HVÍTABÓK • FYLGIBIND 2

# FYRISITING

– ein sjálvstøðug føroysk fyrisiting

*Lýsing av tí fyrisitingarliga samstarvinum við Danmark og teimum krøvum, fullveldisætlanin setur*

2

FØROYSKT FULLVELDI

HVÍTABÓK – FYLGIBIND 2

# FYRISITING

## Ein sjálvstøðug føroysk fyrisiting

*Lýsing av tí fyrisitingarliga samstarvinum við Danmark*
*og teimum krøvum, fullveldisætlanin setur*

Hvítabók – Fylgibind 2 „Fyrisiting“ Ein sjálvstøðug føroysk fyrisiting
© 1999, Føroya Landsstýri
Umbróting og repro: Hestprent
Prent: Estra
Innbinding: Helge Justinussen
Útgevari: Føroya Landsstýri 1999

ISBN 99918-53-33-2

ISBN 99918-53-30-8 øll 3 bindini

# Høvuðsinnihaldsyvirlit

Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

Samandráttur og niðurstøður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

Løgmansskrivstovan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 37
Fíggjarmálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 107
Fiskimálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 135
Vinnumálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 171
Undirvísingar- og mentamálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 211
Almanna- og heilsumálastýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 261

# Inngangur

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum álegði í november 1998 teirri føroysku miðfyrisitingini hesar uppgávur:

1) At lýsa, á hvørjum økjum samstarvað verður við Danmark í dag, og týdningin av hesum samstarvi fíggjarliga, fyrisitingarliga og lógarliga.
2) At lýsa, hvørji mál Danmark umsitur í dag, og hvar tey kunnu verða skipað í einum føroyskum fullveldi.
3) At lýsa krøvini til lóggávu, fyrisiting, fígging og komandi samstarvsavtalur, tá Føroyar skulu umsita alt sjálvar.
4) At gera uppskot til, á hvørjum økjum tørvur verður á samstarvsavtalum við Danmark.
5) At gera málsetingar fyri sjálvstøðuga umsiting á málsøkinum og tíðarætlanir fyri málsetingarnar.

Síðan hava Løgmansskrivstovan og aðalstýrini hvør sær arbeitt við at lýsa hesi viðurskifti.

Úrslitið av arbeiðinum er savnað í hesum áliti. Álitið er ein skrá yvir danskar rættarreglur, sum galda í Føroyum, føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar, og ein skrá yvir tað samstarv, sum annars er millum føroyskar og danskar myndugleikar og stovnar.

Víst verður á, hvar og hvussu fullveldisætlanin ávirkar tey ymisku málsøkini, hvørji øki kunnu koma undir endaligt føroyskt málsræði beinanvegin, og hvørji øki eru so stór, dýr ella torgreidd, at neyðugt verður at samstarva við danskar myndugleikar og stovnar í eini skiftistíð.

Har fyrisitingin hevur hildið seg til tað, eru málsetingar gjørdar fyri sjálvstøðuga umsiting á teimum økjum, har mett verður, at vit kunnu taka við ábyrgdini.

Álitið er fyrst og fremst ætlað fakfólki, umsiting og politikarum sum stuðul í sambandi við fullveldisætlanina – bæði tá farast skal undir samráðingar við stjórnina um eina skiftistíð, og tá kannast skal, hvussu vit í einum fullveldi best laga okkara fyrisiting til okkara fortreytir og tørv.

Hetta er tískil ikki eitt uppskot um, hvussu vit skulu skipa ta føroysku fyrisitingina í fullveldinum, men eitt grundarlag undir tí til-

lagingararbeiði, sum má verða gjørt, skal fullveldisætlanin setast í verk.

Arbeiðið er skipað undir hvør sínum landsstýrismanni; men Løgmansskrivstovan hevur saman við einum umboði fyri hvørt aðalstýri samskipað tað, soleiðis at støði er tikið í einum felags leisti.

Tað hevur kortini ikki verið mett neyðugt at brúka tíð og pengar upp á at tillaga formin í frágreiðingum til hvørja aðra, og talan er tí um seks sjálvstøðugar partar, sum ikki eru heilt eins í formi. Men allir bólkarnir hava hildið seg til og roynt at greitt tær uppgávur, sum landsstýrismaðurin setti teimum.

Fyri at forða fyri misskiljingum í teirri politisku viðgerðini, vilja vit í sambandi við framløguna gera vart við nøkur viðurskifti.

1) Lesarin eigur at hava í huga, at greiningin hevur tikið støði í verandi viðurskiftum. Metingarnar av, hvussu nógv økini fara at kosta, og hvussu nógvum starvsfólki tørvur verður á, tá tey gerast føroysk, taka støðið í, at økini verða yvirtikin sum tey eru skipað nú – t.e. aloftast eftir danskari fyrimynd.

Mint verður á, at tær skipanir, sum galda í Føroyum í dag, í mongum førum byggja á danskar, búskaparligar og fyrisitingarligar fortreytir, sum upprunaliga eru ætlaðar einum donskum tørvi. Tað er greitt, at í einum fullveldi verður neyðugt við umskiping, samanlegging og tillaging av stovnum og arbeiðsgongdum til føroysk viðurskifti – bæði hvat viðvíkir fortreytum og tørvi. Hetta eigur at kunna hava við sær, at umsitingin fer at kosta minni enn tað, sum tølini í hesum frágreiðingum vísa.

2) Nógv av teimum økjum, sum her verða umrødd, eru yvirtikin eftir § 9 í heimastýrislógini. Har er skipanin formelt tann, at føroyingar hava yvirtikið fyrisitingina av økjunum, men at staturin framvegis hevur ein part av teirri fíggjarligu ábyrgdini. Við blokkstuðulskipanini hevur staturin kortini givið heimastýrinum skylduna at rinda tann partin av útreiðslunum, sum staturin hevur ábyrgdina av.

Blokkurin varð upprunaliga roknaður út soleiðis, at upphæddin samsvaraði við tað, sum staturin hevði rindað á t.d. almanna- og heilsuøkinum og undirvísingarøkinum. Stjórnin hevur sambært ríkislóg ikki loyvi at rinda fyri øki, sum eru yvirtikin eftir § 2 í heimastýrislógini, og tí er tað formelt framvegis so, at blokkurin bert fer til § 9-økini.

Men blokkurin verður ikki hildin fyri seg á fíggjarlógini. Reelt er í dag talan um eina generella, árliga hækking av inntøkusíðu landskassans, sum føroyskir myndugleikar ráða yvir. Tí ber illa til at gera eina neyva greining av, hvar hesir pengar verða brúktir.

Tá hesi øki verða umrødd og sagt verður, at føroyskir myndugleikar við blokkinum rinda fyri tey vegna statin, so er altso talan um formlig viðurskifti, sum ikki samsvara við ta veruligu mannagongdina. Tí ber heldur ikki til at siga, at tað verða júst hesi øki, sum t.d. verða rakt av eini minking í blokkstuðlinum.

Vit hava annars mett, at blokkstuðulin sum heild er ein fíggjar- og búskaparpolitiskur spurningur, sum ikki eigur at verða viðgjørdur í sambandi við tey einstøku økini. Hann verður greinaður og viðgjørdur í síni heild í frágreiðingini frá búskaparnevndini.

3) Tá tað í tekstinum verður tosað um at „yvirtaka“ eitt øki, er týdningurin ikki tann, sum vit kenna frá heimastýrisskipanini. Tað merkir her, at økið kemur undir endaligt føroyskt málsræði.

Samskipað arbeiðið millum løgmansskrivstovuna og aðalstýrini hava Barbara á Tjaldrafløtti, cand. scient., adm. formaður, Bergur Berg, cand. scient. pol. skrivari og Sjúrður Skaale, cand. scient. pol. kunningarráðgevi.

Samskipað arbeiðið í teimum ymsu aðalstýrunum hava hesi:

Løgmansskrivstovan, Barbara á Tjaldrafløtti, cand. scient. adm. deildarstjóri
Fíggjarmálastýrið, Jóngerð Purkhús, cand. polit., fulltrúi
Fiskimálastýrið, Heðin Weihe, cand. jur. fulltrúi
Vinnumálastýrið, Bjarni Askham Bjarnason, cand. merc., skrivstovuleiðari
Undirvísingar- og mentamálastýrið, Jeanette Blåsvær, cand. scient. adm. fulltrúi og John Rajani, MBA, fyrrverandi fíggjarfulltrúi og leiðari á Stuðulsstovninum
Almanna- og heilsumálastýrið, Birita Petersen, cand. jur., fulltrúi

# Samandráttur og niðurstøður

## 1. Løgmansskrivstovan

Økini, sum hoyra undir Løgmansskrivstovuna, verða í flestu førum fíggjað og fyrisitin av heimastýrinum. Hóast staturin sambært heimastýrislógini í flestu førum hevur ábyrgdina av økjunum, so er lóggávan eisini lagað nakað til tørvin og viðurskiftini í Føroyum.

Í fyrstu atløgu verður á flestu økjum nóg mikið at lýsa galdandi lóggávu sum føroyska lóggávu.

Kortini eru trý stór øki, sum seta krøv til bæði lóggávu, fyrisiting og – ikki minst – fígging í sambandi við fullveldi. Hesi øki eru løgreglan og ákæruvaldið, uttanríkismál og dómsvaldið.

Av tí at grundlógarnevndin, sum Løgtingið hevur sett, eisini skal viðgera dómsvaldið, ger Løgmansskrivstovan ongar niðurstøður á hesum øki.

### Løgregla og ákæruvald

Tað størsta av felagsmálunum undir Løgmansskrivstovuni er løgregla og ákæruvald.

Ábyrgdin av økinum er donsk burturav, men hvat lóggávu viðvíkir, metir Løgmansskrivstovan kortini ikki, at stórvegis trupulleikar verða av at laga hana til fullveldið. Lógirnar, sum galda í Føroyum, eru lagaðar nakað til føroysk viðurskifti, og í fyrsta umfari ber til at lýsa tær sum føroyskar lógir.

Fyrisitingarliga verða ávís krøv; men hesi nýtast ikki verða so hørð fíggjarliga; heldur er talan um eina fakliga krevjandi uppgávu.

Dagligi raksturin av løgregluni í Føroyum er rættiliga sjálvstøðugur; men hóast føroyska løgreglan tekur sær av øllum dagligum virksemi, so fær hon nógva tekniska og fakliga hjálp úr Danmark – serliga í sambandi við stórar ella óvanligar uppgávur. Skal føroysk løgregla kunna standa fyri hesum í framtíðini, verður tørvur á serútbúnaði og starvsfólki við serligum útbúgvingum. Løgmansskrivstovan mælir heldur til, at avtala verður gjørd við Danmark ella onnur lond um útgerð, eftirútbúgving, kriminaltekniskar tænastur o.a.

Við fullveldinum koma útlendskar umboðsstovur og sendistovur, og almennu vitjanirnar fara helst eisini at økjast. Hetta fer at hava við sær serligar trygdaruppgávur, sum kunnu nerva dagliga raksturin. Mett verður kortini ikki, at hetta fer at krevja fleiri starvsfólk ella at tyngja nakað stórvegis um raksturin.

### Kostnaður

Løgmansskrivstovan metir, at eitt føroyskt fullveldi er ført fyri at átaka sær ábyrgdina av lóggávu og fyrisiting á hesum øki.

Men fíggjarliga er talan um eitt rættiliga tungt øki. 152 fólk starvast hjá løgregluni í Føroyum, og rakstrarútreiðslurnar eru uml. 45 mió. kr. árliga. Men aftur at hesum fær løgreglan, sum nevnt, nógvar tænastur úr Danmark uttan at gjalda afturfyri. Løgmansskrivstovan metir, at virðið á hesum tænastum er í meðal 8,4 mió. kr. til leiðslu og sertænastur, 5 mió. kr. til serligan greiningarkostnað og 1,5-2 mió. kr. afturat til starvsfólk til millumtjóða samstarv.

Sum er rindar løgreglan í Føroyum heldur ikki fyri útbúgving av føroyskum løgreglufólki. Løgmansskrivstovan metir, at virðið liggur um 2,6 mió. kr. árliga.

Um verandi løgregluskipan verður yvirtikin, sum hon er, og heimastýrið skal rinda fult fyri allar tær tænastur, sum danir nú gjalda, verður rakstrarkostnaðurin sostatt um leið 63 mió. kr.

Tað er tí av stórum týdningi, at í avtaluni um skiftistíðina verður staðfest, at føroyska fullveldið ikki skal átaka sær alla ta fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina frá degi til dags, og at nakað av samstarvinum millum løgregluna í Føroyum og Danmark kann halda fram í skiftistíðini.

Løgmansskrivstovan mælir eisini til, at gjøllari útgreiningar verða gjørdar av løgregluni fyri at kanna, um til ber at skipa eina føroyska løgreglu um, so hon verður meira virkisfør og betur lagað til tann føroyska tørvin. Harafturat skal verða kannað, um hon í samstarvi við aðrar føroyskar myndugleikar eisini kann greiða aðrar uppgávur, enn hon ger nú, soleiðis at nýggj servitan kann verða uppbygd í landinum, og ágóðin av hesum kann ganga báðar vegir.

## Varðhaldið

Í varðhaldinum starvast í dag 12 fólk, og tað kostar statinum góðar 4 mió. kr. árliga.

Men føroyingar við longri dómum enn eitt ár – teir eru millum ein og fimm í senn – sita í fangahúsi í Danmark. Skulu langtíðarfangar sita í Føroyum, mugu íløgur verða gjørdar, so hesum fangum verða tryggjaðar hóskandi umstøður.

## Kriminalforsorgin

Kriminalforsorgin í Føroyum er deild av Direktoratet for kriminalforsorgen í Danmark. Uppgávan er at hava eftirlit við fólki, sum verða revsað uttan fyri fangahússkipanina. Hesi eru fólk, ið eru royndarleyslatin, eru dømd at gera samfelagstænastu, eru í rúsdrekkaviðgerð o.a. Harumframt røkir forsorgin sosialar uppgávur í varðhaldinum.

Trý fólk starvast á kriminalforsorgini, og Løgmansskrivstovan mælir til, at virksemið í sambandi við fullveldi í fyrsta umfarið verður yvirtikið, sum tað er. Hetta fer ikki at krevja stórvegis fyrireiking.

Kostnaðurin av rakstrinum verður um leið ein millión kr. um árið.

## Uttanríkistænasta

Øll uttanríkisviðurskifti eru felagsmál, men í royndum virkar heimastýrið fyri ein part sjálvstøðugt á økinum. Vit gera fiskiveiðusáttmálar við onnur lond, og vit eru gjaldandi limir í fimm ymiskum millumtjóða felagsskapum.

Ein uttanríkisdeild við seks fólkum er í Tinganesi, umframt at eitt fólk er í Brússel, trý í Keypmannahavn og eitt í Aberdeen. Í miðfyrisitingini eru harafturat starvsfólk, sum arbeiða við uttanríkisviðurskiftum á sínum øki.

Í donsku uttanríkistænastuni er eitt starvsfólk, sum burturav hevur til uppgávu at taka sær av føroyskum viðurskiftum. Ein føroyingur hevur vanliga sitið í hesum starvi.

Vit standa sostatt ikki heilt á berum á hesum umráði, hóast talan er um felagsmál.

Hóast hetta, kann fullveldisætlanin seta krøv til bæði lóggávu, fyrisiting og fígging. Løgmansskrivstovan mælir tí til, at tveir møguleikar verða umhugsaðir. Annar er, at tað verður ásett í fullveldissáttmálanum, at danska uttanríkistænastan tekur sær av okkara uttanríkismálum á teimum økjum, sum vit ikki hava orku til. Hin er, at vit tryggja okkum danskan stuðul í eini skiftistíð, og nýta hesa tíðina til at byggja upp eina sjálvstøðuga, føroyska tænastu.

Verður seinna loysnin vald, má arbeiðast fram ímóti at seta á stovn sendistovur í Keypmannahavn, Oslo, Reykjavík, London, Washington, New York, (ST), og Brússel, (ES). At stovna sendistovur í fyrrverandi miðveldinum, grannalondunum, teimum týdningarmestu marknaðunum, og har teir stóru, altjóða felagsskapirnir hava miðstøð, er vanligt, tá fullveldi verður stovnsett í smáum londum.

Hetta gerst sjálvsagt ikki frá degi til dags, men Løgmansskrivstovan

metir, at vit eiga at miðja ímóti at fáa sendistovu í Keypmannahavn og í New York sum skjótast. Hesar skulu helst vera mannaðar eitt ár eftir, at fullveldið er lýst.

Síðani skulu eini 3-4 nýggj starvsfólk setast um árið, til allar sendistovurnar eru farnar at virka. Tá uttanríkistænastan er fult útbygd, fara um leið 36 fólk at vera í starvi aftur at teimum, sum longu arbeiða á hesum øki.

Í sáttmálanum um eina skiftistíð verður ásett, at Føroyar hesi árini kunnu nýta ta donsku tænastuna.

### Kostnaður

Av tí at útbygt verður í stigum, verða ikki so nógvar eykaútreiðslur á uttanlandsøkinum tey fyrstu árini.

Men Løgmansskrivstovan metir, at útreiðslurnar til lønir og leigu av hølum og útgerð í øðrum londum, eins og limagjald til fleirtjóða felagsskapir, fer at økja rakstrarútreiðslurnar um leið 47 mió. kr., tá uttanríkistænastan er fult útbygd.

Løgmansskrivstovan vísir kortini á, at til ber at rokna henda pening sum íløgur. Sendistovurnar eiga m.a. at verða nýttar til at stuðla marknaðarføring og søluframtøkum av føroyskum vørum í øðrum londum, og harvið skapa fortreytir fyri størri inntøkum til samfelagið. Vantandi føroyskar umboðsstovur í øðrum londum er ofta ein trupulleiki fyri føroyskar útflutningsfyritøkur.

Harafturat fer eitt føroyskt fullveldi væntandi at fáa inntøkur av altjóða samtarvi. Bæði Norðurlond og stórveldi fara helst at seta á stovn sendistovur í Tórshavn, og hetta fer at styrkja inntøkusíðuna á fíggjarlógini.

## Trygdarmál og verjumál

Trygdarmál, heruppií verju- og hernaðarmál, eru ein týdningarmikil partur av fullveldisfyrisitingini. Løgmansskrivstovan metir, at hóskiligast var at umsita málsøkið trygdarmál í somu fyrisiting, sum umsitur uttanríkismál annars, t.e. í eini føroyskari uttanríkistænastu. Hetta er eisini skipanin í øðrum londum.

Í stuttum kunnu trygdarmálini hjá Føroyum verða býtt í tríggjar høvuðsbólkar: 1) Verja/hevda fullveldið innan fyri ríkismark, 2) Tilbúgving, bjarging og eftirlit, heruppií eftirlit við fiskiveiðu og umhvørvi, og 3) at vera við til at varðveita trygdarstøðuna í Norðurhøvum.

Tá ið ræður um at fremja fullveldishevd og fiskiveiðieftirlit í verki, (punkt 1 og 2 omanfyri), verður víst til frágreiðingina hjá Fiskimálastýrinum, har mett verður, at verður økt um teirra upp-

gávur, fer hetta at vaksa um rakstrarútreiðslurnar við um 10 mió. kr. um árið.

Harumframt verður neyðugt at gera sáttmála um samstarv við eitt vinarsinnað land í Norðuratlantshavi ella at søkja um limaskap í NATO, til tess at tryggja verju landsins, og til tess at geva grannum okkara tryggleika fyri, at innan fyri føroyskt ríkismark er einki virksemi, ið hóttir teirra trygd, (punkt 3 omanfyri).

## Ríkisumboðið

Ríkisumboðið er hægsta umboð ríkisins í Føroyum. Stovnurin tekur sær fyrst og fremst av samskifti og samstarvi millum heimastýrið og statin. Nógvar av uppgávunum falla tískil burtur, ella broytast við fullveldinum.

Men stovnurin røkir eisini nakrar uppgávur, sum føroyskir myndugleikar mugu taka sær av í fullveldinum.

Fyrst og fremst er talan um tey sivilrættarligu málini – hjúnaskilnað, verjumál, rættarstøðu hjá børnum, ættleiðing, umsóknir um fría rættargongd o.a.

At taka við hesum uppgávum setir eingi krøv til nýggja lóggávu, og tað tekur um leið eitt ár at taka við fyrisitingini. Hetta fer at krevja, at til samans fimm fólk verða sett í starv. Kostnaðurin verður uml. 1,5 mió. kr.

## Millumtjóða samstarv

Eitt føroyskt fullveldi má vera limur í um leið 10 millumtjóða felagsskapum aftur at teimum – serliga á fiski- og sjóvinnuøkinum – har Danmark nú er limur okkara vegna.

Hetta kann verða gjørt, so hvørt sum orka er til tað, og tørvur er á tí. Men Landsstýrið má longu frá fyrsta fullveldisdegi hava tryggjað sær limaskap í ST og harvið viðurkenning av tí føroyska fullveldinum frá øðrum londum.

Sum fullveldi er eisini sjálvsagt, at Føroyar verða við í millumtjóða løgreglusamstarvinum INTERPOL og helst eisini í Schengensamstarvinum. Hetta fer helst at krevja 3-4 ársverk afturat í løgregluni.

Hvussu nógv hetta fer at kosa, veldst um, hvussu nógv Føroyar vilja luttaka í arbeiðinum.

# 2. Fíggjarmálastýrið

Sitandi samgonga hevur gjørt av, at vit í sambandi við fullveldi skulu samráðast við danir um, hvussu gjaldoyraviðurskifti Føroya skulu skipast í framtíðini.

Ætlanin er ikki at tað føroyska fullveldið skal hava egið gjaldoyra, men at Føroyar verða knýttar at gjaldoyraskipanini hjá einum øðrum landi – helst Danmark.

Hóast hetta, verða týðandi spurningar at taka støðu til, tá ið londini skulu gera sáttmála. Tað kann t.d. skjótt henda, at stórar broytingar verða á danska økinum, sum fara at krevja eina sjálvstøðuga, føroyska støðutakan. Sum dømi er at nevna, at ger Danmark av at nýta evruna í staðin fyri donsku krónuna, so mugu føroyingar taka støðu til, hvat gjaldoyra vit skulu brúka.

At restin av penga- og kapitalmarknaðarøkinum verður føroyskt málsøki, fer í einum føroyskum fullveldi at seta krøv til bæði lóggávu, umsiting og fíggjarliga ábyrgd.

## Lóggáva um fíggjarstovnar

Gongdin í heimsbúskapinum hevur leingi verið tann, at londini hava roynt at beint burtur allar forðingar fyri altjóða handils- og fíggjarsamskiftinum.

Tí er neyðugt, at londini hava álit á peningakervinum hvør hjá øðrum, og tað verður tryggjað við eini einfaldari og gjøgnumskygdari lóggávu og umsiting.

Tá farið verður at gera føroyska lóggávu á økinum í einum føroyskum fullveldi, er tí avgerandi neyðugt, at hon fylgir lóggávu í øðrum londum. Verður nakar ivi um føroysku reglurnar, verður samstundis ivi um, hvussu tryggir teir føroysku peningastovnarnir eru. Hendir tað, verður trupult hjá teimum, og harvið eisini vinnulívinum og samfelagnum annars, at arbeiða út um landoddarnar við nøkrum, sum hevur við peningsfæ at gera.

Bæði ES-lond og lond, sum hava avtalur við ES, hava lóggávu, sum fylgir ES-fyriskipanum. Fyriskipanirnar verða í hesum londum roknaðar sum minstukrøv, og londini hava skyldu at fylgja teimum. Hetta eiga Føroyar eisini at gera.

Hvat viðvíkir kredittøkinum, kunnu Føroyar eisini tilevna lógirnar við støði í ES-fyriskipanunum. Ein annar møguleiki er tó, at galdandi danska lógin um bankar og sparikassar í Føroyum verður føroyskað og dagførd. Á henda hátt fara Føroyar eisini at fylgja minstu krøvun-

um í ES-fyriskipanunum, og føroyska lógin fer at líkjast bankalógunum í londunum rundan um okkum.

Verður seinna loysnin vald, kundi lóggávan verið gjørd munandi einfaldari, enn hon er nú. – T.d. kundu brotini um „andelskasser“ og annað, sum er Føroyum óviðkomandi, verðið burturúrtikin.

Tað sama er við lógunum um virðisbrævahandil. Lógirnar kunnu gerast einfaldari, enn tær eru, og tó fylgja minstukrøvunum í ES.

Tær flestu lógirnar á hesum øki kunnu verða umgjørdar til føroyskar lógir uttan stórvegis trupulleikar.

Men banka- og sparikassalógin og lógin um virðisbrævahandil saman við øllum kunngerðunum er rúgvismikið tilfar, sum tað fer at krevja bæði tíð og orku at føroyska og einfalda.

Roknast má eisini við, at tað fer at krevja størri umsitingarorku, tá málsøkið verður føroyskt burturav.

## Kunngerðir

Tær flestu donsku kunngerðirnar við heimild í banka- og sparikassalógunum eru í gildi í Føroyum. Hesar kunnu verða lýstar sum føroyskar kunngerðir.

Roknskaparkunngerðin og kunngerðin um kapitaldekningsreglur eru kunngerðir, sum nágreiniliga áseta, hvørjar upplýsingar peningastovnarnir skulu lata Fíggjareftirlitinum. Hesar eru tær størstu og fløktastu av kunngerðunum til banka- og sparikassalógina og harvið tær, sum krevja mestu arbeiðsorkuna at gera og røkja. Fíggjarmálastýrið mælir tí til, at tær vera tær somu sum tær donsku, ið hvussu er ta fyrstu tíðina.

Soleiðis kunnu vit tryggja okkum, at tað føroyska fíggjareftirlitið fær somu upplýsingar sum tað danska, sum vit hava verið partur av.

## Eftirlit við fíggjarstovnum

Seinastu 15-20 árini hava bæði ES-lond og lond, við tilknýti til ES, samtykt ein hóp av lógum við tí í hyggju at styrkja um eftirlitið við fíggjarstovnunum og samstundis gera felags reglur fyri hesar stovnar. Hetta fyri at styrkja bankaskipanina og at skapa ein so tryggan fíggjarmarknað tvørtur um landamørk, sum gjørligt.

Hjá okkum er hetta lógarøkið danskt, og donsku lógirnar eru settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Fyrisitingarligir myndugleikar eru danski búskaparmálaráðharrin, danska fíggjareftirlitið, Skráseting Føroya og Føroya landsstýri.

Í einum føroyskum fullveldi skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum

taka við teirri ábyrgd og tí myndugleika, sum danski búskaparmálaráðharrin nú hevur sum ovasti fyrisitingarligi myndugleiki á økinum.

Tann týdningarmesti stovnurin, tá um eftirlit ræður, er Fíggjareftirlitið. Hann hevur umsjón við, at ásetingarnar í lógum og kunngerðum verða hildnar.

Í einum føroyskum fullveldi skal eitt føroyskt fíggjareftirlit hava tær uppgávur, sum danski stovnurin higartil hevur røkt í Føroyum.

Føroyska fíggjareftirlitið eigur, umframt av hava eftirlit við bankum og sparikassum, at hava eftirlit við tryggingarfeløgunum og øðrum fíggjarligum stovnum og grunnum. Danska fíggjareftirlitið hevur t.d. havt eftirlit við Framtaksgrunninum og Fíggingargrunninum.

Eftirlitið við gjaldskortum kundi eisini ligið hjá føroyska fíggjareftirlitinum.

Umframt sjálva eftirlitsuppgávuna hevur danska fíggjareftirlitið frá búskaparmálaráðharranum fingið til uppgávu at gera ein part av teimum neyðugu kunngerðunum á økinum. Fíggjarmálastýrið skjýtur upp at gera tað sama í Føroyum, tí eisini í føroyska fíggjareftirlitinum verður tann neyðugi yrkisførleikin.

Kortini verður mælt til, at føroyska fíggjareftirlitið ger samstarvsavtalu við danska fíggjareftirlitið ta fyrstu tíðina. Hetta kann vera praktiskt, bæði tí danska fíggjareftirlitið hevur havt eftirlit við okkara peningastovnum higartil, og tí føroyska lóggávan fer at líkjast mest tí donsku – ið hvussu er ta fyrstu tíðina.

Fíggjarmálastýrið metir, at tað fer at taka eitt til hálvt annað ár, til eitt føroyskt fíggjareftirlit kann virka sjálvstøðugt.

### Kostnaður

Í høvuðsdráttum rinda peningastovnarnir fyri fíggjareftirlitið. Í banka- og sparikassalógini er ásett, at peningastovnarnir skulu rinda fyri tað eftirlit, sum staturin ger. Gjaldið hjá tí einstaka peningastovninum verður ásett eftir skuld og ábyrgd.

Tað eftirlit, sum Fíggjareftirlitið eftir virðisbrævahandilslógini hevur við øðrum virkjum, verður goldið av hesum virkjum, og gjaldið verður ásett eftir tí orku, sum brúkt verður til eftirlitið.

Tó er at vænta, at eitt føroyskt fíggjareftirlit kemur at kosta tí almenna nakað. Sum er, gjalda føroysku peningastovnarnir smáar upphæddir fyri fíggjareftirlit, av tí at teir eru so smáir afturímóti donsku peningastovnunum. Hesar upphæddir eru ikki nóg mikið til at fíggja eitt sjálvstøðugt, føroyskt eftirlit.

So leingi støða ikki er tikin til, hvussu føroyska fíggjareftirlitið verður skipað, og hvørjar uppgávur tað skal hava, ber illa til at meta um kostnaðin. Men sjálvt um hildið verður fast við, at stovnarnir skulu fíggja sum mest av eftirlitinum, má roknast við, at tað fer at kosta

um leið 3 milliónir krónur. Her er íroknað tann hálva milliónin, sum tryggingareftirlitið fær á fíggjarlógini.

## Lógin um innsetaratrygdargrunnin

Lógin um innsetaratrygdargrunnin er galdandi fyri alt ríkið og fevnir um allar peningastovnar í bæði stati og heimastýri. Lógin virkar sum ein tryggingargrunnur, sum allir peningastovnarnir gjalda til, og sum rindar privatum innsetarum upp til 300.000 kr. hvør, um ein stovnur fer á húsagang.

Tá ið Føroyar ikki longur eru partur av danska ríkinum, fer lógin um innsetaratrygdargrunnin sjálvsagt úr gildi her. At gera føroyskan grunn eftir sama mynstri ber ikki til, tí vit hava bert fýra peningastovnar. Tí mælir Fíggjarmálastýrið til, at Landsstýrið í samráðingum við stjórnina fær í lag eitt samstarv, sum tryggjar, at teir føroysku peningastovnarnir framhaldandi kunnu vera við í skipanini, við somu rættindum og skyldum sum teir donsku.

Útreiðslurnar til innsetaratrygdargrunnin gjalda peningastovnarnir og ikki tað almenna. Tí fer hetta ikki at kosta landskassanum nakað.

## Fleirtjóða samstarv

Tað eru nógvir fleirtjóða valuta- og fíggjarfelagsskapir, sum Føroyar sum fullveldi kunnu vera við í. Teir størstu eru IMF, Heimsbankin og „Baselnevndin."

Í ES er eisini nógv bæði formligt og óformligt samstarv – til dømis tann ráðgevandi bankanevndin hjá ES, fíggjareftirlitsnevndin hjá ECB, (evropeiska sentralbankaskipanin í ES), og tann óformligi kontaktbólkurin, har EBS londini eru eygleiðarar.

Hjá Føroyum er kortini ikki neyðugt at vera við í tílíkum samstarvi, og Fíggjarmálastýrið vil, sum er, ikki mæla til limaskap nakrastaðni, fyrr enn greitt er, hvønn tørv Føroyar fara at hava.

Hvør tørvurin verður, veldst um, hvussu valutaviðurskiftini hjá okkum verða skipað, og hvørji lond vit fara at gera samstarvsavtalur við. Hesi viðurskifti mugu vera greið, áðrenn støða verður tikin til, hvussu nógva orku vit skulu nýta til fleirtjóða samstarv á hesum øki.

# 3. Fiskimálastýrið

Á teimum lógarøkjum, sum Fiskimálastýrið fyrisitur, er nógv tann størsti parturin av ábyrgdini undir heimastýrinum, bæði hvat viðvíkir fígging, lóggávu og fyrisiting.

Nøkur øki eru kortini, har lóggávan antin er donsk burturav, har føroysk og donsk lóggáva eru samantvinnaðar, og har fíggingin eisini er donsk ella partvíst donsk. Tílík viðurskifti finna vit bæði á fiskivinnuøkinum, sjóvinnuøkinum og skrásetingarøkinum.

Her verður tískil nakað av lóggávuarbeiði at gera, eins og tørvur verður á, at vit tryggja okkum samstarv við danskar myndugleikar á nøkrum økjum eina tíð fram.

## Fiskivinnumál

Á fiskivinnuøkinum eru lóggávan um „Danmarks Riges Fiskeriterritorium“ og kunngerðin um „Fiskeriterritoriet ved Færøerne“ formelt týdningarmikil donsk øki, har ábyrgdin skal verða flutt til eitt føroyskt fullveldi.

Hetta er kortini ikki nøkur stór uppgáva – tað er nóg mikið, at galdandi lógir á økinum verða lýstar sum føroyskar lógir.

Uppgávuna at útinna eftirlit og bjarging á sjónum røkja Fiskiveiðueftirlitið og Færøernes Kommando í felag. Við fullveldinum verður hetta føroyskt starv burturav. Fiskiveiðueftirlitið skal tá bæði standa fyri eftirliti og bjarging, og røkja uppgávuna at verja sjómarkið. – T.e. at hevda fullveldið.

Her verður tørvur á íløgum í eitt minni bjargingarskip og eina tyrlu aftur at teirri verandi, soleiðis at ein tyrla altíð er tøk til fiskiveiðueftirlit, bjarging og sjúkraflutning. Tyrlan kann eisini verða brúkt til ferða- og farmaflutning til og frá útoyggjum og útplássum.

Eykakostnaðurin av hesum verður um leið 10 mió. kr. árliga, men sum skilst, er talan um fleiri stýri, ið koma at gera íløgurnar og bera rakstrarkostnaðin.

## Sjóvinnumál

Lóggávan um sjóvinnumál er lutvíst donsk og lutvíst yvirtikin sum føroyskt sermál.

Lóggávan í sambandi við skipaeftirlit (t.e. lógin um skipatryggleika) og avmerking av siglingarleiðum verður fyrisitin av donskum myndugleikum meðan lóggávan í sambandi við manningarviðurskifti og sjóvinnuútbúgvingar verður fyrisitin av føroyskum myndugleikum. Tá

tað snýr seg um lóggávuarbeiði í altjóða nevndum og ráðum, verður hetta gjørt í samstarvi við danskar myndugleikar. Talan er um eitt sera tekniskt og fakliga krevjandi øki, og verður tí neyðugt við samstarvi við danskar myndugleikar í eitt áramál framyvir, inntil føroysku myndugleikarnir hava fullgóðan førleika á økinum.

Tær mest týðandi ríkislógirnar á økjunum eru helst sjólógin og lógin um skipatrygd.

Sjólógin snýr seg um framferð á sjónum á nógvum økjum. Hon ásetir, hvørja skyldu skiparin hevur at tryggja manningar og ognir, hon ásetir reglur um flutning av fólki og góðsi, um framferð í sambandi við samanstoyt, bjarging á sjónum, oljudálking o.tíl.

Lítil fyrisiting er av lógini. Hon verður mest brúkt, tá ymsar hendingar á sjónum koma fyri rættin, og staðfestast skal, um nakað ólógligt er farið fram, ella um nøkur privatrættarlig ábyrgd kann staðfestast.

Stýrið metir tí ikki, at fullveldi á hesum øki fer at fáa aðrar fíggjarligar skyldur enn tær, ið knýttar eru at lógarsmíði í Føroyum og í norðurlendskum og altjóða høpi.

Hvat Skipaeftirlitinum viðvíkir, rinda danskir myndugleikar allar rakstrarútreiðslur, sum er.

Ein arbeiðsbólkur viðgjørdi í 1988 spurningin um at yvirtaka skipaeftirlitið, og hann metti, at yvirtøkan fór at kosta um leið 9 mió. kr. Tó skal verða gjørt vart við, at tá var ikki talan um at áseta brúkaragjald ella at leggja ávísar uppgávur út til privata vinnu. Tí metir stýrið, at tær almennu útreiðslurnar av einum føroyskum skipaeftirliti kunnu verða minni enn 9 mió. kr.

Tað eigur at verða nevnt í sambandi við skipaeftirlitið, at lógarøkið er ógvuliga tekniskt og sera umfatandi. Neyðugt verður eisini at vera við í altjóða nevndum og lógarsmíði. Tí metir Fiskimálastýrið, at neyðugt verður við einum ávísum samstarvi við Danmark á hesum øki í eina tíð, eftir at økið er vorðið føroyskt.

Ein arbeiðsbólkur varð settur fyrr í ár at fyrireika yvirtøku av skipaeftirlitinum og at kanna tær fíggjarligu avleiðingarnar. Álitið hjá hesum bólki fer at vísa, hvørji krøv verða á hesum øki, og hvat eitt føroyskt skipaeftirlit fer at kosta. Tá verður eisini greitt, hvørji føroysku ynskini skulu verða í hesum sambandi, tá samráðast skal við danir um skiftistíðina.

Mælt verður til, at skipaeftirlit, sigling og onnur lóggáva um sjóvinnu verða skipað undir Fiskimálastýrinum í fullveldinum.

Eitt annað danskt mál er neyð- og trygdarskipanin á radioøkinum. Tele Danmark A/S hevur ábyrgdina av hesum, og Føroya Tele rekur støðina Tórshavn radio vegna Tele Danmark. Fiskimálastýrið mælir til, at økið verður skipað undir Føroya Tele.

## Skrásetingarmál

Hóast skipaskrásetingin er einasta skrásetingarmál, sum er føroyskt sermál, fyrisitur Skráseting Føroya øll skrásetingarmál undir Fiskimálastýrinum.

Skráseting av parta- og smápartafeløgum, vinnurekandi grunnum o.ø. er felagsmál, og lóggávan donsk. Økið verður tó fyrisitið í Føroyum, og verður lutvíst fíggjað við nýtslugjøldum, (skrásetingargjøldum), og lutvíst yvir fíggjarlógina. Tí er hetta ikki eitt øki, sum verður tungt at yvirtaka.

Tá ið ræður um fyrisiting av skrásetingarmálum er tó at nevna, at um kært verður yvir avgerðir hjá Skráseting Føroya í sambandi við parta- og smápartafelagslógina og lógina um vinnurekandi grunnar, er Erhvervsministeriets Erhvervsankenævn kærumyndugleiki. Skal hetta eisini verða fyrisitið í Føroyum, verður mælt til, at kærumyndugleikin framyvir verður Føroya kærustovnur. Kærur av hesum slag koma sera sjáldan fyri, so neyðugt verður ikki at skipa eina serliga fyrisiting bert til kærumál.

Í verandi skipan skal Erhvervs- og Selskabsstyrelsen góðkenna, at ein grunnur hoyrir undir lógina og sostatt kann verða skrásettur í Føroyum. Erhvervs- og Selskabsstyrelsen er grunsmyndugleiki, og Løgmálaráðið skal góðkenna broytingar í viðtøkununum hjá vinnurekandi grunnum.

Fiskimálastýrið metir, at Skráseting Føroya kann átaka sær tær uppgávur, sum Erhvervs- og Selskabsstyrelsen nú hevur. Møguliga kann lógardeildin á Løgmansskrivstovuni góðkenna viðtøkubroytingarnar.

## Millumtjóða samstarv

Sambært § 8 í heimastýrislógini og sambært siðvenju hevur heimastýrið í ávísum førum heimild at tingast við og gera avtalur við onnur lond um fiskivinnuavtalur. Vanligt hevur verið, at umboð fyri donsku uttanríkistænastuna hava verið við – men tey hava fyri mesta partin verið eygleiðarar.

Føroyskir myndugleikar hava tískil longu drúgvar royndir at samráðast um og umsita tílíkar sáttmálar, hóast vit ikki fyrr enn við fullveldinum fáa formligu heimildirnar á økinum.

Tá ið talan er um at vera við í fleirtjóða samstarvi, so hava vit eisini royndir við tí, hóast vit ikki hava kunnað verið við sum sjálvstøðugt land.

Danmark er limur í bæði NAFO, (Northwest Atlantic Fisheries Organisation), og NEAFC, (Northeast Atlantic Fisheries Commissi-

on), vegna Føroyar og Grønland, men føroyingar og grønlendingar hava í felag myndað ta donsku sendinevndina. Fiskimálastýrið mælir til, at Føroyar sum fullveldi gerast limur í báðum felagsskapum.

Hvat viðvíkir sáttmálanum um at varðveita laksin í Norðuratlantshavi, NASCO, er støðan tann sama.

Vit hava í hesum felagsskapum arbeitt sjálvstøðugt, og Fiskimálastýrið mælir tí til, at Føroyar sum fullveldi fáa sjálvstøðugan limaskap. Tað fer ikki at krevja umsitingarliga ella fíggjarliga meirorku.

Viðvíkjandi hvalaveiðu eru tveir fleirtjóða felagsskapir: IWC, (International Whaling Commission), og NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commision). Í tí fyrra umboðar Danmark alt ríkið, og hetta kann vera óheppið fyri føroyingar, tí Danmark ikki altíð hevur somu støðu sum vit á økinum. Í tí seinna eru Føroyar sjálvstøðugir limir.

Fiskimálastýrið mælir til, at vit sum fullveldi vera við í NAMMCO, men spurningurin um limaskap í IWC má takast upp alt eftir tørvi.

Hvat limagjaldi viðvíkir, fer fullveldi ikki at hava við sær stórvegis meirkostnað. Føroyar rindað longu limagjaldið Danmarkar vegna í bæði ICES, NEAFC, NAFO, NAMMCO og NASCO. Hetta kostar um leið eina millión til samans árliga.

Danmark rindar kortini limagjaldið í IWC, so í hesum føri verður møguliga ein lítil øking í útreiðslunum.

Av teimum uttanríkismálum, ið knýta seg til sjóvinnu, er tað serliga arbeiðið í havfelagsskapinum undir ST, IMO, (International Maritime Organisation), sum hevur stóran týdning fyri føroyska sjóvinnu.

Í hesum felagsskapi arbeiða fleiri tekniskar nevndir, sum eru mannaðar við fólki frá teimum ymsu sjóvinnumyndugleikunum og serfrøðingum á teimum ymsu økjunum. Krøvini verða ásett í altjóða sáttmálum, sum Danmark hevur samtykt at seta í gildi fyri Føroyar eftir tilmæli frá heimastýrinum.

Eins og fleiri onnur aðalstýri, mælir Fiskimálastýrið til, at vit sum fullveldi gerast limir í IMO.

# 4. Vinnumálastýrið

Vinnumál eru fyri mesta partin yvirtikin av heimastýrinum, bæði hvat viðvíkir fígging, lóggávu og umsiting. Økini, sum framvegis eru felagsmál, eru mest smáøki, har føroyskir myndugleikar uttan stórvegis trupulleikar eiga at kunna átaka sær uppgávurnar.

Tó er eitt stórt øki – flogferðslan – sum framvegis er danskt burturav.

## Flogferðslan

Flogferðsla er størsta felagsmál undir Vinnumálastýrinum, og heimastýrið hevur onga formliga ábyrgd á økinum.

Kortini verður ikki talan um nakað stórt lóggávuarbeiði, tá ábyrgdin skal verða flutt til eitt føroyskt fullveldi, tí hóast loftferðslulógin er donsk, er galdandi lóg lagað til føroysk viðurskifti. Harumframt verður flogferðsla skipað eftir teimum treytum, sum settar verða av ICAO, (loftferðslustovnur undir ST), altjóða sáttmálum og ES-reglum. Lógirnar verða ofta orðaðar eftir boðum frá altjóða ella fleirtjóða felagsskapum.

Galdandi lógir kunnu tí í flestu førum verða lýstar sum føroyskar lógir.

Vinnumálastýrið mælir kortini til, at avtala verður gjørd við Ferðslumálaráðið um vegleiðing í sambandi við lóggávuarbeiðið á økinum.

Umframt tað, verður neyðugt at taka hesi stig:

Sum fullveldi eiga Føroyar at taka undir við ávísum altjóða sáttmálum á flogferðsluøkinum og gerast limir í ICAO. Við hesum átaka Føroyar sær ta rættarligu ábyrgd, sum nú liggur í Danmark.

Tá ið talan er um skráseting av føroyskum flogførum og tyrlum, mælir Vinnumálastýrið til, at Skráseting Føroya tekur sær av tí. Sum er, eru flogfarið hjá Atlantsflogi og tyrlan hjá landsstýrinum skrásett í National Register hjá Statens Luftfartsvæsen, (SLV). Vinnumálastýrið mælir til, at tey í staðin verða skrásett í Skráseting Føroya og fáa føroyskt tjóðarfrámerki.

Neyðugt verður at gera samstarvsavtalu við Skaðanevndina, (Havarikommissionen for civil luftfart), soleiðis at hon eisini kannar tilburðir, um eitt føroyskt skrásett flogfar skuldi verið fyri óhappi. Verður goldið eftir íbúgvatali í londunum, kostar tænastan 41.000 kr. um árið.

Í løtuni rekur SLV flogvøllin í Vágum, og skal raksturin á føroyskar hendur, fer tað at hava útreiðslur við sær. Fíggjarætlanin hjá SLV í 1998 vísir 8,9 mió. kr. í halli, sum minkar til 5,9 mió. kr. í ár 2002. Hetta er eftir rentur og avskrivingar, og íløgur upp á 2,2 mió. kr. eru viðtaldar. Roknað verður við einum lítlum vøkstri í ferðafólkatalinum.

Vinnumálastýrið vísir á, at SLV farnu árini hevur avhendað raksturin av teimum flestu av flogvøllunum, sum stovnurin hevur havt ábyrgdina av. Í samsvari við hesa gongd hava danskir myndugleikar víst á møguleikan fyri, at føroyingar yvirtaka raksturin av flogvøllinum í Vágum. Ávísar kanningar hava verið gjørdar í hesum sambandi.

Hvat viðvíkir rakstrinum av flogtrygdartænastuni, mælir Vinnu-

málastýrið til, at hann í fyrsta umfari verður latin íslendskum myndugleikum at umsita. Íslendingar umsita longu tað føroyska loftrúmið Danmarkar vegna. Hetta fer ikki at kosta landskassanum nakað, tí raksturin hvílir í sær sjálvum.

Sum er, rindar Vága Floghavn SLV fyri ávísar tænastur á flogvøllinum. Tá loftferðslan verður føroyskt málsøki, kann verða avtalað við SLV um, at hetta samstarv heldur fram. Tað fer ikki at hava meirkostnað við sær.

Mælt verður til, at flogferðsluøkið verður skipað undir samskiftisdeildina í Vinnumálastýrinum. Flogferðslan verður longu sum er partvíst umsitin av deildini.

Vinnumálstýrið metir ikki, at hetta fer at krevja stórvegis eyka umsiting, men møguliga verður tøvur á einum hálvum ársverki afturat.

## Skipan av smærri donskum økjum

Danskar lógir hava gildi fyri Føroyar á fleiri smærri økjum undir Vinnumálastýrinum, men fyri mesta partin metir stýrið ikki, at stórvegis trupulleikar verða av at skipa økini eftir føroyskum lógum í einum fullveldi. Talan verður mest um at lýsa galdandi lógir sum føroyskar.

Nøkur av økjunum fara kortini at hava útreiðslur við sær. Teirra millum eru hesi:

**Kortlegging.** Kort og Matrikelstyrelsen tekur sær av uppmátingum og kortútgávu fyri alt ríkið. Vinnumálastýrið mælir til, at Matrikkulstovan fær ábyrgdina av hesum. Sambært Matrikkulstovuni fer hetta at krevja, at trý starvsfólk verða sett, og at íløgur fyri 1,75 mió. kr. verða gjørdar. Við lóggávu eru eingir trupulleikar.

**Løggildan (akkreditering).** Løggildan merkir at góðkenna og hava eftirlit við ymsari tekniskari útgerð hjá kanningarstovnum og fyritøkum, eins og eftirlit við einstaklingum, vørum og skipanum í hesum sambandi. Ein løggildisstovnur er ein stovnur, sum hevur fulltrú frá myndugleikunum at kanna og góðkenna hesi viðurskifti. Í Danmark eitur stovnurin DANAK, í Svøríki SWEDAK.

Løggildanin í Føroyum verður gjørd við heimild í danskari vinnuframalóg, sum fer úr gildi, tá ið fullveldið verður lýst. Vinnumálastýrið mælir til at gera samstarvsavtalu við annað land, soleiðis at útlendskur stovnur fær heimild at góðkenna mátiútgerð o.a. í Føroyum.

Væntandi fer eitt tílíkt samstarv at kosta 120.000 kr. árliga. Í løtuni rinda vit 70.000 kr.

**Vinnuframi.** Danska lógin um vinnuframa varð sett í gildi fyri Føroyar í 1995. Umframt akkreditering, sum nevnt frammanfyri, so virkar TK-stovan sambært hesi lóg. TK-stovan veitir vinnulívinum ókeypis ráðgeving. Tann danska lógin fer úr gildi við fullveldinum, so um hetta virksemi skal halda áfram, krevst nýggj føroysk lóggáva á økinum. TK-stovan kostar uml. 1,8 mió. kr. at reka. Sum er rindar staturin 2/3 og landsstýrið 1/3 av kostnaðinum.

**Verja av havumhvørvinum.** Hetta er danskt málsøki, men ríkislógartilmæli er samtykt, sum flytir allar hesar uppgávur innan fyri føroyska fiskimarkið til heimastýrið. Tí verður henda fyrisitingin undir øllum umstøðum føroysk, og neyðugt verður við meirjáttan til Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Vaktar- og bjargingartænastuna, sama um fullveldisætlanin verður framd ella ei. Tað ber ikki til at siga, hvussu nógv hetta fer at kosta.

Vinnumálastýrið mælir til, at landsstýrismaðurin í umhvørvismálum býtir uppgávurnar av verjuni millum tey avvarandi stýrini.

**Tilbúgving.** Arbeitt verður í løtuni við at gera føroyska tilbúgvingarætlan við lógum, sum taka støði í føroyskum fortreytum. Tí verður danska sivilforsvarslógin, sum nú er í gildi, helst avtikin undir øllum umstøðum. Í sambandi við broytingina verður neyðugt, at fólk verða skúlað í øðrum londum, og at avtala verður gjørd við eitt grannaland um hjálp, um ein heilt stór vanlukka skuldi hent.

Tilbúgvingarøkið er so mikið umfatandi, at stórur partur av tí fevnir um økir, ið Vinnumálastýrið ikki umsitur – m.a. sjúkrahúsverkið, løgregluna, Vaktar- og bjargingartænastuna og ymsar privatar felagsskapir. Avvarandi aðalstýri hava sjálvi ábyrgdina av, at stovnar undir stýrunum eru fyrireikaðir, um ein tilbúgvingarstøða skuldi tikið seg upp. Tó eigur eitt einstakt aðalstýri – t.d. Vinnumálastýrið – at hava ábyrgdina av, at teir ymsu partarnir í eini framtíðar tilbúgvingarskipan verða samskipaðir. Vinnumálastýrið heldur eisini, at Brunaumsjón landsins skal hava eftirlit við, at lógirnar um bruna- og bjargingarmál á landi verða hildnar. Hetta fer møguliga at krevja, at stovnurin verður útbygdur.

Annars metir Vinnumálastýrið ikki, at tað fer at kosta nakað meira, at økið verður føroyskt, uttan so at tað verður raðfest hægri í framtíðini.

**Umsiting av einkarætti og mynsturlóggávuni.** Í Danmark verður

hetta umsitið av Patentdirektoratet o.ø. Í Føroyum kundi Skráseting Føroya sitið fyri økinum, men neyvan er grundarlag hjá okkum undir einum patentstovni. Tí verður helst eisini neyðugt at gera samstarvsavtalu við onnur lond um eitt nú patentrættin.

Radiosamskifti. Mælt verður til, at radiosamskiftið – serstakliga altjóða samstarv og frekvensfyrisiting – verður lagt saman við Fjarskiftiseftirlitinum, ið er stovnur undir Vinnumálastýrinum. Tørvur verður í hesum sambandi á einum starvsfólki við góðum førleika.

## Føroyskar lógir, sum vísa til danskar myndugleikar

Summar rættarreglur á vinnuøkinum vísa til danskar myndugleikar. Í flestu førum er orsøkin, at føroyskir myndugleikar ikki hava orku til at umsita umfatandi yvirlit yvir tekniskar standardir o.tíl.

Tær donsku reglurnar, sum víst verður til, samsvara í flestu førum við altjóða krøv – serliga ES-krøv. Reglurnar snúgva seg m.a. um fjarskifti, sløkkilið, ravmagn og tekniskar innleggingar.

Í einum fullveldi verður sjálvsagt framvegis neyðugt at vísa til tekniskar standardir hjá øðrum londum. Vinnumálastýrið metir ikki, at fullveldisætlanin fer at hava við sær trupulleikar ella meirútreiðslur á hesum øki.

## Samstarv við danskar stovnar og myndugleikar

Nógvir stovnar undir Vinnumálastýrinum hava bæði formligt og óformligt samstarv við stovnar og myndugleikar í Danmark og í øðrum Norðurlondum. Tað er hugsandi, at tá Føroyar gerast fullveldi, fara summir av hesum donsku stovnum at krevja gjald fyri samstarv, sum nú er ókeypis.

Samstarvið snýr seg m.a. um ráðgeving, útbúgving, fleirtjóða umboðan og ymiskt dagligt samskifti í sambandi við stovnsraksturin.

Millum stovnarnar, hvørs dagliga samstarv við danskar stovnar verður mett at hava stóran týdning, eru Heilsufrøðiliga starvsstovan, Landsdjóralæknin, Arbeiðseftirlitið og Bileftirlitið.

Hesir og aðrir stovnar undir Vinnumálastýrinum fáa nógva fakliga hjálp gjøgnum tað formliga og óformliga samstarvið við danskar stovnar og myndugleikar. Tað er trupult at meta um virðið á hesum samstarvi.

Føroyskir stovnar samstarva kortini ikki bara við danskar stovnar. Nógv samskifti er eisini umvegis tað norðurlendska samstarvið – men

tað er umráðandi, at samstarvið við Danmark kann halda áfram. Vinnumálastýrið mælir tí til, at hetta verður tryggjað í einum protokollati millum londini, tá samráðingarnar verða um skiftistíðina.

## Fleirtjóða samstarv

Við fullveldinum fara úr gildi teir fleirtjóða sáttmálar, sum galda á vinnuøkinum í Føroyum.

Vinnumálastýrið heldur vera neyðugt, at teir sáttmálar, sum niðanfyri eru nevndir, fáa gildi fyri Føroyar beinanvegin.

**WTO-sáttmálin.** Hann kom fyri GATT-sáttmálan í 1995 og fevnir um vøru- og tænastuhandil millum lond. Hvat viðvíkir kostnaðinum av at vera við sum sjálvstøðugt land, vísir Vinnumálastýrið til metingarnar hjá Løgmansskrivstovuni um, hvat luttøka í neyðugum, altjóða samstarvi fer at kosta.

**ITU-sáttmálin.** Hann leggur karmarnar fyri alheims fjarskiftisfelagsskapin við sama navni. Tað er umráðandi at vera við her, so at vit kunnu vera við í menningin á hesum øki. Limagjaldið er 150.000 kr. um árið.

**IMO-sáttmálin.** Hann er viðkomandi fyri nógv øki. Hjá Vinnumálastýrinum er neyðugt at vera við í hesum sáttmála, av tí at felagsskapurin tekur sær av neyð- og trygdartænastu á havinum. Sum er, veitir Føroya Tele hesa tænastu, men Tele Danmark rindar fyri hana. Prísurin er í løtuni 6 mió. kr. árliga, men fer væntandi at minka.

Sum nevnt, verður harafturat neyðugt, at Føroyar gerast limir í altjóða loftferðslustovninum ICAO. Limagjaldið her verður ásett eftir íbúgvatali, og vit skulu rinda um leið 11.000 kr. árliga. Umsitingin av limaskapinum verður dýrari, og fer helst at kosta einar 200.000 kr. árliga.

# 5. Undirvísingar- og mentamálastýrið

Tað mesta av málsøkinum undirvísing og mentan er heilt ella partvíst yvirtikið av heimastýrinum, og stýrið metir tí ikki, at fullveldisætlanin fer at hava við sær stórvegis trupulleikar av lóggávu og fyrisiting á økinum.

Hinvegin er at kalla øll læra og útbúgving í Føroyum tætt knýtt at donskum myndugleikum og stovnum, eins og føroyingar kunnu útbúgva seg ókeypis í Danmark. Hetta hevur stóran týdning, bæði fak-

liga og fíggjarliga, og tað er týdningarmikið, at hetta samstarv og hesi rættindi verða varðveitt í eini skiftistíð.

## Kirkjan

Kirkjan er einasta øki, sum staturin bæði fíggjar og umsitur í dag, og sum natúrligt er at skipa undir Undirvísingar- og mentamálastýrið.

Lóggávuarbeiðið verður kortini neyvan tað nógva í hesum sambandi, tí lógarkarmurin um eina føroyska kirkju verður longu fyrireikaður. Hóast ríkislógartilmæli um nýggjar kirkjulógir vórðu samtykt í Løgtinginum í 1998, so hevur landsstýrismaðurin í kirkjumálum eisini sett arbeiðsbólk at fyrireika yvirtøkuna av kirkjuni og at gera uppskot til føroyska kirkjulóggávu.

Tískil er sannlíkt, at tær nýggju kirkjulógirnar verða avloystar av eini føroyskari kirkjulóggávu undir øllum umstøðum – sama um fullveldisætlanin verður sett í verk ella ikki.

Verandi fólkakirkja kostar sambært tølunum frá ríkisumboðsmanninum uml. 12,6 mió. kr., men torført er at meta um, hvat kirkjan fer at kosta, tá hon verður føroysk. Kostnaðurin veldst um, hvussu lóggávan verður orðað, og hvussu fyrisitingin, sum danska kirkjumálaráðið nú stendur fyri, verður skipað, tá hon verður sett á stovn í Føroyum.

## Skúlar, sum virka eftir donskum rammulógum

Fólkaskúlin, frítíðarundirvísingin, handilsskúlarnir, teknisku skúlarnir, Maskinmeistaraskúlin og Læraraskúlin eru yvirtikin sambært § 9 í heimastýrislógini. T.e., at heimastýrið hevur fingið ta fyrisitingarligu ábyrgdina og heimild at seta í verk løgtingslógir á økinum við heimild í donskum rammulógum.

Síðan yvirtøkurnar hevur Føroya løgting vanliga nýtt heimildirnar at seta í gildi løgtingslógir innan fyri karmarnar á donsku rammulógunum. Tískil hevur føroyska fyrisitingin fingið tær neyðugu royndirnar á økinum. Hvat lóggávu og fyrisiting viðvíkir, metir Undirvísingar- og mentamálastýrið tí ikki, at trupult verður at laga hetta økið til fullveldisætlanirnar.

Rammulógirnar fara sjálvsagt úr gildi við fullveldinum, men tær løgtingslógir, sum hava heimild í rammulógunum, kunnu framvegis vera í gildi. Tørvur verður ikki á øðrum enn at lýsa lógirnar av nýggjum sum føroyskar lógir.

## Hægri lestur og útbúgvingar í Danmark og øðrum norðurlondunum

Sum danskir ríkisborgarar hava føroyingar ókeypis atgongd til danskar og norðurlendskar útbúgvingarstovnar, og somuleiðis rætt til danskan útbúgvingarstuðul.

Neyðugt verður politiskt at samráðast um eina avtalu, sum tryggjar hesi rættindi so væl sum gjørligt framyvir.

At fáa hesa avtalu er kanska tann størsta avbjóðingin, tá ið ræður um undirvísing og mentan í sambandi við fullveldi. Metingar út frá hagtølum hjá Stuðulsstovninum vísa, at útreiðslurnar, sum Statens Uddannelsesstøtte árliga hevur av teimum uml. 1.500 lesandi føroyingunum, eru uml. 63 mió. kr.

Sjálv útbúgvingin kostar eisini. Í 1996 gjørdu Norðurlond sínámillum avtalu um javnbjóðis atgongd til hægri lestur. Avtalan ber við sær, at Danmark, Finland, Svøríki og Noreg árliga rinda 22.000 kr. fyri hvønn av teirra lesandi í hinum londunum, og hon gevur íslendingum rætt at lesa ókeypis í hesum londum. Henda avtala fer úr gildi 31. desember 1999, og væntandi verður gjørd nýggj avtala við broytingum.

Uppgávurnar og upphæddirnar eru tískil so stórar, at tørvur er á eini lagaligari tillagingartíð, har viðurskiftini verða løgd í eina trygga og nøktandi legu. Møguliga ber til at tryggja hetta við eini avtalu um, at føroyingar og danir í skiftistíðini hava full rættindi hvør hjá øðrum.

## Samstarv við danskar myndugleikar og stovnar

Samstarvsavtalur millum føroyskar og danskar stovnar eru nærum á øllum undirvísingar- og mentanarøkjum.

Millum tær týdningarmestu avtalurnar kunnu hesar verða nevndar:

Um **vinnu- og miðnámsútbúgvingar** eru avtalur við danska Undirvísingarmálaráðið um próvtøkur. Hesar avtalur eru grundarlagið undir, at føroyskir næmingar kunnu verða tiknir upp til danskar útbúgvingar á jøvnum føti við danskar næmingar.

Um útbúgvingarnar á **Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum** er avtala millum Søfartsstyrelsen og Undirvísingar- og mentamálastýrið. Avtalan snýr seg fyrst og fremst um danska góðkenning av føroyskum prógvum, soleiðis at hesi fáa altjóða viðurkenning. Søfartsstyrelsen veitir IMO, (International Maritime Organization), trygd fyri, at tær føroysku útbúgvingarnar hava altjóða dygd og lúka tey altjóða krøv, sum IMO setir. Tað er neyðugt, at IMO

góðkennir útbúgvingarnar, um føroyskt sjófólk skal kunna sigla við útlendskum skipum og við føroyskum skipum í onnur lond.

Antin má hetta samstarv halda fram sum nú, ella mugu føroyskir myndugleikar sjálvir fáa IMO at góðkenna okkara útbúgvingar. Hetta krevur, at Føroyar fáa limaskap í ST og IMO, og eina umsiting at syrgja fyri fyrireikingararbeiðinum til góðkenningina. Í donsku umsitingini er hetta málsøkið í Søfartsstyrelsen, og tí eigur tað kanska at verða lagt til Fiskimálastýrið í føroysku umsitingini.

Um **lærlingaútbúgvingarnar** er eisini nógv og týdningarmikið samstarv. Av teimum 70 lærlingaútbúgvingunum í Føroyum eru 44, har lærlingar verða sendir til Danmarkar í lærutíðini. Mett verður, at uml. 70 lærlingar fara til Danmarkar í miðal 10 vikur hvørt ár.

Avtalur eru gjørdar við so at siga allar yrkisnevndir í Danmark um, at føroysk sveinabrøv verða góðtikin í Danmark ájavnt við donsk sveinabrøv. Treytirnar eru, at læruráðið veitir trygd fyri, at føroysku útbúgvingarnar eru fult so góðar sum tilsvarandi útbúgvingar í Danmark – bæði verkliga læran á læruplássinum og ástøðiliga og verkliga innihaldið í skúlanum.

**Landsskjalasavnið** hevur tætt samstarv við Statens Arkiver. Í sambandi við fullveldisætlanina verður neyðugt at endurskoða avtaluna millum hesar stovnar, og prinsipiellar avgerðir mugu takast um, hvar savnindi statsins í Føroyum og føroysk savnindi í Danmark skulu goymast í framtíðini.

**Jarðfrøðisavnið** hevur samstarv við Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelser, GEUS. Hetta samstarv er av stórum týdningi og á fleiri stigum.

Sum skilst, er talan um nógv samstarv, og tað hevur í fleiri førum avgerandi týdning – bæði fakliga og fíggjarliga.

Undirvísingar- og mentamálastýrið mælir tí til at gera eina avtalu, sum tryggjar, at verandi samstarv millum føroyskar og danskar stovnar og myndugleikar kann halda áfram. Tað einfaldasta er, at tað í avtaluni um skiftistíðina verður staðfest, at føroyskir stovnar hava rætt til hetta samstarv, og at stovnarnir sjálvir – eins og nú – leggja tað til rættis.

Stýrið metir, at eitt tílíkt samstarv kann fáast í lag, men fíggjarliga verður tað helst dýrari enn nú. Tað er sannlíkt, at donsku myndugleikarnir fara at krevja, at vit rinda fyri onkrar av teimum tænastum, sum vit sum er fáa fyri einki sum partur av ríkinum. Hvussu nógv talan verður um, er ilt at siga.

### Millumtjóða samstarv

Ikki ber til at siga í hvørjum av teimum ymsu norðurlendsku og altjóða sáttmálunum, sum galda á undirvísingar- og mentaøkinum, Føroyar skulu vera við sum sjálvstøðugt land.

Nevnast skal tó her, at tað er alneyðugt, at Føroyar gerast limir í IMO (International Maritime Organization), og at IMO-sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar. Somuleiðis má tann nýggi sáttmálin um atgongd til hægri lestur í Norðurlondum verða settur í gildi her.

Aðrir sáttmálar eru eisini, sum stýrið mælir til, at Føroyar gerast sjálvstøðugur partur av. Her verður m.a. hugsað um Helsingforsavtaluna og sáttmálan um Norðurlendska Mentanargrunnin.

## 6. Almanna- og heilsumálastýrið

Almanna- og heilsuøkið er tað størsta útreiðsluøkið á fíggjarlógini. Tað kostar uml. 1.3 mia. kr.

Nakrir partar av málsøkinum (apoteksverkið og vanlukkutryggingarøkið) eru fult yvirtiknir av heimastýrinum, nakrir eru bara yvirtiknir viðvíkjandi fyrisiting, meðan aðrir framvegis eru danskir burturav og verða fíggjaðir beinleiðis úr statskassanum. Her er serliga talan um Landslæknan, sum kostaði 1,1 mió. kr. í 1998.

### Partvís yvirtikin øki

Í 1993 varð avtala gjørd ímillum stjórnina og heimastýrið um, at heimastýrið skuldi yvirtaka ávís øki innan almanna- og heilsumál sum snúgva seg um, hvørjar veitingar tann føroyski borgarin hevur rætt til.

Hesar yvirtøkur vórðu gjørdar sambært § 9 í heimastýrislógini, og føroyskir myndugleikar fingu heimild at áseta reglur um uppgávur og fyrisiting á økinum.

Á almannaøkinum var talan um forsorgar- og barnaforsorgarskipanina, pensiónsskipanina, dagpeningaskipanina, og reglur um dagtilboð og hjálp til børn og ung. Á heilsuøkinum var talan um reglur viðvíkjandi sjúkrahúsverki, kommunulæknum, heilsu- og heimasjúkrasystrum, skúlalæknum, tannrøkt og sjúkratrygging.

Rammulógirnar sum tá vórðu samtyktar áseta, at tær donsku lóg-

irnar, sum eru í gildi í Føroyum á hesum økjum, verða verandi í gildi inntil tær verða avloystar av løgtingslógum.

Í seinastu avtaluni við stjórnina varð ásett, at allar løgtingslógirnar á økinum skulu vera lidnar í seinasta lagi í 1999.

Á almannaøkinum manglar heimastýrið framvegis at tilevna flestu løgtingslógirnar sambært rammulógini. Løgtingslóg um almannapensiónir o.a. varð samtykt av løgtinginum í tingsetuni 1998/99.

Viðvíkjandi hinum løgtingslógunum sum gerast skulu sambært rammulógini – forsorgarlógini, barnaforsorgarlógini og dagpengingalógini – verður miðað ímóti at leggja løgtingslógaruppskot fyri løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

Tá ið hesar lógir eru samtyktar, er alt almannaøkið yvirtikið viðvíkjandi umsiting og lóggávu. Arbeiðið viðvíkjandi almannalóggávuni verður kortini ikki liðugt, tí sambært flestu lógum skulu kunngerðir og vegleiðingar gerast á teimum ymisku økjunum. Harumframt verða broytingar alla tíðina gjørdar í skipanunum til tess at finna tær bestu loysnirnar til føroysk viðurskifti. Meira sannlíkt er tí, at økið verður liðugt skipað og lagað til føroysk viðurskifti um nøkur ár.

Á heilsuøkinum manglar heimastýrið bert at uppfylla rammulógina viðvíkjandi kommunulæknaskipan, skúlalæknaskipan og sjúkratrygging. Løgtingslóg um kommunulæknar varð samtykt av løgtinginum í tingsetuni 1998-1999. Landsstýrismaðurin miðjar ímóti at leggja løgtingslógaruppskot um sjúkratrygging og skúlalæknaskipan fyri løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

Tá ið hesar lógir eru samtyktar, er heilsuøkið yvirtikið á teimum økjum sum snúgva seg um veitingar til borgaran, men ikki viðvíkjandi heilsufakligum reglum. Á tí økinum eru danskar reglur framvegis galdandi.

Á heilsuøkinum hevur Sundhedsstyrelsen kortini framvegis týdningarmiklar fakligar uppgávur at røkja í Føroyum. Tær eru at hava eftirlit við sjúkrahúsverkinum og heilsustarvsfólkunum í Føroyum, og at áseta ávísar fakligar reglur á økinum.

Almanna- og heilsumálastýrið mælir til, at alt hetta økið verður kannað nærri um broytingar skulu gerast.

Sum heild hava danskir myndugleikar ein stóran leiklut í skipanini í dag, og um stórvegis broytingar skulu gerast innan økið, er neyðugt at kanna tað neyvari. Politisk støða má takast til hvar tað skal umsitast í framtíðini eins og til støðið á økinum.

## Góðkenningarlógirnar

Ein góðkenningarlóg er ein lóg, sum ásetir krøvini til góðkenning av heilsustarvsfólkum. Sundhedsstyrelsen hevur fakliga eftirlitið við øllum góðkendum heilsustarvsfólki í Føroyum.

Góðkenningarlógirnar byggja allar á altjóða krøv til heilsuútbúgvingar, og krøvini til heilsuútbúgvingar eru tey somu í øllum ES- og EBS-londunum.

Góðkenningarlógirnar eru felagsmál og verða tí settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan. Tann yvirorðnaða fíggjarliga ábyrgdin fyri økinum liggur í Danmark. Góðkenningarlógirnar vórðu ikki tiknar við í rammulógina um heilsuverkið, tí mett varð, at føroyska heimastýrið ikki hevði tað neyðuga fakliga innlitið á økinum til at áseta serføroyskar reglur. Eisini varð mett, at heimastýrið ikki hevði orku til at halda skipanina við líka – tvs. at seta neyðugu lógirnar í gildi á økinum, dagføra tær og at hava fakliga eftirlitið við heilsustarvsfólkinum.

Í dag hevur føroyska umsitingin stórar trupulleikar við at fylgja við í dagføringini av góðkenningarlógunum. Tískil eru flestu góðkenningarlógirnar ikki dagførdar í minst 10 ár. Hvør einstøk góðkenningarlóg og broyting í hesum lógum krevur somu mannagongd, sumríkislógartilmæli. Um arbeiðið skal gerast til fulnar í Føroyum, krevur hetta eina munandi størri umsiting.

Ein loysn á trupulleikanum við góðkenningarlógunum kundi verið, at vit geva Danmark ella øðrum landi heimild til at umsita og lóggeva á hesum økinum okkara vegna. Hetta hevði havt við sær, at tá ið ein góðkenningarlóg verður sett í gildi ella broytt í landinum sum hevði hesa heimild, so verður hon sett í gildi í Føroyum eisini. Í dag verður heimildin til at broyta tær donsku lógirnar soleiðis at tær samsvara við føroysk viðurskifti, kortini so at siga ikki brúkt.

Um ynskið er at heilsustarvsfólk í Føroyum skulu verða á sama støði sum heilsustarvsfólk í Europa, verður mett, at samstarv má fáast í lag við annað land í sambandi við fullveldi.

## Onnur felagsmál

Innan heilsumál eru eisini onnur øki enn tey omanfyrinevndu, sum enn eru felagsmál. Økini kunnu býtast upp í tveir bólkar:

1) Lógir, ið snúgva seg um veitingar til føroyska borgaran. Málsøkini eru m.a. fosturtøka, fyribyrgjandi heilsukanningar og hjálp í sambandi við barnsburð, ókeypis vaccinatión og sterilisatión. Mett verður, at hesar lógir eiga at verða yvirtiknar. Ein møguleiki er at yvirtaka

lóggávuna á hesum økjum eftir at rammulógirnar á almanna- og heilsuøkinum eru útfyltar.

2) Lógir, ið snúgva seg um heilsufaklig- og altjóða krøv til heilsuverk. Hetta er m.a. lóg um „Sundhedsvæsenets Centralstyrelse”. Orsakað av at lógin setir sera stór krøv til ásetan av heilsufakligum reglum, ráðgeving av heilsumyndugleikum, eftirlit, serfrøðisligar kanningar og kæruviðgerð, verður tørvur á stórari umsiting á hesum øki.

Hetta er neyðugt fyri at heilsuveitingarnar í samfelagnum skulu verða nøktandi og lúka altjóða krøv. Lóg um embætislæknar (herundir landslæknin), sjúklingatrygging og „Videnskabsetisk komitésystem“ koma eisini undir hendan bólkin. Spurningurin er her, á sama hátt sum viðvíkjandi góðkenningarlógunum, um tað er ráðiligt at yvirtaka hesi økini ella um samstarvsavtala í staðin skal gerast við Danmark ella eitt av grannalondum okkara.

## Samstarv við danskar myndugleikar og stovnar

Stovnar undir Almanna- og heilsustýrinum hava bæði formligt og óformligt samstarv við stovnar og myndugleikar í Danmark. Tað mesta av hesum samstarvi er ókeypis í dag.

Tann týdningarmesta formliga avtalan, er avtalan millum Sjúkrahúsverkið og Ríkissjúkrahúsið og onnur sjúkrahús í Danmark. Sjúkrahúsverkið rindar allar útreiðslur av hesum samstarvi, og tað fer tí ikki at økja útreiðslurnar, um tað heldur fram.

Hóast apoteksverkið varð yvirtikið í 1948, hevur tað kortini framvegis formligt samstarv við danskar stovnar sambært løgtingslóg um apoteksverkið. Hesir stovnar eru m.a. Sundhedsstyrelsen, Statens Serumslaboratorium og Statens veterinære institut for virusforskning. Stovnarnir hava stóran sakkunnleika á økinum, sum ikki finst í Føroyum.

Tær óformligu avtalurnar snúgva seg oftast um tilboð um útbúgving, skeið, praktikk og vegleiðing til starvsfólk.

Samstarvið við Sundhedsstyrelsen hevur stóran týdning fyri tað føroyska heilsøkið. Almanna- og heilsumálastýrið mælir tí til, at kannað verður, um tað er møguligt at fáa eina samstarvsavtalu við danir, sum tryggjar, at samstarvið við Sundhedsstyrelsen kann halda fram.

Tað er sum heild neyðugt, at samstarvið og samskiftið millum føroyskar og danskar stovnar á almanna- og heilsuøkinum kann halda fram. Nógv av hesum er ókeypis í dag, og tað kann hugsast, at teir

donsku stovnarnir í nøkrum førum fara at krevja gjald fyri tað, um tey ríkisrættarligu viðurskiftini broytast.

## Fleirtjóða sáttmálar

Tað eigur at verða umhugsað at seta m.a. hesar fleirtjóða sáttmálar á almanna- og heilsuøkinum í gildi í Føroyum: „Nordisk konvention om social sikring", „Nordisk konvention om social bistand og tjenester", „Konvention om Europæisk Socialpagt", „Statutter for verdenssundhedsorganisationen", „Verdenssundhedsorganisationens rettigheder og immuniteter", „International sundhedskonvention", „Europæisk overenskomst om gensidig bistand mht. lægelig specialistbehandling og klimatkur" og „konvention om beskyttelse af menneskerettigheder og menneskelig værdighed i forbindelse med anvendelse af biologi og lægevidenskab".

Sáttmálarnir „Nordisk konvention om social sikring" og „Konvention om Europæisk Socialpagt" eru sera týdningarmiklir, av tí at teir tryggja føroyingum tryggar sosialar rammur, tá teir ferðast/arbeiða í Norðanlondum ella í Europa. Tað skal tó gerast vart við, at sjálvstøðugur limaskapur í hesum sáttmálum hevur við sær stórar útreiðslur.

Í Danmark arbeiða 120 starvsfólk á „Den Sociale Sikringsstyrelse" við at umsita „Nordisk konvention om social sikring". Í løtuni er bara eitt fólk á Almannastovuni, sum tekur sær av konventiónini, og tað arbeiðir í tøttum samstarvi við danska myndugleikan. Skulu vit umsita sáttmálan sjálvi, fer tað at krevja fleiri starvsfólk.

# Løgmansskrivstovan

# Innihaldsyvirlit


Inngangur ........................................ 43

KAPITTUL 1 ........................................ 44
1. Niðurstøður ........................................ 44
1.1 Lóggáva ........................................ 44
1.2 Fyrisiting ........................................ 44
Uttanríkistænasta ........................................ 45
Sivilrættarmál ........................................ 45
Løgreglan og fútaembætið ........................................ 46
Varðhaldið ........................................ 46
Kriminalforsorgin ........................................ 46
Dómsvaldið ........................................ 47
1.3 Fígging ........................................ 47
Lógarpartur ........................................ 47
Uttanríkistænasta ........................................ 47
Sivilrættarmál ........................................ 48
Løgreglan ........................................ 48
Varðhaldið ........................................ 48
Kriminalforsorgin ........................................ 48
1.4 Annað samstarv ........................................ 48
Formligt og óformligt samstarv ........................................ 48
Millumlandasáttmálar ........................................ 49
1.4 Samandráttur ........................................ 49
Skipan ........................................ 51

KAPITTUL 2 ........................................ 52
2. Samstarv við danskar myndugleikar ........................................ 52
2.1 Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar . 52
Avtalur ........................................ 52
Keyp ........................................ 53
Skuld ........................................ 53
Vekslar, Kekkar ........................................ 53
Fyrning, Ógilding ........................................ 54
Arvur ........................................ 54
Skifti ........................................ 54
Horvin ........................................ 54
Ognartøka ........................................ 55

Hevd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Veð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Lán, leiga . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Tinglýsing og tinglesing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Lóggáva . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Grundlógin, Fólkatingið, umboðsmaður Fólkatingsins, ríkisarvingalógin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 56
Ríkisborgararættur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 56
Ríkismyndugleikar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 56
Útlendingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 56
Pass . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 57
Revsing og fongsulsverk. Borgaralig revsilóg o.a. . . . . . . . 57
Fongsulsverk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 57
Millumtjóða sakarmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 57
Aðrar almennar reglur. Rasumismunur o.tíl. . . . . . . . . . . 58
Løgfrøðilig hjálp, innheintingar- og loyniløgregluvirksemi 58
Endurgjald til brotsverksoffur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 58
Hjúnalag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 58
Børn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 59
Løgræði . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 59
Millumtjóða viðurskifti viðvíkjandi hjúnaløgum, børnum og løgræði . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 59
Skráir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 60
Viðmerkingar til lóggávuøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 60
Niðurstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 63
2.2. Føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar 64
Byggi og býarskipanir – friðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 65
Kommunuval . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 65
Lóggáva . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 65
Landsstýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 65
Løgting – Fløgg . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 66
Vápn o.a. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 66
Fólkanøvn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 66
Skráir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 66
Niðurstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 67
2.3 Formligt og óformligt samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 67
Uttanríkismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 67
Løgmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 68
Niðurstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 69

KAPITTUL 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
3. Mál, sum Danmark umsitur og málsetingar fyri sjálvstøðuga umsiting. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
3.1 Uttanríkismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Fyrisiting av uttanríkismálum: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Skipan av uttanlandstænastu Føroya . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Fyritreytir fyri at skipa eina føroyska uttanríkistænastu . . 70
Politisk mál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Tvílandamál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Økismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Viðskiftamál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Økissáttmálar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Millumríkjasáttmálar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Tilfeingismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Veiðimál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Umhvørvismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Menningarhjálp . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Arktisk mál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Umboðanarmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Siðaskipanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Ræðismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Kunningarmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 74
Trygdarmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 74
Fíggjarkrøv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 74
Árligur kostnaður í sambandi við rakstur av sendistovum og umboðsstovum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 75
Árligur kostnaður í sambandi við føroyskan limaskap í millumríkja felagsskapum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 77
Árligur rakstrarkostnaður av eini útbygdari uttanríkisdeild 77
Árligur heildarkostnaður fyri rakstur av eini føroyskari uttanríkistænastu . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 78
Búskaparlig árin av eini føroyskari uttanríkistænastu . . . . 78
Búskaparlig árin av útlendskum sendistovum í Føroyum . 79
Samandráttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79
3. 2 Ríkisumboðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81
Uppgávur stovnsins . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81
Sivilrættarliga økið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81
Aðrar høvuðsuppgávur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 81
Samstarv við aðrar stovnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82
Starvsfólk og bygnaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82
Kostnaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82
Niðurstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82

3.3 Løgregla ........ 83
Løgregla ........ 83
Uppgávurnar hjá løgregluni ........ 83
Aðrar høvuðsuppgávur ........ 83
Samstarv við aðrar stovnar ........ 84
Starvsfólk og bygnaður ........ 85
Starvsfólk ........ 85
Bygnaður ........ 85
Høvuðsstøðin ........ 85
Neyðsendardeildin ........ 86
Rannsóknardeildin ........ 86
Fyrisitingardeildin ........ 86
Hinar støðirnar ........ 86
Kostnaður ........ 87
Beinleiðis kostnaður ........ 87
Fjaldur kostnaður ........ 88
Útbúgving ........ 89
Fjaldu útreiðslurnar annars ........ 90
Nýggj virkisøki ........ 92
Samandráttur ........ 93
Útreiðslurnar á løgregluøkinum ........ 93
3.4 Varðhaldið ........ 94
Samstarv við aðrar stovnar ........ 94
Starvsfólk og bygnaður ........ 94
Kostnaður ........ 94
Niðurstøður ........ 95
3.5 Kriminalforsorgin ........ 95
Uppgávur stovnsins ........ 95
Aðrar høvuðsuppgávur ........ 95
Samstarv við aðrar stovnar ........ 96
Starvsfólk og bygnaður ........ 96
Kostnaður ........ 96
Niðurstøður ........ 96
3.6 Dómsvaldið ........ 96
Lýsing av Dómsvaldinum ........ 97
Uppgávur stovnsins ........ 97
Aðrar høvuðsuppgávur ........ 97
Samstarv við aðrar stovnar ........ 98
Starvsfólk og bygnaður ........ 98
Kostnaður ........ 98

KAPITTUL 4 .......... 99
4. Á hesum økjum verða samstarvsavtalur gjørdar .......... 99
Uttanlandsmál .......... 99
Løgregla- og ákæruvaldið .......... 99
Dómsvaldið .......... 100

KAPITTUL 5 .......... 101
5. Millumlanda sáttmálar .......... 101
Millumtjóða sáttmálar á umsitingarøkinum hjá Løgmansskrivstovuni .......... 101
Fólkaskráseting .......... 101
Arvur og skifti .......... 101
Konkurs .......... 102
Heimarættur og land .......... 102
Pass og útlendingar .......... 102
Rættargangur, straffur og fongsulsverkið .......... 102
Hjúnaband og børn .......... 103
Aðrir sáttmálar .......... 104
Norðurlendskt samstarv .......... 104
Millumtjóða felagsskapir .......... 105
Mannarættindi, flóttarfólk og tílík mál .......... 105
Handil og sjóvinna .......... 105
Sáttmálar um samstarv, handil, ídnað, sjóvinnu og búskap 105
Mentan, undirvísing o.t. .......... 106
Fiskivinna v.m. .......... 106
Løgdeildin .......... 106

# Inngangur

Løgmansskrivstovan hevur lagt arbeiðið til rættis við støði í tí arbeiðssetningi, sum landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum lat Løgmansskrivstovuni í oktober 1998.

Tilfarið er skipað soleiðis:

Í kapitli 1 verða niðurstøðurnar gjørdar. Niðurstøðurnar verða lýstar út frá teim trimum høvuðskrøvunum, sum eru í arbeiðssetninginum, nevniliga lýsing av og krøv til lóggávu, fyrisiting og fígging. Við hesum høvuðskrøvum í huga verður farið ígjøgnum øll evnini, sum lýst verða í álitinum, undantikið formliga og óformliga sambandið, sum er millum Føroya og Danmarkar og millumtjóða sáttmálar, har niðurstøðurnar verða skipaðar øðrvísi.

Í kapitli 2 verður samstarvið við Danmark lýst. Hetta verður gjørt út frá donskum rættarreglum, sum eru settar í gildi í Føroyum, føroyskum rættarreglum, sum vísa til danskar myndugleikar og formliga og óformliga samstarvinum, sum er millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Kapittul 3 lýsir tey mál, sum Danmark umsitur í dag, og sum á ein hvønn hátt koma Føroyum við. Komið verður inn á málsetingar fyri, nær málsøkini kunnu fáast at virka sum føroyskt málsøki.

Økini, har mælt verður til at gera samstarvsavtalur við Danmark ella annað land, verða viðgjørd í kapitli 4.

Í kapitli 5 verða uppsettir teir millumtjóða sáttmálar, sum Løgmansskrivstovan umsitir beinleiðis.

# Kapittul 1

## 1. Niðurstøður

Í hesum kapitli verða niðurstøðurnar skrivaðar. Niðurstøðurnar byggja á evnini, sum Løgmansskrivstovan viðger í álitinum. Niðurstøðurnar eru skipaðar á tann hátt, at fyrst verður tikið saman um lóggávuna. Økini, talan er um, eru danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar, føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar, uttanlandsøkið, sivilrættarmál, løgregla, varðhald og kriminalforsorg.

Somuleiðis verða niðurstøður gjørdar um krøv til fyrisiting og fígging á somu økjum.

Tikið verður eisini saman um formliga og óformliga samstarvið, sum er millum Føroya og Danmarkar. Eisini verður niðurstøða gjørd um millumtjóða sáttmálar, sum beinleiðis eru undir fyrisitingarøkinum hjá Løgmansskrivstovuni.

Niðurstøðurnar hava støði í, at Føroyar verða fullveldi.

### 1.1 Lóggáva

Donsku rættarreglurnar, ið galda fyri Føroyar, og sum eru viðgjørdar í kap 2.1, verða lagdar fyri heimastýrið til ummælis, sambært heimastýrislógini § 7, tá ið tær skulu setast í gildi í Føroyum, ella tá ið broytingar, sum ætlandi skulu galda fyri Føroyar, skulu gerast í teimum. Hesar rættarreglur kunnu koma undir føroyskt málsræði uttan at seta nýggj krøv til lóggávu. Tó eigur lóggávan at verða lýst av nýggjum at koma í gildi fyri Føroyar, tá ið Føroyar gerast fullveldi. Eisini er ynskiligt, at øll føroysk lóggáva er orðað á føroyskum.

Føroysku rættarreglurnar, sum eru viðgjørdar í kap 2.2, vísa í nøkrum førum til danskar myndugleikar. Eftir fullveldið er neyðugt at strika hesar tilvísingar.

### 1.2 Fyrisiting

Tvey tey fyrstu økini, sum verða viðgjørd í hesum áliti, eru danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi í Føroyum, og føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar. Talan er mest um lóggávu,

sum regulerar viðurskiftini millum borgararnar í samfelagnum. Tað, sum eyðkennir økið, er, at fáar lógarbroytingar verða gjørdar, (sí kapittul 2). Hetta merkir, at málini krevja ikki stóra fyrisiting, uttan tað, at donsku rættarreglarnar verða týddar til føroyskt. Mett verður, at týðingararbeiðið kann verða gjørt eftir stuttari tíð.

Í føroysku rættarreglunum, sum vísa til danskar myndugleikar, verður neyðugt at strika ávísar tilvísingar. Lítið og einki arbeiði er av hesum.

At ríkislóggáva, ið er viðgjørd undir kap. 2.1, fer undir føroyskt málsræði, kemur hinvegin at seta løgdeildini nýggj krøv, tí neyðugt verður tá at fylgja við gongdini á økinum, bæði uttan- og innanlands, fyri at vera búgvin at gera neyðugar lógarbroytingar á økinum.

Skulu Føroyar umsita uttanlandsmál burturav, krevur hetta harumframt, at løgdeildin verður styrkt, serliga tá ið ræður um altjóða rætt.

Tað er torført at ímynda sær, at løgfrøðiligu uppgávurnar á hesum øki kunnu verða greiddar í einum umhvørvi við færri enn fýra ársverkum.

### Uttanríkistænasta

Á uttanlandsøkinum eru tveir møguleikar. Annar møguleikin er at varðveita verandi føroysku uttanríkistænastuna og í fullveldissáttmálanum tryggja, at danska uttanríkistænastan tekur sær av føroyskum uttanríkismálum, har ið føroysk fyrisitingarorka ikki røkkur.

Um henda avgerðin verður tikin, verða eingi stórvegis krøv til føroysku fyrisitingina.

Hin møguleikin er, at Føroya landsstýri ger av at fullmenna eina føroyska uttanríkistænastu sambært frágreiðingini í hesum áliti. Um henda avgerðin verður tikin, kann talan verða um at seta 36 fólk aftur at teim núverandi 12. Tað er greitt, at starvsfólkini skulu útbúgvast, setast í starv og eftirútbúgvast. Mett verður, at helst verður trupult at seta fleiri enn trý ella fýra fólk um árið. Av tí at roknast skal við ávísum fráfalli, verður mett, at eini 10-15 ár fara at ganga, áðrenn føroyska uttanríkistænastan verður fullmannað.

Verður avgerð tikin um at byggja upp eina føroyska uttanríkistænastu, setir hetta krøv til fyrisitingina, sum skal vera til reiðar at skipa starvsfólkaviðurskiftini til tann tørvin, sum verður. Hugsað verður serliga um útbúgvingarviðurskiftini.

Harumframt verður eisini talan um praktisk viðurskifti sum t.d. at geva sendistovum og umboðsstovum neyðugar arbeiðsumstøður.

### Sivilrættarmál

Um sivilrættarmál, (kap. 3.2), er at siga, at henda uppgáva er nógv minni enn uppgávan at røkja uttanríkistænastuna. Mett verður í

hesum sambandi, at tørvur verður á fimm ársverkum til at røkja sivilrættarmálini, sum ríkisumboðið nú umsitur. Mælt verður eisini til, at avtala verður gjørd við ríkisumboðið um, at verandi starvsfólk hjálpa til við at røkja uppgávurnar í eini skiftistíð upp á um leið eitt ár.

Fáa føroyingar serligan heimarætt og serliga útlendingalóggávu, so skal økið eisini umsitast. Ilt er at siga, hvussu stór ein tílík umsiting skal vera, tí tað hevur ikki eydnast at fingið upplýst, hvussu nógva orku ríkismyndugleikarnir nýta til mál, ið viðvíkja Føroyum, men færri enn fýra ársverk kann neyvan verða talan um.

### Løgreglan og fútaembætið

Tað størsta av málunum, sum Danmark nú umsitur, er løgreglan, kap. 3.3. Sum er, starvast 152 fólk hjá løgregluni. Rættiliga stór fyrisitingarlig krøv standast av, at løgreglan kemur undir føroyskt málsræði. Eisini verður neyðugt at gera samstarvsavtalu við Danmark ella annað land um eftirútbúgving, kriminaltøkniligar tænastur, sumt kanningararbeiði o.a., og ynskiligt er at gera samstarvsavtalu við Danmark um skráseting.

Mælt verður til, at skiftistíðin verður nóg long, so at hóskandi stundir verða til eitt nú at seta starvsfólk við í leiðslubygnaðinum, og at neyvari útgreiningar verða gjørdar av løgregluni at kanna, hvussu stovnurin høgligast kann verða skipaður inn í føroyska samfelagið, uttan at ov nógv orka verður bundin í yvirskipaðu umsitingini. Her hevði eisini verið sjálvsagt at kannað, hvussu styrkt kundi verðið um støðið undir starvsfólkahópinum, við at løgreglan eisini fær aðrar uppgávur afturat, og um servitan, sum annars ikki kundi verið í landinum, kundi verið uppbygd, við at løgreglan samstarvaði við aðrar fyrisitingar á summum økjum.

### Varðhaldið

Í varðhaldinum starvast í dag 12 fólk, kap. 3.4. Skipanin er soleiðis, at fólk, ið eru dømd til fongsul í meir enn eitt ár, sita í fangahúsi í Danmark. Fangarnir, sum hava sitið í Danmark, hava altíð verið millum ein og fimm. Til tess at loysa hesa uppgávu, verður mett, at tørvur verður á at seta fleiri starvsfólk. Hvussu nógv starvsfólk, talan kann verða um, er ógreitt, tí økið hevur ikki verið gjølligari kannað.

### Kriminalforsorgin

Eitt av teimum minnu málunum, sum Danmark umsitur, og sum verður viðgjørt undir Løgmansskrivstovuni, er Kriminalforsorgin, kap. 3.5. Á Kriminalforsorgini starvast trý fólk. Mett verður, at um Kriminalforsorg kemur undir føroyskt málsræði, eigur sama skipanin

í fyrsta umfari at verða varðveitt. Sum er, er tað danska direktoratið fyri kriminalforsorg, sum ger reglur fyri, hvussu virksemið skal vera.

Dómsvaldið

Ongar niðurstøður verða gjørdar um dómsvaldið, tí alt málið verður viðgjørt í undirbólki undir grundlógarnevndini.

Væntast kann, at á hesum økinum verður gjørd ein samstarvsavtala í eini skiftistíð.

## 1.3 Fígging

Torført er at gera ítøkiligar metingar um fíggjartørvin, tá ið málini, sum nevnd eru omanfyri, koma undir føroyskt málsræði. Nógvir eru hættirnir at skipa økini, og útreiðslutørvurin verður alt eftir, hvør háttur verður valdur. Í metingunum er ikki lagt upp fyri munandi umskipanum ella øðrum tiltøkum fram ímóti fullnýtslu, men eru at kalla bara metingar av, hvat tað fer at kosta at fáa verandi donsku skipanir at virka í føroyum. Mett verður um økini hvør sær. Roknað er við, at eitt ársverk í fyrisitingini vanliga kostar 300.000 kr. í løn og rakstri, og eitt ársverk í uttanríkistænastu o.tíl. kostar 500.000 kr.

Lógarpartur

Sum nevnt, verður tørvur á at umseta donsku rættarreglurnar til føroyskt, og økið er rættiliga stórt.

At uttanlandsmál og lóggáva koma undir føroyskt málsræði hevur við sær, at neyðugt verður at styrkja løgdeildina á altjóðarættarliga økinum til at sita fyri yvirskipaðum uppgávum.

Væntandi verður tørvur á fýra ársverkum, og kostnaðurin verður um 1, 2 mió. kr.

Uttanríkistænasta

Kostnaðurin fyri at reka eina fult útbygda uttanlandstænastu er býttur sundur í trý, (sí kap. 3.1). Ein partur er uttanríkisdeildin, sum verður mett at kosta 12 mió. kr. Átta av teim 12 mió. eru til heimastarvandi starvsfólk, og 4 mió. kr. eru til umboðan og keyp av sertænastum uttanlands. Hetta er ein eykakostnaður upp á 7 mió. kr. aftur ímóti nú.

Fyri sendistovur og umboðsstovur verður roknað við einum eykakostnaði upp á 28 mió. kr. Hetta er fyri sendistovu í Reykjavík, Oslo, Keypmannahavn, London og Washington, og fyri umboðsstovu í Brússel og New York.

Harumframt verður talan um ein árligan eykakostnað upp á 13

mió. kr., sum er til limagjøld í teim millumríkja felagsskapum, sum mett verður, at Føroyar mugu verða limir í.

### Sivilrættarmál

Til at umsita sivilrættarmál verður mett, at tørvur er á fimm ársverkum. Kostnaðurin fyri hetta verður mettur til 1,5 mió. kr. í alt.

Mett verður, at ein skipan við serligum føroyskum heimarætti og útlendingalóggávu krevur fýra ársverk. Tað eru um leið 1,2 mió. kr. um árið.

### Løgreglan

Tann parturin av løgregluni, sum nú er í Føroyum, kostar 45 milliónir í beinleiðis rakstri. Harafturat kemur ein fjaldur kostnaður, ið verður mettur at vera 8,4 mió. fyri leiðslu og sertænastur, 2,6 mió. fyri útbúgvingar, 5 mió. fyri serligan greiningarkostnað og 1,5-2 mió. fyri starvsfólk, ið taka sær av millumtjóða samstarvi. Hetta eru í alt um leið 63 mió. kr.

### Varðhaldið

Í varðhaldinum starvast 12 fólk. Varðhaldið kostar, sum er, góðar 4 mió. kr. at reka árliga. Til tess at tryggja langtíðarfangum nøktandi umstøður, verður tørvur á peningi til starvsfólk og íløgur. Tó er ómøguligt við núverandi upplýsingum at meta um hesa upphædd.

### Kriminalforsorgin

Kriminalforsorgin kostar 1.041 mió. kr. at reka árliga. Mælt verður til at skipa kriminalforsorg á sama hátt, sum nú. Aftur at teim uppgávum, sum Kriminalforsorgin nú røkir, kemur uppgávan at seta upp arbeiðsreglur fyri stovnin. Mett verður, at talan verður um eitt hálvt ársverk. Kostnaðurin í alt verður sostatt mettur til um leið 1,2 mió. kr.

## 1.4 Annað samstarv

### Formligt og óformligt samstarv

Hóast økini eru stór, er formliga og óformliga samstarvið millum føroyskar og danskar myndugleikar sera avmarkað, (sí kap. 2.3). Talan er um økini uttanlandsmál og løgmál.

Í uttanlandsmálum eru ávísar formligar avtalur um t.d. skipan við einum serkønum embætisfólki í føroyskum viðurskiftum í danska uttanríkismálaráðnum, ávísar starvssetanir av føroyskum embætisfólkum í Uttanríkismálaráðnum og sendistovum tess og skipan við føroyskum samráðingarnevndum. Harumframt er sett ein uttanríkis-

málanevnd sambært setningi, sum Føroya løgmaður og danski uttanríkismálaráðharrin hava givið í felag. Eisini er formliga ásettur árligur fundur millum Føroya løgmann og danska uttanríkismálaráðharran.

Óformligt er samskifti um t.d. almenna kunning frá ávikavist danska uttanríkismálaráðnum og ríkisumboðsmanninum í Føroyum um uttanríkisviðurskifti, ið kunnu hava týdning fyri Føroyar. Eisini er samskifti um fyrispurningar úr Føroyum um ávís uttanríkisviðurskifti og sínámillum kunning um málsviðgerð av áleikandi føroyskum uttanlandsmálum.

Í løgmálum samstarva føroyskir og danskir myndugleikar beinleiðis um ríkislóggávu, sum skal setast í gildi í Føroyum. Hetta er í sambandi við, at heimastýrið ummælir ríkislógartilmæli. Harumframt er Løgmansskrivstovan við í arbeiðinum í nevndini, sum løgmálaráðharrin hevur sett til at gera uppskot til føroyska rættargangslóg.

Væntast kann, at Løgmansskrivstovan fer at hava ein virknari lut í arbeiðinum hjá ríkismyndugleikunum í sambandi við Schengansamstarvið og nýggju útlendingalógina, sum ætlanin er at seta í gildi fyri Føroyar.

Hvat skráseting viðvíkir, hevur Skrásetingareftirlitið óformligt samstarv við Registertilsynet í Danmark. Samarbeiðið hevur serliga snúð seg um viðgerð av skráum hjá ríkismyndugleikunum og skráseting í sambandi við nakrar privatar verkætlanir, har upplýsingar eru savnaðar í Føroyum, og edv-viðgerðin er farin fram í Danmark. Skrásetingareftirlitið hevur eisini vent sær til Registertilsynet, tá ið ivi hevur verið um, hvussu okkurt mál skuldi viðgerast.

### Millumlandasáttmálar

Um lóggávu, í sambandi við at uttanríkismál koma undir føroyskt málsræði, er at siga, at allir millumlandasáttmálar av sær sjálvum fara úr gildi fyri Føroyar í somu løtu, tær verða skipaðar sum fullveldi. Undantiknir eru tó fullveldissáttmálin og marknasáttmálar.

Sambært galdandi millumtjóða rætti kunnu føroyskir myndugleikar í hvørjum einstøkum føri gera av, hvør av galdandi sáttmálum skal verða settur í gildi aftur fyri Føroyar. Her er tó at hava í huga, at lóg, ið er sett í gildi fyri Føroyar, í sambandi við at millumlandasáttmáli er settur at galda her, verður ikki ávirkað.

## 1.5 Samandráttur

Í alt kann talan verða um at seta um leið 172 starvsfólk, um roknað verður við teim fólkunum, sum eru beinleiðis fíggjað úr Danmark. Harumframt verður roknað við 36 fólkum til eina fult útbygda uttanlandstænastu, har mett verður, at trý ella fýra verða sett um árið.

Eisini verður roknað við, at tørvur verður á átta fólkum at arbeiða við løgfrøðiligum málum.

Talvan niðanfyri lýsir virkisøkini, talið á starvsfólkum, sum nú arbeiða við málunum, talið á starvsfólkum, sum kunnu koma upp á tal at seta, og kostnað fyri hesi umframt kenda kostnað fyri, hvat tað kostar at fáa málini at virka undir verandi skipan.

Lesarin skal geva gætur, at arbeitt er ikki við møguligum broytingum og fullnýtslu á teim økjum, sum nú eru í Føroyum.

| Virkisøki | Verandi starvsfólk | Nýggj starvsfólk | Kendur kostnaður í mió. kr |
|---|---|---|---|
| 1. Løgmál | | 8 | 2,4 |
| 2. Uttanlandsmál | | 3/36 | 1,5/35 |
| 3. Sivilmál | 5 | | 1,5 |
| 4. Løgregla og fútaembætið | 152 | 4 | 47,0 |
| 5. Varðhaldið | 12 | | 4,0 |
| 6. Kriminalforsorgin | 3 | 0,5 | 1,2 |
| Í alt | 172 | 15,5/48,5 | 57,6/91,1 |

Sum sæst á talvuni, kann kostnaðurin í styttri áramál liggja um gott 57 mió. kr. og í eitt longri áramál um 91 mió. kr. ella hægri. Harumframt skal roknast við einum meirkostnaði til fjalda kostnaðin hjá løgregluni á um leið 18 milliónir, og limagjøld til millumríkjafelagsskapir á millum 6 og 13 milliónir.

Tó er sera torført at siga nakað ítøkiligt um, hvussu og nær útreiðslurnar koma, tí tað veldst alt um, hvussu og nær málini hvørt sær koma undir føroyskt málsræði. Harafturat er ikki vist, at allar útreiðslur verða so stórar, sum her er mett. Hetta kann t.d. vera tí, at tað fer ikki at kosta einum landi ella stovni serliga nógv at veita tænastur á økjum, har tey hava eyka kapasitet, og at lond eisini kunnu hava aðrar orsøkir til at vilja gera avtalur um tænastur, sum liggja undir matematiskt roknaðan kostnað.

Viðmerkt verður í hesum sambandi, at tess meira tíð, fyrisitingin hevur til at fyrireika seg til at taka við nevndu málsøkjum, tess betri eru líkindini fyri væleydnaðari fyrisiting. Mælt verður tí til, at fyrisitingin verður útbygd so við og við, til komið er á mál, og at útbyggingarætlanin verður samskipað fyri øll økini, so at líkindi eru fyri, at økini av fyrstan tíð eru mannað við skikkaðum fólki, (sí eisini tað, sum stendur seinast í niðurstøðunum av kap. 2.1).

### Skipan

At økini uttanríkismál, sivilrættarmál, løgregla, varðhald, kriminalforsorg og ríkislóggáva koma undir føroyskt málsræði, setir krøv til fyriskipanarligu viðurskiftini.

Sum frágreitt í innganginum í hesum áliti, er hvørt av hesum økjum viðgjørt eftir, hvussu tað virkar, sum er. Uttan iva eru nógvir møguleikar at skipa viðurskiftini, bæði hvat viðvíkir fyrisiting av uppgávunum og hvat viðvíkir fyriskipan. Málið eigur at vera, at uppgávurnar verða greiddar so væl, sum yvirhøvur til ber.

Til tess at røkka einum tílíkum máli, verður neyðugt at gera ítøkiligar útgreiningar av arbeiðsuppgávunum, áðrenn støða verður tikin til fyriskipanarligu viðurskiftini.

Umframt at fyrisita nevndu øki, kann talan eisini vera um Føroya rætt. Lógin um dómstólsstýrið kom í gildi tann 1. juli 1999, og verður umsitingin av dómstólunum flutt frá Løgmálaráðnum til eitt dómstólsstýri, ið er ein sjálvstøðugur stovnur. Tá ið Føroya rættur kemur undir føroyskt málsræði, má støða verða tikin til, um føroyskt dómstólsstýri skal verða sett á stovn, ella um Føroya rættur eisini kann verða umsitin sum øki í løgdeildini.

Hetta er spurningur, sum undirnevndin hjá grundlógarnevndini, ið skal gera uppskot til føroyska rættarskipan, má taka støðu til.

# Kapittul 2

## 2. Samstarv við danskar myndugleikar

Í heimastýrislógini § 2 er ásett, at tey mál, sum eru sett á lista A í lógini, kunnu verða yvirtikin sum føroysk sermál, um antin danska stjórnin ella heimastýrið vilja tað. At málsøkið verður yvirtikið sum sermál merkir, at heimastýrið tekur við lóggávuvaldi og fyrisitingarvaldi, og at heimastýrið ber kostnaðin av málsøkinum.

Tey mál, sum eru nevnd á lista B í heimastýrislógini, kunnu verða flutt til føroysk sermál eftir samráðingar við ríkismyndugleikarnar við somu fylgjum, sum nevnt er omanfyri. Mál, sum ikki eru nevnd á lista A ella B í heimastýrislógini, eru felagsmál sambært § 6 í heimastýrislógini. Ríkismyndugleikarnir hava lóggávuvald og fyrisitingarvald í felagsmálum og rinda kostnaðin av hesum. Hesi mál kunnu eisini verða latin heimastýrinum at umsita sambært § 9 í heimastýrislógini.

Mál, ið ikki eru nevnd í heimastýrislógini, t.d. persóns-, familju- og arvarættur, konkurs, skifti, ognarrættarlig lóggáva, ákæruvaldsskipanin og revsilóggávan, eru sostatt felagsmál. Sambært § 7 hevur heimastýrið ummælisrætt í lógarmálum, sum koma Føroyum við. Í verki er tað soleiðis, at øll lógaruppskot, sum ætlandi skulu galda fyri Føroyar, ella sum onkursvegna hava týdning fyri Føroyar, verða send heimastýrinum til ummælis. Í stýrisskipanarlógini verða hesi uppskot nevnd ríkislógartilmæli, og landsstýri og løgting viðgera tey eftir somu reglum, sum uppskot til løgtingslógir. Í staðin fyri at kunngera ríkislógartilmælini, verða tey, eftir løgtingsviðgerð, staðfest av løgmanni og send ríkisumboðsmanninum til endaliga avgreiðslu. Allar lógir og kunngerðir – eisini ríkislógir og ríkiskunngerðir – skulu lýsast í kunngerðablaðnum fyri at fáa gildi í Føroyum. Landsstýrið gevur kunngerðablaðið út og ber eisini kostnaðin av blaðnum.

Niðanfyri verða í stuttum lýstar tær donsku rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar, og sum Løgmansssskrivstovan fyrisitur.

### 2.1 Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar

Avtalur
*N.L. af 15.04.1687.*
*L. nr. 242 af 08.05.1917 om Aftaler og Retshandler paa*

*Formuerettens Omraade, som ændret ved L. nr. 250 af 12.06.1975.*

*A. nr. 361 af 30.05.1986 om ikrafttrædelsen for Færøerne af lov om gennemførelse af konvention om, hvilken lov der skal anvendes på kontraktlige forpligtelser m.v.*

Keyp

*L. nr. 102 af 06.04.1906 om Køb, som senest ændret ved L. nr. 147 af 04.04.1979.*

*L. nr. 122 af 15.04.1964 om hvilket lands retsregler der skal anvendes på løsørekøb af international karakter som ændret ved L. nr. 188 af 09.05.1984.*

*L. nr. 243 af 08.05.1917 om Kommission, Handelsagentur og Handelsrejsende.*

*L. nr. 361 af 13.12.1933 om Handelsrejsende på Færøerne, som senest ændret ved L. nr. 186 af 07.06.1958.*

*L. nr. 139 af 29.03.1978 om visse forbrugeraftaler, som sat i kraft ved A. nr. 483 af 28.11.1979.*

*B. nr. 655 af 19.12.1978 vedrørende oplysning om fortrydelsesret i henhold til lov om visse forbrugeraftaler, som sat i kraft ved B. nr. 569 af 11.12.1980.*

*L. nr. 275 af 09.06.1982 om køb på kredit, som sat i kraft ved A. nr. 735 af 23.10.1986.*

*B. nr. 112 af 21.03.1983 om undtagelser og fravigelser fra lov om køb på kredit.*

Skuld

*N. L. af 15.04.1687.*

*L. nr. 146 af 13.04.1938 om Gældsbreve, som senest ændret ved L. nr. 187 af 09.05.1984.*

*– B. nr. 223 fra 24.06.1938 angaaende Notering af Masse-gældsbreve, som ændret ved B. nr. 360 af 15.08.1942.*

*L. nr. 638 af 21.12.1977 om renter ved forsinket betaling, m.v., som sat i kraft ved A. nr. 588 af 04.11.1982.*

*L. nr. 29 af 16.02.1932 om Skyldners Ret til at frigøre sig ved Deponering.*

*– B. nr. 288 fra 12.11.1932 om Forvaring af Ydelser, der er deponeret i Henhold til L. nr. 29 af 16.02.1932.*

*MB. nr. 21 af 12.08.1940 (om Oppebørselskontoret som deponeringssted).*

Vekslar, kekkar

*L. nr. 68 af 23.03.1932: Veksellov, som ændret ved L. nr. 411 af 30.11.1965.*

*L. nr. 69 af 23.03.1932: Checklov, som senest ændret ved L. nr. 410 af 30.11.1965.*

*A. nr. 244 af 31.08.1932 om, at Checks kan trækkes paa Andels kasser samt paa Personer eller Selskaber, der i Henhold til Nærings-adkomst som Vekselerer udøver Vekselerer- eller Bankiervirksomhed.*

Fyrning, ógilding

*N.L. af 15.04.1687.*

*L. nr. 274 af 22.12.1908 om Forældelse af visse Fordringer.*

*L. nr. 145 af 13.04.1938 om Mortifikation af Værdipapirer, som ændret ved L. nr. 620 af 14.12.1977.*

*– B. nr. 222 af 24.06.1938 angaaende Indberetninger til Justits-ministeriets Kartotek over mortificerede og forældede Massegælds-breve og Aktier.*

*– B. nr. 243 af 02.07.1938 angaaende Meddelelser om Indkaldelse til Mortifikation af Massegældsbreve og Aktier.*

Arvur

*L. nr. 215 af 31.05.1963: Arvelov som sat i kraft ved A. nr. 272 af 14.05.1986.*

*L. nr. 88 af 30.03.1935 angående konvention mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om arv og dødsboskifte.*

*– B. nr. 348 af 24.06.1976 om ikrafttræden af konvention mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om arv og dødsboskifte.*

Skifti

*L. af 06.11.1858 for Færøerne om proklama i boer.*

*L. nr. 155 af 30.11.1874 om skifte af dødsbo og fællesbo m.v. som den senest er ændret ved A. 184 af 15.03.1989.*

*L. nr. 22 af 21.02.1902 vedrørende behandlingen af dødsboer efter brasilianske borgere, der afgå ved døden i Danmark.*

*L. nr. 119 af 20.04.1926 om tilsyn med de af eksekutorer behandlede dødsboer som sat i kraft ved A. nr. 105 af 04.05.1927.*

*– B. nr. 94 af 22.03.1933: Instruks for det ved lov nr. 119 af 20. april 1926 anordnede tilsyn med de af eksekutorer behandlede dødsboer, som senest ændret ved B. nr. 342 af 28.06.1982.*

*– Lb. nr. 555 af 01.11.1984 om rettens pleje som den er sat i kraft ved L. nr. 92 af 23.02.1988 § 241, § 654, § 660 – § 665 (Burturúrløgd her, víst verður til 25. part).*

Horvin

*L. nr. 397 af 12.07.1946 om borteblevne, som sat i kraft ved L. nr. 335 af 19.11.1954.*

Ognartøka

*L. nr. 69 af 07.05.1881om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne, som senest ændret ved MB. nr. 17 af 20.01.1944.*

*L. nr. 68 af 29.03.1893 om Afståelse af Grund til Fyranlæg m.m.*

*L. nr. 313 af 22.06.1917 om Afståelse af Grund til Anlæg af Sporforbindelse fra Kulminer til Udskibningssteder.*

*Ll. nr. 90 frá 01.11.1978 um ognartøku av lendi til brennistøðir o.a. / om ekspropriation af arealer til forbrændingsanlæg m.v.*

Hevd

*N.L. af 15.04.1687:*

Veð

*N.L. af 15.04.1687:*

*L. nr. 328 af 02.11.1962 for Færøerne om pantsætning af fangst.*

Lán, leiga

*N.L. af 15.04.1687.*

Tinglýsing og tinglesing

*Ll. nr. 55 frá 16.08.1962 um tinglýsing / om tinglysning, seinast broytt við Ll. nr. 39 frá 05.05.1987.*

*L. nr. 111 af 31.03.1926 om tinglysning, som ændret ved L. nr. 366 af 28.11.1962 i uddrag. (§ 30 og § 54).*

*– K. nr. 63 frá 11.12.1962 um tinglýsing, seinast broytt við K. nr. 91 frá 28.11.1979.*

*N.L. af 15.04.1687 (ang. tinglæsning).*

*L. nr. 81 af 05.05.1905 sigtende til at lette Udarbejdelsen af nye Skøde- og Panteregistre på Færøerne, som ændret ved L. nr. 51 af 26.03.1909.*

Lóggáva

*Reskript af 12.05.1688 om Norske Lovs ikrafttræden.*

*L. nr. 10 af 23.01.1903 om en Statstidende.*

*– B. nr. 82 af 24.03.1904 om Optagelse i Statstidende af forskellige Kundgørelser vedrørende Færøerne.*

*– B. nr. 218 af 21.04.1921 om Taksten for Optagelse af retslige og andre offentlige Bekendt-gørelser i „Dimmalætting, Amtstidende for Færøerne.”*

*– MB. for Færøerne nr. 2 af 09.05.1940 om Kundgørelser.*

*L. for Færøerne nr. 59 af 01.04.1912 om Ophævelse og Kundgørelse ved Kirkestævne m.m.*

*Ll. nr. 109 frá 17.12.1987 um alment kunngerðablað / om offentlig kundgørelsestidende, broytt við Ll. nr. 47 frá 30.03.1990.*

*– K. nr. 106 frá 08.09.1988 um alment kunngerðablað.*

*L. nr. 735 af 06.12.1989 om kundgørelse af love, anordninger og bekendtgørelser på Færøerne.*

Grundlógin, Fólkatingið, umboðsmaður Fólkatingsins, ríkisarvingalógin

*L. nr. 169 af 05.06.1953: Danmarks Riges Grundlov.*

*L. nr. 170 af 27.03.1953: Tronfølgelov.*

*Lb. nr. 342 af 01.12.1961 af lov om folketingets ombudsmand.*

*– B. nr. 48 af 09.02.1962 af instruks for folketingets ombudsmand.*

*L. nr. 458 af 30.06.1993 om folketingsvalg på Færøerne.*

Ríkisborgararættur

*L. nr. 175 af 18.05.1937 om Indfødsret Meddelelse § 3.*

*Lb. nr. 155 af 06.04.1978 af L. om dansk indfødsret, som senest ændret ved*

*L. nr. 159 af 18.03.1991.*

*– B. nr. 463 af 24.11.1950 om gennemførelse af lov nr. 252 af 27.05.1950 om dansk indfødsret.*

*– A. nr. 20 af 17.01.1969, hvorefter visse bestemmelser i lov om dansk indfødsret finder anvendelse i forhold til Finland, Norge og Sverige.*

*– B. nr. 576 af 22.11.1978 om erhvervelse af dansk indfødsret ved afgivelse af erklæring.*

*– B. nr. 184 af 20.03.1991 om brugerbetaling i forbindelse med naturalisation.*

*L. nr. 504 af 20.12.1950 om ordning af visse indfødsretlige forhold.*

*– B. nr. 523 af 23.12.1950 om gennemførelse af kapitel II i lov nr. 504 af 20.12.1950 om ordning af visse indfødsretlige forhold.*

*L. nr. 205 af 16.05.1950 om ophævelse af Dansk-islandsk Forbundslov m.m.*

*– B. nr. 399 af 30.09.1950 om oprettelse af et register over islandske statsborgere, der nyder lige ret med danske statsborgere.*

Ríkismyndugleikar

*Lb. nr. 178 af 21.05.1937 af lov om Statens Regnskabsvæsen og Revision, som ændret ved L. nr. 486 af 28.11.1942 og A. nr. 342 af 27.07.1970.*

Útlendingar

*Lb. nr. 20 af 07.02.1961 om udlændinges adgang til landet m.v., som ændret ved L. 183 af 20.05.1963.*

*B. nr. 220 af 23.06.1964 om udlændinges adgang til og ophold i landet, som ændret ved B. nr. 429 af 15.12.1965.*

Pass

*Færø Amts Kundgørelse nr. 11 af 31.03.1948 af Lov om Færøernes Hjemmestyre § 10.*

*L. nr. 223 af 07.06.1952 om pas til danske statsborgere m.v., som senest ændret ved L. nr. 176 af 07.04.1976.*

*– A. nr. 418 af 13.12.1952 om pastvang, som sat i kraft ved A. nr. 393 af 24.11.1960.*

*– B. nr. 575 af 27.08.1987 om pas m.v., som ændret ved B. nr. 34 af 21.01.1988.*

Revsing og fongsulsverk

Borgaralig revsilóg o.a.

*Lb. nr. 215 af 24.06.1939: Straffeloven, som senest ændret ved A. nr. 818 af 03.11.1997.*

*L. nr. 127 af 15.04.1930 om ikrafttræden af borgerlig straffelov, som senest ændret ved A. nr. 272 af 14.05.1986.*

*A. nr. 290 af 15.11.1932 om Påtale af strafbare Handlinger begået om Bord i fremmede Fartøjer på dansk Område.*

*A. nr. 54 af 21.02.1933 om Tilsyn med betinget domfældte, prøveløsladte m.v. samt om den i Straffelovens § 56, stk. 2, omhandlede særlige Undersøgelse i Sager angående betinget Dom.*

*L. nr. 132 af 29.04.1955 om straf for folkedrab.*

Fongsulsverk

*B. nr. 423 af 21.06.1973 om fuldbyrdelse af frihedsstraf, som senest ændret ved B. nr. 465 af 11.09.1981.*

*A. nr. 245 af 10.07.1933 angaaende Forsikring af Fanger og forvarede mod følger af Ulykkestilfælde.*

*L. nr. 188 af 07.06.1958 om arrestvæsenets ordning på Færøerne.*

*B. nr. 491 af 12.09.1978 om ophold i varetægtsfængsel, som ændret ved B. nr. 615 af 12.12.1980.*

Millumtjóða sakarmál

*L. nr. 27 af 03.02.1960 om udlevering af lovovertrædere til Finland, Island, Norge og Sverige, som ændret ved L. nr. 251 af 12.06.1975.*

*L. nr. 249 af 09.06.1967 om udlevering af lovovertrædere.*

*L. nr. 252 af 12.06.1975 om overførsel til andet land af retsforfølgning i straffesager, som sat i kraft ved A. nr. 154 af 21.03.1988.*

*L. nr. 214 af 31.05.1963 om samarbejde med Finland, Island, Norge og Sverige angående fuldbyrdelse af straf m.v.*

*L. nr. 323 af 04.06.1986 om international fuldbyrdelse af straf m.v., som sat i kraft ved A. nr. 153 af 21.03.1988.*

Aðrar almennar reglur

Rasumismunur o.tíl.

*L. nr. 289 af 09.06.1971 om forbud mod forskelsbehandling p.g.a. race m.v., som sat i kraft ved A. nr. 382 af 12.08.1972.*

Løgfrøðilig hjálp, innheintingar- og loyniløgregluvirksemi

*Lb. nr. 565 af 28.08.1986 om ydelse af juridisk bistand samt om inkasso-og detektivvirksomhed m.v., som sat i kraft ved L. nr. 92 af 23.02.1988.*

Endurgjald til brotsverksoffur

*L. nr. 277 af 26.05.1976 om erstatning fra staten til ofre for forbrydelser, som sat i kraft ved A. nr. 470 af 25.09.1984 og ændret ved L. nr. 233 af 06.06.1985.*

*B. nr. 471 af 25.09.1984 af forretningsorden for det færøske nævn vedrørende erstatning fra staten til ofre for forbrydelser.*

Hjúnalag

*L. nr. 276 af 30.06.1922 om Ægteskabs Indgaaelse og Opløsning, som senest ændret ved Ll. nr. 142 af 08.10.1992.*

*A. nr. 481 af 17.11.1922 om Fremgangsmaaden ved borgerlig Vielse og om Ægteskabsbogens Førelse m.v., som ændret ved A. for Færøerne nr. 218 af 16.05.1923.*

*A. nr. 482 af 17.11.1922 angaaende Betalingen for Udførelsen af de i Kapitel III og IV i Lov om Ægteskabs Indgaaelse og Opløsning af 30.06.1922 omhandlede Forretninger, som senest ændret ved A. nr. 466 af 14.12.1923.*

*A. nr. 483 af 17.11.1922 angaaende Foretagelsen af Mægling og Vilkaarsforhandling ved Separation og Skilsmisse, som sat i kraft ved A. nr. 218 af 16.05.1923.*

*A. nr. 484 af 17.04.1922. angaaende hvilket Steds Overøvrighed de Beføjelser skal tilkomme, som ved Lov om Ægteskabs Indgaaelse og Opløsning af 30.06. 1922 er tillagt Overøvrigheden.*

*B. nr. 485 af 20.11.1922 angaaende Formen for Tilførsler til Ægteskabsbogen samt for Udskrifter af samme.*

*B. nr. 486 af 20.11.1922. angaaende Formen for den i § 21 Nr. 5 i Lov om Ægteskabs Indgaaelse og Opløsning af 30.06.1922 omhandlede Erklæring.*

*A. nr. 544 af 22.12.1922 angaaende kirkelig Vielse indenfor Folkekirken m.v., som ændret ved A. for Færøerne nr. 237 af 23.05.1923.*

*B. nr. 131 af 23.04.1926 om Fastsættelse af Formen for visse Lægeerklæringer til Brug ved Ægteskabs Indgaaelse.*
*L. nr. 56 af 18.03.1925 om Ægteskabets Retsvirkninger, som senest ændret ved A. nr. 469 af 24.09.1984.*
*B. nr. 221 af 18.06.1938 om Autorisation af Læger til at afgive Erklæringer om Personers Sindstilstand til Brug ved Ægteskabs Indgaaelse og i Ægteskabssager.*
*L. nr. 102 af 14.03.1941 om Bevarelse af Enkepensionsret ved Separation og Skilsmisse, som ændret ved L. nr. 268 af 14.06.1951.*

Børn
*L. nr. 200 af 18.05.1960 om børns retsstilling, som senest ændret ved L. nr. 92 af 23.02.1988.1)*
*B. nr. 7 af 14.01.1961 om behandling af faderskabssager m.v., som sat i kraft ved B. nr. 368 af 30.11.1962.1)*
*L. nr. 279 af 07.06.1972: Adoptionsloven, som sat i kraft ved A. nr. 552 af 08.10.1982.*
*B. nr. 553 af 08.10.1982: Adoptionsbekendtgørelse for Færøerne.*

Løgræði
*L. nr. 277 af 30.06.1922 om Umyndighed og Værgemaal, som senest ændret ved A. nr. 14 af 18.01.1982.*
*B. nr. 15 af 18.01.1982 for Færøerne om værgens beføjelser og pligter.*
*A. nr. 186 af 12.05.1962 om ændring i anordning angående udlån af umyndiges og andre under offentlig bestyrelse eller offentligt tilsyn stående midler m.m.*

Millumtjóða viðurskifti, sum viðvíkja hjúnaløgum, børnum og løgræði
*L. nr. 79 af 19.02.1892 om Ægteskabs Indgåelse for danske Konsuler i Udlandet.*
*L. nr. 269 af 14.12.1906 om Overenskomster vedrørende Ægteskaber indgaaede for diplomatiske eller konsulære Embedsmænd.*
*B. nr. 252 af 04.12.1909 om en mellem Danmark og Sverig afsluttet Deklaration angaaende Ægteforeningers Indgaaelse for diplomatiske og konsulære Embedsmænd.*
*B. nr. 487 af 20.11.1922 angaaende Kundgørelse i Udlandet om Indgaaelse af Ægteskab her i Riget.*
*B. nr. 328 af 30.12.1931 angaaende Udstedelse af Ægteskabsattester til Brug ved Ægteskabs Indgaaelse i Udlandet.*
*L. nr. 279 af 11.11.1931 vedrørende internationalprivatretlige Bestemmelser mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om Ægteskab, Adoption og Værgemaal. 1) 2) 3)*

*L. nr. 158 af 06.05.1980 om anerkendelse af nordiske faderskabsafgørelser og om ændring af lov om anerkendelse og fuldbyrdelse af nordiske afgørelser om privatretlige krav §§ 1-4, som sat i kraft ved A. nr. 21 af 20.01.1984.*

Skráir

*Ll. nr. 62 frá 05.06.1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum / om offentlig myndigheders registre, seinast broytt við Ll. nr. 86 frá 15.06.1994.*

*Ll. nr. 107 frá 15.11.1984 um privatar skráir o.a. / om private registre m.v., broytt við Ll. nr. 87 frá 30.05.1994.*

*L. nr. 294 af 08.06.1978 om offentlige myndigheders registre, statslige myndigheder, som sat i kraft ved A. nr. 385 af 01.07.1988.*

*B. nr. 160 af 20.04.1979 om forretningsorden for registerrådet m.v., som sat i kraft ved A. nr. 385 af 01.07.1988.*

Viðmerkingar til lóggávuøki

Málsøkini: avtalur, keyp, skuld, vekslar/kekkar, fyrning, arvur, skifti, horvin, hevd, veð, lán/leiga og lóggáva eru felagsmál. Talan er sostatt um ríkislóggávu. Eingin verulig fyrisiting er av málsøkinum, annað enn lóggávufyrisiting, sum ríkismyndugleikarnir taka sær av og gjalda.

Tá ið lógir verða broyttar á hesum økjum – og tað er sjáldan – er tað Løgmansskrivstovan/løgdeildin, ið avgreiðir málini sum mál, ið eru send heimastýrinum til ummælis sambært § 7 í heimastýrislógini. At málsøkið kemur undir føroyskt málsræði, krevur ikki broytingar í lóggávuni. Nevnda lóggáva kann eisini verða umsitin við lítlum ella ongum meirkostnaði.

Í longdini verður tó neyðugt at menna løgdeildina soleiðis, at hon eisini kann verða før fyri at gera tað arbeiði, sum ríkismyndugleikarnir nú gera á økinum. Ríkismyndugleikarnir fylgja við gongdini á lógarøkinum bæði innan- og uttanlands fyri at vera búnir til at gera møguligar broytingar í lóggávuni.

Málsøkið „ognartøka" er felagsmál. Talan er sotatt um ríkislóggávu, ið ríkismyndugleikarnir umsita. Víst kann eisini verða til ásetingina um ognartøku í § 73 í grundlógini. Tá ið lógir verða broyttar á økinum, er tað Løgmansskrivstovan/løgdeildin, sum avgreiðir málini sum mál, ið eru send heimastýrinum til ummælis sambært § 7 í heimastýrislógini.

„Ognartøka til serlig endamál" er kortini á lista A í heimastýrislógini og er tí sermál. Løgtingið hevur eisini lóggivið á økinum.

Fyrisitingarligu myndugleikarnir eru Landsstýrið og stovnar undir Landsstýrinum, SEV og kommunurnar. At málsøkið kemur undir før-

oyskt málsræði burturav, krevur, at Føroyar ikki hava danska grundlóg. Hinvegin er løgdeildin, sum nú er, kærustovnur í ognartøkumálum. Tí kann málsøkið koma undir føroyskt málsræði burturav, uttan økt krøv til fyrisiting og kostnað.

Lóggávuheimildin um tinglýsing er yvirtikin. Málsøkið „**tinglýsing og tinglesing**“ umsita ávikavist tinglýsingin og Matrikkulstovan. Matrikkulstovan er yvirtikin, men tinglýsingin ikki. At fyrisitingin av málsøkinum „tinglýsing“ kemur undir føroyskt málsræði, krevur ikki lógarbroytingar. Hetta ger tó, at fullveldið skal fíggja økið, sum ríkismyndugleikarnir fíggja nú. Her er tó at siga, at bæði Matrikkulstovan og Tinglýsingin hava inntøkur av sínum virksemi. Sum er, verður tinglýsingin umsitin av Føroya rætti. Tí eigur tann fyrisitingarligi og fíggjarligi spurningurin í sambandi við, at tinglýsingin kemur undir føroyskt málsræði burturav, at verða viðgjørdur av undirnevndini hjá grundlógarnevndini, ið skal gera uppskot til føroyska rættarskipan.

Málsøkið „**lóggáva**“ verður fyrisitið av Landsstýrinum og ríkismyndugleikunum. Allar ríkislógir, ið skulu setast í gildi fyri Føroyar, skulu lýsast í kunngerðablaðnum B fyri at fáa gildi. Landsstýrið gevur út og rindar fyri kunngerðabløðini A og B. Ríkismyndugleikarnir umsita tey praktisku viðurskiftini at kunngera ríkislóggávu í Føroyum í kunngerðablaðnum B, men Løgmansskrivstovan/løgdeildin umsitur tey praktisku viðurskiftini at lýsa føroyska lóggávu í kunngerðablaðnum A.

At málsøkið kemur undir føroyskt málsræði, ger, at donsku reglurnar um kunngerð av lógum, fyriskipanum og kunngerðum í Føroyum verða settar úr gildi.

Sum er, rindar Landsstýrið tað, sum Kunngerðablaðið kostar. At málsøkið kemur undir føroyskt málsræði, hevur tí ongar fyrisitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar.

Málsøkini „**grundlógin, Fólkatingið, umboðsmaður Fólkatingsins, ríkisarvingalógin, ríkisborgararættur, ríkismyndugleikar, útlendingar og pass**“ eru felagsmál. Talan er sostatt um ríkislóggávu, og ríkismyndugleikarnir umsita og fíggja málsøkini.

Tá ið mál um heimarætt verða løgd fyri heimastýrið til ummælis, er tað Løgmansskrivstovan/løgdeildin, ið avgreiðir málini sambært § 7 í heimastýrislógini.

Avgerandi fyri, um fullveldi ber við sær krav um lógarligar, fyrisitingarligar ella fíggjarligar broytingar, er innihaldið í sáttmálanum, ið ætlanin er at gera við ríkismyndugleikarnir, og sum skal koma í staðin fyri heimastýrisskipanina.

Ætlandi skulu Danmark og Føroyar gera sínámillum sáttmála sum tvey javnbjóðis lond við fullveldi, og skal hesin sáttmáli koma í staðin

fyri heimastýrisskipanina. Hetta merkir, at lógirnar, sum omanfyri eru nevndar, verða settar úr gildi, og gjørd verða føroysk grundlóg og aðrar stýrisskipanarreglur. Við hesum fyri eyga er sett ein grundlógarnevnd, sum fer at seta undirnevnd at gera uppskot til føroyska rættarskipan. Grundlógarnevndin eigur at viðgerða fyrisitingarligu krøvini og fíggjarligu avleiðingarnar av, at málsøkið kemur undir føroyskt málsræði. Undirnevndin, sum skal gera uppskot til føroyska rættarskipan, eigur somuleiðis at viðgerða fyrisitingarligu krøvini og fíggjarligu avleiðingarnar av, at rættarskipanin kemur undir føroyskt málsræði.

Málsøkið „**revsing og fongsulsverk**" er felagsmál. Tað merkir, at talan er um ríkislóggávu. Ríkismyndugleikarnir fíggja og umsita málsøkini.

Tá ið lógarbroytingar verða gjørda á økinum, verður heimastýrið eftirspurt sambært heimastýrislógini § 7, og er tað Løgmansskrivstovan/løgdeildin, ið umsitir tey praktisku viðurskiftini í hesum sambandi.

At málsøkið kemur undir føroyskt málsræði, krevur ikki lógarbroytingar. Víst verður til 3.4, tá ið hugsað verður um fyrisitingarkrøv og fíggjarkrøv, tá ið økið kemur undir føroyskt málsræði.

Málsøkið „**hjúnalag, børn, løgræði, og millumtjóðaviðurskifti, sum viðvíkja hjúnaløgum, børnum og løgræði**" er felagsmál. Ríkislóggáva er sostatt galdandi á økinum, og ríkismyndugleikarnir umsita og fíggja økið.

Tá ið lógir verða broyttar á økinum, verður heimastýrið eftirspurt sambært § 7 í heimastýrislógini, og er tað Løgmansskrivstovan/løgdeildin, ið umsitur tey praktisku viðurskiftini í hesum sambandi. At málsøkið kemur undir føroyskt málsræði, krevur lógarbroytingar, serliga á økjum, har avgerðir sambært lógunum kunnu verða kærdar til myndugleikar í Danmark.

Sum er, nýta ríkismyndugleikarnir um leið fimm ársverk til at umsita økið. Væntast kann, at sami tørvur verður á arbeiðsorku, eftir at málsøkið er komið undir føroyskt málsræði. Víst verður í hesum sambandi til 3.2.

Føroyingar hava ongar royndir av at umsita málsøkið. Tí má verða hildið, at ríkismyndugleikarnir í eini skiftistíð upp á um leið eitt ár mugu hjálpa til at umsita økið.

Á málsøkinum „**skráir**" er føroysk skrásetingarlóggáva galdandi í yvirtiknum málum, og hetta økið fíggja og umsita føroyskir myndugleikar. Skráir hjá ríkismyndugleikum í Føroyum koma undir danska skrásetingarlóggávu, ið er sett í gildi fyri ríkismyndugleikar í Føroyum. Tó

hevur føroyska skrásetingareftirlitið ávísar heimildir í føroyku lógini at krevja ríkismyndugleikar í Føroyum eftir upplýsingum.

Fullveldi ger, at danska lógin, ið er sett í gildi fyri ríkismyndugleikar í Føroyum, verður sett úr gildi.

Fyrisitingarliga og fíggjarliga verða ongar broytingar av, at málsøkið burturav kemur undir føroyskt málsræði.

Niðurstøða:

Ríkismyndugleikarnir hava lóggávuheimildina á økinum „ríkislóggáva.“ Tá ið ríkislóggáva verður sett í gildi í Føroyum, verður málið sent heimastýrinum til ummælis sambært heimastýrislógini § 7. Áheitanin um at seta ríkislóggávu í gildi kemur í alra flestu førum frá ríkismyndugleikunum, men kann eisini koma frá heimastýrinum.

Tá ið undantikið er málsøkið „grundlógin, Fólkatingið, umboðsmaður Fólkatingsins, ríkisarvingalógin, ríkisborgararættur, ríkismyndugleikar, útlendingar og pass,“ so setir fullveldi ikki serlig krøv til lóggávu, annað enn nakrar smávegis lógarbroytingar á sivilrættarliga økinum.

Á sivilrættarliga økinum verður mett, at fimm ársverk kunnu umsita økið. Hetta kostar 1,5 mió. kr. um árið.

Einum ávísum umsitingararbeiði má eisini roknast við av at týða lóggávuna til føroyskt. Hetta er tó ikki neyðugt fyri tað, um økið kemur undir føroyskt málsræði, men ynskiligt er í longdini, at øll lóggáva verður orðað á føroyskum.

Tað ber illa til at meta um lóggávuarbeiðið og fyrisitingarligu og fíggjarligu avleiðingarnar á málsøkinum, „grundlóg, Fólkating, umboðsmaður Fólkatingsins, ríkisarvingalógin, ríkisborgararættur, ríkismyndugleikar útlendingar og pass,“ fyrr enn sáttmálin, ið skal gerast millum Føroyar og Danmark, er gjørdur. Men meginparturin av arbeiðinum, sum kemur undir nevnda málsøki, hoyrir til arbeiðssetningin hjá grundlógarnevndini.

Sjálvt um heimastýrið ummælir mál sambært útlendingalógini, so kann ikki sigast, at skipanin, sum er, kostar heimastýrinum nakað.

Um so verður, at føroyingar fáa serligan heimarætt og serliga útlendingalóggávu, so skal økið umsitast. Hvussu stór henda umsiting verður, ber illa til at meta um, tí tað hevur ikki verið møguligt at fingið upplýst, hvussu nógva orku Útlendingastýrið brúkar til mál, ið viðvíkja Føroyum, men færri enn 4 ársverk kunnu neyvan umsita skipanina.

At ríkislóggávan, ið her er viðgjørd, kemur undir føroyskt málsræði, kemur at seta nýggj krøv til løgdeildina.

Neyðugt verður tí at fáa meiri arbeiðsorku á løgdeildini og at menna hana fakliga, soleiðis at hon eisini í framtíðini kann fylgja

gongdini á økinum bæði innan- og uttanlands og vera búgvin til at gera neyðugar lógarbroytingar á økinum.

Gongdin í alheimssamstarvinum ger eisini, at samstarvað verður alsamt meiri. Hetta ger, at tað, meir enn nakrantíð áður, er ein skylda hjá londum at gera lóggávu eftir sama leisti, og er hetta eisini ofta orsøk til, at ríkismyndugleikarnir gera ríkislógir ella gera broytingar í teimum.

Eitt dømi um sovorðið samstarv, sum longu sæst aftur í føroyskari lóggávu, er føroyska mvg skipanin, sum er ein beinleiðis fylgja av handilsavtaluni við ES.

Eitt annað dømi, ið tosað verður um í løtuni, er, at lond fara at samstarva um at gera lóggávu um handil á internetinum. Um so varð, at lóggávan á hesum øki varð yvirtikin sambært galdandi heimastýrisskipan, hevði verðið neyðugt at sett av løgfrøðiliga arbeiðsmegi til at vera við í tílíkum samstarvi.

Annað enn at hava verið við í norðurlendskum lógarsamstarvi, hava Føroyar lítlar og ongar royndir á hesum øki.

Um so er, at Føroyar eisini skulu umsita uttanlandsmál burturav, so krevur hetta harafturat, at løgdeildin verður styrkt á altjóðarættarliga økinum.

Tað er torført at meta um fíggjarliga tørvin, tí tað veldst um, hvussu umfatandi millumtjóðasamstarvið verður, men ilt er at ímynda sær eitt løgfrøðiligt umhvørvi á hesum øki við færri enn fýra ársverkum.

Ein orsøk til, at ríkislóggávan, ið er umrødd her, ikki er yvirtikin sambært galdandi heimastýrislóg, kann vera, at nærum einki av økinum hoyrir til heimastýrislógina, og yvirtekst tí ikki eftir hesi skipan.

Í sambandi við at nevnda ríkislóggáva kemur undir føroyskt málsræði, eigur at verða umhugsað, hvussu ein skipan við frálæru í føroyskari løgfrøði á hægri stigi kann verða skipað.

Sum er, ber ikki til at fáa frálæru í føroyskari løgfrøði, sjálvt um staðfestast kann, at føroysk lóggáva í alsamt fleiri førum er øðrvísi enn t.d. donsk lóggáva.

Tá ið rættarskipanin kemur undir føroyskt málsræði, verður hesin spurningur upp aftur meiri viðkomandi, og eigur nevndin, ið skal gera uppskot til føroyska rættarskipan, tí at viðgera henda spurning sum ein part av sínum arbeiðssetningi.

## 2.2. Føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar

Í fleiri føroyskum lógum eru settar inn rættarreglur, ið vísa til danskar myndugleikar. Hetta kann hava fleiri orsøkir. Ein orsøk kann vera, at

hildið verður, at donsku myndugleikarnir eru teir einastu í Føroyum, sum hava serkunnleika á økinum. Ein onnur orsøk kann vera, at donsk lóggáva hevur fyrr verið á økinum, og í sambandi við yvirtøkuna hevur heimastýrið hildið tað verið skilagott framhaldandi at latið teir myndugleikar, ið hava royndirnar, umsita økið.

Sum dømi um slíka lóggávu eru at nevna ásetingarnar í lógunum niðanfyri, ið allar vísa til danskar myndugleikar. Gjørt verður vart við, at har víst verður til dóms- og løgregluvaldið sum dóms- og løgregluvald, er hetta ikki nevnt.

Niðanfyri verða nevndar tær løgtingslógir, ið hava tilvísingar til danskar myndugleikar, og sum Løgmansskrivstovan fyrisitir.

Byggi og býarskipanir – friðing

*Ll. nr. 13 frá 21.05.1954 um býarskipanir og byggisamtyktir / om byplaner og byggevedtægter, seinast broytt við Ll. nr. 57 frá 13.05.1997. (Eisini broytt við Ll. nr. 59 frá 05.06.1984 og Ll. nr. 80 frá 13.06.1995).*

Viðmerkingar:

– Í grein 15 verður ásett ein metingarnevnd, sum skal meta um endurgjaldsupphæddina í ósemjum um ognartøku. Í nevndini eru tveir limir, valdir av dómsvaldinum. Standa atkvøðurnar á jøvnum, kemur sýslumaðurin í teirri sýslu, sum málið er úr, í nevndina sum avgerðarmaður.

Kommunuval

*Ll. nr. 44 frá 19.06.1972 um val til allar føroyskar kommunur/om valg til samtlige færøske kommuner, seinastu ferð er broytt við Ll. nr. 105 frá 09.11.1984.*

Viðmerkingar:

– Í grein 22 er ásett, at ríkisumboðsmaðurin kann bera seg undan at taka við vali til býráðið.

Lóggáva

*Ll. nr. 109 frá 17.12.1987 um alment kunngerðablað / om en offentlig kundgørelsestidende, broytt við Ll. nr. 47 frá 30.03.1990.*

Viðmerkingar:

– Í grein 6 er ásett, at Landsstýrinum er heimilað eftir avtalu við ríkisstýrið ella ríkismyndugleikar og aðrar myndugleikar at seta lógir, kunngerðir, lýsingar o.tíl. í kunngerðablaðið.

Landsstýrið

*Ll. nr. 132 frá 10.06.1993 um fyrisitingarlóg.*

Viðmerkingar:
– Í grein 1 er ásett, at lógin geldur fyri allar partar av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum.
– Í grein 15 og 26 verður komið inn á ríkisviðurskifti.
Ll. nr. 133 frá 10.06.1993 um innlit í fyrisitingina.
Viðmerkingar:
– Í grein 1 er ásett, at lógin geldur fyri allar partar av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum.
– Í grein 13 verður komið inn á ríkisviðurskifti.

Løgting – fløgg
*Ll. nr. 42 frá 17.07.1959 um flaggið.*
Viðmerkingar:
– Í grein 3 er ásett, at før, sum skrásett eru í Føroyum, skulu nýta Føroya flagg, tó ikki ríkisins før.
– K. nr. 73 frá 26.06.1987: Reglugerð um flagging frá landsins bygningum.
– Í kunngerðini eru ásettir danskir halgidagar og kongligir føðingardagar.

Vápn o.a.
*Ll. nr. 43 frá 22.05.1969 um vápn o.a./ om våben m.v., broytt við Ll. nr. 54 frá 12.05.1980.*
Viðmerkingar:
– Í grein 1 er ásett, at loyvi skal verða fingið frá landfútanum at flyta inn, útvega sær, hava inni ella ganga við skotvápnum o.tíl.) Landfútin er eisini nevndur undir grein 5. Grein 6 ásetir, at lands- og ríkismyndugleikar ikki koma undir reglurnar í hesi lóg. Í grein 7 verður víst til rættargangslógina.
– K. nr. 57 frá 12.09.1969 um vápn o.a.
Viðmerkingar:
– Í grein 1 er ásett, at loyvisumsóknir um vápn verða sendar landfútanum um sýslumann ella løgreglu. Somuleiðis hevur fútin fingið ávísar heimildir.

Fólkanøvn
*Ll. nr. 142 frá 08.10.1992 um fólkanøvn/ om personsnavne.*
Viðmerkingar:
– Í grein 12 verður víst til danska lóg „Lov nr. 89 af 22. april 1904 om navneforandring„ í sambandi við vard nøvn.

Skráir
*Ll. nr. 62 frá 05.06.1984 um evnisskráir hjá almennum*

*myndugleikum, seinast broytt við Ll. nr. 51 frá 13.05.1997 (Eisini broytt við Ll. nr. 113 frá 20.12.1991, Ll. nr. 72 frá 02.04.1993, Ll. nr. 124 frá 21.05.1993, Ll. nr. 35 frá 24.03.1994 og Ll. nr. 86 frá 15.06.1994.)*

Viðmerkingar:
– Í grein 22 um Skrásetingareftirlitið er ásett, at Skrásetingareftirlitið eisini ger arbeiði sambært § 32 í lóg nr. 294 frá 8. juni 1978 „om offentlige myndigheders registre vedrørende registre på Færøerne, der føres for rigsmyndighederne.
– Í § 23 eru ásettar reglur fyri skráir, førdar av ríkismyndugleikunum.

Niðurstøða

Fullveldi ber við sær, at nakrar lógardagføringar skulu verða gjørdar á økinum. Eitt nú skulu donsku lógirnar um fyrisitingarlóg, innlit í fyrisitingina og skrásetingarlógin setast úr gildi. Grein 6 í lógini um alment kunngerðablað verður somuleiðis sett úr gildi. Fútaembætið kann eisini røkja uppgávurnar sambært løgtingslógini um vápn eftir fullveldi, og verður tí eingin broyting á hesum øki.

Mett verður ikki, at hesar broytingar kosta nakað.

## 2.3 Formligt og óformligt samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar

Umframt tað rættarliga samstarv, sum er millum føroyskar og danskar myndugleikar, er eisini talan um formligt og óformligt samstarv á ymsum stigum millum myndugleikarnar.

Niðanfyri verður í stuttum lýst tað formliga og óformliga samstarv, sum er millum Løgmansskrivstovuna og danskar myndugleikar.

Uttanríkismál

Føroyskir og danskir myndugleikar samstarva bæði formliga og óformliga um uttanríkismál.

Formliga samstarvið fevnir um hesi samstarvsøki:

- Skipanin við einum serkønum embætisfólki í føroyskum viðurskiftum í danska uttanríkismálaráðnum sambært heimastýrislógini.
- Ávísar starvssetanir av føroyskum embætisfólkum í danska uttanríkismálaráðnum og tess sendistovum sambært heimastýrislógini.
- Skipan av føroyskum samráðingarnevndum sambært heimastýrislógini.
- Ummæli av millumlandasáttmálum sambært heimastýrislógini.
- Ein uttanríkismálanevnd, myndað av embætisfólkum úr Løg-

mansskrivstovuni og danska uttanríkismálaráðnum. Nevndin er sett á stovn sambært setningi, sum Føroya løgmaður og danski uttanríkismálaráðharrain hava givið í felag.
- Ein árligur fundur er í Føroyum millum Føroya løgmann og danska uttanríkismálaráðharran um uttanríkismál.

Óformliga samstarvið fevnir um hesi samstarvsøki:
- Almenn kunning frá ávikavist danska uttanríkismálaráðnum og ríkisumboðsmanninum í Føroyum um uttanríkisviðurskifti, ið kunnu hava týdning fyri Føroyar.
- Fyrispurningar úr Føroyum um ávís uttanlandsviðurskifti.
- Sínámillum kunning um málsviðgerð av áleikandi føroyskum uttanlandsmálum.

Mett verður, at danska uttanríkismálaráðið í mesta lagi brúkar fýra ársverk, ið svara til 2 mió. kr. til føroysk uttanlandsmál. Útreiðslur Landsstýrisins av uttanlandsmálum eru í fíggjarlógarárinum 1999 settar til tíggju milliónir krónur. Her eru tó ikki íroknaðar útreiðslurnar hjá teimum einstøku aðalstýrunum, sum eru um leið 2 mió. kr., ið svara til fýra ársverk.

Um býtið av fíggjarábyrgdini hjá Føroya landsstýri og donsku stjórnini í føroyskum uttanlandsmálum er í stuttum at siga, at Landsstýrið rindar allar útreiðslur. Undantiknar eru lønarútreiðslur og ferðaútreiðslur hjá donskum embætismonnum.

### Løgmál

Sum nevnt, samstarva føroyskir og danskir myndugleikar um ríkislóggávu, sum skal setast í gildi í Føroyum, á tann hátt, at heimastýrið ummælir ríkislógartilmæli. Harumframt er Løgmansskrivstovan við í arbeiðinum í nevndini, sum løgmálaráðharrin hevur sett at gera uppskot til føroyska rættargangslóg.

Roknað verður við, at Løgmansskrivstovan fer at hava ein virknari lut í arbeiðinum hjá ríkismyndugleikunum í sambandi við Schengen-samstarvið og nýggju útlendingalógina, sum ætlanin er at seta í gildi fyri Føroyar.

Skrásetingareftirlitið hevur óformligt samstarv við Registertilsynet í Danmark. Samarbeiðið hevur serliga snúð seg um viðgerð av skráum hjá ríkismyndugleikunum og skráseting í sambandi við nakrar privatar verkætlanir, har upplýsingar eru savnaðar í Føroyum, og edvviðgerðin hevur verið í Danmark. Skrásetingareftirlitið hevur eisini vent sær til Registertilsynet, tá ið ivi hevur verið um, hvussu okkurt mál skuldi viðgerast.

## Niðurstøða

Sum sæst omanfyri er samstarvið avmarkað, hóast virkisøkini eru sera stór. Fleiri av teim samstarvsøkjum, sum nevnd eru, detta burtur, tá Føroyar verða lýstar sum fullveldi. Tó verður mett, at onnur samstarvsøki helst fara at stinga seg upp, og at innihaldi í samstarvinum og tað, sum samstarva verður um í framtíðini, fer at broytast og møguliga at vera meiri fjøltáttað.

# Kapittul 3

## 3. Mál, sum Danmark umsitur, og málsetingar fyri sjálvstøðuga umsiting

### 3.1 Uttanríkismál

Fyrisiting av uttanríkismálum
Av tí at málsøkið uttanríkismál sambært heimastýrislógini er felagsmál, er lóggávan á økinum mest donsk. Tó er í ávísum førum serføroysk lóggáva sett í gildi í sermálum í sambandi við gildisseting av millumríkjasáttmálum. Annars verður víst til Lovregister for Færøerne 1998.

Skipan av uttanríkistænastu Føroya
Samsvarandi fullveldisætlanum Landsstýrisins kemur málsøkið uttanríkismál undir føroyskt málsræði, og verða tey mál, ið áður formliga lógu undir danska uttanríkismálaráðnum, sambært bygnaðinum í landsfyrisitingini løgd undir uttanríkisdeildina á Løgmansskrivstovuni saman við umboðsstovunum uttanlands.

Føroyskt málsræði á økinum fer at seta ávís fyrisitingarlig krøv. Fyrst verða fyritreytir nevndar, síðani verður ein lýsing gjørd, grundað á fyritreytirnar.

Fyritreytir fyri at skipa føroyska uttanríkistænastu
✓ Føroya landsstýri fær ábyrgd av at skipa eina uttanríkistænastu, ið tryggjar týdningarmikil føroysk áhugamál í samskifti Føroya við umheimin.
✓ Avgerandi fyri, hvussu ein føroysk uttanríkistænasta verður skipað, er, hvussu umfevnandi uttanríkissamstarvi føroyingar hava tørv á, bæði við onnur lond og við millumríkjafelagsskapir. Lond, sum eru javnstór við Føroyar, hava vanliga sendistovu og umboðsstovu í grannalondum sínum, fyrrverandi miðveldi (í hesum føri Danmark), næsta stórveldi, høvuðsmarknaði og á ST-høvuðsborgini í New York.
✓ Í flestu londum er tað nøkulunda helvt um helvt, um starvsfólk í uttanríkistænastu arbeiða heima ella burturi. Tó er vanligt hjá londum, sum eru á støðd við Føroyar, at tann størra helvtin starvast uttan-

ríkis. Í hesum sambandi verður tann frymilin nýttur sum fyritreyt, at ein triðingur av starvsfólkunum starvast í Føroyum, og tveir triðingar uttanríkis.

Við nevndu fyritreytum í huga, verður neyðugt at taka hesi stig til at skipa føroyska uttanríkistænastu.

1. At umhugsa at skipa hesar sendistovur og umboðsstovur:
Sendistovu Føroya í Reykjavík
Sendistovu Føroya í Oslo
Sendistovu Føroya í Keypmannahavn
Sendistovu Føroya í London
Sendistovu Føroya í Washington
Umboðsstovu Føroya í Brússel
Umboðsstovu Føroya í New York

2. At umhugsa at gerast limaland í hesum millumríkjafelagsskapum:
Alheims postsambandinum, (UPU)
Arktiska ráðnum
Barentsráðnum
Sáttmálin um millumtjóða handil við hóttum djóra- og plantusløgum (CITES)
Evroparáðnum
Felagsskapinum fyri búskaparligum samstarvi og menning, (OECD)
Felagsskapinum fyri trygd og samstarvi í Evropa, (OSCE)
Fiskiveiðifelagsskapinum fyri Útnyrðingsatlantshav, (NAFO)
Fiskiveiðinevndini fyri Landnyrðingsatlantshav, (NEAFC)
Havssúgdjóranevndini fyri Norðuratlantshav, (NAMMCO)
Heimsbankin (IBRD)
Heimsfelagsskapinum fyri andsverk, (WIPO)
Heimshandilsfelagsskapinum, (WTO)
Heimsheilsufelagsskapinum, (WHO)
Heimstollfelagsskapinum
Heimsveðurlagsfelagsskapinum, (WMO)
Laksaverndarfelagsskapinum fyri Norðuratlantshav, (NASCO)
Matvøru- og landbúnaðarfelagsskapi sameindu tjóða, (FAO)
Mentamálafelagsskapi sameindu tjóða, (UNESCO)
Millumtjóða dómstólinum, (ICJ)
Millumtjóða fjarskiftissambandinum, (ITU)
Millumtjóða flogferðslufelagsskapinum, (ICAO)
Millumtjóða gjaldoyra grunnurin (IMF)
Millumtjóða havbotnsmyndugleikanum, (ISA)
Millumtjóða havrannsóknarráðnum, (ICES)
Millumtjóða hvalaveiðinevndini, (IWC)

Millumtjóða løgverjufelagsskapinum, (INTERPOL)
Millumtjóða marknanevndini (IBC)
Millumtjóða sjóferðslufelagsskapinum, (IMO)
Millumtjóða, vatnfrøðiliga felagsskapinum
Millumtjóða verkamannafelagsskapinum, (ILO)
Millumtjóðanevndini fyri vernd av atlantshavstunfiski, (ICCAT)
Nevndini fyri burðardyggari menning, (CSD)
Norðuratlantska sáttmálafelagsskapinum, (NATO)
Norðurlandaráðnum (NR)
Sameindu tjóðum, (ST)
Sáttmálin um lívfrøðiligt margfaldni (CBD)

<u>3. At umhugsa at gera hesar ábøtur á verandi uttanlandsdeild:</u>
At skipa uttanlandsdeildina í hesi fyrisitingarøki:

Politisk mál
- Trygdarmál
- Fullveldismál
- Verjumál
- NATO
- OSCE

Tvílandamál
- Politisku viðurskiftini við útlond
- Marknamál

Økismál
- Norrøna samstarvið
- Politisku viðurskiftini við ES
- Altjóðamál
- ST
- Felagsskapir, knýttir at ST

Viðskiftamál
- Tvílandahandilsmál
- Marknaðarviðurskifti uttanríkis
- Tænastuveitingar til útflutningsfyritøkur

Økissáttmálar
- Handilssáttmálin við ES
- Handilssáttmálar við EFTA lond
- Handilssáttmálar við eystanlond
- Aðrir handilssáttmálar

Millumríkjasáttmálar
- OECD
- WTO

Tilfeingismál

Veiðimál
- Fiskiveiðisáttmálar
- NAFO
- NEAFC
- NASCO
- ICCAT
- NAMMCO
- IWC
- ICES

Umhvørvismál
- Nevndin fyri burðardygga menning, (CSD)
- Kyoto tilgongdin

Menningarhjálp
- Neyðhjálp
- Flóttarfólk

Arktisk mál
- Barentsráðið
- Arktiska ráðið

Umboðanarmál

Siðaskipanir
- Føroyskir stjórnarsendimenn
- Útlendskir stjórnarsendimenn
- Útlendskir ríkisleiðarar
- Vitjanir av útlendskum stjórnarumboðum

Ræðismál, (Consular Affairs)
- Pass og visa
- Stuðlan av føroyingum uttanríkis
- Ættarviðurskifti og ognarmál, (viðskiftafólk uttanríkis)
- Løgtingsval og fólkaatkvøður, (føroyingar uttanríkis)

Kunningarmál

- Uttanríkiskunning
- Fjølmiðlaviðurskifti
- Mentamál

Trygdarmál

Trygdarmál, herímillum *verju- og hernaðarmál*, eru ein týdningarmikil partur av fullveldisfyrisitingini. Uttanlandsdeild Løgmansskrivstovunnar metir, at hóskiligast hevði verið at umsitið málsøkið trygdarmál í somu fyrisiting, sum umsitur uttanríkismál annars, t.e. í eini føroyskari uttanríkistænastu. Hetta er eisini skipanin í øðrum londum.

Í stuttum kunnu trygdarmálini hjá Føroyum býtast í tríggjar høvuðsbólkar: (1) Verja og hevda fullveldið innan fyri ríkismarkið, (territoriið), (2) Tilbúgving, bjarging og eftirlit, heruppií eftirlit við fiskiveiði og umhvørvi, og (3) at vera við til at varðveita trygdarstøðuna í Norðurhøvum.

Tá ið ræður um at fremja fullveldishevd og fiskiveiðieftirlit í verki, (bólkarnir 1 og 2 omanfyri), verður víst til frágreiðingina hjá Fiskimálastýrinum, har mett verður, at verður økt um teirra uppgávur samsvarandi tørvinum í einum fullveldi, fara rakstrarútreiðslurnar at vaksa um 10 mió. kr. um árið.

Harumframt verður neyðugt at gera sáttmála um samstarv við eitt vinarsinnað land í Norðurhøvum ella at gerast limur í NATO, til tess at tryggja landsins verju, og til tess at geva grannum okkara tryggleika fyri, at innan fyri føroyskt ríkismark er einki virksemi, ið hóttir teirra trygd, (bólkur 3 omanfyri)

Fíggjarkrøv

Skal ein føroysk uttanríkistænasta samsvara við ta skipan, sum umrødd er omanfyri, fer tað at seta fíggjarkrøv, ið verða gjølligari útgreinað niðanfyri. Tær árligu rakstrarútreiðslurnar hava mest støði í starvsfólkalønum og vøru- og tænastukeypi, heruppií limagjøld til millumríkjafelagsskapir. Aftur at rakstrarútreiðslunum verða eisini aðrar løguútreiðslur.

Sum áður sagt, verða starvsfólk í uttanríkistænastu býtt í tveir høvuðsbólkar, tey, sum starvast heima, og tey, sum starvast burturi. Mett verður, at heildarkostnaðurin fyri eitt starvsfólk heima er í miðal um leið 500.000 krónur um árið. Av hesum fara um leið 300.000 krónur í løn, viðbótum og arbeiðsgevaragjøldum, og um leið 150.000 krónur í ferðaútreiðslum og skrivstovuútreiðslum. Harumframt verða 50.000 kr. í eykaútreiðslum fyrsta árið til útgerð. Heildarkostnaður fyri eitt starvsfólk burturi verður mettur til um leið 1.000.000 krónur um árið. Her verður tó uppgjørt fyri eitt

miðalfólk við maka og tveimum børnum, har útreiðslur eru av langtíðarleiðu, útgerð o.ø.

Føroyskur limaskapur í millumríkjafelagsskapum fer í flestu førum at seta fíggjarkrøv. Tí eigur at verða nevnt, at ikki allir felagsskapir krevja inn limagjald. Tað valdast, um felagsskapurin hevur egna skrivstovu. Vanligt er, at goldið verður eftir bruttotjóðarúrtøku. Í øðrum førum verður goldið sambært semju millum limaland og felagsskap, alt eftir, hvussu virknan politikk limalandið hevur í millumtjóða høpi í virkseminum hjá felagsskapinum.

Skipanin av eini føroyskari uttanríkistænastu kann hava løguútreiðslur við sær. Mett verður, at tílíkar útreiðslur kunnu verða av sendistovum og umboðsstovum. Aftur at hesum eigur at verða havt í huga, at vanligt er at langtíðarleiga bygningar, íbúðir, akfør og aðra útgerð í slíkum starvi. Hesar útreiðslur eru roknaðar upp í útreiðslurnar, sum nevndar vóru omanfyri um fólk, ið starvast burturi í uttanríkistænastu.

Skipanin av eini føroyskari uttanríkistænastu fer at seta ávís starvsfólkakrøv. Ein fullmannað sendistova krevur ein sendiharra, ein varasendiharra, ein sendifulltrúa, eitt skrivstovufólk og eitt hjálparfólk, ið eisini er bilførari. Tað er tó ikki óvanligt, at sendistovur hava minni manning. Í ávísum førum eru dømi um sendistovur, har sendiharrin er einsamallur um alt. Eisini nýta smá lond av fíggjarávum heimastarvandi, ferðandi sendiharrar.

Heildarkostnaðurin fyri eina føroyska uttanríkistænastu, sum samsvarar áðurnevndu ætlan, verður viðgjørdur niðanfyri í trimum stigum. Fyrst verður kostnaðurin og starvsfólkatørvurin fyri føroyskar sendistovur og umboðsstovur viðgjørdur. Síðan verður kostnaðurin fyri føroyska luttøku í millumríkjafelagsskapum viðgjørdur, og at enda verður umrøddur kostnaðurin og starvsfólkatørvurin í sambandi við eina samsvarandi útbygging av uttanlandsdeildini.

### Árligur rakstrarkostnaður av sendistovum og umboðsstovum

*Sendistova Føroya í Reykjavík*

| | |
|---|---|
| Lond og felagsskapir: | Ísland |
| Starvsfólk: | Ein sendiharri |
| | Ein sendifulltrúi, (varasendiharri) |
| | Ein skrivari |
| Rakstrarútreiðslur: | 3 mió. kr. |

*Sendistova Føroya í Oslo*

| | |
|---|---|
| Lond og felagsskapir: | Noreg og Russland |
| Starvsfólk: | Ein sendiharri |

| | |
|---|---|
| | Ein sendifulltrúi, (varasendiharri) |
| | Ein skrivari |
| Rakstrarútreiðslur: | 3 mió. kr. |

*Sendistova Føroya í Keypmannahavn*

| | |
|---|---|
| Lond og felagsskapir: | Danmark, Svøríki og Finnland |
| Starvsfólk: | Ein sendiharri |
| | Ein sendifulltrúi, (varasendiharri) |
| | Ein skrivari |
| Rakstrarútreiðslur: | 3 mió. kr. |

*Sendistova Føroya í London*

| | |
|---|---|
| Lond og felagsskapir: | Bretland, Írland og londini í bretska samveldinum |
| Starvsfólk: | Ein sendiharri |
| | Tveir sendifulltrúar, (annar varasendiharri) |
| | Ein skrivari |
| Rakstrarútreiðslur: | 4 mió. kr. |

*Sendistova Føroya í Washington*

| | |
|---|---|
| Lond og felagsskapir: | USA, Kanada, Meksiko, Miðamerika, Suðuramerika, tó undantikin londini í bretska samveldinum, NAFTA |
| Starvsfólk: | Ein sendiharri |
| | Tveir sendifulltrúar, (annar varasendiharri) |
| | Tveir skrivarar |
| Rakstrarútreiðslur: | 5 mió. kr. |

*Umboðsstova Føroya í Brússel*

| | |
|---|---|
| Lond og felagsskapir: | Evropa, undantikin Norðurlond, Bretland, Írland og Russland, ES, OECD, WTO, NATO, OSCE |
| Starvsfólk: | Ein sendiharri |
| | Fýra sendifulltrúar, (ein teirra varasendiharri) |
| | Tveir skrivarar |
| Rakstrarútreiðslur: | 7 mió. kr. |

*Umboðsstova Føroya í New York*

| | |
|---|---|
| Lond og felagsskapir: | Kyrrahavið; Asia; Afrika; undantikin londini í bretska samveldinum; ST |

| | |
|---|---|
| Starvsfólk: | Ein sendiharri<br>Fýra sendifulltrúar, (ein teirra varasendiharri)<br>Tveir skrivarar |
| Rakstrarútreiðslur: | 7. mió. kr. |

### Árligur kostnaður av føroyskum limaskapi í millumríkjafelagsskapum

Tað kann verða ymiskt, hvussu neyðugt tað er fyri Føroyar at vera limir í teim ymsu felagsskapunum, sum áður eru nevndir. Føroyar eru longu limir í onkrum teirra, antin sum sjálvstøðugur limur, (NAMMCO), ella við óbeinleiðis limaskapi sum danskur ríkispartur, (IWC).

Summir felagsskapir eru nevndir, tí tað er eyðsæð, at spurningurin um limaskap í hesum heilt vist fer at stinga seg upp í eini fullveldistilgongd, hóast tað enn ikki er greitt, um politiska valdið í Føroyum vil hava slíkan limaskap.

Samanløgdu, árligu útreiðslurnar av limagjaldi í øllum hesum 37 felagsskapum eru mettar til um leið 13 milliónir krónur, (við 25% óvissu hvønn vegin). Metingarnar byggja á verandi limagjøld hjá Føroyum í fimm felagsskapum, umframt gjøld hjá Íslandi, San Marino og Danmark. Tó er ikki vist, at Føroyar fara at søkja um limaskap í øllum hesum felagsskapum. Millum teir dýrastu felagsskapirnar eru Sameindu tjóðir, Norðurlandaráðið og Norðuratlantski sáttmálafelagsskapurin.

Av áðurnevndu 37 millumríkjafelagsskapum eru Føroyar longu gjaldandi limir í fimm teirra: ICES, NAFO, NAMMCO, NEAFC og NASCO. Vit gjalda hesum til samans 762.834 krónur í 1999. Varliga mett eiga Føroyar við fullveldi í øllum førum at gerast limir í einum 8-15 millumríkjafelagsskapum afturat. Tað fer at merkja, at fullveldi væntandi fer at hava við sær eina eykaútreiðslu til limagjøld í millumríkjafelagsskapum upp á í minsta lagi 3-6 milliónir krónur. Vilja Føroyar gerast limir í upp aftur fleiri felagsskapum, økjast útreiðslurnar til limagjøld samsvarandi. Tó fer limaskapur í einum millumríkjafelagsskapi ofta at hava vinnulig áhugamál, og tá verður limagjald í slíkum felagsskapi at rokna sum ein fyritreyt fyri at tryggja landinum inntøkur á viðkomandi økjum.

### Árligur rakstrarkostnaður av eini útbygdari uttanríkisdeild

Sum áður sagt verður tann frymilin nýttur sum ein av fyritreytunum fyri at skipa eina føroyska uttanríkistænastu er, at ein triðingur av starvsfólkinum starvast í Føroyum og tveir triðingar út í heimi. Av tí at føroyskar sendistovur og umboðsstovur, eftir lýsingini omanfyri,

fara at krevja 32 starvsfólk til samans, verða tey 16, sum fara at starvast heima. Sambært hesi ætlan verður uttanríkistænasta Føroya sostatt mannað við 48 starvsfólkum til samans.

Tey sekstan starvsfólkini í uttanríkisdeildini kundu hóskandi verið býtt soleiðis.

✓ Leiðsla og skrivari: tvey fólk
✓ Politisk mál: fýra fólk
✓ Viðskiftamál: fimm fólk
✓ Tilfeingismál: trý fólk
✓ Umboðanarmál: tvey fólk

Allur kostnaðurin fyri tey sekstan fólkini, ið skulu starvast heima, verður sambært áðurnevndu kostnaðarætlan um leið átta milliónir krónur. Harafturat verða um leið fýra milliónir krónur til umboðan og keyp av sertænastum uttanlands.

Árligur heildarkostnaður fyri rakstur av føroyskari uttanríkistænastu:

| | |
|---|---|
| Uttanríkisdeild | 12 mió. kr. |
| Sendistovur og umboðsstovur | 32 mió. kr. |
| Limagjøld | 13 mió. kr. |
| Til samans | 57 mió. kr. |
| | |
| Uttanlandsdeild í 1999 | 5 mió. kr. |
| Sendistovur og umboðsstovur í 1999 | 4 mió. kr. |
| Limagjøld í 1999 | 1 mió. kr. |
| Til samans í 1999 | 10 mió. kr. |
| | |
| Eykafíggjartørvur | 47 mió. kr. |

Eykafíggjartørvurin er munurin millum útreiðslur Føroya til uttanríkismál í 1999 og árligu útreiðslurnar av eini fullmentari føroyskari uttanríkistænastu, ið einsamøll umsitur uttanríkismál Føroya.

Búskaparlig árin av eini føroyskari uttanríkistænastu

Sum heild er at siga, at skipanin av Føroyum sum fullveldi við egnari uttanríkistænastu fer at hava við sær árin á tann føroyska búskapin.

Sum omanfyri umrøtt, kann ein fult útbygd, føroysk uttanlandstænasta fara at økja um útreiðslurnar á fíggjarløgtingslógini við 47 milliónum krónum.

Hóast ein føroysk uttanríkistænasta fer at kosta á fíggjarløgtingslógini, so eigur at verða havt í huga, at ein føroysk uttanríkistænasta

kann fáa týdning fyri føroyskar útflutningsfyritøkur. Mangt bendir á, at í løtuni hava føroyskar útflutningsfyritøkur trupult við at koma framat á fjarmarknaðum, serstakliga tí at tær ikki hava fíggjarorku til at stovna egnar skrivstovur á fremmandum marknaðum til marknaðarføring. Sostatt kundu føroyskar sendistovur og umboðsstovur, umframt at røkja stjórnarsamskifti Føroya við onnur lond, eisini arbeitt fyri handilsligum áhugamálum hjá føroyskum útflutningsfyritøkum.

### Búskaparlig árin av útlendskum sendistovum í Føroyum

Verða Føroyar fullveldi, fara onnur lond væntandi at fáa sær sendistovur í Havn. Í løtuni er ilt at siga, hvussu nógvar tær kunnu fara at verða, tí at eingin ivi er um, at fleiri av londunum fara at mæla til, at sendiharrum teirra í grannalondum Føroya verður veitt sendiheimild til eisini at starvast í Føroyum.

Tó er líkt til, at umframt Norðurlond fara stórveldini at hava sendistovur í Havn. Havandi í huga, hvussu lítil føroyski búskapurin er, kann virksemið hjá hesum sendistovum fáa týdning fyri inntøkusíðuna á fíggjarløgtingslógini og fyri føroyska búskapin yvirhøvur. Við øðrum orðum kann virksemið hjá útlendskum sendistovum fyri ein part javna út samfelagsbúskaparligu útreiðslurnar av eini føroyskari uttanríkistænastu.

### Samandráttur

Við støði í tí uppskoti, sum lýst er omanfyri um eina føroyska uttanríkistænastu, verður í fyrstu syftu einans tørvur á framhaldandi samstarvi um ræðismál. Tørvurin fer tó at minka so hvørt, sum føroyska uttanríkistænastan fær í lag eina skipan við føroyskum ræðismonnum kring heimin. Nevnast skal, at slíkar skipanir vanliga ikki bera við sær útreiðslur. Tó kunnu í einstøkum førum verða útreiðslur av ítøkiligum málum.

Til tess at stovna eina føroyska uttanríkistænastu krevjast væl umhugsaðar ætlanir, peningur og fólk og eftirútbúgving av fólki. Ikki verður tó byrjað heilt á berum sum í Íslandi í ávikavist 1918 og 1944. Føroya landsstýri hevur longu eina uttanlandsdeild á Løgmansskrivstovuni við seks fólkum og einum fólki í Brússel. Aftur at hesum sjey á uttanlandsdeildini eru knýtt trý fólk at viðskiftastovuni í Keypmannahavn, og eitt er í Aberdeen. Harafturat er eitt starvsfólk, sum í løtuni starvast við uttanlandsmálum Føroya á eini skrivstovu í danska uttanríkismálaráðnum, men sum verður lønt av Løgmansskrivstovuni, og sum vísir til hennara. Sostatt hevur føroyska uttanlandstænastan tólv fólk í starvi til samans. Her eru ikki tald við tey starvsfólk hjá aðalstýrunum, ið undir verandi heimastýrisskipan arbeiða við uttan-

landssmálum. Tí starvast undir myndugleika Landsstýrisins í veruleikanum fleiri enn tólv fólk við føroyskum uttanlandsmálum.

Spurningurin er so, um hetta er nóg mikið til at taka ímóti fyrsta fullveldisdegi. Til tess at svara hesum er neyðugt at hyggja at, hvat ið eigur at vera framt á fyrsta fullveldisdegi. Hesi stig mugu tá vera tikin:

Í fullveldissáttmálanum við Danmark mugu vera ásetingar um fyrisitingarligt samstarv á uttanríkispolitiska økinum millum avvarðandi myndugleikar í Føroyum og Danmark í eini skiftistíð upp á um leið 10 ár, alt eftir, hvussu skjótt føroyska uttanríkistænastan verður útbygd.

Føroya landsstýri má hava tikið stig til føroyskan limaskap í Sameindu tjóðum, og á tann hátt hava tryggjað sær viðurkenning av fullveldi Føroya frá limalondunum.

Við hesum tiltøkum og verandi manning Føroya í uttanríkismálum ber til at taka ímóti fyrsta fullveldisdegi, men greitt er, at tá má alt fyri eitt farast til verka at byggja upp eina føroyska uttanríkistænastu, bæði innan- og uttanlands, um ikki Føroya landsstýri ætlar at fyrisitingarliga samstarvið við danska uttanríkismálaráðið, ásett í fullveldissáttmálanum, skal gerast varandi.

Av tí at ein føroysk uttanríkistænasta fer at krevja 36 fólk aftur at teim 12, sum nú eru, er greitt, at fólk mugu útbúgvast, setast í starv og eftirútbúgvast. Tað verður helst trupult at seta fleiri enn trý ella fýra fólk hvørt árið. Av tí at vit kunnu rokna við einum ávísum fráfalli, kunnu eini 10-15 ár fara at ganga, áðrenn føroyska uttanríkistænastan verður fullmannað. Føroya landsstýri eigur tí at fáa í lag semjur við fleiri lond um at læra upp starvsfólk í føroysku uttanríkistænastuni til tess at menna førleika teirra sum sendifólk.

Ymsar hugsanir kunnu vera um, hvar Føroyar eiga at hava sendistovur og umboðsstovur. Eftir uppskotinum í hesi frágreiðing verða fimm sendistovur og tvær umboðsstovur. Tá ið Føroyar eru vorðnar fullveldi, fer tað at hava mestan skund at fáa stovnsett sendistovuna í Keypmannahavn og umboðsstovuna í New York. Frá fyrsta fullveldisdegi eigur ikki at ganga meira enn eitt ár, til tey fyrstu útsendu fólkini fara til hesar báðar býir. Síðan eigur Føroya landsstýri so líðandi eftir tørvi at fara undir at stovna umboðsstovur og sendistovur.

Niðurstøðan um eina framtíðar føroyska uttanríkistænastu verður tískil henda. Føroya landsstýri kann antin gera av at varðveita verandi føroysku uttanríkistænastu og samsvarandi fullveldissáttmálanum tryggja, at danska uttanríkistænastan tekur sær av føroyskum uttanríkismálum á teimum økjum, har føroysk fyrisitingarorka ikki røkkur, ella at fullmenna eina føroyska uttanríkistænastu sambært hesi frágreiðing og samsvarandi fullveldissáttmálanum tryggja, at danska uttanríkistænastan, alt eftir, hvussu nógv tann føroyska er

útbygd, tekur sær av føroyskum uttanríkismálum í eini skiftistíð upp á eini 10 ár.

## 3. 2 Ríkisumboðið

Lógargrundarlagið undir ríkisumboðnum er § 15 í heimastýrislógini. Stovnurin umsitur virksemi sambært donsku forvaltningslógini og „Lov om offentlighed i Forvaltningen" og sambært øðrum vanligum, fyrisitingarligum aðalkrøvum og leiðreglum í fyrisitingini.

### Uppgávur stovnsins

Ríkisumboðið er hægsta umboð ríkisins í Føroyum og leiðir fyrisiting ríkisins.

Niðanfyri verða uppgávur stovnsins listaðar og býttar í 1) sivilrættarligar uppgávur og 2) aðrar uppgávur.

### Sivilrættarliga økið

Sum heild umsitur stovnurin hesi lógarøki:
Háyvirvaldsmál, (sundurlesing og hjúnaskilnaður, ómyndug og verjumál, rættarstøða hjá børnum, áseting av uppihaldspeningi o.tíl.)
Ættleiðing
Umsókn um fría rættargongd
Mál um heimarætt
Fólkatingsval
Pengaseðlar o.tíl.

Nevndu lógarøki eru lýst í kapiti 2, danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar.

### Aðrar høvuðsuppgávur

Harumframt fyrisitur stovnurin hesar høvuðsuppgávur:
Formansskapur fyri „Færøernes Kirkeinspektion" og limaskapur í „Færøernes Stiftsøvrighed"
Gerð og útgáva av „Lovregister for Færøerne"
Gerð og útgáva av „Rigsombudsmandens Beretning"
Gerð av frágreiðingum til danska forsætisráðharran
Vegleiðing og kunning til danskar myndugleikar um føroysk viðurskifti og øvugt
Umboðanaruppgávur
Týðing úr føroyskum til danskt
Avgreiðsla av blokkstuðli til Føroya
Atgongd ríkisumboðsins til Løgtingið

### Samstarv við aðrar stovnar

Ríkisumboðið samstarvar í prinsippinum við allar almennar myndugleikar í ríkinum, teirra millum øll donsk umboð í útlondum. Eisini samstarvar ríkisumboðið við eina røð av almennum og privatum fyritøkum.

### Starvsfólk og bygnaður

Á ríkisumboðnum starvast 13 fólk til samans. Av teimum eru fýra útbúgvin á lærdum háskúla.

Stovnurin er býttur í fýra høvuðsøki, eitt fyri fígging, almenn mál og innanhýsis umsiting, eitt fyri løgmál, almenn mál o.tíl, eitt, sum tekur sær av bókførslu, umseting, tekstviðgerð og avgreiðslu, og so er eisini eitt tænastufólk. Aftur at nevndu uppgávum kemur skipið Thorshavn.

### Kostnaður

Ríkisumboðnum eru játtaðar 6.2 mió. kr. til rakstur. Ríkisumboðið hevur eina árliga inntøku, sum stavar frá sølu av útgávuvirksemi og íbúðargjaldi frá starvsfólkum, sum búgva í embætisbústaðnum.

### Niðurstøða

Fullveldið ber við sær, at sivilrættarligu málini koma øll undir føroyskt málsræði. Henda broyting setir eingi beinleiðis krøv til lóggávuna.

Vanliga kunnu avgerðir hjá ríkisumboðnum kærast til Civilretsdirektoratet. At málið kemur undir føroyskt málsræði, krevur, at støða verður tikin til, hvønn ið avgerðir skulu kunna kærast til. Fyrisitingarliga ber hetta við sær, at tørvur verður á fimm ársverkum.

Um hugt verður at uppgávunum, sum koma undir bólkin: aðrar høvuðsuppgávur, sæst, at flest allar av hesum falla burtur við fullveldinum.

Ríkisumboðið gevur út „Lovregister for Færøerne“ saman við Løgmansskrivstovuni. Nevnt skal vera í hesum sambandi, at Løgmansskrivstovan arbeiðir við at seta í verk lógdátagrunn, har grundtilfarið er Lógbókin fyri Føroyar, og á henda hátt verður alt lógartilfar atkomiligt gjøgnum internótina.

Samanumtikið verður mett, at sivilrættarligu málini kunnu verða flutt undir føroyskt málsræði uttan stórvegis fyrireikingar, og málini kunnu verða umsitin á løgdeildini á Løgmansskrivstovuni. Mett verður, at kostnaðurin fyri at umsita sivilrættarligu lóggávuna fer at liggja um 1,5 mió. kr. árliga.

Føroyingar hava ongar royndir í at umsita sivilrættarligu lóggávuna. Hildið verður tí, at talan kann verða um at avtala eina skiftistíð upp á millum 1/2 og 1 ár við ríkismyndugleikarnar, alt eftir, hvussu væl starvsfólkini, sum verða sett til at røkja uppgávuna, kenna økið. Hugsað verður serliga um viðgerð av umsóknum um fría rættargongd.

## 3.3 Løgregla

### Løgregla[1]

Lógargrundarlagið undir løgregluni er í rættargangslógini – í Føroya føri er talan um lóg nr 92, 23. februar 1988, serstakliga kapitlarnir 10 og 11. Her er ásett, at løgreglan og ákærumyndugleikin eru partar av løgreglu og ákærumyndugleika ríkisins.

Kortini er ásett í rættargangslógini, at føroyska løgreglan er ein deild fyri seg. Hetta ber við sær, at løgreglufólk, ið skulu virka í Føroyum, verða úrvald til útbúgving úr Føroyum, og útgangsstøðið er, at tey eftir lokna útbúgving einans kunnu virka í Føroyum, tó at starvsfólkaumbýti kann vera í serligum førum, og í serligum støðum kunnu eisini donsk løgreglufólk verða skipað í starv í Føroyum.

Føroyar eru annars egið løgrøgludømi, eins hini í ríkinum, tó við tí frábrigdi, at kriminalløgreglan – eins og í Íslandi – ikki er ein deild fyri seg; men lógargrundarlagið er ikki heilt eins, tí broytingar í Danmark ikki av sær sjálvum koma í gildi í Føroyum. Herafturat koma so onkrir tilætlaðir munir, m.a. at Føroya landfúti – mótsett poilitimeistarum í Danmark – eisini hevur ríkisákæraheimild.

### Uppgávurnar hjá løgregluni

Høvuðsuppgávan hjá løgregluni er sambært grein 108 í rættargangslógini at varðveita trygd, frið og skil, og at gera tað, sum skal til, fyri at forða brotsverkum og kanna tey.

Føroya landfúti, (politimeistarin), hevur so harumframt ríkisákæraheimild, og fútin hevur ábyrgdina av at samskipa tilbúgvingina í Føroyum.

### Aðrar høvuðsuppgávur

Umframt nevndu uppgávur liggja ymiskar sivilrættarligar uppgávur

[1] Pettið um løgregluna er grundað á skrivligar upplýsingar, sum eru fingnar frá fútanum, ársfrágreiðingini hjá løgregluni fyri 1997, heimasíðuni hjá løgregluni (http://www.politi.dk), danska fíggjarlógaruppskotinum fyri 1999, virksemisroknskapinum hjá løgregluni fyri 1997, heimasíðuni hjá íslendska Dóms- og kirkjuraðuneytinum (http://brunnur.stjr.is/interpro/dkm/dkm.nsf/pages/forsida), og árbókini fyri Føroyar 1997.

Av tí at tilfarið er rættiliga umfatandi, er tað ikki prentað sum skjalatilfar, men er tøkt í skjalagoymslunum á Løgmansskrivstovuni.

hjá løgregluni, serliga fútanum og sýslumonnunum. Hesar uppgávur eru eitt nú:

*Løgregluloyvi*
til: almennar veitslur, sjónleik og sirkus, burturlutan, lutaseðlasølu og innsavningar, loyvi at keypa vápn og spreingievni, flutningsloyvi sambært ferðslulógini og ferðsluteknisk tiltøk.

*Vanligar, sivilrættarligar fyrisitingaruppgávur* hjá løgregluni eru m.a.:
Funnið fæ
Pass
Altjóða koyrikort
Faðirskaparmál
Góðkendir lærusáttmálar
Friðingarmál
Grindaskifti
Tvingsilsinnleggingar
Líkskoðanir og líkskurðir

*Harafturat greiðir løgreglan hesar uppgávur fyri dómsvaldið*:
Fútamál
Skifti
Bøtur
Inndráttir
Áheitanir um frásøgn og boðan

Sum sæst, virkar løgreglan her í fleiri førum sambært føroyskari løgtingslóg fyri yvirtikin mál, og má í hesum førum metast at vísa fakliga til Landsstýrið, eins og Føroya landfúti eisini er við í føroyskum lógarfyrireikandi arbeiði, t.d. í vápnalógum, vinnulógum og ferðslulógum.

Í summum førum umsitir løgreglan nevndu økini sum heild, í øðrum førum er løgreglan við til at umsita økini saman við øðrum myndugleikum.

Av tí at nógv viðurskifti, bæði í lóggavu og samfelagnum annnars, líkjast frá donskum viðurskiftum, reglusetir fútin ofta sjálvur virksemið hjá løgregluni neyvari, heldur enn at donsku forskrivtirnar verða nýttar beinleiðis.

### Samstarv við aðrar stovnar

Løgreglan samstarvar við allar myndugleikar í Føroyum. Harafturat samstarvar hon við nógvar stovnar í Danmark, teirra millum Søfartsstyrelsen, Beredskabsstyrelsen, Sundhedsstyrelsen, Retslægerådet og Retsmedisinsk institut.

## Starvsfólk og bygnaður

### Starvsfólk

Hjá løgregluni starvast í alt 152 fólk fulla ella niðursetta tíð, umroknað til 125 heilársverk. Av hesum er ein løgregluassessor, sum er útlæntur, skipaður í starv í Føroyum í sambandi við skipafíggingarmálini[2].

Av teimum 152 fólkunum eru:

- 5 løgfrøðingar: fútin, varapolitimeistarin, tveir løgregluassessorar og ein løgreglufulltrúi
- 94 løgreglufólk, av teimum eru 4 í grundútbúgving í Danmark
- 11 parttíðarsett eykaløgreglufólk
- 17 fulltíðarsett skrivstovufólk
- 10 parttíðarsett skrivstovufólk
- 1 skrivstovunæmingur
- 1 húsavørður
- 2 parkeringsvørðar
- 3 parttíðarsett reingerðarfólk

### Bygnaður

Ovasta leiðslan í løgregludøminum í Føroyum eru fútin, sum skal vera løgfrøðingur, løgregluovastin, sum skal vera løgreglumaður, og skrivstovuleiðarin, sum skal vera skrivstovumaður.

Varafútin, sum eisini skal vera løgfrøðingur, umsitir ákæruvirksemið í løgregludøminum.

Løgregluovastin er leiðari hjá løgregluútbúna starvsfólkinum og støðleiðari á høvuðsstøðini, sum er í Havn.

Skrivstovuleiðarin hevur fyrisitingarligu leiðsluna av øllum skrivstovu- og reingerðarfólki um hendi, og hevur harumframt verkligu leiðsluna av skrivstovu- og reingerðarfólkinum á støðini í Havn.

Í leiðsluni í løgregludøminum eru deildarleiðararnir á høvuðsstøðini og sýslumenninir, ið annars eisini hava verkligu leiðsluna av teimum starvsfólkum, sum ikki eru løgreglufólk.

### Høvuðsstøðin

Løgregluovastin er støðleiðari. Støðin er býtt sundur í neyðsendardeild, rannsóknardeild og fyrisitingardeild. Deildirnar virka partvíst fyri alt landið.

[2] Ymisk sløg av starvsfólki verða skipað í starv í Føroyum í sambandi við størri mál, alt eftir tørvi. Tá arbeiðið við skipafíggingarmálunum var sum mest, var talan um 7 starvsfólk.

### Neyðsendardeildin

Varaløgregluovastin er dagligur leiðari á deildini og samstundis varamaður fyri løgregluovastan.

Deildin hevur sum hin einasta í landinum varðhald alt samdøgrið, og hevur eisini alarmsentralin.

Deildin ger varðferðir, loysir neyðsendaruppgávur og fremur málsviðgerð í egnum øki. Tá ið tænastan loyvir tí, verða varðferðir eisini gjørdar í hinum økjunum.

### Rannsóknardeildin

Løgreglukommiserurin er dagligur leiðari.

Deildin fremur, sambært arbeiðsbýtinum millum rannóknardeildina og neyðsendardeildina, rannsóknir í kriminalmálum í økinum hjá høvuðsstøðini. Herumframt hevur deildin umsjón við rannsóknum og málsviðgerð í kriminalmálum á hinum løgreglustøðunum, og kann í serligum førum átaka sær leiðsluna og rannsóknina í slíkum málum.

### Fyrisitingardeildin

Ein varaløgreglukommiserur er dagligur leiðari á deildini, sum virkar fyri alt landið.

### Hinar støðirnar

Á hinum støðunum kring landið, í Klaksvík, Runavík, Vestmanna, Miðvági, á Sandi og á Tvøroyri, eru sýslumennirnir støðleiðarar.

Sýslumaðurin hevur tilvísing til løgregluovastan í øllum málum; men vísir tó í øðrum enn løgregluuppgávum fakliga til viðkomandi myndugleika.

Løgregluovastin skal hava boð um álvarsamar løgregluuppgávur – um so skal vera, umvegis vakthavandi á høvuðsstøðini. Hesar uppgávur eru t.d., tá ið leitað verður eftir fólki, fólk verða funnin deyð, ferðslumál, har onkur er deyður ella illa skaddur, aðrar deyðsvanlukkur, mál um álvarsaman kriminalitet og annars mál, sum serligt eftirlit skal verða havt við.

Tørvar eini støð hjálp, skal hon biðja løgregluovastan um hana – um so skal vera, umvegis vakthavandi á høvuðsstøðini.

Av støðnum verða gjørdar varðferðir, neyðsendaruppgávur verða loystar og málsviðgerð verður framd í egnum øki. Harumframt kannar støðin í Miðvági ferðafólk og pass á flogvøllinum.

Lítla fólkaundirlagið – og samsvarandi lítla manningin í smærru økjunum, serliga í Vestmanna og á Tvøroyri, bera við sær ógvuliga skiftandi arbeiðsbyrðu, soleiðis at ikki ber til at leggja fastar vaktir langa tíð frammanundan, og av hesum verður eftirregulerað við eyka frídøgum, alt eftir, hvussu arbeiðsbyrðan hevur verið.

Kostnaður

Sum nevnt, er bæði sjálv løgreglan og ákærumyndugleikin partar av somu myndugleikum í Danmark. Teir standa tí ikki fyri seg á donsku fíggjarlógini, og av tí sama ber ikki til at lýsa greidliga, hvat tað kostar at reka føroysku eindirnar.

Á økjum, har talan er um meira ella minni sjálvstøðugar rakstrareindir, ber til at finna roknskapartølini, (beinleiðis útreiðslurnar). Á øðrum økjum verða tænastur veittar frá miðstøðum í Danmark, (eindunum undir rigspolitichefen), og her ber ikki til at finna, hvussu stórur partur verður nýttur til løgregluna her, (fjaldur kostnaður). Hesin trupulleiki gerst munandi størri av, at sambært upplýsingum frá rigspolitichefen eru eingi roknskapartøl ella útreiðslutøl, sum kunnu benda á, hvussu nógv eindirnar undir honum kosta. Tað vil m.a. siga, at eingi tøl eru fyri, hvat altjóða skrivstovan, starvsfólkadeildin, neyðsendardeildin ella útgerðadeildin kosta[3].

Beinleiðis kostnaður

Beinleiðis útreiðslurnar til løgregluna í Føroyum hava seinastu árini verið hesar

| | 1996 | 1997 | 1998 (mett) |
|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | | | |
| Lønir | 33.470.865 | 34.988.348 | 36.200.000 |
| Vøru- og tænastukeyp | 12.901.986 | 7.920.648 | 9.000.000 |
| Keypt útgerð, netto | 696.754 | 696.701 | 800.000 |
| Leiga og viðlíkahald | 2.118.143 | 1.452.037 | 1.800.000 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 22.989 | 100.508 | 100.000 |
| Ískoyti til persónar | - | 43.521 | 50.000 |
| Endurgjøld | 80.258 | 248.429 | 100.000 |
| | | | |
| Løguútreiðslur | | | |
| Løgreglustøðin í Klaksvík | 5.811.455 | 2.086.348 | 25.000 |
| Beinleiðis útreiðslur í alt | 55.102.450 | 47.509.576 | 48.075.000 |
| | | | |
| Inntøkur | | | |
| Ymsar rakstrarinntøkur | 1.891 | 1.575 | - |
| Bøtur, avgjøld o.a. | 3.312.459 | 2.198.855 | 2.300.000 |
| „overførselsindtægter„ annars | - | 938.824 | 1.000.000 |
| Rentur | 35.609 | 5.613 | 10.000 |
| Inntøkur í alt | 3.312.459 | 3.144.867 | 3.310.000 |
| Beinleiðis nettokostnaður | 51.789.991 | 44.364.709 | 44.765.000 |
| Beinleiðis nettokostnaður uttan løgur | 45.978.536 | 42.278.361 | 44.740.000 |

Av tí at langt er ímillum løgurnar á løgregluøkinum, verður mett, at nettokostnaðurin uttan løgur vísir sannastu myndina av beinleiðis kostnaðinum.

Annars er lutfallið: fólkatal/løgreglufólk – (45.000/99,5[4]=452), nakað væl lægri enn í Danmark, har tað er (5.275.000/9837=536), men átøkt íslendska lutfallinum, sum er (266.000/600=443). Hetta kann vera ein natúrlig fylgja av, at økini eru smá, og tí krevja lutfalsliga størri manning, enn stór og fjølbygd øki, um javngóð trygd skal verða veitt fyri somu tænastu. Íslendsku tølini benda samstundis á, at løgregluliðið longu hevur á leið ta støðd, sum krevst til eina sjálvstøðuga smátjóð, sum vil verða mett sum trygg og framkomin, eisini á hesum økinum.

Tí verður ikki mett, at fullveldið fer at bera við sær annan vøkstur í løgregluliðnum enn tann, sum krevst í sambandi við altjóða samstarv, (sí niðanfyri).

Fjaldur kostnaður

Aftur at hesum beinleiðis útreiðslum koma so ymsar fjaldar útreiðslur, har talan er um tænastur, sum løgreglan Føroyum fær uttan at gjalda afturfyri, tí hon er partur av donsku løgregluni.

Talan er oftast um heilar tænastur, men á onkrum økjum tó lutvísar

- Neyðsendartænastan hjálpir í sambandi við umfatandi tiltøk.
- Ferðaliðið hjálpir í serligum førum, oftast í sambandi við umfatandi kanningararbeiði og í sambandi við fíggjarkriminalitet.
- Kriminalteknisk deild ger allar kriminaltekniskar greiningar, og kemur harafturat í serligum førum á staðin at gera kanningar.
- Starvsfólkadeildin hevur stóran part av starvsfólkaumsitingini her um hendi. Í samráði við løgregluskúlan, stendur deildin somuleiðis fyri at leggja til rættis eftirútbúgvingina hjá øllum starvsfólkabólkum.
- Løgregluskúlin veitir snøgt sagt alla útbúgving og eftirútbúgving á økinum[5]. Løgreglufólk fáa bæði grund-, eftir- og leiðaraútbúgvingar sína haðani, og somuleiðis verða bæði løgfrøðingar og skrivstovufólk annars eftirútbúgvin á løgregluskúlanum. Seinastu árini hava millum 4 og 8 føroyingar verið í grundútbúgving hvørt árið.

[3] Av tí at forsætismálaráðharrin hevur sýtt fyri, at danskir myndugleikar lata aðrar upplýsingar í sambandi við sjálvstýrisverkætlanina enn tær, sum longu eru tøkar, bar heldur ikki til at royna at gera neyvar metingar saman við starvsfólki frá løgregluni.

[4] Her er roknað við, at eykaløgreglufólk í miðal arbeiða hálva tíð.

[5] Tó eru t.d. viðlíkahaldsskeið í sjálvverju, vápnakynstri og telduførleika eisini úti í økjunum.

- Radio- og motordeildin heldur og mennir radioskipanina hjá løgregluni og letur øll motorakfør.
- Útgerðardeildin letur búnar og aðra útgerð, innbúgv og skrivstovuamboð.
- Deildin fyri útfyllingarbløð letur og bøtir um útfyllingarbløð og skrivstovunýtslulutir, og letur faklesnað.
- Teldudeildin heldur og mennir allar telduskráir og telduskipanir í Føroyum, og løgreglan í Føroyum hevur beinleiðis atgongd til miðsavnaðu dátugrunnarnar, bæði at skráseta og at leita eftir upplýsingum. Dátugrunnarnir eru: Registeret for efterlyste køretøjer, Centralregisteret for motorkøretøjer, Legitimationskontoret, Registeret for parkeringsafgifter, og Kriminalregisteret.

Harumframt veita aðrar deildir eisini nakrar minni tænastur

- Grannskoðanardeildin grannskoðar roknskapirnar hjá løgregluni
- Altjóða deildin og Interpol veita ikki føroyska liðnum so mangar beinleiðis tænastur; men óbeinleiðis eru ágóðar av hesum.
- Kunningartænastan hjálpir eftir áheitan
- Leitingartænastan hjálpir eftir áheitan
- Bygningstænastan hevur eftirlit við, hvussu bygningarnir verða hildnir
- Í serligum førum er samstarv við PET, mest í sambandi við metingar undan vitjanum uttaneftir.

## Útbúgving

Á útbúgvingarøkinum hevur borið til at fingið rættiliga neyv tøl og tískil at gera rættiliga neyvar metingar.

*Um útbúgving:* Onga aðra staðni í samfelagnum merkir hin einstaki so ítøkiliga tann myndugleika, sum vit í samfelag hava latið hinum almenna, sum tá ið løgreglan kemur upp í leikin.

Tí er umráðandi, at hon virkar eftir ætlan, hvørki meira ella minni. Fyri ein part ber til at tryggja bæði hin einstaka og løgreglustarvsfólk við reglum og øðrum fyriskipanum; men við teimum stóru krøvum, sum vit seta løgregluni nú á døgum, nytta reglur og fyriskipanir lítið, um løgregluliðið ikki er væl útbúgvið, bæði tá um grundútbúgving og um seinni útbúgvingar ræður.

Soleiðis er í øllum demokratiskum samfeløgum, men ætla vit at hava so fá starvsfólk í løgregluni, sum til ber, mugu yvirskipaðu starvsfólkini helst hava betri og breiðari útbúgvingarstøði enn aðrastaðni. Tá høvdu tey førleika á fleiri økjum, so at so fá ársverk sum gjørligt, vóru bundin at yvirskipaðu uppgávunum, og av tí sama var mest møgulig starvsfólkaorka tøk til týdningarmestu uppgávurnar hjá liðnum.

*Útreiðslur til útbúgvingar:* Í 1997 fóru 114.706.000 kr. til at grundútbúgva løgreglufólk, 54.004.000 kr. til at eftirútbúgva løgreglufólk, 5.261.000 kr. at eftirútbúgva skrivstovufólk og 4.029.000 kr. at eftirútbúgva løgfrøðingar.

Rokna vit hetta um til føroysk viðurskifti eftir starvsfólkatalinum og rokna við, at løgreglan keypti tænasturnar úr Danmark fyri roknaðan framleiðsluprís, hevði kostnaðurin verið 1.137.457 kr. til at grundútbúgva løgreglufólk, 535.519 kr. *(800.000)* til at eftirútbúgva løgreglufólk, 54.288 kr. til at eftirútbúgva skrivstovufólk og 50.112 kr. *(75.000)* til at eftirútbúgva løgfrøðingar.

Í klombrum eru tølini fyri at eftirútbúgva løgfrøðingar og løgreglufólk hækkað um leið 50%, tí tølini, (bæði starvsfólka- og uppgávutølini í veruligum tølum), eru so smá og ójavnt býtt, at skal starvsfólkaorkan verða fullnýtt, er umráðandi at hvørt einstakt starvsfólk hevur førleika at røkja ymiskligar uppgávur[6].

Aftur at tí, sum sæst av almennu hagtølunum og roknskapunum, eru einstøk løgreglufólk í styttri og longri ástøðiligum og verkligum eftirútbúgvingum í Danmark. Hetta er ilt at seta tøl á, men í miðal man talan vera um á leið eina hálva millión um árið, tí oftast fáa tey „danska“ løn, er talan um longri tíð

Samanumtikið kunnu vit sostatt seta útreiðslurnar til útbúgving á løgregluøkinum til 2.566.745 kr., og tá er nakað lagt uppfyri.

Til samanberingar er at nevna, at í Íslandi kostar Løgregluskóli Rikisins 75 mió. ísl. kr., (uml. 7,3 mió), um árið, og hevur um 35 næmingar í grundútbúgving um árið, umframt at veita løgreglumonnunum eftir- og serútbúgvingar, og hetta bendir á, at metingin omanfyri er ikki ov lág, ið hvussu er.

### Fjaldu útreiðslurnar annars

Á øllum hinum „fjaldu“ økjunum er ilt at seta tøl á fjalda kostnaðin, um vit hugsa um, hvat tað hevði kostað at fingið tænastuna at virka í Føroyum, tí talan er mest um háspesialiseraðar tænastur, har eindarkostnaðurin fyri fyrst framleiddu tænastuna av hvørjum slagi er heilt munandi partur av tí, allar veittu tænasturnar á økinum kosta.

Danska løgregluliðið og fólkatalið eru um leið hundrað ferðir størri, og harafturat er samfelagsbygnaðurin í londunum grundleggjandi

[6] Útreiðslutølini eru endaligu roknskapartølini úr fíggjarlógaruppskotinum, starvsfólkatølini eru úr ársfrágreiðingini, og føroysku starvsfólkatølini eru sambært upplýsingum frá fútanum. Donsku tølini eru ávíkavist 10.034, 2132, og 402, føroysku tølini, sum omanfyri nevnt, (parttíðarsett eru tald við við 1/2).

ymiskur, soleiðis at føroyingar gera t.d. heilt óvanliga fá brotsverk eftir fólkatalinum, bæði í norðurlendskum og í alheims høpi.

Smáu tølini, (t.d. minni enn ein eldsáseting, og fleiri ferðir minni enn eitt morð um árið), gera tað enn truplari at leggja ráð fyri, hvørjum tænastum tørvur er á, og hvør útreiðslutørvurin verður hvørt árið. So sjáldsamar hendingar eru ongantíð javnt býttar yvir tíð og stað, og tí hava vit so at siga vissu fyri, at hóast útreiðslutørvurin til flestu sertænasturnar í miðal verður lágur, verður hann ár undan ári at kunna skifta við fleiri milliónum. – Hinvegin gera smáu tølini tað eyðsýnt, at á mongum økjum eru einastu fíggjarligu og fakligu ráðini at leita sær tænasturnar aðrastaðni.

Sum sagt, upplýsir rigspolitichefen, at roknskapir og fíggjarætlanir teirra ikki eru sundurlutað á deildir. Sostatt ber ikki til at fáa at vita, hvat einstøku økini kosta, ella at royna at umrokna hesi til føroysk viðurskifti.

Sambært virksemisroknskapinum hjá løgregluni fara 15% av játtanini til leiðslu, fyrisiting og hjálpartænastur, og til Grønlands og Føroya.

Meta vit, at sama lutfallið kundi verið her[7], fara 8.394.131-kr. til leiðslu, fyrisiting og nevndu tænastur.

Í roynd og veru kunnu vit vænta, at leiðslu- og fyrisitingarparturin gerst lutfalsliga tyngri, men at flestu sertænasturnar helst kunnu fáast til keyps lutfalsliga bíligari, tí ongar grundútreiðslur eru, verða tænasturnar keyptar úr verandi skipanum aðrastaðni[8].

– Ymiskt er, hvussu løgregluleiðsla og løgreglufyrisiting eru skipað í londunum kring okkum. Eitt nú hevur Danmark skipað flestu uppgávurnar í eitt direktorat, (rigspolitichefen), har eisini allar landsfevnandi tænasturnar eru skipaðar. Løgreglan í Íslandi hevur harafturímóti sjálv um hendi flest allar direktoratsuppgávur, soleiðis at bert heilt smávegis arbeiðsorka í sjálvari miðfyrisitingini fer til løgreglu afturímóti orkuni, sum verður nýtt í donsku miðfyrisitingin. Í Íslandi er tað so, at ein løgfrøðingur í Dóms- og kirkjumálaráðnum situr við sjálvum løgregluøkinum burturav, ein annar við virksemi sýslumanna

[7] Lutfallið er ov stórt, tí Grønland og Føroyar eru uppíroknað; men hinvegin eru helst onkrar sertænastur, sum ikki eru fult uppíroknaðar.

[8] Eisini hevði borið til at havt summar sertænastur í løgregluni, treytað av at samlíkar uppgávur úr øðrum pørtum av fyrisitingini, sum tola at bíða, tá hart leikar á hjá løgregluni, verða fluttar løgregluni at umsita. Tá høvdu starvsfólkini kunnað verið fleiri, uttan at øll útreiðslan liggur á løgregluni, og tænastan fyri landið hevði verið betur úr hondum greidd.

annars, og harumframt nýtir Dóms- og kirkjumálaráðið einans orku til starvsfólkamál á økinum.

Akkurát hvussu nógv skal til av starvsfólki og peningi til at umsita føroysku løgregluna, veldst sostatt nógv um, hvussu ein velur at skipa uppgávurnar politiskt, og hvussu nógvar skipanir og fyriskipanir ein velur at „læna“ ella keypa úr øðrum londum; men verður íslendska loysnin vald, verður ikki talan um tey nógvu ársverkini. Verður hinvegin danska loysnin vald, verður starvsfólkatørvurin størri, og við honum eisini útreiðslutørvurin.

Hvørt nevnda meting upp á 8.394.131 kr. til leiðslu, fyrisiting og sertænastur fer at halda ella ikki, veldst tí um, hvørjar politiskar avgerðir verða tiknar um leiðslubygnaðin.

– – Aftur at umrøddu fjaldu útreiðslum kemur, at virksemið hjá løgregluni er soleiðis skipað, at partar av útreiðslunum í sambandi við greiningar í ítøkiligum málum ikki eru roknaðar upp í raksturin hjá løgregluni yvirhøvur. Her er serliga talan um keyp av ymsum tænastum (so sum grannskoðannarfrágreiðingum), sum hava beinleiðis tilknýti til ítøkilig mál. Útreiðslurnar til hetta kunnu vera næstan ongar og so upp í nakrar milliónir um árið. Tað fer neyvan at verða høpi í at talseta eitt so skiftandi tal, men siga vit 5 mió. kr. í miðal, er ið hvussu er ríkiligt lagt uppfyri.

## Nýggj virkisøki

Væntandi er, at fullveldið í sjálvum sær økir nakað um uppgávurnar hjá løgregluni, tí við tí koma útlendskar sendistovur og umboðsstovur til landið, og almennu vitjanirnar verða títtari og størri. Trygdar-, eftiransanar- og fyriskipanaruppgávurnar, sum koma av hesum, kunnu fara at nerva dagliga raksturin nakað, tí liðið er til tað fáment, og summar almennar vitjanir krevja lutfalsliga stóra løgreglumanning í styttri tíð. Væntandi fer hetta tó ikki at tyngja stórvegis um raksturin.

Í hesum sambandi er vanligt við millumtjóða trygdarsamstarvi, herímillum fregnartænastusamstarvi.

Lítið er upplýst um samstarv við PET. Tó upplýsir heimasíðan hjá løgregluni, at í hvørjum løgregludømi er tilnevnt eitt fólk, sum hevur ábyrgdina av samskiftinum við PET, og soleiðis er ivaleyst eisini í Føroyum.

Lítla, gjøgnumskygda samfelagi okkara tørvar neyvan eina fregnartænastu; men fyri at fáa í lag neyðuga samstarvið við trygdar- og fregnartænastur í øðrum londum, er helst neyðugt við eini lítlari tænastueind, har serligt trúnaðartilfar ikki kemur at verða viðgjørt í vanligu arbeiðsgongdunum hjá løgregluni annars, so at trygdartænastur í øðrum londum kunnu líta á, at upplýsingar, sum verða latnar føroysku eindini, eru í tryggum hondum.

Hendan eind kundi helst samstundis umsitið millumtjóða samstarvið annars (sí niðanfyri).

Sum fullveldi er sjálvsagt, at Føroyar eru við í millumtjóða løgreglusamstarvi sum INTERPOL, og trúliga eisini í Schengensamstarvinum[9]. Við vaksandi altjóðanini á øllum økjum, fáa hesi samstørv alt størri týdning, og samstundis krevur luttøka í verkligum millumtjóðasamstarvi bæði serligar fortreytir og lutfalsliga nógva arbeiðsorku. Tí er neyvan heilt burturvið at vænta, at millumtjóða samstarv fer at krevja upp til eini 3-4 ársverk afturat, sum væntandi kosta 1,5-2 mió. um árið í rakstri.

## Samandráttur

### Útreiðslurnar á løgregluøkinum

Væntandi verða útreiðslurnar á løgregluøkjunum 45 mió. til vanligan rakstur, 8,4 mió. til leiðslu og sertænastur, 2,6 mió. til útbúgvingar, 5 mió. til serligan greiningarkostnað og 1,5-2 mió. afturat til starvsfólk til millumtjóða samstarv. Til samans um leið 63 milliónir.

Hvussu stórur partur av teimum 8,4 milliónunum til leiðslu og sertænastur fara at stava frá starvsfólki, og hvussu nógv fer at stava frá veitingum, sum fingnar verða uttanlands, veldst um, hvørjar skipanarligar loysnir verða valdar politiskt.

Væntandi koma útreiðslurnar til løgregluna javnan at skifta minst 10% upp og niður, alt eftir hvørji mál krevja sertænastur uttaneftir.

Talan er um eitt heilt stórt øki og av størsta samfelagsliga týdningi bæði so og so. Fyrisitingin er ikki sloppin at greina økið neyvari, men kortini er eysæð, at áðrenn málsøkið kemur undir føroyskt málsræði, krevjast gjølligar fyrireikingar, og avtalur mugu verða gjørdar um virksemið í eini rættiliga langari skiftistíð, tí føroyskir myndugleikar hava onga servitan um økið.

Avbjóðingarnar liggja sostatt ikki so nógv í tí fíggjarliga, sum í at skipa økið skynsamiliga, og at fáa til vega og halda við líka tann yvirskipaða førleikan.

– Viðmerkt verður, at tænastumannaeftirlønirnar til løgreglufólk ikki eru nevndar, tí tær hoyra ikki til raksturin av sjálvum økinum, og tí at danski staturin sum arbeiðsgevari hevur átikið sær skyldurnar at gjalda tænastumonnunum hesar eftirlønir. Hendan privatrættarliga avtala – sum í grundregluni er millum einstaka arbeiðstakaran øðrumegin og danska statin sum arbeiðsgavara hinumegin, kann hvørki verða ávirkað av ríkisrættarligu støðuni, ella hvør framyvir verður arbeiðsgevari.

[9] Útreiðslurnar av limaskapi eru roknaðar upp í partin um uttanlandsmál.

Her er sostatt einans talan um at greiða praktisk viðurskifti.

Somuleiðis verður viðmerkt, at virksemi fútans sum ákæri og ríkisákæri ikki er viðgjørt, tí mett verður, at hetta eigur at verða viðgjørt í rættarskipanarnevndini undir grundlógarnevndini.

## 3.4 Varðhaldið

Lógargrundarlagið undir virkseminum hjá varðhaldinum er „lov nr. 188 af 17 juni 1958 om arrestvæsenets ordning på Færøerne," 6. kapitul í revsilógini, og „bekendtgørelse nr. 423 af 21 juni 1973 om fuldbyrdelse af frihedsstraf," við seinni broytingum.

### Samstarv við aðrar stovnar

Stovnurin samstarvar við nógvar danskar og føroyskar myndugleikar, og virkar oftast sum partur av danska fongsulsverkinum. Til dømis er at nevna, at revsingar, sum ikki ber til at sita í Føroyum, (vanliga revsingar, sum eru longri enn eitt ár), verða sitnar í Danmark, og harafturat er ikki óvanligt, at fangar av varlætisávum biðja um at sleppa at sita í Danmark.

### Starvsfólk og bygnaður

Varðhaldsverkið er skipað undir Direktoratet for Kriminalforsorgen undir Løgmálaráðnum.

Fútin er varðhaldsinspektørur, og løgfrøðingarnir hjá løgregluni viðgera løgfrøðilig mál á stovninum.

Starvsfólkini eru ein varðhaldsforvaltari, ein yvirvaktmeistari og níggju varðhaldsvørðar, umframt eitt parttíðarsett reingerðarfólk.

### Kostnaður

Hvat kostnaðinum viðvíkir, eru trupulleikarnir teir somu sum við løgregluni. Varðhaldsverkið er partur av danska fongsulsverkinum, og fær tí veitingar og tænastur frá danska partinum av verkinum. Av tí sama er ilt at seta neyv tøl á kostnaðin.

Seinastu árini hevur raksturin av varðhaldinum ligið beint um 4 milliónir um árið. Av teimum eru um 800.000 farnar til rakstur, og hitt er farið til lønarútreiðslur.

Í miðal verður roknað við, at tað kostar 600.000 kr. at hava ein fanga sitandi 1 ár í donskum fongsli, og vanliga sita ein ella tveir – hendinga ferð hava sitið upp í fimm – føroyingar niðri í senn. Kostnaðurin hevur so ligið millum 600.000 og 3.000.000 kr. um árið.

Starvsfólkini fáa útbúgving, eftirútbúgving, og leiðsluútbúgving sína í Danmark, og størsti parturin av starvsfólkaumsitingini er somuleiðis í Danmark. Av tí at talan er um at útbúgva so fá starvsfólk, er

eysæð, at útbúgvingin eigur at verða tikin uttanlands; men tí at fólkini verða so fá, ber nærum ikki til at talseta kostnaðin. Hann verður ógvuliga lítil í miðal.

Niðurstøður
Við øllum hesum í huga fer kostnaðurin av varðhaldsverkinum at vera millum 4,6 og 7 milliónir. Skulu hesar tænastur verða keyptar t.d. úr Danmark, (hagar er høgligasta ferðasambandið hjá tí, sum fer at vitja), er spurningurin, hvørt tað ikki loysir seg bæði fíggjarliga og serliga sosialt at hava sum mál, at allir dómar skulu verða sitnir í Føroyum. – Í heilt serligum førum er tó einki at ivast í, at tað er fíggjarliga og kanska eisini sosialt óráðiligt at hava sum mál, at allir fangar undir øllum umstøðum skulu sita í Føroyum, tí serliga trygg fongsling er ógvuliga kostnaðarmikil, og higartil hevur tørvurin á hesum tíbetur verið ómetaliga lítil.

## 3.5 Kriminalforsorgin

Lógargrundarlagið undir arbeiðinum á Kriminalforsorgini eru kapittul 7 og kapittul 9 í borgarligu revsilógini. Harumframt ger Kriminalforsorgin persónkanningar sbr. § 808 í rættargangslógini.

Tað er Løgmálaráðið, sum ger reglur um, hvussu virksemið verður útint.

Uppgávur stovnsins
Høvuðssetningurin hjá Kriminalforsorgini er at fullføra revsing uttan fyri fangahússkipanina.

Kriminalforsorgin hevur eftirlit við fólki, ið ikki situr í fangahúsi. Hetta er fólk, sum hevur treytaðan dóm, er royndarleyslatið úr fangahúsi, er dømt at gera samfelagstænastu, ella er dømt fyri rúsdrekkakoyring, men sum heldur fer í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, enn inn at sita. Sostatt er tað altíð ein dómur, ið er orsøk til, at Kriminalforsorgin hevur eftirlit við fólki.

Miðað verður ímóti at minka um revsilógarbrot og at byrgja fyri, at tann, ið áður er dømdur, fremur nýggj revsilógarbrot.

Saman við m.ø. fangahúsum og varðhaldum í Danmark, hoyrir Kriminalforsorgin undir Direktoratet for Kriminalforsorgen, ið hoyrir undir danska Løgmálaráðið. Øll donsk amt hava kriminalforsorgardeild. Í 1976 varð føroyska deildin sett á stovn.

Aðrar høvuðsuppgávur
Umframt vanliga arbeiðið við fólki uttan fyri fangahússkipanina hevur Kriminalforsorgin sosialu tænastuna og forsorgararbeiði í varðhald-

inum í Havn. Varðhaldið verður eisini nýtt sum fangahús fyri fólk, ið hava fingið upp til 1 ára fongsulsrevsing. Fólk við longri dómum sita vanliga í donskum fangahúsi, og tá hevur Kriminalforsorgin sosialu tænastuna har. Farið verður eisini í skúlar kring oyggjarnar at siga frá virkseminum hjá Kriminalforsorgini, tá biðið verður um tað.

### Samstarv við aðrar stovnar

Samstarvsfelagar hjá Kriminalforsorgini eru m.a.: Føroya landfúti, Landssjúkrahúsið – psyk. deild, Almannastovan, barnaverndir kring landið, viðgerðarstovnar fyri misnýtslu av rúsevnum, kommunulæknar og skúlar.

### Starvsfólk og bygnaður

Starvsfólkini eru fýra. Deildarleiðarin og forsorgarmedarbeiðarin eru sosialráðgevar, og harumframt er eitt skrivstovufólk og eitt reingerðarfólk, ið eru nakrar tímar um vikuna.

Tá tørvur er á fakligari serhjálp ella hjálp til t.d. telduskipanina, vendir Kriminalforsorgin sær til danska direktoratið. Starvsfólkið er á somu skeiðum og fær somu undirvísing, sum starvsfelagar í Danmark.

### Kostnaður

Stovnurin hoyrir, sum nevnt, undir Direktoratet for Kriminalforsorgen, og hevur sostatt ikki sjálvstøðuga konto á donsku fíggjarlógini. Í 1998 kostaði stovnurin 1.041.481 kr. at reka. Tá er alt uppíroknað. Inntøkur eru ongar.

### Niðurstøður

Við støði í lýsingini av Kriminalforsorgini sæst, at talan er um lítlan stovn, og sigast kann, at tað skuldu ikki verið stórvegis trupulleikar av, at málið kom undir føroyskt málsræði.

Tó er talan um ávís krøv, t.d. um hvussu virksemið skal verða útint. Sum er, ger Løgmálaráðið hetta arbeiði.

Fyrisitingarliga verður ikki mett, at tørvur verður á fleiri fólkum, men talan verður um sama starvsfólkatal, sum forsorgin hevur nú. Sum er, kostar stovnurin góða millión at reka. Talan kann verða um at gera samstarvsavtalu við Løgmálaráðið í eini skiftistíð.

## 3.6 Dómsvaldið

Sambært løgtingslóg um grundlógarnevnd skal nevndin, umframt grundlógararbeiðið, gera uppskot til føroyska rættarskipan. Í viðmerkingunum frá Landsstýrinum til lógaruppskotið stendur, at nevndin kann seta ein serligan undirbólk ella undirnevnd at arbeiða burturav

við hesum. Somuleiðis verður nevnt, at undirbólkurin hevur ikki somu tíðarfreist sum grundlógarnevndin, ið skal lata Landsstýrinum álit og uppskot um grundlóg í seinasta lagi 1. juni ár 2000.

Tað stendur sostatt ikki til fyrisitingarbólkin at viðgerða hetta evnið. Tó er avrátt at lýsa dómsvaldið í høvuðsdráttum, sum tað virkar í dag.

Hetta verður gjørt við at lýsa, hvørjar høvuðsuppgávur, dómsvaldið røkir, hvussu dómsvaldið er fyriskipanarliga, eins og komið verður inn á starvsfólkatal og kostnað.

Dómsvaldið er serstakt øki, og væntast kann, at neyðugt verður at gera samstarvsavtalu í eini skiftistíð.

Ongar niðurstøður verða gjørdar burtur úr lýsingini av dómsvaldinum.

## Lýsing av Dómsvaldinum

Lógargrundarlagið undir Føroya rætti er „retsplejeloven, lov nr. 92 af 23. februar 1988,“ við seinni broytingum. Yvirskipaða fyrisitingin av starvsfólka- og fíggjarviðurskiftum hjá embætinum hoyrir undir Løgmálaráðið. Við „lov nr. 402 af 26. juni 1998 om Domstolsstyrelsen,“ sum fær gildi 1. juni 1999, verður yvirskipaða fyrisitingin av ríkisins dómsstólum lagt til eitt serligt dómsstólastýrið, sum er óheft av Løgmálaráðnum. Lógin fær eisini gildi fyri Føroyar.

## Uppgávur stovnsins

Í høvuðsdráttum umsitur stovnurin hetta lógarøki:
Viðgerð av borgarligum rættarmálum, (borgararættur).
Viðgerð av revsimálum, (revsirættur).
Viðgerð av skiftismálum, (skiftisrættur).
Viðgerð av fútamálum, (fútarættur).
Tinglýsing og skjalskrivaraverk.
Lógargrundarlagið undir hesum virksemi eru hesar lógir: Lov nr. 92 af 23. februar 1998 om rettens pleje, lov nr. 155 af 30. november 1874 om skifte af dødsboer, lov nr. 298 af 8. juni 1977 om konkurs, og løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing. Víst verður annars til kapittul 2 um danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar, har nevnda lógarøki eru lýst.

Sum fylgja av áðurnevndu uppgávum, umsitur rætturin ymsar avgjaldslógir. Tær eru: Løgtingslóg nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjald, lov nr. 794 af 26. november 1988 om retsafgift og lov nr. 136 af 27. mai 1908 om arveafgift og forordning af 8. februar 1810 om afgift ved overdragelse af fast ejendom.

## Aðrar høvuðsuppgávur

Harumframt umsitur stovnurin hesar høvuðsuppgávur:

Yvirformyndaríið, formannin í vanlukkutryggingarráðnum, yvirfriðingarnevndina, yvirlandbúnaðarstevnuna, yvirútskiftingarnevndina, leigunevndina fyri Tórshavnar kommunu, nevndina, ið umsitur endurgjald frá statinum til teirra, sum hava verið fyri illgerð, Færøernes Nævn for Børneforsorg, sjóvinnuráðið, sterilisatiónsnevndina, kappingarkærunevndina og ættleiðingarsamráðið.

### Samstarv við aðrar stovnar

Rætturin hevur ongar beinleiðis samstarvsfelagar uttan Løgmálaráðið og aðrar dómstólar í ríkinum.

### Starvsfólk og bygnaður

Hjá sorinskrivaranum eru tveir dómarar, harav annar hevur umsitingina um hendi. Harumframt eru ein rættarassessor, fýra dómarafulltrúar, tjúgu skrivstovufólk og tveir næmingar.

Stovnurin er býttur í seks eindir: Fútarætt, tinglýsing, skiftirætt, Revsirætt/borgararætt, Vanlukkutryggingarráðið og Kassin.

### Kostnaður

Sorinskrivaranum eru játtaðar 2,5 mió. kr. til raksturin. Sorinskrivarin hevur inntøkur frá rættaravgjaldi, arvaavgjaldi og tinglýsingargjaldi, herímillum gjald fyri avhending av fastari ogn.

Rættaravgjald og tinglýsingargjald eigur statskassin, og arvaavgjald verður býtt millum statskassan og landskassan.

# Kapittul 4

## 4. Á hesum økjum verða samstarvsavtalur gjørdar

Alment kann verða sagt, at mælt verður til, at Føroya landsstýri fær í lag samstarv í eini skiftistíð á øllum økjum, sum frammanfyri eru nevnd. Hetta, tí mett verður, at tørvur er á hesum samstarvi, so at økini kunnu verða ment so við og við til tess at fáa bestu úrslit.

Tó verður mett, at tað serliga er á tveimum høvuðsøkjum, at tørvur verður á samstarvsavtalum í eitt longri áramál. Hesi økini eru uttanlandsmál og løgregla og fútaembætið.

### Uttanlandsmál

Við støði í uppskotinum, sum lýst er í kap. 3.1 um eina føroyska uttanríkistænastu verður í fyrstu syftu einans tørvur á framhaldandi samstarvi um ræðismál – (sendimenn). Tørvurin fer tó at minka so hvørt, sum føroyska uttanríkistænastan fær í lag eina skipan við føroyskum ræðismonnum, (sendimonnum), kring heimin. Nevnt skal verða, at slíkar skipanir vanliga ikki bera við sær útreiðslur. Tó kunnu í einstøkum førum verða útreiðslur av ítøkiligum málum.

Í fullveldissáttmálanum við Danmark mugu verða ásetingar um fyrisitingarligt samstarv á uttanríkispolitiska økinum millum avvarðandi myndugleikar í Føroyum og Danmark í eini skiftistíð upp á um leið 10-20 ár, alt eftir, hvussu skjótt føroyska uttanríkistænastan verður útbygd.

Av tí at ein fult útbygd føroysk uttanríkistænasta fer at krevja 36 fólk aftur at teim núverandi 12, er greitt, at fólk mugu útbúgvast, setast í starv og eftirútbúgvast. Tað verður helst trupult at seta fleiri enn trý ella fýra fólk um árið. Av tí at vit kunnu rokna við einum ávísum fráfalli, kunnu 10-15 ár fara at ganga, áðrenn føroyska uttanríkistænastan verður fullmannað.

Føroya landsstýri eigur tí at fáa í lag semjur við fleiri lond um at læra upp starvsfólk í føroysku uttanríkistænastuni til tess at menna førleika teirra sum sendifólk.

### Løgregla og ákæruvald

Løgreglan og ákæruvaldið er eitt stórt og samansett virkisøki og mett verður at neyðugt er at gera samstarvsavtalur á hesum økjum:

- sergjørd útgerð, (bilar og onnur samskiftistól, ritbúnaður, búnar, trygdar-og verndarútgerð, o.tíl.)
- útbúgving, (grundútbúgving, framhaldsútbúgving, eftirútbúgving og viðlíkahaldsútbúgvingarskeið)
- kriminaltekniskar kanningar

Her kunnu vit við vissu siga, at av tí at fólkatalið her er so lítið, liðið er fáment, og seruppgávurnar av hvørjum slagi so fáar, verður løgreglan bíligari í rakstri, og nevndu tænastur verða betri og støðugari, um vit gera samstarvsavtalur við eitt ella fleiri onnur lond, ið hvussu so er fyri partar av uppgávunum.

Ræður um skráseting, er helst rímiligt at siga, at av tí sambandið millum fólk í Føroyum og í Danmark er so tætt, hevði tað verið fyrimunur fyri báðar partar, um ein skipan, sum er átøk teirri verandi, kundi hildið áfram, tó at hetta ikki er alneyðugt. At økið verður føroyskt hevur við sær fyri Føroyar, at antin má skrásetingarlóggávan verða broytt, ella ein serlig lógarheimild verða gjørd. Fyri Danmark verður fortreytin væntandi, at føroyski parturin av skipanini lýkur ES-krøv fyri skrásetingarreglur í sambandi við triðjalandssamstarv um persónsskráir.

### Dómsvaldið

Roknað kann verða við, at neyðugt verður at gera samstarvsavtalur í eini skiftistíð. Nógv og ymisk krøv verða sett til dómsvaldið, bæði á fakøkinum og á skipanarøkinum.

Sum nevnt í lýsingini av dómsvaldinum, fer ein serlig undirnevnd undir grundlógarnevndini at arbeiða burturav við hesum evni, og tí verður økið ikki lýst neyvari í hesi syftu.

# Kapittul 5

## 5. Millumlandasáttmálar

Um lóggávu er at siga, at tá ið uttanríkismál koma undir føroyskt málsræði, fara allir millumlandasáttmálar úr gildið fyri Føroyar í somu løtu, sum Føroyar verða skipaðar sum land við fullveldi. Undantiknir eru tó fullveldissáttmálin og marknasáttmálar.

Sambært galdandi millumtjóða rætti kunnu føroyskir myndugleikar í hvørjum einstøkum føri gera av, hvør av galdandi sáttmálum skal verða settur í gildi aftur fyri Føroyar. Her er tó at hava í huga, at lóg, ið er sett í gildi fyri Føroyar, í sambandi við at millumlandasáttmáli er lýstur at galda her, verður ikki ávirkað.

### Millumtjóða sáttmálar á umsitingarøkinum hjá Løgmansskrivstovuni

Niðanfyristandandi upplýsingar eru grundaðar á upplýsingar úr lógarskránni fyri Føroyar 1998 – „Lovregister for Færøerne 1998."

Lógarskráin fevnir neyvan um allar lógir, serstakliga ikki tíðina undan heimastýrinum. Aftan á heimastýrið má verða hildið, at hon fevnir um allar sáttmálar, sum ríkisumboðið hevur lagt fyri heimastýrið. Fyrivarni má verða tikið fyri, at tað er ikki heilt vist, at allir sáttmálar hava verið lagdir fyri heimastýrið, hóast heitið sigir so. Tað kann t.d. vera tí, at galdandi lóggáva fevnir um meira enn orðaljóðið í sáttmálanum, men eisini tí, at framløgan hevur ikki verið í samsvari við heimastýrislógina. Í tí føri er sáttmálin ikki í gildi fyri Føroyar, men hetta er ein spurningur millum ríkismyndugleikarnar og heimastýrið. Mótvegis útlondum eru ásetingarnar í sáttmálanum eisini í gildi fyri Føroyar.

Fólkaskráseting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1982 1/6: | T.101 | 01.11.-90 | Nordisk konvention om folkeregistrering |
| | C.145 | 18/6-70 | Optagelse i den internordiske flytteordning |

Arvur og skifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1935 30/3: | L.88 | | Nordisk konvention 1934 om arv og dødsboskifte |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | B.348 | 24.06-76 | Ny konventionstekst |
| | C.37 | 02.03-78 | Vejledning om 1975-ændringen |

Konkurs

| | | |
|---|---|---|
| 1934 1/9 | A.250 | Konkurs erklæret i Danmark omfattende formue i Finland, Island, Norge og Sverige, jf. A. 271 4/10-35. |
| 1934 1/7: | A.251 | Virkning af konkurs erklæret i Finland, Island, Norge og Sverige, jf. A. 272 4/10-35. |

Heimarættur og land

| | | |
|---|---|---|
| 1969 13/2: | T.19 | Nordisk konvention om indfødsretslovens § 10 |
| 1980 15/9: | T.78 | Kontinentalsokkel og fiskerizone mellem Færøerne og Norge |

Pass og útlendingar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1988 23/2: | T.57 | 12.11.55 | Nordisk konvention om pas |
| | T.14 | 27.02.61 | Visse nordiske konventioners udvidelse til Færøerne (viðv. útlendingum). |

Rættargangur, straffur og fongsulsverkið

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1969 3/2: | L.27 | Udlevering af lovovertrædere til Finland, Island, Norge og Sverige, 251 12/6 75 | |
| 1963 31/5: | L.214 | Samarbejde med Finland, Island, Norge og Sverige ang. Fuldbyrdelse af straf m.v. | |
| | B.398 | 16.12.63 | Ikrafttrædelse 1/1-64 |
| | C.220 | 16.12.63 | Fuldbyrdelse af straf i de nordiske lande. |
| 1967 5/12: | L.466 | Fuldbyrdelse af kendelser om internationale investeringstvister, jf. A.343/68 | |
| 1967 9/6: | L.249 | Udlevering af lovovertrædere | |
| | L.27 | 03.02.60 | |
| | L.251 | 12.06.75 | (Finland, Island, Norge, Sverige) |
| 1986 4/6: | L.323 | International fuldbyrdelse af straf m.v., jf. A. 153 21/2-88 | |
| 1994 17/5: | B.119 | 19/5-09 | Haagerkonvention 1905 om civilproces (stadig gældende for Island og Rumænien). |
| | T.33 | 7/6-60 | Haagerkonvention 1954 om civilproces, C.244 14/11-60. England: B.206 24/5-33, 241 18/7-33, 329 30/11-34, T. 18/39. Luxemburg: B.20 25/1.12, 57 11/3-32. Polen: B.39 7/2-33. Sverige: B.48 14/3-12, 176 27/6-13 art. 17-19. Tyskland: B.128 13/6-14, 15 29/1-32, C. 27 3/3-55 Retshjælp. B.276 6/11-31 Straffesager. U.S.A.: T.43 31/8-61 V. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | T.100 | 15/9-75 | (Nordisk overenskomst om gensidig retshjælp). |
| | B.15 | 13/2-70 | Forkyndelse i udlandet. |
| 1925 15/5: | B.167 | | Konvention om voldgiftsklausuler i handelskontrakter, 151 28/6-29, 228 8/9-31. |

B.150 28/6-29 Konvention om eksekution af udenlandske voldgiftskendelser, 227 8/9-31

Fleirtjóða skipanir viðvíkjandi revsirætti:

*B.252 17/10-31, 305 2/12-32, 248 29/8-34, konvention om falskmøtneri, T.13 21/5-37.*

*B. 212 30/6-30, Offentliggørelse af utugtige skrifter, T.55/50, 29/60. T.28/60 vedr. konv. om forebyggelse og straf for folkedrab.*

*B.100 27/11-87 International konvention imod gidseltagning af 17. dec. 1979.*

Avtalur um at útflýggja brotsmenn:

*Belgien: B.74 13/5-1876, 254 30/10-26, 169 15/5-33.*

*Finland: B.202 7/5-1923.*

*Storbritannien, Canada: B.62 17/5-1873, 225 5/10-09, 395 1/7-19, 65 15/3-28, 145 21/4-32, 302 11/10-34, T.9 25/4-36, 18 9/11-36, 29 29/9-38.*

*Europa: T.36 28/9-63 Europæisk konvention.*

Avtalur um at fullføra revsing:

Overenskomst om fuldbyrdelse af straffedomme:

Spanien: T.56 1/6-73

Hjúnaband og børn:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1922 30/6: | B.252 | 4/12-09 | Dekl. m. Sverige om ægteskabs indg. for konsul. |
| | C.60 | 10/4-54 | Sep. og skilsmisse mellem borgere i Norden. |
| 1931 11/11: | L.279 | | Aftale mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om ægteskab, adoption, værgemål, jf. A.325 30/12-31 |
| 1960 18/5: | L.158 | 6/5-80 | Anerkendelse af nordiske faderskabsafgørelser og om ændring af lov om anerkendelse og fuldbyrdelse af nordiske afgørelser om privatretlige krav, jf. A.21 20/1-84 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | T.6 | 16/1-92 | FN-konvention 1989 om Barnets Rettigheder, jf. B.90 7/10-93. |
| 1963 24/4: | B.269 | 28/6-63 | Inddrivelse af bidrag fastsat i de nordiske lande, C.128 28/6-63. |
| | B.433 | 17/12-65 | Inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til den af De Forenede nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956. |
| | B.434 | 17/12-65 | Anerkendelse og fuldbyrdelse af afgørelser om underholdsbidrag i henhold til Hagerkonventionen af 15/4-58 om underholdspligt over for børn. |
| 1963 29/7: | T.21 | | Nordisk konvention om inddrivelse af bidrag. |
| 1965 17/12: | T.433 | | Inddrivelse i henhold til FN-konvention 1956, 49 24/8-62. |
| | T.434 | | Anerkendelse og fuldbyrdelse i henhold til Haagerkonvention 1958. |
| 1979 15/2 | T.23 | | Europæisk konvention 1967 om adoption, 90 9/9-83, 92 24/9-84. |

31. partur í lógarskránni um m.a. altjóða viðurskifti hevur fleiri millumtjóða sáttmálar, sum ivaleyst allir hoyra til umsitingarøkið hjá uttanlandsdeildini, hóast fleiri av teimum innihaldsliga kanska heldur hoyra undir til stýri og deildir.

Aðrir sáttmálar

1910 20/1: B. 34-35 De på fredskonferencen i Haag 1907 afsluttede konventioner.
T. 7 31/3-36 Genevekonv. 28/10-33 om flygtninges stilling.
T. 16 24/7-37 Regler om krigsførelse med ubåde.

1929 5/10: B.198 Traktat om afkald på krig (Kellogg-pagt).
1962 27/6: T.Konsularkonvention med England og Nordirland.

Norðurlendskt samstarv

| | | |
|---|---|---|
| 1971 28/4: | L. | 185 Nordisk samarbejde. |
| | L. | 263 22/5-74, 220 16/5-84. |
| | B. | 298 10/6-71 Ikrafttræden, 406 25/7-84. |
| 38 26/7-62 | | Nordisk samarbejdsoverenskomst, 70 20/7-71, 1 6/1-76, 60 6/8-86, 61 6/8-86, 34 2/4-92, 25 24/3-94. |
| | T. | 32 22/3-72 Nordisk kulturaftale, 75 23/8-84. |
| 48 15/5-73 | Nordisk samarbejde om transport og kommunikation, 73 23/8-84. | |
| 65 9/8-90 | Aftale 1988 om retlige stilling for nord. Institutioner og ansatte. | |

| | | |
|---|---|---|
| 66 9/8-90 | | Aftale 1989 om samarbejde ved ulykkeskader på mennesker, ejendom eller miljø. |
| | T. | 31 14/3-91 Det Nordiske Miljøfinansieringsselskab. |

Millumtjóða felagsskapir

| | | |
|---|---|---|
| 1948 14/9: | T. | 49 Pariserkonv. om europ. økonomisk samarbejde. |
| 1949 13/9: | T. | 39 Nordatlantiske traktat, NATO. |
| 1949 13/9: | T. | 40 Statut for Europarådet, 45 9/12-63, 16/62. |
| | T. | 46 10/11-53 Rettigheder og immuniteter (ses ikke kdg.), 42/56,<br>36/57, 68/62, 54/50, 45/63 (Schweiz). |
| | T. | 32/57, 56/57, 61/59, 41/64 Kulturkonv.<br>(hører også hjemme i UMMS) |
| 1961 9/6: | T. | 25 Organisation for økonomisk udvikling, (OECD). |

Mannarættindi, flóttarfólk og tílik mál

| | | |
|---|---|---|
| 1953 11/6: | T. | 20 Beskyttelse af menneske- og frihedsrettigheder, B. 41/53 (ikrafttrædelse), B. 31/54 (andre landes ratifikation), |
| 1954 24/11: | T. | 55 Konv. Flygtninges retsstilling, 64/60, 11/63, 60/68. |
| | T. | 54 7/7-60 Konv. Statsløses retsstilling, 11/63, 61/68. |
| | T. | 35 17/9-63 Flygtningesøfolk. |
| | T. | 10 6/2-78 Konv. 1961 Begrænsning af statsløshed. |
| 1983 9/9: | B. | 83 af Konv. 18/12-79 om afskaffelse af alle former for diskrimination imod kvinder. |
| 1991 16/5: | B. | 57 Europarådskonvention om forebyggelse af tortur m.v. |
| 1997 9/10: | B. | 97 ILO-konvention nr. 197 om oprindelige folk og stammefolk<br>i selvstændige stater |
| 1998 13/4: | K. | 13 Europarådet nationale mindretal |
| 1995 5/10 | A. | Østersørådets kommisær for menneskerettigheder m.m. |

Handil og sjóvinna

| | | |
|---|---|---|
| 1923 19/4: | B. | 197 Konv. om transitfriheden af 1921 |
| 1990 9/8: | T. | 81 Konv. 1985 om beskyttelse af ozonlaget |
| 1990 9/8: | P. | 82 Beskyttelse af ozonlaget |
| 1994 15/4: | O. | Verdenshandelsoverenskomsten |
| 1997 9/10: | P. | 115 Beskyttelse af ozonlaget Færøerne med under P |
| 1996 27/6: | O. | Luftfartsoverenskomst Belarus |
| 1997 4/12: | O | 124 Luftfartsoverenskomst Mongoliet |

Sáttmálar um samstarv, handil, ídnað, sjóvinnu og búskap:
(Frá l936 í lovtidende C. Fyribilssáttmálar eru ikki tiknir við)

| | | |
|---|---|---|
| USA: | T. | 50/48, 43/61. |

| | | |
|---|---|---|
| Bolivia: | B. | 53/34. |
| Brasilia: | T. | 3/39. |
| Bulgaria: | B. | 330/22. |
| Colombia: | B. | 277/31. |
| Dom. rep.: | | Patent 18/5-1853. |
| Egyptaland: | B. | 195/30. |
| Eysturríki: | B. | 18/29. |
| Frakland: | B. | 27/10, 73/25, 272/25, 113/30. |
| Grikkaland: | B. | 186/29. |
| Haiti: | T. | 22/37, 22/38. |
| Iran: | B | 120/35. |
| Italia: | | Patent 10/12-1864, B. 155/02, 284/27. |
| Japan: | B. | 177-179/1912. |
| Kina: | | Patent 12/11-1864, B. 171/29. |
| Liberia: | | Patent 7/4-1865. |
| Pólland: | B. | 220/24, 288/34. |
| Portugal: | B. | 9/1898, 284/35. |
| Rumænia: | B. | 282/30. |
| Sveis: | B. | 86/1875, 166/24, 60 1/5-97. |
| Siam: | T. | 10/38. |
| Spania: | B. | 44/28, T. 42/50. |
| St. Bretl.: | B. | 156/12, 225/33. |
| Tjek.slovakia: | B. | 155/25, 325/33. |
| Turkaland: | B. | 212/25, 173/31. |
| USSR: | B. | 266/23, 197/24. |

Mentan, undirvísing o.t.

| | | |
|---|---|---|
| 1956 12/1: | T. | 1 Udveksling af kulturelle materialer, 65/60. |
| | T. | 35 14/6-60 Organis. f. undervisn., videnskab og kultur UNESCO. |
| | T. | 43 7/7-60 Indførsel af kulturelt materiale, 52/63. |
| | T. | 56 7/5-65 Udveksling af officielle publikationer. |
| 1980 5/3: | T. | 21 Konv. 16/11-72 Beskyttelse af verdens kultur- og naturarv. |

Fiskivinna v.m.

| | | |
|---|---|---|
| 1993 11/2: | K. | 27 Aftale om samarbejde vedr. hvaler og sæler i Nord atlanten. |

Løgdeildin

1988 22/2: Kon. mv. 15 underholdspligt

# Fíggjarmálastýrið

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ........................................ 110

Kapittul 1 ........................................ 111
Peninga- og gjaldoyraøkið ........................................ 111
Donsk lóg um gjaldoyraviðurskifti ........................................ 111
Donsk lóg um Tjóðbanka Danmarkar ........................................ 112
Donsk lóg um gullklausular ........................................ 113
Donsk lóg um føroyskar peningaseðlar ........................................ 113
Donsk lóg um myndir ........................................ 114

Kapittul 2 ........................................ 115
Peningastovnar o.tíl. ........................................ 115
Inngangur ........................................ 115
Um lógir í bólki 1 ........................................ 116
Um lógir í bólki 2 ........................................ 116
Banka- og sparikassalógin ........................................ 117
Virðisbrævahandilslógin ........................................ 118
Innsetaratrygdargrunnur ........................................ 120
Peningahvítting ........................................ 121
Goymsluhús ........................................ 122
Ávís sparivirki ........................................ 122
Ávísir kreditstovnar ........................................ 123

Kapittul 3 ........................................ 124
Aðrar lógir ........................................ 124
Fiskaríbankin ........................................ 124
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar ........................................ 124
Donsk lóg um treytir fyri útlán frá statinum ........................................ 125
Statsveðhald fyri kredittfelagslán til føroyskar kommunur 125

Kapittul 4 ........................................ 127
Formligt og óformligt samstarv ........................................ 127
Samstarv við danskar toll- og skattamyndugleikar. ........................................ 127
Landsbankin ........................................ 128
Lønardeildin ........................................ 128

Kapittul 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 129
Niðurstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 129
Krøv til fyrisitingarligu myndugleikarnar, tá ið málsøkið gerst føroyskt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 130
Krøv til lóggávu, tá ið málsøkið gerst føroyskt . . . . . . . . . . . . . 130
Krøv til fígging, tá ið málsøkið gerst føroyskt . . . . . . . . . . . . . . 132
Innsetaratrygdargrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 133
Fíggjareftirlitið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 133
Altjóða samarbeiði . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 133
Tíðarhvarv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 133

# Inngangur

Rættarreglur, sum her verða viðgjørdar, eru reglur fyri peninga- gjaldoyra- og kapitalmarknaðin.

Málsøkið er í høvuðsheitum danskt, við tað at talan er um lóggávu á økjum, sum hvørki eru nevnd á lista A ella B í heimastýrislógini, og verður býtt í trý.

Tey einstøku lógarøkini verða viðgjørd í hvørt sínum kapitli: kap. 1, kap. 2 og kap. 3.

Í kap. 4 verða formligt og óformligt samstarv viðgjørd, og at enda í kap. 5 er gjørd ein heildarniðurstøða.

Kap. 1. Peninga- og gjaldoyraviðurskifti.

Kap. 2. Peningastovnar, virðisbrævahandil, innsetaratrygdargrunnurin og lógin um peningahvítting o.a.

Kap. 3. Aðrar lógir, lóg um Fiskaríbankan, Íleggingargrunnin fyri Føroyar o.a.

Kap. 4. Formligt og óformligt samstarv.

Kap. 5. Niðurstøða.

# Kapittul 1

## Peninga- og gjaldoyraøkið

Lóg um gjaldoyraviðurskifti
Lóg um Tjóðbanka Danmarkar
Lóg um føroyskar peningaseðlar
Lóg um føroyskar myntir

Niðanfyri eru nevndu lógir viðgjørdar hvør sær.

### Donsk lóg um gjaldoyraviðurskifti

*L. nr. 372 af 23.12.1964 om valutaforhold, som den senest er ændret ved L. nr. 247 af 09.06.1967.*
*– B. nr. 522 af 31.08.1988 om valutaforhold.*
*BKI nr 94 af 07/11/1978 (Gældende) Bekendtgørelse om Danmarks ratifikation af 2. ændring af overenskomsten af 22. juli 1944 om Den internationale Valutafond samt af overenskomstens herefter gældende ordlyd*
*(97/C 236/03) Amsterdam-resolutionen: DER INDFØRES EN VALUTAKURSMEKANISME, NÅR TREDJE FASE AF DEN ØKONOMISKE OG MONETÆRE UNION INDLEDES DEN 1. JANUAR 1999.*
*Wien-kommuniké. European Union. Vienna. September 26, 1998. Communiqué. Danish and Greek participation in the new exchange rate mechanism (ERM II)*
*ECB-pressemeddelelse d. 11. september 1998. CONVENTIONS AND PROCEDURES FOR THE NEW EXCHANGE RATE MECHANISM (ERM II)*

Lóggáva: Lógin skilmarkar fyribrigdi sum gjaldoyrainn- og útlendingar, og hvør er gjaldoyrahandlari. Hon ásetir eisini reglur fyri hetta og fyri transaktiónir og millumverandi í einum ella fleiri gjaldoyrum, innanlands ella uttanlands. Eisini verða ásettar upplýsingarreglur fyri transaktiónir og millumverandi.

Fyrisiting: Tjóðbanki Danmarkar umsitur gjaldoyraviðurskifti og altjóða gjaldingar í danska ríkinum.

Partar av lógini verða umsitnir av Industri- og Handelsstyrelsen.

Partar av lógini um „valutaforhold“ eru settir í gildi fyri Føroyar við kunngerð í Lovtidende, somuleiðis partar av kunngerðini um „valutaforhold.”

Búskaparmálaráðið hevur ábyrgdina av lógararbeiðinum.

Lóggávan fyri gjaldoyraviðurskifti er donsk. Lóggávan og fyrisitingin fylgja eisini altjóða samstarvi og reglum.

Fígging: Fíggjarligu ábyrgdina av lógararbeiði hevur Búskaparmálaráðið. Ábyrgdina av fyrisitingarkostnaði hevur Tjóðbankin ella Industri- og Handelsstyrelsen, so leingi sum kostnaðurin ikki verður líknaður út á nýtarar við avgjøldum fyri altjóða gjaldingar.

## Donsk lóg um Tjóðbanka Danmarkar

*L. nr. 116 af 07.04.1936 om Danmarks Nationalbank, som den senest er ændret ved L. nr. 88 af 15.03.1939.*

– *B. nr. 344 af 22.12.1937 om indløseligheden af nationalbankens sedler.*

Lóggáva: Lógin er sett í gildi við „B. nr. 152 frá 28.05.36,“ eisini fyri Føroyar. Búskaparmálaráðið hevur ábyrgdina av lógararbeiðinum. Lógin er fyrisitingarlóg fyri Tjóðbanka Danmarkar.

Lóggávan um búskaparstýring og búskaparjavning er blandað donsk og føroysk.

Lóggávan um fyrisitingarøki Tjóðbankans fylgir eisini altjóða samstarvi, avtalum og sáttmálum.

Fyrisiting: Tjóðbanki Danmarkar er fyrisitingarligur myndugleiki fyri peningapolitikk, herímillum rentupolitikk og gjaldoyrapolitikk og fyri at skapa javnvág í tilgongd og frágongd í samfelagsins gjaldføri.

Myndugleiki Tjóðbankans verður útintur eftir serstakari lóggávu á teim ymsu politikkøkjunum. Hesin myndugleiki verður eisini útintur sum partur av vinnuliga virkseminum hjá Tjóðbankanum.

Den kongelige bankkommissær, sum er búskaparmálaráðharrin, hevur eftirlit við, at Tjóðbanki Danmarkar heldur lóg og reglur sínar. Fyrisitingarligi myndugleiki Tjóðbankans hevur eisini gildi í Føroyum. Politikkurin tekur støði í búskaparligu støðuni í Danmark. Landsbanki Føroya skal í virki sínum hava atlit til tørvin í føroyska búskapinum.

Fígging: Fíggjarligu ábyrgdina av lógararbeiði hevur Búskaparmála-

ráðið, men ábyrgdina av rakstrinum hava nevnd og stjórn Tjóðbankans.

---

## Donsk lóg um gullklausular

*L. nr. 254 af 27.11.1936 om Guldklausuler.*

Lóggáva: Lógin er um krøv, sum hava verið tryggjað við gulli ella „gullkrónum." Lógin setir úr gildi krøvini um, at peningur og renta verða tryggjað við gullvirðinum.

Lógin er sett í gildi við kunngerð í Lovtidende og er ikki serstøk fyri Føroyar. Ábyrgdin av lóggávuarbeiðinum er ikki ásett í lógini.

Fyrisiting: Fyrisitingarmyndugleiki er ikki nevndur í lógini.

Fígging: Fíggjarliga ábyrgdin av lógararbeiði er donsk, men tað er ikki staðfest í lógini, hvør ráðharri hevur ábyrgdina.

---

## Donsk lóg um føroyskar peningaseðlar

*L. nr. 248 af 12.04.1949 om pengesedler m.v. på Færøerne.*
- *B. nr. 214 af 24.05.1950 vedrørende ombytning af danske og færøske pengesedler i henhold til lov nr. 248 af 12. april 1949 om pengesedler m.v. på Færøerne.*
- *B. nr. 146 af 04.05.1954 om indkaldelse af færøske pengesedler.*

Lóggáva: Lógin ásetir virðið á føroysku krónuni, (1 føroysk kr. = 1 donsk kr.), og at føroyskir peningaseðlar eru fult svaraðir í donskum krónum, sum standa á eini serligari konto í Tjóðbankanum. Lógin ásetir, at føroyskir peningaseðlar ókeypis kunnu verða býttir um við danskar. Lógin ásetir somuleiðis, at landskassin eigur part í Tjóðbankans yvirskoti eftir lutfallinum millum føroyskar- og danskar peningaseðlar.

Lógin er sett í gildi við kunngerð í Lovtidende, eisini fyri Føroyar. Forsætismálaráðið hevur eftir lógini ábyrgdina av lógararbeiðinum og prinsipiellum avgerðum, men hevur latið Búskaparmálaráðnum ábyrgdina upp í hendur.

Lóggávan fyri peningaverkið er donsk.

Lóggávan um danskar peningaseðlar er ásett í lógini um Tjóðbankan.

Fyrisiting: Føroyska peningaverkið hevur síðan í mars 1998 verið

undir danska búskaparmálaráðnum. Avgerðir í Føroyum verða tiknar av ríkisumboðnum og einum umboði, valdum av Landsstýrinum. Landsstýrið hevur valt landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Tjóðbanki Danmarkar ger peningaseðlarnar, men Løgtingið og Forsætismálaráðið samráðast um útsjónd.

Fígging: Fíggjarliga ábyrgdina av lógararbeiði hevur Búskaparmálaráðið. Ábyrgdina av at gera nýggjar seðlar og skifta gamlar um hevur Tjóðbankin, men ábyrgdina av nýggjum seðlaútgávum hava Búskaparmálaráðið og Tjóðbankin í felag.

## Donsk lóg um myntir

*L. nr. 817 af 21.12.1988, Møntlov.*

– *A. nr. 692 af 11.10.1991 om udmøntning af indenlandsk skillemønt.*

*L. nr. 248 af 12.04.1949 om pengesedler m.v. på Færøerne.*

Lóggáva: Lógin ásetir reglur fyri útgávu, framleiðslu, umsiting og innkalling av donskum myntum.

Lógin er sett í gildi við kunngerð í Lovtidende, eisini fyri Føroyar. Lógin um føroyskar peningaseðlar ásetir eisini, at danskir myntir verða brúktir í Føroyum. Búskaparmálaráðið hevur eftir lógini ábyrgdina av lógararbeiðinum.

Lóggávan fyri peningaverkið er donsk.

Fyrisiting: Búskaparráðharrin og Tjóðbankin kunnu sláa og útgeva myntir. Tjóðbankin tekur sær av framleiðslu og umsiting. Stødd, virði og útsjónd verða eisini ásett av Tjóðbankanum og kunngjørd við kongligari fyriskipan.

Fígging: Fíggjarliga ábyrgdina av lógararbeiðinum hevur Búskaparmálaráðið. Ábyrgdina av at gera nýggjar myntir og umsita myntverkið hevur Tjóðbankin, men ábyrgdina av nýggjum myntútgávum hava Búskaparmálaráðið og Tjóðbankin í felag.

# Kapittul 2

## Peningastovnar o.tíl.

### Inngangur

Á málsøkinum peningastovnar o. tíl. eru hesir tveir lógbólkar galdandi:

Lógbólkur 1
*Lb. nr. 57 af 02.02.1993 om banker og sparekasser m.v. som sat i kraft ved A. nr. 246 af 03.05.1993*
*L. nr. 1072 af 20.12.1995 om værdipapirhandel m.v.*
*L. nr. 367 af 14.06.1995 om en indskydergarantifond som sat i kraft ved A. nr. 718 af 05.10.1998.*
*L. nr. 348 af 09.06.1993 om forebyggende foranstaltninger mod hvidvaskning af penge.*

Lógbólkur 2
*Lb. nr. 101 af 28.09.1992 om en værdipapircentral.*
*Lb. nr. 737 af 19.08.1992 om visse kreditinstitutter.*
*L. nr. 109 af 07.04.1936 om kreditforeninger.*
*L. nr. 108 af 07.04.1936 om købstadshypotekforeninger.*
*L. nr. 156 af 02.05.1934 om visse spare- og udlånsvirksomheder.*
*L. af 23.02.1866 om oplagshuse.*

Lýsing av málsøki
Málsøkið er í høvuðsheitum danskt, við tað at talan er um lóggávu á økjum, sum hvørki eru nevnd í lista A ella B í heimastýrislógini. Undantak er tó lóggávan um kredittfeløg, sum er yvirtikið málsøki, nevnt undir lista A, pkt. 15 í heimastýrislógini.
Undir lista A í heimastýrislógini eru eisini nevnd: „Oplagshuse.“

Lógirnar í bólki 1 skipa aktuellar og týðandi tættir viðvíkjandi fíggjarmarknaðunum.

Lógirnar í bólki 2 eru at kalla tíðarvillur og eiga antin at verða settar úr gildi ella at verða dagførdar.

## Um lógir í bólki 1

Lógirnar um: 1) bankar og sparikassar, 2) virðisbrævahandil 3), virðisbrævameklarafeløg og 4) íløgufeløg, (investeringsforeninger), eru so at siga ein heild, sum lagar donsku rættarreglurnar til ES-fyriskipanirnar um íløgutænastur[1] og íløgustovnar[2]. Samanskrivað fyriskipan og greining av søguligu gongdini á økinum eru í „Direktivsammenskrivning og Direktivsamling," sum danska fíggjareftirlitið gav út í august 1995.

Eyðkent fyri lóggávuna í bólki I er, at hon er lagað eftir teimum minstukrøvum, sum Danmark sum limur í ES hevur bundið seg til. Her er tað serliga lógin um bankar og sparikassar og virðisbrævahandil, sum er týðandi. Men á økinum er eisini onnur týdningarmikil lóggáva, ið ikki er í gildi í Føroyum, men sum átti at verið tað, um lóggávan á økinum skal vera sambærilig við lóggávuna í londunum uttan um okkum. Serliga skal verða víst á tvær lógir, sum áttu at verið settar í gildi:

*L. nr. 476 af 10.6.1997 om investeringsforeninger og specialforeninger*
*og*
*L. nr. 1071 af 20.12.1995 om fondsmæglerselskaber.*

Arbeitt verður við at seta hesar lógir í gildi, so alt týðandi fíggjarvirksemi verður skipað við lóg.

## Um lógir í bólki 2

Lógin um *værdipapircentral* er ótíðarhóskandi, við tað at hon ikki samsvarar við virðisbrævahandilslógina, sum m.a. avmarkar virkisøkið hjá virðisbrævasentralum og sum m.a. ásetir, at ein virðisbrævasentralur skal verða skipaður sum partafelag. Roknast má tí við, at lógin um *værdipapircentral* verður sett úr gildi í Danmark, tá ið VP verður umskipað til partafelag. Tá er eisini ætlanin, at lógin skal fara úr gildi í Føroyum.

"Lov om *oplagshuse*" er frá 1866 og er í gildi enn bæði í Danmark og Føroyum. Í Lógbók fyri Føroyar sæst lógin ikki at vera broytt síðan 1930. Lógin er gomul, ótíðarhóskandi og lítið ella einki brúkt.

"Lov nr. 156 af 02.05.1934 om *visse spare- og udlånsvirksomheder*" er

[1] Fyriskipan um íløgutænastur, 93/22/EØF
[2] Fyriskipan um íløgustovnar, 86/611/EØF

avtikin í Danmark. Í staðin er komin „lov nr. 375 af 22.05.1996 om *sparevirksomheder og udstedere af forudbetalte betalingskort*.“ Ætlanin er, at seinna lógin eisini skal koma í gildi í Føroyum ístaðin fyri ta fyrru, men komið er ikki so langt enn.

Lógin um ávísar lánsstovnar – *lov om visse kreditinstitutter* – er framvegis í gildi í Føroyum, men bara so leingi, ríkismyndugleikarnir ikki hava lýst tær broytingar í banka- og sparikassalógini, sum Løgtingið samtykti at mæla til.

---

## TÆR EINSTØKU LÓGIRNAR

### Banka- og sparikassalógin

*Lb. nr. 57 af 02.02.1993 om banker og sparekasser m.v. som sat i kraft ved A. nr. 246 af 03.05.1993*

*B. nr. 567 af 29.11.1974 om fravigelse af bopælskrav i bank- og sparekasseloven.*

*B. nr. 586 af 29.11.1974 om fradrag for særlig sikre krav ved beregning af bankers og sparekassers enkeltarrangementer.*

*B. nr. 467 af 02.07.1987 om medarbejders valg af bestyrelsesmedlemmer i sparekasser, andelskasser og sammenslutning af andelskasser (Direkte repræsentation).*

*B. nr. 468 af 02.07.1987 om medarbejders valg af bestyrelsesmedlemmer i sparekasser, andelskasser og sammenslutning af andelskasser, der er moderselskab i en koncern (Koncernrepræsentation).*

*B. nr. 436 af 19.07.1988 om henlæggelse af beføjelser til Finanstilsynet samt om klageadgang.*

*B. nr. 530 af 07.08.1989 om anmeldelser m.v. til Erhvervs- og Selskabsstyrelsen for sparekasser og andelskasser.*

*B. nr. 746 af 05.12.1989 om revisionens gennemførelse i pengeinstitutter*

*B. nr. 854 af 14.12.1990 om værdipapirer med ubestemt løbetid og andre kapitalindskud.*

*B. nr. 855 af 14.12.1990 om filialer af kreditinstitutter med hjemsted i et land uden for De Europæiske Fællesskaber.*

*B. nr. 820 af 12.12.1991 om systemrevisionens gennemførelse i fælles datacentraler.*

*B. nr. 879 af 28.10.1992 om puljepension m.v.*

*B. nr. 1235 af 30.12.1992 om kapitaldækningsregler for pengeinstitutter og visse kreditinstitutter.*

*B. nr. 98 af 04.03.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens EDB-system og takster herfor.*

*B. nr. 963 af 13.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens takster for aktie- og anpartsselskaber, pensionskasser, sparekasser, andelskasser, investeringsforeninger, visse spar- og udlånsvirksomheder m.v. og for europæiske økonomiske firmagrupper.*

*B. nr. 995 af 14.12.1993 om den færøske registreringsmyndigheds takster for sparekasser og andelskasser.*

*B. nr. 997 af 14.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens gebyrer for oplysninger og dokumenter.*

Lóggáva: Í banka- og sparikassalógini er ásett, hvussu peningastovnsvirksemi skal verða rikið. Ásettar eru reglur fyri, hvussu peningastovnar skulu skipast og reglur fyri roknskaparviðurskifti. Mørk verða sett fyri, hvussu stórur partur útlánini kunnu vera av skyldunum og av eginpeninginum hjá einum peningastovni. Serligar solvensreglur eru fyri peningastovnar. Ásett er, hvussu eftirlitið skal fara fram, og tað er fyrst og fremst Fíggjareftirlitið, ið tekur sær av tí.

Tað er eisini danska fíggjareftirlitið, sum gevur peningastovni loyvi at virka og tekur aftur loyvi, har tað verður mett neyðugt.

Høvuðsmálið við lógini er at tryggja innsetararnar, so at teir ikki skulu missa pening, sum settur verður á konto í banka ella sparikassa. Soleiðis skal lógin skapa trygg viðurskifti á økinum. Tað verður gjørt við dyggum eftirliti bæði innan fyri og tvørtur um landamørk.

Fyrisiting: Ovasti fyrisitingarmyndugleiki er danski búskaparmálaráðharrin. Á ávísum økjum eru fyrisitingaruppgávur latnar danska fíggjareftirlitinum upp í hendur. Aðrir fyrisitingarmyndugleikar eru Føroya landsstýri, Skráseting Føroya og Erhvervs- og selskabsstyrelsen.

Eftirlitið við, at lógir og kunngerðir verða hildnar, liggur hjá danska fíggjareftirlitinum.

Fígging: Fíggjarliga ábyrgdin er donsk. Útreiðslur til lógarsmíð og umsiting verða goldnar av ríkismyndugleikunum, men eftirlitið verður í høvuðsheitum brúkarafíggjað, soleiðis at skilja, at peningastovnarnir rinda fyri aftirlitið alt eftir skuld og ábyrgd.

---

## Virðisbrævahandilslógin

*L. nr. 1072 af 20.12.1995 om værdipapirhandel m.v. som ændret ved L. nr. 376 af 22.05.1996 og sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996 og A. nr. 552 af 28.06.1997*

*B. nr. 268 af 17.04.1996 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens offentliggørelse af prospekter ved første offentlige udbud af visse værdipapirer som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996.*

*B. nr. 328 af 22.04.1996 om opgørelse af meddelelse om og offentliggørelse af betydelige andele i selskaber, der har aktier optaget til notering på en fondsbørs som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996.*

*B. nr. 329 af 23.04.1996 om prospekter ved første offentlig udbud af visse værdipapirer som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996.*

*B. nr. 330 af 23.04.1996 om kravene til det prospekt, der skal offentligøres, inden værdipapirer kan optages til notering på en fondsbørs som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996.*

*B. nr. 331 af 23.04.1996 om betingelse for optagelse til notering af værdipapirer på en fondsbørs som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996 som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996.*

*B. nr. 332 af 23.04.1996 om indberetning af handler med værdipapirer, der er noteret på en fondsbørs m.v. som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996.*

*B. nr. 333 af 23.04.1996 om aktionærers oplysningsforpligtigelser samt om tilbudspligt, når en aktionær erhverver flertallet af stemmerettighederne eller bestemmende indflydelse i et børsnoteret selskab som sat i kraft ved A. nr. 931 af 25.10.1996.*

*B. nr. 925 af 25.10.1996 om registrering af fondsaktiver i en værdipapircentral.*

*B. nr. 936 af 29.10.1996 om, i hvilke clearing- og afviklingssystemer netting med retsvirkning i henhold til værdipapirhandelslovens § 57 stk. 1, kan finde anvendelse.*

*B. nr. 1032 af 05.12.1996 om tidsfrister for at gøre retten til automatisk pant og betalingsforhold gældende m.v.*

*B. nr. 206 af 11.03.1997 om klagenævnet for Værdipapircentraler.*

Lóggáva: Galdandi virðisbrævahandilslóg er ein tillaðing til ES-reglur, við tað at hon setir í verk íløgufyriskipanina, (direktiv nr. 93/22/EØF frá 10. mai 1993 um íløgutænastur í sambandi við virðisbrøv), og CAD-fyriskipanina, (direktiv nr. 93/6/EØF frá 15. mars 1993 um krøv til peningagrundarlagið undir íløgufeløgum og kredittfeløgum). Harvið verður danski marknaðurin upplatin fyri umheiminum.

Høvuðsinnihaldið í lógini er, at hon undir einum ásetir reglurnar á virðisbrævamarknaðinum. Hesar reglur fevna um handil, clearing og skráseting á marknaðinum, og eru infraskipanin í marknaðinum saman við stovnunum á marknaðinum, sum eru Københavns Fondsbørs, Garantifonden for Danske Optioner og Futures og Værdipapircentralen.

Í samstarvi við Tjóðbankan loysa nevndu tríggir stovnar uppgávur

á virðisbrævamarknaðinum um samanføring av keyps- og sølutilboðum, clearing og netting og eisini gjaldflutning.

Lógin ásetir eisini reglur fyri sokallað „autoriserede markedspladser,“ sum eru handilsstøð fyri partabrøv í miðalstórum partafeløgum, sum ikki eru skrásett á virðisbrævabørsi.

Prospektkrøv eru útgreinað í kunngerðum við heimild í lógini.

Eftirlit við marknaðinum hevur Fondsrådet. Innihaldið í marknaðareftirlitinum er eftirlit við, at virðisbrævaútgevarar halda upplýsingarskyldur sínar og krøv til upplýsingar um handil á marknaðinum, (gjøgnumskygni), o.a.

Harafturímóti hevur Fíggjareftirlitið eftirlit við, at solvenskrøvini hjá virðisbrævahandlarum eru uppfylt, at mannagongdir eru sambært fyriskipan, eins og Fíggjareftirlitið eisini gevur og tekur aftur loyvi til virðisbrævahandil.

Samarbeiðið millum Fíggjareftirlitið og Fondsrådet er soleiðis, at Fíggjareftirlitið er avgreiðsluskrivstova hjá Fondsrådet.

Fyrisiting: Ovasti fyrisitingarligi myndugleiki er danski búskaparmálaráðharrin. Á ávísum økjum eru fyrisitingaruppgávur latnar danska fíggjareftirlitinum upp í hendur. Aðrir fyrisitingarmyndugleikar eru Føroya landsstýri, Skráseting Føroya og Erhvervs- og selskabsstyrelsen.

Fíggjareftirlitið hevur eftirlit við, at lógir og kunngerðir verða hildnar. Fíggjareftirlitið er eisini avgreiðsluskrivstova hjá Fondsráðnum.

Fondsráðið hevur eftirlit við virðisbrævamarknaðinum.

Fígging: Fíggjarliga ábyrgdin er donsk. Útreiðslum til lógarsmíð og umsiting hava ríkismydugleikarnir ábyrgdina av, men eftirlitið, sum liggur á Fíggjareftirlitinum, verður í høvuðsheitum brúkarafíggjað á tann hátt, at gjaldið verður ásett eftir tí orku, sum brúkt verður til eftirlit.

---

## Innsetaratrygdargrunnur

*L. nr. 367 af 14.06.1995 om en indskydergarantifond som sat i kraft ved A. nr. 718 af 5.10.1998*

*B. nr. 754 af 15.09.1995 om indskydergarantifonden som ændret ved A. nr. 718 af 05.10.1998*

*B. nr. 117 af 03.02.1997 om samarbejdet mellem Finanstilsynet og Indskydergarantifonden.*

Lóggáva: Endamálið við lógini er at avmarka missin hjá privatum innsetarum, sum hava pening á konto í peningastovni, sum fer á húsagang.

Missurin verður avmarkaður á tann hátt, at hesir innsetarar fáa tryggjaðan fulnað fyri 300.000 kr., so teir sokallaðu smásparararnir verða altíð tryggjaðir. Innskot á ávísum konti eru tó altíð fult tryggjað, sama, hvussu stór upphæddin er. Hetta eru í høvuðsheitum lógarbundnar konti og viðskiftakonti hjá sakførarum.

Tann stovnur, sum tryggjar alt hetta, er Innsetaratrygdargrunnurin. Innsetaratrygdargrunnurin er sjálvsognarstovnur, sum er stovnsettur og virkar sambært lóg.

Fyrisiting: Búskaparmálaráðharrin er ovasti fyrisitingarligi myndugleiki. Danska fíggjareftirlitið er eftirlit.

Fígging: Grunnurin er danskur, og fíggjarliga ábyrgdin er donsk. Undantikið lógararbeiðið, eru ikki almennar útreiðslur av grunninum, tí allar útreiðslur til rakstur og endurgjald til innsetarar verða rindaðar av peningastovnunum eftir fíggjarstøðu teirra.

***Viðmerkingar:*** Lógin um innsetaratrygdargrunn hevur gildi fyri bæði Føroyar og Danmark. Hon fevnir tí um allar peningastovnar í báðum londum og virkar sum ein tryggingarskipan, har allir peningastovnarnir gjalda til skipanina, sum rindar privatum innsetarum upp til 300.000 kr., um ein stovnur fer á heysin. Hetta letur seg ikki gera í Føroyum einsamøllum við bara fýra peningastovnum. Tí eigur at verða biðið um samstarv við danir, so føroysku peningastovnarnir framhaldandi verða við í skipanini við somu rættindum og skyldum, sum teir donsku.

---

## Peningahvítting

*L. nr. 348 af 09.06.1993 om forebyggende foranstaltninger mod hvidvaskning af penge som sat i kraft ved A. nr. 766 af 03.10.1997*

Lóggáva: Lógin áleggur persónum og fyritøkum á peningaøkinum, herundir peningastovnum og tryggingarfeløgum at hava mannagongdir, sum skulu tryggja, at peningur, sum er vunnin við broti á revsilógina, ikki verður umskiftur, móttikin, fluttur e.tíl.

Fyrisiting: Økið liggur hjá danska búskaparmálaráðharranum, og lóg-

gávan verður sostatt fyrisitin har. Fíggjareftirlitið hevur eftirlitsmyndugleika.
  Politiið kann krevja neyðugar upplýsingar.

Fígging: Lógin um fyribyrgjandi tiltøk móti peningahvítting hevur ikki almennar útreiðslur við sær, men ásetir reglur fyri fíggjarstovnar um, hvussu teir skulu fyribyrgja hesi hvítting.

---

## Goymsluhús

*L. af 23.02.1866 om oplagshuse*

Lóggáva: Lógin um goymsluhús – lov om oplagshuse – er frá 1866 og seinastu broytingarnar frá 1930. Lógin gevur løgmálaráðharranum heimild at geva persónum og fyritøkum, sum hava í hyggju at fara undir at reka goymsluhús, rætt til at seta upp goymsluprógv, áteknað av ráðharrastovuni, soleiðis at vørur einans kunnu verða avhendar ella veðsettar ímóti avhending ella veðseting av próvnum. Somuleiðis kann rættarsókn, so sum úttøka ella lóghald, ikki fremjast móti sjálvum vørunum, men goymslupróvnum.

Fyrisiting: Løgmálaráðið og Fíggjarmálaráðið:

Fígging: Fíggjarligu ábyrgdina hava ríkismyndugleikarnir.

***Viðmerkingar:*** Lógin er bæði gomul og ótíðarhóskandi og verður lítið og einki brúkt.
  Lógin verður helst avtikin fyrsta dagin, og um neyðugt, kunnu reglurnar verða settar inn í aðra lóg.

---

## Ávís sparivirki

***Galdandi (farandi):*** *L. nr. 156 af 02.05.1934 om visse spare- og udlånsvirksomheder, som ændret ved L. nr. 299 af 08.06.1977*

*Kunngerðir, skrásettar omanfyri undir bankalógini:*
*B. nr. 436 af 19.07.1988 om henlæggelse af beføjelser til Finanstilsynet samt om klageadgang*
*B. nr. 98 af 04.03.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens EDB-system og takster herfor*
*B. nr. 963 af 13.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens takster*

*for aktie- og anpartsselskaber, pensionskasser, sparekasser, andelskasser, investeringsforeninger, visse spare- og udlånsvirksomheder m.v. og for europæiske økonomiske firmagrupper*
*B. nr. 997 af 14.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens gebyrer for oplysninger og dokumenter.*

***Komandi**: L. nr. 375 af 22.05.1996 om sparevirksomheder og udstedere af forudbetalte betalingskort*
*B. nr. 182 af 06.03.1997 sparevirksomheder og udstedere af forudbetalte betalingskort.*

---

## Ávísir kreditstovnar

*Lb. nr. 737 af 19.08.1992 om visse kreditinstitutter som ændret ved L. nr. 1061 af 23.12.1992 og sat i kraft ved A. nr. 245 af 03.05.1993*
*B. nr. 856 af 14.12.1990 om visse kreditinstitutter*

*Kunngerðir skrásettar omanfyri undir bankalógini:*
*B. nr. 436 af 19.07.1988 om henlæggelse af beføjelser til Finanstilsynet samt om klageadgang*
*B. nr. 1235 af 30.12.1992 om kapitaldækningsregler for pengeinstitutter og visse kreditinstitutter*

Lóggáva: Lógin um ávísar kredittstovnar – *lov om visse kreditinstitutter* – er framvegis í gildi í Føroyum, men bara so leingi, ríkismyndugleikarnir ikki hava lýst tær broytingar í banka- og sparikassalógini, sum Løgtingið samtykti at mæla til. Lógin javnaði virksemið hjá feløgum, sum hvørki vóru sparikassar ella bankar, og sum vendu sær til almenningin eftir innlánum. Tá ið hesar broytingar eru lýstar, verður virksemið hjá hesum lánsstovnum skipað av banka- og sparikassalógini, við tað at § 10 í lov nr. 376 af 22.05.1996 tekur av lov om visse kreditinstitutter.

Fyrisiting: Danski búskaparmálaráðharrin

Fígging: Fíggjarligu ábyrgdina hava ríkismyndugleikarnir.

---

# Kapittul 3

## Aðrar lógir

Fiskaríbankin

*L. nr. 54 af 17. 02 1978 om Kongeriget Danmarks Fiskeribank.*

Lóggáva: Hetta er ein donsk lóg.

Fyrisiting: Lógin verður umsitin av Landbrugs- og fiskeriministeriet, og dagligu umsitingina hevur Danmarks Hypotekbank og Finansforvaltning.

Fígging: Fíggjarligu ábyrgdina hava ríkismyndugleikarnir.

***Viðmerkingar:***
Núverandi samstarv við Danmark og lýsing av krøvum.

Tá ið Føroyar eru sjálvstøðugar, verður eingin donsk lóg galdandi í Føroyum.

Men føroyingar hava lænt úr Fiskaríbankanum, sjálvt um eingi nýggj lán eru tikin har leingi.

Skuldu føroyingar havt áhuga at lænt í Fiskaríbankanum, so átti avtala at verið millum Danmark og Føroyar um hetta.

---

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar

*L. nr.28 af 29.01.1964 om en investeringsfond for Færøerne, som senest ændret ved l. nr. 566 af 16.11.1997.*

Lóggáva: Við hesi lóg frá 1964 varð Íleggingargrunnurin fyri Føroyar stovnaður, og ásett varð, at 10 milliónir krónur skuldu verða rindaðar í statsstuðli um árið í fíggjarárunum 1964/65 –1969/70. Seinni, frá 1970- 1976, lat danski staturin aftur pening í grunnin.

Ætlanin við grunninum var at fáa til vega pening til láns til størri almennar íløgur, sum vóru neyðugar og ynskiligar fyri at menna føroyskt vinnulív.

Fyrisiting: Lógin er donsk fólkatingslóg, men í henni er ásett, at heimastýrið ásetir neyvari reglur um virki grunsins.

Umsitingarliga ábyrgdin liggur sostatt bæði hjá donskum myndugleikum og Føroya landsstýri.

Fígging: Fíggjarliga ábyrgdin av lógararbeiðinum er bæði hjá danska statinum og Føroya landsstýri.

Umsitingarútreiðslur rindar grunnurin sjálvur. Hetta eru útreiðslur til nevnd og ein skrivara, sum bert hevur hetta arbeiði framíhjá.

***Viðmerkingar***

Tá ið Føroyar verða fullveldi, skulu vit hava eina føroyska lóg.

Einki stendur í lógini um, hvør ið tá eigur peningin, sum er í grunninum. Men hetta málið líkist tí, tá ið Realurin varð yvirtikin.

Samráðst má verða við danir um at fáa eina líknandi loysn sum við Realinum.

---

Donsk lóg um treytir fyri útlán frá statinum

*L. nr.1364 af 02.05.1934 om Ændringer i Vilkårene for Statens udlån*

Lóggáva: Lógin ásetir, at rentan fyri útlán kann lækka til í minsta lagi 4 % um árið, og at hon annars kann verða lagað eftir almenna rentustignum.

Lógin er sett í gildi við kunngerð í Lovtidende og ikki bara fyri fyri Føroyar. Ábyrgdina av lóggávuarbeiðinum hevur danska fíggjarmálaráðið.

Fyrisiting: Fyrisitingarmyndugleiki er danska fíggjarmálaráðið

Fígging: Fíggjarligu ábyrgdina av lógararbeiðinum hevur danska fíggjarmálaráðið.

---

Statsveðhald fyri kredittfelagslán til føroyskar kommunur

*L. nr. 172 af 24.05.1955 om statsgaranti for lån fra Kreditforeningen af Kommuner i Danmark til færøske kommuner.*

Lóggáva: Lógin gevur danska fíggjarmálaráðharranum heimild til, statskassans vegna, at veðhalda fyri lánum til føroyskar kommunur úr Kreditforeningen af Kommuner i Danmark.

Danski fíggjarmálaráðharrin fær, áðrenn hvørja veðhaldstilsøgn, tilsøgn um, at Føroya landsstýri, landskassans vegna, ábyrgist fyri tí pengi, sum danski staturin møguliga kemur at gjalda fyri at uppfylla sínar veðhaldsskyldur.

Fyrisiting: Fíggjarligi myndugleikin er danska Fíggjarmálaráðið.

Fígging: Fíggjarliga ábyrgdin av sjálvum lógararbeiðinum hevur danska fíggjarmálastýrið, sum ger lógina, men endaliga fíggjarliga ábyrgdin, um ein kommuna ikki megnar at gjalda Kreditforeningen af Kommuner i Danmark lánini aftur, liggur á Føroya landsstýri.

***Viðmerkingar:***
Kreditforeningen af Kommuner i Danmark hevur ikki veitt føroyskum kommunum lán í mong ár, og ivasamt er, hvussu lánsmynstrið hjá føroysku kommununum í framtíðini verður.

Samráðast má í øllum førum um, hvussu verða skal við teim veðhøldum, sum givin eru.

# Kapittul 4

## Formligt og óformligt samstarv

### Samstarv við danskar toll- og skattamyndugleikar.

Eitt skipað samstarv millum Líkningarráð Føroya og danskar skattamyndugleikar varð tikið upp, tá ið farið varð undir samtíðarskattalógina. Líkningarráðið fekk hjálp frá bæði táverandi kelduskattadirektoratinum, skattadepartementinum og donsku kommununum. Fleiri donsk starvsfólk hjálptu til við arbeiðinum, bæði við at koma til Føroya og við at kunna føroysk starvsfólk, sum fóru til Danmarkar. Soleiðis var eisini í 1992, tá ið farið varð undir at gera eina meirvirðisgjaldslóg, sum kom í gildi 1. januar 1993. Tá varð avtala gjørd við Told- og Skattestyrelsen í Danmark um, at Region Frederikshavn skuldi vera okkum til hjálpar við lógarsmíði og við at fáa lógina setta í verk.

Sama mannagongd hevur verið nýtt í sambandi við umsiting av tolllógini.

Kostnaðurin fyri landskassan hevur at kalla verið útreiðslur til ferðing og uppihald, og har tað hevur verið neyðugt, eitt vet til úrtíðararbeiði.

Eisini kann verða nevnt, at Region Esbjerg hevur havt starvsfólk úr Føroyum í ein mánað og sett tey inn í viðurskiftini við kolvetnisskatting.

Danska toll- og skattastýrið hevur eisini boðað frá, at teir fegin vilja rætta eina hjálpandi hond við umsiting av kolvetnisskattalógini undir somu treytum, sum hjálpin higartil hevur verið veitt.

Samanumtikið kann verða sagt, at umfatandi, óformligt samstarv hevur verið millum Toll- og skattstovuna og danskar toll- og skattamyndugleikar, tá ið arbeitt hevur verið við teim stóru lógunum á toll- og skattaøkinum, og mett verður, at kostnaðurin av samstarvinum við Told og Skat í Danmørk hevði verið fleirfaldaður, um goldið skuldi verið fyri tænasturnar á vanligan hátt við gjaldi fyri serfrøðingahjálp og fyri ferða- og uppihaldsútreiðslur.

Um hetta alt verður øðrvísi, um viðurskiftini millum Føroya og Danmarkar annars verða broytt, er ilt at meta um. Persónliga sambandið verður so har eina tíð framyvir, um annað verður broytt.

## Landsbankin

Landsbankin hevur óformligar avtalur við deildir í Tjóðbanka Danmarkar um at tosa saman um viðurskifti, sum hava týdning fyri at menna uppgávur Landsbankans.

Við atliti til gjaldoyraviðurskifti føroyinga verður helst brúk fyri samtarvi, um vit vilja halda fram við eini „currency board“ skipan, sum teirri núverandi.

## Lønardeildin

Lønardeildin hevur **formligt** samstarv við Fíggjarmálaráðið, Undirvísingarmálaráðið, Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið um:

- Útlæntar danskar tænastumenn. (t.e. danskir tænastumenn í starvi á økjum, sum eru yvirtikin)
- Pensiónsásetingareftirlønir og endurgjøld bæði til bólkar í sambandi við yvirtøkur, (t.d. fólkaskúlalærarar) og einstaklingar (tey, ið hava verið í starvi bæði í DK og FO sum tænastumenn).

Harumframt er **óformligt** samstarv/samskifti serliga við:

- Fíggjarmálaráðið um tænastumannarætt og vanligan arbeiðsrætt.
- Fólkatingsins umboðsmann um fyrisitingarrætt.
- Kommunernes Lønningsnævn um tænastumannarætt

Formliga samstarvið um útlæntar tænastumenn og tænastumenn, sum eru yvirtiknir, má so ella so halda áfram, eisini eftir fullveldi. Óformliga samstarvið kemst serliga av, at rættarstøðan er so lík í Danmark og Føroyum, at til ber at venda sær til donsku fyrisitingina at leita sær ráð hjá fólki, sum hava serkunnleika um ávís mál. Hugsandi er, at hetta samstarv fellur burtur so líðandi, um vit fáa fullveldi.

# Kapittul 5

## Niðurstøða

Sitandi landsstýri hevur longu tikið støðu til, at peninga- og gjaldoyraøkið við teim lógum, ið eru lýstar í kap. 1., er eitt øki, sum samráðast skal við danir um, hvussu hetta øki skal verða skipað við møguligum felags gjaldoyra.

Í kapitlinum eru umrøddar lógirnar um:
1) gjaldoyraviðurskifti,
2) tjóðbanka,
3) peningaseðlar,
4) myntir.

Hetta politikk- og lóggávuøki er í stórari broyting um allan heim.

Gongdin í heimsbúskapinum hevur í longri tíð verið tann, at handils- og fíggjarsamskiftið millum lond skal vera so lítið forðandi, sum til ber.

Tað, sum um ræður, er at hava eina einfalda og gjøgnumskygda umsiting, sum skapar álit á peningakervið.

Hóast ætlanin er, at peninga- og gjaldoyraøkið framvegis verður í felag við Danmark, verða týðandi spurningar at taka støðu til, tá ið sáttmáli verður gjørdur millum londini, tí at stórar broytingar kunnu eisini verða í donsku búskaparviðurskiftunum og lóggávuni, sum kunnu krevja eina sjálvstøðuga, føroyska støðutakan. Sum dømi er at nevna, at ger Danmark av at nýta evruna í staðin fyri donsku krónuna, so mugu føroyingar taka støðu til, hvat gjaldoyra, vit skulu brúka.

Restin av peninga- og kapitalmarknaðarøkinum verður føroyskt málsøki, sum setir krøv til føroysku fyrisitingina, tá ið ræður um umsiting, lóggávu og fíggjarliga ábyrgd.

Lógirnar, sum eru viðgjørdar í kap. 2, (tær vóru: banka- og sparikassalógin, lóg um virðisbrævahandil, lóg um innsetaratrygdargrunn, lóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítting av peningi og lóg um sparivirki og útgevarar av gjaldkortum, sum eru goldin frammanundan), hava allar sama mál at tryggja innsetarar og íleggjarar so væl, sum til ber.

ES-fyriskipanirnar seinastu 15-20 árini og tær nógvu lógarbroytingarnar á økinum bæði í ES, heruppií Danmark, og í londunum, sum hava avtalur við ES, eru ein roynd at tátta í og herða eftirlitið við fíggjarstovnunum og at gera felags reglur fyri stovnarnar. Málið er at styrkja bankaskipanina og skapa ein so tryggan fíggjarmarknað sum gjørligt tvørtur um landamørk.

Hjá okkum er lógarøkið danskt, og donsku lógirnar eru settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Fyrisitingarligu myndugleikarnir eru:
Danski búskaparmálaráðharrin: Banka- og sparikassalógin, virðisbrævahandilslógin, lógin um ein innsetaratrygdargrunn.

Fíggjareftirlitið: Allar nevndu lógirnar

Skráseting Føroya, Erhvervs- og selskabsstyrelsen og Føroya landsstýri: Mest banka- og sparikassalógin.

## Krøv til fyrisitingarligu myndugleikarnar, tá ið málsøkið gerst føroyskt:

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum verður at hava ta ábyrgd og tann myndugleika, sum danski búskaparmálaráðharrin hevur sum ovasti, fyrisitingarligi myndugleiki á økinum.

Eftirlitsstovnur, sum fíggjareftirlit, skal skipast. Stovnurin skal hava umsjón við, at ásetingarnar í lógum og kunngerðum verða hildnar.

Í Danmark hevur búskaparmálaráðharrin latið Fíggjareftirlitinum upp í hendur at gera ein part av teim neyðugu kunngerðunum. Hetta kundi eisini verðið gjørt í Føroyum, tí eisini í føroyska fíggjareftirlitinum verður tann neyðugi yrkiskunnleikin.

Føroyska fíggjareftirlitið eigur eisini, umframt av hava eftirlit við omanfyri nevndu lógum, eins og t. d. tað danska, at hava eftirlit við tryggingarfeløgunum og øðrum fíggjarligum stovnum ella grunnum. (T.d. hevur danska fíggjareftirlitið havt eftirlit við Framtaksgrunninum og Fíggingargrunninum)

Hóskandi hevði verið, at eftirlitið við gjaldskortum o.tíl í Føroyum lá hjá føroyska fíggjareftirlitinum.

Í Føroyum hevur Skráseting Føroya longu tær uppgávur, sum Erhvervs- og Selskabsstyrelsen hevur í Danmark, so har verður eingin broyting.

## Krøv til lóggávu, tá ið málsøkið gerst føroyskt

Tá føroysk lóggáva skal verða gjørd á økinum, er avgerandi neyðugt, at hon fylgir teirri í øðrum londum. Hetta er øki, har sera stór virði skifta hendur, og peningastovnarnir fáa frá øðrum litið til at umsita

teirra peningsfæ. Verður ivi um støðið, sum reglurnar í Føroyum byggja á, verður samstundis ivi um, hvussu tryggir føroysku peningastovnarnir eru, og tá verður knappliga trupult hjá teimum og harvið eisini vinnulívinum og samfelagnum annars at arbeiða uttan fyri landoddarnar við nøkrum, sum hevur við peningsfæ at gera.

Londini í Evropa hava lóggávu, sum fylgir ES-fyriskipanunum. Somuleiðis er við flestu londum, sum hava avtalur við ES. ES-fyriskipanirnar verða í hesum londum roknaðar sum minstukrøv, og londini í ES hava so skyldu at fylgja teimum. Hetta eiga Føroyar eisini at gera.

Við serligum atliti at kredittøkinum, kunnu Føroyar tilevna lógirnar út frá ES-fyriskipanunum. Annar møguleiki er, at galdandi danska lógin um bankar og sparikassar, sum er í gildi í Føroyum, verður føroyskað og dagførd. Soleiðis koma Føroyar eisini at fylgja minstukrøvunum í ES-fyriskipanunum, og føroyska lógin kemur at líkjast bankalógunum í londunum uttan um okkum. Í tí førinum kundi lóggávan verið einfaldað við t.d., at brotini um „andelskasser“ og annað, Føroyum óviðkomandi, vórðu burturúrtikin.

Um neyvari ásetingar í kunngerðum er at siga, at flestu donsku kunngerðirnar við heimild í banka- og sparikassalógunum eru longu í gildi í Føroyum. Hesar kunnu føroyskast.

Roknskaparkunngerðin og kunngerðin um kapitaldekningsreglur eru tær, sum nágreiniliga áseta, hvørjar upplýsingar, peningastovnarnir skulu lata fíggjareftirlitinum, annaðhvørt tað er mánaðarliga, fjórðingsárliga, hálvárliga o.s.fr. Hesar eru tær størstu og fløktastu av kunngerðunum til banka- og sparikassalógina og harvið tær, sum krevja mestu arbeiðsorku at gera og røkja. Hesar kundu verið tær somu, sum tær donsku, ið hvussu er í fyrstani.

Á tann hátt ber til at tryggja, at føroyska fíggjareftirlitið fær somu upplýsingar, sum tað danska, sum vit hava verið partur av.

Sama er við øðrum lógum sum t.d. lógini um virðisbrævahandil. Lógirnar kunnu gerast heldur einfaldari og tó fylgja minstukrøvunum í ES.

### Øðrvísi er við lógini um innsetaratrygdargrunnin

Lógin um ein innsetaratrygdargrunn er galdandi fyri Føroyar eins væl og Danmark. Hon fevnir tí um allar peningastovnar í báðum londum og virkar sum ein tryggingarskipan, har allir peningastovnarnir gjalda til skipanina, sum rindar privatum innsetarum upp til 300.000 kr., um ein stovnur fer á húsagang.

Tá ið Føroyar ikki longur eru partur av danska ríkinum, kann lógin um innsetaratrygdargrunnin ikki galda í Føroyum longur. Heldur ikki ber til hjá okkum at gera ein føroyskan grunn eftir sama mynstri.

Hetta letur seg ikki gera í Føroyum við bert fýra peningastovnum.

Tí eigur at verða samráðst við danir um samstarv, so føroysku peningastovnarnir framhaldandi vera við í skipanini við somu rættindum og skyldum, sum teir donsku.

## Krøv til fígging, tá ið málsøkið gerst føroyskt

Í Búskaparmálaráðnum er deild, sum varðar og umsitur økið, ið sostatt er fíggjað av ríkismyndugleikunum.

Í Føroyum umsitir ein fulltrúi í Fíggjarmálastýrinum økið saman við øðrum málum, so har verður ikki stórvegis broyting, men roknast kann við, at umsitingin her verður nakað størri.

Hinir partarnir av økinum, t.d. Fíggjareftirlitið, verða í høvuðsheitum rindaðir av peningastovnunum. Í banka- og sparikassalógini er ásett, at peningastovnarnir rinda tað eftirlit, sum staturin hevur. Gjaldið frá tí einstaka peningastovninum verður ásett eftir skuld og ábyrgd.

Tað eftirlit, sum Fíggjareftirlitið eftir virðisbrævahandilslógini hevur við øðrum virkjum, verður goldið av hesum virkjum, og gjaldið verður ásett eftir tí orku, sum nýtt verður til eftirlitið.

Útreiðslurnar til innsetaratrygdargrunnin rinda peningastovnarnir og ikki tað almenna. Lógin um fyribyrgjandi tiltøk móti peningahvítting hevur ikki almennar útreiðslur við sær, men ásetir reglur fyri fíggjarstovnar um, hvussu teir skulu fyribyrgja peningahvítting.

Samanumtikið kann verða sagt, at verður hildið fast um ta meginreglu, at eftirlit og partar av fyrisiting annars verða fíggjað av stovnunum, hevur tað ikki við sær stórvegis útreiðslur fyri landskassan, tá ið málið gerst føroyskt.

Tó kann roknast við, at eitt føroyskt fíggjareftirlit kemur at kosta tí almenna nakað.

Sum er, gjalda føroysku peningastovnarnir smáar upphæddir til fíggjareftirlit, av tí at teir eru so smáir aftur ímóti donsku peningastovnunum. Upphæddirnar, teir nú gjalda, eru ikki nóg mikið til eitt sjálvstøðugt, føroyskt fíggjareftirlit.

Tryggingareftirlitið kostar í løtuni á fíggjarlógini 1/2 millión krónur.

So leingi støða ikki er tikin til, hvussu føroyska fíggjareftirlitið skal verða skipað, og heldur ikki, hvørjar uppgávur skulu verða lagdar til eftirlitið, er ikki lætt at meta um kostnaðin. Men roknað má verða við, at tað kostar nakað av almennum peningi, umleið 3 milliónir krónur, íroknað ta 1/2 milliónina til tryggingareftirlitið, sjálvt um hildið verður fast við, at stovnarnir fíggja eftirlitið so nógv, sum gjørligt er.

# SAMSTARVSAVTALUR

## Innsetaratrygdargrunnurin

Sum nevnt omanfyri, eiga samráðingar at verða tiknar upp við danir um, at núverandi skipan við innsetaratrygdargrunninum kann halda áfram á sama hátt sum higartil.

## Fíggjareftirlitið

Tað hevði óivað verið hent hjá føroyska fíggjareftirlitinum at havt samstarvsavtalu við danska fíggjareftirlitið í fyrstani.

Tað eru partar av tílíkum eftirliti, sum serkunnleiki møguliga eigur at verða keyptur til. Her verður hugsað um peningastovnarnar.

Harafturat kunnu ivamál stinga seg upp, og áðrenn alt er komið í fasta legu, er hent at hava onkran at spyrja, sum hevur royndirnar.

At her verður skotið upp at keypa serkunnleikan úr Danmark, kemst av, at danska fíggjareftirlitið hevur havt eftirlitið við peningastovnunum higartil, og føroyska lóggávan fer at líkjast mest tí donsku, ið hvussu er eina tíð.

## Altjóða samarbeiði

Viðvíkjandi gjaldoyra og fíggjareftirliti eru altjóða samstørv sum t.d. IMF, Heimsbankin og „Baselnevndin”. Og í ES-samstarvinum er bæði formligt og óformligt samstarv sum t. d. ráðgevandi bankanevndin hjá ES, fíggjareftirlitsnevndin hjá ECB, (Evropeiska sentralbankanum) og óformligi kontaktbólkurin, har londini í EBS eru eygleiðarar.

Støðan hjá Føroyum í hesum samstarvi veldst um, hvussu valutaviðurskiftini hjá okkum verða skipað, og hvørji lond Føroyar, sum sjálvstøðugur statur, kemur at gera samstarvsavtalur við. Út frá tí kunnu vit meta um, hvussu nógv orka eigur at verða nýtt í hesum samstarvi.

Tað er ikki so, at neyðugt er at vera við frá fyrsta fullveldisdegi.

## Tíðarhvarv

Tað tekur ikki langa tíð at gera lógirnar, so tær virka sum føroyskar lógir. Tað kann næstan verða gjørt frá degi til dags. Men banka- og sparikassalógin og lógin um virðisbrævahandil saman við øllum kunngerðunum er rúgvismikið lógartilfar, so tað tekur tíð at føroyska og einfalda lógirnar.

Tað tekur eisini tíð at fáa eitt føroyskt fíggjareftirlit á føtur, tí søkt skal verða eftir fólki o.s.fr.

Eitt til hávtannað ár kunnu ganga, áðrenn eftirlitið er veruleiki.

# Fiskimálastýrið

# Innihaldsyvirlit

KAPITTUL 1 . . . . . . . . . . 137
1.1. Samandráttur og niðurstøður . . . . . . . . . . 137

KAPITTUL 2 . . . . . . . . . . 140
2.1. Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar . . . . . . 140
Fiskivinnumál . . . . . . . . . . 140
Fiskiskapur . . . . . . . . . . 140
Fiskimark og eftirlit . . . . . . . . . . 140
Sjóvinnumál, sjólóg o.a. . . . . . . . . . . 142
Loðsur, sjóreglur o.a. . . . . . . . . . . 144
Skipasýn o.a. . . . . . . . . . . 147
Niðurstøða . . . . . . . . . . 150
Skrásetingarmál . . . . . . . . . . 151
Niðurstøða . . . . . . . . . . 159
2.2. Sáttmálar . . . . . . . . . . 159
Fiskivinnumál . . . . . . . . . . 159
Sjóvinnumál . . . . . . . . . . 162
2.3. Formligt og óformligt samstarv . . . . . . . . . . 164
Fiskiveiðueftirlitið . . . . . . . . . . 164
Sjóvinnufyrisitingin . . . . . . . . . . 164
Løgtingslóg um uppmáting av skipum . . . . . . . . . . 164
Løgtingslóg um manning av skipum o.a. . . . . . . . . . . 164
Lov om skibes sikkerhed . . . . . . . . . . 165
Skráseting Føroya . . . . . . . . . . 165

KAPITTUL 3 . . . . . . . . . . 167
3.1. Mál, sum Danmark umsitur, og málsetingar fyri sjálvstøðuga umsiting . . . . . . . . . . 167
Sjóvinnufyrisitingin . . . . . . . . . . 167
Skráseting Føroya . . . . . . . . . . 169

KAPITTUL 4 . . . . . . . . . . 170
4.1. Á hesum økjum verða samstarvsavtalur gjørdar . . . . . . . . . . 170
Sjóvinnumál . . . . . . . . . . 170

# Kapittul 1

## 1.1. Samandráttur og niðurstøður

Lógarøkini, sum Fiskimálastýrið umsitur, og har føroysk og donsk lóggáva eru samantvinnaðar, kunnu í høvuðsdráttum liðast sundur í tríggjar partar: fiskivinnumál, sjóvinnumál og skrásetingarmál, og er tað serliga á teimum báðum seinni nevndu, at talan er um danska lóggávu, sum er sett í gildi í Føroyum, og í ávísum førum eisini um beinleiðis danska fígging. Fiskivinnulóggávan er øll føroysk, tá ið undantiknar eru ásetingar um fiskimark og uttanríkisøkið, og tí verður hon ikki nógv viðgjørd í hesi frágreiðing.

Eins og sæst í frágreiðingini, er tað í sambandi við **fiskivinnumál** serliga talan um lóggávuna um „Danmarks Riges Fiskeriterritorium“ og kunngerðina um „Fiskieriterritoriet ved Færøerne.“ Tað er henda lóggáva, sum ásetir fiskimarkið um Føroyar. Til tess at útinna eftirlit og bjarging á sjónum hava Fiskiveiðueftirlitið og Færøernes Kommando røkt uppgávuna í felag. Í sambandi við fullveldi verður tí neyðugt, at gjørd verður føroysk lóggáva um fiskimarkið, og at Fiskiveiðueftirlitið, umframt at taka sær av eftirliti og bjarging á sjónum, eisini røkir uppgávuna at verja sjómarkið, t.e. at hevda fullveldið.

Sambært § 8, stk. 3 og 4 í heimastýrislógini og sambært siðvenju hevur heimastýrið í ávísum førum heimild at tingast við og gera avtalur við onnur lond. Hetta er m.a. galdandi fyri fiskivinnuavtalur og millumlandasáttmálar, og verður tað vanliga gjørt við hjálp frá donsku uttanríkistænastuni. Í sambandi við fullveldi eiga Føroyar beinanvegin at biðja um sjálvstøðugan limaskap í millumlandafelagsskapunum NAFO, NEAFC, NASCO, ICCAT og NAMMCO og í millumlanda havrannsóknarráðnum ICES. Sum er gjalda Føroyar fyri limaskap í nevndu felagsskapum, og fer sjálvstøðug umboðan tí ikki at hava fíggjarligar meirútreiðslur við sær. Spurningurin um limaskap í IWC má takast upp alt eftir tørvi. Limagjaldið í IWC verður sum er, rindað av Danmark.

Lóggávan um **sjóvinnumál** er lutvíst donsk og lutvíst yvirtikin sum føroyskt sermál. Tá ið skipaeftirlit er undantikið, umsita føroyskir myndugleikar alla lóggávuna, tó at hetta verður gjørt í samstarvi við danskar myndugleikar, kanska serliga í sambandi við lóggávuarbeiði í altjóða nevndum og ráðum.

Av týðandi ríkislógum kunnu verða nevndar sjólógin frá 1985, við broytingum frá 1997, og lóg nr. 98 frá 12.03.1980 um skipatryggleika. Viðvíkjandi sjólógini eru ikki nógvar beinleiðis fyrisitingarligar uppgávur hjá tí almenna at røkja, og tí verður mett, at tær flestu fíggjarligu skyldurnar eru knýttar at lógarsmíði í Føroyum og í norðurlendskum og altjóða høpi.

Viðvíkjandi skipaeftirlitinum skal verða nevnt, at økið er beinleiðis fíggjað úr Danmark. Ein arbeiðsbólkur viðgjørdi í 1988 spurningin um at yvirtaka skipaeftirlitið. Bólkurin metti tá, at yvirtøkan fór at kosta um leið 9 mió. kr. Tó skal vart verða gjørt við, at tá var ikki talan um brúkaragjald, ella at ávísar uppgávur kunna verða latnar privatu vinnuni. Tí verður mett, at útreiðslurnar kunnu verða lægri, enn omanfyri nevnt. Eisini er at viðmerkja, at arbeiðsbólkur er settur í ár at fyrireika yvirtøku av skipaeftirlitinum, herímillum eisini at kanna fíggjarligar avleiðingar.

Í sambandi við skipaeftirlit eigur at verða nevnt, at lógarøkið er ógvuliga tekniskt og sera umfatandi, umframt at vit mugu vera við í altjóða nevndum og lógarsmíði. Tí verður mett, at neyðugt verður við ávísum samstarvi við Danmark um skipaeftirlit – eisini eina tíð aftan á, at økið er komið undir føroyskt málsræði. Hetta kann støða verða tikin til, eftir at nevndin, sum er sett til at fyrireika yvirtøku av skipaeftirlitinum, hevur lagt sítt álit fram seinni í ár og eftir samráðingar við danir.

Av teimum uttanríkismálum, ið knýta seg til sjóvinnu, er tað serliga arbeiðið í ST-havfelagsskapinum IMO, (International Maritime Organisation), sum hevur stóran týdning fyri føroyska sjóvinnu. Í felagsskapinum arbeiða fleiri tekniskar nevndir, sum eru mannaðar við fólki frá teimum ymsu sjóvinnumyndugleikum saman við serfrøðingum á ymsu økjunum. Krøvini verða ásett í altjóða sáttmálum sum t.d. SOLAS, STCW, LL og MARPOL, sum Danmark hevur samtykt at seta í gildi fyri Føroyar eftir tilmæli frá heimastýrinum. Í sambandi við fullveldi eiga Føroyar at gerast sjálvstøðugt limaland í tílíkum felagsskapum á sjóvinnuøkinum, teirra millum serliga IMO.

Av tí at Føroyar ikki eru við í ES, hava føroyingar ikki havt umboð á teimum sjóvinnufundum, sum har hava verið. Ásetingarnar í ES-fyriskipanum um sjóvinnu ávirka tó føroyska sjóvinnu beinleiðis, tí at krøvini verða sett at galda øll skip, sum koma í ES-havn.

Tann parturin, sum knýtir seg til skipaeftirlit, sigling og aðra lóggávu í sjóvinnu, eigur at verða umsitin í Fiskimálastýrinum, sum hevur sjóvinnu sum ábyrgdarøki.

Tele Danmark A/S hevur ábyrgdina av neyð- og trygdarskipanini á radioøkinum. Føroya Tele rekur støðina Tórshavn radio vegna Tele Danmark, og kann økið tí verða skipað undir Føroya Tele.

Skráseting Føroya umsitur øll **skrásetingarmál** undir Fiskimálastýrinum, t.e. bæði skipaskráseting, partafelagslóggávu o.a. Av tí at skipaskráseting er føroyskt sermál, er tað serliga lóggávan um parta- og smápartafeløg, vinnurekandi grunnar o.a., sum er viðgjørd í frágreiðingini. Talan er sum kunnugt um felagsmál, og øll lóggávan er donsk. Hinvegin verður økið umsitið í Føroyum, og verður somuleiðis fíggjað í Føroyum við skrásetingargjøldum og yvir fíggjarlógina.

Viðvíkjandi fyrisiting av skrásetingarmálum skal tó verða nevnt, at verður kært um avgerðir hjá Skráseting Føroya í sambandi við parta- og smápartafelagslógina og lógina um vinnurekandi grunnar, er Industriministeriets Erhvervsankenævn kærumyndugleiki. Skal hetta eisini skal verða umsitið í Føroyum, verður mælt til, at kærumyndugleikin framyvir verður Føroya Kærustovnur, tí kærur av hesum slag koma so sjáldan fyri, at neyðugt er ikki at skipa serliga fyrisiting bert til kærumál.

Sambært „lov om Erhvervsdrivende fonde“ skal Erhvervs- og Selskabsstyrelsen góðkenna, at ein grunnur hoyrir undir lógina, og tí kann verða skrásettur í Føroyum. Erhvervs- og Selskabsstyrelsen er grunsmyndugleiki, og Løgmálaráðið skal góðkenna broytingar í viðtøkununum hjá vinnurekandi grunnum. Mett verður, at Skráseting Føroya kann vera tann góðkennandi myndugleikin og grunsmyndugleiki. Møguliga kann løgdeildin á løgmansskrivstovuni góðkenna viðtøkubroytingar.

# Kapittul 2

## 2.1. Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar

### Fiskivinnumál

### Fiskiskapur

– *L.nr. 210 af 19.05.1971 om internationale reguleringsforanstaltninger vedrørende fiskeri.*

Lóggáva: Talan er um ríkislóg, sum gevur myndugleikunum heimild at gera altjóða sáttmálar og avtalur um fiskiveiðu innan og uttan fyri danskt sjóøki. Hetta fevnir eisini um føroyskt sjóøki.

Lógin gevur heimild til at áseta kunngerðir í sambandi við gjørdar sáttmálar og avtalur. Áðrenn kunngerðirnar verða settar í gildi fyri Føroyar, skal føroyska heimastýrið, eftir samráðingar, hava góðkent kunngerðirnar.

Talan er um lóggávu, sum m.a. var knýtt at tí fyrra NEAFC-sáttmálanum. Við tað Føroyar høvdu ávísir trupulleikar sambært heimastýrislógini at áseta reguleringar um fiskiskap uttan fyri 12 fjórðinga fiskimarkið, varð neyðugt við serligari ríkislóggávu. Hvat ið viðvíkir umsiting av føroysku fiskiveiðuni, hevur henda lóggáva ikki havt nakran leiklut tey seinastu nógvu árini. Mælt verður tí til, at lógin formliga verður sett úr gildi.

Fyrisiting: Sambært § 1, stk. 1, er tað danska stjórnin, sum kann seta altjóða sáttmálar í gildi, bæði innan fyri og uttan fyri danska fiskimarkið.

### Fiskimark og eftirlit

– *L.nr. 597 af 17.12.1976 om Danmarks Riges Fiskeriterritorium.*

Lóggáva: Talan er um ríkislóg, sum gevur danska forsætismálaráðharranum heimild við kongligari fyriskipan at seta avmarkingar fyri føroyskt sjóøki.

Hvat Føroyum viðvíkir er hetta heimildarlóg, sum gevur heimild at áseta fiskimarkið um Føroyar við kongligari fyriskipan. Verður føroysk lóggáva gjørd, er ikki neyðugt bæði við slíkari heimildarlóg og sjálvari lógini um fiskimarkið.

Fyrisiting: Sambært § 1 í lógini er fyrisitingarmyndugleikin danski forsætisráðharrin.

Henda lóg ásetir ikki nøkur beinleiðis krøv til fyrisiting, um málið kemur undir føroyskt málsræði. Tó er greitt, at um so verður, kemur ábyrgdin at verja markið einans at liggja á føroyskum myndugleika, afturímóti sum nú bæði á donskum og føroyskum í felag, (Færøernes Kommando og Fiskiveiðueftirlitinum). Sí A. nr. 598 frá 21.12.76.

Ikki neyðugt við samstarvsavtalu. Sí A. nr. 598 frá 21.12.76.

Fígging: Lógin hevur ongar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar.

– *A.nr. 598 af 21.12.1976 om Fiskeriterritoriet ved Færøerne.*

Lóggáva: Henda kunngerð er donsk, men í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum er danski lógarparturin um áseting av landleiðunum tikin við í føroysku lóggávuna.

Hóast lógarteksturin, sum víst er á frammanfyri, eisini er settur inn í fiskivinnulóggávuna, eigur í sambandi við fullveldi at verða gjørd serstøk lóggáva um føroyska fiskimarkið.

Fyrisiting: Eingin fyrisitingarmyndugleiki er nevndur. Kunngerðin er sett í gildi við heimild í áðurnevndu lóg nr. 597 af 17.12.1976 „om Danmarks Riges Fiskeriterritorium," sum heimilar forsætimálaráðharranum at áseta avmarkingar fyri fiskimark.

Skyldan at tryggja donsk og føroysk áhugamál innan fyri ásetta fiskimarkið er lóggávan í øðrum føroyskum lógum og kunngerðum.

Neyðugt er at gera sáttmálar við onnur lond um miðlinju, ella at gera aðra semju um mark millum Føroya og onnur lond, har fjarstøðan millum grundlinjupunktið er minni enn 400 fjórðingar.

Fígging: Kunngerðin hevur beinleiðis fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar. Her kann verða víst á, at sum er, røkja Færøernes Kommando og Fiskiveiðueftirlitið eftirlitsuppgávur í sambandi við fiskiskap og bjarging á sjónum í felag, við hvør síni fíggjarábyrgd.

Tá uppgávan, sum Færøernes Kommando nú røkir, verður løgd til føroyska fyrisitingarmyndugleikan, fer tað at økja um raksturin hjá Fiskimálastýrinum. Uppgávan at røkja føroyska sjómarkið og bjarging

á sjónum kann verða gjørd við tveimum skipum og eini tyrlu. Meirkostnaðurin í rakstri fer at økjast við um leið 10 mió. kr., og íløgur mugu verða gjørdar í eitt minni bjargingarskip og tyrlu.

– *A.nr. 599 af 21.12.1976 om afgrænsningen af søterritoriet ved Færøerne.*

Lóggáva: Lóggávan er donsk og ásetir 3 fjórðinga sjóøki. Lóggávan hevur m.a. tilknýti til sigling, dálking og føroyska tolllóggávu.

Fyrisiting: Sí frammanfyri undir „anordning nr. 598."

Fígging: Eingin beinleiðis fíggjarlig skylda ella ábyrgd.

## Sjóvinnumál, Sjólóg o.a.

- *Lb. nr. 141 af 01.04.1985: Søloven, som ændret ved anordning nr. 305 af 07.05.1997*
- *B. nr. 242 af 26.08.1953 om skibsdagbog og maskindagbog.*
- *B. nr. 450 af 29.08.1978 om erstatningsfond for olieforurening, som senest ændret ved B. nr. 465 af 26.09.1980.*
- *B. nr. 170 af 16.03.1995 for Færøerne om skibsbøger.*
- *B. nr. 259 af 10.04.1996 om forsikring eller anden garanti til dækning af det privatretlige ansvar for olieskader fra skibe.*
- *B. nr. 433 af 2405.1996 om den internationale fond for erstatning af skader ved olieforurening.*
- *B. nr. 206 af 03.04.1998 om ophævelse af sølovens kapitel 10 a og 10 b.*
- *B. nr, 217 af 08.04.1998 om forsikring eller anden garanti til dækning af det privatretlige ansvar for olieskader fra skibe.*
- *L. nr. 75 af 29.03.1904 om Rederes Forpligtelse til at meddele Statistiske Oplysninger, som ændret ved lov nr. 127 af 15.04.1930.*
- *MB.nr. 4 af 10.05.1940 om Brug og Udleje af skibe hjemmehørende på Færøerne.*
- *MB.nr. 64 af 15.12.1941 om Benyttelse af Fartøjer.*

Lóggáva: Lógarkunngerðin varð sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1985. Sjólógin er ein tann mest týðandi lógin á økinum, (sí niðanfyri um lógarøkið).

Upprunaliga sjólógin, sum er í gildi fyri Føroyar, er frá 1892, og er broytt fleiri ferðir, seinast í 1997, m.a. í sambandi við ásetingar um privatrættarliga ábyrgd í sambandi við oljudálking. Broytingarnar

eru komnar av, at Danmark hevur samtykt fleiri altjóða sáttmálar á sjóvinnuøkinum. Sama er gjørt í Noregi og Svøríki. Tá ið broytingar verða gjørdar í sjólógini, verður grundleggjandi arbeiðið gjørt í serligari danskari sjólógarnevnd. Nevndin viðgerð altjóða sáttmálar og setir fram uppskot til broytingar í sjólógini í samsvari við hesar sáttmálar. Nevndin samstarvar við avvarðandi nevndir í hinum Norðurlondunum. Av hesi orsøk eru reglurnar í sjólógunum í roynd um eins.

Í stuttum kann verða sagt, at lógin umfatar hesi mál:

Í innganginum til lógina verður ásett, hvørjar treytir skulu verða loknar, áðrenn skip verður sagt at vera danskt skip. Hesar reglur eru eisini í samsvari við skipaskrásetingarlógina. Eisini eru reglur um partsreiðarí. Ásettar eru reglur um, hvørjar skyldur skiparin hevur til m.a. at tryggja mannalív og ognir á sjónum, og hvørjar skyldur hann hevur mótvegis reiðaranum á skipinum. Ásett er greiniliga, hvørjar reglur galda, tá ið reiðari átekur sær at flyta farm við skipi. Í sambandi við flutning av ferðafólki og ferðagóðsi eru eisini ásettar reglur fyri hesum.

Reglur eru viðvíkjandi skipbroti, skaða av samanstoyti og um bjarging á sjónum.

Reglur eru um ábyrgd fyri øðrum, og ásettar eru reglur um avmarking av reiðarans endurgjaldsskyldu.

Ásett er, hvørji rættindi kunnu verða tryggjað við sjópanti í skipi.

Ásett er, nær skipaeigari kann koma undir endurgjaldsskyldu, tá ið skipið dálkar um seg við olju. Reglur eru fyri, hvussu dagbøkur verða førdar, sjóforhoyri o.ø.

Fyrisiting: Talan er um felagsmál sambært heimastýrislógini. Vinnumálaráðharrin, (áður ídnaðarmálaráðharrin), skal áseta neyvari reglur í kunngerð, har hetta er ásett í lógini. Bert smáar fyrisitingarligar uppgávur eru at røkja, m.a. at geva út veiðudagbøkur til fiskiskip.

Fígging: Av tí at ongar størri fyrisitingarligar uppgávur eru at røkja, verður ikki mett, at stórvegis fíggjarligar skyldur eru knýttar at lógarøkinum.

– *L.nr. 198 af 16.05.1950 om fremmede statsskibe m.v.*

Lóggáva: Høvuðsreglan er, at danskur dómstólur kann gera krav móti útlendskum statsskipi ella farmi, antin við úttøku ella við at leggja hald á skipið. Hetta kann tó ikki verða gjørt, tá talan eru um hernaðarskip ella annað skip, sum ikki verður nýtt í handilsvinnu. Sama er við farmi, sum ikki verður nýttur í handilsvinnu, men sum annars verður fluttur við handilsskipi.

Ongar fyrisitingarligar ella fíggjarligar uppgávur eru knýttar at hesi lóg.

## Loðsur, sjóreglur o.a.

– *L.nr. 157 af 22.12.1876 om Opfiskning af Ankere, Ankertouge og andet Skibsredskab m.m.*

Lóggáva: Lógin ásetir rættindi og skyldur hjá tí, sum finnur eitt akker á botni, antin tað er leyst akker, ella akker, sum er bundið í boyu. Somu reglur galda fyri aðra skipsútgerð, sum verður funnin á havbotninum.
Lógin er frá 1876 og er nú heilt ótíðarhóskandi og óneyðug.

Ongar fyrisitingarligar ella fíggjarligar uppgávur eru knýttar at hesi lóg.

– *L.nr. 68 af 29.03.1893 om Afståelse af Grund til Fyranlæg m.m.*

Lóggáva: Lógin er um ognartøku av jørð til vitar og tað, sum til hoyrir, t.e. onnur hús við vitan, veg og jørð til vitapassarafólkini. Flotamálaráðharranum verður heimilað at áseta í hvørjum einstøkum føri, hvat er neyðugt at ognartaka. Mett verður ikki, at henda lóg er neyðug longur.

Í lógini er ásett, at ognartøka kemur undir vanligar reglur um ognartøku, tá ið tað almennað skal byggja á privatari grund.

Tær fyrisitingarligu og fíggjarligu uppgávurnar eru helst álagdar donskum myndugleikum.

– *L.nr. 49 af 24.03.1899: Strandingslov for Færøerne, som ændret ved lov nr. 127 af 15.04.1930.*
– *A.nr. 114 af 09.05.1912 om Politiets Pligter i Strandingstilfælde paa Færøerne.*

Sambært heimastýrislógini hoyra skipastrandingar undir lista A, og teir myndugleikar, sum nevndir eru í lógini, landfúti, sýslumenn og løgregla, hoyra undir lista B.

Fyrisiting: Sambært lógini verða skyldur álagdar fleiri myndugleikum, tá ið skip er strandað ella er um at stranda. Hesir myndugleikar eru løgreglan, sýslumenn, landfútin og amtmaðurin. Sama er við vraki og stykkjagóðsi, sum rekur á land, og sum hevur eitt ávíst mett virði.

Løgmálaráðharrin og fíggjarmálaráðharrin hava eisini ávísar skyldur, t.d. at staðfesta ognarrætt til skip ella góðs. Ger eigari ikki vart við seg, hevur fíggjarmálaráðharrin sambært lógini heimild til at lata bjargingarfólk fáa teir ognarlutir, sum hava størri virði enn 10 kr.

Lóggáva: Lógin ásetir reglur fyri, hvørjar uppgávur og skyldur ávísir myndugleikar hava, tá skip er strandað ella er um at stranda. Eisini er álagt øllum at hjálpa, har tað stendur um lív, uttan tó at koma sær sjálvum í vanda. Fólk á staðnum hava skyldu til veita teimum skipbrotnu innivist og neyðuga røkt. Endurgjald verður veitt teimum, sum hava útreiðslur av hesum.

Er eingin umboðsmaður á staðnum fyri tann, sum eigur skip ella farm, hevur løgreglan skyldu til at boða eigaranum frá hesum, soleiðis at hann, eftir at hava veitt trygd fyri bjargingarútreiðslum, kann koma eftir ognarlutunum. Ger eigarin ikki vart við seg innan 1 ár, kunnu ognirnar verða seldar á uppboði.

Bjargingarlønin kann vera 1/3 av søluvirðinum, tá bjargingarútreiðslurnar eru frádrignar. Bjargingarlønin kann eisini verða ásett eftir kapitli 9 í sjólógini. Ger eigarin ikki vart við seg, fær statskassin tað, sum eftir er av upphæddini.

Fígging: Av tí at ábyrgd og skyldur liggja á donskum myndugleikum, eru tað hesir, sum í løtuni bera kostnaðin av at umsita lógina, t.e., at fíggingin av lógarøkinum bert er ein brotpartur av tí, sum nevndu myndugleikar kosta.

– *L.nr. 131 af 17.04.1916 om Lodsvæsenet, som senest ændret ved lov nr. 127 af 15.04.1930.*
– *B.nr. 118 af 02.06.1900 om Brugen af Lodskendingsflaget.*
– *A.nr. 9 af 17.01.1934 om Signaler for Lods.*

Loðslógin er ríkislóg, sum er sett í gildi í 1916 og seinast broytt í 1930. Lóggávan er ótíðarhóskandi á fleiri økjum, serliga tá ið ræður um starvsfólkaviðurskifti. Lógin er dagførd í Danmark, men ikki í Føroyum.

Lóggávan: Lógin ásetir reglur um, hvussu loðsskipanin skal vera, hvussu loðsar og skipsførarar skulu bera seg at og hvørja ábyrgd teir hava, tá ið skip verður loðsað. Sambært lógini skal ráðharrin áseta gjøld fyri loðstænastu. Í lógini er greiniliga ásett, hvat ið goldið skal verða fyri. Gjøldini eigur loðsverkið á staðnum.

Fyrisiting: Sambært lógini skal loðsskipanin verða skipað undir einum

loðsstjóra, sum er settur av kongi. Hesin stjóri setir loðsar í starv. Loðsstjórin kann seta loðs til formann, har fleiri enn ein loðsur er í starvi. Á minni plássum, har einki loðsverk er, kann loðsstjórin seta í starv hjálparar, sum skulu virka undir somu reglum, sum aðrir loðsar.

Fígging: Sambært lógini skal loðsskipanin mest fíggja seg sjálva. Tá ið tað ikki ber til, kann ríkiskassin veita stuðul.

Í hesum sambandi kann verða viðmerkt, at føroyska vitatænastan, sum verður rikin av Farvandsvæsenet, nýtir 7,4 ársverk til tænastumenn og vitapassarar.

- *L.nr. 118 af 28.03.1951 om skibsfartens betryggelse, som ændret ved Anordning nr. 583 af 30.06.1994.*
- *A.nr. 57 af 27.02.1952 om ikrafttræden af lov om forholdsregler til skibsfartens betryggelse*
- *B.nr. 223 af 25.08.1926 angaaende Betimeligheden af at føre fast hvidt Agterlys i større Fiskefartøjer under Gang om Natten på Fiskepladser.*
- *A.nr. 164 af 23.07.1929 angaaende Rorkommandoen i danske skibe.*
- *A.nr. 319 af 17.12.1932 vedrørende Forholdregler til Betryggelse af Sejladsen for Skibe i Nærheden af Is.*
- *Bekendtgørelse nr. 263 af 02.08.1938 angaaende Forholdregler til Betryggelse mod Dybdeforringelser i danske Farvande.*
- *B.nr. 186 af 26.05.1965 om skibsfartens betryggelse.*
- *B.nr. 340 af 26.07.1967 om signaler for fiskeskibe.*
- *B.nr. 819 af 06.12.1990 om søvejsregler.*

Henda lóggáva er felagsmál. Sitandi samgonga hevur avtalað í samgonguskjalinum, at málsøkið skal verða yvirtikið. Hetta er eisini staðfest í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998. Sum er, umsita ríkismyndugleikarnir økið.

Lóggáva: Lógin hevur gildið fyri øll skip og allar bátar. Lógin áleggur einum og hvørjum førara at boða frá, um hann verður varugur við eitthvørt, sum kann vera til vanda fyri trygdina á sjónum, sum t.d. rekaís, vrak á sjónum, ódnarveður o.a. Boðini skulu verða givin øllum skipum nærindis og nærmastu myndugleikum, sum samband fæst við. Álagt kann eisini verða førara at vera eini veðurtænastu til hjálpar við at gera veðurmátingar og senda tær til danskar myndugleikar.

Førarin á einum og hvørjum skipi hevur skyldu til at veita neyð-

støddum á sjónum hjálp, um hetta ikki setir hansara egna skip, manning ella ferðafólk í vanda.

Í fyriskipan ella kunngerð til lógina, eru sjóreglurnar ásettar. Hesar eru altjóða reglur og eru samtyktar í IMO, havfelagsskapinum undir ST.

Fyrisiting: Í samráði við handilsmálaráðharran skal verjumálaráðharrin virka fyri, at Danmark veitir neyðugan materiellan og fíggjarligan stuðul til eina altjóða trygdartænastu í Norðuratlantshavi, herímillum til ísfráboðanarskipan o.a. Álagt er handilsmálaráðharranum at áseta neyvari reglur um skipaferðslutryggleika og sjóreglur.

Verjumálaráðharrin hevur ábyrgd av, at siglingarleiðir eru uppmerktar. Farvandsvæsenet stendur fyri hesi uppgávu í danska ríkinum. Landsverkfrøðingurin ger eisini avmerkingar í Føroyum, eftir neyvari avtalu og í samstarvi við Farvandsvæsenet.

Fígging: Uppmerking av sjóøkinum fíggjar ríkiskassin.

## Skipasýn o.a.

- *L.nr. 98 af 12.03.1980 om skibes sikkerhed m.v., som ændret ved Anordning 583 af 30.06.1994.*
- *B.nr. 269 af 06.09.1930: Regulativ for Prøvekamrene for Skibslys og nautiske instrumenter.*
- *B.nr. 208 af 09.07.1932 angaaende Vægtangivelse paa tungt Gods.*
- *B.nr. 9 af 24.01.1953 om skibsmandskabets opholdsrum m.v., som senest ændret ved B.nr. 397 af 09.09.1980.*
- *B.nr. 11 af 15.01.1960 om skibsmandskabets opholdsrum m.v. i færøske fiskeskibe, som ændret ved B.nr. 375 af 28.07.1972.*
- *B.nr. 173 af 21.05.1965 om forskrifter for skibets bygning og udstyr m.v., som senest ændret ved B.nr.325 af 14.06.1977.*
- *B.nr. 174 af 21.05.1965 om radiostationer og radiotjeneste i skibe, som senest ændret ved -B.nr. 530 af 28.10.1981.*
- *B.nr. 175 af 21.05.1965 om transport af let forskydelige ladninger med skibe.*
- *B.nr. 176 af 21.05.1965 om sikkerhedstjenesten i skibe.*
- *B.nr. 273 af 05.07.1968 om lastelinier for skibe, som ændret ved B.nr. 114 af 16.03.1976.*
- *B.nr.387 af 07.07.1969 om forskrifter for maskinanlæg m.v. i skibe, som senest ændret ved B.nr. 136 af 11.03.1974.*
- *B.nr. 164 af 20.04.1970 om anvendelse af åben ild m.v. ved arbejder om bord i skibe, som ændret ved B.nr. 269 af 22.05.1974.*

- *B.nr. 195 af 12.05.1970 om transport til søs af farlige, flydende kemikalier i bulk.*
- *B.nr. 372 af 07.08.1970 om flaskegasanlæg i skibe.*
- *B.nr. 247 af 03.06.1971 om skibsmandskabets opholdsrum m.v. i fiskeskibe, som ændret ved B.nr. 374 af 28.07.1974.*
- *B.nr. 258 af 17.06.1975 om forskrifter mod støj i skibe.*
- *B.nr. 67 af 28.02.1977 om opholdsrum m.v. i skibe, som ændret ved B.nr. 398 af 09.09.1980.*
- *B.nr. 317 af 14.06.1977 om brandsikring af lastskibe.*
- *B.nr. 358 af 24.06.1977 om foranstaltninger til imødegåelse af den med industrifiskelaster forbundne sundhedsfare, som ændret ved B. af 04.09.1979.*
- *B.nr. 357 af 11.07.1978 om samling af maritime standardudtryk.*
- *B.nr. 362 af 05.08.1980 om fastsættelse af tekniske forskrifter om skibes bygning og udstyr m.v.*
- *B.nr. 120 af 17.03.1981 af forretningsorden for tilbageholdelses-nævnet.*
- *B.nr. 482 af 15.09.1981 om motorer i passagerfartøjer.*
- *B.nr. 530 af 28.10.1981 om radioanlæg og radiotjeneste i skibe i indenrigs fart, der befordrer passagerer.*
- *B.nr. 8 af 05.01.1983 om refusion af udgifter ved syn af skibe m.v.*
- *B.nr. 475 af 11.10.1983 om anvendelse af lov om skibes sikkerhed m.v. på udenlandske skibe.*
- *B.nr. 233 af 09.05.1986 om beskyttelsesudstyr og gas-førstehjælps-udstyr i visse fiskefartøjer.*
- *B.nr. 713 af 11.11.1987 om anmeldelse af arbejdsulykker m.v. til Søfartsstyrelsen.*
- *B.nr. 106 af 01.03.1988 om nødradiopejlsendere og vagtmodtagere i fiskeskibe.*
- *B.nr. 107 af 01.03.1988 om sikkerhedsarbejde i skibe.*
- *B.nr. 463 af 29.07.1988 om syn og certifikater m.v.*
- *B.nr.431 af 19.06.1989 om færøske skibes forsyning med læge-midler m.v.*

Lógarøkið er felagsmál sambært heimastýrislógini. Sitandi samgonga hevur avtalað í samgonguskjalinum, at málsøkið skal verða yvirtikið. Hetta er eisini staðfest í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998. Sum er, umsita ríkismyndugleikarnir økið. Hesir hava eisini fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina.

Lóggáva: Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1985. Danska stjórnin hevur ábyrgd av at tilevna lógina og tilhoyrandi kunngerðir, men føroyska heimastýrið skal tó samtykkja hesar.

Lógin varð gjørd í 1980 og loysti av skipatilsýnislógina frá 1951. Lógin er broytt nakrar ferðir síðani, serliga orsakað av tí tøkniligu menningini og broytingum í altjóða sáttmálum. Mest týðandi altjóða sáttmálin er trygdarsáttmálin á sjónum, SOLAS, frá 1974. Aðrir sáttmálar eru t.d. lastalinjusáttmálin LL frá 1966 og umhvørvissáttmálin MARPOL frá 1973 og 1978.

Í stuttum kann verða sagt, at lógin, saman við tøkniligum fyriskipanum og kunngerðum, ásetir bæði tøknilig krøv til skip og reglur um skipasýn. Skipara og reiðara eru skyldur álagdar at halda skipið í góðum standi. Sjóvinnustýrið kann halda aftur skipi, sum bæði er til vanda fyri trygdina á sjónum og fyri umhvørvið. Reglurnar kunnu, sambært fólkarættarligum reglum, eisini verða settar at galda fyri útlendsk skip, sum koma inn í egið sjóøkið.

Fyrisiting: Vinnumálaráðharrin, (áður ídnaðarmálaráðharrin), hevur heimilað danska sjóvinnustýrinum at útinna tær heimildir, ið eftir hesi lóg eru givnar ráðharranum. Tøkniligar fyriskipanir, ið Sjóvinnustýrið hevur fingið heimilað at áseta, verða kunngjørdar í „Meddelelser fra Søfartsstyrelsen“ og eru at síggja hjá Skipaeftirlitinum og Sjóvinnufyrisitingini í Fiskimálastýrinum.

Tøkniligar fyriskipanir, sum eru í uppskoti at seta í verk bæði í Danmark og Føroyum, koma til Sjóvinnufyrisitingina til ummælis. Avtalað er, at Sjóvinnufyrisitingin áðrenn tveir mánaðir skal boða frá, um fyriskipanin kann koma í gildi fyri Føroyar. Sjóvinnufyrisitingin skal tryggja, at vinnan fær nýggjar fyriskipanir til ummælis, áðrenn hesar verða settar í gildi fyri Føroyar.

Er talan um danskar kunngerðir, kann Sjóvinnufyrisitingin, í samráði við føroysku vinnuna, heita á Sjóvinnustýrið um at fáa sett í gildi nýggjar kunngerðir, gera broytingar ella seta úr gildi verandi kunngerðir.

Í Føroyum hevur danska sjóvinnustýrið eina deild, sum vanliga verður kallað Skipaeftirlitið ella Skipasýnið. Tað hevur skyldu til at ansa eftir, at lógin verður hildin. Sjóvinnustýrið hevur heimild til at halda aftur skipum, sum ikki lúka treytirnar í lógini. Sjóvinnustýrið skal góðkenna skip til ávísa nýtslu, herundir áseta loyvt ferðafólkatal og geva skipinum siglingarloyvi til ávíst øki. Sjóvinnustýrið hevur skyldu til at fylgja tí tøkniligu og sosialu menningini á økinum og virka fyri, at hetta verður til frama fyri trygdina á sjónum.

Danski vinnumálaráðharrin setir eitt skipatilsýnisráð, sum skal vegleiða og ráðgeva Vinnumálaráðnum og Sjóvinnustýrinum í spurningum á lógarøkinum. Formaður í nevndini er eitt umboð úr Sjóvinnu-

stýrinum. Føroyska heimastýrið er ikki umboðað í nevndini, men kann vera við sum eygleiðari, og er eisini við í undirnevndum undir Skipatilsýnisráðnum.

Vinnumálaráðharrin hevur eisini heimilað Sjóvinnustýrinum at kunna heimila klassafeløgum at gera summar uppgávur fyri seg, t.d. tøkniligar kanningar fyri at kunna sýna eitt skip endaliga. Klassafeløgini kunnu eisini, vegna Sjóvinnustýrið, skriva út altjóða loyvisbrøv, sum vátta teirra góðkenning.

Fígging: Økið er beinleiðis fíggjað úr Danmark. Hetta merkir, danskir myndugleikar fíggja allar rakstrarútreiðslur, sum standast av lógarsmíði, herímillum altjóða samarbeiði á sjóvinnuøkinum og útreiðslur til skipasýn o.a.

Ein arbeiðsbólkur hevur í 1988 viðgjørt spurningin um at yvirtaka skipaeftirlitið. Bólkurin metti, at yvirtøkan fór at kosta um leið 9 mió. kr. Upp í hetta tal er ikki roknað, at vinnan skal gjalda fyri skipasýn.

Mett verður tó, at fyritreytirnar fyri hesi kostnaðarmeting eru broyttar frá 1988. Í álitinum frá 1988 er roknað við lutfalsliga nógvum starvsfólki. Somuleiðis eru færri nýbygningar nú, og skipini yvir 20 tons eru farin úr 316 niður í 223.

Men arbeiðið í altjóða nevndum hevur tey seinastu árini sett nógv størri krøv til myndugleikarnar. Talan er m.a. um fráboðanarskyldu til IMO, Port State Control, umhvørvismál o.a.

Mett verður, at skal skipaeftirlitið verða yvirtikið við teimum skyldum og ábyrgdum, tað hevur við sær, og við tí skipatali, sum nú er, fer hetta at kosta í mesta lagi tað sama, sum nevnt varð í álitinum frá 1988, um leið 9 mió. kr. Tó kunnu útreiðslurnar helst verða nakað lægri, um brúkaragjøld verða nýtt, og onkrar uppgávur verða lagdar út til privatu vinnuna í staðin fyri at seta starvsfólk.

Ein nýggjur arbeiðsbólkur er settur í ár til at fyrireika yvirtøku av skipaeftirlitinum. Bólkurin kemur m.a. at viðgera gjølligari, hvørjar fíggjarligar avleiðingar hetta fer at hava.

## Niðurstøða

Sjóvinnuøkið verður í høvuðsdráttum umsitið av trimum myndugleikum, tveimum føroyskum og einum donskum. Sjóvinnufyrisitingin í Fiskimálastýrinum umsitur manningar-, sjómans- og mynstringarlógina, og Undirvísingar- og mentamálastýrið umsitur útbúgvingarmál í sjóvinnu, herímillum sjómansskúlarnar og Maskinmeistaraskúlan. Danski myndugleikin er danska sjóvinnustýrið, sum umsitur ríkislógir

um sjóvinnu, sum eru settar í gildi her, m.a. „lov om skibes sikkerhed.“ Uppgávan hjá Sjóvinnustýrinum, (Skipaeftirlitinum), er m.a. at umsita skipasýn, herímillum at geva loyvisbrøv, eins og tað umsitur lógarsmíð, (ríkislógir og fyriskipanir), og altjóða samstarv á sjóvinnuøkinum.

Aðrir danskir myndugleikar eru eisini við í myndini. Talan er t.d. um umhvørvismál og uppmerking av siglingarøkjum, sum ávikavist Miljøstyrelsen og Farvandsdirektoratet umsita.

Við at kanna lógarøkið sæst, at nógvar av gomlu lógunum á sjóvinnuøkinum eru ótíðarhóskandi og óneyðugar. Somuleiðis eru nakrar av teimum nýggjaru lógunum ikki heilt dagførdar.

Uppgávur, sum danskir myndugleikar umsita í Føroyum, rindar ríkiskassin. Skipasýn hjá Sjóvinnustýrinum verður gjørt at kalla ókeypis fyri reiðaran, men uppgávur, sum klassafeløg gera vegna Sjóvinnustýrið, skal brúkarin gjalda fyri.

Uppgávur, sum føroyskir myndugleikar umsita, eru eisini mestsum ókeypis fyri brúkaran, tá ið undantikin eru skipaskrásetingargjøld og ávís útbúgvingarskeið.

Ætlanir eru um at yvirtaka skipasýnið og at fáa allar ríkislógir um sjóvinnu sum sermál. Til hetta krevst ikki bert fíggjarlig orka, men eisini starvsfólk við grundleggjandi yrkisførleika og royndum í sjóvinnu. Talan kann verða um, at økið formliga verður yvirtikið við teimum skyldum og ábyrgdum, sum hetta hevur við sær, men at føroyska fyrisitingin í eina tíð framyvir hevur neyvt samstarv við Sjóvinnustýrið.

## Skrásetingarmál

- *A. nr. 247 af 03.05.1993. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde.*
- *Bekendtgørelse nr. 992 af 14.12.1993 for Færøerne om anmeldelser m.v. til den færøske registreringsmyndigheds register for erhvervsdrivende fonde.*
- *Bekendtgørelse nr. 993 af 14.12.1993 for Færøerne om nedsættelse af grundkapitalen i erhvervsdrivende fonde.*
- *Bekendtgørelse nr. 994 af 14.12.1993 for Færøerne om opløsning af erhvervsdrivende fonde.*
- *Kunngerð nr. 204 frá 28.12.1993 um gjøld fyri vinnurekandi grunnar.*

Lógin
"Anordning nr. 247 af 3.5.1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde," sum er sett í gildi í Føroyum sambært § 65 stk. 3 í „lov nr. 286 af 6. juni 1984 om erhvervsdrivende fonde med senere ændringer."

Lógarøkið er felagsmál sambært heimastýrislógini. Málið er ikki yvirtikið, men fyrisitingarliga og fíggjarliga er tað føroyskt.

Lóggávan: Lógin við kunngerðum er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan 1.1.1994.

Fyrisiting: Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er Skráseting Føroya. Sambært lógini skal Erhvervs- og Selskabsstyrelsen taka avgerðir í summum førum, t.d. um fráboðaður grunnur hoyrir undir lógina, og í summum førum skal løgmálaráðharrin taka avgerð, t.d. geva loyvi til at grunnur kann gera broytingar í viðtøkum.

Lógin heimilar Landsstýrinum at gera kunngerðir um gjøld fyri ymsar tænastur.

Kærumyndugleiki um summar avgerðir hjá Skrásetingini er Industriministeriets Erhvervsankenævn.

Uppgávan hjá Skráseting Føroya sambært hesi lóg er fyrst og fremst at skráseta vinnurekandi grunnar. Bæði tá ið hesir verða stovnaðir og seinni broytingar í ymsum viðurskiftum hjá hesum grunnum.

Fígging: Økið verður fíggjað á fíggjarlógini, tó partvíst brúkarafíggjað við gjøldum fyri skráseting.

Lógin
"Anordning nr. 248 af 3.5.1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v.," sum er sett í gildi í Føroyum sambært §68 í „lov nr. 284 af 10. juni 1981 om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v. med senere ændringer."

Lógarøkið er felagsmál sambært heimastýrislógini. Økið er ikki yvirtikið, men fyrisitingarliga og fíggjarliga er tað føroyskt.

- *A. nr. 248 af 03.05.1993. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v.*
- *Bekendtgørelse nr. 1053 af 17.12.1993 for Færøerne om opstilling af årsregnskab og koncernregnskab og om udarbejdelse af koncernregnskab.*
- *Bekendtgørelse nr. 1054 af 17.12.1993 for Færøerne om opstilling af årsregnskaber m.v. til den færøske registreringsmyndighed.*

Lóggáva: Lógin við kunngerðum er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan 1.1.1994.

Fyrisiting: Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er Skráseting Føroya.

Lógin heimilar Landsstýrinum at áseta í kunngerð gjald fyri ymsar tænastur.

Kærumyndugleiki um summar avgerðir hjá Skrásetingini er Industriministeriets Erhvervsankenævn.

Uppgávan hjá Skráseting Føroya sambært hesi lóg er fyrst og fremst at taka ímóti og almannakunngera móttøkuna av ársroknskapum hjá partafeløgum, kommanditpartafeløgum og smápartafeløgum. Áðrenn lýsing kannar Skrásetingin innkomnu roknskapirnar fyri at tryggja, at teir eru, sum lógin sigur.

Fígging: Fyrisitingin verður fíggjað við nýtslugjøldum og yvir fíggjarlógina.

Lógin

“Anordning nr. 249 af 3.5.1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anpartsselskaber,“ sum sett í gildi í Føroyum sambært §133 í „lov nr. 371 af 13. juni 1973 om anpartsselskaber med senere ændringer.”

Lógarøkið er ikki yvirtikið mál, men fyrisitingarliga og fíggjarliga er tað føroyskt.

– *A. nr. 249 af 03.05.1993. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om anpartsselskaber.*
– *Bekendtgørelse nr. 32 af 12.01.1989 om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i aktieselskaber og anpartsselskaber m.v. (selskabsrepræsentation) som sat i kraft ved A. nr. 249 af 03.05.1993.*
– *Bekendtgørelse nr. 33 af 12.01.1989 om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i moderselskaber, der er aktieselskaber og anpartsselskaber m.v. ((koncernrepræsentation) som sat i kraft ved A nr. 249 af 03.05.1993.*
– *Bekendtgørelse nr. 36 af 12.01.1988 om slettelse af visse selskaber af Erhvervs- og Selskabsstyrelsens register for aktie- og anpartsselskaber.*
– *Bekendtgørelse nr. 98 af 04.03.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens EDB-system og om takster herfor.*
– *Bekendtgørelse nr. 462 af 18. juni 1991 om anmeldelse m.v. til*

*Erhvervs- og Selskabsstyrelsen for aktie- og anpartsselskaber samt forsikringsselskaber.*

- *Bekendtgørelse nr. 622 af 21.07.1993 om anmeldelser m.v. til Erhvervs- og Selskabsstyrelsen for aktie- og anpartsselskaber.*
- *Bekendtgørelse nr. 963 af 13.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens takster for aktie- og anpartsselskaber, pensionskasser, sparekasser, andelskasser, investerings-foreninger, visse spare- og udlånsvirksomheder m.v. og for europæiske økonomiske firma.*
- *Bekendtgørelse nr. 991 af 14.12.1993 om anmeldelser m.v. til den færøske registreringsmyndighed for aktie- og anpartsselskaber.*
- *Bekendtgørelse nr. 997 af 14.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens gebyrer for oplysninger og dokumenter.*
- *Kunngerð nr. 203 frá 28.12.1993 um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.*
- *Kunngerð nr. 18 frá 14.02.1994 um broyting í kunngerð um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.*
- *Kunngerð nr. 137 frá 05.09.1995 um broyting í kunngerð um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.*
- *Kunngerð nr. 34 frá 24.03.1998 um gjøld fyri útflýgging av upplýsingum og skjølum frá Skráseting Føroya.*

Lóggáva: Lógin við kunngerðum er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan 1.1.1994.

Fyrisiting: Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er Skráseting Føroya. Lógin heimilar Landsstýrinum at áseta í kunngerð gjald fyri ymsar tænastur.

Kærumyndugleiki um avgerðir hjá Skrásetingini er Industriministeriets Erhvervsankenævn.

Uppgávan hjá Skráseting Føroya sambært hesi lóg er fyrst og fremst at skráseta smápartafeløg. Bæði tá hesi verða stovnað og seinni broytingar í ymsum viðurskiftum hjá hesum feløgum.

Fígging: Økið verður fíggjað á fíggjarlógini, tó partvíst brúkarafíggjað við gjøldum fyri skráseting.

Lógin

“Anordning nr. 250 af 3.5.1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om aktieselskaber,“ sum er sett í gildi í Føroyum sambært §163 í „lov nr. 370 af 13. juni 1973 om aktieselskaber med senere ændringer.”

Lógarøkið er ikki yvirtikið mál, men fyrisitingarliga og fíggjarliga er tað føroyskt.

- *A. nr. 250 af 03.05.1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om aktieselskaber.*
- *Bekendtgørelsen nr. 158 af 22.02.1988 om selskabers forpligtelser ved registrering af børsnoterede konvertible gældsbreve som sat i kraft ved A. nr. 250 af 03.05.1993.*
- *Bekendtgørelse nr. 32 af 12.01.1989 om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i aktieselskaber og anpartsselskaber m.v. (selskabsrepræsentation) som sat i kraft ved A. nr. 249 af 03.05.1993.*
- *Bekendtgørelse nr. 33 af 12.01.1989 om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i moderselskaber, der er aktieselskaber og anpartsselskaber m.v. ((koncernrepræsentation) som sat i kraft ved A nr. 249 af 03.05.1993.*
- *Bekendtgørelse nr. 36 af 12.01.1988 om slettelse af visse selskaber af Erhvervs- og Selskabsstyrelsens register for aktie- og anpartsselskaber.*
- *Bekendtgørelse nr. 98 af 04.03.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens EDB-system og om takster herfor.*
- *Bekendtgørelse nr. 461 af 18.06.1991 om opgørelse af, meddelelse om og offentliggørelse af betydelige andele i børsnoterede selskaber som sat i kraft ved A. nr. 250 af 03.05.1993. (Eisini lýst í Kubl 1994, bls. 118)*
- *Bekendtgørelse nr. 462 af 18. juni 1991 om anmeldelse m.v. til Erhvervs- og Selskabsstyrelsen for aktie- og anpartsselskaber samt forsikringsselskaber.*
- *Bekendtgørelse nr. 622 af 21.07.1993 om anmeldelser m.v. til Erhvervs- og Selskabsstyrelsen for aktie- og anpartsselskaber.*
- *Bekendtgørelse nr. 963 af 13.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens takster for aktie- og anpartsselskaber, pensionskasser, sparekasser, andelskasser, investerings-foreninger, visse spare- og udlånsvirksomheder m.v. og for europæiske økonomiske firma.*
- *Bekendtgørelse nr. 991 af 14.12.1993 om anmeldelser m.v. til den færøske registreringsmyndighed for aktie- og anpartsselskaber.*
- *Bekendtgørelse nr. 997 af 14.12.1993 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens gebyrer for oplysninger og dokumenter.*
- *Kunngerð nr. 203 frá 28.12.1993 um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.*
- *Kunngerð nr. 18 frá 14.02.1994 um broyting í kunngerð um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.*
- *Kunngerð nr. 137 frá 05.09.1995 um broyting í kunngerð um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.*
- *Kunngerð nr. 34 frá 24.03.1998 um gjøld fyri útflýgging av upplýsingum og skjølum frá Skráseting Føroya.*

Lóggáva: Lógin við kunngerðum er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan 1.1.1994.

Fyrisiting: Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er Skráseting Føroya.

Lógin heimilar Landsstýrinum at áseta í kunngerð gjald fyri ymsar tænastur.

Kærumyndugleiki um avgerðir hjá Skrásetingini er Industriministeriets Erhvervsankenævn.

Uppgávan hjá Skráseting Føroya sambært hesi lóg er fyrst og fremst at skráseta partafeløg. Bæði tá hesi verða stovnað og seinni broytingar í ymsum viðurskiftum hjá hesum feløgum.

Fígging: Økið verður fíggjað við nýtslugjøldum og yvir fíggjarlógina.

Lógin

„Anordning nr. 931 af 25.10.1996 om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v.,“ sum sett í gildi í Føroyum sbrt. §130 í „lov nr. 1072 af 20.12.1995 om værdipapirhandel m.v. med senere ændringer."

Lógarøkið er ikki yvirtikið mál, men fyrisitingarliga og fíggjarliga er tað partvíst føroyskt.

- *A nr. 931 af 25.10.1996 om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v.*
- *Bekendtgørelse nr. 268 af 17.04.1996 om Erhvervs- og Selskabsstyrelsens offentliggørelse af prospekter ved første offentlige udbud af visse værdipapirer.*
- *Bekendtgørelse nr. 238 af 22.04.1996 om opgørelse af meddelelse om og offentliggørelse af betydelige andele i selskaber, der har aktier optaget til notering på en fondsbørs.*
- *Bekendtgørelse nr. 329 af 23.04.1996 om prospekter ved første offentlig udbud af visse værdipapirer.*
- *Bekendtgørelse nr. 330 af 23.04.1996 om kravene til det prospekt, der skal offentliggøres, inden værdipapirer kan optages til notering på en fondsbørs.*
- *Bekendtgørelse nr. 331 af 23.04.1996 om betingelse for optagelse til notering af værdipapirer på en fondsbørs.*
- *Bekendtgørelse nr. 332 af 23.04.1996 om indberetning af handler med værdipapirer, der er noteret på en fondsbørs m.v.*
- *Bekendtgørelse nr. 333 af 23.04.1996 om aktionærers oplysningsforpligtelser samt om tilbudspligt, når en aktionær erhverver fler-*

*tallet af stemmerettighederne eller bestemmende indflydelse i et børsnoteret selskab.*

- *Bekendtgørelse om registrering m.v. af fondsaktiver i en værdipapircentral. (Udkast af 20.06.1996).*

Lóggávan: Lógin við kunngerðum er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1996.

Fyrisiting: Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er fyrst og fremst ’fondsrådet’ og skrivstova tess, sum er danska fíggjareftirlitið. ’Den færøske registreringsmyndighed,’ sum er Skráseting Føroya, hevur tó ávísar uppgávur sambært lógini.

Uppgávan hjá Skráseting Føroya sambært hesi lóg er at taka ímóti verkevnisætlanum hjá partafeløgum í sambandi við, at partabrøv fyrstu ferð verða útboðin alment, og sum ’fondsrådet’ hevur góðkent og sent Skrásetingini, og síðani at almannakunngera hesar.

Fígging: Økið er fíggjað úr Danmark. (Tó verður tann parturin, sum Skrásetingin stendur fyri, fíggjaður á fíggjarlógini, og partvíst brúkarafíggjaður við gjøldum fyri skráseting.)

Lógin

“Lov nr. 858 af 23.12.1987 om Industriministeriets Erhvervsankenævn,“ sett í gildi í Føroyum 22. apríl 1994.
Lógarøkið er danskt mál, og fyrisitingarliga og fíggjarliga er umsitingin donsk.

- *L. nr. 858 af 23.12.1987 om Industriministeriets Erhvervsankenævn. Sett í gildi 22.04.1994.*
- *Bekendtgørelse nr. 1154 af 18.12.1994 om Erhvervsministeriets Erhvervsankenævn.*

Lóggáva: Lógin við kunngerð er sett í gildi fyri Føroyar í Kunngerðablaðnum 22.4.1994.

Fyrisiting: Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er Industriministeriets Erhvervsankenævn, seinni er hetta nú Erhversministeriets Erhvervsankenævn.

Uppgávan hjá Industriministeriets Erhvervsankenævn sambært hesi lóg er at viðgera kærur um avgerðir hjá Skráseting Føroya, Erhvervs – og Selskabsstyrelsen, Fíggjareftirlitinum og Forbrúkarastýrinum, tiknar eftir lógunum, sum eru lýstar omanfyri.

Fígging: Økið verður fíggjað úr Danmark.

Lógin
"Anordning nr. 246 af 3.5.1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om banker og sparekasser m.v.," sett í gildi í Føroyum sambært §55 stk. 3 í „lovbekendtgørelse nr. 57 af 2. februar 1993 om banker og sparekasser m.v."

Lógarøkið er ikki yvirtikið mál, men fyrisitingarliga og fíggjarliga er tað partvíst føroyskt.

- *A.nr. 245 af 03.05.1993 om ikrafttræden på Færøerne af lov om visse kreditinstitutter.*
- *A.nr. 246 af 03.05.1993 om ikrafttræden på Færøerne af lov om banker og sparekasser m.v.*
- *Bekendtgørelse nr. 467 af 02.07.1987 om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i sparekasser, andelskasser og sammenslutning af andelskasser.*
- *Bekendtgørelse nr. 468 af 02.07.1987 om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i sparekasser, andelskasser og sammenslutninger af andelskasser, der er moderselskab i en koncern.*
- *Bekendtgørelse nr. 436 af 19.07.1988 om henlæggelse af beføjelser til Finanstilsynet samt om klageadgang.*
- *Bekendtgørelse nr. 530 af 07.08.1989 om anmeldelser m.v. til Erhvervs- og Selskabsstyrelsen for sparekasser og andelskasser.*
- *Bekendtgørelse nr. 995 af 14.12.1993 om den færøske registreringsmyndigheds takster for sparekasser og andelskasser.*

Lóggáva: Lógin við kunngerðum er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan 1.1.1994.

Fyrisiting: Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er Skráseting Føroya. Fíggjareftirlitið hevur tó fleiri uppgávur sambært lógini, t.d. at góðkenna bankar og sparikassar, tá ið hesir verða stovnaðir, roknskapir teirra eins og seinni broytingar í viðurskiftum hjá hesum stovnum.

Kærumyndugleiki um summar avgerðir hjá Skrásetingini er Industriministeriets Erhvervsankenævn.

Uppgávan hjá Skráseting Føroya sambært hesi lóg er fyrst og fremst at skráseta bankar og sparikassar. Bæði tá hesir verða stovnaðir og seinni broytingar í ymsum viðurskiftum teirra.

Fígging: Parturin, sum Skrásetingin stendur fyri, verður fíggjaður á

fíggjarlógini, og partvíst brúkarafíggjaður við gjøldum fyri skráseting. Annars verður økið fíggjað úr Danmark.

### Niðurstøða

Allar lógir, sum Skráseting Føroya umsitur viðvíkjandi partafelagsskráseting o.ø., eru danskar ríkislógir. Landsstýrið hevur tó gjørt og sett í gildi fleiri kunngerðir á økinum. Lógarøkið verður fíggjað lutvíst við brúkaragjøldum og lutvíst yvir fíggjarløgtingslógina. Tað merkir tí, at talan verður ikki um eykakostnað í sambandi við fullveldi.

## 2.2. Sáttmálar

### Fiskivinnumál

#### Millumlanda fiskiveiðuavtalur

Føroyar hava fiskivinnusamstarv við øll grannalond í Norðuratlantshavi og við flestu lond, sum eru við í millumlanda felagsskapum so sum NAFO í útnyrðingspartinum av Atlantshavi og NEAFC í landnyrðingspartinum. Treytirnar fyri fiskiskapi hjá føroyskum skipum í altjóða sjóøki eru nógv knýttar at millumlandaavtalum og strandalandaavtalum um fiskiskap.

Undan semjuni um havrættindasáttmálan frá 1982, sum kom endaliga í gildi í 1994, vórðu felagsskapirnir NAFO, (Northwest Atlantic Fisheries Organisation), og NEAFC, (Northeast Atlantic Fisheries Commission), settir á stovn at taka sær av fiskiskapi í altjóða sjógvi í ávikavist útnyrðings- og landnyrðingspartinum av Norðuratlantshavi. Hóast Danmark er limur í báðum felagsskapunum vegna Føroyar og Grønland, mynda tær føroysku og grønlendsku sendinevndir í felag ta donsku sendinevndina á øllum fundum; danska uttanríkisráðið hevur tó vanliga eitt umboð við á týðandi fundum.

Síðani fyrst í nítiárunum hevur á altjóða stigi verið arbeitt nógv fram ímóti greiðari viðurskiftum at gagnnýta fiskastovnar, sum ferðast millum altjóða sjógv og sjóøki undir yvirvaldsræði strandalanda. Serliga hava strandalond havt trupulleikar av hesum. Sum ein sproti burtur úr ST-stevnuni í Rio de Janeiro í 1992, varð í 1995 semja gjørd millum 112 limalond í ST um ein sáttmála um fiskastovnar, sum ferðast um fiskimark og altjóða sjógv. Hóast semjan ikki formliga hevur fingið altjóða, havrættarligt gildi enn, verður víða um í heimi arbeitt grundað á hesa semju, bæði í einstøkum londum og í altjóða

felagsskapum. Danmark hevur ikki enn vegna Føroyar háveldisstaðfest ST-avtaluna um ferðandi fiskastovnar, men verður hetta væntandi gjørt seinni í hesum árinum.

Semjan staðfestir m.a., at strandalond og lond, sum hava grundaðan áhuga fyri fiskiskapi eftir fiskasløgum uttan fyri yvirvaldsæði hjá strandalondum, kunnu taka seg saman í felagsskap við tí máli at umsita fiskatilfeingið. NEAFC og NAFO eru slíkir felagsskapir og virka nú eftir hesi semju.

Semjan gevur felagsskapunum ábyrgd og samstundis víðar møguleikar at skipa umsiting og eftirlit í sambandi við fiskiskap í altjóða sjógvi. Strandalandabólkurin, sum hevur tikið avgerðir um fiskiskap og heildarkvotubýti viðvíkjandi norðhavssildini, virkar eisini í samsvari við hesa semju. Bæði í NEAFC og í NAFO verður stórt arbeiði gjørt at menna felagsskapirnar til fulnar at seta í verk altjóða viðtøkur í samsvari við semjuna um ferðandi fiskastovnar.

Hóast endaligar avgerðir um fiskiskapin eftir norðhavssild hava verið tiknar í NEAFC, hava tær týðandi avgerðirnar verið tiknar í einum strandalandabólki frammanundan. Í hesum bólki eru Føroyar, Ísland, Russland, Noreg og ES. Bólkurin hevur sínámillum gjørt semju um heildarkvotu og býti av norðhavssild, og semjan hevur seinni verið partvíst staðfest í NEAFC.

Sáttmáli um at varðveita laksin í Norðuratlantshavi, NASCO, (North AtlanticSalmon Conservation Organisation), kom í gildi 1. oktober 1983. Henda sáttmála hevur Danmark staðfest vegna Føroyar og Grønland. Eins og í NEAFC og í NAFO verður danska umboðanin umsitin av Føroyum og Grønlandi í felag.

Ræður um hvalaveiðu eru ein altjóða og ein millumlanda felagsskapur. Tann fyrri er Altjóða hvalaveiðunevndin (International Whaling Commission), stytt IWC. Í hesi nevnd, sum tekur sær av stórhvalamálum, er Danmark limur vegna allar tríggjar ríkispartarnar, men av tí at Danmark tekur undir við altjóða rákinum ímóti stórhvalaveiðu, samsvara føroysku sjónarmiðini ikki so væl við tey alment donsku í IWC.

Hin hvalaveiðufelagskapurin, sum Føroyar eru limur í, er North Atlantic Marine Mammal Commision, stytt NAMMCO, sum tekur sær av spurningum um hval og kóp í Norðuratlantshavi. Mótsett limaskapinum í NEAFC og NAFO eru Føroyar og Grønland hvør sær sjálvstøðugir limir í NAMMCO, og Danmark er eygleiðari.

Fiskiskapur eftir tunfiski í Norðuratlantshavi verður umsitin av International Commission for the Conservation of Atlantic Tunas, stytt ICCAT. Stórur áhugi tykist vera fyri tunfiskaveiðu í føroyskum sjógvi ein part av árinum. Í 1997 fingu japonsk skip loyvi frá føroysku myndugleikunum at royndarveiða eftir tunfiski undir Føroyum í sam-

starvi við Fiskirannsóknarstovuna. Hetta samstarv helt fram í 1998, umframt at føroysk skip eisini fingu royndarloyvi. Úrslitið av hesum royndum hevur verið gott, og fleiri liggja framvið at sleppa á royndarveiðu í 1999.

Grundað á tann stóra áhuga, sum seinastu tvey árini hevur verið vístur tunfiskiskapi í føroyskum sjógvi, hevur Fiskimálastýrið saman við danska uttanríkisráðnum seinastu trý árini verið á ársfundum hjá ICCAT sum eygleiðari. Har hevur verið gjørt vart við, at Føroyar sum strandaland hava rætt at gagnnýta tilfeingið undir Føroyum, eisini tunfisk. Spurningurin um limaskap í ICCAT hevur verið umhugsaður í samráði við danska uttanríkisráðið, men enn er støða ikki tikin í hesum máli.

Í sambandi við fullveldi eiga Føroyar beinanvegin at biðja um sjálvstøðugan limaskap í nevndu felagsskapum. Fíggjarliga hevur hetta ongin broyting við sær, tí Føroyar gjalda longu fyri limaskap.

Sáttmálar um fiskiveiðu og aðra veiðu

- *B. nr. 23 af 21.02.1903: Konvention med England om fiskeri ved Færøerne*
- *B. nr. 228 af 21.06.1933: Konvention mellem Danmark og Sverige*
- *T. nr. 8 af 23.02.1948: Konvention om maskestørrelse for redskaber og mindstemål for fisk*
- *T. nr. 45 af 13.07.1950: Konvention om regulering af hvalfangst med senere ændringer (IWC)*
- *T. nr. 17 af 30.04.1952: Overenskomst med Norge om skade på fiskeredskaber*
- *T. nr. ? af 18.11.1980: Konvention om fiskeri i det nordøstlige Atlanterhav (NEAFC)*
- *T. nr. 20 af 14.02.1974: Konvention om fiskeri omkring Færøerne*
- *T. nr. 87 af 26.10.1978: Aftale af 27.11.1977 med Sovjetunionen om gensidige fiskerirelationer mellem Færøerne og Sovjetunionen.*
- *T. nr. 78 af 15.09.1980: Kontinentalsokkel og fiskerizone mellem Færøerne og Norge*
- *T. nr. 39 af 06.04 1982: Konvention om fiskeri i det nordvestlige Atlanterhav (NAFO)*
- *Avtala frá 31.03.1983 um at varðveita laks í Norðuratlantshavi, (NASCO).*
- *T. nr. 63 af 14.06.1990: Aftale om Færøerne og Grønland som observatører i Det Internationale Havundersøgelsesråd (ICES)*

Rammusáttmálar:

- Føroyar – Ísland frá 12.03.1976
- Føroyar – ES frá 15.03.1977
- Føroyar – Noreg frá 07.02.1979

- Føroyar – Kanada frá 03.06.1980
- Føroyar – Estland frá 01.05.1992
- Føroyar – Letland frá 03.11.1992
- Føroyar – Litavia frá 15.02.1993
- Føroyar – Grønland frá 27.05.1997

## Sjóvinnumál

Viðvíkjandi sjóforhoyri:

– *B. nr. 222 af 19.12.1894:* *Overenskomst med Sverige*
– *B. nr. 237 af 30.10.1909:* *Overenskomst med Norge*
– *B. nr. 310 af 10.11.1934:* *Overenskomst med Island*

Viðvíkjandi skipatryggleikalógini:

– *B. nr. 223 af 02.09.1931:* International lasteliniekonvention, T. 33 af 31.10.1938. Ratifik.: T. 11/38, 5/39, 8/39
– *B. nr. 358 af 30.12.1932:* Dansk-svensk aftale
– *B. nr. 230 af 15.09.1926:* Nordisk konvention om sødygtighed

Viðvíkjandi sjólógini:

– *B. nr. 70 af 20.03.1931:* Ens regler om søpanterettigheder med senere ændringer
– *T. nr. 35 af 22.11.1938:* Konvention 1924 Ens regler om konossementer
– *T. nr. 111 af 11.01.1965:* Konvention med Sovjetunionen om bjærgning
– *T. nr. 24 af 16.02.1968:* Konvention 1957 Begrænsning af rederansvar

Viðvíkjandi lógini um sjómenn:

– *B. nr. 179 af 07.06.1928:* Konvention om behandling af veneriske sygdomme
– *T. nr. 6 af 21.03.1938:* Konvention om erstatning for arbejdsløshed ved forlis
– *T. nr. 15 af 07.05.1938:* Konvention om lægeundersøgelse af unge på skibe
– *T. nr. 31 af 04.10.1938:* Konvention om søfolks forhyring
– *T. nr. 34 af 09.11.1938:* Konvention om duelighed hos officerer i handelsflåden

Viðvíkjandi oljudálking:

- *T. nr. 66 af 27.06.1975:* Konvention om indgriben på det åbne hav i tilfælde af olieforureningsulykker

Viðvíkjandi lógini um sjóvinnu:

- *B. nr. 2 af 17.02.1991:* International konvention af 07.07.1978 om uddannelse af søfarende, om sønæring og om vagthold, jf. B. 10 af 01.02.1985

Altjóða sáttmálar:

- International Convention for the Safety of Life at Sea, 1960 (SOLAS)
- International Convention for the Safety of Life at Sea, 1974 (SOLAS)
- International Contvention on Load Lines, 1966 (LL)
- International Convention on Tonnage Measurement of Ships, 1969 (TM )
- Special Trade Passenger Ships Agreement, 1971 (STP)
- Convention on the International Regulations for Preventing Collisions at Sea, 1972 (COLREG)
- International Convention for Safe Containers, 1972 (CSC)
- Convention on the International Maritime Satellite Organization (INMARSAT) and Operating Agreement, 1976
- Torremolinos Intarnational Convention for the Safety of Fishing Vessels, 1977 (SFV)
- International Convention on Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Seafarers, 1978 (STCW)
- International Convention on Maritime Searc and Rescue, 1979 (SAR)
- International Convention for the Prevention of Pollution of the Sea by Oil, 1954 (OILPOL)
- International Convention Relating to Intervention on the High Seas in Cases of Oil Pollution Casualties, 1969 (CSI)
- Convention on the Prevention of Marine Pollution by Dumping of Wastes and Other Matter, 1972 (LDC)
- International Convention for the Prevention of Pollution from Ships, 1973 as modified by the Protocol of 1978 (MARPOL 73/78)
- International Convention on Civil Liability for Oil Pollution Damage, 1969 (CLC)
- Convention Relating to Civil Liability in the Field of Maritime Carriage of Nuclear Material, 1971 (LNM)

- International Convention on the Establishment of an International Fund for Compensation for Oil Pollution Damage, 1971 (IFC)
- Athens Convention Relating to the Carriage of Passengers and Their Luggage by Sea, 1974 (PAL)
- Convention on Limitation of Liability for Maritime Claims, 1976 (LLMC)
- Convention on Facilitation of International Maritime Traffic, 1965 (FAL)

Aðrir sáttmálar:

| | |
|---|---|
| – *B. nr. 279 af 10.12.1913:* | Overenskomst med Sverige angående afmærkning af vrag |
| – *B. nr. 200 af 19.04.1923:* | Konvention om flagret for stater uden søkyst |
| – *B. nr. 32 af 18.04.1986:* | Konvention om maritim eftersøgning og redning |

# 2.3. Formligt og óformligt samstarv

## Fiskiveiðueftirlitið

Sambært avtaluni um at samskipa og útinna fiskiveiðueftirlitið kring Føroyar frá 9. januar 1986, eru ásettar reglur fyri røkt og samskipan av allari vaktartænastuni. Avtalan er galdandi fyri Vaktar- og bjargingartænastuna og Færøernes Kommando og umfatar tey skip og flogfør, sum Føroya landsstýri og Forsvarskommandoen hava tøk til vaktartænastuna. Ætlanir eru frammi um at endurskoða avtaluna.

## Sjóvinnufyrisitingin

Formligt, t.e. skrivliga avtalað við danska sjóvinnustýrið:

LØGTINGSLÓG UM UPPMÁTING AV SKIPUM
Avtalað er, at Sjóvinnustýrið, vegna Føroya landsstýri, ger uppmátingar av føroyskum skipum og gevur út altjóða málibrøv.

LØGTINGSLÓG UM MANNING AV SKIPUM O.A.
Avtalan snýr seg um at javnseta føroysk og donsk sjóvinnubrøv, m.a. grundað á eina javnstøðuavtalu á útbúgvingarøkinum og á altjóða sáttmálan um útbúgving, sjóvinnu og vaktarhald á skipum, STCW-78.

Avtalan snýr seg eisini um, at Sjóvinnustýrið ger manningareftirlit, samstundis sum onnur sýn verða gjørd umborð. Serliga verður hetta gjørt á handilsskipum, herímillum ferðamannaskipum.

LOV OM SKIBES SIKKERHED
Avtalað er, at allar tekniskar fyriskipanir, sum lýstar verða við heimild í hesi lóg, skulu verða sendar Sjóvinnufyrisitingini til ummælis. Eftir at fyriskipanirnar eru viðgjørdar í Føroyum, verður boðað frá, um hesar kunnu koma í gildi í her.

Føroyar eru umboðaðar í tekniskum nevndum í Sjóvinnustýrinum.

Møguligt brot á sjóvinnulógirnar verða viðgjørdar millum stovnarnar, soleiðis at ein felags áheitan kann fara til ákærumyndugleikan.

Avtalan snýr seg eisini um onnur mál, t.d. at fast edv-samband kann vera millum Sjóvinnufyrisitingina og Sjóvinnustýrið fyri at kunna samskifta um tekniskar upplýsingar, at føroysk umboð kunnu vera í donskum sendinevndum á altjóða og norðurlendskum sjóvinnufundum, t.d. IMO, nordisk søsikkerhedsdirektørmøde og NORMAR, og at Vaktar- og bjargingartænastan, (Fiskiveiðueftirlitið), hevur eftirlit við bjargingarútgerð á bátum undir 20 tons, sum koma undir løgtingslógina um bjargingarútgerð á bátum o.a.

Óformligt samstarv:
Sjóvinnufyrisitingin hevur eisini óformligt samstarv við Sjóvinnustýrið.

## Skráseting Føroya

Formligt samstarv:
Sambært *'lov om anpartsselskaber og om aktieselskaber'* er Industriministeriets Erhvervsankenævn kærumyndugleiki.

Vinnumálaráðharrin ger neyvari reglur viðv. starvsfólkavaldum nevndarlimum.

Sambært *'lov om Erhvervsdrivende Fonde'* skal Erhvervs- og Selskabsstyrelsen góðkenna, at ein grunnur hoyrir undir lógina og tí kann verða skrásettur í Skráseting Føroya. Erhvervs- og Sel-skabsstyrelsen er eisini grunsmyndugleiki. Løgmálaráðharrin skal góðkenna broytingar í viðtøkunum hjá grunnum.

Í *'Årsregnskabsloven'* er Industriministeriets Erhvervsankenævn kærumyndugleiki.

'Lov om værdipapirhandel m.v.,' 'Lov om visse kreditinstitutter' og 'Lov om banker og sparekasser m.v.'

Kærumyndugleikin er Industriministeriets Erhvervsankenævn.

Ársroknskapir hjá bankum og sparikassum skal Fíggjareftirlitið góðkenna.

’Fondsrådet,’ sum hevur skrivstovu í Fíggjareftirlitinum, skal góðkenna verkevnisætlanir, sum verða sendar Skrásetingini, áðrenn tær kunnu verða kunngjørdar.

Óformligt samstarv:
Skráseting Føroya, felagsskrásetingin, hevur eisini óformligt samstarv við Erhvervs- og Selskabsstyrelsen. Samstarvið er mest um ráðgeving og hjálp í sambandi við skráseting.

# Kapittul 3

## 3.1. Mál, sum Danmark umsitur, og málsetingar fyri sjálvstøðuga umsiting

### Sjóvinnufyrisitingin

Danska sjóvinnustýrið, (skipaeftirlitið), umsitur reglurnar um skipaeftirlit og sigling og hevur ábyrgd av skipasýnisøkinum, sum umfatar teknisk krøv til skip og eftirlit við hesum, lógarsmíð og arbeiði í altjóða nevndum. Reglurnar um sigling og avmerking av siglingarleiðum umsitur Farvandsdirektoratet.

Av teimum uttanríkismálum, sum knýta seg til sjóvinnu, er tað serliga arbeiðið í ST-havfelagsskapinum IMO, (International Maritime Organisation), sum hevur stóran týdning fyri føroyska sjóvinnu. Í felagsskapinum arbeiða fleiri tekniskar nevndir, sum eru mannaðar við fólki frá teimum ymsu sjóvinnumyndugleikum saman við serfrøðingum á ymsu økjunum. Krøvini verða ásett í altjóða sáttmálum, t.d. SOLAS, STCW, LL, MARPOL o.ø.

Sjóvinnustýrið røkir hetta arbeiðið vegna Danmark, og eisini vegna Føroyar og Grønland. Í teimum málum, sum eru yvirtikin, t.e. sjóvinnufyrisiting og sjóvinnuútbúgving, er tað serliga arbeiðið í STCW-nevndini, sum hevur okkara áhuga, og sum hevur beinleiðis avleiðingar fyri okkara egnu løgtingslógir.

Av tí at Føroyar ikki eru limaland í ES, hava vit ikki havt umboð til teir sjóvinnufundir, sum har hava verið. Ásetingarnar í ES-fyriskipanum um sjóvinnu ávirka tó okkara sjóvinnu beinleiðis, av tí at krøvini galda øll skip, sum koma í ES-havn.

Av øðrum altjóða nevndum kann verða nevndur arbeiðarafelagsskapurin undir ST, ILO, sum ásetir reglur um arbeiðaravernd. Á sjóvinnuøkinum eru tað teknisk og operationell krøv, t.d. útbúgvingarkrøv, sum verða sett skipum og manningum.

Tann parturin, sum hevur við skipasýn og felagslóggávu á sjóvinnu-

økinum at gera, vil natúrliga kunna hoyra undir Fiskimálastýrið, sum hevur sjóvinnu sum ábyrgdarøki.

Avmerking av siglingarøkjum kann verða skipað undir Vinnumálastýrið, t.e. Landsverkfrøðingin, av tí at hesin stovnur samarbeiðir við Farvandsdirektoratet um hetta.

Tele Danmark A/S hevur ábyrgdina av neyð- og trygdarskipanini á radioøkinum. Føroya Tele rekur støðina Tórshavn radio vegna Tele Danmark. Telestyrelsen hevur ábyrgdina á virkisøkinum hjá Tele Danmark. Økið hevði natúrliga kunnað verið skipað undir Føroya tele.

Kemur alt sjóvinnumálsøkið undir føroyskt sjálvræði, kunnu ríkislógir, við tí gildi, tær nú hava, verða innførdar í føroyska løgtingslóggávu, eftir at tær eru umsettar til føroyskt. Av tí at sjóvinnuøkið eisini er altjóða øki, skal umsitingin eisini kunna arbeiða í altjóða viðurskiftum, har lógir og fyriskipanir um trygd á sjónum verða gjørdar. Hetta setir sera stór krøv til umsitingina, tí at í flestu førum er talan um serkunnleika, sum sjóvinnumyndugleikin skal hava sambært altjóða sáttmálum.

Umsitingin má skipa seg soleiðis, at serkunnleiki má vera á hesum økjum:

- skipaeftirlit, sum krevur tekniskan vitan um konstruktiv krøv til skip
- sjóvinnuumsiting, operationella vitan um skiparakstur, herímillum manning av skipi, førleikakrøv og sosial viðurskifti
- sjóvinnuútbúgvingar, vitan um hvørji altjóða krøv verða sett til sjóvinnuútbúgvingar o.a.

Umframt at fíggja umsitingina, liggur tað eisini á limalondum í altjóða felagsskapum, t.d. IMO, at gjalda fyri limaskap.

Av tí at altjóða arbeiðið krevur serkunnleika á nógvum økjum, er skilagott, at myndugleikarnir í ymsu londunum kunnu vera felags um hetta. Dømi um tað er í norðurlendska samstarvinum, har høvuðsmálini í t.d. IMO verða viðgjørd. Velja Føroyar tó ikki at hava serkunnleika á øllum økjum, er neyðugt at gera samstarvssáttmálar við grannalond okkara, sum kunnu stuðla okkara arbeiði har.

Í sambandi við fullveldi eiga Føroyar beinanvegin at taka ábyrgdina av øllum økinum og at gera nýggjar samstarvsavtalur við danir um serkøna hjálp í eini skiftistíð.

## Skráseting Føroya

Víst verður til lýsingina av teimum økjum, har samstarvað verður við danir.

1. Sambært *'lov om anpartsselskaber og om aktieselskaber'* er Industriministeriets Erhvervsankenævn kærumyndugleiki.
   *Viðv. 1) Skal hetta verða umsitið í Føroyum, má kærunevnd verða til hetta. Tað loysir seg tó neyvan at stovna nýggja kærunevnd í Føroyum, tí kærur koma sera sjáldan fyri. Kanska kundi henda nevnd verið partur av Føroya kærustovni.*

2. Vinnumálaráðharrin ger neyvari reglur viðvíkjandi starvsfólkavaldum nevndarlimum.
   *Viðv. 2) Hetta eigur landsstýrismaðurin at áseta reglur um.*

3. Sambært *'lov om Erhvervsdrivende Fonde'* skal Erhvervs- og Selskabsstyrelsen góðkenna, at ein grunnur hoyrir undir lógina og kann verða skrásettur í Skráseting Føroya. Erhvervs- og Selskabsstyrelsen er eisini grunsmyndugleiki. Løgmálaráðharrin skal góðkenna broytingar í viðtøkum hjá grunninum.
   *Viðv. 3) Skráseting Føroya kann vera tann góðkennandi myndugleikin og vera grunsmyndugleiki. Møguliga kundi lógardeildin í Landsstýrinum so góðkent viðtøkubroytingar.*

4. Í *'Årsregnskabsloven'* er Industriministeriets Erhvervsankenævn kærumyndugleiki.
   *Viðv. 4) sama sum viðv.1)*
   'Lov om værdipapirhandel m.v.,' 'Lov om visse kreditinstitutter' og 'Lov om banker og sparekasser m.v.'

5. Kærumyndugleiki er Industriministeriets Erhvervsankenævn.
6. Ársroknskapir hjá bankum og sparikassum skal Fíggjareftirlitið góðkenna.
7. 'Fondsrådet,' sum hevur skrivstovu í Fíggjareftirlitinum, skal góðkenna verkevnisætlanir, sum verða sendar Skrásetingini, áðrenn tær kunnu verða kunngjørdar.
   *Viðv. 5) sama sum viðv.1)*
   *Viðv 6) Hetta kundi t.d. Landsbankin gjørt, um ikki eitt føroyskt fíggjareftirlit verður sett á stovn.*
   *Viðv. 7) Tað loysir seg neyvan at gera slíkt grunsráð í Føroyum, tí hesar verkevnisætlanir koma sera sjáldan fyri. Tí kundi Landsbankin, (ella føroyska fíggjareftirlitið, um tað verður), kanska eisini tikið sær av hesum.*

# Kapittul 4

## 4.1. Á hesum økjum verða samstarvsavtalur gjørdar

### Sjóvinnumál

Verður Skipaeftirlitið yvirtikið, fer meira orka at verða kravd enn nú. Deildin hjá Sjóvinnustýrinum í Føroyum er mannað við trimum eftirlitsfólkum, sum hava tekniskt eftirlit við skipum.

Tekniska lógargrundarlagið, er ógvuliga umfatandi. Hetta kemst av, at krøvini eru ásett til ymisk skipasløg og ymsar skipastøddir.

Lógarsmíð og altjóða nevndararbeiði fer at krevja samstarvsavtalur við t.d. Danmark, sum røkir hetta arbeiði fyri okkum, sum er. Hvussu nógva orku vit skulu seta av til hetta í Føroyum, verður ein politisk avgerð, eftir at nevndin, sum er sett til at fyrireika yvirtøku av skipaeftirlitinum hevur lagt fram sítt álit seinni í ár og eftir samráðingar við danir.

Tann parturin, sum er yvirtikin, t.e. sjóvinnufyrisiting og sjóvinnuútbúgvingar, umsita føroyskir myndugleikar, sum er. Formlig samstarvsavtala er millum danir og føroyingar á hesum økjum, sum umfata javnseting av føroyskum og donskum sjóvinnubrøvum og útbúgvingum.

# Vinnumálastýrið

# Innihaldsyvirlit

KAPITTUL 1 . . . . . . . . . . 174
1. Samstarv við Danmark og lýsing av krøvum . . . . . . . . . . 174
1.1 Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar . 175
1.2 Trygging . . . . . . . . . . 176
1.3 Vinnuframi . . . . . . . . . . 176
1.4 Endurgjald . . . . . . . . . . 177
1.5 Kjarnorka . . . . . . . . . . 177
1.6 Einkarættur . . . . . . . . . . 177
1.7 Mynstur . . . . . . . . . . 179
1.8 Mát og vekt . . . . . . . . . . 179
1.9 Ráevni í undirgrundini . . . . . . . . . . 180
1.10 Umhvørvisvernd . . . . . . . . . . 181
1.11 Radiosamskifti . . . . . . . . . . 182
1.12 Tilbúgving . . . . . . . . . . 183
1.13 Flutningur . . . . . . . . . . 184
1.14 Havnir . . . . . . . . . . 185
1.15 Flogferðsla . . . . . . . . . . 186
1.16 Niðurstøður . . . . . . . . . . 189

KAPITTUL 2 . . . . . . . . . . 191
2. Føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar . . . 191
2.1 Fjarskifti . . . . . . . . . . 191
2.2 Arbeiðaravernd . . . . . . . . . . 191
2.3 Sløkkilið og spreingievni . . . . . . . . . . 192
2.4 Ravmagn og tekniskar innleggingar . . . . . . . . . . 193
2.5 Ferðsla . . . . . . . . . . 193
2.6 Niðurstøður . . . . . . . . . . 194

KAPITTUL 3 . . . . . . . . . . 195
3. Sáttmálar . . . . . . . . . . 195
3.1 Arbeiðsmarknaður . . . . . . . . . . 195
3.2 Ráevni . . . . . . . . . . 196
3.3 Orka . . . . . . . . . . 196
3.4 Heilsufrøði . . . . . . . . . . 196
3.5 Umhvørvi . . . . . . . . . . 196
3.6 Ferðsla . . . . . . . . . . 197
3.7 Flogferðsla . . . . . . . . . . 197

3.8 Postmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 197
3.9 Handil og vinna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 198
3.10 Fjarskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 198

KAPITTUL 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 201
4. Formligt og óformligt samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 201
4.1 Matvøru- og umhvørvismál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 201
4.2 Landbúnaðarroyndir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 202
4.3 Veterinermál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 202
4.4 Skógrøktarmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 203
4.5 Matrikulerings- og útskiftingarmál . . . . . . . . . . . . . . . . . 203
4.6 Arbeiðseftirlitsmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 204
4.7 Ferðslumál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 205
4.8 Postmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 206
4.9 Ferðavinnumál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 207
4.10 Niðurstøður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 207

KAPITTUL 5
5. Mál, sum Danmark umsitur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 208

# Kapittul 1

## Samstarv við Danmark og lýsing av krøvum

Vinnumálastýrið hevur tikið støði í tí arbeiðsetningi, sum landsstýrismaðurin í fullveldismálum hevur lagt fyri Landsstýrið. Arbeiðssetningurin hjá Landsstýrinum hevur verið umfatandi, og tí hevur partur av arbeiðinum hjá Vinnumálastýrinum verið at avmarka lýsingina av samstarvinum við Danmark, soleiðis sum Vinnumálastýrið sær tað.

Útgreiningarnar taka støði í rættarreglum, t.e. lógum, kunngerðum og sáttmálum o.ø. Hetta hevur við sær eina ávísa avmarking í lýsingini, tí givið er, at ikki øll øki verða lýst til fulnar í øllum førum. T.d. málsøki tvørturum stýrini, men eisini málsøki, ið eru føroysk, men har ein ávís rættarregla í sambandi við økið er donsk. Møguligar skipanir, t.d. tilbúgvingarskipanin, verða ikki lýstar til fulnar, tí sum áður sagt, tekur lýsingin bert støði í rættarreglum. Tískil ber í øllum førum ikki til at fáa eina heildarmynd av einum øki við einans at lesa lýsingarnar hjá Vinnumálastýrinum, men hugt má eisini verða eftir lýsingum hjá øðrum stýrum.

Tíðarætlanin hevur verið stutt, og tí er arbeiðið merkt av hesum. Lýsingarnar eru stuttar og taka støði í tí víðkaða arbeiðssetningum, sum fyrisitingarbólkurin hevur gjørt. Rættarreglurnar verða lýstar við at greina fyrisitingarmyndugleikar og lóggávu og møguligar fíggjarligar avleiðingar av rættarreglunum.

Umframt hetta hevur Vinnumálastýrið, saman við stovnum sínum, lýst tað samstarv, sum er, bæði formligt og óformligt, ímillum danskar og føroyskar stovnar og myndugleikar. Upplýsingarnar eru veittar av stovnum, sum saman við ávísum donskum stovnum og myndugleikum hava lýst økið.

Viðvíkjandi altjóða sáttmálum hevur arbeiðssetningurin verið avmarkaður til bert at lýsa altjóða sáttmálar, sum eru lýstir fyri Føroyar og eru at lesa í „lovregister for Færøerne”. Avgjørt varð bert at lista sáttmálarnar, men tó at útgreina ávísar, tí hesir hava týdning fyri lýsingina. Harafturat eru aðrir sáttmálar, sum ikki eru settir í gildi fyri Føroyar, men sum hava alstóran týdning í sambandi við broytta, ríkis-

rættarligu støðu Føroya. Vinnumálastýrið hevur lýst nakrar av hesum sáttmálum, tí hesir hava týdning í sambandi við útgreiningarnar. Lýsingin av sáttmálunum er ikki fullfíggjað, men arbeitt verður í Landsstýrinum við at útgreina hesar, men er hetta ikki partur av útgreiningum hjá Vinnumálastýrinum.

Síðst í hvørjum parti er ein niðurstøða, sum í stuttum samanfatar høvuðspunktini í lýsingini.

At enda er ein lýsing av, hvussu tær rættarreglur, sum Danmark umsitur, kunnu verða skipaðar undir teimum ávísu málsøkjunum, og hvar neyðugt er at gera avtalur við Danmark ella onnur lond í sambandi við broytta ríkisrættarliga støðu.

## 1.1. Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar

### Lýsing av fyrisiting, lóggávu og fígging, eins og krøvum til fyrisiting, lóggávu og fígging

Lýsingin niðanfyri er ein stutt gjøgnumgongd av donskum rættarreglum í Føroyum. Nakrar hoyra til føroysk málsøki, eru yvirtiknar sbrt. heimastýrislógini, og aðrar vísa til øki, sum ikki eru yvirtikin. Fíggjarligu avleiðingarnar skulu verða tiknar við fyrivarni, tí tað er bert, har greiða er, hvat kostnaðurin verður, at avleiðingarnar eru lýstar. Óivað eru møguleikar fyri at skipa økini á annan hátt, og nakrir av hesum eru uppítiknir.

### Kortlegging

*L. nr. 82 af 31.03.1928 om Geodætisk Institut.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Kort- og Matrikelstyrelsen, (fyrr Geodætisk Institut), ið er danskur stovnur undir Íbúðarmálaráðnum.

Lóggáva: Lóggávan áleggur Kort- og Matrikelstyrelsen at taka sær av jarðmátingum, tí staðfrøðiligu kortleggingini av ríkinum og at geva út jarðfrøðilig kort og rit.

Skal málsøkið koma undir føroyskt málsræði, er tað meira ein fíggjarspurningur enn lóggávuspurningur, tí at lógin bert áleggur Kort- og Matrikelstyrelsen tær uppgávur, ið omanfyri eru nevndar.

Fíggjarviðurskifti: Fíggjarligu ábyrgdina hevur Kort- og Matrikelstyrelsen, men Matrikkulstovan hevur latið ávísa arbeiðsmegi til hetta arbeiði. Skal Matrikkulstovan átaka sær málsøkið, verður mett, at neyðugt er at seta trý fólk í starv afturat, og at hetta kemur at krevja

íløgur fyri 1.750.000 kr, meðan raksturin kemur at kostað samanlagt 1.550.000 kr. árliga.

## 1.2. Trygging

*L. nr. 129 af 15.04.1930 om forsikringsaftaler, som senest ændret ved L. nr. 266 af 26.06.1975.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Eingin fyrisitingarmyndugleiki.

Lóggáva: Lógin regulerar tryggingaravtalur við ásetingum. M.ø. um, hvussu tryggingaravtalur verða gjørdar, og hvussu tær skulu verða tulkaðar. Lógin er, sum serlig avtalulóg, ein partur av formúurættinum, og sostatt felagsmál. Eingin umsiting er av økinum, uttan í sambandi við lógarbroytingar.

Fíggjarviðurskifti: Eingin umsiting er av økinum, uttan í sambandi við lógarbroytingar.

## 1.3. Vinnuframi

***A.** nr. 720 af 05.09.1995 om ikrafttræden på Færøerne af lov om erhvervsfremme.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Vinnumálaráðharrin, Erhvervsudviklingsrådet, Exportfremmerådet, Erhvervsfremmestyrelsen, Bevillingsudvalget, Færøernes regnskabsdirektorat, Færøernes finansforvaltning, Landsstýrið, Kongeriget Danmarks Hypotekbank og Finansforvaltning, (Hypotekbanken).

Lóggáva: Lógin er donsk vinnuframalóg og ein avleiðing av avtaluni millum danskar og føroyskar myndugleikar í 1994, og er avtalan endurtikin í 1998, um at danskar vinnuframaskipanir skulu virka í Føroyum.

Eitt úrslit av, at lógin varð sett í gildi fyri Føroyar, er TK-stovan, ið veitir føroyskum vinnulívi og einstaklingum ókeypis ráðgeving í sambandi við menning, leiðslu, sølu, framleiðslu, fígging o.a.

Verður lóggávan føroysk, verður tørvur á einari føroyskari løggildisskipan, (akkrediteringsskipan). Her verður helst neyðugt við samstarvsavtalu við norðurlendskan stovn. Hetta er gjørt í Íslandi, har samstarvað verður við Svøríki.

Fíggjarviðurskifti: Danski staturin hevur fíggjarligu ábyrgdina. Skulu vit hava føroyska løggildisskipan, verður leysliga mett, at umsitingin

av hesum fer at kosta 120.000 kr. árliga. Tað er ein fortreyt, at samstarvsavtala er gjørd við annað land. Tá er kostnaðurin av TK-stovuni er ikki uppíroknaður, og fyri hana rindar landið, sum er, uml. 600 tús. kr., sum er ein triðingur av rakstrarkostnaðinum. Samanlagt kostar TK-stovan 1,8 mió.kr. at reka.

## 1.4. Endurgjald

*L. nr. 371 af 07.06.1989 om produktansvar sat i kraft ved A. nr. 62 af 12.02.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Løgmálaráðharrin hevur heimild til at „fastsætte regler til gennemførelse af mellemfolkelige overenskomster om lovvalget i sager om produktansvar."

Lóggáva: Lógin hoyrir undir formúurættin, ið er felagsmál. Lógin áleggur framleiðara ella millumhandlara ábyrgd fyri skaða, ið er elvdur av vøru, sum hesir hava framleitt ella útvegað. Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1993, við ávísum tillagingum til føroysk viðurskifti.

Fíggjarviðurskifti: Eingin umsiting er av økinum, uttan í sambandi við lógarbroytingar.

## 1.5. Kjarnorka

*L. nr. 170 af 16.05.1962 om nukleare anlæg (atomanlæg) som den er sat i kraft ved A. nr. 462 af 02.08.1973 og ændret ved L. nr. 332 af 19.06.1974.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Forsætisráðharrin skal eftir lógini geva loyvi til at byggja og reka kjarnorkuverk.

Lóggáva: Lógin er sum heild donsk. Ongar broytingar eru neyðugar, um málsøkið verður føroyskt.

Fíggjarviðurskifti: Fíggjarligu ábyrgdina av umsitingini hevur danski staturin. Væntandi verða ongar útreiðslur av økinum, tí neyvan verður farið at byggja kjarnorkuverk í Føroyum í bræði.

## 1.6. Einkarættur

Lb. nr. 546 af 25.10.1978 af patentlov.

*A. nr. 204 af 26.09.1936 om indrømmelse af fortrinsret ved ansøgning om patent.*
- *B. nr. 142 af 01.05.1968 om patentankenævnet.*
- *A. nr. 543 af 23.10.1978 om at visse bekendtgørelser, der udfærdiges af handelsministeren, ikke indføres i lovtidende.*
- *B. nr. 548 af 25.10.1978 angående ansøgninger om patent m.v.*
- *B. nr. 549 af 25.10.1978 om patentafgifter.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Fyrisitingarligi myndugleikin er patentdirektoratið.

Skal málsøkið koma undir føroyskt málsræði, verður mett, at samstarvsavtala eigur at verða gjørd á økinum, tí tað hevði helst verið ov tungt at umsitið sjálvstøðugt, eftir hvat tørvurin er.

Lóggáva: Lógin gevur tí, sum hevur gjørt eina uppfinning, ella tí, sum hevur fingið rættin til uppfinningina, rætt til at søkja um at fáa patent upp á hana, og soleiðis fáa einarætt til at brúka hana í vinnuligum høpi.

Fíggjarviðurskifti: Fíggjarligu ábyrgdina av umsitingini hevur danski staturin. Torført er at meta um, hvat kostnaðurin hevði verið, um økið kom undir føroyskt málsræði, men við samstarvsavtalu við annað land, verður kostnaðurin neyvan stórur, av tí at føroyskar patentumsóknir eru fáar í tali.

*L. nr. 341 af 06.06.1991: Varemærkelov, som sat i kraft for Færøerne ved A. nr. 331 af 04.05.1994.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Patentdirektoratið, patentkærunevndin og danski vinnumálaráðharrin.

Lóggáva: Lógin gevur vinnurekandi virki møguleika fyri við skráseting ella við brúki at fáa einarætt til at brúka vørumerki sum serligt eyðkenni fyri vøru ella tænastur, ið virkið bjóðar. Eitt vørumerki kann t.d. vera figurur, orðasamanseting, bókstavir ella tøl.

Fíggjarviðurskifti: Fíggjarligu ábyrgdina av umsitingini hevur danski staturin. Var økið føroyskt, kundi tað verðið umsitið av t.d. Skráseting Føroya. Kostnaðurin verður ikki mettur at verða stórur.

*L. nr. 342 af 06.06.1991: Fællesmærkelov, som sat i kraft ved A. nr. 331 af 04.05.1994.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Patentdirektoratið, patentkærunevndin og ídnaðarmálaráðharrin.

Lóggáva: Í samsvari við vørumerkjalógina gevur lógin felagsskapum av vinnurekandi møguleika fyri við skráseting ella brúki at fáa limunum í felagsskapinum einarætt til at brúka serlig eyðkenni fyri vøru ella tænastu, ið limirnir bjóða í virki sínum.

Fíggjarviðurskifti: Fíggjarligu ábyrgdina av umsitingini hevur danski staturin. Varð økið føroyskt, kundi tað verið umsitið av t.d. Skráseting Føroya. Kostnaðurin verður ikki mettur at vera stórur.

## 1.7. Mynstur

*L. nr. 218 af 27.05.1970 om mønstre.*
- *B. nr. 387 af 20.08.1970 om mønsterafgifter.*
- *B. nr. 388 af 20.08.1970 om ansøgning og registrering af mønstre.*
- *B. nr. 411 af 24.09.1970 om mønsterankenævnet.*
- *B. nr. 415 af 24.09.1970 om forretningsorden for mønsterankenævnet.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Patentdirektoratið, danski vinnumálaráðharrin og danska mynsturkærunevndin.

Lóggáva: Mynstur í lógarinnar merking er at skilja sum fyrimynd fyri útsjónd á vøru ella prýði, (design). Við skráseting kann tann, ið hevur gjørt mynstrið, fáa einarætt til at brúka mynstrið í vinnuligum høpi.

Fíggjarviðurskifti: Fíggjarligu ábyrgdina av umsitingini hevur danski staturin. Varð økið føroyskt, kundi tað verið umsitið av t.d. Skráseting Føroya.

## 1.8. Mát og vekt

*A. nr. 720 af 05.09.1995 om ikrafttræden på Færøerne af lov om erhvervsfremme.*
*A. nr. 603 af 18.11.1918 om forkortede betegnelser for metrisk mål og vægt.*
*B. nr. 84 af 01.03.1950 om Justerreglementet som den senest er ændret ved B. nr. 22 af 31.01.1972.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Ídnaðarmálaráðharrin, Justervæsenet (núverandi Force-institutterne), Landsstýrið og Arbeiðseftirlitið.

Lóggáva: Talan er um tríggjar danskar lógir. „Lov om erhvervsfremme“ ásetir í § 10 reglur um mátieindir, mátihátt, eftirlit o.a. „Anordning om metrisk mål og vægt“ ásetir hugtalslýsingar fyri mát og vekt, og reglurnar um „Justerreglementet“ áseta galdandi rætt á økinum.

Talan er um at fylgja góðkendum altjóða mát- og vekteindum, og skal føroysk lóggáva á økinum fylgja slíkum.

Fíggjarviðurskifti: Eitt starvsfólk á Arbeiðseftirlitinum hevur um hendi uppgávurnar viðvíkjandi hesum lógum. 65% av arbeiðstíðini fer til at røkja uppgávunar viðv. mát og vekt, og hini 35% av arbeiðsorkuni verða nýtt til uppgávur hjá Arbeiðseftirlitinum.

Skulu vit røkja hesa uppgávu sjálvi, verður, umframt løn til eitt fólk, talan um at gera íløgur í útgerð o.a. Økið er brúkarafíggjað, og tí standast ongar beinleiðis almennar útreiðslur av, at økið verður føroyskt.

## 1.9. Ráevni í undirgrundini

*L. nr. 181 af 08.05.1950 om efterforskning og indvinding af råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund.*
*A. nr. 259 af 07.06.1963 vedrørende udøvelsen af dansk højhedsret over den kontinentale sokkel.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Fyrisitingarligur myndugleiki er Vinnumálastýrið, (oljumáladeildin). Eftir løgtingslóg um kolvetnisvinnu frá 1998 kann Landsstýrið veita loyvi til forkanningar, leitingar og útvinningar í sambandi við kolvetni á føroyskum øki, og kann seta eina ørgrynnu av treytum í hesum sambandi. Danska undirgrundarlógin frá 1950 kann gerast virkin, um talan verður um at gagnnýta annað náttúrutilfeingi enn kolvetni, og var tað orsøkin til, at kolvetnislógin ikki setti donsku lógina frá 1950 úr gildi. Lógin vísir til „Ministeren for offentlige arbejder,“ (nú Orkumáláráðið), og DGU, (nú GEUS), sum fyrisitingarmyndugleikar. Lógin skal tí verða lisin á tann hátt, at Landsstýrið verður sett inn, har lógin talar um „regeringen.”

Lóggáva: Danska lógin frá 1950 er bert í gildi í Føroyum, tí í Danmark er komin nýggj undirgrundarlóg frá 1981, við seinni broytingum. Lógin tilskilar, at ráevni í undirgrundini í danska kongsríkinum er ogn hjá danska statinum, og at danski staturin hevur einkarrætt til leiting og útvinning av ráevnum o.s.fr. Fyriskipanin staðfestir danskan yvirvaldsrætt yvir landgrunninum í sambandi við leiting og útvinning av náttúrutilfeingi.

Við yvirtøkuni av ráevnum í undirgrundini í 1993 eru løggávuvaldið og fyrisitingarvaldið føroysk, og landið fíggjar kostnaðin í hesum sambandi.

Donsku rættarreglurnar á økinum hava neyvan nakran praktiskan týdning longur, men yvirvaldsrætturin yvir føroyskum øki er tó framvegis danskur.

Seinast í kunngerðini um yvirtøku av ráevnunum í undirgrundini verður viðmerkt, at „Regeringen har konstateret, at Færøernes landsstyre er indstillet på, til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser, forudsat konkurrencedygtighed at anvende sagkundskab indenfor dansk forvaltning og forskning samt danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvinding.“ Her verður ikki beinleiðis víst til danskar myndugleikar, men talan er um eina ætlanaryvirlýsing, har Landsstýrið kann velja at nýta danskan sakkunnleika og danskt vinnulív í ráevnisvinnuni. Viðmerkt kann verða, at Danmarks Geologiske Undersøgelse og Orkustýrið hava verið við í arbeiðinum hjá Oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins.

Fíggjarviðurskifti: Verður føroyskt fullveldi skipað, verður yvirvaldsrætturin føroyskur. Hetta hevur ongan meirkostnað við sær.

## 1.10. Umhvørvisvernd

*A. nr. 318 af 26.06.1985 om ikrafttræden for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet.*

*B. nr. 236 af 09.07.1958 om oliejournal.*

- *B. nr. 155 af 12.05.1959 om forholdsregler i skibe mod olieforurening af havet.*
- *B. nr. 450 af 29.08.1978 om erstatningsfond for olieforurening som senest ændret ved B. nr. 465 af 26.09.1980.*
- *K. nr. 20 frá 08.04.1987 um móttøkuskipan av oljurestum og -blandingum, kloakkavlopsvatni og burturkasti í føroyskum havnum.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Umhvørvismálaráðharrin, Landsstýrið, danska umhvørviskærunevndin og danska umhvørvisstýrið.

Løggáva: Lógin er ætlað at verja hav og lív um Føroyar og tekur við, har lógin um umhvørvisvernd á landi sleppur. Talan er um danska lóg. Viðmerkjast skal, at landsstýrismaðurin legði fram uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar „anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet,“ (løgtingsmál nr. 96/98), og varð uppskotið samtykt av løgtinginum tann 23. apríl 1999. Lógin flytur allar heimildir innan fyri føroyska fiskimarkið

til landsstýrismannin, og tí verður neyðugt við føroyskari fyrisiting á hesum øki.

Um sæð verður burtur frá ávísum tillagingum, orsakað av at Landsstýrið fær ávísar heimildir, er lóggávan lík teirri donsku. Umframt sjálva lógina, ið er rammulóg, verður neyðugt at lýsa nakrar kunngerðir á økinum, og skal her verða víst til „Álit frá arbeiðsbólki viðvíkjandi kgl. fyriskipan um havumhvørvið," frá 16.9.97.

Fíggjarviðurskifti: Galdandi skipanin hevði ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, men nevnda lóg, ið flytur fyrisitingina á føroyskar hendur, kemur at hava við sær meirkostnað. Í álitinum, (s. 7 og 8), verður tosað um 1,2 mió. árliga til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og „nakrar" mió. kr. til Vaktar- og Bjargingartænastuna. Vart verður tó gjørt við, at talan er um tilmæli hjá arbeiðsbólkinum, og at politisk støða er ikki tikin til, hvussu nýggju uppgávurnar skulu verða greiddar, og hvør skal hava tær um hendi.

*L. nr. 332 af 19.06.1974 om erstatning for atomskader (nukleare skader) som den er sat i kraft ved A. nr. 303 af 20.06.1975.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Løgmáláráðharrin og undirvísingarmáláráðharrin.

Lóggáva: Lógin er donsk, men er ein útinning av Parissáttmálanum frá 29/7 1960.

Fíggjarviðurskifti: Danski staturin hevur í ávísum førum eftir lógini skyldu til at rinda endurgjald fyri skaða av kjarnorkuútbúnaði.

## 1.11. Radiosamskifti

*Lb. nr. 210 af 06.04.1976 af lov om radiokommunikation.*

- *B. nr. 140 af 13.03.1974 om indretning og benyttelse af radiomodtagere.*
- *B. nr. 521 af 10.10.1974 om foranstaltninger til imødegåelse af ulovlig benyttelse af radioanlæg.*
- *B. nr. 527 af 21.10.1978 for Færøerne om foranstaltninger til imødegåelse af ulovlig benyttelse af radioanlæg.*
- *B. nr. 49 af 07.02.1984 om radiostationer i skibe og luftfartøjer som ændret ved B. nr. 136 af 07.03.1989.*
- *B. nr. 100 af 21.03.1985 om privatradioanlæg.*
- *B. nr. 541 af 04.12.1985 om amatørradiostationer.*

– *B. nr. 248 af 25.04.1988 om radioanlæg i forbindelse med den landmobile tjeneste.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Lógin vísir til danskan myndugleika, og danskur myndugleiki umsitur hana. Rakstraravtala er við Fjarskiftiseftirlitið um at reka virksemið í Føroyum undir navninum: Radioeftirlitið.

Neyðugt verður at byggja upp vitan og royndir í altjóða samstarvi og samskipan á økinum.

Lóggáva: Talan er um danskar rættarreglur um radiosamskifti og tilluting av radiofrekvensum, settar í gildi fyri Føroyar. Tørvur er á at endurskoða lógarøkið. Arbeiðið er longu í gongd og verður ætlandi liðugt í 1999, og fer tað at verða nøktandi í sambandi við føroyskt málsræði.

Fíggjarviðurskifti: Talan er um inntøkufíggjað virksemi, har brúkararnir gjalda fyri tænastuna. Sostatt eru eingin krøv um almenna fígging, um økið kemur undir føroyskt málsræði.

## 1.12. Tilbúgving

*A. nr. 337 af 02.10.1952 hvorved lov om Civilforsvaret sættes i kraft på Færøerne*

Fyrisitingarmyndugleikar: Innanríkismálaráðið, Íbúðarmálaráðið, Landsstýrið, fútin og kommunurnar.

Í løtuni arbeiðir verkætlanarbólkur undir Vinnumálastýrinum við at gera eina føroyska tilbúgvingarætlan, og verður sivilforsvarslógin helst avtikin í sambandi við hetta arbeiði. Ætlanin er ikki at seta donsku tilbúgvingarlógina í gildi í staðin, tí hon hóskar illa til føroysk viðurskifti. Helst verður føroysk tilbúgvingarlóg smíðað, og helst verður brand- og tilbúgvingarøkið samansjóðað, eins og í Danmark.

Skal føroysk tilbúgvingarætlan verða gjørd, mugu fleiri myndugleikaspurningar verða greiddir fyrst, tí tilbúgvingarøkið er partvíst danskt, partvíst føroyskt ábyrgdarøki. T.d. er løgreglan oftast leiðari á skaðastaðnum, og spurningurin er, um ein føroysk tilbúgvingarlóg kann áleggja donskum myndugleikum skyldur og krøv. Í verandi støðu er neyðugt við samráðingum við danskar myndugleikar, áðrenn slík føroysk tilbúgvingarlóg kann verða gjørd.

Um løgreglan kemur undir føroyskt málsræði, skuldu ongar forðingar verið fyri, at føroyingar sjálvir skipa økið framyvir. Í sambandi við tilbúgvingarætlanina verður kannað, hvussu útbúgvingarnar skulu verða skipaðar, og líkt er til, at Brandskúlin við Áir og møguliga aðrir skúlar kring landið við neyðugu dagføringini kunnu nøkta tørvin rættiliga væl. Tó kann verða neyðugt at senda leiðandi starvsfólk á tilbúgvingarøkinum uttanlands á skeið, og kunnu samstarvsavtalur verða gjørdar við Danmark, Noreg ella Ísland um hetta.

Tó eigur avtala helst at verða gjørd við okkurt grannaland um hjálp, um okkurt heilt álvarsligt skuldi borist á, og vit ikki fáa hjálpt nóg væl sjálvi.

Fyrisitingin av tilbúgvingarøkinum verður lítið og einki ávirkað, um málsøkið verður føroyskt. Neyðugt verður kanska at seta eitt eyka starvsfólk á Brunaumsjón landsins at kanna, um fyriskipanir í eini føroyskari tilbúgvingarlóg verða fylgdar, men hetta verður væntandi eisini neyðugt, um økið ikki kemur undir føroyskt málsræði. Kemur løgreglan undir føroyskt málsræði, verða tilbúgvingaruppgávurnar hjá henni helst lítið broyttar.

Lóggáva: Lógin er bert formliga sett í verk, og hevur hon tí í veruleikanum nærum ongan týdning havt. Neyðugu kunngerðirnar eru ongantíð lýstar. Í Danmark varð sivilforsvarslógin avtikin í 1992, og ein samlað tilbúgvingarlóg er komin í staðin: L. nr. 1054 af 23. december 1992, (beredskabsloven). Henda tilbúgvingarlóg samskipar brand- og tilbúgvingarøkið og leggur sum heild størri dent á sivila tilbúgving. Sostatt eru vit í eini støðu, har ein avtikin donsk lóg er í gildi í Føroyum, men lítlan ella ongan praktiskan týdning hevur.

Fíggjarviðurskifti: Væntandi verður eingin beinleiðis kostnaður av, at alt málsøkið verður føroyskt. Tó er líkt til, at økið framyvir fer at verða raðfest hægri, og fara almennu útreiðslurnar til útbúgvingar og útbúnað tá helst at hækka nakað. Ógreitt er tó, hvussu nógv landskassin skal fíggja hetta í stóran mun kommunala ábyrgdarøkið.

Sí annars undir útgreiningunum hjá øðrum stýrum, sum vara av ymiskum, sum er viðkomandi fyri tilbúgving, t.d. sjóverja.

## 1.13. Flutningur

*Lb. nr. 602 af 09.09.1986 om fragtaftaler ved international vejtransport.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Eingir

Lóggáva: Danska lógin frá 1965, „fragtaftale ved international vejtransport," er lýst at galda í Føroyum. Lógin regulerar góðsflutning við akfari millum statir, antin til ella úr Danmark ella millum fremmandar statir, har minst annar teirra hevur tikið undir við Genevesáttmálanum frá 19. mai 1956 um altjóða fraktflutning eftir landsvegum. Løgmálaráðið kann geva undantak frá ásetingunum í lógini um ferðslu um landamørk.

Við fullveldi kunnu føroyingar velja at halda áfram við avtaluni sum sjálvstøðugur sáttmálapartur við at boða avvarandi myndugleika, sum umsitur sáttmálan, frá hesum. Hetta hevur ongan meirkostnað við sær.

Fíggjarviðurskifti: Eingi

## 1.14. Havnir

*L. nr. 7 af 30.01.1875 om Udfærdigelse af reglementariske Bestemmelser for Benyttelsen af Havne m.m. som ændret ved L. nr. 127 af 15.04.1930.*
*L. nr. 127 af 29.04.1913 om anlæg af Havne m.v. på Færøerne som senest ændret ved L. nr. 125 af 15.06.1927.*
*L. nr. 69 af 07.05.1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Eeie, Havne og Landingssteder, samt til offentlige skoler på Færøerne, som senest ændret ved MB. nr. 17 af 20.01.1944.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Vinnumálastýrið og kommunurnar.

Lóggáva: Havnir eru føroyskt málsøki. Rættarreglurnar á økinum eru danskar, uttan kunngerð um skipa- og vørugjøld fyri havnir og bryggjur í Føroyum, sum er lýst við heimild í 1875 lógini. Henda lógarheimild er ógvuliga ivasom, tí hon heimilar ikki kommununum at áseta skipa- og vørugjøld. At kunngerðin er lýst við heimild í hesi lóg, er helst tí, at vit ikki hava rættarreglur á økinum annars.

Í lógunum frá 1875 og 1913 verður víst til „Indenrigsministeren," „Ministeren for offentlige arbejder" og „Færø Amts Kommune," men av tí at málsøkið er føroyskt, og lógirnar bert galda í Føroyum, kunnu tær verða lisnar soleiðis, at „landsstýrismaður" verður sett inn, har lógirnar vísa til danskar ráðharrar.

Lógin frá 1875 heimilar innanríkisráðharranum at áseta reglur um „Overholdelse af orden og forebyggelse af fare ved benyttelse av havne" o.s.fr., og at áseta bøtur í hesum sambandi. Lógin frá 1913 er

um studning til m.a. havnarbygging ymsastaðni í Føroyum fyrst í øldini, og eru hesar havnarløgur sjálvandi langt síðan gjørdar. Tíðin er so ruddiliga farin frá hesum lógum, og tær skuldu verðið avtiknar.

Ein arbeiðsbólkur arbeiðir við uppskoti til føroyska havnarlóg í løtuni, og arbeiðið verður ætlandi liðugt í ár. Gomlu lógirnar kunnu verða avtiknar í hesum sambandi.

Ognartikið verður við heimild í lóg nr. 69 frá 7. mai 1881 „om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne." Henda fólkatingslóg er bert í gildi í Føroyum. Tørvur er á eini tíðarhóskandi, føroyskari ognartøkulóg.

Fíggjarviðurskifti: Eingi

## 1.15. Flogferðsla

*Lb. nr. 408 af 11.09.1985 af lov om luftfart som sat i kraft ved A. nr. 130 af 03.03.1989 og ændret ved L. nr. 117 af 11.03.1987 sat i kraft ved A. nr. 573 af 09.08.1990.*

- *A. nr. 28 af 27.01.1986 om at forskrifter, der udfærdiges af Statens Luftfartsvæsen ikke indføres i lovtidende.*
- *B. nr. 86 af 25.02.1986 om kundgørelse af forskrifter, der udfærdiges af Statens Luftfartsvæsen.*
- *A. nr. 727 af 21.11.1989 om at organisationen for International Civil Luftfarts tekniske instruktioner for sikker lufttransport af farligt gods ikke indføres i Lovtidende.*
- *B. nr. 332 af 27.11.1964 om luftfartøjers luftdygtighed m.v.*
- *B. nr. 264 af 27.06.1966 om driftforskrifter for regelmæssig og ikke-regelmæssig, offentlig lufttrafik som ændret ved B. nr. 397 af 11.10.1967.*
- *B. nr. 88 af 21.03.1967 om meddelelsespligt for luftfartøjschefer.*
- *B. nr. 161 af 20.04.1971 vedrørende benyttelse af faldskærme.*
- *B. nr. 446 af 01.10.1972 om benyttelse af svæveplaner, modelluftfartøjer m.v.*
- *B. nr. 191 af 23.05.1975 vedrørende luftfartscertifikater.*
- *B. nr. 345 af 24.06.1975 om ansvarsbegrænsing ved lufttransport.*
- *B. nr. 575 af 20.11.1975 om ændring af bekendtgørelse om luftfartøjers udstyr med førstehjælpsmateriel.*
- *B. nr. 98 af 17.03.1977 om transport af eksplosive stoffer, krigsmateriel og krigsammunition m.v. med civile luftfartøjer som ændret ved B. nr. 737 af 17.11.1989.*

- *B. nr. 469 af 15.09.1981 om ændring af bekendtgørelse om udfærdigelse af reglement vedrørende flyveredningstjeneste.*
- *B. nr. 92 af 08.03.1982 om udåndingsprøver efter luftfartsloven som ændret ved B. nr. 27 af 19.01.1987*
- *B. nr. 93 af 08.03.1982 om flyvesikringstjeneste, luftrumsorganisation, luftrafikregler og luftfartsinformationstjeneste.*
- *B. nr. 272 af 29.05.1984 om meddelelsespligt med hensyn til flyvehavarier og flyvehændelser.*
- *B. nr. 491 af 23.09.1984 om minimunsgrænser for ansvarsforsikring for luftfartøjer i henhold til luftfartslovens § 130, stk. 1.*
- *B. nr. 170 af 28.04.1985 om specifikationer for flyvepladser*
- *B. nr. 171 af 28.04.1985 om driftsforskrifter for luftfart med danske luftfartøjer.*
- *B. nr. 172 af 28.04.1985 om luftfartøjers luftdygtighed, om nationalitets- og registreringsmærker for luftfartøjer, luftfartsdokumenter og radioudstyr.*
- *B. nr. 28 af 19.01.1987 om at AFIS-operatører er omfattet af luftfartslovens § 74.*
- *B. nr. 553 af 16.09.1988 om sikkerhedsrepræsentanter og sikkerhedsudvalg i henhold til lov om luftfart.*
- *B. nr. 864 af 19.12.1988 om forebyggelse af forbrydelser mod luftfartens sikkerhed.*
- *B. nr. 556 af 14.08.1989 om forbud mod eller indskrænkning af luftfart i visse områder som ændret ved B. nr. 66 af 31.01.1990.*
- *B. nr. 737 af 17.11.1989 om lufttransport af farligt gods.*
- *B. nr. 173 af 13.03.1991 om ordensreglement for flyvepladser på Færøerne.*

*L. nr. 235 af 07.06.1972 om forbud mod civil overlydsflyvning.*

*L. nr. 367 af 21.12.1938 om frihed for arrest og forbud med hensyn til luftfartøjer som den er sat i kraft ved A. nr. 179 af 14.04.1939.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Ferðslumálaráðharrin, Statens Luftfartsvæsen, innanríkisráðharrin, verjumálaráðharrin, løgmálaráðharrin, Arbeiðsumhvørvisráðið, løgreglan, skaðanevndin (Havarikommissionen), Føroya landsstýri, (nú landsstýrismaðurin), og føroyskar kommunur.

Við føroyskum málsræði verður lóggávuvaldið og fyrisitingarvaldið á málsøkinum føroyskt, og yvirvaldsrætturin yvir loftrúminum føroyskur. Loftferðslan í Føroyum er ógvuliga lítil samanborin við onnur lond, og av tí at flogferðsla er altjóða vinna, verður neyðugt at samstarva við onnur lond á flestu økjum.

Lóggáva: Loftferðslulógin er donsk, tó við ymsum broytingum, sum heimastýrið hevur ásett. Nógvar ásetingar í lógini galda bert eftir samráðingar við Landsstýrið. Í onkrum føri verður ásett, at heimastýrið skal verða kunnað ella hoyrt. Allastaðni í lógini verður tilskilað, at har tað stendur „dansk bruger,“ „dansk ledelse,“ „dansk bestyrelse“ o.s.fr., ber til at lesa tekstin soleiðis, at „ved dansk forstås tillige færøsk.”

Flogferðsla verður regulerað sambært teimum treytum, sum loftferðslustovnur Sameindu tjóða, ICAO, setir, eins og eftir altjóða sáttmálum, ES-reglum og loftferðslulógini, sum aftur lýkur tær treytir, sum altjóða og fleirtjóða felagsskapir seta flogferðsluni. Tí verður mælt til at fylgja donsku rættarreglunum á økinum við teimum broytingum og tillagingum, sum hóska til føroysk viðurskifti. Avtala verður gjørd við Ferðslumálaráðið um mannagongd í sambandi við lóggávuarbeiði. Hetta fer ikki at kosta meira enn verandi skipan.

Sum fullveldi eiga Føroyar at taka undir við Chicagosáttmálanum og gerast sjálvstøðugur limur í ICAO. Við hesum átaka føroyingar sær somu fólkarættarligu ábyrgd, sum nú liggur á Danmark. Í fyrsta umfari kunnu føroyingar lata íslendingum flogtrygdartænastuna at umsita. Íslendingar umsita sum er føroyska loftrúmið, Danmarkar vegna. Í framtíðini fáa føroyingar møguleika fyri at veita flogtrygdartænastuna, um vit eru sinnaðir til tess, og treytað av, at ICAO tekur undir við hesum.

Fíggjarviðurskifti: Danmark rindar ICAO 1,3 mió. kr. í árligum limagjaldi. Statens Luftfartsvæsen, (SLV), upplýsir, at gjaldið er ásett eftir bruttotjóðarúrtøkuni hjá limalondunum, og merkir tað, at Føroyar bert skulu gjalda um leið 11 tús. kr. um árið í limagjaldi. Til at røkja henda limaskap og fyrisitingarútreiðslur í hesum sambandi, krevjast leystliga mett 200 tús. kr. árliga.

Flogvøllurin í Vágum, sum SLV rekur, (flogvallarøkið), rindar um leið 2,9 mió. kr. um árið yvir raksturin fyri allar tænastur, sum Loftferðslueftirlitið og Flogtrygdartænastan veita á føroyskum øki. Flogfeløgini rinda sjálvi fyri at útbúgva og góðkenna starvsfólk.

Danskir myndugleikar, (Ferðslumálaráðið og SLV), hava víst á møguleikan fyri, at føroyingar yvirtaka raksturin av flogvøllinum í Vágum. Gongdin hevur verið soleiðis seinru árini, at SLV hevur avhendað flogvøllir sínar og rekur nú bert tveir flogvøllir. 25 fólk starvast hjá SLV á flogvøllinum, umframt 7 starvsfólk, sum eru keypt í starv frá Flogtrygdartænastuni. Bókførda virðið av føstu ognini hjá SLV á flogvøllinum við árslok 1997 var 23 mió. kr.

Vilja føroyingar yvirtaka raksturin av flogvøllinum í Vágum, hevur hetta kostnað við sær. Verandi fíggjarætlan hjá SLV vísir eitt rakstrarhall fyri 1998, áðrenn rentur og avdráttir, upp á – 3,6 mió. kr., sum minka til – 2,1 mió. kr. ár 2002. Eftir rentur og avskrivingar eru høllini somu ár ávikavist – 8,9 mió. kr. og – 5,9 mió. kr. Hesar metingar eru gjørdar út frá galdandi ráðlegging, sum hevur hesar fyritreytir: Løguætlan upp á í miðal 2,2 mió. kr. um árið, at ferðafólkatalið økist við 5% um árið, og at flúgvingin fer at økjast við 2,5% fram til ár 2002.

Avtala verður gjørd við SLV, (Ferðslumálaráðið), um framhaldandi at veita tær tænastur, sum flogvøllurin í Vágum nú rindar SLV fyri, tá ið loftferðsla verður føroyskt málsøki. Hetta hevur ongan meirkostnað við sær.

Flogfarið hjá Atlantsflogi og tyrlan hjá Landsstýrinum, sum nú eru skrásett í donsku tjóðskaparskránni, kunnu í staðin verða skrásett í Skráseting Føroya og fáa føroysk tjóðskapareyðkenni.

Neyðugt verður at gera samstarvsavtalu við skaðanevndina, (Havarikommissionen for civil luftfart), soleiðis at hon eisini kannar tilburðir, um eitt føroyskt skrásett flogfar skuldi verið fyri óhappi. Verður goldið eftir íbúgvatali, kostar tænastan bert 41 tús. kr. um árið.

## 1.16. Niðurstøður

Lýsingarnar byggja á, at rættarreglurnar verða óbroyttar, og at umsitið verður á sama hátt sum nú. Donsk málsøki verða føroysk, um málsræðið verður flutt til Føroya.

Donsku rættarreglurnar, sum galda fyri Føroyar, kunna verða býttar í tvey. Ikki yvirtikin málsøki og yvirtikin málsøki, har ávísar rættarreglur framvegis eru danskar.

Nógvar av donsku rættarreglunum hava ongan praktiskan týdning í Føroyum. Dømi um hetta er lógin um kjarnorku.

At rættarreglurnar eru á donskum, er eingin trupulleiki. Vit hava fleiri danskar rættarreglur í gildi í Føroyum frá árunum undan heimastýrinum og fyri seinni yvirtikin málsøki. Dømi um hetta eru ráevni í undirgrundini.

Í sambandi við fullveldi kunnu donsku rættarreglurnar verða tillagaðar til føroysk viðurskifti í teimum førum, har tað er neyðugt.

Eitt umfatandi danskt málsøki er flogferðsla. Um flogferðslu hava tingingar verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um at yvirtaka flogvøllin, treytað av at danir rinda ávísar útbyggingar áðrenn. Einki er til hindurs fyri, at føroyskir myndugleikar yvirtaka heimild-

ina at gera lógir um flogferðslu, men føroyskar rættarreglur fara eyðsýnt ikki at víkja nógv frá galdandi donskum, tí flogferðsla er regulerað av altjóða rætti.

# Kapittul 2

## Føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar

Lýsing av fyrisiting, lóggávu og fígging og krøvum til fyrisiting, lóggávu og fígging
Summar av føroysku rættarreglunum vísa til danskar myndugleikar. Hetta er í flestu førum, har føroyskir myndugleikar ikki hava orku til at umsita umfatandi yvirlit yvir tekniskar standardir o.tíl., sum í flestu førum stava frá altjóða standardum. Niðanfyri er stutt gjøgnumgongd av hesum rættarreglum.

### 2.1. Fjarskifti

*Ll. nr. 73 frá 23.05.1997 um fjarskifti.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Føroyskir myndugleikar, men § 13, stk. 4 vísir til danska Telestyrelsen, tá ið útbúnaður skal verða góðkendur. Frá apríl 2000 verður lóggávan í EBS broytt, soleiðis at allur útbúnaður skal hava framleiðaraváttan við CE merking, ið borgar fyri, at útbúnaðurin lýkur altjóða krøv. Tískil gerst økið sera einfalt at umsita.

Lóggáva: Føroysk lóggáva, sum vísir til danskan myndugleika.

Fíggjarviðurskifti: Føroyar hava ábyrgdina, men økið er inntøkufíggjað. Brúkarin rindar fyri tænasturnar.

### 2.2. Arbeiðaravernd

*LL. nr. 58 frá 24.05.1974 um arbeiðaravernd, seinast broytt við Ll. nr. 126 frá 21.05.1993.*

Kunngerðir, lýstar við heimild í hesi lóg, eru mest danskar og vísa til danskar myndugleikar.

## 2.3. Sløkkilið og spreingievni

*Ll. nr. 78 frá 12.06.1986 um eldsbruna o.a*
*K. nr. 45 frá 09.05.1992 um brunaverju og brunatrygd.*
*K. nr. 94 frá 15.06.1994 um eldfiman løg.*
*L. nr. 13 af 14.02.1874 om forbud mod visse tændstikker m.m. som sat i kraft ved A. nr. 7 af 23.01.1903.*
*A. nr. 667 af 15.12.1920 om opbevaring af kalciumkarbid på Færøerne.*
*B. nr. 668 af 15.12.1920 om forskrifter, der skal følge med ved salg af karbid.*
*L. nr. 68 af 01.04.1912 for Færøerne om sprængstoffer som senest ændret ved Ll. nr. 40 frá 1. juni 1978.*
*A. nr. 251 af 11.11.1912 for Færøerne angående de forsigtighedsregler, der skulle iagttages ved transport af visse eksploderende stoffer.*
*B. nr. 109 af 26.05.1927 angående ammunition til raket- eller lyskuglepistoler.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Vinnumálastýrið og Brunaumsjón landsins, sum hava eftirlit við brunamálum, sum viðvíkja bygningum og nýtslu av teimum, goymslum og flutningi av eldkvæmum og spreingikvæmum evnum, og kommununurnar, ið umsita mál, sum viðvíkja útgerð og førleika hjá sløkkiliðum og kommunalum tilbúgvingarspurningum.

Lóggáva: Brunamál o.a. er føroyskt málsøki, og mesta lóggávan er somuleiðis føroysk. Donsku rættarreglurnar, sum galda í Føroyum á økinum, eru millum 72 og 124 ára gamlar og áttu at verðið dagførdar. Í lógunum viðv. goymslu av kalsiumkarbid og framleiðslu, flutningi og sølu av spreingikvæmum evnum, verður í ávísum førum víst til Løgmálaráðið, amt, sýslur og fútan sum myndugleikar á økinum. Í roynd og veru umsitur tó Brunaumsjón landsins málsøkið.

Føroysku rættarreglurnar á økinum, (løgtingslóg um eldsbruna), heimila Landsstýrinum at áseta, at tekniskar fyriskipanir, sum brunaumsjón ríkissins í Danmark hevur gjørt á ymsum økjum, kunnu galda í Føroyum. Kunngerðirnar áseta m.a., at Brunaumsjón landsins nýtir Dansk Standard (DS), ymsar tekniskar fyriskipanir hjá Beredskabsstyrelsen, DBI (Dansk Brandteknisk Institut) og tøkniligu ásetingarnar í „Gasreglementet 1981 afsnit A“ og „Justitsministeriets bekendtgørelse nr. 520“ frá oktober 1978 í brunartrygdarligum, tekniskum og øðrum ásetingum sínum, og tá ið tilfar, vegleiðingar o.a. verður góðkent.

Til ber at siga, at føroysku rættarreglurnar á økinum vísa ikki beinleiðis til danskar myndugleikar, men at Brunaumsjón landsins í

arbeiði sínum yvirhøvur hevur valt at nýta danskar standardir og fyriskipanir, sum aftur samsvara við ES-standardir o.s.fr.

Fíggjarviðurskifti: Eingi

## 2.4. Ravmagn og tekniskar innleggingar

*Ll. nr. 134 frá 10.06.1993 um sterkstreymsútbúnað.*
- *K. nr. 171 frá 21.09.1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari.*
- *K. nr. 173 frá 21.09.1993 um ígildissetan av sterkstreymsreglugerð v.m.*
- *K. nr. 175 frá 21.09.1993 um góðkendar royndir og starvskrøv fyri góðkenning av elinnleggjarum*

Fyrisitingarmyndugleikar: Sambært lógini eru fyrisitingarligir myndugleikar landsstýrismaðurin í vinnumálum og elnevndin. Landsstýrismaðurin ásetir m.a. reglur um gerð og rakstur av sterkstreymsútbúnaði, framleiðslu, eftirkannan, góðkenning, sølu og nýtslu av eltilfari o.s.fr. Elnevndin ráðgevur landsstýrismanninum og røkir teir fyrisetningar, ið verða settir nevndini sambært lógini.

Lóggáva: Málsøkið er føroyskt og somuleiðis rættarreglurnar. Rættarreglurnar vísa ikki beinleiðis til danskar myndugleikar, men vísa í ávísum førum til danskar lógir, kunngerðir, standardir o.s.fr. Landsstýrið kann t.d. áseta, at reglurnar hjá danska ravmagnsráðnum og umsitingarligu reglurnar í sterkstreymsreglugerðini heilt ella lutvíst kunnu galda í Føroyum, at alt nýtt eltilfar, ið verður selt, útflýggjað ella innlagt í Føroyum, er við í yvirlitinum hjá Danmarks elektriske materialekontrol, at reglurnar, sum danska ravmagnsráðið hevur ásett um gerð, kanning, nýtslu og rakstur av elútbúnaði, skulu galda í Føroyum, og at elinnleggjarar, fyri at verða góðkendir, m.a. lúka tey krøv, sum eru ásett í „bekendtgørelse nr. 172 af 14. maj 1952 om prøver for elektroinstallatører § 1, III, jfr. §§ 6-11“ frá „Ministeriet for offentlige arbejder.”

Fíggjarviðurskifti: Eingi

## 2.5. Ferðsla

*Ll. nr. 14 frá 02.03.1988 um ferðslu, seinast broytt við Ll. nr. 59 frá 20.05.1996. Eisini broytt við Ll. nr. 44 frá 07.05.1991, Ll. nr. 45 frá 07.05.1991 og Ll. nr. 2 frá 09.01.1996.*

- *K. nr. 105 frá 21.06.1995 um tilgerð og útgerð o.a. hjá akførum, broytt við K. nr. 28 frá 13.03.1998*
- *K. nr. 105 frá 18.12.1978 um fallhjálmar.*

Fyrisitingarmyndugleikar: Fyrisitingarligir myndugleikar eru Vinnumálastýrið og Bileftirlit Føroya.

Lóggáva: Málsøkið er føroyskt eins og allar rættarreglur. Rættarreglurnar vísa ikki beinleiðis til danskar myndugleikar, men Landsstýrið kann gera av, at tær kunngerðir, sum Ferðslumálaráðið sambært ferðslulógini hevur givið út um stakfyriskipanir um akfarsgerð og akfarsútgerð, heilt ella partvíst skulu hava gildi í Føroyum, (eru undantiknar lýsing). Ásett verður eisini, at m.a. fallhjálmar skulu verða góðkendir eftir donskum, finskum ella svenskum reglum.

Fíggjarviðurskifti: Eingi

## 2.6. Niðurstøður

At føroyskar rættarreglur vísa til danskar myndugleikar er av praktiskum orsøkum, tí hetta ger umsitingina lættari.

Oftani er talan um sera umfatandi, tekniskar fyriskipanir, sum krevja nógva umsiting at halda við líka, og hetta arbeiði hava Føroyar ikki orku til. Annar fyrimunur er, at tær donsku, teknisku fyriskipanir fylgja ES-reglum. Í sambandi við eina broytta, ríkisrættarliga støðu verður framvegis neyðugt at vísa til tekniskar standardir hjá øðrum londum við teimum praktisku fyrimunum, hetta hevur við sær.

# Kapittul 3

## Sáttmálar

Niðanfyri er listi yvir sáttmálar, sum eru lýstir fyri Føroyar sbrt. „lov-register for Færøerne.“ Harumframt er stutt lýsing av ávísum sáttmálum, sum Vinnumálastýrið heldur eru serliga viðkomandi í sambandi við broytta, ríkisrættarliga støðu.

### 3.1. Arbeiðsmarknaður

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1949 29.03. | T. 12. | Internationale arbejdsorganisations status 1946 | |
| | B. 31. | 10.07.-20 | Konv. søfolks forhyring (9) |
| | B.465. | 02.11.-21 | Konv. arbejdsløshed (2) |
| | B.232. | 19.05.-23 | Konv. Lavalder for børns arbejde i industrien (5) |
| | B.233. | 19.05.-23 | Konv. Unge menneskers natarbejde i industrien (6) |
| | B.231. | 19.05.-23 | Konv. Landarbejderers forsikringar (12) |
| | B.199. | 08.07.-24 | Konv. Unge mennesker som kullempere og fyrbødere (15) |
| | B.155. | 27.04.-28 | Konv. Ligeberett. for udenlandske arbejdere (19) |
| | B.200. | 08.07.-24 | Konv. Lavalder for børns arbejde til søs (7) |
| | B.220. | 12.07.-30 | Konv. Landarbejderes forenings- og organisationsret (11) |
| | B.49. | 01.03.-32 | Konv. Tvunget eller pligtmæssigt arbejde (29) |
| | B.45. | 14.02.-33. | Konv. Vægtan. på tungt stykgods ved søtransport(27) |
| | B.269. | 28.09.-35. | Konv. Ugentlig hviledag i industrien (14) |
| | B.68. | 06.08.-92. | Nordisk konvention om fælles nordisk arbejdsmarked |
| | B.97. | 09.10.-97. | ILO-konv. om oprindelige folk og stammefolk (169) |
| | T.34 | 24.10.-36. | Konv. Minim. krav til fagl. duelighed hos handelsskipsoff. |
| | T.6. | 21.03.-38. | Konv. Erstatning for arbejdsløshed ved forlis (8) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | T.15. | 07.05.-38. | Konv. Lægeundersøgelse af unge på skibe (16) |
| | T.1. | 04.01.-57. | Konv. Arbejdsklausul i off. kontrakter (94) |
| | T.2. | 04.01.-57. | Konv. Ret til at organisere sig (98) |
| | T.64. | 07.11.-58. | Konv. Ugentlig fritid i handel og kontor (106) |
| | T.65. | 07.11.-58. | Konv. Afskaffelse af tvangsarbejde (105) |
| | T.46. | 11.12.-63. | Konv. Ændringer i tidl. konv. (116) |
| 1989 29/6 | T. Norðurlendskur sáttmáli við Finland, Ísland, Noreg og Svøríki um arbeiðsumhvørvi. | | |

## 3.2. Ráevni

1980 15/9 T. 78 Kontinentalsokkel og fiskerizone mellem Færøerne og Norge

## 3.3. Orka

1947 15/9 T. 41. Statut for international atomernergikommision.

## 3.4. Heilsufrøði

1925 1/7 T.205 Overenskomst om internt bureau i Paris vedrørende epidemiske husdyrsygdomme, T. 51 18/3-29

## 3.5. Umhvørvi

1990 9/8 T.81. Konv. 1985 om beskyttelse af ozonlaget.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1984 8/10 | T96 Konv. Med tilhørende protokol om forebyggelse af forurening fra skibe | | |
| | B.47. | 15.05.-86. | Om andre landes tiltræden af konventionen med protokol |
| | T.35. | 03.04.-74. | Konv. Oslo 1972 om havforurening ved dumpning fra skibe og luftfartøjer, 109 26/11-76 (Færøerne) |
| | T.15. | 06.02.-76. | Kon. London 1972 om havforurening ved dumpning, |
| 110 26/11-76 | | | |
| | T.3. | 11.01.-80. | 80 Kon. Paris 1974 om landbaseret havforurening. |
| | T.64. | 14.06.-90 | Ændr. 1986. |
| | T.138. | 05.12.-91. | Andre landes tiltrædelse. |
| 1994 18/9 | T.89 Klimaændringer | | |

## 3.6. Ferðsla

| | |
|---|---|
| 1973 28/2: | T. 20 Konv. Med Storbritannien om godstrafik ad vej, 100 2/11-83. |
| 1973 30/4: | T. 39 Overenskomst med Spanien om straf for færdselsforseelser. |

## 3.7. Flogferðsla

| | |
|---|---|
| 1939 27/4: | T. 9 Konvention om frihed for arrest og forbud i luftfartøj. |
| 1948 30/3: | T. 17 Konvention om civil luftfart, 43 10/8-55, 54 18/10-62. |
| | T. 16 16/5-38 Konvention om regler for international luftbefordring. |
| | T. 60 16/12-48 Konvention om transitret for internationale luftruter. |
| 1990 9/8: | T. 83 Protokol til bekæmpelse af ulovlige voldshandlinger i lufthavne. |
| 1934 29/5: | B. 184 U.S.A. (luftfartsoverenskomst). |
| 1952 31/7: | T. 36. Storbritannien. (luftfartsoverenskomst). |
| 1996 23/5 | B. 52. Belarus (luftfartsoverenskomst) |
| 1997 4/12 | B. 124 Mongoliet (luftfartsoverenskomst) |

Nevndu sáttmálar eru teir einastu, sum eru lýstir at galda í Føroyum, og eru at finna í „Færøsk Lovregister.“ Í sambandi við fullveldi eru nevndu sáttmálar als ikki nøktandi. Neyðugt verður at gerast partur av fleiri øðrum sáttmálum.

Mælt verður til, at Føroyar taka undir við Chicagosáttmálanum og gerast limur í ICAO. Við hesum átaka føroyingar sær somu fólkarættarligu ábyrgd, sum nú liggur á Danmark.

Danmark rindar ICAO 1,3 mió. kr. í árligum limagjaldi. Statens Luftfartsvæsen upplýsir, at gjaldið er ásett eftir bruttotjóðarúrtøkuni hjá limalondunum, og merkir tað, at Føroyar skuldu goldið um leið 11 tús. kr. um árið. Til at røkja henda limaskap og fyrisitingarútreiðslur í hesum sambandi krevjast leysliga mett 200 tús. kr. árliga.

## 3.8. Postmál

1. UPU Constitution
2. Universal Postal Convention

Sum fullveldi skulu Føroyar verða limur í UPU, (Union postale universelle), ið er alheimsfelagsskapur fyri postflutning. Limaskapur í

UPU kemur helst at kosta um leið 50.000 kr. Árliga, (Ísland 190.000 árliga). Harafturat koma kanska viðkomandi fundir og ráðstevnur, ið eru við longri millumbili.

## 3.9. Handil og vinna

| | |
|---|---|
| 1923 26/3 | B. 97-98. Meterkonv. 1875 med ændr. 1921 |
| 1963 5/7 | T. 16. Konv. om højhedsret over kontinentalsokkel, 37 21/8-64 |
| 1967 6/3 | T. 20. Tredje internationale tinovernskomst |
| 1980 15/9 | T. 78. Kontinentalsokkel og fiskerizone mellem Færøerne og Norge. |

WTO-sáttmálin
Heimshandilsfelagskapurin WTO er altjóða felagsskapur, sum fevnir um bæði vøruhandil, tænastuhandil og upphævsrættindi. WTO-sáttmálin kom fyri GATT-sáttmálan, og kom í gildi 1. januar 1995. Í WTO eru 130 limalond. Sáttmálin er tí at rokna sum ein alheims sáttmáli við greiðum stevnumiðum fyri altjóða handil.

Føroyar eru, sum er, partur av danska limaskapinum í WTO. Tískil hava vit bundið okkum til at fylgja meginreglunum í sáttmálanum í lógarsmíði á matvøru- og heilsuøkinum.

Umframt almennar reglur fyri vøruhandli, eru tveir sáttmálar undir WTO, sum hava týdning fyri matvørur og heilsufrøðilig viðurskifti. Annar er SPS-sáttmálin, (Sanitary and Phytosanitary Measures), ið snýr seg um tiltøk til at vísa fyrilit fyri fólki, djórum og plantuvøkstri. Hin sáttmálin hevur heitið „Technical Barriers to Trade“ og snýr seg um tekniskar handilsforðingar, sum ikki eru tiknar við í SPS-sáttmálan. Her er talan um eitt nú ásetingar um merking, góðskureglur og fyrilit fyri brúkaranum.

Verða Føroyar fullveldi, er WTO-sáttmálin ein av teimum sáttmálum, sum ikki kemst uttanum.

Verður hugsað um, hvat tað kostar føroyingum at vera við sjálvir, verður víst til metingarnar hjá Løgmansskrivstovuni, um hvat føroysk luttøka í neyðugum altjóða samstarvi kemur at kosta.

## 3.10. Fjarskifti

Um vernd av sjókaðalum.
*Konvention af 29. april 1958 om det åbne hav*
*Konvention om Den kontinentale Sokkel af 29. april 1958*

*Konvention om undersøiske telegrafkablers beskyttelse af 18. nov 1885.*

Her skulu Føroyar boða frá, at tær taka undir við sáttmálunum. Hesir sáttmálar hava ongar beinleiðis útreiðslur við sær.

*ITU's konstitution, konvention og fakultative protokol fra 22. december 1992*

Hesin sáttmálin setir karmar fyri alheims fjarskiftisfelagsskapin ITU, sum flest øll heimins lond eru við í. Felagsskapurin leggur rammurnar fyri, hvussu alheims frekvensspektrið verður sundurlutað, er við til at menna og gera rammur fyri nýggjum tænastum og ásetir annars standardir o.s.fr. Tað er eyðsæð, at Føroyar, við okkara fyritreytum, fólkatali, vinnu og landafrøðiligu viðurskiftiunum, ikki hava tey heilt stóru hjartamálini her. Tó er greitt, at neyðugt er at verða limur í felagsskapinum fyri at kunna fylgja við í menningini. Úr Íslandi skilja vit, at har verður valt frá sak til sak, um tað ávirkar teir, og teir tí vilja vera við. Annars er vanligt, at Norðurlond samstarva um hesi viðurskiftini, soleiðis at eitt av størru Norðurlondunum fær fulltrú frá hinum.

Ein minstamarks limaskapur í ITU, umframt í økisfelagsskapunum CEPT (Commitee Europenne de Post et Telegraph), ERC (European Radiocommunication Committee) og ECTRA (European Committee for Telecommunication Regulatory Affairs), kemur at kostað um leið 1/8 Unit, svarandi til um leið 150.000 um árið, umframt luttøku á fundum o.s.fr. Luttøkan á fundum kann verða hildin innan fyri verandi fíggjarkarmar hjá Fjarskiftiseftirlitinum, ið er inntøkufíggjað virksemi.

*IMO-sáttmálin (sí meira undir útgreiningunum hjá Fiskimálastýrinum).*

IMO, (International Maretime Organisation), er altjóða havfelagsskapur undir ST. Ein av nevndunum hjá IMO er Maritime Safety Committee, ið m.a tekur sær av Radiocommunications and Search and Rescue, (COMSAR).

Hetta er tað, ið nevnt verður radiogrundað neyð- og trygdartænasta á havinum. Hesa tænastu rindar Tele Danmark A/S fyri sum part av teirra veitingarskyldu, men sjálva tænastuna rekur Føroya tele, ið fær um leið 6 mió. árliga fyri hetta. Menningin á økinum er stór, og alt meira verður farið yvir til at nýta GMDSS trygdarútgerð, ið fer yvir fylgisvein, sum verður rikin av fylgisveinasamtøkum, og tískil verður goldin av einstaka brúkaranum. Tó er sannlíkt, at tænastan verður veitt eini 10 ár afturat, men ikki er óhugsandi, at tað kundi verðið gjørt fyri eina minni upphædd. Gjaldið fyri limaskap í IMO verður sett eftir, hvussu nógv bruttoregistartons handilsflotin hjá hvørjum

landi er afturímóti handilsflotanum í øllum heiminum. Sí meira undir útgreiningunum hjá Fiskimálastýrinum.

Konvention fra 3. september 1976 om den internationationale maritime Satellit-organisation INMARSAT og den dertil knyttede driftsoverenskomst.

Konvention af 15. juli 1982 om Den europæiske Telekommunikationssatellit-Organisation EUTELSAT og den dertil knyttede driftsoverenskomst.

Overenskomst af 20. august 1971 om den internationale telekommunikationssatellit-organisation INTELSAT og den dertil hørende driftsoverenskomst.

Neyðugt er at verða limur í hesum felagsskapum í sambandi við altjóða fjarskifti, neyð, trygd o.a. Limaskapur er ókeypis. Kostnaður at fara á fundir kann verða hildin innan fyri verandi fíggjarkarmar hjá Fjarskiftiseftirlitinum.

# Kapittul 4

## Formligt og óformligt samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar

Lýsing av fyrisiting, lóggávu og fígging og krøvum til fyrisiting, lóggávu og fígging
Stovnar undir Vinnumálastýrinum hava lýst samstarv, sum teir hava við danskar myndugleikar og stovnar. Talan er bæði um formligt samstarv, t.e. skrivliga avtalað millum partarnar, og óformligt samstarv, t.e. munnliga avtalað millum partarnar.

### 4.1. Matvøru- og umhvørvismál

Heilsufrøðiliga starvsstovan
1. Formligt samstarv
Lov om erhvervsfremme
Kemisku kanningarstovurnar verða løggildar, (akkrediteraðar), við heimild í donsku vinnuframalógini, sum er sett í gildi fyri Føroyar. Danskur stovnur, nevndur DANAK, fremur hesa løggildan, og kostar hetta árliga 70.000 kr. Verður hetta føroyskt, er neyðugt, at onkur í Føroyum hevur umsitingina av hesum. Í Íslandi hevur Løggildingarstovan hesa heimild, og arbeiðir hon í tøttum samstarvi við SWEDAC í Svøríki. Mett verður, at eykakostnaðurin av at fáa løggildanina undir føroyskt málsræði verður uml. 50.000 kr. um árið.

2. Óformligt samstarv
Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur nógv, óformligt samstarv við danskar stovnar. M.a. hesar:

Miljøstyrelsen við tilhoyrandi stovnum
Veteriner- og fødevaredirektøratet
Dansk Polacenter
DMU (Danmarks miljøundersøgelser)

Í fakligum fyrispurningum og fakligum uppgávum, sum vit ikki megna at greiða sjálvi, fæst hjálp og vegleiðing frá hesum stovnum. Ilt er at siga, hvat samstarvið er vert í krónum, men tað hevur ómeta-

ligan stóran týdning, og at samstarv av tílíkum slagi eisini er við aðrar norðurlendskar stovnar. Ongar fíggjarligar skyldur eru í slíkum samstarvi.

Í norðurlendskum høpi er Heilsufrøðiliga starvsstovan umboðað sum partur av donsku sendinevndini í ymsum arbeiðsbólkum og ætlanum. Her er t.d. vert at nevna NMKL (Nordisk MetodikKometé for Levnedsmidler), AMAP, AMP og CODEX. Broytist ríkisrættarliga støðan mótvegis Danmark, skal verða roknað við eykakostnaði í hesum samstarvi sum sjálvstøðug tjóð. Uml. 100.000 til 200.000 kr. árliga.

## 4.2. Landbúnaðarroyndir

Almennar royndir
1. Formligt samstarv
Einki

2. Óformligt samstarv
Samstarvar við Meterologisk institut um veðurlagsupplýsingar, við donsku landbúnaðarráðgevingina og við aðrar danskar royndarstovur. Almennar royndir fáa næstan øll kanningarúrslit ókeypis.

## 4.3. Veterinermál

Landsdjóralæknin
1. Formligt samstarv
Einki

2. Óformligt samstarv
Landsdjóralæknin hevur óformligt samstarv við veterinerar stovnar í Danmark. Samskiftið byggir á kenningar, sum landsdjóralæknin hevur í donsku veterinerskipanini. Stovnar, talan er um, eru:
Den Kgl. Veterinær- og Landbohøjskole: Ráðgeving um djórasjúkur o.a.
Veterinær- og Fødevaredirektoratet: Ráðgeving um veterinerlóggávu, arbeiði við djórasjúkum, veteriner matvørueftirlit o.a.
Statens Veterinere Sundhedsråd: Ráðgeving um veterinert rættarmedisin, djóravernd o.a.
Statens Veterinere Serumlaboratorium: Diagnostikk av djórasjúku, diagnostikk og arbeiði við fiskasjúkum.

Broytist ríkisrættarliga støða Føroya mótvegis Danmark, hevur hetta ikki við sær eykakostnað fyri landsdjóralæknaembætið. Tó so, at neyðugt verður hjá Føroyum at fáa sjálvstøðuga umboðan í Office

International des Épizooties, (O.I.E.), tí hetta hevur týdning fyri eftirlit við fiskasjúkum í alivinnuni, har størri, altjóða handil við fiskavøru setir størri krøv til dagførda vitan og sjúkufráboðanir ímillum londini fyri at sleppa undan ringum umfarsjúkum.

## 4.4. Skógrøktarmál

Skógrøkt landsins
Formligt samstarv
Skógrøkt landsins hevur gjøgnum Føroya læruráð gjørt avtalu við donsku yrkisútbúgvingarráðini fyri plantuútbúgvingum. Avtalan merkir, at skúlagongdin hjá yrkisgartnarum í Føroyum er á donskum yrkisskúla.

Avtala er við Plantedirektoratet um eftirlit við uttandura plantutilfari, ið fer úr Føroyum til Danmarkar. Higartil hevur avtalan bert kravt smávegis arbeiðsorku.

Óformligt samstarv
Stovnurin samstarvar við nógvar ymiskar danskar stovnar, m.a. hesar:
Serdeildina Arboretet í Hørsholm undir Den Kgl. Veterinær- og Landbohøjskole:
Botaniks Have/Botanisk institut, Københavns Universitet
Forskningscentret for Skov- og Landskab – FSL: Ráðføring og aðra vitan.
Skov- og Naturstyrelsen: Ráðgeving.
AMU: Fólk frá Skógrøktini hava verið á yrkisskeiði í donsku AMU-skipanini.
Plantedirektoratet: Ráðgeving, tá ið plantur verða fluttar til Føroya úr útheimi.

Óformliga samstarvið er kostnaðarmikið og fakliga krevjandi. Ilt er at meta um kostnaðin, um føroyingar sjálvir skulu rinda fyri hesa vitan.

## 4.5. Matrikulerings- og útskiftingarmál

Matrikkulstovan
Formligt samstarv
Matrikkulstovan hevur samstarvssavtalu við Kort- og Matrikelstyrelsen, sum hoyrir til danska Íbúðarmálaráðið. Avtalan er um nýkortlegging av Føroyum. Síðan 1980 hevur Matrikkulstovan latið arbeiðsmegi til hetta samstarv, og fram til 1995 starvaðust tvey fólk á Matrikkulstovuni burturav við hetta. Síðan 1995 hevur uml. 1/2 starv verðið avsett. Annars er kortlegging danskt málsøki.

Geodædiskt grundarlag: Talan er um danskt øki. Endurnýggjar Kort- og Matrikelstyrelsen geoidina, so at hæddarnetið kann verða styrkt við fylgisveinamátingum, fer íløgan til GPS-sett at verða uml. 300 tús. kr. Raksturin fer at verða uml. 100 tús. kr. árliga av hesi skipan.

Kortframleiðsla- og útgáva: Danskt øki. Talan er um kort í ymiskum støddum. Kortini verða hildin við líka eftir upplýsingum frá Landsverkfrøðinginum, Matrikkulstovuni og kommununum. Sum er, verða kortini gjørd við hond. Hetta er ógvuliga dýrt, tí upplagið av hvørjum korti bert er um 400 tús. kr.

Fotoreproduktión: Skal Matrikkulstovan hava størri fotoavrit av loftmyndum, má stovnurin venda sær til Kort- og Matrikelstyrelsen.

Altjóða sáttmálar og samstarvsstovnar: Verast má uppi í altjóða samstarvi, um ríkisrættarliga støða Føroya broytist.

Sjókort, uppmáling og framleiðsla: Talan er um danskt øki.

Verður ríkisrættarliga støða Føroya broytt, merkir hetta, at kortlegging verður føroyskt málsøki. Í sambandi við hetta mugu íløgur verða gjørdar fyri uml. 1,7 mió.kr., og árligi raksturin av hesum fer at liggja um tær 1,5 mió. kr. Her er roknað við einum kortteknara, einum landmátara og einum telduserfrøðingi.

Óformligt samstarv
Einki.

## 4.6. Arbeiðseftirlitsmál

Arbeiðseftirlitið
Formligt samstarv
Trukk- og kranførarar: Skrivlig avtala er millum Arbeiðseftirlitið og danska arbeiðseftirlitið um førleikaprógv hjá trukk- og kranførarum. Praktisku umstøðurnar í Føroyum gera, at Føroyar fáa ikki skipað fyri kranføraraskeiðum. Føroyingar eru tí á donskum skeiðum. Skúlin er ókeypis, og danska arbeiðsávísingin rindar luttakarunum samsýning fyri lønarmiss.

Justervæsenet, (Force Institutterne): Avtalað er millum Landsstýrið og Justervæsenet, at teirra starvsfólk, sum hevur eftirlitið í Føroyum av øllum vektum og málarum, (oljupumpum), sambært galdandi lóg

hevur tilhald á Arbeiðseftirlitinum. Starvsfólkið nýtir 65% av arbeiðstíðini til eftirlitið, og 35% fara til annað arbeiði á Arbeiðseftirlitinum.

Óformligt samstarv
Reglur um arbeiðseftirlit: Landsstýrið hevur við heimild í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mei 1974 sett eina rúgvu av donskum kunngerðum í gildi fyri Føroyar av tí sannroynd, at vit høvdu ikki megnað at átikið okkum hesa uppgávu í Føroyum, tí hetta hevði kravt tveytaldar løgfrøðingar. Arbeiðseftirlitið hevur ongan løgfrøðing í starvi. Nevndu kunngerðir eru tillagaðar til ES-áseting av sama slag, so at galdandi reglur í Føroyum samsvara altjóða reglum.

Eftirútbúgving: Føroysku eftirlitsfólkini fáa ókeypis eftirútbúgving á danska arbeiðseftirlitinum. Hesar eftirútbúgvingar hava stóran týdning.

Arbejdsmiljøinstituttet: Føroyska arbeiðseftirlitið kann á jøvnum føti við danska arbeiðseftirlitið nýta vitan og sertænastur frá Arbejdsmiljøinstituttinum.

## 4.7. Ferðslumál

Bileftirlitið
Formligt samstarv
Einki

Óformligt samstarv
Færdselsstyrelsen: Floksgóðkenningar og meginfloksgóðkenningar: Allir bilar, sum verða gjørdir til sølu í Føroyum og Danmark, skulu verða meginfloksgóðkendir, áðrenn teir kunnu verða skrásettir. Danska Færdselsstyrelsen hevur deild, har 10 til 15 fólk burturav arbeiða við hesum. Hetta er tekniskt krevjandi arbeiði og sera umfatandi, av tí at hvørt bilslag og merki sær skal verða eftirkannað, góðkent og tekniskt lýst.

Stakfyriskipanir fyri akfør: Stakfyriskipanirnar hjá danska Færdselsstyrelsen eru við kunngerð settar í gildi fyri Føroyar. Talan er um umfatandi lógarverk, sum regulerar og lýsir øll teknisk krøv og viðurskifti, sum viðvíkja bilum. Stakfyriskipanirnar verða dagførdar so hvørt og givnar út í bók á hvørjum ári.

Ferðsluspurningar sum heild: Umframt á nevndu økjum verður samstarvað um ferðsluspurningar sum heild, eins og samráðingar um sínamillum góðkenningar av ferðslufrálæru hjá báðum stovnum.

Statens Bilinspektion: Fakligt samstarv. Statens bilinspektion er eftirlitsmyndugleiki í Danmark, eins og Bileftirlitið er í Føroyum. Danir hava munandi fleiri starvsfólk enn Bileftirlitið, og harvið er førleiki teirra betri og breiðari, og hetta kemur Bileftirlitinum til góðar hvønn dag.

Ríkisløgreglan: Ferðslumál. Í Danmark er løgreglan skrásetingarmyndugleiki fyri akfør. Nógv samskifti og samstarv fer dagliga fram millum Bileftirlitið og donsku løgregluna í sambandi við bilar, sum verða fluttir millum londini.

Koyrikortsmál. Í Danmark er løgreglan koyrikortsmyndugleiki. Í sambandi við at fólk flytur millum londini, er tætt samstarv um koyrikortsmál.

Heilsustýrið: Koyrikortsmál. Í sambandi við koyrikortsmál eru árliga uml. 500 mál, sum krevja víðkaða, heilsuliga sakarviðgerð. Málini verða send landslæknanum, (danskur myndugleiki í Føroyum), til støðutakan, og av hesum verða uml. 100 send danska heilsustýrinum til viðgerðar og støðutakan, av tí at landslæknin sær seg ikki føran fyri at viðgera málini.

Samstarvið er kostnaðarmikið og fakliga krevjandi. Ilt er at meta um fíggjarligu og fakligu orkuna, sum skulu til, um málini verða føroysk.

## 4.8. Postmál

Postverk Føroya
Formligt samstarv
PostDanmark: Skrivlig avtala um avrokning og kvalitetsrelateraða avrokning av brævaposti. Avtalurnar eru ikki kostnaðarmiklar.
Føroya vegna tekur PostDanmark sær av altjóða samskiftinum við heimspostfelagið UPU, Evropeiska postfelagsskapin og NordPost. Hetta samstarv verður heldur ikki mett at vera kostnaðarmikið.

Rammuavtala um peningahandlar við 15 undiravtalum. Avtalað er, hvørjar tænastur, samstarvað verður um. Avtalan er ikki kostnaðarmikil.

Handilsavtala millum PostDanmark og Postverkið um, at føroyskar frímerkjaársmappur verða seldar í Danmark, og at Føroyar selja donsk frímerkju í USA ígjøgnum føroysku umboðini har.

Óformligt samstarv
Einki

## 4.9. Ferðavinnumál

Ferðaráð Føroya
Formligt samstarv
Danmarks Turistrråd: Avtala er við Danmarks Turistråd um marknaðarføring og messuluttøku. Avtalan kostar 241 tús. kr. um árið. Avtalan hevur við sær, at Føroyar fáa fría útbreiðslu av høvuðsfaldara, og at Føroyar verða profileraðar í faldara hjá Danmarks Turistråd. DT samskipar eisini føroyska luttøku á WTM-messuni í London.

Óformligt samstarv
Einki

## 4.10. Niðurstøður

Lýsingin av formliga og óformliga samstarvinum hevur tikið støði í samstarvinum millum føroyskar og danskar stovnar.

Grundleggjandi byggir meginparturin av samstarvinum á tey starvssambond, sum fólk í føroysku og donsku umsitingini hava. Harafturat hava føroyskir stovnar nógv samskifti ígjøgnum norðurlendska samstarvið, har føroyskir og aðrir samsvarandi stovnar hittast.

Samstarvið, sum nú er, hevur stóran týdning fyri føroysku stovnarnar. Danskir stovnar veita teimum føroysku nógva, fakliga hjálp, sum er ring at kostnaðarmeta. Meginparturin av samstarvinum er óformligt, t.e. ikki lýst í nakrari avtalu millum Føroya og Danmarkar. Tað er umráðandi, at hetta samstarv heldur fram, hóast ríkisrættarliga støðan millum londini verður broytt. Samstarvinum eigur tí at verða tryggjað eitt framhald í einum protokollati millum londini í sambandi við samráðingar.

# Kapittul 5

## Mál, sum Danmark umsitur, og sum natúrliga kunnu verða skipað undir tey ávísu málsøkini og møguligar samstarvsavtalur

Kortlegging, t.e. at gera kort av Føroyum, er uppgáva hjá Kort- og Matrikelstyrelsen. Henda uppgáva kann verða løgd undir Vinnumálastýrið og Matrikkulstovuna.

Løggildi, (akkreditering), verður veitt við heimild í danskari vinnuframalóg, sum eyðsýnt ikki kann vera í gildi, um ríkisrættarstøðan verður broytt. Í Íslandi er ein løggildisstova, (akkrediteringsstovnur), sum t.d. løggildar kemiskar kanningarstovur. Í Føroyum kundi tílíkur stovnur verðið skipaður undir ein av stovnum Vinnumálastýrisins. Samstarvsavtala kundi verðið gjørd við annað land um løggildisskipan.

Einkarætt og mynsturlóggávu umsita danska patentdirektoratið o.o. Í Føroyum kundi Skráseting Føroya umsitið økið, men neyðugt verður helst at gera samstarvsavtalu við onnur lond um t.d. patentrættin, tí neyvan er grundarlag undir einum patentstovni í Føroyum.

Havumhvørvisvernd hava danskir myndugleikar umsitið. Nú økið er vorðið føroyskt, er neyðugt, at landsstýrismaðurin í umhvørvismálum býtur uppgávurnar millum ymsu aðalstýrini.

Radiosamskifti, herundir serstakliga altjóða samstarv og frekvensfyrisiting, verður heilt lagt saman við Fjarskiftiseftirlitinum, ið er stovnur undir Vinnumálastýrinum. Tørvur er á einum starvsfólki við góðum førleika.

Ilt er at siga, hvør skal umsita tilbúgvingarøkið av røttum, um málsøkið, sum er partvíst føroyskt og partvíst danskt, skal verða føroyskt burturav. Tilbúgving er sundurbýtt millum land og kommunur, umframt at hon fevnir um fleiri aðalstýri. Tilbúgvingarøkið fevnir m.a. um sjúkrahúsverkið (Almanna- og heilsumálastýrið), løgregluna,

Vaktar- og bjargingartænastuna (Fiskimálastýrið), Brunamál (Vinnumálastýrið, Brunaumsjón landsins,) umframt privatar felagskapir. Stórur partur av tilbúgvingarøkinum liggur hjá kommununum, men okkurt slag av samskipan má vera. Av tí at økið fevnir um so mikið nógv ymisk aðalstýri, verður tað helst hvørt einstakt stýri, ið hevur ábyrgd av landstilbúgvingini á sínum øki. Fyriskipanir verða so gjørdar um, at ein leiðslubólkur kann taka um endan, um stórar vanlukkur koma fyri, sum krevja samskipaða hjálp av einum stað. Fyrisitingin av tilbúgvingarøkinum verður lítið og einki ávirkað, um tað, sum eftir er av málsøkinum, kemur undir føroyskt málsræði. Kemur løgreglan undir føroyskt málsræði, verða tilbúgvingaruppgávurnar hjá teimum væntandi lítið broyttar.

Við fullveldi verða lóggávuvald og fyrisitingarvald á málsøkinum føroysk, og yvirvaldsrætturin yvir loftrúminum føroyskur. Vinnumálastýrið, (Samskiftisdeildin), eigur at umsita flogferðslumál. Loftferðsla verður regulerað sambært teimum treytum, sum loftferðslustovnur Sameindu tjóða, ICAO, setir, eins og eftir altjóða sáttmálum, ES-reglum og loftferðslulógini, sum aftur lýkur tær treytir, sum altjóða og fleirtjóða felagskapir seta flogferðsluni. Kemur lóggávuvaldið undir føroyskt málsræði, ber t.d. til at fylgja donsku rættarreglunum, við ávísum tillagingum til føroysk viðurskifti. Hetta hevur ikki fyrisitingarligar avleiðingar við sær, tí hetta er mannagongdin, sum nú verður nýtt. Mælt verður til, at Føroyar taka undir við Chicagosáttmálanum og gerast limur í ICAO. Við hesum átaka føroyingar sær somu fólkarættarligu ábyrgd, sum nú liggur á Danmark. Í fyrsta umfari kunnu føroyingar lata íslendingum flogtrygdartænastuna at umsita. Íslendingar umsita, sum er, føroyska loftrúmið vegna Danmark. Avtalan verður galdandi, til annað verður avrátt. Í framtíðini fáa føroyingar møguleika fyri at veita flogtrygdartænastuna, um vit eru sinnaðir til tess, og treytað av, at ICAO tekur undir við hesum. Danmark rindar 1,3 mió. kr. í árligum limagjaldi til ICAO. Statens Luftfartsvæsen, (SLV), upplýsir, at gjaldið er ásett eftir bruttotjóðarúrtøkuni hjá limalondunum, og merkir tað, at Føroyar bert skulu gjalda umleið 11 tús. kr. um árið. Til at røkja henda limaskap og fyrisitingarútreiðslur í hesum sambandi krevjast leystliga mett 200 tús. kr. um árið. Flogvøllurin í Vágum, sum SLV rekur, rindar um leið 2,9 mió. kr. um árið yvir raksturin fyri allar tænastur, sum Loftferðslueftirlitið og Flogtrygdartænastan veita á føroyskum øki. Kemur flogvøllurin undir føroyskt málsræði, kann verða neyðugt at gera avtalu við SLV, (Ferðslumálaráðið), um framhaldandi at veita tær tænastur, sum Vága floghavn nú rindar SLV. Hetta hevur ongan meirkostnað við sær. Neyðugt verður at gera samstarvsavtalu við skaðanevndina, (Havarikommissionen for

civil luftfart), soleiðis at hon eisini kannar tilburðir, um eitt føroyskt skrásett flogfar skuldi verið fyri óhappi. Verður goldið eftir íbúgvatali í londunum, kostar tænastan bert 41 tús. kr. árliga.

Samstørv, sum stovnar undir Vinnumálastýrinum hava við danskar myndugleikar, eiga at halda áfram ótarnað. Hetta hevur stóran týdning fyri stovnarnar, tí í flestu førum fáa teir ókeypis ráðgeving ella tænastur úr Danmark. Sum partur av sáttmála millum Danmarkar og Føroya eigur at verða gjørt eitt protokollat, sum tryggjar, at samstarvið kann halda áfram.

# Undirvísingar- og mentamálastýrið

# Innihald

KAPITTUL 1 . . . . . . . . 214
1. Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar . . . . . . 214
  1.1. Bløð . . . . . . . . 214
  1.2. Fjølmiðlaábyrgd . . . . . . . . 215
  1.3. Kongliga Leikhúsið . . . . . . . . 216
  1.4. Fólkaskúlin . . . . . . . . 217
  1.5. Tænastumenn í fólkaskúlanum . . . . . . . . 218
  1.6. Ymsar broytingar í skúlaverkinum . . . . . . . . 218
  1.7. Frítíðarundirvísing . . . . . . . . 218
  1.8. Handilsskúlar, tekniskir skúlar og maskinmeistaraskúlar . . 219
  1.9. Læraraútbúgving . . . . . . . . 220
  1.10. Upphavsrættur . . . . . . . . 221
  1.11. Einkarættur og upphavsrættur . . . . . . . . 222
  1.12. Niðurstøður . . . . . . . . 224

KAPITTUL 2 . . . . . . . . 225
2. Føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar . . . . 225
  2.1. Skjalasavn . . . . . . . . 225
  2.2. Niðurstøður . . . . . . . . 225

KAPITTUL 3 . . . . . . . . 226
3. Sáttmálar . . . . . . . . 226

KAPITTUL 4 . . . . . . . . 227
4. Formligt og óformligt samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar . . . . . . . . 227
  4.1. Undirvísingar- og mentamálastýrið . . . . . . . . 227
  4.2. Sernámsdepilin . . . . . . . . 233
  4.3. Føroya Læraraskúli . . . . . . . . 233
  4.4. Náttúrugripasavnið . . . . . . . . 234
  4.5. Føroya Landsbókasavn . . . . . . . . 236
  4.6. BIOFAR . . . . . . . . 237
  4.7. Føroya Landsskjalasavn . . . . . . . . 237
  4.8. Føroya Fornminnissavn . . . . . . . . 238
  4.9. Granskingarráðið . . . . . . . . 238
  4.10. Listasavn Føroya . . . . . . . . 239
  4.11. Niðurstøður . . . . . . . . 239

KAPITTUL 5 .......................................... 241
5. Mál, sum Danmark umsitur og sum natúrliga eiga at vera
undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum ............. 241
5.1. Kirkjan ........................................ 241

KAPITTUL 6 .......................................... 248
6. Á hesum økjum eiga samstarvsavtalur at verða gjørdar ...... 248
6.1. Rættindini hjá føroyingum til danskan lestrarstuðul ..... 248
6.2. Atgongd til hægri lestur í Danmark og hinum Norður-
londunum ........................................ 249
6.3. Lærlingaútbúgving ............................... 249
6.4. Onnur øki ....................................... 250
6.5. Niðurstøður ..................................... 250

KAPITTUL 7 .......................................... 251
7. Fylgiskjøl ........................................ 251
7.1. Yvirlit yvir danskar lógir, sum eru settar í gildi fyri Føroyar 251
7.2. Sáttmálar og konvenitíónir galdandi millum Danmark og
onnur lond á undirvísingarøkinum .................... 255

# Kapittul 1

## Danskar rættarreglur, sum eru settar í gildi fyri Føroyar

Niðanfyri verða lýstar tær donsku rættarreglurnar, sum eru settar í gildi fyri Føroyar. Lýsingin fevnir um tríggjar partar: Sjálva lógina, hvør hevur fyrisitingarligu ábyrgdina smb. lógini og at enda, hvør ber møguligan kostnað av lógini.

Endamálið við at lýsa donsku rættarreglurnar, er at fáa eina greiða mynd av, hvørja ávirkan møguligt føroyskt fullveldi fær fyri lóggávu, fyrisiting og fígging. Kapittul 2 er býttur í fleiri partar, sum hvør viðger eina ávísa lóg. Kapittul 3 viðger føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar. Í kapitli 4 verður stutt greitt frá støðuni viðvíkjandi sáttmálum, og í kapitli 5 verður tað formliga og óformliga samstarvið við Danmark lýst. Kirkjan verður viðgjørd í kapitli 6, og í kapitli 7 verður skotið upp, á hvørjum økjum samstarvsavtalur eiga at verða gjørdar. Í kapitli 8 verða fylgiskjøl løgd fram.

### 1.1. Bløð

*L. nr. 147 af 13.04.1938 om pressens brug, som senest ændret ved L. nr. 524 af 28.11.1969*

Lóggáva
Lógin fevnir bara um prentaðar fjølmiðlar, og ongar reglur eru í lógini um elektroniskar fjølmiðlar, sum t.d. útvarp og sjónvarp. Í galdandi fjølmiðlalóg er rættarliga ábyrgdin av tí, sum kemur á prent, hjá blaðstjóranum, men í ávísum førum kann rithøvundurin, um hann er nevndur, koma undir ábyrgdina. Annars hevur blaðstjórin ta lutbundnu ábyrgdina.

Hetta lógarøkið er felagsmál, og í Danmark er komin nýggj fjølmiðlalóg nr. 348 frá 5. juni 1991, sum er broytt við lóg nr. 1065 frá 23. desember 1992, § 79. Lógin kann eftir § 59 verða sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan við neyðugum broytingum fyri serlig føroysk viðurskifti.

Eftir nýggju fjølmiðlalógini eru somu ábyrgdarreglur galdandi fyri allar fjølmiðlar, bæði fyri revsing og endurgjaldsábyrgd. Eftir nýggju lógini er somuleiðis álagt fjølmiðlunum at nýta góðan fjølmiðlasið, t.e. at vísa etiska ábyrgd. Klagur um ikki at hava hildið etiskar reglur kunnu eisini verða kærdar til fjølmiðlanevndina.

Í 1996 varð uppskot um ríkislógartilmæli lagt fyri løgtingið um nýggja fjølmiðlaábyrgdarlóg (løgtingsmál nr. 82/1996). Uppskotið varð samtykt, og verður nú bíðað eftir, at ríkislógartilmælið kemur aftur úr Danmark. Í donsku fjølmiðlaábyrgdarlógini stendur í § 55, stk. 2, at lóg nr. 147 frá 13. apríl 1938 om pressens brug fer úr gildi. Tá ið lógin um fjølmiðlaábyrgd kemur í gildi í Føroyum, verður henda lóg sett úr gildi.

Fyrisiting
Tað danska Løgmálaráðið velur teir tríggjar limirnar í „berigtigelsesnævnet". Bøtur, sum verða dømdar eftir hesari lóg, verða goldnar í danska statskassan, og mál um lógarbrot verða viðgjørd sum løgreglumál. Umframt hetta stendur einki í lógini um, hvør fyrisitingarmyndugleikin er.

Fígging
Í viðmerkingunum til fjølmiðlaábyrgdarlógina stendur, at uppskotið kostar einki fyri landskassan, og grundað á hetta, verður ikki mett, at málið kostar nakað.

## 1.2. Fjølmiðlaábyrgd

*L. nr. 348 af 06.06.1991 om medieansvar við seinni broytingum er samtykt í Løgtinginum, men er í løtuni í danska Løgmálaráðnum. Lógin skal avloysa L. nr. 147 af 13.04.1938 om pressens brug.*

Í 1996 varð uppskot um ríkislógartilmæli lagt fyri løgtingið um nýggja fjølmiðlaábyrgdarlóg (løgtingsmál nr. 82/1996). Uppskotið varð samtykt, og verður nú bíðað eftir, at ríkislógartilmælið kemur aftur úr Danmark.

Lóggáva
Eftir nýggju fjølmiðlalógini eru somu ábygdarreglur galdandi fyri allar fjølmiðlar, bæði fyri revsing og endurgjaldsábyrgd. Eftir nýggju lógini er álagt fjølmiðlunum at nýta góðan fjølmiðlasið, t.e. at vísa etiska ábyrgd. Klagur, um ikki at hava hildið etiskar reglur, kunnu eisini verða kærdar til fjølmiðlanevndina.

Um Føroyar fáa fullveldi, eigur føroysk fjølmiðlaábyrgdarlóggáva at verða gjørd, sum hevur líknandi innihald, sum tann danska.

Fyrisiting
Í ríkislógartilmælinum verður § 41 orðað soleiðis: „*Der oprettes et særligt færøsk Pressenævn bestående af en formand og en næstformand og 6 andre medlemmer, der beskikkes af justitsministeren. Formanden og næstformanden, der skal være jurister, beskikkes efter udtalelse fra sorenskriveren, 2 medlemmer beskikkes efter udtalelse fra Færøernes Journalistforbund (Blaðmannafelagið), 2 medlemmer beskikkes til at repræsentere de redaktionelle ledelser i den trykte presse og radio og fjernsyn efter udtalelse fra Færøernes Akademi.*"

Eftir hesum at døma er tað danski løgmálaráðharrin, sum er fyrisitingarmyndugleikin.

Ein føroysk fjølmiðlaábyrgdarlóg eigur at verða fyrisitin av Lógardeildini á Løgmansskrivstovuni ella í Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Mett verður ikki, at neyðugt verður við formligum fyrisitingarligum samstarvsavtalum við danir á hesum øki, um føroysk lóg kemur í staðin fyri eina danska.

Fígging
Í donsku lógini er tað tann danski løgmálaráðharrin, sum er fyrisitingarligi myndugleikin og tískil hevur ábyrgd av møguligum útreiðslum av at umsita lógina. Hvussu hetta eigur at verða skipað í Føroyum við møguligum fullveldi, er ivasamt, men hildið verður, at Lógardeildin á Løgmansskrivstovuni ella Mentamáladeildin í Undirvísingar- og mentamálastýrinum eigur at hava fíggjarligu ábyrgdina.

## 1.3. Kongliga Leikhúsið

*L. nr. 40 af 14.02.1935 om Det Kongelige Teater og om oprettelsen af en kulturel fond, som ændret ved L. nr. 174, 13.04.1938.*

Lóggáva
Lógin fevnir serliga um danska Kongliga Leikhúsið. Lóggávan fevnir eisini um ein mentanarligan grunn, sum eigur at stuðla tónlist, serliga í leikhúsins tænastu.

Fyrisiting
Det Kongelige Teater er ein statsfyritøka undir danska Mentamálaráðnum.

Mett verður ikki, at hetta málið skal yvirtakast, um Føroyar taka fullveldi.

Mælt verður til, at tað við avtalu í framtíðini verður tryggjað føroyingum rætt til upptøku á danskar sjónleikaraskúlar.

Fígging
Danska kongliga leikhúsið verður fíggjað við stuðli á donsku fíggjarlógini, og rakstrarætlanin og -játtanin skal góðkennast av danska mentamálaráðharranum.

## 1.4. Fólkaskúlin

*L. nr. 51 af 14.02.1979 for Færøerne om folkeskolen.*

Lóggáva
Lógin er ein rammulóg, sum er sett í gildi av tí, at fyrisitingin av undirvísingarverkinum er yvirtikin sambært § 9 í heimastýrislógini.

Lógin sigur m.a., at heimastýrið kann áseta nærri reglur um fólkaskúlan í Føroyum.

Í § 7 stendur: *„Færøernes hjemmestyre fastsætter de nærmere regler om folkeskolen på Færøerne, herunder om folkeskolens formål og styrelse, om undervisningens indhold, omfang og tilrettelæggelse samt om undervisningspligtens opfyldelse".*

*Ll. nr. 125 frá 20.06.1997 um fólkaskúlan er sett í gildi við heimild L. nr. 51 af 14.02.1979 for Færøerne om folkeskolen.*

Fyrisiting
Donsku ríkismyndugleikarnir hava ábyrgd av hesi lóg.

Ikki verður mett, at fullveldið fer at fáa nakra fyrisitingarliga ávirkan á hetta økið. Málsøkið er fyrisitingarliga yvirtikið, og hóast rammulógin eftir fullveldi fellur burtur, eigur Ll. nr. 125 frá 20.06.1997 um fólkaskúlan framhaldandi at vera í gildi.

Fígging
Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina á økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum upp í hendi skylduna til at rinda útreiðslurnar á økinum. Fyri hesar útreiðslur fær heimastýrið blokkstuðul.

## 1.5. Tænastumenn í fólkaskúlanum

*L. nr. 65 af 08.03.1972 om tjenestemænd m. fl. i folkeskolen på Færøerne varð sett úr gildi við L. nr. 474 af 10.06.1997 om lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m. fl. i folkeskolen på Færøerne.*
Hóast lógin varð sett úr gildi við *L. nr. 474 af 10.06.1997 om lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m. fl. i folkeskolen på Færøerne*, fær føroyska heimastýrið við heimild í hesi lóg framhaldandi 80% í endurgjaldi úr ríkiskassanum til eftirlønir til eftirløntar tænastumenn í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá við eftirlønarrætti fram til 31.12.1987.

Hvørja avleiðing møguligt fullveldi kann fáa fyri 80% endurgjaldið úr ríkiskassanum til eftirlønir til eftirløntar tænastumenn í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá við eftirlønarrætti fram til 31.12.1987, er torført at meta um. Upphæddin, ið talan er um, kann tó ásetast rættiliga neyvt, so møguliga eigur hesin spurningur at verða tikin við í eini fíggjarligari uppgerð millum Føroyar og Danmark.

## 1.6. Ymsar broytingar í skúlaverkinum

*L. nr. 723 af 18.11.1987 om ændring af forskellige love om Færøernes undervisningsvæsen.*
Lógin broytir ásetingar í tveimum ymiskum lógum. Nakrar broytingar eru til L. nr. 65 af 08.03.1972 om tjenestemænd m. fl. i folkeskolen på Færøerne. Henda lógin varð tó sett úr gildi við L. nr. 474 af 10.06.1997 om lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m. fl. i folkeskolen på Færøerne.

Hinar broytingarnar eru til L. nr. 357 af 4. juni 1986 om Statens Uddannelsesstøtte. Har verður m.a ásett, at henda lóg ikki longur verður galdandi fyri lesandi við føroyskar lærustovnar. Henda broytingin kom, tá ið Føroyar yvirtóku lestrarstuðulin til føroysk lesandi í Føroyum í 1988.

## 1.7. Frítíðarundirvísing

*L. nr. 53 af 14. 02.1979 for Færøerne om fritidsundervisning m.v.*

Lóggáva
Lógin er ein rammulóg, sum er sett í gildi av tí, at fyrisitingin av undirvísingarverkinum er yvirtikin, sambært § 9 í heimastýrislógini frá 31. mars 1948.

Lógin sigur m.a., at heimastýrið kann áseta nærri reglur um frítíðarundirvísing í Føroyum.

Í § 9 stendur: *„Færøernes hjemmestyre fastsætter de nærmere regler om fritidsundervisning m.v. herunder om undervisningens styrelse, indhold, omfang og tilrettelæggelse."*

Ll. nr. 70 frá 30.06.1983 um frítíðarundirvísing o.a. er sett í gildi við heimild í L. nr. 53 af 14.02.1979 for Færøerne om fritidsundervisning m.v.

Fyrisiting
Donsku ríkismyndugleikarnir hava ábyrgd av hesi lóg.

Tað verður ikki mett, at fullveldi fer at hava nakra fyrisitingarliga ávirkan á hetta økið. Málsøkið er fyrisitingarliga yvirtikið, og hóast rammulógin eftir fullveldi fall burtur, eigur Ll. nr. 70 frá 30.06.1983 um frítíðarundirvísing o.a. framhaldandi at kunna verða í gildi.

Fígging
Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina á økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum upp í hendi skylduna til at rinda útreiðslurnar á økinum. Fyri hetta fær heimastýrið blokkstuðul.

## 1.8. Handilsskúlar, tekniskir skúlar og maskinmeistaraskúlar

*L. nr. 54 af 14. februar 1979 for Færøerne om handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler.*

Lóggáva
Lógin er ein rammulóg, sum er sett í gildi av tí, at fyrisitingin av undirvísingarverkinum er yvirtikin sambært § 9 í heimastýrislógini frá 31. mars 1948.

Lógin heimilar landsstýrinum m.a. at góðkenna handilsskúlar, tekniskir skúlar og maskinmeistara- og maskinistskúlar.

Í § 2 stendur: *„Færøerne hjemmestyre fastsætter de nærmere bestemmelser om indholdet, omfang og tilrættelæggelsen af den undervisning, der skal foregå på de godkendte handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler."*

Føroyskar lógir, sum hava heimild í hesi lóg, eru:

- Ll. nr. 106 um yrkisskúlar frá 29. desember 1998
- Ll. nr. 107 frá 29. desember 1998 um støðisútbúgving á fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkinum
- Ll. nr. 127 frá 21. mai 1993 um hægri handilsútbúgving
- Ll. nr. 47 frá 28. apríl 1992 um støðisútbúgving í tøkni
- Ll. nr. 129 frá 21. mai 1993 um hægri tøkniliga útbúgving
- Ll. nr. 50 frá 28. apríl 1992 um maskinmeistaraútbúgving og aðrar maskin- og eltøkniútbúgvingar

Uppskot til løgtingslóg um støðisútbúgving í tøkni, (SIT-útbúgvingar), uppskot til løgtingslóg um hægri, tøkniliga próvtøku, (HT-útbúgving), og uppskot til løgtingslóg um hægri handilspróvtøku, (HH-útbúgving), frá 5. mars 1999 hava somuleiðis heimild í rammulógini.

Fyrisiting
Donsku ríkismyndugleikarnir hava ábyrgd av hesi lóg.

Tað verður ikki mett, at fullveldi fer at hava nakra fyrisitingarliga ávirkan á hetta økið. Málsøkið er fyrisitingarliga yvirtikið, og hóast rammulógin eftir fullveldi fer úr gildi, eiga løgtingslógir við heimild í hesi lóg framhaldandi at vera í gildi.

Fígging
Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina á økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum upp í hendi skylduna til at rinda útreiðslurnar á økinum. Fyri hetta fær heimastýrið blokkstuðul.

## 1.9. Lærarútbúgving

*L. nr. 52 af 14.02.1979 for Færøerne om læreruddannelsen, som sat i kraft ved B. nr. 71 af 01.03.1984.*

Lóggáva
Lógin er ein rammulóg, sum er sett í gildi av tí, at fyrisitingin av undirvísingarverkinum er yvirtikin sambært § 9 í heimastýrislógini.

Lógin ásetur m.a., at endamálið við Føroya Lærarskúla er at útbúgva lærarar til fólkaskúlan. Útbúgvingin skal eisini mynda støðið undir undirvísing á øðrum skúlum.

Útbúgvingarnar á Føroya Lærarskúla kunnu verða skipaðar, sum leiðslan í Føroyum vil tað, men útbúgvingarnar skulu verða á sama

støði, sum danska útbúgvingin. Bæði lærara- og pedagogútbúgvingarnar eru javnsettar við danskar útbúgvingar og verða í norðurlondum mettar eftir teim donsku.

Eftirútbúgving av lærarum, sum antin kann fara fram í Føroyum ella í Danmark, er eisini heimilað í hesi lóg. Heimastýrið ásetur smb. § 4 neyvari reglur um læraraútbúgvingina og um víðari útbúgving av lærarum. Reglur um víðari útbúgving í Danmark verða ásettar av danska undirvísingarmálaráðharranum eftir samráðing við heimastýrið.

Ll. nr. 69 frá 28.05.1980 um læraraútbúgving hevur heimild í L. nr. 52 af 14.02.1979 for Færøerne om læreruddannelsen. Lógin ásetur endamálið við læraraútbúgvingini og undirvísing í øðrum skúlakørmum. Lógin fevnir harumframt um upptøkureglur, innihaldið í útbúgvingini, læraraskúlan, venjingarskúlan, eftirútbúgving av lærarum og gildiskomu.

Fyrisiting

Myndugleikin, ið hevur ábyrgd av hesi lóg, er danska Undirvísingarmálaráðið.

Undirvísingar- og mentamálastýrið umsitur tær lógir, sum eru settar í gildi við heimild í hesi lóg. Við fullveldi kann tí ikki væntast meira umsiting enn í dag.

Tað verður ikki mett, at fullveldið fer at hava nakra fyrisitingarliga ávirkan á hetta økið. Málsøkið er fyrisitingarliga yvirtikið, og hóast rammulógin eftir fullveldi fór úr gildi, eiga løgtingslógir við heimild í hesi lóg framhaldandi at vera í gildi.

Fígging

Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina á økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum upp í hendi skylduna til at rinda útreiðslurnar á økinum. Fyri hetta fær heimastýrið blokkstuðul.

## 1.10. Upphavsrættur

*L. nr. 158 af 31.05.1961 om ophavsretten til litterære og kunstneriske værker, som ændret ved L. nr. 250 af 12.06.1975. (sambært s. 1041 í Lógbókini: Broytt við L. nr. 250 frá 12.06.1975, sett í gildi við A. nr. 150 frá 21.03.1988 at galda frá 01.04.1988) Nýggj lóg er komin í gildi í Danmark síðani. (LBK nr. 706 af 29/09/1998) Lógin verður í løtuni endurskoðað í fyrisitingini, og arbeitt verður við at gera ríkislógartilmæli um upphavsrættindalóg.*

Lóggáva

Lógin ásetur í kapitli 1, hvat upphavsrætturin fatar um: Tann, sum skapar eitt bókmentarligt ella listarligt verk, sum antin verður borið fram í skrift ella talu í føgrum bókmentum ella framførslum, sum tónleikarverk ella á palli, sum myndlist, bygningsverk ella gagnlist ella á annan hátt.

Upphavsrætturin gevur skaparanum av verkinum einkarætt til hesi verk og avgerðarrættin til, hvussu hesi verk kunnu verða nýtt og ásetur, nær upphavsrættindahavarin hevur rætt til viðbót. Lógin ásetur eisini, nær verkið er tøkt hjá almenninginum: Tá ið tað verður framført alment, tá ið eintøk verða bjóðað út til sølu, leigu ella lán o.a. Upphavsrættindahavarin hevur rætt til at verða nevndur á eintøkum, eisini tá ið verkið verður tøkt hjá almenninginum.

Lógin ásetur eisini, hvørjar reglur eru galdandi fyri umseting, umgerð o.a. av verkum. Í kapitli 2 verður ásett, hvørji undantøk eru frá teimum reglum, ið eru ásettar í kapitli 1. Lógin ásetur í kapitli 3, nær og undir hvørjum formi upphavsrætturin kann verða latin øðrum, og í kapitli 4 verður ásett, hvussu leingi upphavsrætturin er galdandi. Kapittul 5 ásetur onnur rættindi, og í kapitli 6 eru ymiskar ásetingar. Kapittul 7 ásetur, hvussu rætturin verður vardur, og í kapitli 8 verður viðtøkuføri hjá lógini ásett.

Fyrisiting

Tað danska Mentamálaráðið og Undirvísingar- og mentamálastýrið fyrisita lógina.

Av tí, at henda lóg stavar frá 1961, hevur hon sín uppruna frá tíðini, áðrenn danska Mentamálaráðið varð sett á stovn. Málsøkið var tá undir Undirvísingarmálaráðnum og varð lóggávan løgd fram av Undirvísingarmálaráðharranum. Í dag er málsøkið flutt yvir í Mentamálaráðið, og verður upphavsrættindalógin umsitin haðani.

Um Føroyar taka fullveldi, og málið skal yvirtakast, verður neyðugt at gera eina føroyska lóggávu.

Fígging

Ongar beinleiðis útreiðslur eru av lógini.

## 1.11. Einkarættur og upphavsrættur

*L. nr. 157 af 31.05.1961 om retten til fotografiske billeder.*
*B. nr. 260 af 14.07.1962 om fastsættelse af vederlag ved benyttelse af beskyttede litterære og kunstneriske værker samt fotografiske billeder.*
*A. nr. 272 af 21.07.1962 om arkivers, bibliotekers og museers adgang*

*til at fremstille eksemplarer af litterære og kunstneriske værker m.v. ved fotografering.*

*A. nr. 365 af 23.09.1965 om anvendelsen af lov om ophavsretten til litterære og kunstneriske værker og lov om retten til fotografiske billeder i forhold til andre lande m.v.*

Lóggáva

Lógin gevur teimum, sum hava tikið fotografiskar myndir rættin til – við fotografi, prenti, tekning ella á annan hátt – at framleiða eintøk av myndini og at vísa hana fram alment. Lógin fatar m.a. eisini um reglur um, hvussu endurútgáva av myndum skal fara fram, nær myndin er at rokna sum almannakunngjørd og í hvørjum skapi myndirnar kunnu verða almannakunngjørdar, hvussu leingi myndatakarin hevur rættin til myndina, og hvussu brot á lógina skulu viðgerast.

Í Danmark er lógin frá 31. mai 1961 ikki í gildi longur, men í staðin kom nýggj lóg.

Ætlanin við at nútímansgera lógina um upphavsrætt er, at fotografilógin verður gjørd sum partur av upphavsrættindalógini (sí tað, sum stendur um upphavsrættindalógina).

Fyrisiting

Tað danska Mentamálaráðið og Undirvísingar- og mentamálastýrið umsita lógina.

Av tí, at henda lóg stavar frá 1961, hevur hon sítt upphav frá tíðini, áðrenn danska Mentamálaráðið varð sett á stovn. Málsøkið var tá undir Undirvísingarmálaráðnum, og varð lóggávan løgd fram av undirvísingarmálaráðharranum. Í dag er málsøkið flutt yvir í Mentamálaráðið, og verður upphavsrættindalógin umsitin haðani.

Av tí, at lógin um rættin til fotografiskar myndir er sett úr gildi í Danmark og hesin partur er vorðin partur av upphavsrættindislógini, kann væntast, at sami leistur verður nýttur í Føroyum. Arbeitt verður í løtuni við at gera uppskot til nýtt ríkislógartilmæli um upphavsrættindalóg. Í uppskotinum til ríkislógartilmælið um upphavsrættindalógina, er lógin um rættin til fotografiskar myndir vorðin partur av upphavsrættindislógina.

Mett verður ikki, at neyðugt verður við fyrisitingarligum samstarvi um hetta málsøki.

Fígging

Tað danska Mentamálaráðið og Undirvísingar- og mentamálastýrið hava fíggjarligu ábyrgdina av galdandi lóg. Ein nevnd skal umsita eftirlitið eftir galdandi lóg.

Væntandi stendst eingin fíggjarligur kostnaður av yvirtøku av hesari lóggávu, men um so er, er fíggjarligi myndugleikin Undirvísingar- og mentamálastýrið.

## 1.12. Niðurstøður

Viðvíkjandi teimum donsku rættarreglunum, sum eru í gildi í Føroyum, verður mett, at møguligt fullveldi ikki fer at hava avleiðingar av týdningi fyri lóggávu og fyrisiting. Henda meting er grundað á, at Løgtingið í stóran mun hevur nýtt heimildirnar at seta í gildi føroyskar lógir innan fyri karmarnar av donsku rammulógunum. Samstundis hevur føroyska fyrisitingin ognað sær neyðugu fyrisitingarligu royndirnar í tíðarskeiðnum, sum málsøkið fyrisitingarliga hevur verið føroyskt. Eitt sindur torførari er at meta um tær fíggjarligu avleiðingarnar.

Fyri fólkaskúlan, frítíðarundirvísingina, handilsskúlar og lærarautbúgvingina er niðurstøðan hin sama. Tað verður ikki mett, at fullveldi fer at hava nakra fyrisitingarliga ávirkan. Málsøkini eru fyrisitingarliga yvirtikin, og hóast rammulógirnar eftir fullveldi fara úr gildi, eiga løgtingslógir við heimild í hesi lóg framhaldandi at verða í gildi. Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina á økjunum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum upp í hendi skylduna til at rinda útreiðslurnar á økjunum. Fyri hetta fær heimastýrið blokkstuðul.

Danska lógin um tænastumenn í fólkaskúlanum sigur, at danir hava skyldu at endurrinda 80% av eftirlønini hjá tænastumonnunum, sum er vunnin áðrenn 1988. Henda eftirløn kann verða gjørd upp og kanska tikin við, sum eitt føroyskt krav til møguligar samráðingar millum føroysku og donsku myndugleikarnar.

Ríkistilmælið um nýggja fjølmiðlaábyrgdarlóg er samtykt av Løgtinginum, og fer henda lóg, tá ið hon kemur í gildi í Føroyum, at seta allar hinar fjølmiðlalógirnar úr gildi.

Mett verður, at nakrar av teimum ríkislógunum, sum eru, ella í næstum verða settar í gildi fyri Føroyar, eiga at verða verandi í gildi. Talan er m.a. um fjølmiðlaábyrgdarlógina og upphavsrættindalógina. Hinvegin eru aðrar lógir, sum settar eru í gildi fyri Føroyar, óneyðugar, m.a. lógin um Kongliga Leikhúsið.

Fíggjarliga hava teir donsku ríkismyndugleikarnir, sambært § 9 í heimastýrislógini, framvegis fíggjarligu ábyrgdina av einum stórum parti av málsøkjunum. Hvørjar fíggjarligar avleiðingar fullveldi fær, má metast at vera ein spurningur, sum í stóran mun er tengdur at avtaluni, sum føroysku myndugleikarnir gera við danir.

# Kapittil 2

## Føroyskar rættarreglur, sum vísa til danskar myndugleikar

### 2.1. Skjalasavn

*Ll. nr. 49 frá 28.04.1992 um Føroya Landsskjalasavn.*

Lóggáva
§1, stk. 2 vísir til avtalu millum landsstýrið og statin um savnindi ríkisins í Føroyum. Avtalan er frá ávikavist 30.03.1990 og 12.10.1990. Sambært § 8 í hesi avtalu skulu altíð galdandi danskar reglur vera galdandi fyri skjalasøvn hjá ríkisstovnum í Føroyum.

Landsskjalavørðurin hevur sambært avtaluni tær heimildir, sum ríkisskjalavørðurin hevur í Danmark. Men danska skjalalóggávan við sínum kunngerðum o.ø. er ongantíð sett í gildi í Føroyum. Skulu savnindi statsins handast Føroyum eftir fullveldi, má hetta skipast við nýggjari avtalu millum føroysku stjórnina og danska statin.

Eftir fullveldi eiga vit at hava eina føroyska lóg, sum fylgir altjóða reglum á økinum.

Fyrisiting
Danska Mentamálaráðið, Undirvísingar- og mentamálastýrið og Landsskjalasavnið eru fyrisitingarligu myndugleikarnir smb. hesi lóg.

Fígging
Ongar meirútreiðslur standast av hesum.

### 2.2. Niðurstøður

Viðvíkjandi teimum føroysku rættarreglunum, sum vísa til danskar myndugleikar, verður mett, at eitt møguligt føroyskt fullveldi ikki fer at hava avleiðingar av týdningi, hvørki fyri lóggávu, fyrisiting ella fígging.

# Kapittul 3

## Sáttmálar

Um Føroyar verða fullveldi, eigur at verða hugsað um, í hvønn mun Føroyar skulu gerast sjálvsstøðugt limaland í teimum ymsu norðurlendsku og altjóða sáttmálunum (konventiónunum), sum eru galdandi fyri undirvísing og mentan.

Talið av sáttmálum er sera stórt, og ikki ber til at lýsa hvønn einstakan sáttmála. Eitt yvirlit yvir teir sáttmálar, sum donsku undirvísingarmyndugleikarnir hava staðfest, er hjálagt sum fylgiskjal 8.2. Yvirlitið gevur eina ábending um, hvørjar sáttmálar, talan er um.

Her skal tó verða nevnt, at alneyðugt er hjá Føroyum at gerast limur í IMO, (International Maritime Organization), og at IMO-sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar. Somuleiðis má nýggi sáttmálin um atgongd til hægri lestur í Norðurlondum verða settur í gildi fyri Føroyar.

Aðrir sáttmálar eru eisini, sum stýrið mælir til, at Føroyar gerast partur av. Her verður m.a. hugsað um Helsingforsavtaluna og sáttmálan um Norðurlendska Mentanargrunnin.

Ilt er at siga, hvat tað fer at kosta at vera við í teimum ymsu sáttmálunum.

Mælt verður til, at kostnaður, fyrimunir og vansar verða lýstir í sambandi við, at arbeitt verður við seta hesar sáttmálar í gildi fyri Føroyar.

# Kapittul 4

## Formligt og óformligt samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar

### 4.1. Undirvísingar- og mentamálastýrið

Students- og HF-útbúgvingin
Avtala millum Uddannelsesstyrelsen og Undirvísingar- og mentamálastýrið snýr seg um hesi viðurskifti:

- Nýtsla av lærugreinaráðgevum til fakliga ráðgeving og eftirkanning av pensaskjølum
- Ókeypis nýtsla av donskum skrivligum próvtøkuuppgávum
- Umbýti av próvdómarum til munnligu og skrivligu próvtøkuna
- Hjálp til góðkenning av prógvum í altjóða høpi
- Námsfrøðilig útbúgving
- Luttøka á eftirútbúgvingarskeiðum á jøvnum føti við danskar starvsfelagar
- Ókeypis sending av reglusøvnum og øðrum tilfari frá Uddannelsesstyrelsen
- Innbjóðing til skeið, ráðstevnur o.a.

Viðvíkjandi umbýti av próvdómarum til munnligu próvtøkuna verður mett, at tað er gagnligt fyri ta yrkisligu menningina, at føroyskir próvdómarar fáa royndir í øðrum høpi, og at danskir próvdómarar koma til Føroya. Tað fakliga umhvørvið í Føroyum er lítið, og tað hevur tí stóran týdning, at lærarar í Føroyum fáa høvi at læra av royndunum hjá starvsfeløgum í øðrum londum. Útreiðslur til ferðing og uppihald hjá føroyskum próvdómarum í Danmark verða goldnar av føroyska skúlaverkinum, og setanarskúlin í Danmark rindar ferðing og uppihald hjá donskum próvdómarum í Føroyum.

Í ávísum førum er trupult at fáa føroysk yrkisfólk at gera próvtøkuuppgávur, tí yrkisumhvørvið í Føroyum er so lítið. Tá ið danskar próvtøkuuppgávur verða nýttar, verða hesar dømdar av donskum próvdómarum. Uppgávurnar eru ókeypis, men dømingin verður rindað av føroyska skúlaverkinum.

Føroyska skúlaverkið nýtir danskar lærugreinaráðgevar til ráðgeving, yrkisskeið, eftirkanning av pensaskjølum o. a. Útreiðslur til ferðing og uppihald hjá lærugreinaráðgevum í sambandi við skeið verða goldnar av føroyska skúlaverkinum. Alt annað er ókeypis.

Føroyskir lærarar kunnu taka námsfrøðiliga útbúgving í Danmark, har teir ókeypis kunnu luttaka á almennu og yrkisástøðiligu skeiðini, sum Uddannelsesstyrelsen skipar fyri. Tann verkligi parturin fer fram á donskum studentaskúla, og føroyska skúlaverkið rindar útreiðslurnar til vegleiðara og løn til læraran, meðan hann er í Danmark.

Lóggáva um próvtøkuviðurskifti er reint føroyskt málsøki. Einki er ásett um, at føroyska skúlaverkið skal býta um próvdómarar ella nýta danskar próvtøkuuppgávur, men hetta verður gjørt eftir avtalum millum danska Undirvísingarmálaráðið og Undirvísingar- og mentamálastýrið. Tað er sostatt eingin treyt, at slíkar avtalur eru um próvtøkur, men tær eru grundarlagið undir at taka føroyskar næmingar upp til danskar útbúgvingar á jøvnum føti við danskar næmingar.

### Hægri Handilsútbúgving

Avtala millum Uddannelsesstyrelsen og Undirvísingar- og mentamálastýrið snýr seg um umbýti av próvdómarum til munnligu próvtøkuna.

Viðvíkjandi umbýti av próvdómarum til munnligu próvtøkuna verður mett, at tað er gagnligt fyri ta fakligu menningina, at føroyskir próvdómarar fáa royndir í øðrum høpi og at danskir próvdómarar koma til Føroya. Tað fakliga umhvørvið í Føroyum er lítið, og tað hevur tí stóran týdning, at lærarar í Føroyum fáa høvi at læra av royndum hjá starvsfeløgum í øðrum londum. Útreiðslur til ferðing og uppihald hjá føroyskum próvdómarum í Danmark og hjá donskum próvdómarum í Føroyum verða goldnar av føroyska skúlaverkinum.

Lóggáva um próvtøkuviðurskifti er reint føroyskt málsøki. Einki er ásett um, at føroyska skúlaverkið skal býta um próvdómarar, men hetta verður gjørt eftir avtalum millum danska Undirvísingarmálaráðið og Undirvísingar- og mentamálastýrið. Tað er sostatt eingin treyt, at slíkar avtalur eru um próvtøkur, men tær eru grundarlagið undir at taka føroyskar næmingar upp til danskar útbúgvingar á jøvnum føti við danskar næmingar.

### Útbúgvingar á Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum

Avtala er millum Søfartsstyrelsen og Undirvísingar- og mentamálastýrið um útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum. Henda avtala snýr seg fyrst og fremst um danska góðkenning av føroyskum prógvum, soleiðis at føroysk prógv verða altjóða viðurkend. Søfartsstyrelsen tryggjar IMO, (International Maritime

Organization) at tær føroysku útbúgvingarnar eru á altjóða stigi og lúka tey altjóða krøv, sum IMO setur. Tað er neyðugt, at útbúgvingar eru gókendar av IMO, um føroysk sjófólk skulu sigla við útlendskum skipum og við føroyskum skipum, sum sigla uttan fyri føroyskan sjógv og koma til útlenskar havnir.

Harumframt fevnir avtalan um skrivligar uppgávur til próvtøkuna hjá skipsførarum, maskinistum og maskinmeistarum, soleiðis at hesar eru til taks ókeypis hjá føroysku skúlamyndugleikunum. Í onkrum førum verða próvdómarar úr Danmark nýttir, og verður hetta goldið av føroyska skúlaverkinum.

Um fullveldi førir til, at vit sjálv skulu fáa okkara útbúgvingar góðkendar av IMO, skulu Føroyar hava limaskap og umsiting at syrgja fyri fyrireikingararbeiðinum til góðkenningina.

### Útbúgvingar á handilsskúlunum og teknisku skúlunum

Avtalan er um:

- Ókeypis nýtslu av donskum skrivligum próvtøkuuppgávum
- Ókeypis nýtslu av lærugreinaráðgevum til yrkisráðgeving
- Ókeypis sending av reglusavninum og øðrum tilfari frá Uddannelsesstyrelsen
- Hjálp við góðkenning av prógvum í altjóða høpi

Í ávísum førum er trupult at fáa føroysk yrkisfólk at gera próvtøkuuppgávur, tí fakliga umhvørvið í Føroyum er so lítið. Tá danskar próvtøkuuppgávur verða nýttar, vera hesar dømdar av donskum próvdómarum. Uppgávurnar eru ókeypis, men próvdømingin verður goldin av føroyska skúlaverkinum.

Føroyska skúlaverkið nýtir danskar ráðgevar til ráðgeving, yrkisskeið o. a. Útreiðslur til ferðing og uppihald hjá lærugreinaráðgevum í sambandi við skeið verða goldnar av føroyska skúlaverkinum. Alt annað er ókeypis.

Lóggáva um próvtøkuviðurskifti er reint føroyskt málsøki. Einki er ásett um, at føroyska skúlaverkið skal nýta danskar próvtøkuuppgávur, men hetta verður gjørt eftir avtalum millum danska Undirvísingarmálaráðið og Undirvísingar- og mentamálastýrið. Tað er sostatt eingin treyt, at slíkar avtalur eru um próvtøkur, men tær eru grundarlagið undir, at taka føroyskar næmingar upp til danskar útbúgvingar á jøvnum føti við danskar næmingar.

### Lærlingaútbúgvingin

Lærlingaútbúgvingarnar í Føroyum eru um 70 í tali. Talið er eitt sindur skiftandi. Nýggjar útbúgvingar verða settar á stovn, og aðrar verða niðurlagdar. Býtið millum útbúgvingarnar er í løtuni soleiðis, at fyri

handverk og ídnað er talið 52, og fyri skrivstovur, fíggingarstovnar, heilsøluhandil og smásøluhandil er talið 19.

Lærlingaútbúgvingar eru skiftisútbúgvingar, har lærlingur í umleið 3/4 av lærutíðini er á einum góðkendum læruplássi og umleið 1/4 av tíðini er í skúla. Útbúgvingartíðin hjá lærlingunum er 2-5 ár, men flestu handverksútbúgvingarnar taka tó um 4 ár.

Lærlingi er við Løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 við seinni broytingum tryggjað minstaløn í allari lærutíðini. Landskassin endurrindar læruplássunum lærlingaløn undir skúlagongd, tó ikki meira enn galdandi minstuløn. Somuleiðis endurrindar landskassin læruplássunum ferðaútreiðslur í standast av kravdari skúlagongd í Danmark. Í Danmark er tað ikki tað almenna, ið veitir hesi endurgjøld, men harafturímóti Arbejdsgivernes Elevrefusion.

Í 8 av teimum 52 handverksútbúgvingunum fáa lærlingarnir ta neyðugu skúlagongdina í Føroyum. Í hinum 44 noyðast lærlingarnir til Danmarkar. Í 6 av hesum 44 kunnu lærlingar tó taka tað fyrsta skúlaskeiðið í Føroyum og síðani restina í Danmark.

Allir handilslærlingar og allir skrivstovulærlingar, undantiknir „all round – skrivstovulærlingar", hava verið noyddir at taka sergreinaskeiðini eftir støðisárið á handilskostskúlum í Danmark.

Síðani føroyska lærlingalógin kom í gildi í 1954, og eisini áðrenn tað, hevur verið galdandi, at føroyskir lærlingar, sum ikki kunnu fáa skúlagongd í Føroyum, skulu fáa skúlagongdina á tekniskum skúlum í Danmark. Sambært Rundskrivelse nr. 446 fra Tilsynet med den tekniske undervisning frá 4. apríl 1962 hevur verið galdandi, at: *„Såfremt undervisningen for et håndværksfag i henhold til §11 i den færøske lærlingelov helt eller delvis henlægges til en teknisk skole i Danmark, vil lærlingene fra dette fag kunne få udgifterne godtgjort til de nødvendige rejser, herunder skib Torshavn-København og tilbage på 2. klasse med køje. – Spørgsmål om ydelse af befordringsgodtgørelse til andre lærlinge, hvor læremester og lærling er enige om, at lærlingen bør søge undervisning ved en teknisk skole i Danmark, og hvor det færøske lærlingeråd skriftligt anbefaler andragendet, skal i hvert enkelt tilfælde forelægges tilsynet til forudgående godkendelse."*

Lærlingaundirvísingin á tekniskum skúlum og handilsskúlum í Føroyum hevur verið fíggjað við 80% úr blokkinum og við 20% frá kommununum.

Danskir vinnuskúlar, ið taka ímóti føroyskum lærlingum, hava higartil fingið rakstrarstuðul til undirvísingina, sama um lærlingarnir høvdu danskan ella føroyskan lærusáttmála. Tað hevur sostatt ikki verið kravt gjald fyri føroyskar lærlingar á skúlum í Danmark. Heldur ikki, tá ið tað snýr seg um uppihald. Tann parturin av uppihaldsútreiðslunum, sum lærlingur sjálvur skal rinda, (uml. 500 kr. um vik-

una fyri vistarhald) hevur verið tann sami fyri føroyskar lærlingar, sum fyri danskar lærlingar. Føroyskir lærlingar fáa sostatt lut í teim donsku studningsskipanum, sum galdandi eru fyri danskar lærlingar, ið búgva á skúlaheimi.

Føroyskir lærlingar, ið fáa skúlagongdina í Danmark, taka eisini sveinaroyndina í Danmark. Hetta verður gjørt eftir avtalu millum Føroya Læruráð og viðkomandi yrkisnevnd (Fagligt Udvalg). Í Danmark er fyri hvørt yrki sær ein yrkisnevnd, sum skipar fyri sveinaroyndunum. Læruráðið hevur samtykt, at føroyskir lærlingar skulu skoðast eftir somu reglum, sum galdandi eru í Danmark í viðkomandi yrkisgrein. Metingarreglur og sveinaroyndarreglur annars eru ymiskar frá yrkisgrein til aðra. Tó so, at innan fyri onkur høvuðsøki, sum t.d. jarn og metal, kunnu tað verða fleiri yrkisgreinar, ið hava líknandi metingarreglur.

Læruplássið ber útreiðslurnar av sveinaroyndini. Tá ið føroyskir lærlingar taka sveinaroynd í Danmark, gjalda føroysku lærupláss teirra tað sveinaroyndargjald, sum galdandi er í viðkomandi yrkisgrein. Fyri jarn- og metalyrkini er gjaldið 1560 kr. fyri hvønn. Í onkrari yrkisgrein kemur gjaldið upp í t.d. 5000 kr.-, alt eftir, hvussu nógv tilfar skal til og hvussu ofta skoðanarmeistararnir skulu møta. Gjaldið fevnir eisini um samsýning til skoðanarmeistarar. Í Føroyum hevur gjaldið síðani fyrst í 1980unum verið 200 kr. Umleið 1990 vórðu meginfeløgini og læruráðið samd um, at gjaldið átti at setast upp til 2000 kr., men lógaruppskotið fall í tinginum.

Vit hava ikki hagtøl, sum beinleiðis vísa, hvussu nógvir lærlingar hava verið á skúla í Danmark ár um ár. Hagtøl fyri lærlingatilgongdina yvirhøvur geva tó eina góða mynd av gongdini.

Í teimum omanfyri nevndu 44 handverksútbúgvingum, har skúlagongdin fer fram í Danmark, hevur lærlingatilgongdin seinastu 20 árini í miðal verið 42. Største tilgongdin var í 1984, tá ið talið var 78, og minsta tilgongdin var í 1992, tá talið var 12. Skúlagongdin hjá hvørjum av hesum lærlingum er í miðal 14 vikur um árið.

Í handilsútbúgvingunum (heilsølu og smásølu) ganga hagtølini frá 1986. Miðaltilgongdin í tíðarskeiðnum frá 1986 til 1997 hevur verið 22. Skúlagongdin hjá hvørjum av hesum lærlingum hevur í miðal verið 3 vikur um árið. Frá 1998 er skúlagongdin longd til í miðal 4-5 vikur um árið.

Í skrivstovuútbúgvingunum hava flestu lærlingarnir til og við 1997 gingið í skúla í Føroyum. Við nýggju útbúgvingarreglunum og øktu sergreinauppbýtingini frá 1998 noyðast helst fleiri av skrivstovulærlingunum at ganga í skúla í Danmark, um ikki Føroya Handilsskúli kemur at bjóða út fleiri sergreinaskeið, enn higartil. Talið á skrivstovulærlingum, sum í árunum 1995-1997 hava verið noyddir at

gingið í skúla í Danmark, hevur verið 6 í miðal, og hevur skúlatíðin verið um 3 vikur í miðal. Eins og í handilsútbúgvingunum er skúlagongdin í skrivstovuútbúgvingunum longd til í miðal 4-5 vikur um árið.

Samanumtikið kann sigast, at út frá hagtølunum um lærlingatilgongd er talið á føroyskum lærlingum, ið noyðast til Danmarkar at taka ta neyðugu skúlagongdina, í miðal um 70 um árið, og at skúlatíðin í miðal er 9,6 vikur um árið.

Avtala er gjørd við so at siga allar yrkisnevndir í Danmark um, at føroysk sveinabrøv verða góðtikin í Danmark ájavnt við donsk sveinabrøv. Treytirnar fyri, at so kann vera eru, at læruráðið veitir trygd fyri, at innihaldið í føroysku útbúgvingunum (tað er verkliga læran á læruplássinum og ástøðiliga og verkliga innihaldið í skúlaskeiðunum) er í minsta lagi á sama stigi, sum tilsvarandi útbúgving er í Danmark. Hetta verður m.a. tryggjað á tann hátt, at víðkaða læruráðið hevur samtykt og sett sær fyri, at lærupláss verða góðkend eftir somu góðkenningartreytum, sum galdandi eru í Danmark, og at føroysku útbúgvingarreglurnar samsvara við donsku útbúgvingarkunngerðirnar so leingi, hesar ikki stríða ímóti føroyskari lóggávu. Ivamál verða at gera av av víðkaða læruráðnum í viðkomandi yrkisgrein.

Flestu av hesum avtalum eru óformligar. Tó eru formligar avtalur gjørdar við el-yrkið, grafisku yrkini, hotel- og matstovuyrkini, jarn- og metalyrkini og garðyrkini.

### Eftirútbúgving av lærarum – Danmarks Lærerhøjskole

Undirvísingar- og mentamálastýrið og Danmarks Lærerhøjskole hava sínámillum samstarvsavtalu um, at Danmarks Lærerhøjskole er við til at eftirútbúgva føroyskar fólkaskúlalærarar í Føroyum. Hetta fer fram m.a. á tann hátt, at lærarar á Danmarks Lærerhøjskole undirvísa á teimum skeiðum, sum Undirvísingar- og mentamálastýrið skipar fyri, ella at lærarar fara á skeið í Danmark.

Sambært avtaluni skal Undirvísingar- og mentamálastýrið ikki gjalda lærarum løn fyri undirvísing, men bert bera kostnaðin av ferða- og vistarhaldi. Av tí, at avtalan er frá 1994 og at ávísar broytingar síðani eru hendar í Danmark, hava ivaspurningar í seinastuni verið um fíggjarliga partin av hesi avtalu. Landsstýrismaðurin hevur tikið spurningin upp við donsku myndugleikarnar um at gera nýggja samstarvsavtalu millum Undirvísingar- og mentamálastýrið og Danmarks Lærerhøjskole, soleiðis at hon gerst tíðarhóskandi.

## 4.2. Sernámsdepilin

Gómaráð
Sernámsdepilin hevur samstarv við 4 danskar serlæknar í danska heilsuverkinum, sum koma einaferð um árið at kanna børn við opnum góma. Sernámsdepilin ber útreiðslurnar til ferð og uppihald, men danska heilsuverkið rindar læknunum løn.

Kanningarnar kunnu føra við sær, at børn verða løgd undir skurð á Ríkissjúkrahúsinum. Sjúkrahúsverkið rindar tá útreiðslurnar á Ríkissjúkrahúsinum, men Sernámsdepilin ber útreiðslurnar av ferðing og uppihaldi hjá barninum og avvarðandi, sum fylgir við barninum til Danmarkar.

Barnasálarsjúkufrøði
Avtala er millum sjúkrahúsverkið og Børnenes Hus í Odense, sum ber í sær, at tveir barnasálarfrøðingar koma til Sernámsdepilin 3 ferðir um árið í uml. 15 dagar tilsamans.

Sernámsdepilin og sjúkrahúsverkið hava borið útreiðslurnar av ferðing og uppihaldi, men Børnenes Hus í Odense rindar lønina hjá sálarfrøðingunum.

## 4.3. Føroya Læraraskúli

Ongar fyrisitingarligar avtalur eru í dag við myndugleikar í Danmark, men hetta kann verða neyðugt, um so er, at Føroyar taka fullveldi. Ikki bert við Danmark, men eisini við hini Norðurlondini.

Rektarin á Føroya Læraraskúla hevur rætt at møta á rektarafundi saman við rektarunum á donsku læraraskúlunum, men hann hevur ikki atkvøðurætt. Eina til tvær ferðir árliga, alt eftir hvat ið er á skránni, er rektarin við á donsku rektarafundunum, og alt tilfar til fundirnar, verður eisini sent læraraskúlanum, so til ber at fylgja við gongdini.

Lærarar á Læraraskúlanum eru við á tveimum skeiðum, sum interna eftirútbúgvingarskipan læraraskúlanna hevur skipað fyri. Seinastu árini er hetta vorðið dýrari enn frammanundan, tí tá rindaði Undirvísingarmálaráðið mesta kostnaðin. Nú er hetta býtt út á læraraskúlarnar, og tann føroyski skúlin skal sostatt rinda sín part, tá ið hann er við.

Eftir fullveldi verður væntandi neyðugt at gera reglur fyri luttøkuna í eini slíkari skipan.

## 4.4. Náttúrugripasavnið

Djórasavnið – Ringmerking

Djórasavnið hevur granskingarsamstarv við Ringmerkingardeildina á Zoologisk Museum í Keypmannahavn. Zoologisk Museum rindar fyri ringarnar, ið verða settir á fuglin hjá okkum og gera alt tað umsitingarliga arbeiðið.

Eftir fullveldi eiga vit at stovna okkara egnu ringmerkingardeild, útvega nýggjar føroyskar fuglaringar og sjálv taka okkum av samstarvinum við útlond.

Djórasavnið – Statens Skadedyrslaboratorium

Djórasavnið hevur granskingarsamstarv við Statens Skadedyrslaboratorium í Danmark, sum hevur sent ókeypis tilfar og viðgjørt tey fáu málini, ið Djórasavnið av eini ella aðrari orsøk hevur biðið um hjálp til.

Eftir fullveldi eigur samstarv at vera við Statens Skadedyrslaboratorium í Danmark.

Djórasavnið – Miljøstyrelsens Katastrofefond

Miljøstyrelsens Katastrofefond, MIKA og Djórasavnið samstarva um eina verkætlan at seta sendarar á grindahval.

Eftir fullveldi eigur hetta samstarv at halda fram.

Djóra- og Plantusavnið – Forskningsforum

Forskningsforum er undir Granskingarmálastýrinum. Savnsstjórin situr í nevndini, sum leggur skránna fyri „Nordatlantsforskning", ið umsitur kr. 35. mill. í studningi til verkætlanir í fimm ár.

Tað verður ikki gjørligt eftir fullveldi at útvega sær pening úr donskum grunnum til føroysk endamál. Føroyskar verkætlanir hava higartil verið stuðlaðar við 4. mill. kr. úr hesum grunnum.

Jarðfrøðisavnið – GEUS

Samstarv við Danmarks- og Grønlands Geologiske Undersøgelse, GEUS, hevur serligan týdning. Tí verður tað samstarvið útgreinað niðanfyri. Samstarv, ið hevur almennan týdning og røkkur út um samstarvið við GEUS, fevnir nú um:

- Kanningar av føroyska landslagnum í samstarvi við Geografisk Institut á universitetinum í Keypmannahavn, GEUS, universitetið í Lund og universitetið í Edinburg. Síðan 1994 hava tílíkar kanningar verið gjørdar uppi á landi. Í løtuni verður søkt um 8 mill. kr. til granskingarstyrk frá danska granskingarráðnum til stóra 4 ára verkætlan, sum fatar um bæði land og havbotn.

- Havbotnfrøðiligar kanningar (t.e. kanningar av jarðfrøðiligu viðurskiftunum omaná og í ovastu jarðløgunum í havbotninum, serliga við atliti at stabilitetsmetingum og streym- og hitaviðurskiftum í sjónum, í nýggjari jarðfrøðiligari tíð) verða gjørdar í samstarvi við GEUS og við GEM-verkætlanina, sum oljufeløgini standa fyri. Enn er avgerð ikki tikin um, hvaðani fígging fæst til hesa verkætlan umframt tað, sum oljufeløgini gjalda.
- Kanningar av, hvussu veðurlagsbroytingar kunnu lesast úr landslagnum á landi og á havbotninum. Jarðfrøðisavnið hevur hesum viðvíkjandi í fleiri ár havt samband við Geologisk Institut á universitetinum í Keypmannahavn og stuðlað teirra kanningarliðum á ferðum til Føroya. Arbeitt verður við at fáa í lag eitt neyvari samstarv í hesi vísindagrein millum granskarar úr øllum norðurlondum, sum Norðurlendska Ráðharraráðið skal fíggja.
- Samstarv er um aðrar verkætlanir, sum tó ikki eru bundnar at serstøkum játtanum.

Ein frágreiðing um søguligu gongdina í samstarvinum millum Danmark og Jarðfrøðisavnið er til taks á Jarðfrøðisavninum.

Sum ein avleiðing av yvirtøkuni av ráevnum í undirgrundini til føroysk sermál í 1992 fekk landsstýrið fulla ábyrgd av øllum jarðfrøðiligum kanningaruppgávum o.ø., ið eru knýttar at hesum málsøki. Við hesum broyttist uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum Danmarks Geologiske Undersøgelse, DGU og Jarðfrøðisavnið grundleggjandi.

Sum partur av skipanarligu broytingunum á DGU í 1990-árunum varð Føroya-deildin tikin av, og varð vísindaliga arbeiðið flutt til Danmarkar. Tó varðveitti stovnurin síni skrivstovuhøli á Náttúrugripasavninum á Debesartrøð. Tær broyttu umstøðurnar førdu m.a. við sær, at Náttúrugripasavnið og DGU í 1994 fyri fyrstu ferð gjørdu formliga sínámillum avtalu, har tað m.a. verður staðfest, at Jarðfrøðisavnið nú hevur fulla ábyrgd av øllum jarðfrøðiligum arbeiði við atliti at ráevnum í føroysku undirgrundini, umframt øllum jarðfrøðiligum goymsluuppgávum Føroyum viðvíkjandi. Arbeiðið hjá DGU skal stuðla Jarðfrøðisavninum at byggja upp eitt haldgott vísindaligt umhvørvi í Føroyum, sum skal kunna taka sær av teimum nýggju og stóru avbjóðingunum.

Í sambandi við donsku lógina frá 20. desember 1995 um „sektorforskningsinstitutioner“ vórðu Danmarks Geologiske Undersøgelser (DGU) og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GGU) løgd saman til ein nýggjan økisgranskingarstovn (granskingardeild) undir danska Umhvørvis- og Orkumálaráðnum. Heitið á nýggja stovninum er Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS).Við saman-

leggingini varð lógin um DGU tikin av. Nýggja lógin við viðmerkingum nevnir einki um Føroyar.

Formliga sambandið, ið nú er við GEUS verður lýst niðanfyri:

GEUS er skipað av einum 13-manna stýri, útnevnt av danska Umhvørvis- og Orkumálaráðnum. Ein av limunum verður útnevndur av Føroya Landsstýri. Í verandi 4-ára skeiði, ið rennur út ár 2001, er Martin V. Heinesen stýrislimur,og Árni Olafsson er varalimur.

Ein 5-manna stýrisbólkur er settur at viðgera og góðkenna stevnumiðini fyri virksemið, sum fatar um Føroyar. Tríggir føroyskir limir eru í stýrisbólkinum.

Karmarnir um virksemið hjá GEUS, sum viðvíkja Føroyum, eru ásettir í samstarvsavtaluni frá 1994, sum eisini setir karmarnar um ábyrgdarbýtið millum JFS og GEUS.

Ætlanin er, at ein kunngerð skal setast í gildi fyri GEUS. Við støði í økisgranskingarlógini (granskingardeildarlógini) skal hon útgreina arbeiðsøkið hjá GEUS neyvari í síni heild. Eftir áheitan frá danska Umhvørvis- og Orkumálastýrinum hevur landsstýrið (Undirvísingar- og mentamálastýrið) nýliga gjørt viðmerkingar til málið. Stýrið mælir í sínum svarskrivi frá, at okkurt serstakt verður sett í kunngerðina um virksemið hjá GEUS, sum viðvíkur Føroyum, og mælir heldur til, at rúm verður givið í sjálvari lógini fyri, at serstakar samstavsavtalur kunnu gerast millum landsstýrið og donsku stovnarnar, ið lógin fatar um. Nýggj donsk kunngerð er í umbúna hesum viðvíkjandi, har Føroyar verða nevndar í § 10.

### Fígging

Jarðfrøðiliga arbeiðið í GEUS, Føroyum viðvíkjandi, verður partvís fíggjað av almennu donsku fíggjarjáttanini, partvís av inntøkugevandi virksemi og partvís úr Føroyum.

## 4.5. Føroya Landsbókasavn

### Føroya Landsbókasavn – Kongliga Bókasavnið

Síðani 1995 hevur Føroya Landsbókasavn umsitið føroyska partin av teimum báðum altjóða skrásetingarskipanunum ISBN og ISSN. Her skal leggjast afturat, at ISBN-skipanin, sum fevnir um bókaskráseting, verður umsitin av Føroya Landsbókasavni einsamøllum við beinleiðis sambandi til høvuðsskrivstovuna í Berlin, meðan ISSN-skipanin, ið er skráseting av tíðarritum, verður umsitin av Kongliga Bókasavninum og Føroya Landsbókasavni í felag. Sambandinum við høvuðsskriv-

stovuna, ið liggur í París, tekur Kongliga Bókasavnið sær av – eisini í føroyskum málum.

Mett verður, at Landsbókasavnið lættliga kann yvirtaka umsitingina á hesum økinum, og hetta fer ikki at hava fíggjarligar avleiðingar av týdningi.

Føroya Landsbókasavn
Føroya landsbókasavn hevur óformligt samstarv við nógvar danskar stovnar, haðani vit fáa/keypa ráð og tænastur. Afturfyri gevur Føroya Landsbókasavn ráð og tænastur eftir tørvi. Umframt Kongliga Bókasavnið og Statsbókasavnið í Århus verður m.a. samstarvað við hesar donsku stovnar: Dansk Biblioteks Center, Biblioteksstyrelsen, Danmarks Biblioteksskole, Dansk Blindebibliotek o.fl.

## 4.6. Biofar

BIOFAR – Zoologisk Museum
BIOFAR hevur avtalu við Zoologisk Museum í Keypmannahavn um, at tey vísindaliga nýggju dýrini, sum verða funnin, skulu verða latin teimum í varðveitslu.

Skal henda varðveitsla verða flutt á føroyskan stovn, krevur tað, at starvsfólk verður sett at røkja tílíkt savn og at hóskandi høli verða funnin til hetta. Dýrini skulu tó ikki latast Biofar-royndarstovuni, men Føroya Náttúrugripasavni í varðveitslu.

## 4.7. Føroya Landsskjalasavn

Føroya Landsskjalasavn – Statens Arkiver
Høvuðssamstarvsstovnar í Danmark eru Statens Arkiver, sum fevna um Rigsarkivet og tey fýra landsarkivienie. Allir stovnarnir eru undir danska Mentamálastýrinum. Landsstýrið hevur gjørt avtalu við danska Forsætismálaráðið, undirritað ávikavist 30.03.1990 og 12.10.1990. Landsskjalasavnið er við hesi avtalu altíð bundið at halda galdandi danskar reglur fyri skjalasøvn ríkisins í Føroyum. Annars tryggjar avtalan, at skjølini hjá øllum ríkisstovnum, uttan hernaðarstovnum, verða varðveitt í Føroyum á Landsskjalasavninum. Hetta hevur søguvísindaligan týding, av tí at hesi skjøl eru týðandi keldur til Føroya søgu.

Landsskjalasavnið hevur týðandi samstarv við samstarvstovnarnar, og heldur seg til teirra vegleiðingar, krøv og siðvenju.

Tað verður neyðugt at endurskoða skjalasavnsavtaluna í sambandi við møguligt fullveldi. Aðalsamráðingar mugu fara fram um tey savnindi, sum viðvíkja Føroyum, sum hava danskan uppruna, men sum

sambært siðvenju og skjalasavnsavtaluni verða varðveitt á Føroya Landsskjalasavni. Samráðingar eru longu um savnindi um Føroyar, sum eru á donskum skjalasøvnum. Hetta eru jú donsk fyrisitingarsavnindi. Ein stórur partur av almennu savnindum Landsskjalasavnsins eru frá stovnum ríkisins í Føroyum.

Tann yrkisráðgeving, sum Landsskjalasavnið fær frá Statens Arkiver, fer at krevja meiri arbeiðsorku, um Landsskjalasavnið ikki fær ta donsku tænastuna. Higartil hevur Landsskjalasavnið fylgt donskum reglum og hevur hildið seg til donsk krøv og siðvenju.

Spurningurin í sambandi við fullveldi er, um Landsskjalasavnið framhaldandi skal halda seg til danskar reglur ella ganga sína egnu leið. Higartil hevur tað av fyrisitingarsøguligum orsøkum verið natúrligt at fylgt donskum reglum. Annars heldur statens arkiver seg til altjóða reglur og støði, so alt bendir á, at skilabest er at halda fram við at fylgja donskum mannagongdum, reglum og støði, tá ið talan er um „record management“ í framtíðini. Hetta mál eigur at verða loyst, tá ið nýggjar avtalur koma í staðin fyri avtaluna frá 1990.

Eingir beinleiðis fíggjarligur kostnaður er av hesum.

## 4.8. Føroya Fornminnissavn

### Føroya Fornminnissavn – altjóða samstarv

Undir verandi skipan umboða danskir stovnar føroyska heimastýrið í Norðurlondum og altjóða høpi. Føroyskir fornminnamyndugleikar eru ikki við í norðurlendskum samstarvi, men eru áhugaðir fyri at vera við á norðurlendskum ríkisantikvarfundum og í Nordisk Museumskommité. Eisini er áhugi fyri altjóða samstarvi við eitt nú ICOM og ICOMOS undir UNESCO.

Á fornminnaøkinum er galdandi skipan ein forðan fyri norðurlendskum og altjóða samstarvi. Hon avbyrgir føroyskar fornminnamyndugleikar frá umheiminum. Møguligt fullveldi fer uttan iva at gera enda á hesi avbyrging.

Neyðugt verður við samstarvsavtalum við danir um eitt nú skeiðluttøku á Museumshøjskolen o.t. um Føroyar fáa fullveldi.

Eingin beinleiðis fíggjarligur kostnaður er av hesum.

## 4.9. Granskingarráðið

Granskingarráð Føroya hevur einki formligt samstarv við danskar stovnar, men skal í hesum sambandi verða nevnt, at føroyingar hava møguleika at søkja stuðul úr donsku granskingarráðunum. Hesin møguleiki hevur ikki verið nógv nýttur, men ráðið væntar, at fleiri føroyingar komandi árini fara at søkja donsku granskingarráðini um

stuðul, og hetta kann saman við teimum 35 mió. kr., sum beinleiðis eru settar av á donsku fíggjarlógini til gransking av føroyskum og grønlendskum viðurskiftum, fáa rættiliga stóran fíggjarligan týdning fyri føroyska gransking.

## 4.10. Listasavn Føroya

Listasavnið hevur samband við danska stovnin Fælleskonserveringen um umvæling av list. Hesin stovnur, sum tey almennu donsku listasøvnini í felag eiga og reka, hevur verkstaðir í Århus og Helsingør við serkønum listumvælarum. Listasavnið er ikki limur í hesum felagsskapi, og hevur ikki nakra formliga avtalu. Men Listasavnið hevur kortini latið nøkur av listaverkum sínum umvæla á hesum verkstøðum eftir sera lagaligari avtalu.

Eftir fullveldi eiga samstarvsavtalur at verða gjørdar um umvæling av list, ella eigur ein slíkur verkstaður at verða gjørdur fyri føroysku søvnini (Landsskjalasavnið, Landsbókasavnið, Fornminnissavnið, Jarðfrøðisavnið og Listasavnið). So kundu arbeiðsuppgávur og serkunnleiki verið savnað á einum staði.

## 4.11. Niðurstøður

Samanumtikið kann verða sagt, at tað á nærum øllum økjum eru samstarvsavtalur við danskar stovnar. Hetta samstarv eigur at halda fram, eftir at Føroyar hava fingið fullveldi. Mett verður best, at stovnar sjálvir skipa hetta samstarv, fyri at tryggja okkum, at alt neyðugt samstarv heldur fram eftir fullveldið.

Av serligum týdningi er niðanfyri nevnda samstarv:

Fyri Vinnu- og Miðnámsútbúgvingarnar verður mett, at eingin treyt er, at avtalur eru við danska Undirvísingarmálaráðið um próvtøkur, men tær eru grundarlagið undir, at føroyskir næmingar verða tiknir upp til danskar útbúgvingar á jøvnum føti við danskar næmingar.

Fyri útbúgvingarnar, sum fara fram á Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum er avtala millum Søfartsstyrelsen og Undirvísingar- og mentamálastýrið. Avtala er fyrst og fremst um danska góðkenning av føroyskum prógvum, soleiðis at føroysk prógv verða viðurkend á altjóða støði. Søfartsstyrelsen tryggjar IMO (International Maritime Organization), at tær føroysku útbúgvingarnar eru á altjóða støði og lúka tey altjóða krøv, sum IMO setur. Tað er neyðugt, at útbúgvingar eru gókendar av IMO, um føroysk sjófólk skulu sigla við útlendskum skipum, og við føroyskum skipum, sum sigla uttan

fyri føroyskan sjógv og koma til útlenskar havnir. Um fullveldið hevur við sær, at vit sjálv skulu fáa okkara útbúgvingar góðkendar av IMO, skulu Føroyar hava limaskap í ST og IMO og umsiting at syrgja fyri fyrireikingararbeiðinum til góðkenningina.

# Kapittul 5

## Mál, sum Danmark umsitur og sum natúrliga eiga at vera undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum

### 5.1. Kirkjan

Kirkjan man vera einasta mál, sum Danmark umsitur nú, sum natúrliga eigur at vera undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum.

Sum kunnugt eru ríkislógartilmæli um nýggjar kirkjulógir samtykt í Løgtinginum, og verða hesar lógir settar í gildi fyri Føroyar, tá ið reglur og kunngerðir fyri lógirnar eru gjørdar. Nú hevur landsstýrismaðurin í kirkjumálum sett ein arbeiðsbólk at fyrireika yvirtøku av kirkjuni og at gera uppskot um føroyska kirkjulóggávu. Tískil kann væntast, at tær nýggju kirkjulógirnar verða avloystar av nýggjari føroyskari kirkjulóggávu, tá ið fólkakirkjan verður yvirtikin. Í hesum áliti er valt at gera eina almenna lýsing av verandi rættarreglum, fyrisiting og fígging av fólkakirkjuni.

#### Verandi rættarstøða

Bygnaðurin í føroysku kirkjuni er ein tvítáttað skipan.

Annar tátturin er kirkjuráðini – Kirkjustjórnin – Løgtingið/Landsstýrið. Hesin táttur umsitur føroyska peningin, veitir stuðul til viðlíkahald av kirkjum, ásetir, hvussu stóra upphædd kirkjuráðini kunnu nýta sum tøkupening (rådighedsbeløb) o.a. og hevur umsjón við kirkjum og kirkjugørðum.

Bispur hevur einki við henda part av bygnaðinum at gera, hóast hann av røttum verður mettur at vera ovasti leiðari kirkjunnar. Í lóg nr. 109 frá 29. mars 1924 fyri Føroyar um stjórn kirkjunnar o.a. sum er broytt við lóg nr. 192 frá 11. mai 1935, eru ásettar nærri reglur um, hvussu Kirkjustjórnin útinnir virksemi sítt.

Hin tátturin er kirkjuráðini – Stiftstjórnin – Kirkjumálaráðið. Hesin táttur hevur um hendi prestaumsitingina, eitt nú løn, tænastumannahús og virksemið hjá kirkjuráðunum. Nærri reglur fyri, hvussu Stifts-

stjórnin útinnir virksemi sítt, eru ásettar í lóg nr. 729 frá 6. desember 1990. Við hesi lóg varð hin 15. november 1990 aftur stovnsett biskupsdømi í Føroyum við egnum biskupi, og Havnar Kirkja gjørdist dómkirkja. Sett varð á stovn Stiftsstjórn, har limirnir eru biskupurin, ríkisumboðsmaðurin og landsstýrismaðurin í kirkjumálum ella ein persónur, sum landsstýrismaðurin tilnevnir.

Í kunngerð Kirkjumálaráðsins nr. 262 frá 21. apríl 1992 verða í 7 greinum ásettar nærri reglur fyri peninganýtslu, endurgjøld til prestarnar og tænastumannahús – á sama hátt sum fyri kirkjurnar, sb. 1924 lógina. Tað er eisini dómprósturin, sum saman við einum byggiserkønum sýnar tænastumannahúsini.

Frá 1923 til 15. november 1990 vóru Føroyar eitt próstadømi í Keypmannahavnar biskupsdømi. Síðani eru tær vorðnar eitt sjálvstøðugt biskupsdømi, men framvegis er bara eitt próstadømi í Føroyum og ein dómpróstur við sæti í Tórshavn sambært lóg um biskupsdømi í Føroyum § 3. Tað hava verið ætlanir um at býta Føroyar sundur í 2-3 próstadømi, men ikki er vist, at kirkjunevndin kemur til hesa niðurstøðu. Til 1913 vóru Føroyar býttar sundur í 7 prestagjøld við einum sóknarpresti í hvørjum. Nú eru 13 prestagjøld og 20 prestar – Ein tvífalding av prestagjøldum og trífalding av prestum frá tíðini, tá ið galdandi lóg varð gjørd.

Ein av týdningarmestu kirkjulógunum er lóg nr. 109 frá 29 mars 1924 um stjórn kirkjunnar o.a. sum er broytt við lóg nr. 192 frá 11. mai 1935. Henda lóg snýr seg fyri ein part eisini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar. Sambært 1924 lógini § 1 er Løgtingið ovasta stjórn kirkjunnar. Tað er sjálvsagt í stríð við stýrisskipanarlógina, at eitt lóggávuting kann vera ovasti fyrisitingarmyndugleiki hjá kirkjuni. Sum tíðin er liðin, hevur Kirkjustjórnin so líðandi tulkað Løgtingið sum landsstýrið. Kirkjuráðið stýrir kirkjuni á staðnum undir eftirliti av kirkjustjórnini, har limirnir eru amtmaðurin (nú ríkisumboðsmaðurin), próstur og trý fólk, sum løgtingið velur við lutfalsvali, sb. § 2. Støðan er sostatt tann, at ríkisumboðsmaðurin situr bæði í Stiftsstjórnini og Kirkjustjórnini.

Kirkjuráðini syrgja fyri viðlíkahaldi av kirkjunum innan antin við innsavnaðum peningi ella peningi, sum fingin er til vega við kirkjuskatti frá limunum (uml. 60 % av kirkjusóknunum hava kirkjuskatt, og 89 % av limunum rinda kirkjuskatt). Lægsta kirkjuskattaprosent er 0,15 og hægsta er 1,2. Miðalprosentið er 0,27 (Í Danmark er miðalprosentið 0,88).

Kirkjustjórnin hevur um hendi Føroya Kirkjugrunn. Lógin frá1924 heimilar at krevja inn kirkjuskatt á staðnum og landsskatt. Tó kann landskirkjuskatturin einans verða innkravdur, um kirkjugrunnurin ikki er førur fyri at gera skyldur sínar, sb. § 11, stk. 3 í lógini. Henda heim-

ild hevur ongantíð verið nýtt, men landsstýrið/Løgtingið setur í staðin hvørt ár eina ávísa upphædd á fíggjarlógina til Føroya Kirkjugrunn. Men í lógini stendur einki um hetta. Seinastu árini hevur játtanin til kirkjugrunnin verið 3. mill.kr. Peningurin í kirkjugrunninum verður nýttur til viðlíkahald av kirkjum uttan og at byggja nýggjar kirkjur fyri. Orsakað av kreppuni fyrst í 1990-árunum varð hetta broytt, so styrkur ikki longur verður latin til nýbygging av kirkjum. Játtanin til kirkjugrunnin varð tá minkað munandi, og tí gjørdi Kirkjustjórnin av at leggja størsta dentin á viðlíkahald.

Í roynd og veru heimilar 1924 lógin bara at nýta pening til vanligan rakstur og viðlíkahald av kirkjunum, sb. § 3 í lógini, og galdandi reglur um at seta størv í fólkakirkjuni í Føroyum snúgva seg bara um at seta prestar. Kortini hava einstøk kirkjuráð sett skrivstovufólk fyri at lætta um hjá prestinum, og summi gjalda „ løn“ til urguleikara o.o. Kirkjuráðini skulu sambært 1924 lógini senda inn fíggjarætlan til Kirkjustjórnina til góðkenningar. Lógin ásetur, at fíggjarætlan kirkjunnar í seinasta lagi 30. september skal sendast Kirkjustjórnini, sum staðfestir fíggjarætlanina. Kirkjurnar senda roknskapir sínar til Kirkjustjórnina, sum tekur støðu til teirra.

Avgreiðsluskrivstovan hjá Kirkjustjórnini var hjá Ríkisumboðnum, til hon í apríl mánaði í 1992 varð flutt til biskupsskrivstovuna í J. Paturssonargøtu í Havn.

### Kirkjur og kirkjugarðar

Sambært 1924 lógini skulu kirkjuráðini á hvørjum ári í mai mánaði nágreiniliga sýna kirkjubygningarnar og alt, sum har til hoyrir, og síðani skrivliga boða Kirkjustjórnini frá, í hvørjum standi bygningarnir eru og hvat, ið vantar. Lógin ásetur eisini, at triðja hvørt ár skal prósturin saman við 2 byggiserkønum vera við til sýningina. Tað, sum gerast skal við bygningin, verður av próstinum skrivað í sýningarbókina fyri próstadømið, og úrskrift verður send Kirkjumálaráðnum, Løgtinginum og Kirkjustjórnini. Afturat teimum 60 kirkjunum, sum próstur skal sýna, skulu eisini teir 18 prestagarðarnir sýnast triðja hvørt ár, og kirkjubøkurnar kring landið annað hvørt ár.

Kirkjugarðarnir standa saman við kirkjunum á lista B í heimastýrislógini. Tað einasta, sum í 1924 lógini stendur um kirkjugarðar (§ 14), er, at hvør einstøk sókn skal syrgja fyri røkt og gerð av nýggjum kirkjugarði. Hetta skal gerast í samráði við Kirkjustjórnina, sum hevur eftirlit við kirkjugørðunum. Eru partarnir ósamdir, tekur Løgtingið avgerð í málinum. Kirkjugarðarnir eru ikki yvirtiknir av heimastýrinum, hóast kommunurnar røkja teir og gera nýggjar kirkjugarðar. Kirkjugarðarnir liggja framvegis undir Kirkjustjórnini og danskari løgsøgn (jurisdiktion).

Fleiri kommunur hava gjørt kirkjugarðsviðtøkur, hóast eingin lóg og eingin kunngerð er um kirkjugarðar í Føroyum. Tað vanta reglur um eftirlit við kirkjugørðum, reglur um flyting av líkum og „urnum", og reglur um gerðabøkur o.a. Heldur ikki eru reglur fyri, hvussu fram skal farast, t.d um onkur ynskir, at hansara ella hennara jarðligu leivdir verða spjaddar við vindinum, ella um viðkomandi ynskir at verða jarðaður á sjónum.

### Setanarviðurskiftini í fólkakirkjuni

Setanarlógin (lóg nr. 310 frá 16. mai 1990) er ikki galdandi í Føroyum. Av tí at setanarlógin ikki er galdandi í Føroyum, kann kunngerðin frá 18. juni 1991 um, at kirkjuráðini skulu vera við, tá ið prestar verða settir o.a. ikki nýtast í Føroyum, tí hon er givin út við heimild í setanarlógini. Men fyriskipanin um, at kirkjuráðini skulu vera við, stendur hjá okkum í kirkjuráðslógini, (fyriskipan nr. 232 frá 25. mai 1981, sum setur í gildi í Føroyum lóg um kirkjuráð) ein val- og kirkjuráðslóg. Orsøkin til trupulleikarnar er, at 4. partur í hesi lóg bara viðger vanligar starvssetanir, har starvið alment verður lýst leyst. Hetta ger, at biskupurin ikki kann seta ein prest fyribils í eitt starv, uttan at starvið frammanundan hevur verið lýst leyst.

Galdandi setanarlóg í Føroyum er frá 1940-árunum (lóg nr. 195 frá 16. apríl 1941 um atgongd til prestaembætini í fólkakirkjuni, sb. lógarkunngerð nr. 173 frá 4. juni 1947). Henda seinna gevur kvinnum rætt at vera prestar í fólkakirkjuni.

Kirkjuráðslógin er yngsta kirkjulóg í Føroyum, (fyriskipan nr. 232 frá 25. mai 1981). Hetta er danska kirkjuráðslógin frá 1980 (lógarkunngerð nr. 136 frá 15. apríl 1980), sum við broytingum er sett í gildi í Føroyum. Lógin um kirkjuráðs- og vallóg er í einari lóg.

Hvat kunngerðum viðvíkur, er eisini talan um gamlar og ótíðarhóskandi fyriskipanir. Kunngerð nr. 238 frá 20. september 1957 um brævatkvøður er sambært lógarskrá Føroya 1996 enn galdandi, hóast hon hevur støði í gomlu kirkjuráðslógini (fyriskipan nr. 196 frá 3. juli 1956, sum setur í gildi lóg um kirkjuráð í Føroyum).

### Halgidagar

Galdandi lóg um halgidagar er fyriskipan nr. 441 frá 21. november 1923, sum setur í gildi í Føroyum lóg nr. 353 frá 7. august 1922 um, at almennur friður skal vera á fólkakirkjunnar halgidøgum og grundlógardegnum. Fyriskipanin ásetur, hvørji arbeiði kunnu verða gjørd halgidagar, og bannar eitt nú samkomum ella drykkjulagi í almennum vertshúsum frá kl. 9 til 16. Halgidagslóggávan er tikin við á lista B í heimastýrislógini, men økið verður ikki longur umsitið av Kirkjumálaráðnum, men Løgmálaráðnum. Danska halgidagslógin er frá

1963, men er seinni broytt – sí lógarkunngerð nr. 279 frá 17. juni 1983 um halgidagar.

## Kirkjuligar „hendingar"

Kirkjuligar „hendingar" eru føðing, andlát, dópur, ferming, brúðleyp, jarðarferð og ritual.

Um fráboðan um føðing og andlát er fyriskipan nr. 115 frá 20. februar 1989 galdandi. Hon setur í gildi lóg nr. 225 frá 31. mai 1968. Kunngerð nr. 76 frá 17. juni 1989 ásetur nærri reglur fyri fráboðan um føðing og andlát. Tá ið hesar reglur vórðu settar í gildi, fingu vit skráseting í heimstaðnum í staðin fyri skráseting, har hending fór fram. Hetta merkir, at føðing og andlát skulu verða fráboðað prestinum, sum skrivar kirkjubøkurnar, har móðurin/tann deyði býr/búði.

Nýggju reglurnar hava tó skapt einstakar trupulleikar millum Føroyar og Danmark. Í føroysku kunngerðini er Danmark innanlands, og tí verður t.d. barn, har mamman býr í Danmark, men føðir í Føroyum, skrásett í Danmark, har móðirin býr. Men í donsku kunngerðini eru Føroyar uttanlands, og føroyingur, sum verður føddur ella doyr í Danmark, verður tí skrásettur har og ikki í Føroyum. Orsøkin til hetta man helst vera, at vit í Føroyum leingi høvdu skráseting á føði- og deyðsstaðnum. Føroyar fingu ikki skráseting í heimstaðnum fyrr enn í 1989. Kirkjumálaráðið átti at fingið broytt donsku kunngerðina, so hon samsvarar við ta føroysku. Hetta varð gjørt vart við longu í 1994.

Dópsfyriskipanin frá 30. mars 1828, sum er sett í gildi við kunningarskipan (reskripti) frá 28. apríl 1832 er eisini galdandi í Danmark. Fyriskipanin ásetur neyvari reglur um dóp, gummur, gubbar o.a.

Galdandi rættur er fyriskipan nr. 12. frá 1. februar 1909 um ferming.Fermingarfyrireikingin skal vanliga fara fram tvær ferðir um vikuna í minsta lagi í 3 mánaðir, sb. § 2, stk.1. Børn, ið ikki eru fylt 14 ár, áðrenn konfirmatiónsmánaðurin er liðin, kunnu ikki verða fermd uttan við loyvi frá bispi. Loyvi at verða fermdur má undir ongum umstøðum verða givið børnum, sum ikki eru fylt 13 ár. Ferming verður vanliga hildin tvær ferðir um árið, um várið og um heystið. Nær fermingin verður, skal vera kunngjørt frá prædikustólinum í minsta lagi átta dagar frammanundan. Eisini verður ásett, hvussu fermingin skal fara fram, og um børnini m.a. skulu verða yvirhoyrd.

Fyriskipan nr. 544 frá 22. desember 1922 um kirkjuliga vígslu í fólkakirkjuni o.tíl. sum er sett í gildi við fyriskipan nr. 237 frá 23. mai 1923, ásetur neyvari reglur fyri vígslu í fólkakirkjuni. Men eisini ein hjúnabandslóg er galdandi í Føroyum, lóg nr. 276 frá 30. juni 1922, og kortini er omanfyri nevnda fyriskipan varðveitt. Hetta er bara eitt av mongum dømum um, hvussu torført tað er at halda skil á lóggávuni í Føroyum.

Fleiri fyriskipanir liggja ymsastaðni, meir ella minni fjaldar, og tann samskipanin, sum seinastu árini er farin fram í lóggávuarbeiðinum í Danmark, er ikki gjørd í Føroyum. Hetta vísir eisini, hvørjir trupulleikar kunnu standast av eini endurskoðan av kirkjulóggávuni, tí hon kemur eisini inn á onnur rættarøki. Omanfyri nevnda fyriskipan um giftu er nevniliga givin út við heimild í hjúnabandslógini og má tí verða varðveitt, til ein nýggj hjúnabandslóg er komin. Fyriskipanin ásetur reglur um, hvør ið kann víga hjún borgarliga og vælsigna borgarliga giftu.

Jarðarferðarlógin er lóg nr. 100 frá 19. apríl 1907 um ymisk viðurskifti viðvíkjandi jarðarferðum, sum er sett í gildi við fyriskipan nr. 9 frá 17. januar 1908. Lógin ásetur reglur bæði fyri kirkjuliga og borgarliga jarðarferð – seinna er við ongun presti. Har eru eisini reglur fyri at seta á stovn kommunalar kirkjugarðar.

Í sambandi við ritual skal verða nevnt, at Hans J. Joensen, biskupur er vígdur eftir ritualinum í kunngerð nr. 151 frá 20. mars 1987, sum ikki er galdandi í Føroyum. Biskupurin átti av røttum at verið vígdur eftir ritualinum í kunngerð nr. 119 frá 8. september 1989 um góðkenning/løggilding av nýggjum rituali fyri biskupsvígslu.

Samanumtikið kann verða sagt, at galdandi kirkjurættur í Føroyum fyri tað mesta byggir á ymiskar, ofta sera gamlar lógir og kunngerðir/rundskriv, sum ikki altíð samsvara so væl hvør við aðra. Oftani eru ongar kunngerðir/rundskriv. Lógirnar eru ofta fáorðaðar og svara ikki teimum spurningum, sum stinga seg upp í einum nútímans samfelag. Summar lógir eru ógvuliga spjaddar og ósamanhangandi, og í fleiri førum sita vit við lógum, sum í Danmark vórðu býttar sundur fyri nógvum árum síðani og skipaðar av nýggjum. Støðan hevur leingi verið tann, at nógvar av teimum gomlu lógunum als ikki verða fylgdar. Kanska kann her verða víst til desvetudo, tvs. at ein lóg ella rættarregla dettur burtur, hevur hon ikki verið nýtt í longri tíð. Í staðin hevur ein nýggj, rangvørg siðvenja tikið seg upp. Hetta styrkir ikki rættarkensluna í samfelagnum og kann hava við sær, at ein óskrivaður siðvenjurættur, sum kann verða torførur at umsita, fær fótin fastan.

### Kirkjunevndin

Landsstýrismaðurin við undirvísingar- og mentamálum, ið eisini situr fyri kirkjumálum, hevur sett nevnd at gera uppskot til yvirtøku av fólkakirkjuni. Arbeiðssetningurin hjá fólkakirkjunevndini er m.a.:

- At skapa neyðuga grundarlagið fyri samráðingum millum landsstýrið og kirkjumálaráðið um, hvussu yvirtøkan av fólkakirkjuni kann fara fram.

- At lýsa galdandi fólkakirkjuligu lóg og fíggjarligu viðurskifti fólkakirkjunnar í dag.
- Í stuttum at lýsa fólkakirkjuligu lóggávuna og fíggjarligu viðurskifti fólkakirkjunnar í grannalondunum.
- At gera eitt uppskot til løgtingslóg um stjórn og rakstur av fólkakirkjuni o.ø. sum m.a. inniheldur reglur um:

  - hægri fyrisiting og stjórn fólkakirkjunnar
  - kirkjur og kirkjugarðar
  - starvsfólkaviðurskifti fólkakirkjurnnar
  - kirkjuligar hendingar
  - halgidagsfrið
  - onnur kirkjusamfeløg

Ætlanin er, at føroyska fólkakirkjan eftir yvirtøkuna skal vera ein kirkja við støði í føroyska samfelagnum og skipað eftir fíggjarligu fortreytunum.

### Fígging

Tað er torført at meta um, hvat kirkjan fer at kosta, tá ið hon er yvirtikin. Hetta kemur at verða tengt at, hvussu lóggávan fer at vera orðað. Verandi fólkakirkja kostar sambært tølinum frá Ríkisumboðsmanninum uml. 12,6 mill.kr. Eftir yvirtøku verður fyrisitingin, sum í dag er í danska Kirkjumálaráðnum, at verða flutt til Føroya, og fer hetta eisini at kosta nakað.

# Kapittul 6

## Á hesum økjum eiga samstarvsavtalur at verða gjørdar

### 6.1. Rættindini hjá føroyingum til danskan lestrarstuðul

Flestu føroyingar, sum í dag leita sær uttanlands í lestrarørindum, velja at fara til Danmarkar. Hesi fara tá úr tí føroysku lestrarstuðulsskipanini og inn í donsku skipanina, eisini um lisið verður uttan fyri Danmark. Hóast eingi heilt neyv hagtøl eru um føroyingar, sum lesa uttanlands, hevur Stuðulsstovnurin við støði í teimum, sum fáa ferðaískoyti, mett, at uml. 1500 føroyingar lesa uttanlands.

Sum støðan er í dag, hava føroyingar sama rætt, sum aðrir danskir ríkisborgarar, til lestrarstuðul frá Statens Uddannelsesstøtte. Hvørjar avleiðingar hesi rættindi fáa, um Føroyar verða skipaðar sum fullveldi, er torført at meta um, men hugsast kunnu fleiri møguleikar,

- at rættindi føroyinga til danskan lestrarstuðul fella burtur dag frá degi
- at rættindi føroyinga til danskan lestrarstuðul fella burtur yvir eitt ásett áramál, ella
- at føroyingar, sum eru føddir, áðrenn skipan av fullveldi, og sum tí eru danskir ríkisborgarar, varðveita rættin til danskan lestrarstuðul, men at teir føroyingar, sum verða føddir eftir skipan av fullveldi, ikki koma at hava henda rættin

Við støði í talinum omanfyri ber til leysliga at meta um lestrarstuðulsútreiðslurnar, sum Statens Uddannelsesstøtte hevur av lesandi føroyingum. Um roknað verður við eini stuðulsupphædd, sum er kr. 3.500 um mánaðin, (hetta er á leið tað, sum fæst frá SU) verður árliga upphæddin til uml. 63 mió. kr.

Eingin ivi er um, at stórar fíggjarligar avbjóðingar eru á hesum øki og at ein samstarvsavtala eigur at verða gjørd við danir um hetta málsøki.

## 6.2. Atgongd til hægri lestur í Danmark og hinum Norðurlondunum

Í 1996 varð avtala gjørd millum Danmark, Finland, Ísland, Norra og Svøríki um javnbjóðis atgongd til hægri lestur hjá persónum í nevndu londum við lærustovnarnar hjá hvør øðrum. Í avtaluni binda partarnir seg til at tryggja øllum, sum ynskja at fara undir hægri lestur og sum eru búsitandi í einum øðrum norðurlandi, javnbjóðis atgongd til hægru lærustovnarnar í sínum egna landi.

Avtalan tilskilar, at londini: Danmark, Finland, Norra og Svøríki skulu gjalda 22.000 danskar kr. fyri hvønn lesandi um árið. Gjørt verður upp árliga, hvussu nógv lesandi, hvørt landið hevur í einum øðrum landi, og verða netto útreiðslurnar ella inntøkurnar síðani mótroknaðar í tí upphædd, sum hvørt landið rindar til Norðurlandaráðið. Ísland er undantikið hesi reglu og rindar tískil einki fyri at hava javnbjóðis atgongd til hægru lærustovnarnar í hinum Norðurlondunum.

Eitt sindur av ónøgd hevur verið við hesa avtalu. Serliga hava tað verið Danmark og Svøríki, sum hava funnist at avtaluni, m.a. av tí at gjaldið DKK 22.000 er ov lítið, men eisini tí ov nógv fremmand lesandi eru komin til ávikavist Danmarkar og Svøríkis fyri at taka útbúgvingar, sum eru dýrar og avmarkaðar í tali. Eitt dømi er norskir læknalesandi í Danmark.

Føroyingar hava higartil verið partur av hesi norðurlendsku samstarvsavtaluni, tí at føroyingar eru danskir ríkisborgarar. Danir hava tískil goldið fyri teir føroyingar, sum lesa í hinum Norðurlondunum. Um Føroyar taka fullveldi, verður neyðugt, at Føroyar koma við í hesa norðurlendsku samstarvsavtalu, fyri á tann hátt at tryggja føroyingum eitt breitt og dygdargott úrval av hægri lestrarmøguleikum.

Eitt sindur torført er at meta um, hvussu kostnaðarmikil ein tílík avtala verður fyri Føroyar. Avtalan, sum er í gildi, fer úr gildi 31. desember 1999. Eftir hetta verður væntandi ein nýggj avtala gjørd, sum kann fáa stóran týdning fyri Føroyar. M.a. verður áhugavert at síggja, um upphæddin uppá 22.000 danskar kr. hækkar, um kvotur verða settar á ávísar hægri útbúgvingar, og um Ísland framvegis sleppur undan at gjalda fyri síni lesandi.

## 6.3. Lærlingaútbúgving

Avtala er gjørd við so at siga allar yrkisnevndir í Danmark um, at føroysk sveinabrøv verða góðtikin í Danmark ájavnt við donsk sveinabrøv. Treytirnar fyri, at so kann vera eru, at Lægruráðið veitir trygd fyri, at innihaldið í føroysku útbúgvingunum í minsta lagi er á sama stigi, sum tilsvarandi útbúgving er í Danmark. Hetta verður m.a.

tryggjað á tann hátt, at víðkaða Læruráðið hevur samtykt og sett sær fyri, at lærupláss verða góðkend eftir somu góðkenningartreytum, sum galdandi eru í Danmark, og at føroysku útbúgvingarreglurnar samsvara við donsku útbúgvingarkunngerðirnar, so leingi hesar ikki stríða ímóti føroyskari lóggávu.

Flestu av hesum avtalum eru óformligar. Tó eru formligar avtalur gjørdar við el-yrkið, grafisku yrkini, hotel- og matstovuyrkini, jarn- og metalyrkini og garðyrkini.

## 6.4. Onnur øki

Umframt allar tær óformligu avtalurnar finst eitt net av óformligum samstarvi, ið møguliga eftir fullveldið má skipast við formligum avtalum, sí t.d. kapittul 4. Tað hevur stóran týdning, at hetta net verður varðveitt. Eitt hugskot hevði verið at sett danskar-føroyskar samstarvsbólkar, ið av donsku stjórnini og landsstýrinum fingu heimild at røkja ella gera reglugerðir fyri hetta samstarv.

## 6.5. Niðurstøður

Tað er serliga á undirvísingarøkinum, at neyðugt verður við samstarvsavtalum. Hugsað verður her um rættindini hjá føroyingum til danskan lestrarstuðul. Eftir hagtølum hjá Stuðulsstovninum verður leystliga mett, at lestrarstuðulsútreiðslurnar, sum Statens Uddannelsesstøtte hevur av lesandi føroyingum, er uml. 63 mió.kr. Eingin ivi er um, at stórar fíggjarligar avbjóðingar eru á hesum øki, og at ein samstarvsavtala eigur at verða gjørd við danir um hetta málsøki.

Tað verður eisini neyðugt at samstarva um atgongd til hægri lesnað í Danmark og hinum Norðurlondunum. Avtala er gjørd í 1996 millum Norðurlondini um javnbjóðis atgongd til hægri lestur. Avtalan tilskilar, at Danmark, Finland, Svøríki og Norra rinda 22.000 kr. fyri hvønn lesandi um árið. Avtalan fer úr gildi 31. desember 1999, og væntandi verður nýggj avtala gjørd við broytingum.

Neyðugt verður eisini við samstarvsavtalum um lærlingaútbúgvingar. Hetta er serliga galdandi fyri góðkenning av sveinabrøvum.

# Kapittul 7

## Fylgiskjøl

### 7.1. Yvirlit yvir danskar lógir, sum eru settar í gildi fyri Føroyar

4. partur
Bløð, Sjónleikarhús, Mentanargrunnur, Kykmyndahús, Tónleikur, Ungdómshús
*(Aviser, Teatre, Kulturfond, Biografer, Musik, Ungdomshus)*
C. Sjónleikarhús, Mentanargrunnur, Kykmyndahús, Tónleikur, Ungdómshús
L. nr. 40 af 14.02.1935 om Det Kongelige Teater og om oprettelsen af en kulturel fond, som ændret ved L. nr. 174, 13.04.1938.
D. Bløð, Skrivingarlag / Aviser, Pressens brug
L. nr. 147 af 13.04.1938 om pressens brug, som senest ændret ved L. nr. 524 af 28.11.1969
L. nr. 348 af 06.06.1991 om medieansvar, við seinni broytingum er samtykt í Løgtinginum, men er í løtuni í danska Justitsministeriet. Skal avloysa L. nr. 147 af 13.04.1938 om pressens brug.

9. partur
Undirvísingarmál
*(Undervisningsvæsen)*
B. Fólkaskúli o.a. / Folkeskolen m.m.
L. nr. 51 af 14.02.1979 for Færøerne om folkeskolen.
L. nr. 65 af 08.03.1972 om tjenestemænd m. fl. i folkeskolen på Færøerne var sett úr gildi við L. nr. 474 af 10.06.1997 om lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m. fl. i folkeskolen på Færøerne. Tó fær føroyska heimastýrið við heimild í hesi lóg framhaldandi 80% endurgjald úr ríkiskassanum fyri eftirløn til eftirløntar tænastumenn í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá við eftirlønarrætti fram til 31.12.1987.
L. nr. 723 af 18.11.1987 om ændring af forskellige love om Færøernes undervisningsvæsen.
L. nr. 53 af 14. 02.1979 for Færøerne om fritidsundervisning m.v.
C. Yrkisútbúgvingar o.a. / Erhvervsuddannelser m.m.
L. nr. 54 af 14. februar 1979 for Færøerne om handelsskoler, tekniske

skoler samt maskinmester- og maskinistskoler er sett í gildi í Føroyum við Bekendtgørelse nr. 363 af 9. august 1979.

*E. Læraraskúli / Seminarium*
L. nr. 52 af 14.02.1979 for Færøerne om læreruddannelsen, som sat i kraft ved B. nr. 71 af 01.03.1984. Sett í gildi at galda frá 01.04.1984, tó virkandi frá 01.05.1980.

10. partur
Einkarættur og upphavsrættur
*(Eneret, Ophavsret, Patent)*
A. Upphavsrættur og fotografiskar myndir / Ophavsret og fotografiske billeder
L. nr. 158 af 31.05.1961 om ophavsretten til litterære og kunstneriske værker, som ændret ved. L. nr. 250 af 12.06.1975. Lógin verður í løtuni endurskoðað í fyrisitingini.
L. nr. 157 af 31.05.1961 om retten til fotografiske billeder.
B. nr. 260 af 14.07.1962 om fastsættelse af vederlag ved benyttelse af beskyttede litterære og kunstneriske værker samt fotografiske billeder.
A. nr. 272 af 21.07.1962 om arkivers, bibliotekers og museers adgang til at fremstille eksemplarer af litterære og kunstneriske værker m.v. ved fotografering.
nr. 365 af 23.09.1965 om anvendelsen af lov om ophavsretten til litterære og kunstneriske værker og lov om retten til fotografiske billeder i forhold til andre lande m.v.

19. partur
Kirkja
*(Kirke)*
A. Kirkja / Kirke
L. nr. 109 af 29.03.1924 for Færøerne om Kirkernes Styrelse m.v., som ændret ved L. nr. 192 af 11.05.1935.
Cancellie – plakat af 19.10.1822 om utilladelig Collectering, som den er sat i kraft ved canc. skrivelse af 31.03.1827.
B. nr. 111 af 25.04.1910 angaaende Kollekt i Landets Kirker paa Kristi Himmelfartsdag til Fordel for Missionsvirksomhederne i Hedninge- og Muhamedanerverdenen.
L. nr. 62 af 01.04.1908 for Færøerne om Afløsning af Tiende og Forandring i forskellige Skatter og Afgifter. (uddrag vedr. kirkelige forhold).
L. nr. 729 af 06.11.1990 om oprettelse af Færøernes Stift.
B. nr. 262 af 21.04.1992 om Færøernes stiftsøvrighed.

A. nr. 479 af 15.11.1922 angaaende Sjællands Stifts Deling
A. nr. 287 af 11.10.1937 angaaende Stiftsmidlernes Bestyrelse.
N.L. af 15.04.1687 2-4-4, 2-4-5, 2-4-6, 2-4-7, 2-4-8, 2-4-9, 2-4-10, 2-4-11, 2-4-12, 2-4-17
B. nr. 13 af 16.02.1885 om Autorisation af en ny Række Prædiketekster.
B. nr. 10 af 29.01.1897 angaaende nogle Forandringer i den almindelige Gudstjeneste paa Søn- og Helligdage.
B. nr. 108 af 03.08.1898 angaaende nogle Forandringer i de ved allerhøjeste Resolution af 28de Januar 1885 autoriserede nye Prædike tekster.
L. nr. 225 af 31.05.1968 om anmeldelse af fødsler og dødsfald som sat i kraft ved A. nr. 115 af 20.02.1989.
K. nr. 76 frá 17.07.1989 um fráboðan um føðing og andlát.
B. nr. 45 af 07.02.1977 om dødsattester.
N.L. af 15.04.1687 2-5-5, 2-5-8, 2-5-9.
Fr. af 30.05.1828 om Daaben som sat i kraft ved reskript af 28.04.1832 og senest ændret ved A. nr. 115 af 20.02.1989.
A. nr. 12 af 01.02.1909 angaaende Konfirmation.
A. nr. 544 af 22.12.1922 angaaende kirkelig Vielse indenfor Folkekirken m.v. som den er sat i kraft ved A. nr. 237 af 23.05.1923.
N.L. af 15.04.1687 2-10-1.
L. nr. 100 af 19.04.1907 om forskellige Forhold vedrørende Begravelser som sat i kraft ved
A. nr. 9 af 17.01.1908.
A. nr. 61 af 16.03.1910 angaaende Adgang for Folkekirkens Præster til at yde deres Medvirken ved Ligfærd, hvor Ligbrænding finder Sted.
A. nr. 75 af 26.03.1910 angaaende Godkendelse af de fra Folkekirken afvigende Trossamfunds Begravelsesritualer.
B. nr. 102 af 13.04.1910 angaaende Godkendelse af de i det romersk-katolske Trossamfunds Manuale indførte Begravelsesritualer til Brug ved Begravelser paa Folkekirkens Kirkegaarde.
Danmarks og Norges Kirke-ritual af 25.07.1685.
B. nr. 119 af 08.09.1898 angaaende Autorisation af et nyt Ritual for Bispevielse.
B. nr. 120 af 08.09.1898 angaaende Autorisation af et nyt Ritual for Præstevielse.
B. nr. 154 fra 21.11.1898 angaaende Autorisation af et Ritual for Provste-indsættelse som ændret ved B. nr. 202 af 26.07.1912.
B. nr. 156 af 21.11.1898 angaaende Autorisation af et Ritual for Kirkevielse.
B. nr. 230 af 26.07.1912 om præsters selvkommunion.

B. nr. 201 af 26.07.1912 om Autorisation af nye Ritualer for Daab, Nadver og Brudevielse.
B. nr. 361 af 21.11.1938 angaaende Autorisation af Ritual for Kirkelig velsignelse af et borgerlig stiftet Ægteskab.
A. nr. 441 af 21.11.1923 hvorved Lov nr. 353 af 7. August 1922 om den offentlige Fred paa Folkekirkens Helligdage samt Grundlovsdagen sættes i Kraft på Færøerne.
N.L. af 15.04.1687 2-21-65, 2-21-66.
L. nr. 128 af 28.04.1916 om Afstaaelse af Grund til Kirker og Kirkegaarde.
A. nr. 120 af 08.04.1954 hvorved lov om kirkers brug, sognebåndsløsning m.m. sættes i kraft på Færøerne, sum broytt við A. nr. 115 af 20.02.1989.
A. nr. 232 af 25.05.1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om menighedsråd.
A. nr. 47 af 22.03.1897 indeholdende Regler for Udtrædelse af og Genoptagelse i Folkekirken.
L. nr. 88 af 15.05.1903 om Valgmenigheder som senest ændret ved A. nr. 115 af 20.02.1989.
N.L. af 15.04.1687 1-2-11, 1-2-12, 1-4-34, 1-6-7.
N.L. af 15.04.1687 2-5-17, 2-16-4. 2-16-5, 2-17-1, 2-17-2, 2-17-3, 2-17-5, 2-17-7, 2-17-8, 2-17-9, 2-21-7.
L. nr. 79 af 03.03.1948 om Adgang for Biskopper til Fritagelse i visse Tilfælde for at føre Tilsyn med en Menighed og dennes Præster.
N.L. af 15.04.1687 2-3-3, 2-3-5, 2-3-6, 2-3-9, 2-4-1, 2-5-19, 2-7-3, 2-7-5, 2-11-1, 2-11-3, 2-11-8, 2-11-9, 2-11-15 2-14-12, 2-17-5.
L. nr. 195 af 16.04.1941 om Adgang til Præsteembeder i Folkekirken som ændret ved L. nr. 173 af 04.06.1947.
B. nr. 89 af 23.08.1901 angaaende Adgang for Folkekirkens Præster til at afholde Gudstjeneste og Forrette Altergang i en evangelisk-luthersk Frimenigheds Kirke.
B.nr. 191 af 18.11.1904 angaaende Adgang for Folkekirkens Præster til at afholde Gudstjeneste og Forrette Altergang i en evangelisk-luthersk Frimenigheds Kirke under Vakance i Frimenighedens Præsteembede.
B. nr. 189 af 29.07.1912 angaaende Tilladelse for Præster ved visse evangelisk- lutherske Frimenigheder her i Riget til at bære Folke-Kirkens Præstedragt.
B. nr. 49 af 21.01.1921 om Præstevielse af teologiske Kandidater i visse Tilfælde.
A. nr. 34 af 06.02.1936 angaaende Ophævelse af Præsteskyds paa Færøerne og Udredelse af Befordringsgodtgørelse til Præsterne sammesteds.

N.L. af 15.04.1687 2-15-3, 2-15-5, 2-21-34, 2-21-36.
A. af 29.03.1814 om Bekendere af den mosaiske Religion.
B. af 02.11.1865 om Anerkendelse af Methodistkirken.
L. nr. 59 af 01.04.1912 om Ophævelse af Kundgørelse ved Kirkestævne m.m.

## 7.2. Sáttmálar og konvenitíónir galdandi millum Danmark og onnur lond á undirvísingarøkinum

- Bekendtgørelse om en mellem Danmark og Frankrig afsluttet Overenskomst vedrørende den videnskabelige, litterære og skolemæssige Forbindelse
- Bekendtgørelse om Danmarks Ratifikation af den i London den 16. November 1945 undertegnede Overenskomst om Oprettelse af de Forenede Nationers Organisation for undervisningsmæssige, videnskabelige og kulturelle Spørgsmål.
- Bekendtgørelse om Danmarks ratifikation af den i Paris den 11. december 1953 undertegnede europæiske konvention om ligestilling af eksaminer, der giver adgang til universiteter.
- Bekendtgørelse om Danmarks ratifikation af den af De forenede Nationers organisation for undervisningsmæssige, videnskabelige og kulturelle spørgsmål
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af overenskomsten af 16. november 1945 om UNESCO
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af den europæiske konvention af 11. december 1953 om ligestilling af eksaminer, der giver adgang til universiteter
- Bekendtgørelse om Tyrkiets ratifikation af Den Europæiske Konvention af 11. december 1953 om ligestilling af eksaminer, der giver adgang til universiteter
- Bekendtgørelse om Danmarks ratifikation af Den europæiske Konvention af 15. december 1956 om ligestilling af studieperioder ved universiteter.
- Bekendtgørelse om konvention om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse om Sveriges ratifikation af Den europæiske Konvention af 11. december 1953 om ligestilling af eksaminer, der giver adgang til universiteter
- Bekendtgørelse om andre landes stilling til UNESCO-konventionen af 10. december 1948 til lettelse af den internationale udveksling af synlige og hørbare materialer af undervisningsmæssig, videnskabelig og kulturel karakter
- Bekendtgørelse om andre landes stilling til Den europæiske

Konvention af 15. december 1956 om ligestilling af studieperioder ved universiteter

- Bekendtgørelse af europæiske konvention om akademisk anerkendelse af universitetsgrader.
- Bekendtgørelse af overenskomst med U.S.A. om ændring af overenskomsten af 23. august 1951 om finansiering af kulturelt samarbejde
- Bekendtgørelse af protokol af 4. juni 1964 til den europæiske konvention om ligestilling af eksaminer, der giver adgang til universiteter.
- Bekendtgørelse af overenskomst med U.S.A. om ændring af overenskomsten af 28. maj 1962 om finansiering af kulturelt samarbejde
- Bekendtgørelse om andre landes stilling til den europæiske konvention af 15. december 1956 om ligestilling af studieperioder ved universiteter
- Bekendtgørelse af konvention af 15. december 1960 mod forskelsbehandling inden for undervisningen samt protokol af 18. december 1962 om bilæggelse af stridigheder i forbindelse med konventionens håndhævelse.
- Bekendtgørelse om andre landes stilling til protokol af 4. juni 1964 til den europæiske konvention om ligestilling af eksaminer, der giver adgang til universiteter.
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af den europæiske konvention af 14. december 1959 om akademisk anerkendelse af universitetsgrader
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af den europæiske konvention af 15. december 1956 om ligestilling af studieperioder ved universiteter
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konventionen af 15. december 1960 mod forskelsbehandling inden for undervisningen
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konvention om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af UNESCO-konventionen af 10. december 1948 til lettelse af den internationale udveksling af synlige og hørbare materialer af undervisningsmæssig, videnskabelig og kulturel karakter
- Bekendtgørelse af overenskomst af 13. februar 1969 om oprettelse af en europæisk molekylærbiologisk konference.
- Bekendtgørelse af traktat af 1. juli 1965 med Island om overførelse af dele af Den arnamagnæanske Stiftelses håndskrifter til

forvaring og forvaltning af Islands Universitet •Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse og opsigelse af konvention om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur

- Bekendtgørelse af overenskomst med U.S.A. om ændring af overenskomsten af 28. maj 1962 om finansiering af kulturelt samarbejde
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konvention af 16. november 1945 om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af UNESCO-konventionen af 10. december 1948 til lettelse af den internationale udveksling af synlige og hørbare materialer af undervisningsmæssig, videnskabelig og kulturel karakter
- Bekendtgørelse af statut af 12. april 1957 for Europaskolen
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konventionen af 16. november 1945 om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konventionen af 15. december 1960 mod forskelsbehandling inden for undervisningen samt protokollen af 18. december 1962 om bilæggelse af stridigheder i forbindelse med konventionens håndhævelse
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konventionen af 16. november 1945 om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af overenskomsten af 13. februar 1969 om oprettelse af en europæisk molekylærbiologisk konference
- Bekendtgørelse af overenskomst af 10. maj 1973 om oprettelse af europæisk molekylærbiologisk laboratorium
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konventionen af 16. november 1945 om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse af konvention af 30. maj 1975 vedrørende oprettelsen af en europæisk rumorganisation
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af konventionen af 15. december 1960 mod forskelsbehandling inden for undervisningen
- Bekendtgørelse af ILO-konvention nr. 142 af 23. juni 1975 om erhvervsvejledning og erhvervsuddannelse
- Bekendtgørelse af aftale af 19. juni 1978 om ændring af bilaget til vedtægten for Europaskolen
- Bekendtgørelse af UNESCO-konvention af 21. december 1979

om anerkendelse af studier, diplomer og grader inden for de videregående uddannelser i de stater, der tilhører Europa-regionen.

- Bekendtgørelse om udvidelse til Færøerne af overenskomst af 3. marts 1982 med Finland, Island, Norge, og Sverige om et fælles nordisk arbejdsmarked for lærere i folkeskolen
- Bekendtgørelse af aftale af 11. april 1984 om ændring af tillægget til vedtægten for Europaskolen
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af UNESCO-konventionen af 21. december 1979 om anerkendelse af studier, diplomer og grader inden for de videregående uddannelser i de stater, der tilhører Europa-regionen
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af overenskomsten af 16. november 1945 om De Forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af den europæiske konvention af 11. december 1953 og af den dertil knyttede protokol af 4. juni 1964 om ligestilling af eksaminer, der giver adgang til universiteter
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af den europæiske konvention af 15. december 1956 om ligestilling af studieperioder ved universiteter
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af den europæiske konvention af 14. december 1959 om akademisk anerkendelse af universitetsgrader
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af UNESCO-overenskomsten af 10. december 1948 til lettelse af den internationale udveksling af synlige og hørbare materialer af undervisningsmæssig, videnskabelig og kulturel karakter
- Bekendtgørelse om protokol af 1. august 1986 mellem Danmark og Island om overførelse af dele af Den arnamagnæanske Stiftelses håndskrifter til forvaring og forvaltning af Islands Universitet
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af UNESCO-konventionen af 21. december 1979 om anerkendelse af studier, diplomer og grader inden for de videregående uddannelser i de stater, der tilhører Europa-regionen
- Bekendtgørelse om forlængelse af gyldigheden af overenskomsten af 13. januar 1969 om oprettelse af en europæisk molekylærbiologisk konference
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af UNESCO-konventionen af 15. december 1960 mod forskelsbehandling inden for undervisningen samt protokollen af 18. december 1962 om

bilæggelse af stridigheder i forbindelse med konventionens håndhævelse

- Bekendtgørelse af aftale af 29. september 1986 med Finland, Island, Norge og Sverige om fælles arbejdsmarked for faglærere, lærere i praktisk-æstetiske fag og speciallærere i grundskolen
- Bekendtgørelse af aftale af 29. september 1986 med Finland, Island, Norge og Sverige om fælles arbejdsmarked for faglærere og lærere i praktisk-æstetiske fag i gymnasieskolen
- Bekendtgørelse af overenskomst af 4. marts 1992 med Finland, Island, Norge og Sverige om uddannelsesfællesskab på gymnasialt niveau
- Bekendtgørelse om udvidelse til Grønland af nordisk overenskomst om uddannelsesfællesskab på gymnasialt niveau af 4. marts 1992
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af overenskomsten af 16. november 1945 om De forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur
- Bekendtgørelse om andre landes tiltrædelse af overenskomsten af 16. november 1945 om De Forenede Nationers Organisation for Uddannelse, Videnskab og Kultur

# Almanna- og heilsumálastýrið

# Innihaldsyvirlit

Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 266

KAPITTUL 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 269
Fólkatingslógir, sum galda fyri alt ríkið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 269
Krígsendurgjald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 269
Líkbrenning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 270
Sinnisjúka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 271
Ognartøka til sjúkrahús . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 272
Læknakanning av børnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 272
Endurgjald fyri koppsetingarskaðar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 274

KAPITTUL 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 275
Fólkatingslógir, settar í gildi fyri Føroyar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 275
Serforsorgin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 275
Vanlukkutryggingarøkið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 275
Sjúkrahúsverkið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 278
Vevnaðartøka úr fólki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 279
Fosturtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 279
Fyribyrgjandi heilsukanningar og hjálp í sambandi við barnsburð 280
Tilboð um ókeypis koppseting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 281
Fráboðan um føðingar og andlát . . . . . . . . . . . . . . . . . . 282
Sterilisatión og kastratión . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 282
Farssóttir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 283
Líkskoðan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 286
Embætislæknar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 288
Sundhedsvæsenets Centralstyrelse . . . . . . . . . . . . . . . . . 290
Sjúklingatrygging . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 292
Vísindasiðseminevnd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 294

KAPITTUL 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 296
Danskar góðkenningarlógir, settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 296
Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 296
Læknar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 299
Tannlæknar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 302
Kliniskir tannsmiðir *(kliniskir tannteknikarar)* . . . . . . . . . . . . . 304
Sjúkrasystrar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 305

Ljósmøður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 306
Røktarassistentar (Yrkis- og alisrøktarar) *(Ergo- og fysioterapeutar)* 308
Fótrøktarar *(Fótterapeutar)* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 309
Kliniskir kostráðgevar *(Kliniskir diætistar)* . . . . . . . . . . . . . . . 310
Tannrøktarar *(Tannpleygarar)* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 311

KAPITTUL 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 313
Rammulógin fyri almannaøkið, við útfyllandi lóggávu . . . . . . . . . . 313
Rammulógin á sosiala økinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 313
Forsorgarlógin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 314
Barnaforsorgarlógin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 316
Barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.a. . . . . . . . . . . . . . . . 318
Avlamispensión o.a. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 319
Fólkapensión . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 320
Ásetan og javnan av almannaveitingum . . . . . . . . . . . . . . . . . . 322
Um uppískoytisveiting til einkjur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 323
Viðbót til ávísar pensiónistar o.a. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 323
Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima . . . . . . . . . . . . 324
Dagpeningalógin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 325

KAPITTUL 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 328
Rammulógin um heilsuverkið í Føroyum, við útfyllandi lóggávu . . 328
Rammulógin um heilsuverkið í Føroyum . . . . . . . . . . . . . . . . . 328
Sjúkrahúsverk Føroya . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 329
Kommunulæknaskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 331
Heilsusystratænastan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 332
Heimasjúkrasystratænastan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 333
Skúlalæknaskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 334
Barna- og ungdómstannrøkt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 335
Sjúkrakassaøkið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 336
Útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans 338

KAPITTUL 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 340
Føroyskar løgtingslógir annars á almanna- og heilsuøkinum . . . . . . 340
Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 340
Bjálvingarstuðulslán til pensiónistar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 340
Vardar íbúðir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 341
Kærunevndin í almannamálum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 341
Býtið av almannaútreiðslum o.a. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 342
Royndarskipan fyri eldrarøkt í Sandoynni . . . . . . . . . . . . . . . . 344
Stuðul til uppihaldsskyldug . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 344
Apoteksverkið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 345
Føroyska býtið til kommunulæknalønir . . . . . . . . . . . . . . . . . . 347

Hvíldarheimið Naina .......... 347
Tiltøk at minka um tubbaksnýtslu .......... 348
Javnstøðumál .......... 349
Bygging, sethúsa- og íbúðarbygging .......... 349

KAPITTUL 7 .......... 351
Samstarvsavtalur fyri Almanna- og heilsumálastýrið .......... 351
Inngangur .......... 351
Stovnar undir Almanna- og heilsumálastýrinum .......... 351
Almannastovan .......... 351
Serforsorgin .......... 352
Kreppumiðstøðin .......... 352
Hvíldarheimið Naina .......... 352
Føroya barnaheim .......... 352
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark .......... 352
Landsapotekarin .......... 352
Húsalánsgrunnurin .......... 353
Hotel Tórshavn .......... 353
Vanlukkutryggingarráðið .......... 353
Blindastovnur Føroya .......... 353
Meginfelag sjúkrakassa Føroya .......... 353
Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu .......... 354
Landssjúkrahúsið .......... 354
Suðuroyar sjúkrahús .......... 355
Heimarøktin .......... 355
Danskir stovnar í Føroyum .......... 355
Landslæknin .......... 355
Áhugafeløg undir Almanna- og heilsumálastýrinum .......... 356
Føroya astma/allergifelag .......... 356
LFA, Landsfelag fyri autistar .......... 356
Føroya blindafelag .......... 356
Cøliakifelag Føroya .......... 357
Deyvafelag Føroya .......... 357
Diabetisfelag Føroya .......... 357
Epileptikarafelag Føroya .......... 357
Giktafelag Føroya .......... 357
Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum .......... 358
ÍSB, Ítróttarsamband fyri brekað .......... 358
Javni .......... 358
Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum .......... 358
Morbus Bechtrew .......... 358
Nýrafelagið .......... 358
Parkinsonfelagið .......... 358

Føroya psoriasisfelag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 359
Sclerosufelagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 359
Sinnisbati . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 359
Spastikarafelagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 359
Felagið MBD/DAMP-børn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 360
Lymfødemfelagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 360

KAPITTUL 8 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 361
Millumlandasáttmálar, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum umsitur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 361
Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 361
Almannamál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 361
Heilsumál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 363

KAPITTUL 9 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 364
Niðurstøða av sjálvstýrisverkætlanini/Almanna- og heilsuøkið. . . . . 364
§ 2 yvirtøkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 365
§ 9 yvirtøkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 366
Góðkenningarlógirnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 369
Felagsmál annars . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 371
Samstarvsavtalur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 373
Millumlandasáttmálar. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 374

# Inngangur

Í sambandi við fólkaatkvøðuna um fullveldi hava tríggir bólkar arbeitt síðan oktober 1998 við eini verkætlan, sum lýsir, hvørji krøv fara at verða sett føroyska samfelagnum í sambandi við fullveldi. Hesir bólkar eru búskaparbólkurin, sáttmálabólkurin og fyrisitingarbólkurin. Fyrisitingarbólkurin hevur verið mannaður við umboðum úr øllum aðalstýrum.

Aðalstýrini fingu í hesum sambandi sum setning at gera eina lýsing av teimum ymsu landsstýrismálaøkjunum. Almanna- og heilsumálastýrið hevur við hesum lýst almanna- og heilsuøkið, tá ið talan er um fyrisiting, lóggávu og fígging.

Viðvíkjandi fyrisiting er lýst, hvørjir danskir og føroyskir fyrisitingarmyndugleikar eru sambært lóggávu á økinum, og hvørjar uppgávur hesir myndugleikar hava. Stórur dentur er lagdur á at lýsa fyrisitingaruppgávur, fyri at fáa yvirlit yvir, hvussu umfatandi tær eru á hesum øki.

Viðvíkjandi lóggávu er lýst, hvussu og nær lóggávan er sett í gildi, og hvat slag av yvirtøku, talan er um, t.e., um økið er yvirtikið sambært § 2 ella § 9 í heimastýrislógini, ella um økið ikki er yvirtikið.

Viðvíkjandi fígging er lýst, hvør ið hevur fíggjarligu ábyrgdina, føroyskir ella danskir myndugleikar.

Einki taltilfar er við í hesi lýsing, tí hetta vóru ikki stundir til, áðrenn frágreiðingin skuldi verða avhend. Arbeiðið at fáa hesi tøl til vega heldur á, og verða tølini løgd við sum skjal seinni. Ikki ber til at finna tøl fyri útreiðslur, ið eru avsettar á fíggjarlógini, og fyri ávísar aðrar útreiðslur, sum danski staturin rindar, sum t.d. landslæknan. Í hesi lýsing verða tí ongar metingar gjørdar av, hvussu nógv eitt føroyskt heilsustýri hevði kostað. Hetta mugu gjølligari kanningar til.

Almanna- og heilsuøkið er sera torskilt, tá ið talan er um lóggávu. Tí varð hildið at vera neyðugt at greiða eitt sindur frá hesi lóggávu, áðrenn komið verður til sjálva lýsingina av almanna- og heilsuøkinum.

Tosað verður tíðum um, at føroyingar hava „yvirtikið“ eitt málsøki frá dønum. Men „yvirtøka“ er sera vítt hugtak. Til ber at yvirtaka eitt øki bæði fyrisitingarliga, lógarliga og fíggjarliga, ella bert at yvirtaka tað partvíst.

Ein yvirtøkuformur er sambært § 9 í heimastýrislógini. Í hesi yvirtøku er málsøkið felagsmál, og tveir møguleikar eru fyri yvirtøku:

- Fyri tað fyrsta kunnu vit eftir samráðingar við danir avtala, at vit

yvirtaka eitt mál fyrisitingarliga og lógarliga, soleiðis at bert fíggjarliga ábyrgdin verður verandi í Danmark.
- Fyri tað annað ber okkum eisini til bert at yvirtaka fyrisitingarligu ábyrgdina av einum málsøki, og danir varveita so bæði lógarligu og fíggjarligu ábyrgdina av økinum.

Ein triðja yvirtøka er sambært § 2 í heimastýrislógini, sum ásetir, at føroyska heimastýrið kann taka við einum máli við at taka við bæði fyrisitingarligu, lógarligu og fíggjarligu ábyrgdini hjá dønum. Økið er í hesum førum endaliga yvirtikið og er eitt sermál.

Sostatt eru tríggir ymsir møguleikar fyri yvirtøku. Allir hesir møguleikar eru á almanna- og heilsuøkinum.

Almannaøkið er alt yvirtikið, hvat fyrisiting og lóggávu viðvíkir, men á heilsuøkinum hava vit bert tikið við tí partinum, sum snýr seg um veitingar til borgaran. Heilsumál, ið snúgva seg um heilsufakligar reglur, er hvørki yvirtikin fyrisitingarliga, lógarliga ella fíggjarliga.

Í 1948 yvirtók føroyska heimastýrið apoteksverkið, og í 1980 vanlukkutryggingina sambært § 2 í heimastýrislógini. Hetta eru eisini einastu øki í almanna- og heilsumálum, ið eru heilt yvirtikin sum sermál.

Umsitingin av almannaverkinum varð yvirtikin í 1975, og umsitingin av heilsuverkinum í 1977. Umsitingin av serforsorgini, sjúkrakassunum og tí primeru heilsutænastuni varð yvirtikin í 1988.

Sambært „L.nr. 315 frá 17.05.95 om sociale ydelser på Færøerne" og „L.nr. 316 frá 17.05.1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne" fekk føroyska heimastýrið heimild til at áseta reglur um uppgávur, veitingar og fyrisiting í størsta partinum av almanna- og heilsuverkinum.

Yvirtøkur eftir hesum báðum rammulógunum eru tær, vit kalla § 9-yvirtøkur sambært heimastýrislógini. Donsku lógirnar, ið galda í Føroyum á hesum øki, verða tó verandi í gildi, til tær verða avloystar av føroyskum løgtingslógum.

Stuðulin úr Danmark til føroyska almanna- og heilsuverkið varð til og við 1987 goldin landskassanum sum endurgjald. Tann 9. marts 1987 gjørdu danska stjórnin og Føroya landsstýrið sínámillum avtalu um at taka endurgjaldsskipanina av, og stuðulin til almanna- og heilsuverkið varð í staðin goldin sum blokkstuðul, samstundis sum donsku heimildirnar at gera reglur um raksturin av ymsum fyriskipanum fyri heilsuverkið datt burtur.

Sambært § 9-yvirtøkunum liggur statsrættarliga, fíggjarliga ábyrgdin av málsøkjunum hjá Fólkatinginum og danska ráðharranum. Fólkatingið hevur tó við ríkislógum latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á almanna- og heilsuøkinum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Mál, sum ikki eru yvirtikin sum sermál sambært heimastýrislógini, eru felagsmál. Hvat heilsuøkinum viðvíkir, kunnu hesi mál gerast sermál, við at heimastýrið ella danska stjórnin formliga seta fram ynski um, at so skal verða.

Felagsmálini verða sum høvuðsregla umsitin av ríkismyndugleikunum og sostatt eisini regulerað við danskari lóggávu, sum er sett í gildi fyri Føroyar. Hetta er tó ikki galdandi fyri § 9-yvirtøkur, men er galdandi fyri góðkenningarlógir, (autorisatiónslógir), og felagsmál annars á heilsuøkinum.

Henda frágreiðing, sum lýsir almanna- og heilsuøkið, er ætlað sum uppslagsverk, so at til ber at sláa upp eina ávísa lóg og finna allar neyðugar upplýsingar um hana. Fyri at hetta skuldi ganga í lag, hevur verið neyðugt við nógvum endurtøkum í frágreiðingini.

Kapitlarnir í frágreiðingini eru skipaðir eftir, hvat slag av lógum, talan er um. Við hesi uppseting skuldi borið til at lýst, hvat ið krevst viðvíkjandi teimum ymsu lóggávunum í sambandi við fullveldi.

Í lýsingini eru allar galdandi lóggávur fyri almanna- og heilsuøkið í Føroyum. Verður talan um fullveldi í Føroyum, hevði verið áhugavert at kannað lóggávu í øðrum londum, sum t.d. Íslandi ella øðrum smátjóðum, fyri at sammeta økini ella síggja, um almanna- og heilsulóggávan kanska skuldi verið heilt øðrvísi uppbygd, enn hon er nú.

Høvi var ikki til hetta í hesi frágreiðing, men hon er eitt fyrsta stig til størri útgreiningararbeiði av, hvør lóggáva skal galda á almanna- og heilsuøkinum, um talan verður um fullveldi.

# Kapittul 1

## Fólkatingslógir, sum galda fyri alt ríkið

Her er oftast talan um upprunaliga gamlar, danskar lógir, sum eru settar í gildi, áðrenn heimastýrislógin varð samtykt í 1948, og sum formliga enn galda í Føroyum. Fyri seinna veraldarbardaga vóru Føroyar eitt vanligt, danskt amt, og donsku lógirnar høvdu tískil eisini gildi fyri Føroyar av sær sjálvum. Ein serlig lóg ásetti tó, at hesar donsku lógir vanliga ikki fingu gildi í Føroyum fyrr enn fýra vikur eftir, at tær vóru kunngjørdar í Dimmalætting.

Summar fólkatingslógir eru tó settar í gildi fyri alt ríkið, eisini eftir seinna veraldarbardaga.

### Krígsendurgjald

*Lb. nr. 244 af 01.04.1992 om erstatning til besættelsestidens ofre, som ændret ved L. nr. 502 af 24.06.1992 om ændring af lov om erstatning til besættelsestidens ofre, (færøske fiskere).*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru Arbejdsskadestyrelsen og Erstatningsrådet.

Tað er Arbejdskadestyrelsen, sum umsitur lógina. Fyri at avgreiða eina umsókn krevst, at sjúkrahús, læknar og onnur lata Arbejdsskadestyrelsen upplýsingar, sum hava týdning fyri viðgerðina av endurgjaldinum.

Avgerðir hjá Arbejdsskadestyrelsen sambært hesi lóg kunnu verða kærdar til Erstatningsrådet.

2. Lóggáva

Lógin ásetir, at danskir statsborgarar, sum í minsta lagi 6 mánaðir í tíðini frá 9. apríl 1940 til 5. mai 1945 hava siglt við føroyskum fiskiskipi, kunnu søkja um endurgjald fyri mist arbeiðsevni. Fyri at skjalprógva hesa siglingartíð, skal umsøkjarin venda sær til Føroya landsskjalasavn fyri at fáa siglingartíðina. Lógin er eisini galdandi fyri hjúnafelagar hjá teimum, sum sigldu.

Lógin er fólkatingslóg, sum er sett í gildi fyri alt ríkið í apríl 1992. Fólkatingið gjørdi ávísar broytingar í lógini, tá ið talan var um

føroyskar fiskimenn. Hesar broytingar komu í gildi í Føroyum í juni 1992.

Ætlanin við lógini, sum ásetir reglur um krígsendurgjald fyri seinna veraldarbardaga, er útint, tá ið tey, ið lógin umfatar, ikki liva longur. Tí verður ikki hildið at vera neyðugt at gera føroyska lóg á økinum.

Málsøkið er felagsmál, t.e., at fyrisitingarliga, fíggjarliga og lógarliga er ábyrgdin hjá donskum myndugleikum.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Fíggjarliga ábyrgd hevur danski staturin. Bæði av lógarumsiting og av sjálvum krígsendurgjaldinum.

## Líkbrenning

*L. nr. 60 af 14.03.1931 om Ligbrænding.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru løgmálaráðharrin og løgreglan.

Uppgávan hjá løgmálaráðharranum sambært lógini er at áseta neyvari reglur fyri líkbrenning. Løgmálaráðharrin skal góðkenna øll líkbrenningarhús í ríkinum, og hann skal eisini góðkenna gravstaðin, har øskan verður grivin. Hevur tann deyði viljað verðið grivin aðrastaðir, enn vanligt er, kann løgmálaráðharrin loyva hesum. Skal øskan av tí deyða verða send til annað land, skal loyvi verða fingið frá Løgmálaráðnum.

Uppgávan hjá løgregluni sambært hesi lóg er at kanna, at alt er í lagi við líkinum, áðrenn tað verður brent. Um so er, kann løgreglan geva eina skrivliga váttan um, at alt er rætt framfarið. Løgreglan skal føra góðkenda protokoll um øll líkbrenningarhús og um hvørt lík, ið brent verður. Líkbrenningarprotokollir og løgregluváttanir skulu altíð vera tøkar hjá løgregluni, tá ið hon kemur á eftirlit.

### 2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um, hvussu fram eigur at verða farið, tá ið lík verða brend og jarðað í danska ríkinum.

Fólkatingið hevur sett lógina í gildi fyri alt ríkið, t.e. fyri Danmark, Føroyar og Grønland um somu tíð. Danska stjórnin hevur evnað lógina og kunngerðina til.

Donsk kunngerð, sett í gildi sambært lógini:

– *B. nr. 202 af 01.06.1937 om Regulativ for Udførelse af Ligbrænding.*

Lógarøkið er felagsmál, men kemur undir lista A í heimastýrislógini.

Tað merkir, at føroyska heimastýrið ella ríkismyndugleikarnir altíð kunnu gera av, at hetta økið verður yvirtikið sum føroyskt sermál.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Danir hava fíggjarligu ábyrgdina av økinum og rinda útreiðslur av umsitingini sambært lógini.

## Sinnisjúka

*L. nr. 118 af 13.04.1938 om sindssyge Personers Hospitalsophold, som senest ændret ved L. nr. 225 af 07.06.1972.*

Í høvuðsdráttum snýr lógin seg um rættarstøðuna hjá sinnisjúkum. Lógin ásetir reglur um, nær fólk kann verða innlagt á sjúkrahús fyri sinnisjúku, og nær fólk kann verða tvingað at verða innlagt á sjúkrahús fyri sinnissjúku. Lógin ásetir eisini reglur um, nær ið fólk kann verða útskrivað, og nær noktað kann verða fyri útskriving.

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru løgmálaráðharrin, Sundhedsstyrelsen, fútin og løgreglan.

Uppgávan hjá løgmálaráðharranum sambært hesi lóg er at geva statssjúkrahúsum, kommunusjúkrahúsum og privatum heilsuviðgerðarstøðum góðkenning, (autorisatión), at viðgera sinnissjúk. Góðkenningin verður givin eftir tilmæli frá Sundhedsstyrelsen og skal verða endurnýggjað, tá ið viðgerðarstovnurin skiftir leiðandi lækna. Góðkenning kann altíð verða afturtikin, tá ið lækni metir, at sjúklingur ikki kann verða útskrivaður, av tí at hann kann vera sær sjálvum og øðrum til bága. Í øðrum førum kann læknin eisini nokta fyri útskriving, men tá skal løgmálaráðharrin góðkenna noktanina. Løgmálaráðharrin hevur eisini til uppgávu at áseta neyvari reglur fyri, tá ið løgreglan er við til at leggja sinnissjúk inn.

Sundhedsstyrelsen hevur einans eina uppgávu sambært lógini, og hon er viðv. góðkenningum.

Uppgávan hjá fútanum sambært lógini er at syrgja fyri góðum trygdarskipanum viðv. sinnisjúkum, tá ið tann sjúki sambært læknaváttan kann seta rættartrygdina í vága. Hesar trygdarskipanir kann bert fútin broyta ella taka av. Spurningar, hvørt tað er lógligt at halda fólki aftur, kunnu verða kravdir at verða lagdir fyri rættin.

Uppgávan hjá løgregluni sambært hesi lóg er at vera við til at leggja inn sinnisjúk fólk, um so má vera, og at geva skiftirættinum, har tann sinnissjúki býr, boð um tvingsilsinnleggingina.

2. Lóggáva
Økið er felagsmál. Lógin varð í 1938 sett í gildi samstundis fyri alt ríkið, bæði fyri Danmark, Føroyar og Grønland. Nýggj donsk lóggáva er sett í gildi í Danmark á hesum øki, men lógin er enn ikki sett í gildi fyri Føroyar.

Av tí at økið er felagsmál, er møguleiki fyri at seta nýggju, donsku sinnissjúkralógina í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan. Skulu vit hava føroyska lóg, verður mælt til at gera skipanina einklari enn ta donsku. Danska umsitingin av lógini er stór, og nýggja lógin krevur enn meiri umsiting.

Vit hava yvirtikið fyrisitingarligu og lógarligu ábyrgdina av sjúkrahúsverkinum, (sí kap. 5). Sinnissjúkralógin er tengd at sjúkrahúsverkinum og kundi tí hugsandi verðið yvirtikin.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Danski staturin ber útreiðslurnar sambært lógini.

## Ognartøka til sjúkrahús

*L. nr. 293 af 27.04.1949 om bemyndigelse for Færøernes landsstyre til ekspropriation af grunde til anlæg af sygehuse i Tveraa og Thorshavn.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarmyndugleikin er Føroya landsstýrið.

Sambært hesi lóg verður Landsstýrinum heimilað at keypa ella ognartaka øki, so at farið kann verða at byggja Tvøroyrar og Tórshavnar sjúkrahús.

2. Lóggáva
Lógin er donsk og er sett í gildi í Føroyum beinleiðis av Fólkatinginum. Lógin var bert ætlað til eitt ávíst endamál í 1949. Ætlanin við lógini er útint.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Útreiðslurnar sambært lógini bar landskassin.
Landskassin hevur ongar útreiðslur av lógini longur.

## Læknakanning av børnum

*L. nr. 236 af 30.04.1946 om Lægeundersøgelse af børn.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar sambært hesi lóg eru innanríkisráðharrin, Sundhedsstyrelsen og føroysku kommunurnar.

Kommunurnar skulu sambært hesi lóg tryggja børnunum í kommununi at fáa upp til 9 ókeypis, fyribyrgjandi heilsukanningar av lækna. Av teimum skulu tríggjar vera, áðrenn barnið hevur fylt 1 ár.

Uppgávan hjá innanríkisráðharranum sambært hesi lóg er at áseta neyvari reglur á økinum og at áseta ta samsýning, sum lækni fær fyri at gera kanningarnar.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at áseta neyvari leiðreglur um kanningarnar og frágreiðingarskyldu sambært lógini.

### 2. Lóggáva

Økið er partur av arbeiðinum hjá kommunulæknunum, (sí kap. 5). Lógarliga verður økið regulerað í Danmark. Fólkatingið hevur sett lógini í gildi fyri alt ríkið, t.e., at eingin avmarking er sett í donsku lógina um, at hon kann verða sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan. Lógin umfatar tískil eisini Føroyar. Lógin er avtikin í Danmark, og læknakanningar av børnum verða í staðin reguleraðar í „L.nr. 438 af 14 juni 1995 om forebyggende sundhedsordninger for børn og unge."

Henda lóg er ikki sett í gildi fyri Føroyar, men ætlanin er at gera føroyska løgtingslóg á hesum øki við heimild í rammulógini fyri heilsuøkið, (sí kap. 5). Av tí at danska avtøkan av gomlu lógini ikki er lýst í Føroyum, er lógin enn galdandi her sbrt. „L.nr. 735 af 06.12.89 om kundgørelse af love, anordninger og bekendtgørelse på Færøerne." Tá ið henda lóg er tilevnað og sett í gildi, verður lóg um læknakanningar sett úr gildi, og tá hava vit yvirtikið økið sambært § 9 í heimastýrislógini.

Í hesum føri er ikki talan um faklig krøv til eitt ávíst heilsuøki ella um altjóða standard fyri heilsuøkið, men lógin ásetir bert reglur um veitingar til borgarar í Føroyum viðv. læknakanningum av børnum.

Donsk kunngerð, sett í gildi sambært galdandi lóg:
- *B. nr. 576 af 10.12.1981 om lægeundersøgelse af børn.*

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Sambært lógini verður skipanin umsitin á tann hátt, at kommunurnar rinda læknunum samsýningina sum forskot. Helvtin av útreiðslunum hjá kommununum í hesum sambandi verða endurgoldnar av danska statskassanum, (endurgjaldsskipanin). Sum kunnugt er endurgjaldsskipanin sett úr gildi sambært avtalu við danir í 1987, og blokkstuðulin er komin í staðin. Lógin verður tí umsitin á tann hátt, at sam-

sýningin til læknararnar verður rindað í Føroyum burtur av blokkstuðlinum.

## Endurgjald fyri koppsetingarskaðar

*L. nr. 82 af 08.03.1978 om erstatning for vaccinationsskader.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru staturin, heilsumálaráðharrin, Arbejdsskadestyrelsen, Den Sociale Ankestyrelse og almannamálaráðharrin.

Uppgávan hjá statinum er at geva tí koppsetta ella teimum avvarðandi eitt endurgjald, sum má metast at vera grundað á koppseting, sum er gjørd í Føroyum fyri eina sjúku, sum er umfatað av lógini um tilboð um ókeypis koppseting fyri ávísar sjúkur, (sí niðanfyri kap. 2). Staturin gevur eisini endurgjald fyri skaða, sum óivað er íkomin av smittu frá fólki, sum er koppsett.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum er at áseta reglur um, at lógin eisini kann umfata aðra koppseting enn ta, sum er nevnd í lógini.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum er at áseta reglur um, hvat skal henda við veitingunum, um tann skaddi er komin undir serforsorg ella aðra almenna forsorg.

Uppgávan hjá Arbejdsskadestyrelsen er at viðgera mál um veitingar sambært lógini. Áðrenn avgerð verður tikin, skal Arbejdsskadestyrelsen upplýsa málið og spyrja seg fyri hjá teimum, sum eru uppi í málinum. (Í føroysku lógini stendur, at Sikringsstyrelsen hevur hesar uppgávur, men sambært danskari lógarbroyting eru uppgávurnar fluttar til Arbejdskadestyrelsen).

Læknar, sum gerast varugir við, at koppsetingarskaði er hendur, skulu gera Arbejdsskadestyrelsen varugt við hetta.

Avgerðir hjá Arbejdsskadestyrelsen kunnu verða kærdar til den Sociale Ankestyrelse, sum viðger málið sum vanligt kærumál.

### 2. Lóggáva

Fólkatingið setti lógina í gildi í 1978 fyri alt ríkið, t.e. Danmark, Grønland og Føroyar. Eftir upplýsingum frá ríkisumboðnum er lógin kunngjørd í Dimmalætting tann 22.04.1980. Nógvar lógarbroytingar eru gjørdar í donsku lógini, men hesar eru ikki lýstar í Føroyum.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, t.e., at danir hava fíggjarligu ábyrgdina, bæði viðvíkjandi umsitingini av økinum og viðvíkjandi sjálvum endurgjaldinum til sjúklingin.

# Kapittul 2

## Fólkatingslógir, settar í gildi fyri Føroyar

Hesin kapittul snýr seg serliga um lógir, sum eru samtyktar á Fólkatingi, men sum eisini skula galda í Føroyum. Ymsar mannagongdir eru í sambandi við hesar lógir, men tær vanligu eru hesar báðar:

- Í donsku lógini verður ásett, at lógin hevur ikki gildi í Føroyum, men at lógin kann verða sett í gildi við kongligari fyriskipan. Lógin verður hereftir lagað til føroyskar umstøður, verður løgd fyri Løgtingið til samtyktar og fær gildi í Føroyum, tá hon er lógliga kunngjørd her. (Kongelig anordning nr. … af … om ikrafttræden på Færøerne af lov om …”).
- Ein serlig lóg fyri Føroyar, sum er skræddaraseymað til føroysk viðurskifti, verður samtykt á Fólkatingi. Lógin fær gildi í Føroyum, tá hon er kunngjørd eftir teimum reglum, sum galda her, t.e., at hon eisini er kunngjørd í Føroyum (”Lov nr … af … for Færøerne om …”).

### Serforsorgin

*L.nr. 719 af 18.11.1987 om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Sambært lógini eru fyrisitingarligu myndugleikarnir heimastýrið og Skúlin á Trøðni. Síðan lógin kom í gildi, eru tó framdar bygnaðarbroytingar í almennu umsitingini, sum hava ført við sær, at fyrisitingarmyndugleikarnir nú eru landsstýrismaðurin í almannamálum, Skúlin á Trøðni og Serforsorgin, (sum er partur av nýggjum stovni: „Heimarøktin og serforsorgin”).

Serforsorgin hevur ábyrgdina av øllum viðurskiftum hjá brekaðum, bæði tá talan er um viðgerð, arbeiði og upplæring. Eisini hevur Serforsorgin eftirlit við bústovnum og verkstøðum fyri brekað.

Uppgávan hjá Skúlanum á Trøðni er at undirvísa og uppvenja tey brekaðu, og landsstýrismaðurin í almannamálum hevur ábyrgdina av at gera útfyllandi lógararbeiði, t.e. kunngerðir, reglugerðir o.a., sum viðvíkir brekaðum.

2. Lóggáva
Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við fólkatingslóg. Málsøkið varð yvirtikið tann 1. januar 1988 sum § 9-mál í heimastýrislógini og er ætlað at lata føroyskum myndugleikum ábyrgdina av rakstrinum av serforsorgini, ábyrgdina av viðurskiftinum hjá brekaðum og somuleiðis ábyrgdina av starvsfólkinum, ið arbeiðir í serforsorgini.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Fíggjarliga ábyrgdin liggur hjá donskum myndugleika, av tí at málsøkið er yvirtikið sum § 9-mál, men donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna sambært hesi lóg. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Vanlukkutryggingarøkið

*A. nr. 389 frá 15. november 1966 for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.*

Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Formliga hava danskir myndugleikar stóra ávirkan og stórar uppgávur á vanlukkutryggingarøkinum í Føroyum. Hetta kemst av tí heldur fløktu, rættarligu støðu, ið valdar á økinum – sí meira niðanfyri undir „lóggávu."

Donsku fyrisitingarligu myndugleikarnir eru:

- *Staturin*, ið m.a. hevur ábyrgd av sínum tænastumonnum, eisini tá teir starvast í Føroyum, umframt formliga at hava fíggjarligu ábyrgdina av Vanlukkutryggingarráðnum.
- *Direktoratet for ulykkesforsikring (nú: Arbejdsskadestyrelsen)*, ið m.a. hevur ein týðandi lut í málsviðgerðini av vanlukkutryggingartilburðum í Føroyum.
- *Stjórnin*, ið m.a. vegna Føroyar hevur heimild at gera altjóða sáttmálar á vanlukkutryggingarøkinum.
- *Almannamálaráðharrin*, ið m.a. hevur heimild at gera bæði heildarreglur og stakreglur fyri vanlukkutryggingarlóggávu í Føroyum.
- *Vanlukkutryggingarráðið*, ið m.a. er vanligi málsviðgerðin í vanlukkutryggingartilburðum.
- *Sorinskrivarin*, sum er fastur formaður í Vanlukkutryggingarráðnum.
- *Landslæknin*, sum er fastur limur í Vanlukkutryggingarráðnum.
- *Ríkisumboðsmaðurin*, sum skal verða kunnaður um virksemið hjá Vanlukkutryggingarráðnum.

- *Ulykkesforsikringsrådet/Appelrådet*, sum er kærumyndugleiki fyri avgerðir, sum Vanlukkutryggingarráðið hevur tikið.
- *Statsanstalten for Livsforsikring (nú: Danica)*, hvørs virksemi verður brúkt sum grundarlag undir útrokningini av ymsum veitingum eftir vanlukkutryggingarlóggávuni í Føroyum.
- *Løgreglan* í Danmark hevur skyldu til at veita Vanlukkutryggingarráðnum í ávísum førum.
- *Dansk konsulat*, sum er rætti fráboðanarmyndugleiki, tá skaði hendur í útlondum

Eingir føroyskir myndugleikar hava stórvegis uppgávur á vanlukkutryggingarøkinum í Føroyum. Nakrar reglur áleggja tó sjúkrahúsum, sjúkrakassum og læknum fráboðanarskyldu í sambandi við vanlukkutilburðir.

2. Lóggáva

Lógin er sett í gildi við kongligari fyriskipan. Vanlukkutryggingarøkið er sambært § 2 í heimastýrislógini føroyskt sermál, (A-mál). Hetta merkir, at bæði heimastýrið og ríkisvaldið altíð kunnu krevja, at heimastýrið yvirtekur fyrisitingarligu, fíggjarligu og lógarligu ábyrgdina av málsøkinum.

Samsvarandi hesum gjørdi Landsstýrið í 1980 av at taka við allari ábyrgd av málsøkinum.

Í „yvirtøkukunngerðini,“ (sí kunngerð nr. 32 frá 28. mars 1980), stendur tó, at tann táverandi (og framvegis galdandi) danska „Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde“ – nr. 389 frá 15. november 1966 – framhaldandi skal vera í gildi, til nýggjar, føroyskar reglur eru gjørdar.

Føroyskar reglur um vanlukkutrygging eru ikki samtyktar á Føroya løgtingi enn, og tískil galda tær donsku reglurnar framvegis í Føroyum.

Síðan vanlukkutryggingarøkið varð yvirtikið í 1980, hava ymiskir arbeiðsbólkar arbeitt við at gera nýggjar, føroyskar reglur fyri økið. Enn er tó ongar av hesum lógum endaliga samtyktar á Føroya løgtingi.

Høvuðslógin á vanlukkutryggingarøkinum er nevnda danska „Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.“ Fyriskipanin er sett í gildi fyri Føroyar við heimild í táverandi donsku vanlukkutryggingarlógini og ásetir, nær og undir hvørjum treytum fólk kunnu fáa endurgjald fyri skaðar, sum henda í arbeiði.

Somuleiðis eru galdandi kunngerðir, givnar við heimild í fyriskipanini, danskar, og áleggja donskum myndugleikum ábyrgd og uppgávur á vanlukkutryggingarøkinum í Føroyum.

Yvirlit yvir reglur, ið galda á vanlukkutryggingarøkinum:

- *Kunngerð nr. 32 frá 28. mars 1980 um yvirtøku av málsøkinum „lógskyldug vanlukkutrygging."*
- *"Anordning nr. 389 af 15.11.1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" við seinni broytingum (sambært heimild, givin donsku stjórnini í § 82 í „lov om forsikring mod følger af ulykkestilfælde, jfr. Bekendtgørelse nr. 259 af 18. august 1964."*
- *Anordning nr. 202 af 22.03.1918 angaaende Anvendelsen af Bestemmelserne i Lov nr. 205 af 06.07.1916 om Forsikring mod Følger af Ulykkestilfælde paa Statens Tjenestemænd og Arbejdere, som ændret ved A. nr. 154 af 03.04.1923.*
- *Anordning nr. 284 af 07.10.1926 angaaende Ophævelse af den ved kongelig Anordning af 22.03.1918 oprettede Stats-Ulykkesforsikring og de paagældende Sagers Henlæggelse under Arbejderforsikringsraadets Administration.*
- *Anordning nr. 245 af 10.07.1933 angaaende Forsikring af Fanger og forvarede mod Følger af Ulykkestilfælde.*
- *Bekendtgørelse nr. 196 af 17.06.1953 om ulykkesforsikring af arbejdere, der midlertidig beskæftiges i Grønland i virksomheder, der har sæde eller styrelse på Færøerne.*
- *Anordning nr. 394 af 08.11.1939 om Krigs-Ulykkesforsikring for søfarende, som ændret ved MB: nr. 49 af 11.12.1944.*
- *Lov nr. 93 af 20.03.1940 om Udbetaling af Hædersgaver til danske Sømænd og Fiskere og deres efterladte, senest ændret ved L. nr. 67 af 03.03.1948.*

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Vanlukkutryggingarøkið er við heimild í § 2 í heimastýrislógini yvirtikið sum føroyskt sermál. Sostatt hevur heimastýrið fulla ábyrgd av økinum, bæði fyrisitingarliga, fíggjarliga og lógarliga.

Sum áður nevnt, galda tó tær donsku reglurnar enn formliga í Føroyum. Hesar reglur áleggja í høvuðsdráttum bert donskum myndugleikum ábyrgd og uppgávur á vanlukkutryggingarøkinum. Somuleiðis er tað formliga bert Danmark, sum hevur fíggjarliga ábyrgd av økinum.

Samsvar er sostatt ikki millum samtyktina í 1980 um at yvirtaka vanlukkutryggingarøkið sum føroyskt sermál og tær formligu reglur, sum framvegis galda á hesum øki.

## Sjúkrahúsverkið

*"Lb. nr. 137 af 06.03.1991 af lov for Færøerne om sygehusvæsenet,"*

*seinast broytt við Ll. nr. 89 frá 04.06.1996. Eisini broytt við Ll. nr. 93 frá 13.06.1995.*

Meginparturin av reglunum í hesi lóg varð settur úr gildi, tá ið nýggj lóg um Sjúkrahúsverk Føroya varð sett í gildi í 1996.

Bert §§17-19 í lógini galda enn. Í hesum greinum stendur, at Statshospitalið í Havn kemur undir føroyska heimastýrið 1.1.1977 og verður lagt saman við Landssjúkrahúsinum.

Føroyska heimastýrið skal ikki rinda dønum nakað, um hetta kemur undir føroyskt málsræði.

## Vevnaðartøka úr fólki

*A.nr. 317 frá 22.08.88 om udtagelse af menneskeligt væv.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligi myndugleikin sambært hesi lóg er Sundhedsstyrelsen.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at góðkenna teir stovnar, (sjúkrahús o.tíl.), sum skulu hava loyvi til at taka vevnað úr fólki sambært lógini.

1. Lóggáva

Lógin snýr seg um, hvørji krøv verða sett heilsustarvsfólki og heilsustovnum, tá ið vevnaður verður tikin.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Sambært lógini rindar danski staturin fyri útreiðslurnar.

## Fosturtøka

*A. nr. 228 af 20.06.1959 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v. og ændret ved A. nr. 73 af 14.03.1968.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru Mødrehjælpsinstitutionen, heilsumálaráðharrin, staturin og løgmálaráðharrin.

Er kvinna so fyri, at hon vil hava fosturtøku, kann hon venda sær til Mødrehjælpsinstitutionen. Mødrehjælpsinstitutionen skal tá geva henni vegleiðing í, hvørjar møguleikar hon hevur at fáa fosturtøkuna. Til hetta kann Mødrehjælpsinstitutionen fáa sær sakkøna hjálp uttanífrá. Til líknandi stovnur sum Mødrehjælpsinstitution verður í Føroyum, skulu fosturtøkur her verða gjørdar eftir samráð ímillum tann góðkenda læknan, sum skal gera fosturtøkuna, og ein annan góðkendan lækna.

Uppgávurnar hjá innanríkisráðharranum, (nú heilsumálaráðharranum), eru at áseta reglur um, at sjúkrahúsið, sum fremur fosturtøkuna, heilt ella partvíst kann fáa útreiðslurnar í sambandi við fosturtøkuna endurgoldnar av sjúkrahúsinum, sum hoyrir til økið, har kvinnan býr.

Staturin kann geva kommunum, privatum feløgum og felagsskapum fíggjarligan stuðul til at upplýsa fólk um gitnaðarfyribyrging. Tó ber einans til at fáa helvtina av útreiðslunum til upplýsingararbeiðið goldnar.

Uppgávan hjá løgmálaráðharranum er at áseta neyvari reglur um, hvussu lógin verður útint.

2. Lóggáva

Henda lóg snýr seg í høvuðsdráttum um, í hvørjum førum ein kvinna kann fáa fosturtøku, og hvussu hetta skal fara fram.

Lógin er sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Hetta økið er ikki yvirtikið, men stendur á lista A í heimastýrislógini. Heilsumál kunnu verða yvirtikin, tá ið føroyingar vilja tað. Sum nú er, er økið danskt, og danir hava umsitingarligu ábyrgdina.

## Fyribyrgjandi heilsukanningar og hjálp í sambandi við barnsburð

*A. nr. 643 af 09.12.1982 om ikrafttræden på Færøerne af lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp, som senest ændret ved A. nr. 543 af 30.06.1993 (Eisini broytt við A. nr. 845 af 18.12.1987)*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í heilsumálum, Almannastovan, Sundhedsstyrelsen, Statens Seruminstitut og heilsumálaráðharrin.

Uppgávan hjá landsstýrismanninum er at áseta neyvari reglur sambært lógini, at geva kvinnum møguleika fyri ókeypis, fyribyrgjandi heilsukanningum, meðan tær eru við barn, og barnsburðarhjálp. Landsstýrismaðurin skal seta tær jarðarmøður og hjálparstarvsfólk, sum eru neyðug fyri at halda skyldurnar sambært lógini, áseta neyvari reglur fyri, um jarðarmøður, í samráði við landslæknan, skulu hava skyldu til at virka aðrastaðir enn á sjúkrahúsi, geva tilboð um vegleiðing frá lækna um gitnaðarfyribyrging og syrgja fyri, at fólk fær upplýsing um hesa fyribyrging.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at gera neyvari leiðreglur fyri, hvussu fyribyrgjandi heilsukanningarnar verða framdar sambært lógini.

Uppgávan hjá Almannastovuni er at taka sær av kvinnum, sum frá lækna ella jarðarmóður eru vístar til lækna, tí at tær hava persónligar, sosialar ella fíggjarligar trupulleikar, ímeðan tær eru við barn.

Statens Seruminstitut hevur til uppgávu at gera tær kanningar av blóðroyndum, sum eru neyðugar sambært lógini.

Heilsumálaráðharrin kann áseta neyvari reglur um kanningarnar av blóðroyndum.

2. Lóggáva

Økið er felagsmál og sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Lógin ásetir ikki faklig krøv ella altjóða standard til eitt ávíst heilsuøki, men bert reglur um veitingar til borgarar í Føroyum viðv. fyribyrgjandi heilsukanningum av barnakonum.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Økið er felagsmál, t.e., at danir hava fíggjarligu ábyrgdina.

## Tilboð um ókeypis koppseting

*A. nr. 17 af 16.01.1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om tilbud om gratis vaccinationer mod visse sygdomme, som ændret ved A. nr. 845 af 18.12.1987.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru heilsumálaráðharrin, Sundhedsstyrelsen og Statens Seruminstitut.

Uppgávurnar, sum donsku myndugleikarnir sambært lógini hava, eru hesar:

Heilsumálaráðharrin skal áseta reglur um tilboð um ókeypis koppseting fyri ávísar sjúkur.

Sundhedsstyrelsen skal áseta vegleiðingar um koppseting sambært lógini.

Statens Seruminstitut skal hava ávísa nøgd av koppingarevnum á goymslu til koppsetingar sambært lógini.

2. Lóggáva

Økið er felagsmál. Lóggávan er ein konglig fyriskipan, t.e. donsk lóggáva, sum er tillagað føroysk viðurskifti.

Talan er ikki um faklig krøv ella altjóða standard til eitt ávíst heilsuøki, men lógin ásetir bert reglur um veitingar til borgarar í Føroyum viðv. tilboðum um ókeypis koppseting. Tað eigur at standa til Løgtingið at áseta, hvørjar veitingar tað vil geva sínum borgarum.

Við heimild í kongligu fyriskipanini er sett í gildi:
- *B. nr. 634 af 05.07.1994 om gratis vaccination mod visse smitsomme sygdomme m.v. på Færøerne.*

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin ber útreiðslurnar av at samsýna læknum fyri at koppseta fyri sjúkur sambært lógini, eins og hann ber útreiðslurnar av koppingarevnum. Aðrar útreiðslur sambært lógini verða goldnar av dønum.

Við tað at økið er felagsmál, er fíggjarliga ábyrgdin donsk.

## Fráboðan um føðingar og andlát

*A. nr. 115 af 20.02.1989 om anmeldelse af fødsler og dødsfald.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru „Folkekirkens ministerialbøger,“ landsstýrismaðurin í heilsumálum og varabiskupurin í Danmark.

Føðingar og andlát í Føroyum skulu verða fráboðað „Folkekirkens ministerialbøger.”

Í samráði við varabiskupin í Danmark ásetir landsstýrismaðurin í heilsumálum neyvari reglur um fráboðanirnar.

2. Lóggáva
Økið er felagsmál. Lógin er sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Lógin snýr seg um, hvørjir myndugleikar skulu hava boð um føðingar og andlát í Føroyum.

Við heimild í lógini er sett í gildi:
- *K. nr. 76 frá 17.07.1989 um fráboðan um føðingar og andlát.*

3. Fíggjarlig ábyrgd
Danski staturin ber útreiðslurnar sambært lógini.

## Sterilisatión og kastratión

*A. nr. 73 af 14.03.1968 om sterilisation og kastration.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru løgmálaráðharrin, Retslægerådet, Mødrehjælpsinstitutionen, landslæknin og dómarin.

Uppgávan hjá løgmálaráðharranum er at áseta reglur um viðgerð av umsóknum um sterilisatión og um eftirkanningar í sambandi við kastratión. Løgmálaráðharrin skal geva loyvi til kastratión eftir tilmæli frá Retslægerådet. Løgmálaráðharrin er eisini kærumyndugleiki í avgerðum, sum Mødrehjælpsinstitutionen hevur tikið.

Mødrehjælpsinstitutionen er eitt samráð, ið hevur til uppgávu at viðgera umsóknir um sterilisatión, og gevur loyvi til hetta. Sterilisatión kann bert verða loyvd, um eitt einmælt samráð er fyri tí. Verður sýtt fyri umsókn, kann hetta verða kært til løgmálaráðharran.

Í Føroyum verður loyvi til sterilisatión givið av nevnd, sum er samansett av landslæknanum, dómaranum og trimum limum, sum løgmálaráðharrin tilnevnir.

2. Lóggáva

Økið er felagsmál. Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Økið er felagsmál og verður fíggjað við blokkinum.

## Farssóttir

*A. nr. 600 af 30.11.1984 om ikrafttræden på Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme, som senest ændret ved A. nr. 845 af 18.12.1987.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru heilsumálaráðharrin, landsstýrismaðurin í heilsumálum, Sundhedsstyrelsen, epidemikommisiónin, tollmyndugleikar, løgreglan, havnarmyndugleikar og loftferðslumyndugleikar.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum er støðugt at dagføra teir listar, sum áseta, hvørjar sjúkur eru at rokna sum farsóttir. Heilsumálaráðharrin kann í samráði við Landsstýrið áseta reglur um, hvat verður gjørt á skúlum og stovnum, um farsótt fer at ganga, áseta reglur um innflutning og útflutning, samráðingar, útflýggjan, viðgerð og goymslu av sóttfongdum evnum, sum stava frá farsótt, sum henda lógin umfatar. Harafturat kann heilsumálaráðharrin áseta reglur um líkflutning inn og út úr landinum, áseta reglur um viðgerð og líkflutning innanoyggja og taka avgerð um, at epidemikommisiónin skal hava læknaliga hjálp til sítt virksemi. Eftir samráðingar við Landsstýrið og við tilmæli frá Sundhedsstyrelsen hevur danski heilsumálaráðharrin heimild til at gera av, at fyriskipanir, ið bert verða settar í

verk ímóti farsóttum, eisini kunnu verða settar í verk ímóti øðrum sóttum, eins og hann hevur heimild at geva kravboð um, at fólk í einum neyvt avmarkaðum øki skulu lata seg koppseta. Talan kann tá eisini vera um ein ávísan samfelagsbólk.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at gera tilmæli til heilsumálaráðharran, (sí omanfyri). Sundhedsstyrelsen kann eisini eftir samráð við landslæknan áseta reglur um, hvørjir samfelagsbólkar ella hvørji fólk skulu verða kannað fyri tuberklar, og reglur um læknahjálp til at basa eini farsótt.

Uppgávan hjá Landsstýrinum er at samráðast við heilsumálaráðharran, sum omanfyri nevnt.

Uppgávan hjá epidemikommisiónini er:

- At geva boð um, at ein og hvør, sum hevur fingið farsótt, ella tá ið mett verður, at viðkomandi er smittaður av tílíkari sjúku, skal lata seg kanna av lækna. Verður hetta ikki gjørt, kann viðkomandi verða handtikin av løgregluni, soleiðis at kanningin kann verða gjørd.
- Epidemikommisiónin kann geva boð um, at ein og hvør, sum er sóttfongdur, skal lata seg avbyrgja, og um neyðugt lata seg leggja inn á sjúkrahús. Hetta kann eisini verða framt við hjálp frá løgregluni. Epidemikommisiónin kann geva boð um at avbyrgja eitt øki, har sum farsótt er farin at ganga.
- Verður hildið, at fólk er deytt av farsótt, kann epidemikommisiónin í samráði við Sundhedsstyrelsen geva boð um, at líkið skal verða kannað.
- Epidemikommisiónin kann seta kanningar í verk av bakteriologiskum ella tílíkum slag, um hetta er neyðugt fyri at tryggja, at ein smitta verður staðfest.
- Eftir reglum, sum Sundhedsstyrelsen ásetir, kann Epidemikommisiónin geva boð um, at smittað ella smittandi fólk og tey, ið hava verið í sambandi við hesi, mugu lata seg sóttreinsað; eins og kommisiónin kann geva boð um at sóttreinsa leysoyra, fastogn, flutningsfør o.a.
- Epidemikommisiónin kann geva boð um, at ein og hvør, sum kemur til Føroya, skal lata seg kanna av lækna, og at viðkomandi um neyðugt skal lata seg kanna av lækna á sjúkrahúsi. Hetta kann eisini verða gjørt við hjálp frá løgregluni. Epidemikommisiónin kann geva einum flutningsfólki skrivliga váttan um, hvørjar kanningar hava verið gjørdar av farminum hjá viðkomandi sambært hesi lóg. Váttanin skal vera ókeypis.
- Epidemikommisiónin skal áseta endurgjald í samráði við ein, sum hevur havt miss av kanningum og øðrum, sum eru sett í verk sambært hesi lóg.

- Tollmyndugleikar, løgregla, havnarmyndugleikar og loftferðslumyndugleikar skulu hjálpa epidemikommisiónini í virksemi hennara sambært hesi lóg.

Tá ið rannsóknarstova kannar HIV-andevni o.a., skal hon senda Statens Seruminstitut mánaðarligar frágreiðingar um, hvussu umfatandi kanningin er, og um kanningarúrslitini. Lækni, sum fær fólk við tuberklum í viðgerð, skal geva landslæknanum, Statens Seruminstitut og Sundhedsstyrelsen boð um hetta. Sí „bekendtgørelse for Færøerne om laboratoriets indberetning af HIV undersøgelser m.v.“ og „bekendtgørelse for Færøerne om lægers anmeldelse om tuberkulose.”

Sambært reglunum omanfyri er uppgávan hjá landslæknanum at vera myndugleikin, sum læknar skulu venda sær til, um teir koma eftir, at fólk hevur t.d. tuberklar. Sambært „bekendtgørelse for Færøerne om forholdsregler mod smitsomme sygdomme i skoler og daginstitutioner for børn og unge,“ kann landslæknin gera av, at ein stovnur ella skúli verða stongdir, tí at smittuvandi er. Ímeðan verða tær fyriskipanir, sum landslæknin hevur givið boð um, settar í verk, og skúlin ella stovnurin kunnu bert verða uppafturlatnir við góðkenning frá landslæknanum. Landslæknin kann eisini gera av, at nýggj børn sleppa ikki at ganga í stovnar ella skúlar, har farsótt er, og verður eitt barn sóttfongt á stovni ella skúla, skal landslæknin beinanvegin geva viðkomandi leiðara boð um hetta. Landslæknin kann áseta neyvari reglur um at kunna stovnar og skúlar um farsóttir.

Eftir samráðingar við landslæknan ásetir Sundhedsstyrelsen neyvari reglur um fyrivarni fyri farsóttum í skúlum og dagstovnum fyri børn og ung. Sambært „bekendtgørelse for Færøerne om behandling af lig“ skal landslæknin syrgja fyri, at áðrenn eitt líkpass verður útvegað, skulu allar treytir fyri einum líkpassi sambært lógum og kunngerðum verða hildnar. Sundhedsstyrelsen ásetir neyvari reglur um líkpass. Tá ið fólk doyr av farsótt, skal læknin geva landslæknanum frágreiðing um tann deyða. Líkskoðan verður tá gjørd av landslæknanum ella av øðrum lækna, sum landslæknin heitir á. Landslæknin fær til vega neyðugar trygdartraktir og tryggjar sær, at hesar verða sóttreinsaðar og fyribeindar aftan á, at tær hava verið brúktar. Eftir at líkið er lagt í kistuna, skal rúmið, sum tann deyði hevur ligið í, beinanvegin verða sóttreinsað eftir ávísing frá landslæknanum.

Samráðingar um koppingarevni, sum eru vandamikil fyri fólk, og sum eru gjørd til at viðgera fólk og djór, mugu bert fara fram gjøgnum Statens Seruminstitut og Den kongelige veterinær- og landbohøjskolens serumlaboratorium. Eitur, sum er gjørt til týna rottu, mús og annað skaðadjór, og sum eisini kann smitta fólk, má bert verða samráðst um eftir góðkenning frá Sundhedsstyrelsen.

2. Lóggáva

Økið er felagsmál. Lóggávan er sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Lógin skal tryggja at, farsóttir ikki fáa breitt seg í Føroyum, og at slíkar sjúkur heldur ikki sleppa til og úr Føroyum til onnur lond. Lógin krevur stóra umsiting, og talan er um øki við nógvari heilsufakligari vitan.

Við heimild í lógini eru settar í gildi:

– *B. nr. 747 af 14.09.1993 for Færøerne om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme.*
– *B. nr. 748 af 14.09.1993 for Færøerne om forholdsregler mod smitsomme sygdomme i skoler og daginstitutioner for børn og unge.*
– *B. nr. 749 af 14.09.1993 for Færøerne om behandling af lig.*
– *B. nr. 750 af 14.09.1993 for Færøerne angående smitstof, der er farligt for menneskers sundhed.*
– *B. nr. 580 af 04.07.1997 for Færøerne om lægers anmeldelse af smitsomme sygdomme m.v.*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Sambært § 28 í lógini rindar heimastýrið allar útreiðslur, ið standast av lógini, tó við ávísum undantøkum.

## Líkskoðan

*A. nr. 534 af 06.09.1988 om ligsyn m.v.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar sambært hesi lóg eru løgmálaráðharrin, fútin, landslæknin, Sundhedsstyrelsen, kommunurnar í Føroyum og løgreglan.

Uppgávan hjá løgmálaráðharranum sambært lógini er fyrst og fremst at áseta neyvari reglur um líkskoðan. Løgmálaráðharrin skal t.d. áseta reglur um, at lækni ella líkskoðari ikki kunnu skoða ein deyðan, sum læknin ella líkskoðarin hava havt serligt tilknýti til. Eisini skulu neyvari reglur verða ásettar, at líkskoðan kann verða gjørd av tveimum líkskoðarum undir serligum umstøðum, t.e., at undir serligum umstøðum er ikki kravt, at lækni skal vera við. Løgmálaráðharrin kann eisini áseta neyvari reglur um líkviðgerð, og annars neyvari reglur um líkskoðan og líkskurð í førum, sum ikki eru lýst í lógini.

Rættarlæknaliga líkskoðan gera løgreglan og landslæknin í felag, men løgmálaráðharrin kann loyva, at aðrir læknar eisini eru við. Rættarlæknaligan líkskurð ger ein serlækni, sum løgmálaráðharrin tilnevnir.

Uppgávan hjá fútanum sambært lógini er at gera av, í hvørjum kommunum líkskoðarar skulu verða settir. Fútin ger hetta í samráði við landslæknan. Líkskoðarar verða settir í starv og sagdir úr starvi av fútanum eftir tilmæli frá kommununi. Á sama hátt verða ein ella tveir varalíkskoðarar settir.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen sambært hesi lóg er at geva løgmálaráðharranum tilmæli í málum um líkskoðan.

Uppgávan hjá løgregluni sambært lógini er at syrgja fyri, at læknar ella líkskoðarar, sum verða tilkallaðir til líkskoðan, geva løgregluni frágreiðing um málið. Rættarlæknaliga líkskoðan gera løgreglan og landslæknin í felag, eins og løgreglan tekur avgerð um rættarlæknaligan líkskurð. Eru tey avvarðandi hjá tí deyða ímóti rættarlæknaligum líkskurði, skal løgreglan innan eitt samdøgur leggja spurningin, um avgerðin er løggildu, fyri rættin.

Uppgávan hjá landslæknanum sambært lógini er at samstarva við fútan og løgregluna í málum um líkskoðan.

2. Lóggáva

Í høvuðsdráttum ásetir lógin reglur um, hvussu farast skal fram, tá ið líkskoðan verður gjørd í danska ríkinum.

Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1988. Danska stjórnin hevur ábyrgdina av at tilevna lógina og tilhoyrandi kunngerðir, men hesar skulu tó verða samtyktar av føroyska heimastýrinum.

Vart skal verða gjørt við, at galdandi lóg á økinum í Danmark: „L.nr. 402 af 13. juni 1990 om ligsyn, obduktion og transplantation," er samtykt á Løgtingi, men er ikki sett í gildi fyri Føroyar enn. Danskir myndugleikar skulu seta lógina í gildi, við at hon verður undirskrivað av danska ráðharranum og drotningini og lýst í Kunngerðablaðnum B.

Lógarøkið er enn felagsmál. Um føroyingar vilja, kunnu teir yvirtakað økið uttan at samráðast við danir, av tí at økið stendur á lista A í heimastýrislógini.

Lógin ásetir fakligar standardir fyri heilsuøkið og hongur saman við, hvat góðkendir læknar kunnu gera í sínum arbeiði.

Við heimild í lógini eru lýstar:

- *B. nr. 45 af 07.02.1977 om dødsattester, som sat i kraft ved A. nr. 534 af 06.09.1988.*
- *B. nr. 46 af 07.02.1977 om lægers adgang til at foretage ligsyn og udstede dødsattest, som sat i kraft ved A. nr. 534 af 06.09.1988.*
- *B. nr. 538 af 09.09.1988 om ligsynsmænd på Færøerne.*

3. Fíggjarlig ábyrgd
Danir hava fíggjarligu ábyrgdina av økinum.

Myndugleikarnir sambært lógini eru fyri ein part í Danmark og fyri ein part danskir myndugleikar, sum starvast í Føroyum og eru danskt løntir.

## Embætislæknar

*A. nr. 633 af 20.07.1995 om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v.,*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar sambært lógini eru heilsumálaráðharrin, landslæknin, Sundhedsstyrelsen, løgmálaráðharrin, landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum og kommunalu myndugleikarnir.

Uppgávurnar hjá heilsumálaráðharranum sambært fyriskipanini eru at áseta neyvari reglur um ta útbúgving, sum ein lækni skal hava, fyri at kunna verða settur sum landslækni, um vanliga virksemið hjá landslæknanum, reglur fyri heilsustøðuni á viðgerðar- og røktarheimum o.ø., skúlum og dagstovnum o.ø. eins og á øðrum stovnum, sum geva læknaliga viðgerð, og eftir samráðingar við Landsstýrið at áseta reglur um skyldurnar hjá landslæknanum mótvegis Arbeiðseftirlitinum.

Harumframt setir Heilsumálaráðið landslæknan í Føroyum, eftir at tilmæli er fingið til vega frá Sundhedsstyrelsen. Heilsumálaráðið virkar eisini sum kærumyndugleiki í málum á hesum øki.

Uppgávan hjá landslæknanum sambært fyriskipanini er at vera ráðgevi hjá donskum myndugleikum, landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum og hjá teimum kommunalu myndugleikunum í Føroyum, tá ið talan er um læknaligar, heilsuligar, umhvørvisligar og sosialmedisinskar umstøður, t.e., at landslæknin hjálpir til við at fremja sosialar og heilsuligar uppgávur so sum heilsusystraskipan, heimasjúkrasystraskipan, skúlalæknaskipan o.a. Hann skal vera ráðgevi hjá løgregluni í læknaligum málum, tá ið heilsumálaráðharrin, eftir avtalu við løgmálaráðharran, ásetir reglur um hetta. Landslæknin skal fylgja við heilsustøðuni í Føroyum og halda eyga við, at heilsulóggávan verður hildin, eins og hann skal gera Landsstýrið og donsku myndugleikarnar varug við, um okkurt tvørrar við heilsustøðuni og koma við uppskotum um, hvussu betrað kann verða um støðuna. T.d. skal hann ráðgeva dag- og samdøgursstovnum og gera teir varugar við, um ábøtur mugu verða gjørdar á stovnunum.

Landslæknin hevur vegna Sundhedsstyrelsen eftirlit við tí virksemi, sum læknar, tannlæknar, ljósmøður, sjúkrasystrar, røktarassistentar o.o.

hava í Føroyum, og er embætismaður hjá Sundhedsstyrelsen í Føroyum. Umframt at hava eftirlit við heilsustarvsfólki, skal landslæknin eisini halda seg kunnaðan um viðgerðir, sum ikki eru góðkendar í Føroyum. Heldur landslæknin tað vera neyðugt at seta í verk løgreglukanning av heilsustarvsfólki í Føroyum, skal hann geva Sundhedsstyrelsen tilmæli um hetta. Heldur landslæknin, at heilsustarvsfólk kann vera fólki til bága í starvi sínum, skal landslæknin geva Sundhedsstyrelsen boð um hetta við hjálagdari kanning av viðurskiftunum.

Eftir neyvari ásettum reglum frá Sundhedsstyrelsen skal landslæknin geva Sundhedsstyrelsen boð um heilsustøðuna í Føroyum, savna inn og arbeiða við medisinalstatistiskum upplýsingum, gera ársfrágreiðing um sítt virki, kunna um týðandi umstøður av heilsuligum týdningi, viðvirka til at myndugleikarnir seta heilsuupplýsandi tiltøk í verk í Føroyum, virka fyri samstarvi millum teir ymsu heilsustarvsfólkabólkarnar og vera við til at skipa fyri, at hóskandi heiligvágsgoymslur eru í Føroyum.

Landslæknin skal bera so í bandi, at fólk, ið arbeiðir við heilivági, skal geva Sundhedsstyrelsen frágreiðing um virki sítt.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at áseta neyvari reglur á økinum í ávísum førum. Annars skal Sundhedsstyrelsen stuðla landslæknanum í Føroyum í virki hansara, tá ið hetta er gjørligt.

Uppgávan hjá kommununi sambært fyriskipanini og kunngerðunum er, at hon hevur heimild til at geva forboð fyri at nýta ein dag- ella samdøgursstovn, um heilsuligar ábøtur ikki verða gjørdar á stovninum innan eina ávísa tíð, sum kommunan ásetir, ella um tað verður mett at vera ómøguligt hjá stovninum at gera ábøturnar, ella tá ið álvarsligur vandi er fyri heilsustøðuni, um stovnurnin heldur áfram at virka.

## 2. Lóggáva

Økið er felagsmál, men stendur á lista A í heimastýrislógini og kann tí verða yvirtikið, tá ið føroyska heimastýrið tekur avgerð um hetta.

Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1995. Danski staturin hevur ábyrgdina av at tilevna lógina og tilhoyrandi kunngerðir. Kongligu fyriskipanirnar skulu verða samtyktar á Løgtingi og lýstar í Kunngerðablaðnum fyri at hava gildi fyri Føroyar.

Lógin ásetir í høvuðsdráttum reglur um, hvussu arbeiðið hjá embætislæknum í Føroyum skal fara fram. Á sama hátt sum góðkenningarlógirnar, (autorisatiónslógirnar), ásetir lógin reglur, sum krevja stóra heilsufakliga vitan. Í Grønlandi er landslæknaembætið yvirtikið.

Við heimild í kongligu fyriskipanini eru settar í gildi:

– *B. nr. 739 af 11.09.1995 for Færøerne om Landslægens opgaver i forhold til dag- og døgninstitutioner m.v.*

– *B. nr. 740 af 11.09.1995 for Færøerne om Landslægens virksomhed.*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Danir hava fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Myndugleikarnir sambært lógini eru fyri ein part í Danmark og fyri ein part danskir myndugleikar, sum starvast í Føroyum og eru danskt løntir.

## Sundhedsvæsenets Centralstyrelse

*A. nr. 634 af 20.07.1995 om sundhedsvæsenets centralstyrelse m.v.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar sambært fyriskipanini eru Sundhedsstyrelsen, heilsumálaráðharrin, Sundhedsvæsenets Patientklagenævn og Statens Seruminstitut.

Síðan Heilsumálaráðið varð stovnað, hevur ráðið havt tær uppgávur, sum Innanríkisráðið hevur sambært fyriskipanini. Tí verður heilsumálaráðharrin settur í staðin fyri innanríkisráðharran í lýsingini niðanfyri.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum sambært fyriskipanini er at áseta neyvari reglur á økinum og at virka sum kærumyndugleiki. Heilsumálaráðharrin velur formannin og næstformannin til Patientklagenævnet og ásetir eisini neyvari reglur fyri tað. Heilsumálaráðharrin setir eisini hinar limirnar eftir tilmæli frá Amtsrådsforeningen í Danmark, Keypmannahavnar kommunu, Frederiksbergs kommunu og De samlede invalide organisationer. Limirnir verða valdir soleiðis hvørja ferð, kommunuval er. Harumframt hevur heilsumálaráðharrin ta uppgávu, at hann, tá ið fólk vil hava eina frátikna góðkenning, (autorisatión), aftur, kann geva hesum fólki góðkenningina aftur, tá ið tær umstøður, sum frátøkan varð grundað á, ikki longur eru til staðar.

Uppgávurnar hjá Sundhedsstyrelsen sambært fyriskipanini eru hesar:

- Ráðgeva og hjálpa teimum ymsu ráðharraráðunum við miðfyrisiting á heilsuøkinum.
- Fylgja við í heilsustøðuni í ríkinum og halda seg kunnaðan um fakligu vitanina á heilsuøkinum.
- Tá ið Sundhedsstyrelsen gerst varugt við brot ella tørv á heilsuøkinum, skal tað kunna avvarðandi myndugleikar og almenningin um hetta.
- Ráðgeva myndugleikum um spurningar á heilsuøkinum.
- Sundhedsstyrelsen hevur eftirlit við heilsufakliga virkseminum,

sum heilsustarvfólk útinnir í heilsuverkinum. Hetta er tó ikki galdandi fyri góðkendar sálarfrøðingar.

- Heldur Sundhedsstyrelsen, at ein góðkenning eigur at verða tikin frá fólki, gevur tað heilsumálaráðharranum boð um hetta. Áðrenn Sundhedsstyrelsen kemur við boðunum, skal tað hava eina skrivliga váttan frá Retslægerådet. Sundhedsstyrelsen kann í serligum førum taka góðkenningina frá fólki fyribils, um vandi er fyri, at viðkomandi ger skaða í sínum framhaldandi starvi.
- Sundhedsstyrelsen almannakunnger avgerðir um fyribils ella endaliga frátøku av góðkenning.

Uppgávan hjá Sundhedsvæsenets Patientklagenævn sambært hesi fyriskipan er at viðgera kærur um fakliga arbeiðið hjá starvsfólki í heilsuverkinum. Hetta er tó ikki galdandi fyri tær kærur, sum kunnu kærast til annan kærumyndugleika sambært aðrari lóggávu. Harumframt skal Sundhedsstyrelsen leggja mál fyri Patientklagenævnet, um Sundhedsstyrelsen metir, at orsøkir eru at finnast at ella at revsa starvsfólk í heilsuverkinum. Patientklagenævnet er í sínum virki óheft, og tess avgerðir kunnu ikki verða lagdar fyri hægri fyrisitingarmyndugleika. Patientklagenævnet kann siga sína hugsan um málið, herímillum eisini finnast at einum starvsfólki, ella royna at seta aðrar revsingar í verk. Patientklagenævnet kann tó ikki geva endurgjald fyri skaða. Patientklagenævnet kunnar Sundhedsstyrelsen um tær avgerðir, sum tiknar verða.

Uppgávurnar hjá Statens Seruminstitut sambært hesi fyriskipan er at vera høvuðsrannsóknarstova í humanbakteriologi, virologi og serologi, og at gera kanningar fyri millum annað sjúkrahús og praktiserandi læknar, eins og at gera og fáa til vega koppingarevni, gera blóðproduktir o.a. Statens Seruminstitut hevur virksemi við vísindaligari gransking og ráðgeving og hevur eftirlits- og referancefunktión á økjum, sum viðv. tess uppgávum. Innanríkisráðharrin, (nú heilsumálaráðharrin), ásetir neyvari reglur um virksemið hjá Statens Seruminstitut. Sundhedsstyrelsen krevur eisini inn gjøld fyri m.a. at góðkenna ávísar starvsfólkabólkar í heilsuverkinum.

## 2. Lóggáva

Føroyska heimastýrið kann altíð yvirtaka lógarøkið, av tí at økið stendur á lista A í heimastýrislógini.

Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1995. Danski staturin hevur ábyrgdina av at tilevna lógina og tilhoyrandi kunngerðir. Kongligu fyriskipanirnar skulu verða samtyktar á Løgtingi og lýstar í Kunngerðablaðnum fyri at hava gildi í Føroyum.

Lógin ásetir í høvuðsdráttum reglur um virksemið hjá Sundhedsstyrelsen, Sundhedsvæsenets Patientklagenævn og Statens Seruminstitut.

Sundhedsstyrelsen, Sundhedsvæsenets Patientklagenævn og Statens Seruminstitut hava umfatandi uppgávur sambært lógini. Neyðugt verður við stórari umsiting á økinum, tí lógin setir stór krøv til eftirlit, kanningar og kæruviðgerð. Mett verður, at hetta er neyðugt, fyri at heilsuveitingarnar í samfelagnum skulu vera nøktandi og lúka altjóða krøv.

Við heimild í lógini eru sett í gildi:

– *Millumbroytingarlógir, sum eisini eru í gildi í Føroyum, eru: L. nr. 391 af 07.06.1989, L. nr. 369 af 06.06.1991 og L. nr. 494 af 30.06.1993.*
– *B. nr. 977 af 22.12.1986 om gebyrer for autorisation af visse personalegrupper indenfor sundhedsvæsenet.*
– *B. nr. 662 af 14.09.1998 om forretningsorden for Sundhedsvæsenets Patientklagenævn.*

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Danir hava fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Myndugleikarnir sambært lógini eru allir danskir og danskt løntir.

Á donsku fíggjarlógini fyri 1999 fær Sundhedsstyrelsen eina rakstrarjáttan á 127 mió. kr., Statens Seruminstitut fær 77,1 mió. kr. og Sundhedsvæsenets Patientklagenævn 21,2 mió. kr.

Tað krevur eina gjølligari kanning at meta um, hvussu nógv tað hevði kostað føroyingum, um økið kom undir føroyskt málsræði.

## Sjúklingatrygging

*Anordning om ikrafttræden på Førøerne om patientforsikring.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Landsstýrið hevur ikki tryggingarskyldu sambært lógini, men kann kortini tekna trygging hjá einum tryggingarfelag, soleiðis sum gjørt verður í løtuni. (Sjúkrahúsverkið teknar tryggingina).

Tey tryggingarfeløg, sum tekna tryggingar sambært lógini, skulu gerast limir í donsku Patientforsikringsforeningen.

Klagur um skaðar, sum lógin fevnir um, verða sendar Patientforsikringsforeningen til avgerðar.

Stýrið í felagnum tekur bert støðu til heildarmál. Í stakmálum tekur avgreiðsludeildin avgerð. Millum teirra, sum starvast á avgreiðsludeildini, eru 14 løgfrøðingar. Tá ið avgerð verður tikin, kann Patient-

forsikringsforeningen ráðføra seg við eitt læknaligt ráðgevaranet, sum eisini er knýtt at skipanini.

Avgerðin hjá felagnum kann verða kærd til Patientskadeankenævnet.

2. Lóggáva

Sum er, er bert culpaábyrgd í føroyska sjúkrahúsverkinum. Tað merkir, at sjúklingurin sjálvur skal prógva, at eitt mistak er gjørt, tá ið hann er vorðin viðgjørdur á føroyskum sjúkrahúsi. Hetta er sera óheppið, tí ofta er sera torført hjá sjúklinginum at prógva mistakið.

Hetta verður broytt við hesi lóg. Ætlanin við henni er at víðka um endurgjaldsrættin hjá sjúklinginum og at tryggja, at sjúklingurin fær endurgjaldið skjótari og lættari enn eftir reglunum, sum nú eru. Í „Lov om patientforsikring" er ábyrgdin ikki avmarkað til culpaábyrgd, tó at talan heldur ikki er um vanliga, objektiva ábyrgd.

Rætturin hjá sjúklinginum til endurgjald er ikki tengdur at, um t.d. ein lækni hevur átikið sær sjálvsábyrgd av skaðanum. Meginreglan í lógini er, at endurgjaldsábyrgdin umfatar allar skaðar av kanning, viðgerð ella tílíkum, sum sjúklingurin sambært eini objektivari meting kundi verið sloppin undan, antin við at havt ein royndari lækna, ella við at nýtt aðrar viðgerðarhættir. Harumframt fær sjúklingurin eisini endurgjald fyri skaðar, sum koma av brekum í teknisku tólunum á sjúkrahúsinum, og um so er, at sjúklingurin av viðgerðini fær aðra smittu, sum ikki er rímiligt, at hann skal gjalda útreiðslurnar av sjálvur.

Heimild er fyri at seta lógina í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan. Lógin snýr seg um endurgjald til sjúklingar. Bæði endurgjaldsábyrgd og heilsuverkið eru felagsmál. Tryggingarvirksemið er sermál, men lógin snýr seg tó ikki um tryggingarvirksemi. Tann parturin av lógini, sum hevur við trygging at gera, snýr seg um, at tann endurgjaldsskyldugi skal gera tryggingaravtalu við eitt tryggingarfelag. Tað merkir, at lógin regulerar tryggingaravtalur, og hesar eru ikki sermál. Tí verður lógin sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan.

Føroyska lógin verður at kalla átøk tí donsku. Frávikini eru, at teksturin verður broyttur soleiðis, at sjúklingatryggingin fer at galda fyri sjúklingaskaða, ið er hendur í Føroyum ella í Danmark, at tilvísingarnar í lógini eru broyttar í samsvari við lóggávuna í Føroyum, og at gildiskomureglurnar eru øðrvísi.

Lógin varð samtykt á Løgtingi í tingsetuni 1998/99 og er send donsku ríkismyndugleikunum, tí tað eru teir, sum skulu seta lógina í gildi fyri Føroyar við at lýsa hana í Kunngerðablaðnum B. Av tí at hetta ikki er gjørt enn, er lógin heldur ikki komin í gildi.

Klaga frá sjúklingi fær sambært hesi lóg eina sera holla viðgerð í donsku skipanini, sum byggir á drúgvar royndir við endurgjaldi til

sjúklingar sambært sjúklingatryggingarlógini. Ein slík skipan er sera dýr at sett í verk og krevur stóran serkunnleika á økinum.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Fíggjarliga høvuðsábyrgdin av økinum er í Danmark, við tað at hetta er felagsmál.

Í Føroyum stendst fíggjarligur kostnaður av lógini, við tað at sjúkrahúsverkið, og í ávísum førum Føroya landsstýrið, skulu rinda tryggingarfelagi eitt tryggingargjald. Fíggjarligur kostnaður stendst eisini av, at Føroya landsstýrið er endurgjaldsskyldugt í teimum førum, sum nevnd eru í § 1, stk. 3, smb. við § 9, stk. 2, og Føroya landsstýri kann yvirtaka tryggingarskylduna sambært § 11 stk. 2.

## Vísindasiðseminevnd

*„Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter.“*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Í Danmark er skipanin uppbygd við einum ávísum tali av vísindaetiskum økisnevndum og eini vísindaetiskari høvuðsnevnd, sum samskipar arbeiði hjá økisnevndunum.

Føroyska vísindasiðseminevndin skal sambært uppskotinum virka í donsku skipanini sum økisnevnd undir høvuðsnevndini. Í føroysku nevndini skulu sita sjey limir, harav landsstýrismaðurin velur fýra og Føroya læknafelag tríggjar. Tveir av limunum í nevndini verða valdir at sita í donsku høvuðsnevndini.

Uppgávan hjá føroysku vísindasiðseminevndini verður sambært uppskotinum at gera eina fakliga og etiska meting av teimum granskingarverkætlanum, sum nevndar eru í § 6, og sum ætlanin er at seta í verk í Føroyum. Heldur nevndin granskingarverkætlanina vera ráðiliga, gevur hon loyvi til, at royndin kann verða sett í verk. Nevndin hevur harnæst eftirlit við, at royndin verður gjørd í samsvari við givna loyvið.

Høvuðsnevndin í Danmark samskipar arbeiðið ímillum donsku og føroysku økisnevndirnar, fylgir við í granskingarmenningini, viðger ávísar granskingarverkætlanir sambært lógini, vegleiðir økisnevndirnar, ásetir neyvari leiðreglur fyri tær, eins og hon virkar sum kærumyndugleiki, tá ið kært verður um avgerðir hjá økisnevndunum.

2. Lóggáva

Ætlanin við lógini er at áseta neyvari rammur fyri vísindaetisku metingina av biomedisinskum granskingarverkætlanum.

Av tí at málsøkið ikki er yvirtikið, er heimild fyri at seta lógina í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið er tað ein fyrimunur við skipanini, at føroyska vísindasiðseminevndin verður knýtt at „Den Centrale Videnskabsetiske Komité,“ sum er høvuðsmyndugleiki hjá donsku økisnevndunum. Soleiðis kunnu føroyingar fáa neyðuga vegleiðing frá høvuðsnevndini, samstundis sum skipanin ikki verður so dýr hjá føroyingum at umsita.

Teksturin í uppskotinum er tillagaður føroysk viðurskifti, soleiðis at ásett verður, hvussu nevndin skal verða uppbygd, og hvussu sambandið ímillum føroysku nevndina og donsku høvuðsnevndina skal vera. Eisini verður lógin broytt soleiðis, at hon í staðin fyri at áseta, hvørjar uppgávur donsku nevndirnar hava, ásetir, hvørjar uppgávur føroyska nevndin skal hava.

Lógin varð samtykt á Løgtingi í tingsetuni 1998/99 og er send donsku ríkismyndugleikunum, tí tað eru teir, sum skulu seta lógina í gildi fyri Føroyar við at lýsa hana í Kunngerðablaðnum B. Av tí at hetta ikki er gjørt enn, er lógin tískil ikki komin í gildi.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Mett verður, at fíggjarligi kostnaðurin av uppskotinum verður uml. 50.000 kr. um árið. Væntandi fara teir sjey nevndarlimirnir at hava um tíggju fundir árliga. Landsstýrismaðurin rindar limunum fundarpening og ferðaútreiðslur eftir vanligum reglum, sum galda fyri tænastumenn. Í kongligu fyriskipanini er eisini møguleiki fyri, at landsstýrismaðurin ásetir reglur um, at limirnir, umframt hetta, fáa dag- og tímapening eftir vanligum reglum, sum galda fyri tænastumenn, umframt endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, og at formaðurin, næstformaðurin og skrivarin kunnu fáa viðbót ella løn fyri sítt arbeiði. Harumframt kunnu standast útreiðslur av, at teir tveir føroysku limirnir í donsku høvuðsnevndini skulu fáa ferðaútreiðslur til Danmarkar goldnar í sambandi við fundir, sum høvuðsnevndin hevur.

# Kapittul 3

## Danskar góðkenningarlógir, settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan

### Inngangur

Í hesum kapitli verða lýstar allar góðkenningarlógir, (autorisatiónslógir), sum galda í Føroyum. Góðkenningarlóg er lóg, sum ásetir krøvini til góðkenning, (autorisatión), av heilsustarvsfólki. Lógirnar áseta reglur um, hvørji krøv verða sett til útbúgvingina sum heilsustarvsfólk, hvør hevur rætt til at fáa góðkenning sum heilsustarvsfólk, og hvørji krøv verða sett teimum, eftir at tey eru góðkend. Sundhedsstyrelsen hevur fakliga eftirlitið við øllum góðkendum heilsustarvsfólki.

Vart verður gjørt við, at umframt góðkenningarlógirnar, sum nevndar eru niðanfyri, eru í Danmark eisini lóg um kiropraktorar, um sálarfrøðingar og um optikarar. Hesar góðkenningarlógir eru enn ikki settar í gildi fyri Føroyar.

Góðkenningarlógir eru felagsmál, og eru sostatt hvørki yvirtiknar fyrisitingarliga, lógarliga ella fíggjarliga. Lógirnar verða tí settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan. Ein konglig fyriskipan er fólkatingslóg, sum verður sett í gildi fyri Føroyar við teimum tillagingum, sum føroyskar umstøður krevja. Fyriskipanin skal verða samtykt á Løgtingi, áðrenn hon verður sett í gildi.

Høvuðsfyrisitingina sambært lógunum hava heilsumálaráðharrin og Sundhedsstyrelsen.

Danska Heilsumálaráðið er ovasti fyrisitingarligi og politiski myndugleiki á heilsuøkinum í Danmark. Áðrenn Heilsumálaráðið varð stovnað, vórðu allar tess uppgávur greiddar í Innanríkismálaráðnum. Har í donskum heilsulógum stendur Innanríkismálaráðið, er tað sostatt oftast Heilsumálaráðið, sum nú umsitur uppgávurnar.

Í Heilsumálaráðnum arbeiða uml. 160 starvsfólk. Ráðið er skipað í 3 deildir við til samans 8 fakøkjum. Rakstrarjáttanin fyri fíggjarárið 1999 er 103,1 mió. kr.

Sundhedsstyrelsen er stýri undir danska Heilsumálaráðnum og er samansett av sakkønum á heilsuøkinum. Sundhedsstyrelsen arbeiðir

leyst av Heilsumálaráðnum og hevur tær heilsufakligu uppgávurnar á heilsuøkinum um hendi. Rakstrarjáttanin fyri fíggjarárið 1999 er 127,0 mió. kr.

Um góðkenningarlógir kann sum heild verða sagt, at tær allar lúka altjóða krøv fyri heilsuútbúgvingar. Viðmerkt verður eisini í hesum sambandi, at ein harmonisering er gjørd í ES, sum tryggjar, at heilsuútbúgvingar skulu lúka somu krøv, bæði í londum í ES og í EBS. Góðkenningarlógirnar eru ikki tiknar við í rammulógina um heilsuverkið, (sí kap. 5), tí mett varð ikki, at føroyska heimastýrið hevði serkunnleika og orku á økinum til at áseta reglur. Mett varð heldur ikki, at heimastýrið hevði orku til at halda skipanina við líka við at seta neyðugu lógirnar á økinum í gildi og dagføra tær og hava fakligt eftirlit við heilsustarvsfólkinum.

Í dag hevur føroyska umsitingin stórar trupulleikar við at dagføra góðkenningarlógirnar, so at hesar hava sama orðaljóð sum tær donsku. Tað krevur størri umsiting at gera hetta arbeiði til fulnar.

Tá ið góðkenningarlóg verður sett í gildi ella dagførd, verða næstan ongar broytingar gjørdar frá tí donsku lógini. Hetta, tí at lógirnar bert snúgva seg um altjóða standardir fyri heilsuligum útbúgvingum, og tískil ikki um serføroyskar umstøður. Hóast hetta hava slíkar lógir nógva umsiting við sær í Føroyum.

At geva eina mynd av hesi umsiting, skal greitt verða frá mannagongdini, tá ið slík lógaruppskot koma fyri.

Lógin verður fyrst send til hoyringar hjá øllum viðkomandi stovnum. Almanna- og heilsumálastýrið og stovnarnir skulu seta seg gjølla inn í lógartekstin fyri at vita, um eitthvørt skuldi verið broytt afturímóti tí donsku lógini. Tá ið hoyringarsvar eru afturkomin, skal Almanna- og heilsumálastýrið samanskrivað svarini, gera gjølligar viðmerkingar til lógaruppskotið og síðani senda uppskotið til eftirkanningar á lógardeildini á Løgmansskrivstovuni. Lógardeildin skal somuleiðis seta seg gjølla inn í uppskotið, gera viðmerkingar og senda hetta aftur til stýrið. Stýrið og lógardeildin diskutera síðani, um broytingar skulu verða gjørdar í uppskotinum. Síðani verður uppskotið sent á landsstýrisfund og viðgjørt av øllum samgonguflokkunum sum vanligt lógaruppskot. Á Løgtingi skal uppskotið hava tríggjar viðgerðir umframt nevndarviðgerð sum vanligt lógaruppskot. Eftir at uppskotið er samtykt, verður tað sent aftur til Almanna- og heilsumálastýrið, sum sendir samtykta uppskotið ígjøgnum ríkisumboðið niður til donsku stjórnina. Danski ráðharrin á økinum skal saman við drotningini undirskrivað kongligu fyriskipanina, og ríkisumboðið lýsir síðan fyriskipanina í Kunngerðablaðnum B. Skulu broytingar seinni verða gjørdar í lógini, skal nevnda mannagongd ganga um aftur, og heldur ikki í hesum umfari verða broytingar gjørdar frá danska tekstinum.

Sum sæst, er hetta ógvuliga drúgv mannagongd, sum bæði krevur nógv av umsitingini, og sum ger, at donsku lógirnar ikki fáa gildi í Føroyum fyrr enn fleiri ár aftaná, at lógin er komin í gildi í Danmark. Summar av góðkenningarlógunum eru ikki settar í gildi enn. Tað vanliga er nú, at kongligu fyriskipanirnar verða settar í gildi, men at ov lítil arbeiðsorka er til at broyta fyriskipanirnar, so hvørt sum hesar verða broyttar í Danmark. Tí eru føroysku fyriskipanirnar ofta als ikki dagførdar. Tá samanum kemur, minkar hetta um trygdina hjá føroyska borgaranum, tí hann má gjalda fyri, at krøvini til heilsustarvsfólk ikki eru tey somu í Føroyum, sum tey eru aðrastaðni.

Eini ráð at greiða trupulleikan kundu verið, at føroyska heimastýrið gav dønum heimild til at umsita og lóggeva á hesum øki okkara vegna, soleiðis at tá ið góðkenningarlóg verður sett í gildi ella broytt í Danmark, so verður hon sett í gildi fyri bæði Føroyar og Danmark. Sum er, verður heimildin til at broyta hesar lógir, so at tær samsvara við føroysk viðurskifti, kortini so at siga ikki brúkt.

Í galdandi stýrisskipanarlóg ber tó ikki til at lata øðrum stati ræðisrætt á ávísum økjum. Í føroysku grundlógini átti at verið umhugsað at havt eina reglu, sum líktist § 20 í donsku grundlógini um ræðislát, (afgivelse af suværenitet). Danir hava latið ES ræðisrættin at áseta reglur, sum galda beinleiðis fyri danir.

Varð hetta gjørt, høvdu góðkenningarlógirnar altíð verið dagførdar í Føroyum samstundis sum í Danmark, og føroyingar høvdu spart nógva umsiting. Orkan, sum nú fer til hetta, kundi í staðin verið nýtt til annað arbeiði.

Her verður ikki farið nærri inn á tað lógarliga í avtaluni, av tí at tað liggur á sáttmálabólkinum at fáa greiðu á, hvussu samstarvsavtalurnar skulu vera lógarliga, herímillum hvussu Føroyar sum sjálvstøðug tjóð á henda hátt kunnu lata Danmark fáa ræðisrætt.

Tó skal verða viðmerkt, at sambært løgtingslóg nr. 109 frá 17.02.87 um alment kunngerðablað skulu allar lógir verða lýstar í føroyska kunngerðablaðnum fyri at hava gildi í Føroyum. Hetta má kanska verða broytt, so at heimild verður givin Fólkatingi at lóggeva um heilsustarvsfólk í Føroyum, um ráðini, sum omanfyri eru nevnd, verða fylgd.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Fíggjarliga høvuðsábyrgdin av økinum liggur í Danmark. Allir umsitingarligu myndugleikarnir sambært lógunum eru danskir, t.e., at umsitingarútreiðslurnar verða goldnar í Danmark.

Tó verður eisini stór orka løgd í at umsita heilsuútbúgvingarnar í føroysku umsitingini við at tilevna kongligar fyriskipanir og dagføra hesar. Ringt er tó at seta eina ávísa upphædd á, hvussu nógv hetta arbeiði kostar føroysku umsitingini, sum er.

# Læknar

*A. nr. 35 af 26.02.1935 for Færøerne om Udøvelse af Lægegerning, som senest ændret ved A. nr. 89 af 11.02.1992.*

## 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar sambært hesi lóg eru heilsumálaráðharrin, Sundhedsstyrelsen, landslæknin og fútin. Harumframt hava undirvísingarmálaráðharrin og løgmálaráðharrin á ávísum økjum uppgávur sambært lógini.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum sambært hesi lóg er at áseta neyvari reglur um supplerandi, praktiskar grundútbúgvingar hjá læknum, um framhaldsútbúgvingar hjá teimum, avmarkingar fyri, nær lækni, sum ikki hevur fingið góðkenning, kann arbeiða sum fyribils avloysari fyri alment praktiserandi lækna, og at áseta føroyskum læknastarvi neyvari reglur, sum eru neyðugar fyri at kunna halda sáttmálar um felags, norðurlendskan arbeiðsmarknað fyri læknar. Eftir tilmæli frá Sundhedsstyrelsen ásetir heilsumálaráðharrin harafturat neyvari reglur um samanseting av serfrøðinganevnd, sum verður vald fyri fýra ár í senn. Serfrøðinganevndin gevur heilsumálaráðharranum tilmæli um, hvør lækni skal fáa loyvi at vera serlækni. Harumframt virkar heilsumálaráðharrin sum kærumyndugleiki, tá ið læknar kæra avgerð hjá Sundhedsstyrelsen.

Uppgávan hjá undirvísingarmálaráðharranum sambært hesi lóg er at áseta neyvari reglur um læknavísindaliga embætisprógvið.

Uppgávan hjá innanríkisráðharranum sambært hesi lóg eru at áseta neyvari reglur um læknaváttanir, og hvussuleiðis og hvussu nágreiniliga læknar skulu føra sjúkrabók um sítt virksemi.

Uppgávan hjá løgmálaráðharranum sambært lógini er at áseta reglur um, nær læknar skulu geva barnsburðarhjálp. Løgmálaráðharrin skal eisini geva loyvi til, at ein kann taka sjúk í viðgerð, tá hann ikki er góðkendur lækni.

Uppgávurnar hjá Sundhedsstyrelsen sambært hesi lóg eru at góðkenna læknar, at ansa eftir, at lækni ikki verður góðkendur, um hann verður mettur at vera fólki til bága í sínum læknavirki, og at geva lækna loyvi til at virka sum sjálvstøðugur lækni. Sundhedsstyrelsen skal eisini góðkenna tann, sum hevur tikið líknandi læknaútbúgving sum ta donsku í øðrum londum, og loyva honum at virka sum sjálvstøðugur lækni í Føroyum. Sundhedsstyrelsen hevur heimild til at taka loyvi aftur frá lækna, um góðkenningin verður tikin frá honum uttanlands. Lækni kann skriva góðkenning sína frá sær við at geva Sundhedsstyrelsen boð um hetta. Um orsøkirnar til, at læknin skrivaði góðkenningina frá sær, ikki longur eru til staðar, hevur

Sundhedsstyrelsen heimild til at geva læknanum góðkenningina aftur.

Fara ringar farsóttir ella tílíkt at ganga í Føroyum, og fólkið hevur størri tørv á læknahjálp, kann Sundhedsstyrelsen, við heimild frá heilsumálaráðharranum, geva øðrum læknum tíðaravmarkað loyvi til at arbeiða í Føroyum.

Avgerðir hjá Sundhedsstyrelsen um at geva og taka góðkenning frá lækna, kunnu verða kærdar til heilsumálaráðharran.

Sundhedsstyrelsen hevur heimild til at føra neyvt eftirlit við ordinatiónunum av euforiserandi evnum hjá einum lækna. Sundhedsstyrelsen ger sjálvt av, nær neyvt eftirlit er neyðugt. Um lækni ordinerar euforiserandi evni óráðiliga, kann Sundhedsstyrelsen taka frá honum rættin at ordinera hesi evni í 1-5 ár, ella til annað verður avgjørt. Sundhedsstyrelsen kann geva læknum og apotekarum boð um fólk, sum tað heldur misnýta euforiserandi evni.

Sundhedsstyrelsen hevur vanliga eftirlitið við læknunum og ansar eftir, at teir røkja sítt læknastarv sambært lógini. Sundhedsstyrelsen kann krevja upplýsingar frá læknunum, soleiðis at eftirlitið kann verða gjørt til lítar.

Sundhedsstyrelsen almannakunnger, at góðkenningar og loyvi eru givin ella afturtikin, og gevur apotekarum og embætislæknum í landinum boð um mistan rætt til at ordinera euforiserandi evni.

Landslæknin er tann forlongdi armurin hjá Sundhedsstyrelsen í Føroyum, (sí omanfyri, kap. 2). Uppgávan hjá landslæknanum sambært hesi lóg er at átaka sær skyldur hjá lækna, sum hevur mist rættin til at ordinera euforiserandi evni.

Uppgávan hjá fútanum er, at um lækni gerst sekur í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður læknin tá revsaður við bót ella hefti.

## 2. Lóggáva

Lógin ásetir í høvuðsdráttum, hvat krevst av góðkendum læknum og virksemi teirra í Føroyum.

Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan í 1935. Danski staturin hevur ábyrgdina av at tilevna lógina og laga hana til føroyskar umstøður og kunngerðir. Í royndum verður hetta arbeiði tó gjørt í føroysku umsitingini. Lógin er ikki dagførd í Føroyum síðani 1992, av tí at føroyska umsitingin hevur ikki havt neyðuga arbeiðsorku til tess. Sjálvt um lógin varð dagførd í 1992, eru fleiri broytingar eldri enn tað, sum ikki eru komnar við í fyriskipanina, sum er í gildi fyri Føroyar. Kongligu fyriskipanirnar skulu verða samtyktar á Løgtingi og lýstar í føroyska kunngerðablaðnum fyri at hava gildi fyri Føroyar.

Heilsuøkið er felagsmál, men stendur á lista A í heimastýrislógini. Tað merkir, at heimastýrið og ríkisvaldið altíð kunnu krevja, at heimastýrið yvirtekur fíggjarligu, fyrisitingarligu og lóggávuligu ábyrgdina av málsøkinum.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

Við heimild í lógini eru hesar føroysku og donsku kunngerðir settar í gildi:

– *B. nr. 209 af 24.06.1935 for Færøerne om de Lægerne paahvilende Optegnelser og Indberetning angaaende Fødsler, ved hvilke de har ydet Fødselshjælp uden Medvirken af en Jordemoder.-*
– *B. nr. 212 af 20.06.1935 angaaende almindelige Regler for Afgivelse af lægeerklæringer.-*
– *B. nr. 244 af 26.07.1937 om Lægers Pligt til at føre Optegnelser.-*
– *B. nr. 169 af 01.06.1954 om anvendelse af visse former for diathermi samt ultralydsapparater.-*
– *B. nr. 551 af 25.11.1976 om uddannelse til selvstændig at virke som læge, som ændret ved B. nr. 512 af 24.11.1980.-*
– *B. nr. 409 af 26.09.1979 om specialistnævnets sammensætning.-*
– *B. nr. 324 af 02.06.1982 om uddannelse af alment praktiserende læger.-*
– *B. nr. 50 af 15.01.1987 om lægers anmeldelse til Cancerregisteret af kræftsygdomme m.v.-*
– *B. nr. 463 af 26.06.1987 om speciallæger.-*
– *K. nr. 139 frá 02.10.1992 um skyldu hjá læknum og tannlæknum at siga Arbeiðseftirlitinum frá vinnusjúkum.-*
– *B. nr. 748 af 14.09.1993 for Færøerne om forholdsregler mod smitsomme sygdomme i skoler og daginstitutioner for børn og unge.-*
– *B. nr. 580 af 04.07.1997 for Færøerne om lægers anmeldelse af smitsomme sygdomme m.v.*

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

# Tannlæknar

*A. nr. 218 af 06.04.1988 om ikrafttræden på Færøerne af lov om tandlæger.*

## 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Myndugleikarnir sambært hesi fyriskipan og kunngerðum eru undirvísingarmálaráðharrin, heilsumálaráðharrin, danska Undirvísingarstýrið, Sundhedsstyrelsen, innanríkismálaráðharrin, danska Sertannlæknaráðið, Arbeiðseftirlitið og fútin.

Uppgávurnar hjá undirvísingarmálaráðharranum og heilsumálaráðharranum sambært fyriskipanini eru at áseta neyvari reglur á økinum og at virka sum kærumyndugleikar.

Heilsumálaráðharrin ásetir føroyskum tannlæknavirksemi reglur, sum eru neyðugar fyri at gera sáttmálar um felags, norðurlendskan arbeiðsmarknað. Hann ásetir eisini reglur um møguleikar hjá tannlæknum at gerast sertannlæknar, um hvat tannlæknans starv er afturímóti læknans starvi, um at ávíst virksemi bert kann verða gjørt av tannlæknum, sum hava lokið framhaldsútbúgving sum tannlæknar, nær tannlæknar kunnu brúka hjálparar í sínum arbeiði, og um at aðrar útbúgvingar kunnu verða javnmettar við danskar útbúgvingar.

Undirvísingarmálaráðharrin ásetir reglur um útbúgvingina hjá tannlæknum og kann sambært fyriskipanini lata Undirvísingarstýrinum sínar arbeiðsuppgávur.

Uppgávan hjá Innanríkisráðnum er at áseta reglur um útbúgvingina til sertannlækna eftir tilmæli frá Sundhedsstyrelsen og Sertannlæknaráðnum.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen sambært fyriskipanini er at góðkenna tannlæknar. Sundhedsstyrelsen kann eisini góðkenna tannlæknar, sum hava verið í øðrum londum og tikið líknandi útbúgving sum ta donsku. Henda góðkenning kann verða tíðaravmarkað.

Sundhedsstyrelsen kann taka góðkenningina frá einum tannlæka, sambært „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse.“ Tannlækni kann eisini sjálvur skriva góðkenning sína frá sær við at geva Sundhedsstyrelsen boð um hetta. Sundhedsstyrelsen kann geva honum góðkenningina aftur, um orsøkirnar til, at tannlæknin skrivaði góðkenningina frá sær, ikki longur eru til staðar. Sundhedsstyrelsen kann senda tannlæknum upplýsingar um fólk, sum eftir upplýsingum hjá Sundhedsstyrelsen misnýta euforiserandi evni. Sundhedsstyrelsen almannakunnger, tá ið góðkenningar og loyvi eru givin ella afturtikin. Boð um mistan ella fingnan rætt til at ordinera euforiserandi evni verða send landsins apotekarum og embætislæknum, herímillum landslæknanum. Sundhedsstyrelsen skal áseta reglur um, hvussu

tannlæknar skulu føra sjúkrabók. Sundhedsstyrelsen hevur eftirlit við tannlæknunum sambært „Lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse," (sí omanfyri).

Tannlæknar skulu boða Arbeiðseftirlitinum frá, um teir fáa illgruna um, at fólk hevur fingið heilsubrek av arbeiði hjá tannlækna.

Uppgávan hjá fútanum er, at um tannlækni gerst sekur í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður tannlæknin tá revsaður við bót ella hefti.

### 2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um, hvat krevst av tannlæknum og virksemi teirra í Føroyum.

Økið er felagsmál, og lógin er tí sett í gildi við kongligari fyriskipan í Føroyum, men er ikki dagførd síðani 1988, av tí at føroyska umsitingin hevur ikki havt neyðuga arbeiðsorku til tess.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

Við heimild í lógini eru hesar føroysku og donsku kunngerðir settar í gildi:

- *B. nr. 230 af 29.04.1974 om tandplejere.-*
- *B. nr. 404 af 25.07.1977 om tandlægers pligt til at føre ordnede optegnelser (journalføring).*
- *B. nr. 368 af 20.07.1978 om begrænsning i tandlægers virksomhedsområde.-*
- *B. nr. 559 af 03.11.1979 om tandlægers ret til at iværksætte generel analgesi.-*
- *B. nr. 238 af 03.06.1983 om specialtandlæger, som ændret ved B. nr. 354 af 19.07.1983.-*
- *K. nr. 139 frá 02.10.1992 um skyldu hjá læknum og tannlæknum at siga Arbeiðseftirlitinum frá vinnusjúkum.*

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

## Kliniskir tannsmiðir ***(kliniskir tannteknikarar)***

*A. nr. 215 af 06.04.1988 om ikrafttræden på Færøerne af lov om kliniske tandteknikere.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar sambært fyriskipanini eru undirvísingarmálaráðharrin, heilsumálaráðharrin, danska Undirvísingarstýrið, Sundhedsstyrelsen, landslæknin og fútin.

Undirvísingarmálaráðharrin og heilsumálaráðharrin hava sambært fyriskipanini heimild til at áseta reglur fyri økið og at virka sum kærumyndugleikar.

Undirvísingarstýrið kann í ávísum førum greiða uppgávur hjá Undirvísingarmálaráðnum sambært fyriskipanini.

Uppgávur hjá Sundhedsstyrelsen sambært fyriskipanini eru hesar:

1) Geva kliniskum tannsmiðum góðkenning.
2) Taka góðkenningina frá tannsmiðum sambært „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse," (sí omanfyri).
3) Um tannsmiður sjálvur skrivar góðkenning sína frá sær, kann hann søkja um at fáa góðkenningina aftur frá Sundhedsstyrelsen. Sundhedsstyrelsen ger tá eina meting av, um hann kann fáa góðkenningina aftur ella ikki.
4) Sundhedsstyrelsen skal almannakunngera, tá ið góðkenning er givin ella afturtikin.
5) Sundhedsstyrelsen skal hava eftirlit við tannsmiðum sambært „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse," (sí omanfyri). Sundhedsstyrelsen syrgir sostatt fyri, at tannsmiðir fylgja øllum teim krøvum, sum verða sett teimum sambært fyriskipanini og kunngerðunum, sum nevndar eru omanfyri.

Uppgávan hjá landslæknanum viðv. tannsmiðum er sbrt. „B.nr. 547 af 10.11.81 om kliniske tandteknikeres pligt til at indberette nedsættelse til embedslægeinstitutioner m.v." Sambært hesi kunngerð skulu tannsmiðir upplýsa landslæknanum, tá ið teir flyta o.a.

Uppgávan hjá fútanum er, at gerst kliniskur tannsmiður sekur í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður tannsmiðurin tá revsaður við bót ella hefti.

### 2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um, hvat krevst av kliniskum tannsmiðum og virksemi teirra.

Økið er felagsmál, og lógin er tí sett í gildi við kongligari fyriskipan

í Føroyum, men er ikki dagførd síðani 1988, av tí at føroyska umsitingin hevur ikki havt neyðuga arbeiðsorku til tess.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

Við heimild í lógini eru hesar donsku kunngerðir settar í gildi:
– *B. nr. 391 af 29.08.1979 om begrænsning i kliniske tandteknikeres virksomhedsområde.-*
– *B. nr. 547 af 10.11.1981 om kliniske tandteknikeres pligt til at indberette nedsættelse til embedslægeinstitutionen m.v.-*
– *B. nr. 548 af 10.11.1981 om kliniske tandteknikeres pligt til at føre ordnede optegnelser (journalføring).*

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

## Sjúkrasystrar

*A. nr. 353 af 21.12.1959, hvorved lov om sygeplejersker sættes i kraft på Færøerne, som senest ændret ved A. nr. 217 af 06.04.1988. -.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar sambært fyriskipanini eru heilsumálaráðharrin, undirvísingarmálaráðharrin, innanríkismálaráðharrin, danska Undirvísingarstýrið, Sundhedsstyrelsen, danska Útbúgvingarráðið og fútin.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum er at áseta føroyskum sjúkrasystravirksemi reglur, sum er neyðugar fyri at gera sáttmálar um felags, norðurlendskan arbeiðsmarknað fyri sjúkrasystrar. Danska Heilsumálaráðið virkar eisini sum kærumyndugleiki í málum sambært fyriskipanini.

Uppgávan hjá danska Undirvísingarmálaráðnum er at áseta neyvari reglur fyri útbúgvingina sum sjúkrasystir og at áseta neyvari reglur um kærumøguleikar. Undirvísingarmálaráðið kann sambært fyriskipanini lata Undirvísingarstýrinum sínar skyldur.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen sambært fyriskipanini er at góðkenna sjúkrasystrar. Sundhedsstyrelsen kann eisini góðkenna sjúkrasystur, ið hevur tikið líknandi útbúgving sum ta donsku í øðrum

londum. Sundhedsstyrelsen kann taka og geva aftur góðkenning hjá sjúkrasystrum. Er góðkenning afturtikin, verður hetta almannakunngjørt av Sundhedsstyrelsen. Sundhedsstyrelsen hevur eftirlit við sjúkrasystrunum sambært „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse.“ Skrivstovur, sum ávísa sjúkrasystrum arbeiði, eru eisini undir eftirliti hjá Sundhedsstyrelsen, og Sundhedsstyrelsen skal góðkenna tær, áðrenn tær sleppa til verka.

Danska Innanríkismálaráðið skipaði í 1996 eitt útbúgvingarráð fyri heilsuverkið, og hetta ráðið er ráðgevandi fyri Innanríkismálaráðið og Sundhedsstyrelsen í málum, sum viðvíkja sjúkrasystrum. Ráðið skal virka fyri, at útbúgvingin hjá sjúkrasystrum altíð lýkur tey krøv, ið sett verða. Ráðið kann eisini av sínum eintingum taka útbúgvingarspurningar upp.

Uppgávan hjá fútanum er, at um sjúkrasystir gerst sek í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútina átala hetta, og verður sjúkrasystirin tá revsað við bót ella hefti.

2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um, hvat krevst av sjúkrasystrum og virksemi teirra í Føroyum.

Økið er felagsmál, og lógin er tí sett í gildi við kongligari fyriskipan í Føroyum, men er ikki dagførd síðani 1988, av tí at føroyska umsitingin hevur ikki havt neyðuga arbeiðsorku til tess.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

Við heimild í lógini er sett í gildi:
– *B. nr. 653 af 17.07.1992 for Færøerne om sygeplejerskeuddannelsen*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

## Ljósmøður

*A. nr. 10 af 07.01.1983 om jordemødre.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar sambært fyriskipanini eru Innanríkismálaráðið, Undirvísingarmálaráðið, Sundhedsstyrelsen og fútin.

Uppgávurnar hjá Innanríkismálaráðnum og Undirvísingarmálaráðnum er at áseta neyvari reglur á økinum og at virka sum kærumyndugleiki.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen sambært fyriskipanini er at:
1) Geva ljósmøðrum góðkenning.
2) Geva teimum góðkenning, ið hava tikið líknandi útbúgving sum ta donsku í útlondum.
3) Taka góðkenning frá ljósmøðrum og geva hana aftur sambært reglunum í „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelese," (sí omanfyri).
4) Sundhedsstyrelsen skal almannakunngera allar góðkenningar og afturtøkur av góðkenningum sum ljósmóðir.
5) Sundhedsstyrelsen skal áseta reglur um virkisøkið hjá ljósmøðrum.
6) Tá ið ljósmóðir vil gevast við sínum starvi, skal hon skrivliga upplýsa Sundhedsstyrelsen um hetta, og Sundhedsstyrelsen almannakunnger tað síðan.
7) Sundhedsstyrelsen hevur eftirlit við ljósmøðrunum sambært „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse."

Uppgávan hjá fútanum er, at um ljósmóðir gerst sek í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður ljósmóðirin tá revsað við bót ella hefti.

### 2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um, hvat krevst av ljósmøðrum og virksemi teirra í Føroyum.

Økið er felagsmál, og lógin er tí sett í gildi við kongligari fyriskipan í Føroyum, men er ikki dagførd síðani 1983, av tí at føroyska umsitingin hevur ikki havt neyðuga arbeiðsorku til tess.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

## Røktarassistentar (Yrkis- og alisrøktarar) ***(Ergo- og fysioterapeutar)***

*A. nr. 216 af 06.04.1988 om ikrafttræden på Færøerne af lov om terapiassistenter.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Myndugleikarnir sambært lógini eru danska Heilsumálaráðið, undirvísingarmálaráðharrin, danska Undirvísingardirektoratið, Sundhedsstyrelsen og fútin.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum sambært fyriskipanini er at góðkenna yrkis- og alisrøktarar. Tá ið góðkenningin verður givin, verður mett, um viðkomandi lýkur krøvini til hetta yrki. Danski heilsumálaráðharrin kann eisini góðkenna tey, sum hava tikið líknandi útbúgving í øðrum londum. Ráðharrin kann eisini avmarka rættin hjá fólki at starvast sum yrkis- ella alisrøktari, og hann skipar fyri, at yvirlit er yvir allar givnar góðkenningar. Heilsumálaráðið virkar eisini sum kærumyndugleiki sambært hesi fyriskipan.

Uppgávan hjá Undirvísingarmálaráðnum sambært fyriskipanini er at góðkenna skúlar fyri røktarassistentar og at áseta neyvari reglur um útbúgvingarnar. Undirvísingarmálaráðharrin kann lata danska Undirvísingarstýrinum hesar uppgávur. Undirvísingarmálaráðharrin kann áseta reglur um kærumøguleikar.

Sundhedsstyrelsen hevur til uppgávu at hava eftirlit við røktarassistentum sambært „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse,“ (sí omanfyri). Røktarassistentar kunnu skriva frá sær rættin til virki sítt við at geva Sundhedsstyrelsen boð um hetta. Samstundis missir viðkomandi góðkenningina. Vil hann hava góðkenningina aftur, skal hann senda umsókn til Heilsumálaráðið. Missir ein góðkenningina, almannakunnger Sundhedsstyrelsen hetta.

Uppgávan hjá fútanum er, at um røktarassistentur gerst sekur í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður røktarassistenturin tá revsaður við bót ella hefti.

### 2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um virksemið hjá røktarassistentum í Føroyum.

Økið er felagsmál, og lógin er tí sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan, men er ikki dagførd síðani 1988, av tí at føroyska umsitingin hevur ikki havt neyðuga arbeiðsorku til tess.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

## Fótrøktarar ***(Fótterapeutar)***

*A. nr. 100 af 20.02.1987 om ikrafttræden på Færøerne af lov om fodterapeuter.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Myndugleikarnir í fyriskipanini eru Heilsumálaráðið, Undirvísingarmálaráðið, Sundhedsstyrelsen, danska Undirvísingardirektoratið og fútin.

Uppgávurnar hjá Heilsumálaráðnum sambært fyriskipanini er at góðkenna fótrøktarar, eisini teir, sum hava tikið líknandi útbúgving sum ta donsku í øðrum londum. Tá ið ein skal vera góðkendur, verður mett, um viðkomandi er egnaður at vera fótrøktari. Heilsumálaráðið sær til, at yvirlit er yvir givnar góðkenningar, og ráðið kann eisini taka góðkenning frá fólki og geva hana aftur av nýggjum.

Uppgávan hjá Undirvísingarmálaráðnum er at góðkenna fótrøktaraskúlar og at áseta neyvari reglur um útbúgvingina og um kærumøguleikar, tá ið Undirvísingarmálaráðið sambært fyriskipanini hevur latið Undirvísingarstýrinum sína ábyrgd.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at hava eftirlit við fótrøktarunum sambært „lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse,“ (sí omanfyri).

Sundhedsstyrelsen almannakunnger, tá ið fótrøktarar missa góðkenningina, ger vegleiðingar um arbeiðsøkið hjá fótrøktarunum og ásetir neyvari reglur um, hvussu fótklinikkir verða innrættaðar.

Uppgávan hjá fútanum er, at um fótrøktari gerst sekur í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður fótrøktarin tá revsaður við bót ella hefti.

2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um, hvat krevst av fótrøktarum og virksemi teirra í Føroyum.

Økið er felagsmál, og lógin er tí sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan, men er ikki dagførd síðani 1987, av tí at føroyska umsitingin hevur ikki havt neyðuga arbeiðsorku til tess.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

## Kliniskir kostráðgevar ***(Kliniskir diætistar)***

*Anordning om ikrafttræden på Færøerne om kliniske diætister.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru Undirvísingarmálaráðið, heilsumálaráðharrin, Sundhedsstyrelsen og fútin.

Undirvísingarmálaráðið hevur til uppgávu at góðkenna útbúgvingina *kliniskur kostráðgevi.*

Heilsumálaráðharrin hevur til uppgávu at áseta neyvari reglur fyri útbúgvingina. Heilsumálaráðharrin virkar eisini sum kærumyndugleiki, tá ið kært verður um avgerðir hjá Sundhedsstyrelsen. Heilsumálaráðharrin setir eina nevnd, sum skal døma um, um góðkenningar undir serligum umstøðum kunnu verða góðtiknar.

Sundhedsstyrelsen hevur til uppgávu at tilluta góðkenningar. Góðkenning má ikki verða tillutað einum, sum verður mettur at vera fólki til bága í virki sínum, sum kliniskur kostráðgevi. Sundhedsstyrelsen kann eisini góðkenna tann, sum hevur verið í øðrum londum og fingið sær líknandi útbúgving sum ta donsku. Góðkenningin sum kliniskur kostráðgevi kann verða tikin frá einum og givin aftur eftir reglunum í „anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om Sundhedsvæsenets centralstyrelse," (sí omanfyri). Ein kliniskur kostráðgevi kann skriva góðkenning sína frá sær í eina ávísa tíð við at geva Sundhedsstyrelsen boð um hetta.

Uppgávan hjá fútanum er, at um ein kliniskur kostráðgevi gerst sekur í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður kostráðgevin tá revsaður við bót ella hefti.

2. Lóggáva
Lógin ásetir krøvini fyri at kunna fáa góðkenning og virka sum kliniskur kostráðgevi. Lógin kann verða sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, av tí at økið er felagsmál.

Uppskot til ríkislógartilmæli um „Lov om kliniske diætister" varð samtykt á Løgtingi í oktober 1997, men kongliga fyriskipanin er enn ikki komin í gildi, hóast fyriskipanin varð send danska Heilsumálaráðnum beint eftir samtyktina á Løgtingi, og Almanna- og heilsumálastýrið síðan tá javnan hevur biðið um at fáa fyriskipanina setta í

gildi fyri Føroyar. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur eisini verið á fundi við danska heilsumálaráðharran um málið, men einki er hent enn. Hetta er dømi um, hvussu illa núverandi skipan um góðkenningarlógir virkar.

Tað er danska Heilsumálaráðið, sum saman við drotningini endaliga skal undirskriva kongligu fyriskipanina og almannakunngera hana. Fyriskipanin er sum sagt ikki komin í gildi enn, men verður tó tikin við her, av tí at hon er samtykt á Løgtingi.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

## Tannrøktarar ***(Tannpleygarar)***

*Anording om ikrafttræden på Færøerne af lov om tandplejere.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru undirvísingarmálaráðharrin, heilsumálaráðharrin, Sundhedsstyrelsen og fútin.

Uppgávan hjá undirvísingarmálaráðharranum er at góðkenna útbúgvingina fyri tannrøktarar og í samstarvi við heilsumálaráðharran at áseta neyvari reglur á økinum.

Uppgávan hjá heilsumálaráðharranum er at áseta neyvari reglur um tannrøktarar og at virka sum kærumyndugleiki, tá ið kært verður um avgerðir hjá Sundhedsstyrelsen.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at góðkenna tannrøktarar, eins og tað kann taka góðkenningina frá teimum. Tannrøktarar kunnu eisini sjálvir skriva góðkenning sína frá sær í eina ávísa tíð. Fyri góðkenningina verður goldið eitt gjald, sum heilsumálaráðharrin ásetir. Sundhedsstyrelsen kann eisini góðkenna tann, sum hevur tikið útbúgving, sum kann verða javnmett við hana, sum nevnd er omanfyri. Góðkenning sum tannrøktari kann verða afturtikin og afturgivin eftir reglunum í „anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om Sundhedsvæsenets Centralstyrelse.“ Kæra um Sundhedsstyrelsen kann verða send heilsumálaráðharranum. Sundhedsstyrelsen almannakunnger, hvør hevur fingið ella mist góðkenning, og hvør hevur skrivað góðkenning frá sær. Sundhedsstyrelsen kann eisini áseta ávísar

reglur um virki hjá tannrøktarum, og hevur eftirlit við tannrøktarum sambært „anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om Sundhedsvæsenets Centralstyrelse."

Uppgávan hjá fútanum er, at um tannrøktari gerst sekur í grovari ella endurtakandi misrøkt í starvi sínum, skal fútin átala hetta, og verður tannrøktarin tá revsaður við bót ella hefti.

### 2. Lóggáva

Lógin ásetir krøv um, nær tannrøktari kann fáa góðkenning og virka sum tannrøktari. Lógin kann verða sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan, av tí at málsøkið er felagsmál.

Uppskot til ríkislógartilmæli um „Lov om tandplejere" varð samtykt á Løgtingi í oktober 1997, men kongliga fyriskipanin er enn ikki komin í gildi, hóast fyriskipanin varð send Sundhedsstyrelsen beint eftir løgtingssamtyktina, og Almanna- og heilsumálastýrið síðani tá javnan hevur biðið um at fáa fyriskipanina setta í gildi fyri Føroyar. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur eisini verið á fundi við danska heilsumálaráðharran um málið, men einki er hent enn. Hetta er dømi um, hvussu illa núverandi skipan um góðkenningarlógir virkar.

Tað er Sundhedsstyrelsen, sum saman við drotningini endaliga skal undirskriva kongligu fyriskipanina og almannakunngera hana. Fyriskipanin er sum sagt ikki komin í gildi enn, men verður tó tikin við her, av tí at hon er samtykt á Løgtingi.

Um lóggávuna annars og samstarvsavtalu við donsku stjórnina, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Málsøkið er felagsmál, tað merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av málsøkinum liggur í Danmark.

Um upplýsingar um fíggjarligar avleiðingar annars, sí inngangin til kapitlið. Tað, sum har stendur, er galdandi fyri allar heilsuútbúgvingar.

# Kapittul 4

## Rammulógin fyri almannaøkið, við útfyllandi lóggávu

### Rammulógin á sosiala økinum:

*L.315 af 17. maj 1995.*

Í 1995 var „L.nr. 315 fra 17.05.1995 om sociale ydelser på Færøerne" sett í gildi sambært avtalu millum danskar og føroyskar myndugleikar. Talan er um rammulóg, sum áleggur og gevur føroyskum myndugleikum heimild at yvirtaka og áseta reglur um uppgávur, veitingar og fyrisiting í almannaverkinum á hesum økjum:

- forsorgarhjálp
- pensiónsskipan
- serlig tilboð til fólk við sálarligum ella likamligum breki
- serlig tilboð til fólk við varandi sjúku- ella ellisbreki
- tilboð til fólk við serligum sosialum trupulleikum
- reglur um dagtilboð og hjálp til børn og ung
- barnagjald til einsamallar uppihaldarar
- heimahjálp
- revalideringshjálp
- dagpening við óarbeiðsføri av sjúku, barnsburð ella føðing

Orðið „rammulóg" merkir, at føroyska heimastýrið innan fyri ávísar rammur hevur fingið heimild til at áseta føroyskar reglur. Heimildin til at áseta reglur sambært hesi lóg verður tulkað í eini rúmari merking enn t.d. heimildin í rammulógini á heilsuøkinum, (sí kap. 5). Á almannaøkinum verður eisini lóggivið á økjum, sum ikki beinleiðis eru nevnd í rammulógini, og hetta ber t.d. ikki til sambært rammulógini á heilsuøkinum.

Rammulógin ásetir, at donsku almannalógirnar, ið eru í gildi í Føroyum, verða verandi í gildi, til tær verða avloystar av føroyskum løgtingslógum. Sambært avtalu við danir skulu hesar vera lidnar í seinasta lagi 1999, og sostatt verður almannaøkið bæði fyrisitingarliga (frá 1975) og lógarliga føroyskt.

Tað einasta, sum ikki er yvirtikið enn, er fíggjarliga ábyrgdin, sum danski myndugleikin hevur sambært rammulógini. Fólkatingið hevur tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á nevndu økjum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Økið er tí felagsmál og verður ikki sermál, fyrr enn heimastýrið eisini tekur við fíggjarligu ábyrgdini av økinum, ella formliga vil yvirtaka málsøkið sum sermál.

Arbeiðið við at gera føroyskar løgtingslógir sambært rammulógini er í gongd, og miðað verður ímóti at allar almannalógir skulu verða lidnar í 1999.

## Forsorgarlógin

*Lb. nr. 100 af 02.03.1988 om offentlig forsorg, som senest ændret ved Ll. nr. 177 frá 30.12.1997.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru Almannastovan og deildir hennara í Klaksvík, á Tvøroyri og í Runavík, Tórshavnar býráð, kærunevndin í almannamálum, ríkisumboðið og landsstýrismaðurin í almannamálum.

Uppgávan hjá Almannastovuni er at umsita ásetingarnar í forsorgarlógini og hava eftirlit við teimum stovnum, sum forsorgarlógin heimilar at seta á stovn. Talan kann vera um stovns- og aðrar fyriskipanir fyri fólk, ið hava serligan tørv á stuðli, so sum røktar-, umlættingar-, viðgerðar-, og bústovnar fyri brekað og eldri.

Økisdeildirnar hjá Almannastovuni í Klaksvík, Runavík og á Tvøroyri umsita forsorgarlógina vegna Almannastovuna. Tórshavnar býráð og Klaksvíkar kommuna umsita sjálvar ásetingarnar í forsorgarlógini, tí hesar kommunur hava meir enn 2000 íbúgvar, og Almannastovan umsitur forsorgarlógina fyri tær kommunur, ið hava minni enn 2000 íbúgvar.

Avgerðir hjá Almannastovuni kunnu innan 4 vikur verða kærdar til kærunevndina í almannamálum. Ríkisumboðið umsitur sambært forsorgarlógini uppihaldsloyvi til útlendingar.

Landsstýrismaðurin í almannamálum skal sambært forsorgarlógini gera kunngerðir, reglugerðir o.a. uppfyllandi lógararbeiði.

### 2. Lóggáva

Málið við forsorgarlógini er at ráðgeva og leiðbeina í forsorgarligum og persónligum spurningum og at upplýsa tí einstaka um rættindi og skyldur eftir hesi lóg. Sambært lógini skal Almannastovan hjálpa fólki,

tá ið tey eru fyri eini almannahending so sum sjúku, arbeiðsloysi, barnsburði ella samlívssliti. Varandi hjálp kann eisini verða givin, tá ið eingi útlit eru fyri sjálvbjargni, eins og talan kann verða um serliga hjálp so sum einkjupensión, endurútbúgving, arbeiðsskapandi tiltøk, umbroytingar á sethús í sambandi við sjúku/brek og játtan fyri avlamisbilar til børn og vaksin, ið eru rørslutarnað.

Lógarøkið er felagsmál. Lógin er fólkatingslóg, sum er sett í gildi fyri alt ríkið. Danska lógin er avtikin, í sambandi við at danir hava sett í gildi nýggja forsorgarlóg. Gamla lógin er tó enn í gildi í Føroyum, tí lógaravtøkan er ikki lýst her.

Umsitingin av Almannaverkinum varð yvirtikin í 1975, og lóggevandi ábyrgdin varð yvirtikin í 1995 sambært § 9 í heimastýrislógini í 1995. Økið kann altíð verða yvirtikið sum føroyskt sermál sambært § 2 í heimastýrislógini.

Almanna- og heilsumálastýrið arbeiðir í løtuni við at gera føroyska forsorgarlóg, sum skal verða løgd fyri Løgtingið í seinasta lagi í 1999. Í hesum sambandi er ætlanin at broyta navnið á lógini til „trivnaðarlógin." Mett verður, at hetta heitið lýsir lógarøkið betur enn heitið: „forsorgarlóg." Til samanlíkningar kann verða nevnt, at heitið á donsku lógunum á økinum eru „Lov om social service," „Lov om aktiv socialpolitik" og „Lov om retsikkerhed."

Í sambandi við at uppskotið um nýggja forsorgarlóg verður framlagt, er ætlanin at skipa fyri aðalorðaskifti á Løgtingi, har landsstýrismaðurin í almannamálum leggur nakrar tankar fram um ein framtíðar føroyskan almannapolitikk. Til hetta orðaskifti er gjørt eitt álit, sum lýsir forsorgarøkið í dag, og sum kemur við nøkrum hugleiðingum um, hvussu forsorgarøkið í Føroyum kann verða skipað, og hvussu føroyskar loysnir kunnu verða settar í verk.

Við heimild í verandi forsorgarlóg eru lógarbroytingar framdar, og hesar føroysku og donsku lógir og kunngerðir settar í gildi:

- *L.nr. 392 af 20.05.1992, sum er sett í gildi við B. nr. 607 af 08.07.1992, § 1 i lov nr. 393 af 20.05.1992,*
- *L. nr. 1075 af 23.12.1992,*
- *L. nr. 393 af 22.06.1993*
- *Ll. nr. 76 frá 23.05.1997)*
- *B. nr. 607 af 08.07.1992 om ikrafttræden af visse bestemmelser i lov for Færøerne om offentlig forsorg og lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel.*
- *K. nr. 37 frá 22.03.1993 um fráboðanarskyldu sambært forsorgarlógini.*
- *K. nr. 38 frá 22.03.1993 um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu sambært forsorgarlógini.*

- *K. nr. 39 frá 22.03.1993 um mannagongd hjá kommunum viðvíkjandi útvegan av upplýsingum o.ø. eftir forsorgarlógini.*
- *K. nr. 40 frá 22.03.1993 um valdsnýtslu o.tíl. á stovnum fyri fólk við likamligum ella sálarligum breki.*
- *K. nr. 43 frá 24.03.1993 um afturgjaldsskyldu viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað, broytt við K. nr. 143 frá 21.09.1995.*
- *K. nr. 64 frá 01.04.1993 um upphæddir til persónligan tørv og gjald fyri vaksin, sum búgva á stovni.*
- *K. nr. 11 frá 11.01.1994 um reglur fyri skipan av sambýlum sambært forsorgarlógini.*
- *K. nr. 78 frá 28.05.1996 um aktivering av forsorgarstuðli.*
- *K. nr. 82 frá 29.05.1997 um heimahjálp.*
- *K. nr. 139 frá 19.09.1997 um forsorgarstuðul til fólk undir útbúgving.*
- *K. nr. 151 frá 24.11.1997 um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini, fólkapensiónslógini og avlamispensiónslógini.*
- *K. nr. 71 frá 27.08.1998 um eldrasambýli.*

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna sambært hesi lóg. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Barnaforsorgarlógin

*Lb. nr. 104 af 02.03.1988 om børneforsorg, seinast broytt við Ll. nr. 163 frá 29.12.1997.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligu myndugleikarnir eru allar barnaverndir, sum kommunurnar hava sett, Almannastovan, landsstýrismaðurin í almannamálum, kærunevndin í almannamálum, Færøernes Nævn for Børneforsorg.

Ætlanin við barnaforsorgarlógini er at kunna hava almenna umsjón við børnum og korum teirra í kommununum, at hava eftirlit við tí einstaka barninum og at seta í verk fyribyrgjandi skipanir fyri uppihaldi, uppaling, upplæring og viðgerð uttan fyri heimið. Lógin heimilar eisini við, góðkenning frá Almanna- og heilsumálastýrinum, at seta á stovn dag- og samdøgursstovnar og dagrøktarskipanir fyri børn.

Barnaverndarnevndir hava rætt og skyldu til at hava eftirlit við børnum í kommununi, taka avgerðir um at seta í verk fyribyrgjandi fyriskipanir, gera heimavitjanir og at útvega sær upplýsingar frá skúlamyndugleikum og frá Almannastovuni.

Somuleiðis eiga barnaverndarnevndir at gera bý- og bygdarráð varug við barnaansingartrupulleikar, t.d. um ansingin ikki er góð, ella um børn koma í trupulleikar av, at tørvur er á ansingarplássum í býi ella bygd.

Barnaverndin skal eisini hava eftirlit við øllum børnum undir 14 ár, sum eru í pleygu ímóti gjaldi, øllum børnum undir 7 ár, sum eru fødd uttan fyri hjúnalag, og teimum børnum, sum fáa barnagjald frá tí almenna eftir lógini um „Børnebidrag til enlige forsørgere."

Barnaverndin kann harafturat gera av at hava eftirlit við børnum, sum eru í pleygu, ið ikki verður goldið fyri, og við ættleiddum børnum undir 14 ár. Barnaverndini nýtist ikki at hava eftirlit við børnum, sum eru fødd uttan fyri hjúnalag, um tey liva í góðum korum, børnum, sum fáa barnagjald, og børnum, ið eru í pleygu, har tey liva í góðum korum.

Uppgávan hjá Almannastovuni sambært lógini er at ráðgeva og leiðbeina barnaverndum og at greiða ivamál ímillum barnaverndir. Almannastovan kann vegna eina barnavernd gera av, at barn ikki skal flyta frá pleygufamilju, men skal halda áfram at búgva hjá henni. Almannastovan kann harumframt seta fyribyrgjandi fyriskipanir í verk og er kærumyndugleiki hjá barnaverndunum.

Uppgávan hjá landsstýrismanninum í almannamálum sambært barnaforsorgarlógini er at áseta reglur fyri arbeiðið hjá barnaverndunum, um hvussu tær skal føra sítt eftirlit, eins og hann er kærumyndugleiki hjá Almannastovuni.

Landsstýrismaðurin í almannamálum skal eisini sambært lógini góðkenna dag- og samdøgursstovnar fyri børn og ung, tá ið tílíkir verða skipaðir.

## 2. Lóggáva

Barnaforsorgarlógin er fólkatingslóg, sum er sett í gildi fyri alt ríkið. Danska lógin á økinum er nú avtikin, og í staðin er barnaforsorgarøkið regulerað í donsku forsorgarskipanini, men av tí at avtøkan av donsku lógini ikki er lýst í Føroyum, er lógin enn í gildi her.

Lógin er partur av rammulógini, og verður tí arbeitt við at gera føroyska barnaforsorgarlóg.

Við heimild í lógini eru hesar broytingar gjørdar, og hesar kunngerðir og lógir settar í gildi:

- *L. nr. 393 af 20.05. 1992 og L. nr. 393 af 22.06.1993)*
- *K. nr. 43 frá 24.03.1993 um afturgjaldsskyldu viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað.*
- *K. nr. 50 frá 25.03.1993 um barnaforsorg.*
- *K. nr. 62 frá 01.04.1993 um dagstovnar, dagrøkt og samdøgursstovnar fyri børn og ung.*

- *K. nr. 65 frá 01.04.1993 um fyriskipan fyri eftirlitsverjar.*
- *K. nr. 6 frá 25.01.1995 um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt.*

Sambært rammulógini frá 1995 verður miðað ímóti at leggja uppskot um nýggja barnaforsorgarlóg fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

3. Fíggjarliga ábyrgd
Donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna av hesum øki. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.a.

*Ll. nr. 71 frá 20.05.1996, broytt við Ll. nr. 25 frá 14.03.1997.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru Føroya gjaldstova, Almannastovan, landsstýrismaðurin í almannamálum og kærunevndin í almannamálum.

Uppgávan hjá Føroya gjaldstovu sambært lógini er at rinda barnagjaldið sum forskot og at krevja gjaldið inn aftur eftir reglunum í § 10 í lógini.

Almannastovan umsitur umsóknir um at fáa uppihaldsgjald í forskoti og kann í hvørjum einstøkum føri eisini veita stuðul til útreiðslur, um barnið er sjúkt, ella í sambandi við barnsins dóp, konfirmatión ella jarðarferð.

Avgerðir hjá Almannastovuni kunnu innan 4 vikur verða kærdar til kærunevndina í almannamálum.

Landsstýrismaðurin í almannamálum kann áseta neyvari reglur um fyrisitingina av hesi lóg.

2. Lóggáva
Lógin er løgtingslóg, sum skal veita stuðul til einsamallar uppihaldarar.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna sambært hesi lóg. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Avlamispensión o.a.

*Lb. nr. 101 af 02.03.1988 som senest ændret ved L. nr. 1131 af 21.12.1994.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru almannamálaráðharrin, landsstýrismaðurin í almannamálum, Almannastovan, Den sociale ankestyrelse, kærunevndin í almannamálum, Vanlukkutryggingarráðið, kommunurnar og sjúkrakassarnir.

Sambært lógini er tað Vanlukkutryggingarráðið, sum tekur avgerð um veita, broyta og taka aftur avlamispensión og røktar- og hjálparviðbót. Umsóknin um avlamispensión verður send Vanlukkutryggingarráðnum, og umsøkjarin skal hava váttan frá tí kommunu, har hann býr, og frá tí sjúkrakassa, har hann er limur. Avgerðin hjá Vanlukkutryggingarráðnum verður send Almannastovuni, sum umsitur lógina.

Avgerðir hjá Vanlukkutryggingarráðnum kunnu verða kærdar til Den sociale ankestyrelse, og avgerðir hjá Almannastovuni kunnu verða kærdar til kærunevndina í almannamálum.

Umsitingin av økinum varð yvirtikin í 1975.

### 2. Lóggáva

Ætlanin við lógini er at veita avlamisveitingar til fólk, ið ikki eru arbeiðsfør.

Lógin er fólkatingslóg, sum er sett í gildi fyri alt ríkið.

Uppskot til nýggja lóg um almannapensiónir er løgd fyri Løgtingið í tingsetuni 1998/99.

Við heimild í lógini eru hesar broytingar gjørdar:
- *L. nr. 393 af 20.05.1992,*
- *L. nr. 393 af 22.06.1993,*
- *L. nr. 227 af 06.04.1994.*

Sí viðmerkingar um nýggja løgtingslógaruppskotið um almannapensiónir niðanfyri undir „fólkapensión.“ Uppskotið varð lagt fyri Løgtingið í tingsetuni 1998-1999.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna sambært hesi lóg. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Tað er staturin, ið fíggjar útreiðslurnar hjá Den sociale ankestyrelse, og heimastýrið fíggjar á løgtingslógini fyri 1998 uml. 130 mió. kr.

## Fólkapensión

*Lb. nr. 103 af 02.03.1988, som senest ændret ved Ll. nr. 37 af 16.04.1997*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í almannamálum, Almanna- og heilsumálastýrið, Almannastovan, kærunevndin í almannamálum, kommunurnar og sjúkrakassarnir.

Landsstýrismaðurin í almannamálum kann áseta neyvari reglur sambært lógini.

Tann, ið søkir um fólkapensión, skal senda Almannastovuni umsóknina. Kommunan, har viðkomandi býr, skal vátta umsóknina, og sjúkrakassin, har viðkomandi er limur, skal eisini vátta oyðublaðið. Almannastovan umsitur lógina. Almanna og heilsumálastýrið umsitur umsóknirnar um framskundaða fólkapensión og játtar umsóknunum eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum.

Avgerðir, sum Almannastovan tekur, kunnu verða kærdar til kærunevndina í almannamálum.

Málsøkið er felagsmál, sum er fyrisitingarliga yvirtikið í 1975.

### 2. Lóggáva

Endamálið við verandi lóg er at veita fólki yvir 67 ár fólkapensión. Lógin heimilar tó fólkapensión til einligar kvinnur millum 62 og 67 ár, framskundaða fólkapensión, og pensión til kvinnur millum 62 og 67 ár, um tær eru giftar við pensiónistum.

Økið er felagsmál. Lógin er fólkatingslóg, sum er sett í gildi fyri alt ríkið.

Hesar lógarbroytingar og kunngerðir eru settar í gildi við heimild í lógini:

- *L. nr. 1075 af 23.12.1992.*
- *L. nr. 393 af 20.05.1992.*
- *L. nr. 393 af 22.06.1993*
- *L. nr. 277 af 06.04.1994*
- *L. nr. 1131 af 21.12.1994*
- *K. nr. 43 frá 24.03.1993 um afturgjaldsskyldu viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað.*
- *K. nr. 36 frá 22.03. 1993 um avlamis- og fólkapensión*
- *K. nr. 49 frá 20.04. 1994 um umsorgararbeiði fyri pensiónistar.*
- *K. nr. 151 frá 24.11.1997 um stuðul til heiligvág eftir forsorgarlógini, fólkapensiónslógini og avlamispensiónslógini.*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna sambært hesi lóg. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

*Viðmerkingar til lógirnar um avlamis- og fólkapensión*

Uppskot til løgtingslóg um almannapensiónir o.a. er lagt fyri Løgtingið í tingsetuni 1998-99. Verður lógin samtykt, kemur hon í gildi tann 1. januar 2000.

Verður lógin samtykt, verða eingi krøv viðvíkjandi fyrisiting og lóggávu í sambandi við fullveldi.

Sambært løgtingslógaruppskotinum kann pensión verða játtað fólki, ið hevur fylt 18 ár. Í galdandi lóg er aldurin 15 ár.

Vanligur fólkapensiónsaldur verður 67 ár fyri øll. Møguligt er sambært uppskotinum hjá øllum at søkja um fyritíðarpensión, grundað á heilsu- ella arbeiðsumstøður ella aðrar serligar umstøður frá 50 ára aldri. Í galdandi lógum hava einkjur og einsamallar kvinnur møguleika at søkja um hesa pensión frá 50 ára aldri, og onnur kunnu søkja frá 60 ára aldri. Einsamallar kvinnur og tær, sum eru giftar við pensiónistum, hava sum er rætt til pensión frá 62 ára aldri.

Fyritreytin fyri at fáa pensión yvirhøvur, áðrenn umsøkjarin er fyltur 60 ár, er, at ikki hevur borið til at útvega arbeiði ella at menna vinnuførleikan hjá viðkomandi, og pensión tískil er einasti forsorgarmøguleiki. Eftir galdandi lóg er hetta einans beinleiðis ásett sum ein fyritreyt, tá talan er um avlamispensión.

Lægsta avlamispensión er hækkað og broytt soleiðis, at hon verður hin sama sum aðrar fyritíðarpensiónir á fólkapensiónsstigi; eingin pensión er sostatt eftir uppskotinum lægri enn fólkapensiónin.

Ásetingarnar um hjúnabands-, sjúkrakassa- og aldursviðbøtur og avlamisveiting verða settar úr gildi. Í uppskotinum verður viðbótin hækkað við verandi sjúkrakassaviðbót. Aldursviðbótin verður framhaldandi, við skiftisreglu, varðveitt fyri tey, sum fáa hana í dag. Hjúnabandsviðbótin fellur heilt burtur. Avlamisveiting kann sambært galdandi lóg verða veitt teimum, sum fyri inntøku ikki kundu fáa pensión, tá ið avlamni eftir lækna hugsan er so mikið umfatandi, at tey høvdu havt rætt til hægstu ella miðal fyritíðarpensión. Avlamisveitingin fellur burtur. Hetta kemst av, at sambært uppskotinum verður øll fyritíðarpensiónin inntøkuregulerað, og fellur pensiónin tískil burtur, tá pensiónisturin hevur størri inntøku enn eina ávísa upphædd. Tí er rættast, at avlamisveitingin fellur burtur. Mett verður eisini, at henda veiting ikki er so neyðug, sum fyrr. Avlamisveitingin skuldi rokkið fyri tær eykaútreiðslur, brekið hevði havt við sær. Aðrar

lógir og aðrar skipanir so sum forsorgarlógin og avsláttur við strandferðsluni, dekka sama endamál.

Hinar viðbøturnar, fyritíðarviðbótin, óarbeiðsførisviðbótin og pensiónsviðbótin, verða lagdar saman til eina viðbót. Ætlanin er, at viðbótin til fólkapensiónistar í minsta lagi skal svara til pensiónsviðbótina, sum er. Viðbótin til hægstu fyritíðarpensión skal í minsta lagi svara til pensiónsviðbót, fyritíðarviðbót og óarbeiðsførisviðbót til samans, viðbótin til miðal fyritíðarpensión skal svara til pensiónsviðbót og fyritíðarviðbót til samans, og viðbótin til lægstu fyritíðarpensión skal svara til pensiónsviðbótina í dag. Upphæddirnar verða ásettar í serligari løgtingslóg.

Reglur um, hvat hendir við pensiónini, tá ið pensiónistur fær uppihald á ellis- og røktarheimi, stovni sambært forsorgarlógini ella líknandi almennum ella alment góðkendum stovni, umframt reglur um gjald fyri uppihaldið, verða gjørdar í serligari løgtingslóg, sum verður løgd fyri ting í næstum.

Nógvir myndugleikar eru við í fyrisitingini av pensiónum eftir galdandi lóg: Kommunustýrið, sýslumenn, Føroya landfúti, Almanna- og heilsumálastýrið (eisini í einstaklingamálum), Vanlukkutryggingarráðið og Almannastovan. Eftir uppskotinum koma einans Almannastovan og Vanlukkutryggingarráðið at hava fyrisitingina av einstaklingamálum.

Den Sociale Ankestyrelse í Danmark er kærumyndugleiki fyri avgerðir hjá Vanlukkutryggingarráðnum um avlamispensión. Henda skipan kann halda fram, hóast eingin áseting er um tað í rammulógini. Eftir avtalu tryggjar Almannamálaráðið, at fyritreytirnar fyri tí eru í lagi. Donsku myndugleikarnir gera neyðugar tillaðingar í reglunum, soleiðis at avgerðir hjá Vanlukkutryggingarráðnum um fyritíðarpensión fyri avlamni framhaldandi kunnu verða kærdar til Sociale Ankestyrelsen. Landsstýrismaðurin hevur tó heimild til at leggja henda kærumyndugleika til kærunevndina í almannamálum.

## Ásetan og javnan av almannaveitingum

*Ll. nr. 105 frá 29.12.98.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingligu myndugleikarnir eru landsstýrismaðurin í almannamálum og Almannastovan.

Landsstýrismaðurin í almannamálum kann áseta neyvari reglur á økinum.

Almannastovan umsitur lógina.

2. Lóggáva

Ætlanin við lógini er at áseta upphæddina á fólka-, avlamis- og einkjupensión og á barnagjaldi. Sostatt eru ásetanin og javnanin av almannaveitingum burturtikin úr hesum lógum, sum nú bert snúgva seg um rættin til veitingarnar.

Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna sambært hesi lóg. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Um uppískoytisveiting til einkjur

*Ll. nr. 36 frá 04.05.1977, broytt við Ll. nr. 120 frá 29.12.1983.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingligu myndugleikarnir eru Almannastovan, kærunevndin í almannamálum og landsstýrismaðurin í almannamálum.

Sambært løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur hevur Almannastovan til uppgávu at umsita lógina. Kærunevndin í almannamálum er kærumyndugleiki, og Almanna- og heilsumálastýrið skal sambært lógini áseta neyvari reglur um uppískoytisveiting

2. Lóggáva

Lógin er løgtingslóg og er ætlað til at veita einkjum eitt ískoyti, tá ið rætturin til einkjupensión fellur burtur, tí at einkjan ikki hevur børn undir 18 ár.

Lógin er innarbeidd í nýggja uppskotið til løgtingslóg um almannapensiónir og fellur tí burtur, tá ið henda kemur í gildi.

Lógin er ikki beinleiðis umfatað av rammulógini, men verður tulkað sum partur av pensiónsskipanini.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Heimastýrið rindar útreiðslurnar við blokkstuðlinum.

## Viðbót til ávísar pensiónistar o.a.

*Ll. nr. 35 frá 16.04.1997*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru Almannastovan, landsstýrismaðurin í almannamálum og kærunevndin í almannamálum.

Uppgávan hjá Almannastovuni er at umsita viðbótina, sum landsstýrismaðurin í almannamálum ásetir og staðfestir. Avgerðir, sum eru tiknar sambært hesi lóg, kunnu verða kærdar til kærunevndina í almannamálum.

Upphæddin á viðbótunum verður á hvørjum ári ásett í kunngerð, sum landsstýrismaðurin í almannamálum staðfestir eftir játtanini á fíggjarlógini.

2. Lóggáva

Lógin er føroysk løgtingslóg. Sostatt verða eingi krøv í sambandi við fullveldi sett til hetta øki.

Lógin er ikki umfatað av rammulógini, men verður tulkað sum partur av pensiónsskipanini. Ætlanin er at seta hesa viðbót til pensiónistar inn í lógini um almannapensiónir.

Kunngerðir, settar í gildi við heimild í hesi lóg:

- *K. nr. 21 frá 06.03.1998 um viðbót til ávísar pensiónistar o.a., broytt við K. nr. 54 frá 24.04. 1998 (bert í gildi fyri fíggjarárið 1998).*
- *K.nr. 3 frá 12.01.99 um viðbót til ávísar pensiónistar o.a.*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Heimastýrið rindar útreiðslurnar við blokkstuðlinum.

## Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima

*Ll. nr. 64 frá 05.06.1984, broytt við Ll. nr. 46 frá 23.03.1993.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru Almannastovan, landsstýrismaðurin í almannamálum, Føroya gjaldstova og kærunevndin í almannamálum.

Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpum heima verður veitt teimum, sum krevja støðuga hjálp. Upphæddin á samsýningini er tann sama sum einkjupensiónsupphæddin. Almannastovan umsitur hesa lóg, og Føroya gjaldstova rindar samsýningina. Tiknar avgerðir kunnu verða kærdar til kærunevndina í almannamálum. Landsstýrismaðurin í almannamálum ásetir neyvari reglur fyri, hvussu henda lóg verður umsitin.

2. Lóggáva

Lógin er føroysk løgtingslóg og ásetir reglur um serlig tilboð til eldri og óhjálpin. Hetta er uppi í rammulógini, og føroyska heimastýrið hevur sostatt uppfylt ein part av rammulógini á hesum øki.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Heimastýrið rindar útreiðslurnar við blokkstuðlinum.

## Dagpeningalógin

*Lb. nr. 102 af 02.03.1988*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Danskir fyrisitingarmyndugleikar hava ikki nógva beinleiðis ávirkan á dagpeningaøkið í Føroyum. Tó skal danski almannamálaráðharrin verða tikin upp á ráð, áðrenn heimastýrið ásetir neyvari reglur um dagpening fyri barnsburð, eins og almannamálaráðharrin í hesum sambandi hevur heimild at seta galdandi reglur úr gildi. Almannamálaráðharrin kann eisini gera frávik frá dagpeningalóggávuni í Føroyum, tá ið altjóða sáttmálar krevja tað.

"Det Færøske Ulykkesforsikrinsråd," sum er sett á stovn við heimild í donskum reglum um vanlukkutrygging í Føroyum, hevur í ávísum førum til uppgávu at samskipa dagpeningaveitingar í sambandi við skaðatilburðir, ið samstundis koma undir vanlukkutryggingarlóggávuna, (arbeiðsskaðar).

Í lógini um dagpening fyri ættleiðing, (sí niðanfyri), er treyt fyri at fáa dagpening, at ættleiðingarmyndugleikarnir hava gjørt av, at annað av foreldrunum skal vera heima hjá barninum ta fyrstu tíðina. Ríkisumboðið umsitur ættleiðingarlóggávuna og ger av, hvør skal fáa ættleiðingarloyvi, og undir hvørjum treytum ættleiðingarloyvi verður givið. Tað er sostatt ein danskur myndugleiki í Føroyum, sum er við til at gera av, um dagpeningur kann verða veittur í hesum føri.

Føroysku myndugleikarnir á dagpeningaøkinum eru fyrst og fremst landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum og Almannastovan. Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta høvuðsreglur fyri dagpeningaøkið innan fyri tær rammur, ið Fólkatingið hevur givið Landsstýrinum í dagpeningalógini.

Almannastovan umsitur dagpeningøkið sambært dagpeningalógini og kunngerðum við heimild í lógini.

2. Lóggáva
Sambært heimastýrislógini er dagpeningaøkið, sum partur av almannaverkinum, eitt felagsmál. Hóast hetta, yvirtók heimastýrið kortini dagpeningaøkið í 1995 við eini § 9-yvirtøku. Hetta merkir, at heimastýrið umsitur dagpeningaøkið innan fyri tær rammur, sum Fólkatingið loyvir, umframt at Fólkatingið kann heimila heimastýrinum at áseta neyvari, føroyskar reglur um dagpening.

Høvuðslógin á økinum – Lov for Færøerne om dagpenge ved syg-

dom eller fødsel (Socialministeriets lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988) – er samsvarandi hesum ein donsk lóg, sum serliga er smíðað til føroysk viðurskifti. Lógin áleggur Almannastovuni at umsita dagpeningaøkið og gevur samstundis landsstýrismanninum í Almanna- og heilsumálum heimild til at lóggeva neyvari um dagpening. Dagpeningalógin ásetir reglur um m.a.:

1) Hvørjir tilburðir geva rætt til dagpening,
2) Hvør hevur rætt til dagpening,
3) Geografiskar treytir fyri rættinum til dagpening,
4) Krøv um eitt ávíst tilknýti til arbeiðsmarknaðin og
5) Reglur um inntøkugrundarlag og dagpeningaupphæddir.

Hóast galdandi dagpeninglóg er donsk lóg, so eru kunngerðirnar, sum eru givnar við heimild í lógini, føroyskar. Hetta er tí, at dagpeningalógin gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta neyvari reglur á økinum.

Lóggevandi heimild landsstýrismansins er víðkað í 1995, sbrt. „Lov om sociale ydelser på Færøerne (lov nr. 315 af 17. maj 1995),“ ið áleggur landsstýrismanninum at gera nýggja løgtingslóg um dagpening fyri sjúku og barnsburð.

Landsstýrismaðurin hevur eisini nýtt sínar lóggevandi heimildir á dagpeningaøkinum til í 1994 at gera løgtingslóg um dagpening í sambandi við ættleiðing, (sí løgtingslóg nr. 77 frá 17. mai 1994 um dagpening við ættleiðing). Lógin staðfestir, at ættleiðing eisini gevur rætt til dagpening, men vísir annars til vanligu reglurnar í dagpeningalógini.

Sum liður í avtaluni við Danmark frá 1995, (sí „lov nr. 315 af 17. maj 1995 om sociale ydelser på Færøerne),“ hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum sett arbeiðsbólk at endurskoða dagpeningaskipanina og leggja fram uppskot um nýggja, føroyska dagpeningalóg.

Landsstýrismaðurin miðar ímóti at leggja uppskotið fyri Løgtingið á sumri 1999.

Yvirlit yvir lógir og kunngerðir, sum galda á dagpeningaøkinum:
- *Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel (Socialministeriets lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988)*
- *Løgtingslóg nr. 77 frá 17. mai 1994 um dagpening við ættleiðing.*
- *Kunngerð nr. 51 frá 26.03.1993 um læknaváttanir í sambandi við umsókn um dagpening fyri sjúku ella skaða.*
- *Kunngerð nr. 51 frá 26.06.1979 um dagpening við seinni broytingum.*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Av tí at talan er um felagsmál, sum bert er yvirtikið við § 9-yvirtøku, hevur Danmark fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Føroyar hava fyrisitingarligu og fyri ein part lóggevandi ábyrgdina av økinum, men Danmark fíggjar økið. Hetta verður gjørt á tann hátt, at Danmark á hvørjum ári letur heimastýrinum eina ávísa upphædd í blokkstuðli, og henda upphædd er fyri ein part ætlað til at fíggja dagpeningaøkið, (sí „Lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre (lov nr. 393 af 22. juni 1993)).“ Hóast dagpeningaøkið er tikið við á føroysku fíggjarlógina, so er fíggjarliga ábyrgdin sostatt formliga framvegis í Danmark.

# Kapittul 5

## Rammulógin um heilsuverkið í Føroyum, við útfyllandi lóggávu

### Rammulógin um heilsuverkið í Føroyum

*L. nr. 316 af 17.05.1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne.*

Tann 6. apríl 1993 varð avtala gjørd ímillum donsku stjórnina og føroyska heimastýrið um, at heimastýrið skuldi yvirtaka ávís øki á heilsuøkinum. Tí varð gjørd nevnda rammulóg, ið áleggur og gevur føroyska heimastýrinum heimild til at áseta reglur um uppgávur, veitingar og fyrisiting í heilsuverkinum viðvíkjandi:

1) Sjúkrahúsverki
2) Kommunulæknaskipan
3) Heilsusystraskipan
4) Heimasjúkrasystraskipan
5) Skúlalæknaskipan
6) Tannrøktarskipan
7) Sjúkratrygging

Orðið „rammulóg“ merkir, at føroyska heimastýrið innan fyri ávísar rammur hevur fingið heimild til at áseta føroyskar reglur. Heimildin sambært hesi lóg til at áseta reglur verður trongt tulkað, t.e., at hon umfatar bert tey øki, sum eru nevnd omanfyri. Sum dømi kann verða nevnt, at heimildin til at gera lóg um sjúkrahúsverkið bert umfatar lóg um sjálvt sjúkrahúsverkið. Hon fær ikki verið tulkað til at umfata reglusmíð um t.d. „Patientforsikring“ ella „Patienters rettigheder.“ Hesar lógir mugu enn verða settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Rammulógin ásetir, at tær donsku lógir, ið eru í gildi í Føroyum á hesum økjum, verða verandi í gildi, til føroyskar løgtingslógir koma í staðin.

Økini, sum nevnd eru omanfyri, eru yvirtikin við § 9-yvirtøkum. Tað merkir, at føroyska heimastýrið hevur fingið heimild til at gera

løgtingslógir á hesum økjum og heimild til at umsita økini. Umsitingin av føroyska sjúkrahúsverkinum varð tó longu yvirtikin í 1976 sambært „lov for Færøerne om sygehusvæsenet."

Tað einasta, sum ikki er yvirtikið, er fíggjarliga ábyrgdin. Statsrættarliga liggur fíggjarliga ábyrgdin tí enn hjá Fólkatinginum og danska heilsumálaráðharranum. Fólkatingið hevur tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna av nevndu økjum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Allar lógir, nevndar í rammulógini, eru enn felagsmál og verða ikki sermál, fyrr enn heimastýrið tekur við fíggjarligu ábyrgdini av økinum, ella yvirtekur málsøkið sum sermál.

Sambært seinastu avtaluni við danir skulu allar løgtingslógirnar sambært rammulógini verða lidnar í seinasta lagi í 1999.

Hesar løgtingslógir eru settar í gildi við heimild í rammulógini:

1) Ll. nr. 89 frá 04.06.96 um Sjúkrahúsverk Føroya, við tilhoyrandi kunngerðum.
2) Ll. nr. 87 frá 06.06.97 um heilsusystratænastuna, við tilhoyrandi kunngerð.
3) Ll. nr. 88 frá 06.06.97 um heimasjúkrasystraskipanina, við tilhoyrandi kunngerð.
4) Ll. nr. 23 frá 06.03.98 um barna og ungdómstannrøkt, við tilhoyrandi kunngerð.

Niðanfyri verða lýstar allar tær lógir, sum eru settar í gildi við heimild í rammulógini, og tær lógir, sum skulu verða gjørdar til føroyskar løgtingslógir sambært rammulógini.

## Sjúkrahúsverk Føroya

*Ll. nr. 89 frá 04.06.1996 um Sjúkrahúsverk Føroya.*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í heilsumálum og Sundhedsstyrelsen.

Uppgávurnar hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum eru at áseta neyvari reglur um, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið, um virki teirra, um reglur fyri sjúkrahúsráð og læknavirksemi á sjúkrahúsinum, um nær ávísir sjúklingar fáa rætt til ókeypis viðgerð í sjúkrahúsverkinum beint eftir, at teir eru fluttir, ella eftir eitt uppihald, sum er styttri enn seks vikur.

Landsstýrismaðurin kann eisini áseta reglur um, at á føroyskum

sjúkrahúsum verður ókeypis viðgerð veitt fólki, ið býr uttanlands, men sum er í Føroyum fyribils, at summar viðgerðir verða veittar ókeypis, sama, hvar sjúklingurin býr, at í serligum førum kann gjald verða álagt fyri ávísar viðgerðir og veitingar ella fyri viðgerð á ávísum stovnum. Harumframt kann landsstýrismaðurin áseta reglur um fólk, sum sambært hesi lóg ikki hevur rætt til ókeypis viðgerð, reglur um flutning ella ferðaendurgjald til sjúklingar, sum við samtykt frá sjúkrahúsverkinum fara úr Føroyum at fáa viðgerð í øðrum londum, reglur um at rinda aðrar útreiðslur í sambandi við at sjúklingar, sum við samtykt frá sjúkrahúsverkinum verða sendir úr Føroyum til viðgerðar í øðrum londum, og reglur um, í hvørjum øðrum førum flutningur ella ferðaendurgjald verða latin. Landsstýrismaðurin kann áseta mark fyri ferðaútreiðslunum og áseta neyvari reglur um, hvussu flutningur og ferðaendurgjald verða veitt, umframt onnur gjøld fyri aðrar neyðugar ferðaútreiðslur í sambandi við hetta.

Landsstýrismaðurin er eisini kærumyndugleiki í avgerðum, sum leiðslan fyri sjúkrahúsverkið hevur tikið um rætt til viðgerð, flutning ella ferðaendurgjald. Kært skal verða innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Landsstýrismaðurin kann áseta, at heimildin hjá honum sum kærumyndugleiki kann verða løgd til eina kærunevnd.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen sambært lógini er at hava eftirlit við føroyska sjúkrahúsverkinum.

Viðvíkjandi teimum myndugleikum, sum sambært lógini eru føroyskir, verður eingin broyting í støðuni, um vit fáa fullveldi.

2. Lóggáva

Lógin ásetir reglur um tey trý sjúkrahúsini: Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Lógin ásetir eisini reglur um læknavirksemið á sjúkrahúsunum og um rættin hjá borgarum til veitingar í sjúkrahúsverkinum.

Føroyingar hava uppfylt rammulógina á hesum øki við at seta løgtingslóg í gildi. Sostatt verða eingi krøv sett til lóggávu í sambandi við fullveldi. Tó verður viðmerkt, at fleiri kunngerðir enn ikki eru tillagaðar til sjúkrahúsverkið. Ætlanin er at gera hetta sum skjótast, av tí at nógv ivamál dagliga eru í sjúkrahúsverkinum, við tað at økið ikki er nóg reglusett.

Kunngerðir, settar í gildi sambært lógini:
– *K. nr. 104 frá 22.06.1995 um flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar innanoyggja.*
– *K. nr. 124 frá 23.10.1996 um sjúkrahúsráð, seinast broytt við K. nr. 74 frá 12.10.1998 (Eisini broytt við K. nr. 27 frá 25.03.1997).*

– *K. nr. 123 frá 20.06.1997 um flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar uttanlands, broytt við K. nr. 147 frá 12.11.1997.*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Donsku myndugleikarnir hava við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna sambært hesi lóg. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Kommunulæknaskipanin

*Lov nr. 88 af 21.4.1914, jfr. Lb. nr. 239 af 29.08.1927 om kommunal lægehjælp og tingmál nr. 75/1998: uppskot til løgtingslóg um kommunulæknaskipan.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru kommunurnar, Innanríkisráðið og Kommunulæknaráðið.

Uppgávan hjá kommununum er at syrgja fyri, at fólk, ið hevur tørv á læknahjálp, skal fáa hesa læknahjáp sambært lógini.

Uppgávan hjá innanríkisráðharranum er at seta eitt kommunulæknaráð, sum skal vera meklari ímillum læknar og kommunur viðv. kommunulæknahjálp. Bæði kommunur og læknar kunnu leggja mál fyri Kommunulæknaráðið. Í ráðnum eru seks limir. Tríggir teirra skulu vera praktiserandi læknar, sum danska læknafelagið velur, og hinir tríggir verða valdir politiskt í Danmark. Tá talan er um flutningstrætur, verða tveir limir valdir afturat, sum skulu vera ein lækni og ein limur, sum sjúkratryggingin velur. Limirnir í ráðnum verða valdir fyri 4 ár í senn.

Sambært galdandi lóggávu er fyrisitingarliga høvuðsábyrgdin sostatt í Danmark. Í royndum hevur tað tó verið Landsstýrið, sum hevur sett kommunulæknarnar í Føroyum.

*Uppskot til løgtingslóg um kommunulæknaskipan*

Við nýggja uppskotinum til løgtingslóg um kommunulæknaskipan verður fyrisitingarliga ábyrgdin flutt frá donskum til føroyskar myndugleikar.

Sambært uppskotinum eru fyrisitingarligu myndugleikarnir landsstýrismaðurin í heilsumálum og kommunurnar.

Sambært uppskotinum setir landsstýrismaðurin í heilsumálum kommunulækna í starv. Kommunan útvegar viðtalurúm o.a. Hetta merkir, at fyrisitingarliga eru einans føroyskir myndugleikar inni í myndini.

Viðmerkt verður, at sambært aðrari lóggávu er tað Sundheds-

styrelsen, sum umvegis landslæknan hevur eftirlit við kommunulæknum sum fakbólki, eins og tað hevur eftirlit við øðrum heilustarvsfólki.

2. Lóggáva
Galdandi lóg á økinum er donsk lóg, sum er sett í gildi í Føroyum í 1927. Sum øll onnur heilsuøki, fylgir kommunulæknaøkið oftast donskum vegleiðingum og rundskrivum. Hetta er neyðugt, fyri at vit kunnu hava eitt dagført heilsuøki í Føroyum.

Donsk kunngerð, sett í gildi sambært galdandi lóg:
- *B. nr. 262 af 09.10.1915 om Instruks for Mæglingsrådet for kommunal lægehjælp.*

Nýtt uppskot til føroyska løgtingslóg um kommunulæknar er lagt fram fyri Løgtingið í tingsetuni 1998-99. Verður uppskotið samtykt, hava føroyingar endaliga yvirtikið lógarligu ábyrgdina av økinum.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á økinum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Landsstýrið rindar sostatt kommunulæknunum eina grundupphædd, og tað, sum vantar í, fáa kommunulæknarnir frá sjúkrakassunum. Grundupphæddin verður javnað eftir donskum reglum. Hetta kemst av, at kommunulæknar hava ongan setanarsáttmála við landið. Hetta verður broytt sambært nýggja uppskotinum um kommunulæknalóg.

Útreiðslubýtið ímillum land og kommunu verður staðfest í løgtingslóg um býti av Føroya parti av løn kommunulæknanna, (sí meira í kap. 6).

## Heilsusystratænastan

*Ll. nr. 87 frá 06.06.1997 um heilsusystratænastuna.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í heilsumálum og Sundhedsstyrelsen.

Uppgávan hjá landsstýrismanninum í heilsumálum er at áseta neyvari reglur um heilsusystraskipanina.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at áseta reglur um frágreiðingarskyldu hjá heilsusystratænastuni og at gera leiðbeinandi reglur

fyri, hvussu heilsusystraskipanin skal verða løgd til rættis, og hvussu arbeiðið verður útint.

Fyrisitingarliga eru eingi krøv í sambandi við lógina, men tá talan er um tær uppgávur, sum Sundhedsstyrelsen hevur, verður mett, at avtala átti at verðið gjørd við Sundhedsstyrelsen um at halda fram við teimum uppgávum, sum tað nú hevur á økinum.

2. Lóggáva

Lógin er føroysk løgtingslóg og snýr seg í høvuðsdráttum um tær veitingar, sum heilsusystratænastan gevur borgarum í Føroyum, og lógin greiðir eisini frá, hvussu skipanin virkar.

Kunngerð, sett í gildi við heimild í lógini:
– *K. nr. 105 frá 11.06.1997 um heilsusystratænastuna.*

Líknandi lógin í Danmark er avtikin, og heilsusystraskipanin verður í staðin regulerað í „L.nr. 438 af 14 juni 1995 om forebyggende sundhedsordninger for børn og unge.“ Henda lóg er ikki sett í gildi fyri Føroyar, men ætlanin er at gera føroyska løgtingslóg á hesum øki við heimild í rammulógini á heilsuøkinum.

3. Fíggjarlig ábyrgd

Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á økinum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Í føroysku skipanini verða útreiðslur í sambandi við skipanina goldnar sambært løgtingslóg um býti av almannaútreiðslum, (sí meira í kap. 6).

## Heimasjúkrasystratænastan

*Ll. nr. 88 frá 06.06.1997 um heimasjúkrasystratænastuna.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í heilsumálum og Sundhedsstyrelsen.

Uppgávurnar sambært lógini eru hesar:
Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetir neyvari reglur fyri heimasjúkrasystraskipanina.

Sundhedsstyrelsen hevur til uppgávu at áseta reglur fyri frágreiðingarskyldu hjá heimasjúkrasystratænastuni og gera vegleiðing

fyri, hvussu heimasjúkrasystraskipanin verður løgd til rættis og útint.

Hóast málsøkið er yvirtikið sum § 9-yvirtøka, hevur Sundhedsstyrelsen uppgávur sambært lógini, tí tá ið lógin varð gjørd, varð mett, at føroyingar kundu ikki vera serfrøðingavitanina hjá Sundhedsstyrelsen fyriuttan.

2. Lóggáva
Lógin er føroysk løgtingslóg og snýr seg í høvuðsdráttum um, hvørjar veitingar heimasjúkrasystratænastan skal geva borgaranum í landinum, og hvussu skipanin skal vera uppbygd.

Kunngerð, sett í gildi við heimild í lógini:
– *K. nr. 106 frá 11.06.1997 um heimasjúkrasystratænastuna.*

3. Fíggjarlig ábyrgd
Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á økinum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Í Føroyum verða útreiðslurnar býttar soleiðis, at tær verða goldnar sambært løgtingslóg um býti av almannaútreiðslum, (sí meira í kap. 6).

## Skúlalæknaskipanin

*A. nr. 16 af 16.01.1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning, som senest ændret ved A. nr. 845 af 18.12.1987.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í heilsumálum, Tuberklastøðin, landslæknin, kommunurnar og Sundhedsstyrelsen.

Uppgávan hjá landsstýrismanninum í heilsumálum er at seta skúlalæknar, heilsusystrar og sjúkrasystrar og annað hjálparstarvsfólk hjá skúlalæknunum í samstarvi við landslæknan og kommunurnar. Reglur um skúlalæknaskipanina ásetir Landsstýrið.

Sambært lógini skal Tuberklastøðin skipa fyri, at øll børn í skúlaaldri verða kannað fyri tuberklar av skúlalæknanum í samstarvi við Tuberklastøðina. (Hetta verður tó ikki gjørt soleiðis longur, av tí at vandin fyri tuberklum ikki er so stórur).

Uppgávan hjá kommununum er at síggja til, at skúlalæknaskipanin virkar í kommununum.

Uppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er at áseta ávísar reglur um skúlalæknaskipanina í Føroyum.

2. Lóggáva
Lógin er donsk, men miðað verður eftir sum skjótast at gera føroyska lóggávu um skúlalæknaskipan. Lógin er avtikin í Danmark, og skipanin verður í staðin reguleraað í „L.nr. 438 af 14 juni 1995 om forebyggende sundhedsordninger for børn og unge."

Kunngerð, sett í gildi sambært lógini:
– *B. nr. 240 af 30.04.1986 om skolelægeordning på Færøerne, broytt við K. nr. 120 frá 19.06.1997.*

Henda lóg er ikki sett í gildi fyri Føroyar, men ætlanin er at gera føroyska løgtingslóg á hesum øki við heimild í rammulógini á heilsuøkinum. Av tí at avtøkan av lógini um „skolelægeordning" ikki er lýst í Føroyum, er lógin enn í gildi hjá okkum sbrt. „L.nr. 735 af 06.12.89 om kundgørelse af love, anordninger og bekendtgørelse på Færøerne."

Skúlalæknaskipanin er partur av rammuavtaluni frá 1995 við donsku stjórnina, (sí inngangin), og føroyingar hava tí skyldu at gera føroyska lóg á økinum í seinasta lagi ár 1999. Ætlanin er at gera eina líknandi lóg sum donsku lógina um „forebyggende foranstaltninger for børn og unge." Miðað verður ímóti at leggja uppskot til løgtinglóg fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á økinum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

Sambært løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum, skulu kommunurnar útvega skúlalæknaskipanini viðtalurúm o.a.

## Barna- og ungdómstannrøkt

*Ll. nr. 23 frá 06.03.1998 um barna- og ungdómstannrøkt*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarmyndugleikar sambært lógini eru kommunurnar, landsstýrismaðurin í heilsumálum og Sundhedsstyrelsen.

Uppgávan hjá kommununum er at tryggja øllum børnum og ungum undir 16 ár, sum búgva í kommununi, møguleika fyri ókeypis, fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt.

Tilboð um kommunala tannrøkt verður givið á almennum tannlæknastovum, men kommunan kann tó fáa undantaksloyvi frá landsstýrismanninum at nýta privatan tannlækna, sum kommunustýrið ger

sáttmála við. Kommunustýrið skal geva landsstýrismanninum upplýsingar um virksemið sambært lógini. Kommunurnar bera útreiðslurnar av tannrøktini. Kommunustýrið setir leiðara, tannlæknar og hjálparstarvsfólk á teimum almennu tannlæknastovunum.

Landsstýrismaðurin hevur til uppgávu sambært lógini at áseta neyvari reglur fyri barna- og ungdómstannrøktini. Fyrst og fremst skal landsstýrismaðurin áseta reglur um, hvussu umfevnandi tannrøktin skal vera, og hvørji krøv skulu verða sett henni. Við hesum reglum setir landsstýrismaðurin millum annað í gildi donsku reglurnar um kommunala tannrøkt, sum Sundhedsstyrelsen hevur ásett í Føroyum.

Landsstýrismaðurin virkar sum kærumøguleiki, um foreldur ella verji at børnum í kommunalu tannrøktini eru ónøgd við avgerð, sum kommunustýrið hevur tikið sambært lógini.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum skipar fyri hagtølum fyri tannlæknavirksemi, og landskassin ber útreiðslurnar av hesum arbeiði.

2. Lóggáva

Lógin er føroysk løgtingslóg. Høvuðsinnihaldið í lógini er, at kommunustýri skal tryggja øllum børnum og ungum undir 16 ár, sum búgva í kommununi, møguleika fyri ókeypis, fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt.

Kunngerð, sett í gildi sambært lógini:

– *K. nr. 53 frá 24.04.1998 um kommunala barna- og ungdómstannrøkt.*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á økinum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Sjúkrakassaøkið

*“Lb. nr. 514 af 21.07.1989 om den offentlige sygeforsikring,“ seinast broytt við Ll. nr. 153 frá 04.12.1997*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru sjúkrakassarnir, Almannastovan, landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Sundhedsstyrelsen, sjúkrahúsini og Innkrevjingarøkið hjá Toll- og skattstovu Føroya.

11 sjúkrakassar eru í Føroyum, og allir eru limir í Meginfelag sjúkrakassa Føroya. Bara ein sjúkrakassi er fyri hvørt læknadømi, men

landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum kann áseta, at ein sjúkrakassi kann umfatað fleiri læknadømi. Millum limirnar í sjúkrakassunum verður vald ein umboðsnevnd, sum situr 4 ár í senn. Reglur fyri hesa umboðsnevnd verða gjørdar eftir tilmæli frá Almannastovuni.

Ein og hvør, sum býr í Føroyum og er fyltur 18 ár, skal verða skrásettur í øki sjúkrakassans. Limur í sjúkrakassa kann velja ímillum at vera A-limur ella B-limur. Tey, ið ikki vilja hava serstakt val, verða tryggjað sum A-limir.

Almannastovan hevur eftirlit við sjúkrakassunum og er teimum til hjálpar við neyðugum upplýsingum og vegleiðingum. Almannastovan hevur rætt til at fáa upplýsingar frá bý- og bygdaráðum, arbeiðsgevarum og viðkomandi sjúkrahúsum, klinikkum, læknum og øðrum, tá ið hetta er neyðugt fyri eftirlitið hjá Almannastovuni. Herímillum eru eisini sjúkrahúsjournalir og tílíkt, ella avskrivtir av hesum.

Avgerðir hjá Almannastovuni kunnu verða kærdar til Føroya kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið avgerðina. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ásetir neyvari reglur fyri sjúkrakassagjaldið. Arbeiðsuppgávan hjá Innkrevjingarøkinum hjá Toll- og skattstovuni er at krevja inn limagjald, sum ikki er goldið. Tá ið kravið verður sent Innkrevjingarøkinum til innheintingar, kann landskassin mótrokna skuldina í avlopsskatti, negativum MVG og øðrum útgjøldum úr landskassanum. Innkrevjingarøkið pantar eftir reglunum um skattainnkrevjing.

Arbeiðsuppgávan hjá Sundhedsstyrelsen er m.a. at áseta, hvat ískoyti sjúkrakassin skal veita til fysiurgiska viðgerð, eftir ávísing frá lækna til góðkendan alisrøktara, (fysioterapeut).

## 2. Lóggáva

Lógin er fólkatingslóg, sum er sett í gildi fyri alt ríkið, og fleiri kunngerðir eru ásettar við heimild í lógini, bæði av donskum og føroyskum myndugleikum, sum niðanfyri nevnt:

- *Ll. nr. 115 frá 21.05.1993*
- *Ll. nr. 135 frá 16.12.1996*
- *Ll. nr. 86 frá 06.06.1997*
- *B. nr. 565 af 19.12.1969 om valg av repræsentantskab i anerkendte sygekasser på Færøerne.*
- *B. nr. 566 af 19.12.1969 om de færøske sygekassers betalingspligt for ophold på særforsorgsinstitutioner, institutioner for sindslidende og tuberkuloselidende*
- *B. nr. 403 af 18.08.1978 om hvilende medlemsret i sygekasse under ophold på institution.*

- *B. nr. 404 af 18.08.1978 om visse sygekasseforhold under ophold på institution.*
- *B. nr. 348 af 25.07.1980 om de indtægtsforhold m.v., der betinger A-medlemskab i en anerkendt sygekasse på Færøerne, seinast broytt við kunngerð Almannastovunnar frá 18.11.1992.*
- *B. nr. 347 af 25.06.1981 af fortegnelse over tilskudsberettigede lægemidler.*
- *K. nr. 7 frá 25.01.1995 um C-limagjald til sjúkrakassarnar.*
- *B. nr. 545 frá 02.07.1993*

Arbeitt verður í løtuni við at gera føroyska løgtingslóg á sjúkrakassaøkinum, og hon verður løgd fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000. Miðað verður ímóti at gera eina einklari skipan enn hana, sum nú er.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Sambært § 9 í heimastýrislógini hava danir fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Danir hava tó við ríkislóg latið føroyska heimastýrinum útreiðsluskylduna á økinum. Sum endurgjald fyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðul.

## Útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans

*Ll. nr. 115 frá 21.05.1993 um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru sjúkrakassarnir, landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum og Sundhedsstyrelsen.

Lógin ásetir, hvussu nógv sjúkrakassin skal rinda av útreiðslunum til heilivág, sum er fyriskipaður av lækna.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ásetir í kunngerð neyvari reglur fyri afturberingini.

Sundhedsstyrelsen er ráðgevi landsstýrismansins, tá ið gjørdar verða tær skráir, sum umrøddar eru frá stk. 1-3. Landsstýrið ásetir í kunngerð neyvari reglur fyri, nær henda lóg verður sett í gildi.

Tá ið Sundhedsstyrelsen er undantikið, eru fyrisitingarligu myndugleikarnir føroyskir. Mett verður, at neyðugt er við framhaldandi samstarvi við danir ella aðrar – á sama hátt sum nú verður samstarvað við Sundhedsstyrelsen.

2. Lóggáva
Lógin er føroysk løgtingslóg og er sett í gildi, áðrenn rammulógin

kom í gildi, men er ein partur av sjúkrakassaskipanini og má tí sigast at vera partur av rammulógini.

Hesar kunngerðir eru settar í gildi sambært lógini:

– *K. nr. 144 frá 02.07.1993 um ígildissetan av løgtingslóg um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans*
– *K. nr. 136 frá 16.12.1996 og við K. nr. 160 frá 18.12.1995*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Føroyska heimastýrið rindar útreiðslurnar sambært hesi lóg við blokkstuðlinum.

# Kapittul 6

## Føroyskar løgtingslógir annars á almanna- og heilsuøkinum

### Inngangur

Á almanna- og heilsuøkinum eru fleiri løgtingslógir settar í gildi uttan formligar samráðingar við donsku stjórnina og eru sostatt ikki yvirtiknar sum sermál. Sambært heimastýrislógini verður eitt málsøki yvirtikið sum sermál sambært lista A eftir áheitan frá heimastýrinum ella donsku stjórnini. Hetta verður tulkað soleiðis, at um ein slík yvirtøka skal fara fram, skal heimastýrið formliga boða donsku stjórnini frá, at tað vil yvirtaka økið.

Heimastýrið hevur sett lógirnar í gildi uttan at boða donsku stjórnini frá, sum ásett er í heimastýrislógini.

Tey málsøki, sum eru yvirtikin sum sermál sambært § 2 í heimastýrislógini, eru apoteksverkið, sum var yvirtikið sum sermál í 1948, og vanlukkutryggingarøkið, sum var yvirtikið í 1980.

### Bjálvingarstuðulslán til pensiónistar

*Ll. nr. 40 frá 07.05.1991, seinast broytt við Ll. nr. 29 frá 14.02.1995.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarmyndugleikar sambært lógini eru Húsalánsgrunnurin, Orkuráðið, Almannastovan, landsstýrismaðurin í almannamálum og kærunevndin í almannamálum.

Húsalánsgrunnurin umsitur lógina og tekur avgerð um bjálvingarstuðulslán. Grunnurin kann, um tað er neyðugt, útvega sær upplýsinger, ráð og leiðbeining frá Almannastovuni. Undir Húsalánsgrunninum er ein bjálvingarstuðulslánsgrunnur, sum fær játtan á løgtingsfíggjarlógini á hvørjum ári.

Almannastovan hevur skyldu til at upplýsa Húsalánsgrunninum, um umsøkjarin er pensiónistur, og um viðurskiftini hjá honum annars.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur til uppgávu at gera

reglugerð sambært hesi lóg og kann í samráði við Húsalánsgrunnin gera tekniskar reglugerðir um bjálvingartiltøk, sum eru bindandi fyri fólk, ið eru metingarmenn ella serliga bjálvingarkøn.

Allar avgerðir hjá Almannastovuni sambært hesi lóg kunnu verða kærdar til kærunevndina í almannamálum, og avgerðir hjá Húsalánsgrunninum kunnu verða kærdar til stýrið fyri Húsalánsgrunnin.

2. Lóggáva
Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin rindar útreiðslurnar sambært lógini.

## Vardar íbúðir

*Ll. nr. 111 frá 03.10.1988*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarmyndugleikin er landsstýrismaðurin í almannamálum.

Málið við lógini er at lata studning til vardar íbúðir hjá avlamisfólki og eldri fólki, sum hevur fyri neyðini at búgva í vardum og tryggum umstøðum.

Verða íbúðirnar ikki brúktar til endamálið ella seldar, fellur ognin/ nettoprísurin aftur til landskassan.

2. Lóggáva
Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin rindar útreiðslurnar sambært lógini.

## Kærunevndin í almannamálum

*Ll. nr. 47 frá 23.03.1993.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru kærunevndin í almannamálum, Almannastovan og landsstýrismaðurin í almannamálum.

Í kærunevndini í almannamálum sita tríggir limir, sum landsstýrismaðurin í almannamálum velur. Hesir eru ein lækni, ein løgfrøðingur og ein sosialráðgevi. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum tilnevnir formannin. Í kærunevndini kunnu fólk, sum eru í almennum starvi á tí sosiala økinum, ikki verða vald til limir.

Tá ið kærunevndin vil hava betri greiðu á máli, sum er til viðgerðar, kann stovnurin heita á áhugafeløg, fakfeløg, felagsskapir o.tíl. um at koma á fund við stovnin fyri at lýsa málið.

Stovnurin hevur sjálvstøðuga skrivstovu, sum skal fyrireika tey mál, ið kærunevndin skal viðgera. Tann myndugleiki, ið hevur tikið avgerð og hevur kært, hevur skyldu at lata skrivstovu kærunevndarinnar allar upplýsingar, sum hava verið grundarlag undir tí kærdu avgerðini. Avgerðir hjá kærunevndini skulu vera fráboðaðar skrivliga og skulu vera grundaðar.

Føroya kærustovnur varð stovnaður í 1998.

### 2. Lóggáva

Lógin er føroysk løgtingslóg.

Lógin ásetir við heimild í „Lov for Færøerne om offentlig forsorg,“ „Lov for Færøerne om invalidepension,“ „Lov for Færøerne om folkepension,“ „Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel“ og „Lov for Færøerne om børneforsorg,“ at heimild landsstýrisins sum kærumyndugleiki verður latin Føroya kærustovni. Føroya kærustovnur skal viðgera og taka endaliga avgerð í kærumálum sambært teimum lógum, sum omanfyri eru nevndar.

Eisini skal stovnurin viðgera kærur, tiknar sambært løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur, løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima og løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensiónistar.

Avgerðir, sum verða tiknar av kommunalari og sosialari deild, kunnu innan 4 vikur verða kærdar til Almannastovuna og ikki til kærunevndina í almannamálum. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum setir fólk at taka sær av tí dagliga arbeiðinum á skrivstovuni. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ásetir neyvari reglur um starvskipan kærunevndarinnar. Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og kom í gildi 23.3.1993.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Landskassin ber útreiðslurnar hjá kærunevndini í almannamálum.

## Býtið av almannaútreiðslum o.a.

*Ll. nr. 125 frá 21.05.1993*

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í almannamálum og kommunurnar.

2. Lóggáva
Lógin ásetir býtið av almannaútreiðslum millum landskassan og kommunukassan. Av almannaútreiðslum verða 93,25% goldin úr landskassanum og 6,75% goldin úr kommunukassanum. Landskassin leggur út kommunupartin og fær hann afturgoldnan, soleiðis at í seinasta lagi fyrsta apríl hvørt ár verður uppgjørt, hvussu nógv landskassin skal hava aftur frá hvørjari kommunu sær fyri farna fíggjarárið, við at 50% verða roknað eftir seinasta fólkatali og 50% eftir skattainntøku í kommununi seinasta árið.

Lógin fevnir um útreiðslur av:

- útgoldnari fólkapensión við viðbótum sambært „lov for Færøerne om folkepension”
- útgoldnari avlamispensión og avlamisveiting við viðbót sambært „lov for Færøerne om invalidepension”
- útgoldnari einkjupensión við viðbótum sambært „lov for Færøerne i henhold til offentlig forsorg”
- barnaforsorgarútreiðslur sambært grein 43 stk. 2 og 3 í „lov for Færøerne om børneforsorg”
- útgoldnari hjálp til einstaklingar sambært „lov for Færøerne om offentlig forsorg”
- heimahjálparaskipanina sambært „lov for Færøerne om offentlig forsorg“ og av heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini
- útgoldnari veiting sambært „lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.”
- til rakstur av røktar-, ellis- og vistarheimum
- til rakstur av stovnum sambært grein 32 stk. 2 í „lov for Færøerne om offentlig forsorg.”

Tá ið henda lógin varð sett í gildi, fóru løgtingslóg nr. 3 frá 6. januar um býtið av útreiðslunum til heimasjúkrasystra-, heilsusjúkrasystra og skúlalæknaskipanina og løgtingslóg nr. 98 frá 23. juni 1992 um býtið av almannaútreiðslum úr gildi.

Lógin er føroysk løgtingslóg, t.e., at eingin lógarlig krøv verða sett í sambandi við fullveldi.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin og kommunurnar rinda útreiðslurnar sambært lógini. Landskassans partur av útreiðslunum verður rindaður við blokkstuðlinum.

## Royndarskipan fyri eldrarøkt í Sandoynni

*Ll. nr. 63 frá 20.05.1996*

1. Fyrisitingarligir myndugleiki og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í almannamálum, Almannastovan, Heimarøktin og kærunevndin í almannamálum.

Fyri at royna at sameina røktarheimsrakstur og heimarøkt hevur landsstýrismaðurin í almannamálum heimild til at seta í verk royndarskipan fyri eldrarøkt í Sandoynni. Almannastovan, (Heimarøktin), umsitur lógina, og avgerðir hennara kunnu verða kærdar til kærunevndina í almannamálum.

Royndartíðin er sett til 5 1/2 ár og er galdandi til 31. des. 2001.

2. Lóggáva
Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin rindar útreiðslurnar sambært lógini.

## Stuðul til uppihaldsskyldug

*Ll. nr. 90 frá 06.06.1997*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í almannamálum og Almannastovan.

Landssýrismaðurin hevur heimild til at áseta neyvari reglur sambært lógini, og Almannastovan umsitur lógina.

2. Lóggáva
Málið við lógini er at veita teimum stuðul, sum tað almenna hevur álagt at gjalda uppihaldspening til børn yngri enn 18 ár, og sum ikki búgva hjá uppihaldskylduga. Landsstýrismaðurin í almannamálum kann áseta neyvari reglur um fyrisitingina av hesi lóg, og við kunngerð nr. 143 frá sep. 1997 er álagt Almannastovuni at umsita lógina. Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu verða kærdar til landsstýrismannin í almannamálum

Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin ber útreiðslurnar sambært lógini.

## Apoteksverkið

*L.nr. 104 frá 05.09.1988*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Danskir myndugleikar, sum hava fyrisitingarligar uppgávur og ábyrgd av føroyska apoteksverkinum, eru m.a.:

Sundhedsstyrelsen, Statens Serumlaboratorium, Statens veterinære institut for virusforskning, ávísir danskir undirvísingarstovnar, ávísir útlendskir skrásetingarmyndugleikar, landslæknin í Føroyum og dómsvaldið í Føroyum,

Teir tríggir fyrst nevndu myndugleikarnir eru við til at tryggja, at medisinskur útbúnaður, sum antin verður innfluttur til Føroya ella gjørdur í Føroyum, lýkur ávís heilsu- og trygdarkrøv. Hetta verður m.a. gjørt við at seta danskar reglugerðir, standardir o.s.fr. í gildi fyri medisinskan útbúnað á føroyska marknaðinum.

Harumframt kunnu sjúkrahús, læknar og djóralæknar í Føroyum flyta inn koppingarevni og serum frá hesum stovnum uttan um apoteksverkið.

Ávísir danskir undirvísingarmyndugleikar skulu tryggja, at tey, sum gera, selja ella ráðgeva um medisinskan útbúnað í Føroyum, eru skikkað til hetta starv. Hetta verður m.a. gjørt við at krevja, at hesi fólk hava tikið góðkendar, danskar útbúgvingar á økinum, t.d. farmaseut- og apoteksassistentútbúgving.

Um ávísir danskir skrásetingarmyndugleikar hava góðkent medisinskan útbúnað, so verður henda góðkenning eisini nýtt sum grundarlag undir skrásetingini av útbúnaðinum á føroyska marknaðinum.

Landslæknin í Føroyum hevur í høvuðsdráttum eftirlitsmyndugleika á økinum, og dómsvaldið hevur myndugleika til at revsa tann ella tey, sum ikki halda ásettu reglurnar.

Føroysku myndugleikarnir á økinum eru serliga
- Landsapotekarin í Føroyum
- Avvarðandi landsstýrismaður

Landsapotekarin er „dagligur“ leiðari fyri alt apoteksverkið, t.e. apotekunum, handkeypssølunum og apoteksgrunninum. Harumframt hevur hann ovastu, fíggjarligu leiðsluna, og skal saman við apotekaranum standa fyri rakstri, fíggjarætlanum og fíggjarstýring.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur generellar heimildir at áseta neyvari reglur fyri virksemið hjá apoteksverkinum og kann soleiðis við „rammustýring“ hava ávirkan á, hvussu apoteksverkið í Føroyum verður skipað.

2. Lóggáva

Apoteksverkið varð við heimild í § 2 í heimastýrislógini yvirtikið sum føroyskt sermál í 1948. Tað merkir, at heimastýrið hevur fulla ábyrgd av økinum, bæði í lóggávu, fyrisiting og fígging.

Øll lóggávan fyri apoteksverkið er tí samsvarandi hesum føroysk.

Høvuðslógin er løgtingslóg nr. 104 frá 05.09.1988 um apoteksverk og heilivág. Lógin ásetir m.a. reglur um:

Útbúgvingarkrøv til teirra, sum arbeiða í apoteksverkinum

Fíggjarviðurskifti apoteksverksins

Reglur um apoteksgrunnin

Reglur um heilivág o.a. sum verður gjørdur, marknaðarførdur ella seldur í Føroyum.

Harumframt hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum við heimild í høvuðslógini gjørt fleiri kunngerðir á økinum. Hesar kunngerðir eru formliga føroyskar, men innihaldsliga áseta tær yvirhøvur, at danskar reglur, standardar o.s.fr. eisini skulu galda fyri føroyska apoteksverkið.

Lógir og kunngerðir fyri apoteksverkið:

- *Løgtingslóg nr. 104 frá 05.09.1988 um apoteksverkið og heilivág.*
- *Kunngerð nr. 82 frá 11.08.1989 um heilivágsskrá o.a. (farmacopé).*
- *Kunngerð nr. 84 frá 11.08.1989 um dygd í heilivági.*
- *Kunngerð nr. 112 frá 1. juli 1992 um hydrogenperoxid.*
- *Kunngerð nr. 113 frá 1. juli 1992 um áseting av søluprísi á heilivág.*
- *Kunngerð nr. 17 frá 10.03.1997 um broyting í kunngerð um áseting av søluprísi á heilivág.*
- *Kunngerð nr. 145 frá 02.07. 1993 um skrá yvir heilivágsløg, sum eru heimilað tilskot.*
- *Kunngerð nr. 160 frá 18.12.1995 um broyting í kunngerðini um skrá yvir heilivág, sum er heimilaður tilskot.*
- *Kunngerð nr. 136 frá 16.12.1996 um broyting í kunngerð um skrá yvir heilivágssløg, sum eru heimilað tilskot.*
- *Kunngerð nr. 12 frá 13.02.1997 um broyting í kunngerð um skrá yvir heilivágssløg, sum eru heimilað tilskot.*
- *Kunngerð nr. 39 frá 01.04.1998 um broyting í kunngerð um skrá yvir heilivágssløg, sum eru heimilað tilskot.*
- *Kunngerð nr. 13 frá 31.01.1994 um brúkarainnpakning til sertilbúningarheilivág*

- *Kunngerð nr. 14 frá 31.01.1994 um forskriftir og forskriftaskyldur o.a.*
- *Kunngerð nr. 17 frá 28.02.1996 um broyting í kunngerð um forskriftir og forskriftaskyldu o.a.*
- *Kunngerð nr. 32 frá 16.04.1997 um broyting í kunngerð um forskriftir og forskriftaskyldu o.a.*
- *Kunngerð nr. 16 frá 10.03.1997 um fyrimyndarreglur á heilivági*

3. Fíggjarlig ábyrgd
Av tí at apoteksverkið er føroyskt sermál, hevur heimastýrið fulla, fíggjarliga ábyrgd av økinum. Apoteksverkið er sostatt heldur ikki óbeinleiðis fíggjað úr Danmark við blokkstuðlinum.

## Føroyska býtið til kommunulæknalønir

*Ll. nr. 56 frá 17.12.1952 um býtið av føroyska partinum til kommunulæknalønir.*

1. Fyrisitingarligu myndugleikar og uppgávur
Fyrisitingarligir myndugleikar eru kommunurnar og landskassin.

2. Lóggáva
Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Kommunulæknaskipanin verður fíggjað á tann hátt, at danir gjalda 50% av skipanini við blokkstuðlinum, og føroyingar gjalda 50%. Føroya partur av løn kommunulæknanna verður býttur í helvt millum landskassan og viðkomandi kommunu. Landskassin leggur út fyri kommununar í fyrsta umfari.

Hetta hevur havt við sær, at av tí at farið varð frá endurgjaldsskipanini til blokkstuðulsskipanina í 1987, rindar landið nú 75% av útreiðslunum og kommunurnar 25%.

## Hvíldarheimið Naina

Ll. nr. 18 frá 09.04.1964 um raksturin av hvíldarheiminum Naina.

Fyrisitingarliga, fíggjarliga og lógarliga verður økið umsitið í Føroyum. Til raksturin av hvíldarheiminum Naina letur landskassin árligan studning við játtan á fíggjarlógini. Ber heimið seg ikki við hesum studningi og øðrum inntøkum, til dømis studningi frá kommunum og gjaldi frá sjúkrakassunum, verður landskassin í fyrsta umfari at

leggja út fyri hallið, sum síðani verður líkað út á kommunurnar, alt eftir hvussu nógvar dagar íbúgvarnir í viðkomandi kommunum hava verið á heiminum. Hevur kommunan latið beinleiðis studning, verður hesin tó at mótrokna.

Hvíldarheimið Naina hevur skyldu til at senda Landsstýrinum fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár. Skjótast gjørligt, aftan á at rakstrarárið er endað, sendir heimið roknskapin til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum, og saman við honum tær upplýsingar, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum krevur. Annars verður hvíldarheimið rikið av stýrinum fyri heimið, leyst av Landsstýrinum. Viðtøkur eru fyri hvíldarheimið.

## Tiltøk at minka um tubbaksnýtslu

*Ll. nr. 94 frá 04.10.1984 um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur

Fyrisitingarligir myndugleikar eru landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum og Tubbaksráðið.

Uppgávan hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum er at áseta neyvari reglur á økinum og at seta eitt tubbaksráð við trimum limum, sum skulu geva landsstýrismanninum ráð í tubbaksspurningum og geva tilmæli um, hvussu lógin verður framd.

2. Lóggáva

Ætlanin við lógini er at seta í verk tiltøk, sum kunnu minka um skaðarnar, ið koma av tubbaksnýtslu. Sambært lógini er ikki loyvt at lýsa við tubbaksvørum í Føroyum, ikki er heldur loyvt at selja ella lata tubbaksvørur til ung undir 15 ár, og heldur ikki at selja tubbaksvørur, um hesar ikki er merktar samsvarandi reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

Kunngerðir, settar í gildi við heimild í lógini:

– *K. nr. 95 frá 08.10.1984 um undantak frá forboði viðvíkjandi lýsing við tubbaksvørum.*
– *K. nr. 7 frá 06.03.1985 um ávaringartekstir á tubbaksvørum, seinast broytt við K. nr. 138 frá 02.10.1992.*
– *K. nr. 50 frá 09.04.1990 um hámark av tjøru í sigarettum, broytt við K. nr. 97 frá 13.05.1993.*

Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin rindar útreiðslurnar sambært lógini.

## Javnstøðumál

*L. nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn.*

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Á javnstøðuøkinum virka einans danskir myndugleikar í Føroyum; men danska ákæruvaldið og danska dómsvaldið í Føroyum hava hvør sín leiklut á hesum øki. Eftir áheitan frá Javnstøðunevndini hevur ákæruvaldið til uppgávu at kanna, um grundarlag er undir ákæru fyri brot á javnstøðulógina, og dómsvaldið skal viðgera tey sakarmál, ið Javnsstøðunevndin ella ákæruvaldið leggja fyri rættin til støðutakan. Av føroyskum myndugleikum er tað serliga Javnstøðunevndin, ið hevur týðandi leiklut. Hon hevur til høvuðsuppgávu at hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin, og at seta ymisk tiltøk í verk, um lógin ikki verður fylgd.

Annars hava allir almennir og privatir arbeiðsgevarar skyldu til at hava javnstøðulógina í huga, tá teir seta fólk í arbeiði, løna arbeiðsfólki ella siga tey úr starvi, eins og teir hava skyldu til at veita Javnstøðunevndini neyðugar upplýsingar og hjálp í sambandi við arbeiði nevndarinnar.

2. Lóggáva
Lógin er føroysk løgtingslóg.

3. Fíggjarlig ábyrgd
Landskassin rindar útreiðslurnar sambært lógini.

## Bygging, sethúsa- og íbúðarbygging:

*Ll. nr. 85 frá 24.10.1978 um rentustudning til samansparing til húsabygging.*

Fyrst skal verða viðmerkt, at øll mál viðvíkjandi íbúðum o.ø. ikki eru málsøki hjá Almanna- og heilsumálastýrinum; m.a. hoyra leigumál ikki undir hetta stýrið.

1. Fyrisitingarligir myndugleikar og uppgávur
Eingir danskir myndugleikar hava nakran leiklut á hesum málsøki.

Føroysku myndugleikarnir eru serliga landskassin/landsstýrismaðurin, Húsalánsgrunnurin og aðrir lánsstovnar. Hesir hava allir til upp-

gávu at veita lán og stuðul til sethúsa-, íbúðar- og kollegiumbygging. Harumframt verður bjálvingarstuðul eisini veittur pensiónistum.

2. Lóggáva

Tey málsøki, sum viðvíkja bygging, sethúsa- og íbúðarbygging, og sum hoyra undir landsstýrismannin í almanna- og heilumálum, eru regulerað við føroyskari løgtingslóg, t.e., at eingin lógarlig krøv verða sett í sambandi við fullveldi.

Øll lóggávan á økinum er føroysk. Við heimild í lógini eru henda kunngerð og hesar lógarbroytingar gjørdar á økinum:

– *K. nr. 5 frá 09.02.1989 um fyrisiting av rentustudningi til húsabygging*
– *Ll. nr. 97 frá 01.11.1978 um húsalánsgrunn*
– *Ll. nr. 40 frá 07.05.1991 um bjálvingarstuðul til pensiónistar*
– *Ll. nr. 63 frá 23.06.1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving,*
– *Ll. nr. 52 frá 07.05.1987 um íbúðargrunn*

3. Fíggjarlig ábyrgd

Landskassin rindar útreiðslurnar sambært lógini.

# Kapittul 7

## Samstarvsavtalur fyri Almanna- og heilsumálastýrið

### Inngangur

Fyri at fáa eina meira fullfíggjaða lýsing av, á hvørjum økjum samstarvað verður við danir í dag, og hvønn týdning hetta samstarv hevur á teimum ymsu landsstýrismálaøkjunum, gjørdi fyrisitingarbólkurin av, at umframt at lýsa lóggávuna, so skuldu eisini verða lýstar bæði formligar og óformligar avtalur, sum eru ímillum danska statin og heimastýrið á økjunum.

Almanna- og heilsumálastýrið sendi skriv út til allar stovnar í stýrinum, danskar myndugleikar á økinum í Føroyum og áhugafeløg, um at fáa lýst bæði formligar og óformligar avtalur, sum hesir stovnar og áhugafeløg hava við danska statin.

Við formligar avtalur verður hugsað um skrivligar avtalur, og við óformligar avtalur verður hugsað um aðrar munnligar avtalur, har uppgávurnar eru fíggjarliga tungar ella krevjandi fyri stovnin.

Almanna- og heilsumálastýrið hevur ikki fingið svar frá øllum stovnum sínum í sambandi við nevnda skriv, men niðanfyri verður samandráttur gjørdur av svarunum, sum eru innkomin frá stovnum og áhugafeløgum á almanna- og heilsuøkinum.

## STOVNAR UNDIR ALMANNA- OG HEILSUMÁLASTÝRINUM

### Almannastovan

Almannastovan hevur ongar formligar avtalur við danir annað enn tað, sum er staðfest í almannalógunum. Avtalur eru tó við „Den Sociale Sikringsstyrelse“ í sambandi við umsiting av „Nordisk Konvention om Social Sikring.“ Samstarvið er ókeypis. Viðmerkt skal verða, at samstarvað verður eisini við Ísland og Noreg um henda sáttmála, og hetta er eisini ókeypis.

## Serforsorgin

Formligar avtalur eru ongar, men Almannastovan hevur fleiri føroyingar á stovni í Danmark og hevur eitt gott, óformligt samstarv við danska statin um hetta. Víst verður til Socialministeriets bekg. nr. 888 af 11. dec. 1986.

## Kreppumiðstøðin

Stovnurin tekur sær av kreppuraktum kvinnum, sum hava verið fyri harðskapi. Kreppumiðstøðin hevur hvørki formligar ella óformligar avtalur við Danmark.

## Hvíldarheimið Naina

Hvíldarheimið Naina hevur ongar avtalur við Danmark.

## Føroya barnaheim

Formligar avtalur hevur Føroya barnaheim ongar við Danmark, men eitt gott, óformligt samstarv er við danska felagsskapin, „Danske døgninstitutioner“ um ráð og vegleiðing. Barnaheimið er eisini limur í tí norðurlendska felagsskapinum.

## Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

Felagið Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark hevur ongar formligar avtalur við Danmark, men óformligt samstarv við nógvar ymiskar myndugleikar og stovnar í Danmark, t.d.:

Toll- og skattestyrelsen, cpr.-kontoret hjá Innanríkisráðnum, kommunalar- og amtskommunalar myndugleikar, sjúkrahús, stovnar á undirvísingarøkinum, direktoratet for arbejdsløshedsforsikringen, fakfeløg og A-kassar og pensiónskassar.

## Landsapotekarin

Apoteksverk Føroya hevur formligt samstarv ígjøgnum sáttmálan við ALIS, (Amternes Lægemiddelregistreringskontor), um forskriftir fyri ávísa heilivágsgerð. Apotekið er eisini bundið av altjóða sáttmálum, sum Danmarkar ríki hevur undirskrivað. Føroya landsstýri gjørdi í 1951 sáttmála við Danmarks Apotekerforening, sum gevur føroysku apotekunum atgongd at øllum upplýsingum, sum líknandi donsk apotek fáa.

Apoteksverk Føroya hevur eitt gott, óformligt samstarv við samstarvsfelagar í Lægemiddelstyrelsen, sum er stýri undir Heilsumálaráðnum.

## Húsalánsgrunnurin

Grunnurin hevur ongar formligar ella óformligar avtalur við danska statin.

## Hotel Tórshavn

Formligar avtalur eru nakrar, og teimum skipar føroyska sjúkrahúsverkið fyri. Millum hesar avtalur er t.d. avtalan við Ríkissjúkrahúsið. Hotel Tórshavn hevur ávís óformlig samstørv við t.d.:

- hjálpitólamiðstøðina í Keypmannahavnar kommunu
- felag um vask av seingjarklæðum
- hýruvognavirki
- Delfin Apotek

## Vanlukkutryggingarráðið

Formligar avtalur eru ongar við danska statin, men Vanlukkutryggingarráðið hevur eitt gott og tætt samstarv við Arbejdskadestyrelsen í Danmark, og hevur hetta samstarvið verið ókeypis.

## Blindastovnur Føroya

Formligar avtalur eru ongar, men Blindastovnur Føroya hevur nógv samarbeiði við danskar stovnar, bæði um vegleiðing og skeiðvirksemi. Serliga er gott samstarv við Dansk Blindesamfund.

## Meginfelag sjúkrakassa Føroya

Formligar avtalur eru ongar við Danmark, men eitt óformligt samstarv hevur MSF við avvarðandi myndugleikar og yrkisfeløg í Danmark. Hesi yrkisfeløg eru:

- kommunulæknar
- serlæknar
- tannlæknar
- alisrøktarar (fysioterapeutar)

## Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu

Formligar avtalur eru ongar, men eitt formligt tilknýti er til Odense Universitet, og eitt óformligt granskingarsamstarv við umhvørvismedisinsku deildina Institut for Sygdomsforebyggelse og Helsetjenesteforskning á Odense Universitet.

## Landssjúkrahúsið

Frá Landssjúkrahúsinum eru komin aftursvar frá trimum deildum.

### Psykiatrisk deild

Er talan um formligar avtalur, hevur deildin samband við serviðgerðarstovnar á psykiatriska økinum, har viðgerð ikki er í Føroyum. Talan er um barna- og ungdómspsykiatri. Konsulentskipan er við Odense Universitetshospital, sum sendir konsulentar til Føroya tríggjar ferðir um árið. Avtala er eisini við Bispebjerg Hospital, tá børn verða innløgd.

Harafturat er avtala við Ríkissjúkrahúsið og Psykiatrisk Hospital Risskov, Center for hjerneskade á Amager og Amtssygehus Herlev. Avtala er við Falck um sjúkraflutning.

Viðvíkjandi óformligum avtalum er talan serliga um út- og eftirútbúgvingartilboð til starvsfólk.

### Fyristøðukvinnan

Sjúkrarøktarleiðslan samstarvar við ymiskar stovnar í Danmark. Tá talan er um góðkenning av sjúkrasystrum, verður samstarvað við Sundhedsstyrelsen. Samstarvað verður eisini við ymisk sjúkrahús í sambandi við sjúkraflutning til Danmarkar.

Viðvíkjandi starvsfólkaútbúgving verður farið á serlig eftirútbúgvingarskeið á Ríkissjúkrahúsinum, og starvsfólk koma eisini úr øðrum donskum sjúkrahúsum til Føroya at undirvísa sjúkrasystrum her.

Í útbúgvingini á Danmarks Sygeplejerskehøjskole hava føroyskar sjúkrasystrar somu rættindi sum danskar sjúkrasystrar at fara á eftirútbúgvingarskeið.

### Sjúkrasystraskúlin

Danska Undirvísingarmálaráðið skal góðkenna útbúgvingarætlanina, tá ið ræður um karmar fyri útbúgving, útbúgvingarskipan, kravdum uppgávum og próvtøkum, og Sundhedsstyrelsen skal góðkenna fakliga innihaldið.

Skúlin samstarvar við donsku heilsutænastuna í sambandi við starvslæruna hjá sjúkrasystrunum.

## Suðuroyar sjúkrahús

Av formligum avtalum hevur sjúkrahúsið avtalur viðv. byggiráðgeving og viðgerð av sjúklingum á Ríkissjúkrahúsinum.

Óformligar avtalur eru t.d. um lóggevandi krøv av røntgentólum, kanningar á Medicinsk Laboratorium og Statens Seruminstitut, kanningar av narkosutólum og avtalur um lógarkrøvum viðvíkjandi Dansk Brandteknisk Institut, herundir árliga sýning av sprinklaraskipan.

## Heimarøktin

Heimarøktin hevur hvørki formligar ella óformligar avtalur við Danmark, men sjálvt um ongar beinleiðis avtalur eru, metir stovnurin, at hann reint fakliga er sera bundin at teimum menningarmøguleikum, sum eru í Danmark og øðrum Norðurlondum.

# DANSKIR STOVNAR Í FØROYUM

## Landslæknin

Landslæknin er statsstovnur undir Sundhedsstyrelsen. Stovnurin vísir til „Anordning om ikrafttræden på Færøerne af den danske lov om embedslægeinstitutioner m.v. af 15. juni 1973," sum varð sett í gildi fyri Føroyar 1. august 1995.

Landslæknin hevur ongar formligar ella óformligar avtalur við Danmark, men kann venda sær til stovnar í Danmark, uttan at hetta kostar nakað.

Stovnar, ið landslæknin serliga samstarvar við, eru:

1. Sundhedsstyrelsen viðv. hagtølum.
2. Lægemiddelstyrelsen viðv. loyvum til læknar at nýta óskrásettan heilivág og at avgreiða umsóknir um serligt tilskot til heilivág.
3. Levnedsmiddelstyrelsen.
4. Statens Seruminstitut viðv. smittandi sjúkum, koppseting og fyribyrging.
5. Nævnet for helbredsbedømmelser i tjenestemandssager viðv. fyrispurningum um serliga trupul mál. Hesir fyrispurningar kosta uml. 850,- kr. hvørja ferð, og verður peningurin goldin av tí stovni, ið setir fyrispurningin, men avgreiðir landslæknin sjálvur fyrispurningarnar, eru teir ókeypis.
6. Embætislæknastovnar.

# ÁHUGAFELØG UNDIR ALMANNA- OG HEILSUMÁLASTÝRINUM

## Føroya astma/allergifelag

Føroya astma/allergifelag er ein lokal deild hjá danska Astma/Allergiforbundet. 170 limir eru í Føroyum, og limagjaldið er 150 kr. um árið. Av limagjaldinum fara 65 kr. til Danmarkar, hetta til umsiting og annað. Føroya astma/allergifelag fær sendandi Astma/Allergiblaðið seks ferðir um árið, og somuleiðis faldarar og annað upplýsandi tilfar. Eisini ber til at søkja um legat fyri ferðir at vinna sær heilsubót, stuðul til seingjartoy o.a., sum verður latið frá Astma/Allergiforbundet.

Norðurlendskt samstarv: Saman við danska felagnum.

## LFA, Landsfelag fyri autistar

Autistafelagið er sjálvstøðugt, føroyskt felag, men hevur tætt tilknýti til danska autistafelagið. Felagið hevur m.a. fíggjarligar fyrimunir av tilknýtinum til autistafelagið í Danmark. Tað fíggjar millum annað ferðir niður til Danmarkar hjá foreldrum, ið hava fingið autistiskt barn, og somuleiðis eisini uttanlandsskeið hjá lærarum á Skúlanum á Trøðni. Harumframt verður fígging veitt úr Danmark fyri at fáa serfrøðingar hendaveg.

Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðug luttøka.

## Føroya blindafelag

Føroya blindafelag er serstøk deild undir Dansk Blindesamfund. Sostatt hava teir um leið 100 virknu limirnir í Føroya blindafelag somu rættindi og sømdir í Dansk Blindesamfund sum danir. Vit tulka tí alt sum formligar avtalur. Føroya blindafelag fær 70 krónur fyri hvønn lim um árið úr Danmark.

Til limir sínar letur Dansk Blindesamfund, um tørvur er á tí:
Legat, vanliga hægst 5.000 krónur.
Lán til ymisk endamál.

Umframt tað, hava limirnir eisini aðrar ágóðar, sum til dømis:
Bíligari ferðamøguleikar saman við fylgjara.
Ymisk skeiðtiltøk.
Ókeypis ráðgeving frá ráðgevum í DBS.

Norðurlendskt samstarv: Saman við Dansk Blindesamfund.

## Cøliakifelag Føroya

Cøliakifelag Føroya varð stovnað í 1990 sum økisfelag undir Dansk Cøliakiforbund. Hetta hevur tó ongan fíggjarligan týdning fyri Cøliakifelagið, tí eingin fíggjarligur stuðul fæst frá danska felagnum. Við at gjalda 50 krónur fyri hvønn lim árliga, fáa limirnir blaðið Cøliakinyt. Av munligum avtalum kann verða nevnt, at felagið kann senda umboð á aðalfund/ársfund hjá danska felagnum, tó at tað ikki hevur atkvøðurætt, og felagið fíggjar sjálvt ferðakostnaðin.

## Deyvafelag Føroya

Deyvafelag Føroya er limur í danska landsfelagnum fyri øll deyv í Danmark.

Stuðulin, ið Deyvafelagið fær niðrifrá, er: Tá ið tiltøk eru í Danmark, so sum temafundir og landsfundir, fær Deyvafelagið fyri ferðapening og uppihald. Eisini hevur felagið, eins og hini økisfeløgini í danska landsfelagnum, fingið ókeypis teldu. Peningin fyri teldurnar høvdu tey fingið frá Tipsgrunninum. Deyvafelagið er eisini limur í Dansk Døves Ungdomsforbund og fær stuðul til tiltøk hjá teimum. Felagið er partur av donsku sendinevndini í DNR, (Døves Nordiske Råd), men hevur enn bert eygleiðarastøðu. Deyvahúsið er fíggjað við lántøku í Kreditforeningen Danmark.

## Diabetisfelag Føroya

Diabetisfelag Føroya er sjálvstøðugt felag og hevur hvørki fíggjarligar ella aðrar avtalur við Danmark yvirhøvur.

Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðugt.

## Epileptikarafelag Føroya

Epileptikarafelagið er sjálvstøðugt felag og hevur hvørki fíggjarligar ella aðrar avtalur við Danmark yvirhøvur.

## Giktafelag Føroya

Giktafelagið er sjálvstøðugt felag og hevur ikki fíggjarligar avtalur við Danmark. Felagið fær limablað fyri serprís frá danska giktafelagnum. Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðugt.

## Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum

Felagið fær ongan fíggjarligan stuðul úr Danmark og rindar sjálvt fyri limablað frá danska felagnum.
Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðugt.

## ÍSB, Ítróttarsamband fyri brekað

ÍSB er sjálvstøðugt felag og fær ongar fíggjarsømdir úr Danmark. Felagsskapurin arbeiðir saman við felagsskapum kring allan heim á sjálvstøðugum stigi.

## Javni

Javni er sjálvstøðugur felagsskapur og hevur einki fíggjarligt samstarv við Danmark.
Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðugt.

## Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum

MBF hevur einki fíggjarligt samband við líknandi feløg í Danmark. Limabløð verða hildin sum vanligt móti gjaldi. Tá ið MBF hevur formansskapin í HNR, verður ferðaendurgjald goldið.

## Morbus Bechtrew

Felagið hevur einki fíggjarligt samband við Danmark. Limablað úr Danmark móti gjaldi.

## Nýrafelagið

Nýrafelagið er javnmett við tey 16 økisfeløgini í Danmark. Óbeinleiðis hevur Nýrafelagið fíggjarligar fyrimunir við lutasølu. Alla vitan og viðgerð fær Nýrafelagið úr Danmark.

Nevndarlimir sleppa við á fundir hjá danska felagnum, og ferðaseðilin verður goldin niðrifrá. Ársroknskapurin hjá Nýrafelagnum er, at allar ognir eru at rokna sum felagsognir hjá danska felagnum. Limablað frítt til limirnar í Føroyum. Nýrafelagið hevur fult ræði á egnum peningaligum viðurskiftinum.

## Parkinsonfelagið

Parkinsonfelagið er sjálvstøðugt felag og hevur einki beinleiðis

samstarv við Danmark, uttan limablað, ið fæst frá danska parkinsonfelagnum.

Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðugt.

## Føroya psoriasisfelag

Psoriasisfelagið er sjálvstøðugt felag og hevur einki fíggjarligt samstarv við Danmark, uttan limablað, ið felagið keypir. Tvær ferðið um árið fer Psoriasisfelagið til Danmarkar á fundir, og felagið rindar sjálvt fyri ferðirnar.

Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðugt.

## Sclerosufelagið

Sclerosufelagið er deild undir danska Scleroseforeningen. Upplýst er, at um Sclerosufelagið hevði mist sambandið við danska felagið, kunnu fylgjurnar verða hesar:

- Ferðagrunnurin, sum danska felagið árliga heldur við líka við 6000 krónum, hevði verðið strikaður.
- Árligi rakstrarstuðulin til føroyska felagið upp á 6000 krónur hevði verðið strikaður.
- Luttøkugjald fyri tveir limir at fara á árligu ráðstevnuna í Danmark, 8000 krónur, hevði verðið strikað.
- Skipanin við sosialráðgeva og sálarlækna, sum danska felagið ókeypis hevur sett í verk í Føroyum, (árligi kostnaðurin í løtuni 10-12.000 krónur), hevði verðið strikað.
- Annað ókeypis tilfar, ið Sclerosufelagið nú fær frá danska felagnum, skuldi verðið goldið fyri.

## Sinnisbati

Sinnisbati hevur ongar skrivligar avtalur við nakran felagsskap í Danmark. Heldur ikki fær Sinnisbati nakran fíggjarliga stuðul úr Danmark. Sinnisbati hevur natúrligt samstarv við danska systurfelagið Sind, sum hevur nógvar lokaldeildir.

Norðurlendskt samstarv. Nordisk forening for social og mental helse.

## Spastikarafelagið

Spastikarafelagið er sjálvstøðugt felag. Fær blaðið „Spastikeren“ ókeypis 6 ferðir árliga frá Spastikerforeningen í Danmark, annars einki formligt samstarv við danska felagið. Felagið er í norður-

lendskum samstarvi á óformligum grundarlag, (Nordisk Handicapråd).

Limir felagsins fáa konsulentvitjan 2 ferðir (2-3 dagar) árliga av serlæknum frá Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Limirnir vilja varðveita hesa skipan og sambandið við Ríkissjúrkahúsið sum heild, men eru eisini áhugaðir í at fáa samstarv við onnur lond í serviðgerð.

## Felagið MBD/DAMP-børn

Felagið er sjálvstøðugt felag og hevur einki fíggjarligt samband við Danmark. Felagið fær limablað ókeypis. Fyri serfrøðingar, ið felagið skipar fyri at koma til Føroya at halda skeið, fíggjar felagið MBD/DAMP-børn sjálv.

Norðurlendskt samstarv: Sjálvstøðugt.

## Lymfødemfelagið

Lymfødemfelagið er sjálvstøðugt, føroyskt felag, hevur 50 limir og varð stovnað í 1996. Lymfødemfelagið hevur einki soleiðis samband við danska lymfødemfelagið, annað enn tað at felagið fær limablaðið sendandi fýra ferðir um árið.

# Kapittul 8

## Millumlandasáttmálar, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum umsitur

### Inngangur

Í lýsingini av almanna- og heilsumálum eru millumlandasáttmálar, sum galda í Føroyum, ikki tiknir við. Hetta av teirri orsøk, at eingin fullfíggjaður listi er yvir galdandi sáttmálar. Ein bólkur er skipaður til at lýsa hetta. Ikki fyrr enn hetta arbeiði er liðugt, kann ein lýsing verða gjørd av hesum øki.

Annar trupulleiki við at lýsa millumlandasáttmálarnar nú er, at fáa vit fullveldi, detta allir sáttmálar burtur, og vit mugu gera teir av nýggjum sum sjálvstøðug tjóð. Spurningurin er, um teir sáttmálar, sum galda í dag, skulu verða settir í gildi aftur undir einum fullveldi. Kanska skuldu vit heldur hugt eftir, hvørjir sáttmálar galda í Íslandi ella í øðrum smátjóðum.

Fyrisitingarbólkurin hevur tí gjørt av bert at gera ein lista yvir teir millumlandasáttmálar, sum vit vita galda í Føroyum og á hvørjum øki. Millumlandasáttmáli verður bert lýstur, um so er, at hann hevur serliga stóran týdning á økinum.

### Almannamál

1923 19/5 B. 231 Konvention 1923 om Landarbejdernes forsikring.
1928 27/4 B. 155 Konvention 25 om Ligeberettigelse for udenlandske arbejdere.

| | |
|---|---|
| 1952 22/11: | T. 47 Konvention om Social tryghed med Frankrig 28/6-58 |
| | T. 33 20/7-55 Europæisk konvention om socialhjælp m.m. |
| | T. 34 20/7-55 Europæisk konvention om social tryghed |
| | T. 60 2/10-56 Nordisk konvention om social tryghed. |
| | T. 14 2/3-60 Konvention med England om social tryghed. |
| | T. 28 12/8-63 Europæisk konvention om specialistbehandling og klimatkur. |
| | T. 9 28/3-63 Konvention med Schweiz om socialforsikring. |
| 1957 1/2 | T. 3 Konvention med England om ulykkesforsikring. |

## 1994 12/4 T. NORDISK KONVENTION OM SOCIAL SIKRING

Summir millumlandasáttmálar hava sera stóra umsiting við sær fyri tey lond, sum seta teir í gildi. Ímillum hesar er norðurlenski sáttmálin um „Social sikring."

### 1. Fyrisitingarligir myndugleikar

Fyrisitingarligir myndugleikar í Danmark og Føroyum sambært sáttmálanum eru hesir:

Í Danmark er umsiting stovnað til at taka sær av hesum sáttmála: „Den sociale sikringsstyrelse." Á stovninum arbeiða uml. 120 fólk.

Í Føroyum er eitt starvsfólk sett á Almannastovuni til at umsita sáttmálan í Føroyum. Starvsfólkið arbeiðir í tøttum samstarvi við „Den sociale sikringsstyrelse" í Danmark. Skulu vit umsita sáttmálan sjálvi, vildi verðið neyðugt at sett fleiri fólk.

### 2. Sáttmálin

Sáttmálin varð samtyktur á Løgtingi tann 12. apríl 1994 og lýstur í Kunngerðablaðnum B í 1997. Løgtingið samtykti sáttmálan uttan fyrivarni, t.e., at allur sáttmálin er í gildi í Føroyum.
Tær sosialu veitingarnar, sum sáttmálin fevnir um, eru:

1) veitingar orsaka av sjúku, føðing ella ættleiðing,
2) veitingar orsaka av avlamni, aldurdómi ella deyða,
3) veitingar orsaka av arbeiðsskaða,
4) almennar kontantveitingar til børn.

Sjálvt um sáttmálin hevur stórar, fíggjarligar avleiðingar, verður mett, at neyðugt er at hava henda sáttmála í gildi. Hetta fyri at tryggja, at føroyingar, sum antin í frítíðarørindum ella av øðrum orsøkum í styttri ella longri tíð eru í øðrum norðurlandi, verða javnsettir við aðrar norðurlendskar borgarar. Fær sáttmálin ikki gildi fyri Føroyar, kunnu føroyingar ikki á jøvnum føti við aðrar norðurlendingar fáa sjúkrahjálp, alduspensión, barnagjald, arbeiðsskaðaveitingar o.s.fr.

### 3. Fíggjarlig ábyrgd

Fíggjarliga ábyrgdin liggur hjá føroyska heimastýrinum.

## KONVENTION OM SOCIAL BISTAND OG TJENESTER

Sáttmálin um „social bistand og tjenester" varð lagdur fyri Løgtingið í tingsetuni 1998-99 og verður væntandi samtyktur.

Sáttmálin hevur millum lítla og onga umsiting við sær, men tryggjar føroyskum borgarum forsorgarhjálp, tá ið teir ferðast ella búgva í øðrum norðurlondum.

KONVENTION OM EUROPÆISK SOCIALPAGT

"Konvention af 1961 om Europæisk Socialpagt" er ikki sett í gildi fyri Føroyar, men varð sett í gildi í Danmark í 1965. Ríkisumboðið hevur við jøvnum millumbilum sett fram fyrispurning, um heimastýrið vil góðkenna og seta henda sáttmála í gildi fyri Føroyar.

Sáttmálin hevur við sær tryggar, sosialar rammur fyri føroyskan borgara, sum ferðast ella arbeiðir í evropeiskum landi, á sama hátt sum nevndu norðurlendsku sáttmálar hava við sær í Norðurlondum. Av tí at nógvar skyldur/umsiting og útreiðslur standast av sáttmálanum, er tað útsett í óvissa tíð at góðkenna hann.

## Heilsumál

| | |
|---|---|
| 1922 23/5 | B. 408 Opiumskonventionen 1912 |
| | B. 174 8/6-30 Opiumskonventionen 1925 |
| | T. 48 1/10-64 Protokol 1953 Begrænsning og regulering af opiumsdyrkning og –handel |
| | T. 37 14/9-49 Protokol 1946 Ændret konvention om narkotiske midler |
| | T. 4 24/1-50 Protokol 1948 Kontrol af narkotiske midler |
| | T. 73 30/6-65 Enkelte konventioner 1961 om narkotiske midler. |
| 1948 15/6 | T. 32 Statutter for Verdenssundhedsorganisationen. |
| | T. 24 19/6-64 Verdenssundhedsorganisationens rettigheder og immuniteter. |
| | T. 119 28/2 – 31 International sundhedskonvention. |
| | T. 41 3/5-71 Konvention om anvendelse af detergenter i vaskemidler. |
| 1960 30/11 | T. 74 Udvidelse af den nordiske karantæneoverenskomst. |
| | C. 249 30/11-60 |
| 1963 12/8 | T. 28 Europæisk overenskomst om gensidig bistand mht. lægelig specialistbehandling og klimatkur. |
| | T. 29 Konvention om udveksling af blodtypereagenser. |
| 1983 7/11: | B. 103 af overenskomst af 25/8-81 mellem Danmark, Finland, Norge og Sverige om godkendelse af erhvervsudøvelse for visse personalegrupper indenfor sundhedsvæsenet og veterinærvæsenet. |

Væntandi verður „konvention af 4. april 1997 om beskyttelse af menneskerettigheder og menneskelig værdighed i forbindelse med anvendelse af biologi og lægevidenskab" løgd fyri Løgtingið til samtyktar í tingsetuni 1999-2000.

Sáttmálin tryggjar, at fólk, ið eru við í biomedisinskum royndum sum t.d. ílegugransking, ikki verða misnýtt.

# Kapittul 9

## Niðurstøða av sjálvstýrisverkætlanini/ Almanna- og heilsuøkið

Landsstýrið gjørdi í oktober 1998 av at seta í gongd verkætlan um fullveldi. Aðalstýrini fingu í hesum sambandi til uppgávu at gera eina lýsing av hvør sínum øki. Almanna- og heilsumálastýrið hevur gjørt eina lýsing av almanna- og heilsuøkinum viðvíkjandi fyrisiting, lóggávu og fígging.

Út frá hesari lýsing er tilmæli gjørt til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um, hvussu økið kann verða skipað í sambandi við fullveldi. Tilmælið er góðkent, og niðurstøðan er ein endurgeving av tilmælinum.

Almanna- og heilsuøkið er sera torskilt, tá ið ræður um lóggávu. Tí verður hildið, at neyðugt er at greiða eitt sindur frá hesi lóggávu, áðrenn komið verður til sjálva lýsingina av almanna- og heilsuøkinum.

Tosað verður tíðum um, at føroyingar hava „yvirtikið“ ávís øki sum sermál. Men „yvirtøka“ er sera vítt hugtak. Møguligt er at yvirtaka eitt øki bæði fyrisitingarliga, lógarliga og fíggjarliga ella bert partvíst.

Sambært § 2 í heimastýrislógini kann føroyska heimastýrið yvirtaka eitt mál, soleiðis at føroyingar yvirtaka bæði fyrisitingarligu, lóggevandi og fíggjarligu ábyrgdina frá dønum. Økið er í hesum førum endaliga yvirtikið.

Sambært § 9 í heimastýrislógini eru tveir møguleikar fyri yvirtøkum. 1) Fyri tað fyrsta kunnu vit eftir samráðingar við danir avtala, at vit yvirtaka eitt mál fyrisitingaliga og løgfrøðisliga, soleiðis at bert fíggjarliga ábyrgdin verður verandi í Danmark. 2) Fyri tað annað ber okkum eisini til bert at yvirtaka fyrisitingarligu ábyrgdina av einum málsøki, og danir varðveita so bæði løgfrøðisligu og fíggjarligu ábyrgdina av økinum. § 9 yvirtøkurnar eru tó enn felagsmál millum Føroya og Danmarkar.

Sostatt arbeiða vit við trimum yvirtøkumøguleikum. Allir tríggir møguleikar eru á almanna- og heilsuøkinum.

Tá ið ræður um lóggávu og umsiting er alt almannaøkið yvirtikið sambært § 9 í heimastýrislógini. Tað sama er ikki við heilsuøkinum, serliga ikki lóggávan, sum ásetir fakligu reglurnar á heilsuøkinum.

Mál, sum ikki eru yvirtikin sum sermál sambært heimastýrislógini, eru felagsmál. Tá um heilsuøkið ræður, kunnu hesi mál gerast sermál, tá ið heimastýrið ella danska stjórnin formliga seta fram ynski um, at so skal verða.

Oftast umsita ríkismyndugleikarnir felagsmál, ið sostatt eisini verða regulerað við danskari lóggávu, sum er sett í gildi fyri Føroyar. Hetta er galdandi fyri góðkenningarlógirnar og felagsmál annars á heilsuøkinum.

Almanna- og heilsuøkið kostar uml. 1.3 mia. kr. á føroysku fíggjarlógini. Ein partur av hesum útreiðslum verður í dag rindaður via blokkstuðulin, meðan summar útreiðslur á heilsuøkinum verða rindaðar beinleiðis av dønum, sum t.d. Landslæknin, útreiðslurnar til krígspensión.

## § 2 yvirtøkur

Einastu øki, sum eru yvirtikin sum sermál sambært § 2 í heimastýrislógini á almanna- og heilsuøkinum, eru apoteksverkið og vanlukkutryggingarøkið.

Apoteksverkið varð yvirtikið sum føroyskt sermál í 1948. Lóggávan um apoteksverkið er regulerað við løgtingslóg, og endaliga, fíggjarliga ábyrgdin er í Føroyum, og umsitingin er føroysk. Tó hava danskir myndugleikar eisini uppgávur sambært løgtingslóg um apoteksverkið. Hesir eru Sundhedsstyrelsen, Statens Serumlaboratorium, Statens veterinære institut for virusforskning, ávísir danskir undirvísingarstovnar, ávísir útlendskir skrásetingarmynduleikar, landslæknin í Føroyum og dómsvaldið í Føroyum. Hesir myndugleikar hava stóran serkunnleika á økinum.

Vanlukkutryggingarøkið varð í 1980 yvirtikið sum føroyskt sermál. Síðan vanlukkutryggingarøkið varð yvirtikið, hava ymsir arbeiðsbólkar arbeitt við at gera nýggjar, føroyskar reglur á økinum. Enn eru tó ongar lógir í hesum sambandi endaliga samtyktar á Føroya løgtingi, og sostatt eru enn bert danskar reglur á økinum. Almanna- og heilsumálastýrið arbeiðir í hesum døgum við at eftirkanna uppskotið um nýggja vanlukkutryggingarlóg og væntar at leggja tað fyri Løgtingið á sumri 1999.

Á almanna- og heilsuøkinum eru fleiri løgtingslógir settar í gildi, uttan at málsøkinini samstundis eru yvirtikin sum sermál. Hesar eru t.d. Ll. nr. 18 frá 09.04.1964 um raksturin av hvíldarheiminum Naina, Ll. nr. 111 frá 03.10.1988 um vardar íbúir, Ll. nr. 94 frá 04.10.1984 um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna og løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn.

Eftir heimastýrislógini verður eitt málsøki yvirtikið sum sermál

sambært lista A eftir áheitan frá heimastýrinum ella donsku stjórnini. Hetta verður tulkað soleiðis, at skal slík yvirtøka fara fram, skal heimastýrið formliga boða donsku stjórnini frá, at tað vil taka við økinum. Seinast nevndu lógir eru sostatt ikki formliga yvirtiknar sum sermál. Lóggávan er tó føroysk, og fyrisitingin sambært lógunum er føroysk.

## § 9 yvirtøkur

Tann 6. apríl 1993 varð avtala gjørd ímillum donsku stjórnina og føroyska heimastýrið um, at heimastýrið skuldi yvirtaka ávís øki á almanna- og heilsuøkinum. Við rammulógunum „L.nr. 315 frá 17.05.1995 om sociale ydelser på Færøerne“ og „L. nr. 316 af 17.05.1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne“ varð føroyska heimastýrinum álagt og heimild givin til at áseta reglur fyri uppgávur, veitingar og fyrisiting av almanna- og heilsuverkinum á hesum økjum:

Almannamál:
- Forsorgarhjálp
- Pensiónsskipan
- Serlig tilboð til fólk við sálarligum ella likamligum breki
- Serlig tilboð til fólk við varandi sjúku- ella ellisbreki
- Tilboð til fólk við serligum, sosialum trupulleikum
- Reglur um dagtilboð og hjálp til børn og ung
- Barnagjald til einsamallar uppihaldarar
- Heimahjálp
- Endurútbúgvingarhjálp
- Dagpening við óarbeiðsføri av sjúku, barnsburði ella føðing

Heilsumál:
- Sjúkrahúsverk
- Kommunulæknaskipan
- Heilsusystraskipan
- Heimasjúkrasystraskipan
- Skúlalæknaskipan
- Tannrøktarskipan
- Sjúkratrygging

Allar lógir, sum eru nevndar í rammulógini, eru enn felagsmál og verða ikki sermál, fyrr enn heimastýrið eisini tekur við fíggjarligu ábyrgdini av økinum, ella vil taka við málsøkinum sum sermál. Lógirnar snúgva seg allar um, hvørjar veitingar føroyski borgarin hevur rætt til á almanna og heilsuøkinum.

Rammulógirnar áseta, at tær donsku lógir, ið galda í Føroyum á hesum økjum, verða verandi í gildi, til tær verða avloystar av føroyskum løgtingslógum.

Sambært seinastu avtalu við danir skulu allar løgtingslógir sambært rammulógunum verða lidnar í seinasta lagi 1999.

Hesar løgtingslógir eru settar í gildi við heimild í rammulógunum:

*Ll.nr 71 frá 20.05.1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.o., (við seinni broytingum.)*

*Ll. nr. 89 frá 04.06.96 um Sjúkrahúsverk Føroya, við tilhoyrandi kunngerðum.*

*Ll. nr. 87 frá 06.06.97 um heilsusystratænastuna, við tilhoyrandi kunngerð.*

*Ll. nr. 88 frá 06.06.97 um heimasjúkrasystraskipanina, við tilhoyrandi kunngerð.*

*Ll. nr. 23 frá 06.03.98 um barna og ungdómstannrøkt, við tilhoyrandi kunngerð.*

Á almannaøkinum hevur heimastýrið sostatt ikki enn tilevna flestu løgtingslógirnar sambært rammulógini. Løgtingslóg um almannapensiónir o.a. varð samtykt í Løgtinginum í tingsetuni 1998/99. Viðvíkjandi hinum løgtingslógunum sambært rammulógini: forsorgarlóg, barnaforsorgarlóg og dagpengingalóg, verður miðað ímóti at leggja løgtingslógaruppskot fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

Tá ið hesar lógir eru samtyktar, er alt almannaøkið yvirtikið, tá ið ræður um umsiting og lóggávu. Arbeiðið viðvíkjandi almannalóggávuni verður tó ikki liðugt, tí sambært flestu lógum skulu kunngerðir og vegleiðingar gerast og broytingar verða alla tíðina gjørdar í skipanunum fyri at finna tær bestu loysnirnar til føroysk viðurskifti. Meira sannroynt er tí, at økið verður liðugt skipað innan nøkur ár.

Á heilsuøkinum hevur heimastýrið bert eftir at uppfylla rammulógina fyri kommunulæknaskipan, skúlalæknaskipan og sjúkratrygging. Løgtingslóg um kommunulæknar varð samtykt í Løgtinginum í tingsetuni 1998-1999. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum miðar ímóti at leggja løgtingslógaruppskot um sjúkratrygging og skúlalæknaskipan fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

Tá ið hesar lógir eru samtyktar, eru umsiting og lóggávu á heilsuøkinum yvirtiknar, har talan er um veitingar til borgaran, men ikki, tá ið talan er um heilsufakligar reglur, (sí niðanfyri um góðkenningarlógir og felagsmál annars).

Er talan um rammulógir á heilsuøkinum hevur Sundhedsstyrelsen tó eisini týdningarmiklar, fakligar uppgávur sambært lógunum, ið eru umfataðar av rammulógini, við at hava eftirlit við sjúkrahúsverkinum

og heilsustarvsfólki í Føroyum, og eisini við at áseta ávísar fakligar reglur á økinum. Politisk støða má bert verða tikin til, hvar hetta økið skal verða umsitið í framtíðini, og til støði undir heilsuøkinum. Skulu stórvegis broytingar verða gjørdar, er neyðugt at kanna økið neyvari. Tað eru serliga donsku myndugleikarnir, sum hava ein stóran leiklut í skipanini í dag.

Viðvíkjandi fíggjarligu ábyrgdini eru øll tey nevndu økini yvirtikin sambært § 9 í heimastýrislógini. Løgfrøðisliga merkir hetta, at fíggjarliga høvuðsábyrgdin enn liggur hjá danska fólkatinginum og danska heilsumálaráðharranum.

Stuðulin úr Danmark til føroyska almanna- og heilsuverkið varð til og við 1987 goldin landskassanum sum endurgjald. Tann 9. marts 1987 varð avtala gjørd ímillum donsku stjórnina og landsstýrið, sum broytti endurgjaldsskipanina soleiðis, at stuðulin til almanna- og heilsuverkið í staðin varð útgoldin sum blokkstuðul, samstundis sum donsku heimildirnar til at gera reglur um raksturin av ymsum fyriskipanum í heilsuverkinum duttu burtur.

§ 9 yvirtøkurnar eru felagsmál. Statsrættarliga fíggjarábyrgdin av málsøkjunum liggur hjá danska fólkatinginum og danska ráðharranum. Fólkatingið hevur tó við ríkislógum, (kongligari fyriskipan), latið føroyska heimastýrinum fíggjarskylduna á almanna- og heilsuøkinum. Afturfyri at rinda útreiðslurnar, fær heimastýrið blokkstuðulin.

Sostatt standa útreiðslurnar til nevndu øki á føroysku fíggjarlógini, hóast tað at fíggjarliga høvuðsábyrdin liggur í Danmark.

Spurningurin er tó, um danir í blokkstuðulssamráðingunum fara at leggja dent á, um ymsu økini skulu undir føroyskt málsræði. Dentur verður heldur lagdur á ein generellan niðurskurð í blokkinum, uttan at koma nærri inn á tað løgfrøðiliga við málsræðinum.

Tá ið talan er um, at almanna- og heilsuøkið skal undir føroyskt málsræði fíggjarliga, er trupulleikin, at økið er sera kostnaðarmikið, og at tørvur er á fleiri veitingum, um føroyski borgarin skal fáa eitt nøktandi tilboð frá almanna- og heilsuverkinum. Td. kann verða nevnt, at:

- tørvur er á størri pensiónum til fólka- og avlamispensiónistar,
- tørvur er á fleiri barnaansingarplássum,
- somuleiðis er stórur tørvur á kommunulæknum og læknum í sjúkrahúsverkinum,
- landssjúkrahúsinum tørvar stórar umvælingar,
- sjúkrahúsverkinum tørvar nýggj amboð,
- eldrarøktin má mennast.

Alt hetta eru veitingar, sum kunnu fáa fólk til at støðast betur í

landinum, og sum kunnu skapa ein stabilari arbeiðsmarknað, men sum samstundis hava við sær meirkostnað fyri land og kommunur.

## Góðkenningarlógirnar

Ein góðkenningarlóg er lóg, sum ásetur krøvini til góðkenningarnar hjá heilsustarvsfólki. Lógirnar áseta reglur um, hvørji krøv verða sett til heilsuútbúgvingina, hvør hevur rætt til at fáa góðkenning sum heilsustarvsfólk, og hvørji krøv verða sett teimum aftan á, at tey hava fingið hesa góðkenning. Sundhedsstyrelsen hevur fakliga eftirlitið við øllum góðkendum heilsustarvsfólki.

Góðkenningarlógirnar byggja allar á altjóða krøv til heilsuútbúgvingar. Krøvini til heilsuútbúgvingar eru tey somu í øllum londum í ES og EBS.

Góðkenningarlógir eru felagsmál, og verða tí settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Góðkenningarlógirnar vórðu ikki tiknar við í rammulógina um heilsuverkið, av tí at mett varð ikki, at føroyska heimastýrið hevði tað neyðuga fakliga innlitið á økinum til at áseta føroyskar reglur, og heldur ikki megnaði at halda skipanina við líka við at seta neyðugar lógir í gildi, at dagføra tær og hava fakligt eftirlit við heilsustarvsfólki.

Høvuðsfyrisitingina sambært lógunum hava heilsumálaráðharrin og Sundhedsstyrelsen. Ein lítil frágreiðing um hesar myndugleikar kundi verið viðkomandi í hesum sambandi:

Heilsumálaráðið er ovasti fyrisitingarligi og politiski myndugleiki á heilsuøkinum í Danmark. Áðrenn Heilsumálaráðið varð stovnað, hevði Innanríkisráðið allar uppgávur tess. Har, sum í donskum heilsulógum stendur Innanríkisráðið, er tað sostatt sum oftast Heilsumálaráðið, sum umsitir uppgávurnar nú.

Í Heilsumálaráðnum arbeiða uml. 160 starvsfólk. Heilsumálaráðið er skipað í tríggjar deildir við til samans 8 fakøkjum. Rakstrarjáttanin fyri fíggjarárið 1999 er 103,1 mió.kr.

Sundhedsstyrelsen er stýrið undir Heilsumálaráðnum, sum er samansett av sakkønum á heilsuøkinum. Sundhedsstyrelsen virkar leyst av Heilsumálaráðnum og hevur tær heilsufakligu uppgávurnar á heilsuøkinum um hendi. Rakstrarjáttanin fyri fíggjarárið 1999 er 127,0 mió.kr.

Sum er, hevur føroyska umsitingin stórar trupulleikar við at dagføra góðkenningarlógirnar. Tað krevur størri umsiting, um hetta arbeiði skal verða gjørt til fulnar.

Tá ið góðkenningarlógirnar verða settar í gildi ella dagførdar, verða

næstan ongar broytingar gjørdar afturímóti donsku lógini. Hetta av teirri orsøk, at lógirnar bert snúgva seg um altjóða standardir fyri heilsuligu útbúgvingarnar, og at tað tí ikki eru føroyskar umstøður, sum gera seg galdandi. Hóast hetta, hava slíkar lógir nógva umsiting við sær í Føroyum.

Fyri at geva eina mynd av umsitingini av hesum, skal niðanfyri verða lýst, hvussu mannagongdin er, tá ið slík lógaruppskot eru fyri:

Lógin verður send til hoyringar hjá øllum viðkomandi stovnum. Almanna- og heilsumálastýrið og stovnarnir seta seg gjølla inn í lógartekstin fyri at vita, um eitthvørt skuldi verið broytt afturímóti tí donsku lógini. Tá ið hoyringarsvar eru afturkomin, skal Almanna- og heilsumálastýrið samanskrivað svarini, gera gjølligar viðmerkingar til lógaruppskotið og síðan senda uppskotið til eftirkanningar á lógardeildini á Løgmansskrivstovuni. Lógardeildin setir seg somuleiðis gjølla inn í uppskotið, ger viðmerkingar og sendir stýrinum tær aftur. Stýrið og lógardeildin tosa síðan sínámillum um, um broytingar skulu verða gjørdar í uppskotinum. Uppskotið verður so sent á landsstýrisfund og viðgjørt av øllum samgonguflokkunum sum vanlig lógaruppskot. Á Løgtingi skal uppskotið hava tríggjar viðgerðir umframt nevndarviðgerð sum vanlig lógaruppskot. Eftir at lógaruppskotið er samtykt, verður tað aftur sent Almanna- og heilsumálastýrinum, sum sendir samtykta uppskotið ígjøgnum ríkisumboðið niður til donsku stjórnina. Danski ráðharrin á økinum skal saman við drotningini undirskrivað kongligu fyriskipanina, og síðani lýsir ríkisumboðið fyriskipanina í Kunngerðarblaðnum B. Um broytingar seinni skulu verða gjørdar í lógini, so skal nevnda mannagongd ganga um aftur, og heldur ikki í hesum umfari verða broytingar gjørdar frá tí danska tekstinum.

Sum sæst, so er hetta ógvuliga drúgv mannagongd, sum bæði krevur nógv av umsitingini, og sum ger, at donsku lógirnar ikki fáa gildi í Føroyum fyrr enn fleiri ár aftan á, at lógin er komin í gildi í Danmark. Summar av góðkenningarlógunum eru enn ikki settar í gildi. Tað vanliga er nú, at kongligu fyriskipanirnar verða settar í gildi, men at ov lítil arbeiðsorka er til at broyta fyriskipanirnar, so hvørt sum hesar verða broyttar í Danmark. Tí eru føroysku fyriskipanirnar ofta als ikki dagførdar. Tá samanum kemur, rakar hetta trygdina hjá føroyska borgaranum, tí hann má gjalda fyri, at krøvini til heilsustarvsfólk ikki eru tey somu í Føroyum, sum tey eru aðrastaðni.

Vart verður gjørt við, at umframt tær góðkenningarlógir, sum eru settar í gildi í Føroyum, galda eisini hesar í Danmark: lóg um kiropraktorar, lóg um sálarfrøðingar og lóg um optikarar. Hesar góðkenningarlógir eru enn ikki settar í gildi í Føroyum.

Er talan um fíggjarliga partin, liggur fíggjarliga høvuðsábyrgdin av økinum í Danmark. Allir umsitingarmyndugleikar sambært lógunum eru danskir. Tað merkir, at útreiðslan av at umsita málsøkið verður goldin í Danmark.

Tó verður eisini stór orka løgd í at umsita donsku lógirnar viðvíkjandi heilsuútbúgvingum í føroysku umsitingini við at tilevna kongligar fyriskipanir og dagføra hesar. Ringt er at seta eina ávísa upphædd á, hvussu nógv hetta arbeiði kostar.

Ein loysn á trupulleikanum við góðkenningarlógunum kundi verið, at føroyska heimastýrið gevur dønum ella øðrum landi heimild til at umsita og lóggeva á hesum økinum okkara vegna, soleiðis at tá ið góðkenningarlóg verður sett í gildi ella broytt í Danmark, so verður hon sett í gildi fyri bæði fyri Føroyar og Danmark samstundis. Sum er, verður heimildin til at broyta hesar lógir, soleiðis at tær samsvara við føroysk viðurskifti, kortini so at siga ikki brúkt.

Skal heilsustarvsfólk í Føroyum vera eins gott sum heilsustarvsfólk í Evropa, verður mett, at samstarv má verða fingið í lag við annað land í sambandi við fullveldi. Í galdandi stýrisskipanarlóg ber tó ikki til at lata øðrum stati ræðisrætt á ávísum økjum. Í føroysku grundlógini átti at verið umhugsað at havt eina líknandi reglu sum § 20 í donsku grundlógini um ræðislát, (afgivelse af suværenitet). Danir hava latið ES ræðisrætt at áseta reglur, sum galda beinleiðis fyri danir. Tað átti at verið umhugsað at sett tílíka grein í føroysku grundlógina, soleiðis at tað t.d. bar til at danskar góðkenningarlógir eisini høvdu gildi í Føroyum.

Tað skal tó ikki verða afturvíst, at tað ikki ber til at taka økið undir føroyskt málsræði. Er politiskur vilji til tess, verður mælt til, at gjølligari kanningar verða settar í verk fyri at vita, hvussu hetta skal verða gjørt.

## Felagsmál annars

Umframt § 9 yvirtøkurnar, eru tey øki í almanna- og heilsumálum, sum nevnd eru niðanfyri, felagsmál, og sostatt ikki yvirtikin av føroyska heimastýrinum. Allar hesar lógir eru á heilsuøkinum. Økini kunnu verða býtt upp í lógir, ið snúgva seg um veitingar til føroyska borgaran, og lógir, ið snúgva seg um fakligu krøvini til ávíst heilsuøki.

Kongliga fyriskipanin um fosturtøku er enn felagsmál, men stendur á lista A í heimastýrislógini, (heilsumál), og kann tí verða yvirtikin, tá ið føroyska heimastýrið ella danska stjórnin vilja tað. Danskir myndugleikar sambært lógini eru Heilsumálaráðið og Løgmálaráðið. Lógin snýr seg í høvuðsdráttum um, nær kvinna kann fáa fosturtøku, og hvussu hetta skal fara fram. Talan er um politisku áskoðanina í

samfelagnum til fosturtøku, og um hvat verður hildið at vera sømiligt. Politiska áskoðanin í hesum máli er øðrvísi í Danmark enn í Føroyum.

Kongligu fyriskipanirnar um fyribyrgjandi heilsukanningar og hjálp í sambandi við barnsburð og um tilboð um ókeypis koppseting eru felagsmál. Fyriskipanirnar kunnu sigast at verða partur av føroysku kommunulæknaskipanini, sum føroyska heimastýrið hevur yvirtikið fyrisitingarliga og lóggevandi ábyrgd av í 1995. Talan er ikki um faklig krøv til ávíst heilsuøki, ella um altjóða standard á heilsuøkinum, men lógin ásetir bert reglur um veitingar til borgarar í Føroyum viðv. fyribyrgjandi heilsukanningum av barnakonum. Danskir myndugleikar sambært lógunum eru Heilsumálaráðið, Sundhedsstyrelsen og Statens Seruminstitut.

Kongliga fyriskipanin um sterilisatión og kastratión ásetir reglur um, nær sterilisatión og kastratión kunnu fara fram, og um mannagongdir í hesum sambandi. Danskir myndugleikar sambært lógini eru Løgmálaráðið, Retslægerådet og Landslæknin.

Mett verður, at hesar lógir eiga at verða yvirtiknar. Tær snúgva seg allar um veitingar til borgaran. Tað kann verða umhugsað at yvirtaka hesar lógir, eftir at rammulógirnar á almanna- og heilsuøkinum eru útfyltar.

”Lov om udtagelse af menneskeligt væv“ er sett í gildi við kongligari fyriskipan í Føroyum. Sundhedsstyrelsen hevur týdningarmiklar uppgávur sambært lógini.

Kongliga fyriskipanin um tiltøk viðv. farsóttum skal tryggja, at farsóttir ikki fáa breitt seg í Føroyum og syrgja fyri, at smitta frá hesum sóttum ikki sleppur til Føroya ella úr Føroyum til onnur lond. Sundhedsstyrelsen hevur týdningarmiklar uppgávur sambært lógini. Kongliga fyriskipanin um líkskoðan ásetir fakligar reglur um líkskoðan í Føroyum og hongur saman við, hvat góðkendir læknar kunnu gera í sínum arbeiði. Sundhedsstyrelsen og Landslæknin hava týdningarmiklar uppgávur sambært lógini.

Lóg um „Sundhedsvæsenets Centralstyrelse“ er ógvuliga nágreinilig. Sundhedsstyrelsen, Sundhedsvæsenets Patientklagenævn og Statens Seruminstitut hava umfatandi uppgávur sambært lógini, og hesar uppgávur eru somikið kostnaðarmiklar, at tað verður trupult at hava líka góðar skipanir í Føroyum. Landslæknin sendir uml. 7 kærur um árið til Sundhedsvæsenets Patientklagenævn.

Neyðugt er at hava stóra umsiting á hesum øki, tí lógin setir sera stór krøv um heilsufakligar reglur, ráðgeving av heilsumyndugleikum, eftirlit, serfrøðiligar kanningar og kæruviðgerð. Mett verður, at hetta er neyðugt, fyri at heilsuveitingarnar í samfelagnum skulu verða nøktandi og lúka altjóða krøv.

Lóg um embætislæknar er sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan. Høvuðsuppgávurnar sambært lógini hevur Landslæknin. Danska rakstrarjáttanin til Landslæknan varð í 1998 1,1 mio. kr. Landslæknin er partur av danska Heilsustýrinum og hevur sostatt tætt samstarv við stovnin. Økið krevur, á sama hátt sum góðkenningarlógirnar og „lov om Sundhedsvæsenets Centralstyrelse,“ stóra fakliga vitan um heilsufakligar reglur, ráðgeving av heilsumyndugleikum og eftirlit. Gjølligari kanningar eru neyðugar, til tess at gera eitt skikkað tilmæli um tær uppgávur, ið landslæknaembætið hevur.

Kongligu fyriskipanirnar um sjúklingatrygging og „videnskabsetisk komitésystem“ eru samtyktar í Løgtinginum, men donsku myndugleikarnir hava ikki enn sett tær í gildi fyri Føroyar.

Sambært hesum fyriskipanum eru føroyingar partur av donsku skipanunum. Í viðmerkingunum til lógaruppskotini verður sagt, at tað hevði verið sera dýrt at sett í verk skipanir sum hesar í Føroyum, og at umsitingin hevði verið sera stór. Harumframt hevði verið truput at bygt upp sama serkunnleika sum í Danmark. Mett var tí, at ráðiligast hevði verið at knýtt seg til donsku skipanina.

Lógirnar omanfyri snúgva seg í høvuðsdráttum um heilsufakligan serkunnleika og altjóða krøv til heilsuverk. Lógirnar krevja stóra umsiting og seta stór krøv til starvsfólk um serkunnleika. Spurningurin er tí, á sama hátt sum við góðkenningarlógunum, um ráðiligt er, at hesi øki koma undir føroyskt málsræði, ella um samstarvsavtala í staðin skal verða gjørd við Danmark ella eitt av grannalondum okkara.

Tá ið støða skal verða tikin um hetta, mugu gjølligar kanningar verða gjørdar av, hvussu stór umsitingin av nevndu økjum skuldi verið í Føroyum, og hvussu kostnaðarmikið tað hevði verið at tey komu undir føroyskt málsræði.

## Samstarvsavtalur

Umframt lóggávu hava stovnar undir Almanna- og heilsumálastýrinum eisini formligar og óformligar avtalur við danska statin. Við formligar avtalur verður hugsað um skrivligar avtalur, og við óformligar avtalur verður hugsað um aðrar, munnligar avtalur við Danmark, har uppgávurnar eru kostnaðarmiklar ella krevjandi fyri stovnin.

Sjúkrahúsverkið hevur formligt samstarv við Ríkissjúkrahúsið, og í summum førum við onnur donsk sjúkrahús um serviðgerð av sjúklingum. Hetta rindar sjúkrahúsverkið dønum útreiðslurnar fyri.

Apoteksverk Føroya hevur formligt samstarv við danir ígjøgnum sáttmálan hjá Amternes Lægemiddelregistreringskontor um forskriftir fyri ávísan heilivág. Apotekið er eisini bundið av altjóða sáttmálum, sum Danmark hevur undirskrivað. Føroya landsstýri gjørdi í 1951

sáttmála við Danmarks Apotekerforening, sum gevur teim føroysku apotekunum atgongd at øllum upplýsingum, sum somu apotek fáa í Danmark.

Almannastovan hevur ikki formligt samstarv við Danmark, annað enn tað, sum er ásett í lóggávuni á almannaøkinum. Óformligt samstarv er við „Den sociale sikringsstyrelse“ í sambandi við „Nordisk Konvention om Social Sikring.“ Samstarvið er ókeypis. Viðvíkjandi hesum sáttmálanum hevur Almannastovan tó eisini óformligt samstarv við Ísland og Noreg. Hetta samstarv er eisini ókeypis.

Flestu stovnarnir undir Almanna- og heilsumálastýrinum hava tó ikki formligt, men bert óformligt samstarv við danskar myndugleikar, sum veita teimum ráð og vegleiðing. Hetta er eisini ókeypis.

Eisini er nógv óformligt samstarv við danir um skeið, starvslæru, og út- og eftirútbúgvingartilboð til starvsfólk í almanna- og heilsuverkinum.

Landslæknaembætið er stovnur undir danska Heilsustýrinum og samskiftir tí við donsku myndugleikarnar ókeypis sum ein danskur stovnur.

## Millumlandasáttmálar

Í sambandi við fullveldi fara allir millumlandasáttmálar úr gildi, og vit mugu gera nýggjar sum sjálvstøðug tjóð. Spurningurin er, um sáttmálarnir, sum galda í dag, skulu setast í gildi undir einum fullveldi. Møguliga skuldu vit heldur hugt eftir, hvørjir sáttmálar galda í Íslandi ella øðrum smátjóðum.

Ávísir sáttmálar á almannaøkinum hava stóran týdning fyri Føroyar, ímillum hesar er m.a. „Nordisk konvention om social sikring.“ Hesin sáttmáli varð samtyktur í Løgtinginum tann 12. apríl 1994 og lýstur í Kunngerðarblaðnum B í 1997. Løgtingið samtykti hann uttan fyrivarni, t.e. at allur sáttmálin hevur gildi í Føroyum.

Sáttmálin tryggjar, at føroyingar, sum í frítíðarørindum ella av øðrum orsøkum eru í øðrum Norðurlandi í styttri ella longri tíð, verða javnsettir við aðrar norðurlendskar borgarar. Er sáttmálin ikki í gildi í Føroyum, verða føroyingar forðaðir í á jøvnum føti við aðrar norðurlendingar at fáa sjúkrahjálp, aldurspensión, barnagjald, arbeiðsskaðaveitingar o.s.fr.

Í Danmark er umsiting gjørd til at taka sær av hesum sáttmála, „Den sociale sikringsstyrelse.“ Á stovninum arbeiða uml. 120 fólk.

Í Føroyum er eitt starvsfólk sett á Almannastovuni til at umsita sáttmálan. Starvsfólkið arbeiðir í tøttum samstarvi við „Den sociale sikringsstyrelse“ í Danmark. Sáttmálin hevur stórar útreiðslur við sær. Skulu vit umsita sáttmálan sjálvi, skulu vit hava munandi størri um-

siting, tí sum er verða nógvir trupulleikar greiddir í samstarvinum við „Den Sociale Sikringsstyrelse.“ Eisini verður umsitingin størri, av tí at brøkpensión eisini skal verða roknað av tí arbeiði, sum føroyingar hava gjørt í Danmark.

Sáttmálin um „social bistand og tjenester“ varð lagdur fyri Løgtingið í tingsetuni 1998-99 og verður væntandi samtyktur. Sáttmálin hevur at kalla onga umsiting og/ella fíggjarligan kostnað við sær, men tryggjar føroyskum borgarum forsorgarhjálp, tá ið teir ferðast ella búgva í øðrum Norðurlandi.

“Konvention af 1961 om Europæisk Socialpagt“ er ikki sett í gildi fyri Føroyar, men varð sett í gildi í Danmark í 1965. Sáttmálin hevur við sær tryggar, sosialar rammur fyri føroyskan borgara, sum ferðast ella arbeiðir í evropeiskum landi, á sama hátt sum nevndu, norðurlendsku sáttmálar hava við sær í Norðurlondum. Ríkisumboðið hevur við jøvnum millumbilum sett fram fyrispurning, um heimastýrið vil góðkenna og seta henda sáttmála í gildi fyri Føroyar. Av tí at nógvar skyldur/umsiting og útreiðslur standast av hesum sáttmála, er tað útsett í óvissa tíð at góðkenna hann. Mett verður tó, at hetta er ein tann týdningarmesti sáttmálin á almannaøkinum, og at tað tí átti at verið umhugsað at sett hann í gildi fyri Føroyar.

Á heilsuøkinum galda ávísir týdningarmiklir sáttmálar. Hesir eru m.a.: 1948 15/6 T. 32 Statutter for verdenssundhedsorganisationen, T. 24 19/6-64 Verdenssundhedsorganisationens rettigheder og immuniteter, T. 119 28/2 – 31 International sundhedskonvention, 1963 12/8: T. 28 Europæisk overenskomst om gensidig bistand mht. lægelig specialistbehandling og klimatkur.

Væntandi verður „konvention af 4. april 1997 om beskyttelse af menneskerettigheder og menneskelig værdighed i forbindelse med anvendelse af biologi og lægevidenskab“ løgd fyri Løgtingið til samtyktar í tingsetuni 1999-2000.

Tað eigur at verða umhugsað at seta nevndu sáttmálar í gildi aftur í sambandi við fullveldi. Kanningar mugu verða settar í verk, hvussu nógv hesir sáttmálar kosta at umsita í Føroyum, ella um samstarvað skal verða við eitt av grannalondum okkara.

FØROYA LANDSSTÝRI 1999